# Pensjónsnýskipan



## Uppskot
## til
## Pensjónsnýskipan

**2011**

## Løgtingið - Pensjónsnyskipan 2011:

Løgtingsmál nr. 157/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.
Løgtingsmál nr. 155/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
Løgtingsmál nr. 168/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl.
Løgtingsmál nr. 160/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg.
Løgtingsmál nr. 162/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti.
Løgtingsmál nr. 167/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
Løgtingsmál nr. 164/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting av lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.
Løgtingsmál nr. 156/2010: Uppskot til løgtingslóg um javning av fólkapensjón.
Løgtingsmál nr. 170/2010: Uppskot til løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn.
Løgtingsmál nr. 165/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentutrygging v.m.
Løgtingsmál nr. 161/2010: Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.
Løgtingsmál nr. 158/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið.

Lagt fyri Løgtingið 1. mars 2011:
Rósa Samuelsen (landsstýriskvinna í Almannamálum),
Aksel V. Johannesen (landsstýrismaður í Fíggjarmálum) og
John Johannessen (landsstýrismaður í Heilsumálum).

Fyrivarni verður tikið fyri villum, samstundis sum mint verður á, at bert lógarteksturin í kunngerðarblaðnum hevur løggildi.

Uppskot til pensjónsnýskipan
© 2011, Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið
Uppseting: Fíggjarmálaráðið
Útgávan kann takast niður frá www.fmr.fo

# Innihaldsyvirlit

**Almennar viðmerkingar til pensjónsnýskipanina** ................................ 1

**Semja um pensjónsnýskipan** ................................................................ 7

**Fíggjarligt yvirlit** ................................................................................ 11

**Høvuðsyvirlit yvir lógaruppskot** ........................................................ 17

**Serstøk lógaruppskot** .......................................................................... 19

*Fólkapensjón:*

157. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um áseting og javning av almannaveitingum .................... 19

155. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um almannapensjónir o.a.. ................................................. 41

168. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl. ................................ 55

160. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um almenna forsorg ........................................................... 63

162. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um áseting av skatti ............................................................ 67

167. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um landsskatt og kommunuskatt ........................................ 73

164. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um broyting av lóg um arbeiðsmarknaðar-
eftirlønargrunn .................................................................. 81

156. Uppskot til løgtingslóg
um javning av fólkapensjón ............................................... 85

*Persónlig samansparing:*
170. Uppskot til løgtingslóg
um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn................. 93

165. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um rentutrygging v.m.................................................... 131

*Stovnsuppihald:*
161. Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg
um uppihald á stovni o.l.................................................. 135

158. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg
um sjúkrahúsverkið........................................................ 139

**Skjøl:**

**Yvirlit yvir hoyringspartar ..........................................................Skjal 1**

**Hoyringssvar**

Almannastovan......................................................................**Skjal 2**
Betri Pensjón.........................................................................**Skjal 3**
Fakfelagssamstarvið..............................................................**Skjal 4**
Farmakonomforeningen ........................................................**Skjal 5**
Felagið Føroyskir Peningastovnar.........................................**Skjal 6**
Føroya Arbeiðsgevarafelag ...................................................**Skjal 7**
Føroya Kommunufelag .........................................................**Skjal 8**
Føroya Skipara- og Navigatørfelag.......................................**Skjal 9**
Innlendismálaráðið..............................................................**Skjal 10**
Kommunusamskipan Føroya................................................**Skjal 11**
Lærarafelagið .......................................................................**Skjal 12**
Landsfelag Pensjónista.........................................................**Skjal 13**
Lív...... .................................................................................**Skjal 14**
MBF... ..................................................................................**Skjal 15**
Nærverkið ............................................................................**Skjal 16**
Pharma Danmark..................................................................**Skjal 17**
SAMTAK..............................................................................**Skjal 18**
Ríkisstovnar .........................................................................**Skjal 19**
Tryggingareftirlitið...............................................................**Skjal 20**

**Pensjónsnýskipan 2009 – Uppskot til eina haldføra**

**pensjónsskipan fyri Føroyar .......................................................Skjal 21**

# Almennar viðmerkingar til pensjónsnýskipanina

Í framtíðini verður talið av eldri fólki størri, meðan talið av arbeiðsførum spakuliga minkar. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst. Við einum nógv størri tali av pensjónistum fara útreiðslurnar til pensjónir og til røkt av eldri fólki at vera nógv størri enn í dag.

Útreiðsluvøksturin verður so stórur, at tað fer ikki at bera til at hækka skattin svarandi til útreiðsluvøksturin. Tað er tí neyðugt at gera tiltøk nú, sum gera, at útreiðsluvøksturin ikki verður so stórur.

## Endamál við nýskipanini

Í einum vælferðarsamfelagi sum okkara er tað týdningarmikið, at øll fáa eina virðiliga og góða tilveru, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum. Skipanin av pensjóns- og eftirlønarøkinum er tí ein týðandi lutur í øllum vælferðarsamfeløgum.

Í arbeiðinum við pensjóns- og eftirlønarviðurskiftunum er skattafíggjaða inntøkan kallað pensjón, meðan tann uppsparingsfíggjaða inntøkan er kallað eftirløn. Ein týðandi partur av arbeiðinum er at fáa eitt gott samspæl millum hesi bæði sløgini av pensjónistainntøkum.

Pensjóns- og eftirlønarskipanir hava tvey høvuðsendamál:

1. Ein javnan av inntøku til pensjónistar við eini lágari inntøku og harvið at fyribyrgja fátækradømi millum tey eldru.

2. Varðveita eina rímiliga inntøku, tá fólk fara frá eini tilveru sum løntakarar til tilveruna sum pensjónistar.

Annað endamálið við nýskipanini er at gera eina pensjóns- og eftirlønarskipan, sum er haldfør, te. at hon tolir, at talið av pensjónistum verður munandi hægri enn í dag.

Hitt endamálið er at tryggja almennu tænasturnar uppá longri sikt. Hetta kann bert gerast við at gera fíggjarlógina haldføra, te. umskipa útreiðslumynstrið, so at nóg mikið verður til almennu tænasturnar, sjálvt um talið av pensjónistum verður munandi hægri enn í dag.

## Yvirskipað endamál

At gera eina fíggjarliga haldføra eftirlønar- og pensjónsskipan, sum tryggjar øllum eina rímiliga inntøku, tá tey gerast pensjónistar, og sum tryggjar, at almennu myndugleikarnir kunnu veita borgarunum hóskandi vælferðartænastur, eisini við einum stórum vøkstri í talinum av eldri fólki.

## Fleiri eldri og sama tal av arbeiðsførum

Tær almennu pensjónsskipanirnar eru undir trýsti í flestu londum, tí talið av pensjónistum økist skjótari enn talið av fólki í arbeiðsførum aldri. Avbjóðingin er hin sama fyri føroyska samfelagið, sum hon er í flest øðrum londum, nevniliga at í framtíðini verða færri fólk í arbeiðsførum aldri í mun til eldri fólk.

Talið av eldri fólki veksur skjótt, meðan talið av fólki í arbeiðsførum aldri mest sum stendur í stað. Henda gongdin førir við sær, at pensjónsútreiðslurnar, ellisrøktarútreiðslurnar og sjúkrarøktarútreiðslurnar fara at veksa skjótt. Tað, at talið av arbeiðsførum ikki veksur, ger hinvegin, at útlit eru til, at inntøkur landskassans ikki fara at veksa so skjótt í framtíðini.

Um einki verður gjørt, so hendir í fyrsta lagi tað, at tað almenna fer ikki longur at kunna útinna vælferðartænasturnar innan skúlaverk, heilsuverk og almannaverk. Í øðrum lagi verður skattatrýstið so høgt, at vandi er fyri fólkafráflyting.

## Økt uppsparing ella hægri skattir og verri vælferð

Embætismannafrágreiðingin "Pensjónsskipan 2009" varð løgd fram í juni 2009 (skjal 21). Í hesi frágreiðing er greitt frá fleiri hættum at fíggja ella minka um stóru útreiðsluhækkingarnar.

1. **Hækka skattatrýstið, fyri at fíggja øktu útreiðslurnar til pensjónir og røktartænastur.** Av tí, at útreiðslurnar fara at hækka sera nógv, og skattatrýstið er sera høgt frammanundan, verður mett, at skattahækking bert kann bera ein lítlan part av útreiðsluøkingini. Tess meiri virkin tiltøkini undir 2, 3 og 4 verða, tess minni verður skattahækkingin.

2. **Hækka pensjónsaldurin og harvið minka um talið á teimum, sum fáa fólkapensjón.** Embætismannafrágreiðingin mælir til, at pensjónsaldurin spakuliga verður hækkaður næstu 40 árini fyri at minka pensjónsútreiðslurnar í framtíðini.

3. **Minka um fólkapensjónina hjá teimum, sum hava arbeiði ella sum hava eina góða uppsparda eftirløn.** At inntøkujavna pensjónsútreiðslurnar fyri at minka um samlaðu pensjónsútreiðslurnar verður longu gjørt við verandi lóggávu. Embætismannafrágreiðingin mælir til at minka mótrokningarprosentið, sum nú er 60 prosent, so langt niður sum gjørligt. Endamálið er at stimbra fólki at spara upp til eftirløn og at stimbra teimum at arbeiða eftir 67 ára aldur, so nógv sum hugur og orka røkka.

4. **Økja um samansparingina hjá hvørjum einstøkum.** Hvør einstakur fær harvið eina munandi eftirløn og fær tí ikki so stóra fólkapensjón. Embætismannafrágreiðin mælir til at øll, ið kunnu, skulu spara saman til eftirløn. Hetta fer at gera, at fólk í størri og størri mun fara at hava stórar eftirlønarsamansparingar og góðar eftirlønir. Hetta fer at føra til, at tey eftir eitt áramál fara at hava minni tørv at fáa fólkapensjón. Harvið minkar útreiðsluvøksturin til fólkapensjónsútreiðslur í framtíðini.

5. **Broyta samansetingina av eftirlønaruppsparingini so minni partur fer til kapitaleftirløn og meir fer til leypandi útgjøld yvir longri áramál. Broyta útgjaldstíðarskeiðið, so eftirløn bert kann útgjaldast frá og við pensjónsaldrinum.** Í embætismannafrágreiðingini verður greitt frá, at um eftirlønarsamansparingin verður útgoldin í einum og áðrenn pensjónsaldur, so er eingin trygd fyri, at eftirlønarsamansparararar hava nakra egininntøku at liva av í pensjónsárunum. Við verandi samansparingarmynstri fer landskassin bæði at geva skattafrádrátt til eftirløn, og kortini gjalda fulla fólkapensjón til øll. Í embætismannafrágreiðingini verður mælt til at broyta útgjaldsleistin, so landskassin bert gevur frádrátt til eftirlønarsamansparing, sum tryggjar, at samanspararin hevur eina støðuga egininntøku í nógv ár eftir, at hann er vorðin pensjónistur.

## Broytingaruppskot hjá politiska fylgibólkinum

Ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum á tingi hevur síðan heystið 2009 arbeitt víðari við uppskotunum úr embætismannafrágreiðini. Politiski fylgibólkurin hevur havt fundir við nógvar partar, sum hava áhuga í málinum, og somuleiðis hevur bólkurin sent lógaruppskotini í hoyring summarið 2010.

Í november 2010 varð semja gjørd millum flokkarnar í politiska fylgibólkinum. Semjan er grundarlagið undir pensjónsnýskipanaruppskotinum, sum nú verður lagt fram. Semjan sæst á síðu 7-10.

Politiski fylgibólkurin hevur gjørt broytingaruppskot á fleiri týðandi økjum:

Til 1. Skattatrýstið fer at hækka munandi komandi árini. Pensjónsnýskipanin fer ikki at forða fyri útreiðsluhækking og skattahækking. Pensjónsnýskipanin tekur tó burtur umleið helvtina av útreiðsluvøkstrinum.

Til 2. Fylgibólkurin hevur ikki tikið nakra støðu til um, ella í hvønn mun, hækking av pensjónsaldrinum kann viðvirka til at minka vøksturin í pensjónsútreiðslunum. Fylgibólkurin fer seinni at arbeiða víðari við pensjónsaldrinum, m.a. at arbeiða við virknum eldrapolitikki og við at gera tað lættari hjá fólki at fáa eitt meira smidligt og stigvíst skifti frá arbeiðslívinum til pensjónistalívið.

Til 3. Politiski fylgibólkurin tekur undir við at inntøkujavna fólkapensjónina. Hesin háttur at minka um útreiðslurnar verður longu nýttur nú. Fylgibólkurin hevur gjørt uppskot til skiftisskipan, sum eftir 10 árum broytir mótrokningarskipanina frá verandi leisti til ein nýggjan. Mótrokningarprosentið minkar støðugt hesi 10 árini.

Til 4. Politiski fylgibólkurin tekur undir við, at øll tey, ið kunnu, skulu spara saman til egna eftirløn.

Til 5. Politiski fylgibólkurin tekur undir við, at frádráttur bert verður givin til samansparing við einum útgjaldsleisti, sum tryggjar, at samansparari hevur støðuga inntøku í fleiri ár eftir at hann er vorðin pensjónistur.

**Pensjónsnýskipanin í stuttum**

*Eftirlønarsamansparing:*

- Øll, sum eru knýtt til arbeiðsmarknaðin skulu gjalda 15 % til eina bundna eftirlønarsamansparing.

- Samansparingin er persónlig og skal verða útgoldin sum lívlang veiting og lutaeftirløn. Við pensjónsaldur verður møguligt at fáa eitt kapitalútgjald.

*Fólkapensjón:*

- Bundna eftirlønarsamansparingin ger tað møguligt at minka um útreiðslurnar til fólkapensjón.

- Í framtíðini verður mótroknað í allari fólkapensjónini. Mótrokningarfría upphæddin verður minni, og mótrokningarprosentið verður lækkað.

- Útgjaldið úr Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum verður hækkað, og verður sum í dag goldin øllum pensjónistum uttan mun til inntøku.

- Mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin.

Á Almannaøkinum verður bøtt um viðurskiftini hjá búfólkum á ávísum stovnum. Búfólk á psykiatriska deplinum, ymsum bústovnum, røktarheimum og ellisheimum, sum í dag fáa niðursetta pensjón (lummapengar), fara framyvir at fáa fyritíðarpensjón ella fólkapensjón og gjalda fyri uppihaldið á stovninum.

Tann bundna samansparingin og broytingarnar í fólkapensjónini verða sett í verk við einari stigvísari skiftiskipan yvir 10 ár.

Fyri at fíggja tiltøkini, sum eru gjørd á almannaøkinum, um FASarar og skiftisskipanir, verður skotið upp, at eykaskatturin á háinntøkur, sum skuldi fara úr gildi í 2012, heldur fram til og við 2014.

**Fíggjarligar avleiðingar av pensjónsnýskipani**

Uppskotið til pensjónsnýskipan, sum við hesum verður lagt fyri Løgtingið, fer at minka um vøksturin í eldraútreiðslunum við umleið 50%. Vøksturin verður framvegis stórur og neyðugt verður at gera fleiri tiltøk í komandi árum.

Pensjónsnýskipanin ger tó, at útreiðsluvøksturin ikki verður so ógvusligur, og førir tí til, at tey tiltøkini, sum gerast skulu í framtíðini ikki gerast so stór og knapplig, sum tey annars høvdu verið.

Argir, 1. mars 2011

| | |
|---|---|
| **Rósa Samuelsen**<br>landsstýriskvinna | **Aksel V. Johannesen**<br>landsstýrismaður |

# Pensjónsnýskipan 2012
# Semja millum politisku flokkarnar í fylgibólkinum

*Talið av eldri fólki í Føroyum er skjótt vaksandi, meðan talið av arbeiðsførum verður nærum óbroytt. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst. Endamálið við pensjónsnýskipanini er at skipa viðurskiftini soleiðis, at vit fáa eina fíggjarliga haldføra eftirlønarskipan, ið tryggjar øllum pensjónistum ein virðiligan og góðan aldurdóm.*

Semjan er ein stuttorðað lýsing av høvuðsbroytingunum í pensjóns- og eftirlønarviðurskiftunum, sum politiski fylgibólkurin hevur viðgjørt.

Fólkapensjón, bruttofisering.
Politiski fylgibólkurin skjýtur upp at:
Pensjónsveitingar verða gjørdar skattskyldugar og pensjónsveitingarnar verða samstundis hækkaðar, so at pensjónistur við ongari lønar- og eftirlønarinntøku hevur somu upphædd eftir sum áðrenn umleggingina.

Fólkapensjón, grundupphædd og viðbøtur.
Fólkapensjónsveitingarnar eru í dag samansettar av grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar.

Politiski fylgibólkurin skjýtur upp at:
Fólkapensjónin verður bert ein upphædd, og at mótroknast kann í allari upphæddini.
Grundupphæddin verður tó varðveitt í einum 6 ára skiftistíðarskeiði:
Grundupphæddin hjá giftum verður 4.500 kr./mð. árini 2012-2017.
Grundupphæddin hjá støkum verður 6.500 kr./mð. árini 2012-2014, og 4.500 kr./mð. árini 2015-2017.

Mótrokning.
Við verandi skipan verður mótroknað í fólkapensjónsviðbótini við 60 % av inntøku yvir 60.400 kr.
Politiski fylgibólkurin skjýtur upp at:
Mótroknað verður í fólkapensjónini við 50 % av allari inntøku yvir 59.000 kr. í 2012.
Mótroknað verður við 45 % av allari inntøku yvir 58.000 kr. í 2013.
Mótroknað verður við 45 % av allari inntøku yvir 56.000 kr. í 2014.
Mótroknað verður við 40 % av allari inntøku yvir 54.000 kr. í 2015.
Mótroknað verður við 40 % av allari inntøku yvir 52.000 kr. í 2016.
Mótroknað verður við 40 % av allari inntøku yvir 50.000 kr. í 2017.
Mótroknað verður við 35 % av allari inntøku yvir 40.000 kr. í 2018 og 2019.
Mótroknað verður við 30 % av allari inntøku yvir 30.000 kr. í 2020 og frameftir.

Fólkapensjón, mótrokning millum hjúnafelagar.
Mótrokning millum hjúnafelagar verður avtikin í 2012.

Fólkapensjón, javning.
Við verandi skipan verður fólkapensjónsgrundupphæddin ikki javnað.
Fólkapensjónsviðbótin, og viðbót til ávísar pensjónistar verða javnaðar við 1 % árliga.
Politiski fylgibólkurin skjýtur upp, at:
Nýggja samlaða fólkapensjónin verður javnað við miðal av prosentvísu hækkingini av sáttmálalønini og prosentvísu hækkingini av prístalinum.
Pensjónin kann tó ikki hækka meir enn prosentvísa hækkingin av sáttmálalønini.

Flyting av skattainntøkum frá kommunum aftur til landskassan.
Kommunukassar fáa eina stóra eykainntøku orsakað av, at pensjónsútreiðslurnar hjá landskassanum verða hækkaðar. Fyri at taka hesar eykainntøkur innaftur frá kommunukassunum til landskassan, verða kommunuskattaprosentini lækkað 1,25% og landsskattaprosentini hækkað 1,25%.

Politiski fylgibólkurin skjýtur upp at:
Avtala verður gjørt við kommunurnar um, at landið fær meirinntøkuna frá bruttofiseringini aftur til landskassan. Landskassin fær meirinntøkuna hjá kirkjuni av bruttofiseringini innaftur við at lækka játtanina til kirkjuna á fíggjarlógini.

Hámark fyri kommunuskattaprosent hjá pensjónistum.
Hámark á 19,75(21) prosent verður sett fyri kommunuskattaprosentið hjá pensjónistum.

Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.
Inngjaldið hækkar úr 1,75 % til 2 % frá 1. januar 2012.
Útgjaldið hækkar úr 32.280 kr. um árið (2.690 kr. um mánaðin) upp í umleið 36.900 kr. um árið (umleið 3.075 kr. um mánaðin).

Bundna eftirlønaruppsparingin.
Lóg um bundnu uppsparingina verður sett í gildi frá 1. januar 2012. Inngjaldið skal í minsta lagi vera 1,5 % fyrsta árið, og hækkar við 1,5 prosentstigum um árið og verður 15 % í 2021.

Bundna uppsparingin og sjálvbodna uppsparingin verða lagdar saman til eina eftirlønaruppsparing. Bundna og sjálvbodna uppsparingin fáa sama rætt til skattafrádrátt.

Vanligar uppsparingar skulu útgjaldast eftir niðanfyristandandi leisti:

Kapitalútgjald: í mesta lagi 10 % av uppsparingini

Av restini:
Lívlang veiting: í minsta lagi 50 % av uppsparingini
Ratueftirløn: í mesta lagi 50 % av uppsparingini

Fyri stórar uppsparingar, har lívlanga veitingin er komin upp á 80 % av eini arbeiðaraløn, kann ein størri partur enn ásett í vanligu reglunum fara til ratueftirløn.

Pensjónsaldurin.
Pensjónsaldurin verður ikki viðgjørdur á hesum sinni. Ætlanin er, at politiski fylgibólkurin skal arbeiða víðari við pensjónsaldrinum, m. a. at arbeiða við virknum eldrapolitikki og við at gera tað lættari hjá fólki at fáa eitt meira smidligt og stigvíst skifti frá arbeiðslívinum til pensjónistalívið.

Fólk, ið fáa niðursetta pensjón.
Bústovnarnir fyri vaksin á psykiatriska økinum og bústovnarnir fyri vaksin undir trivnaðartænastuni verða umskipaðir til sambýli. Fyritíðarpensjónistar, ið búgva á røktarheimum koma eisini undir hesa skipan, so teir í framtíðini fáa fyritíðarpensjón og fara at gjalda fyri uppihald á stovninum. Tey fólkini, sum í dag búgva á psykiatriska deplinum verða eisini umfataði av broytingini, t. e. at hesi fólk eisini fáa fyritíðarpensjón og fara at gjalda fyri uppihaldið.

Fólkapensjónistar, sum búgva á ellis- og røktarheimum.
Fólkapensjónistar, sum búgva á ellis- og røktarheimum, bústovnum og psykiatriska deplinum fáa niðursetta pensjón og útgjald frá samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Politiski fylgibólkurin skjýtur upp at:
Omanfyrinevndu fólkapensjónistar varðveita fólkapensjón og fara at gjalda fyri uppihald á stovninum.

Búfólk á eldrasambýlum umframt omanfyrinevndu búplássum fara at fáa somu veiting í pensjón, svarandi til støk og fara at rinda sama gjald fyri uppihald v.m.

Eykaskatturin á háinntøkur heldur fram til 2014.
Eykaskatturin upp á 2% á inntøkur omanfyri 400.000 kr./ár heldur fram til og við 2014.

*Í politiska fylgibólkinum, sum hevur luttikið í arbeiðinum við pensjónsnýskipani, hava verið:*

Helgi Abrahamsen (Sambandsflokkurin)
Óli Breckmann (Fólkaflokkurin)
Annita á Fríðriksmørk (Tjóðveldi)
Karsten Hansen (Miðflokkurin)
Kári P. Højgaard (Sjálvstýrisflokkurin)
Bergtóra Høgnadóttir Joensen (Tjóðveldi)
Bjørn Kalsø (Sambandsflokkurin)
Jákup Mikkelsen (Fólkaflokkurin)
Andrias Petersen (Javnaðarflokkurin)
Hans Pauli Strøm (Javnaðarflokkurin)

Aksel V. Johannesen (landsstýrismaður í fíggjarmálum)
Jóannes Eidesgaard (fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum)
Rósa Samuelsen (landsstýriskvinna í almannamálum)

*Argir, tann 28. februar 2011*

# Fíggjarligt yvirlit

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit yvir avleiðingarnar av pensjónsnýskipani. Talva 1 vísir hækkingina av eldraútreiðslununum áðrenn og eftir pensjónsnýskipanina. Talva 2 vísir positivu ávirkanina á fíggjarlógina av pensjónsnýskipani í árunum frá 2012 til 2050. Talva 3 vísir ávirkanina av bruttofiseringini. Talva 4 vísir útreiðslur til íverksetan og kunning í 2011.

## Vøkstur í eldraútreiðslunum

Tá talið av eldri fólki veksur, veksa eisini eldraútreiðslurnar á fíggjarlógini. Eldraútreiðslurnar fevna um útreiðslur til fólkapensjón, útgjald frá samhaldsfasta, ellisheim, heimarøkt og heilsuútreiðslur. Útgjald frá samhaldsfasta er tó ikki á fíggjarlógini.

**Talva 1: Eldraútreiðslur áðrenn og eftir pensjónsnýskipan.**

| *(mió. kr. í føstum prísum)* | **2012** | **2015** | **2020** | **2030** | **2040** | **2050** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eldraútreiðslur áðrenn nýskipan | 1.359 | 1.480 | 1.658 | 2.088 | 2.577 | 2.642 |
| ***Vøkstur*** | **-** | **120** | ***299*** | ***729*** | ***1.217*** | ***1.283*** |
| Útreiðsluminking og inntøku-hækking av nýskipan | 0 | 1 | 64 | 227 | 483 | 692 |
| Eldraútreiðslur eftir nýskipan | 1.359 | 1.479 | 1.594 | 1.862 | 2.094 | 1.951 |
| ***Vøkstur*** | ***-0*** | **119** | ***234*** | ***502*** | ***734*** | ***591*** |
| *Prosent av útreiðsluvøkstri sum nýskipanin tekur burtur* | | 1% | 22% | 31% | 40% | 54% |

Í talvu 1 sæst, at um ongi tiltøk vera framd, fara eldraútreiðslurnar at veksa frá umleið 1,36 mia. kr. árliga í 2012 til góðar 2,6 mia. kr. árliga í 2050. Men longu í 2020 eru útreiðslurnar øktar við 300 mió. kr. í mun til í dag, og fram til 2030 veksa tær við meir enn 700 mió. kr. Eitt av høvuðsendamálunum við pensjónsnýskipanini er at minka um henda bráðvøkstur.

Tiltøkini í hesum fyrra parti av pensjónsnýskipanini eru í høvuðsheitum:

1) at fáa øll at spara upp til egna eftirløn, og harvið minka um fólkapensjónsútreiðslurnar og økja um skattainntøkurnar upp á longri sikt,
2) at broyta mótrokningarreglurnar, so tað fer at loysa seg betri hjá fólki yvir 67 ár at arbeiða.

Hesar broytingar fara at gera tað møguligt at fíggja vøksturin í vælferðartænastunum til eldri.

Um hesin fyrri parturin av pensjónsnýskipanini verður framdur, so fara útreiðslurnar bert at veksa upp í umleið 2 mia. kr. árliga. Tiltøkini í pensjónsnýskipanini fáa veksandi týdning sum frá líður. Fram til 2020 tekur pensjónsnýskipanin bert 25-30 prosent av

útreiðsluvøkstrinum fram til 2020 burtur, og fram til 2030 tekur pensjónsnýskipanin bert 30-35 prosent av vøkstrinum burtur. Ikki fyrr enn seint í 2040unum fær pensjónsnýskipanin fullan virknað.

Orsøkin til, at tiltøkini fáa so nógv størri virknað, sum frá líður, er, at tað tekur langa tíð áðrenn samansparda eftirlønin er nóg stór til, at hon heilt ella partvís kann setast í staðin fyri fólkapensjónina.

Umframt henda fyrra partin av pensjónsnýskipanini er ætlanin seinni eisini at arbeiða víðari við tí partinum av pensjónsnýskipanini, sum snýr seg um pensjónsaldurin, serliga at gera skifti frá arbeiðslívinum til pensjónistalívið meir smidligt og meir stigvíst, og at økja um áhugan hjá fólki at vera longri á arbeiðsmarknaðinum.

## Tiltøk í pensjónsnýskipanini og ávirkan á fíggjarlógina

Í pensjónsnýskipanini verða framd ein røð av tiltøkum, sum skulu minka um útreiðslurnar til almennar pensjónir og økja um inntøkur landskassans. Eisini eru nøkur tiltøk, sum bøta um ymisk viðurskifti innan almannaøkið. Hvørji tiltøk talan er um, og hvussu tey ávirka fíggjarlógina sæst í talvu 2. Tiltøkini eru nærri útgreinað í lógaruppskotunum um einstøku tiltøkini.

**Talva 2: Ávirkan á fíggjarlógina frá 2012-2050.**

| *(mió. kr. í føstum prísum)* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | | | | | | |
| **1. Mótrokning, bruttofisering og samansparing** | | | | | | | | |
| Broytt mótrokning og bruttofisering | 12,3 | 11 | 12 | 13 | 23 | 12 | 6 | 0 |
| Økt samansparing, skattur og mótrokning | 0,0 | 1 | 2 | 3 | 22 | 99 | 234 | 355 |
| **2. Minni útreiðslur av ikki at javna við fullari lønarjavning** | 0,0 | 4 | 11 | 18 | 55 | 153 | 281 | 375 |
| **3. Eykaskattur (heldur fram til 2014)** | 13,0 | 13 | 13 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur tilsamans** | **25,3** | **29** | **37** | **34** | **101** | **263** | **521** | **730** |
| **Útreiðslur:** | | | | | | | | |
| **4. Almannaveitingar, sum koma í staðin fyri løn, hækka við pensjónsinngjaldinum:** | | | | | | | | |
| Sjúkradagpeningur | 0,5 | 1 | 1 | 2 | 4 | 5 | 5 | 5 |
| Barnsburðargjald | 0,2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Forsorgarv. sum koma í staðin fyri løn | 0,8 | 2 | 2 | 3 | 7 | 8 | 8 | 8 |
| **5. SAMEG, arbeiðsgevarapartur landskassans** | 5,3 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| **6. FASarar fáa frádrátt fyri eftirlønarinngjøld (frá 2014)** | - | - | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 |
| **7. Tiltøk innan almannaøkið:** | | | | | | | | |
| Avtøka av mótrokning millum hjúnafelagar | 2,0 | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 4 | 4 |
| Pensjón til psykiskt sjúk á stovni | 1,9 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Pensjón til búfólk undir trivnaðartænastuni | 4,0 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 |
| Minnikostnaður vegna egingjald hjá búfólki | -1,4 | -1 | -1 | -1 | -1 | -1 | -1 | -1 |
| Pensjón til fyritíðarpensjónistar á ellisheimum | 0,6 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Pensjón til pensjónistar á ellisheimum | 3,0 | 3 | 3 | 3 | 4 | 5 | 5 | 5 |
| **8. Skiftiskipanir:** | | | | | | | | |
| Endurgjald til kommunur vegna kommunuskattahámark | 6,6 | 7 | 7 | 7 | 3 | 0 | 0 | 0 |
| **9. Umsiting:** | | | | | | | | |
| Rakstur hjá TAKS framyvir | 1,8 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **25,2** | **27** | **31** | **33** | **36** | **36** | **38** | **38** |
| **Fíggjarlógin tilsamans** | **0,1** | **2** | **6** | **1** | **64** | **227** | **483** | **692** |

Tølini í talvu 2 eru fyri 2012 ein ítøkilig meting av inntøkum og útreiðslum á fíggjarlógini. Um pensjónsnýskipanin verður samtykt av Løgtinginum, skulu hesar broytingar takast við í fíggjarlógina fyri 2012. Tey fyrstu fýra árini førir pensjónsnýskipan ikki til nakran bata á fíggjarlógini, men frá 2015 tálmar pensjónsnýskipanin útreiðslurnar á fíggjarlógini meira og meira.

Fyri at varðveita minstuupphædd til fólkapensjónistar (fyrrverandi grundupphædd), verður eykaskatturin á háinntøkur longdur tey trý árini 2012-2014.

Tølini frá 2015-2050 eru meira yvirskipaðar metingar av búskaparligu ávirkanini á fíggjarlógina. Búskaparliga gongdin, broytingar í fólkatalinum ella til dømis ein broyttur arbeiðshugur hjá pensjónistum, kunnu tó gera, at upphæddirnar í einstøku árunum gerast øðrvísi. Talan er tó um, at gongdin er hin sama, men at hon verður forskotin við nøkrum árum, um broytingar henda.

Ongin ivi er tó um, at eldraútreiðslurnar í framtíðini fara at veksa munandi, tí talið av eldri fólki longu nú er kent. Ei heldur er nakar ivi um, at tiltøkini, sum nú verða løgd fyri Løgtingið við pensjónsnýskipani, fara at minka munandi um vøksturin í eldraútreiðslunum. Økta persónliga eftirlønarsamansparingin fer at gera, at útreiðslur til fólkapensjónina yvir tíð fara at minka, og at skattainntøkurnar frá pensjónistum fer at veksa. Harumframt fer ein føst javning av fólkapensjónini við eini javning, sum er minni enn lønarvøksturin, at minka um tørvin fyri knappligum og kostnaðartungum politiskum tiltøkum.

**Talva 3: Bruttofisering av fólkapensjónini. (Útgreining av punkti 1 í talvu 2)**

| *(mió. kr. í føstum prísum)* | **2012** |
|---|---|
| Hækking av fólkapensjónsútreiðslum (íroknað mótrokning) | -190,2 |
| Landsskattur | 99,0 |
| Kommunuskattur | 101,7 |
| Kirkjuskattur | 2,9 |
| **Almennir kassar tilsamans** | 13,5 |
| | |
| *Ávirkan á fíggjarlógina:* | |
| Landskassin netto (-190,2+99) | -91,1 |
| Skattaflyting til landið frá kommununar (1,25%) | 100,5 |
| Lækking av játtan til kirkjuna | 2,9 |
| **Fíggjarlógin tilsamans** | **12,3** |

Bruttofiseringin av fólkapensjónini merkir í fyrsta lagi, at fólkapensjónin verður skattskyldug. Fyri at pensjónistar skulu hava eins stóra tøka inntøku og teir høvdu áðrenn bruttofiseringina, verður neyðugt at hækka fólkapensjónina. Hækkingin í fólkapensjónini ger, at bæði land og kommunur fáa munandi størri skattainntøkur frá pensjónistum. Kommunurnar fáa eina meirinntøku á góðar 100 mió. kr. Fyri at taka meginpartin av hesi skattainntøkuhækking inn aftur frá kommununum, er ætlanin at hækka landsskattaprosentini og lækka kommunuskattaprosentini.

Ein fyritreyt fyri búskaparligu metingunum í talvu 2 er, at hesar meirinntøkurnar hjá kommununum upp á 100 mió. kr. verða fluttar aftur frá kommununum til landið.

Ætlanin er at gera avtalu við kommunurnar um hesa skattaflyting. Umhugsað hevur verið at gera hesa skattaflyting frá kommunum til landið við lóg, men mett verður ikki, at tað er í tráð við stýrisskipanarlógina at broyta kommunuskattin við løgtingslóg. Nærri verður greitt frá skattaflytingini í viðmerkingunum til *"Uppskot til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um áseting av skatti"*.

Skattainntøkuhækkingin hjá kirkjuni verður tikin innaftur við at játtanin til kirkjuna á fíggjarlógini verður lækkað 2,9 mió. kr.

## Íverksetan

Tørvur er fyri játtan til íverksetan av pensjónsnýskipani í 2011.

**Talva 4: Eykajáttan á fíggjarlógini fyri 2011 til íverksetan.**

| *(mió. kr. í føstum prísum)* | **2011** | **2012** |
|---|---|---|
| Kunning og nýggj elektronisk skipan hjá TAKS | 2,5 | 0,1 |
| Almannastovan og Nærverkið | 0,8 | 0,0 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **3,3** | **0,1** |

Pensjónsnýskipanin broytir nógv viðurskifti hjá bæði pensjónistum, løntakarum, arbeiðsgevarum, pensjónsveitarum og almannamyndugleikum Mett verður, at rættast er at gera eitt kunningartiltak, har allir borgarar og fyritøkur verða kunnað um pensjónsnýskipanina, og hvat pensjónsnýskipanin fær at týða fyri tey. Í 2011 verður neyðugt at seta av 500 tús. kr. til kunning og fyrisitingarligar fyrireikingar. Í 2012 eru 100 tús. kr. settar av til kunning.

Tað er týðandi, at eftirlitið við inngjøldum og útgjøldum av persónligu samansparingini verður gjørt so einfalt og ódýrt sum tilber hjá TAKS at umsita. Tí verður nú arbeitt við at gera skipanina so, at innkrevjingin fer fram elektroniskt saman við lønarflytingini. Til hetta krevst ein útbygging av TAKS skipanini hjá Elektron, sum er mett at kosta 2 mió. kr.

Hjá Almannastovuni og Nærverkinum verða útreiðslurnar til kunning og íverksetan 780 tús. kr. í 2011.

Upphæddinar, sum verða neyðugar til íverksetanarútreiðslur í 2011, verða settar á næsta eykajáttanaruppskot, sum Fíggjarmálaráðið ger. Roknað verður við, at hetta verður gjørt í apríl mánaði. Útreiðslurnar í 2012 verða settar av á fíggjarlógini fyri 2012 og eru tí við í tølunum í talvu 2.

# Høvuðsyvirlit yvir lógaruppskot

**Uppskot viðv. almanna pensjónir:**

| *Mál nr.* | *Uppskot til løgtingslóg um:* | *Innihald:* |
|---|---|---|
| 157/2010 | Broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum | Ásetur nýggjar satsir fyri fólkapensjón og mótrokning.<br>Fólk á stovni fara at fáa vanliga fólkapensjón og fyritíðarpensjón. |
| 155/2010 | Broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. | Mótrokningarskipan.<br>Avtøka av mótrokning millum hjún. |
| 168/2010 | Broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl. | Viðbót til ávísar pensjónistar verður ikki longur veitt fólkapensjónistum. |
| 160/2010 | Broyting í lóg um almenna forsorg | Teknisk broyting av tilvísing til grundupphæddina hjá fólkapensjónistum. |
| 162/2010 | Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti | Hækkar landsskattin við 1,25%.<br>2% eykaskattur á háinntøkur heldur fram til 2014. Skattafrádráttur fyri eftirlønarinngjald hjá persónum undir FAS-skipanini verður sett í gildi frá 2014. |
| 167/2010 | Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt | Kommunuskattahámark fyri pensjónistar. |
| 164/2010 | Broyting í løgtingslóg um broyting av lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn | Hækkar inngjaldið til SAMEG við 0,25%. |
| 156/2010 | Lóg um javning av fólkapensjón | Ásetir hvussu fólkapensjónin skal javnast. |

**Uppskot viðv. persónlig eftirlønaruppsparing:**

| *Mál nr.* | *Uppskot til løgtingslóg um:* | *Innihald* |
|---|---|---|
| 170/2010 | Eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn | Øll á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda til eina bundna eftirlønarsamansparing.<br>Reglur um samansparing, íløgur, skatt, avgjald, útgjald v.m. |
| 165/2010 | Broyting í løgtingslóg um rentutrygging v.m. | Skiftisreglur. |

**Uppkot viðv. stovnsuppihald:**

| *Mál nr.* | *Uppskot til løgtingslóg um:* | *Innihald* |
|---|---|---|
| 161/2010 | At seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l. | Pensjónistar á stovni fáa pensjón og ikki lummapengar. |
| 158/2010 | Broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið | Persónar á psykiatriska deplinum fáa pensjón /fyritíðarpensjón og ikki lummapengar. |

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 157/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um áseting og javning av almannaveitingum

### § 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 9. desember 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 verður aftaná "løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl." sett inn: ", lóg um almenna forsorg (offentlig forsorg)".

2) § 2, stk. 1 seinasta pkt. verður strikað.

3) Í § 2 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Tó verður fólkapensjónin javnað sambært løgtingslóg um javning av fólkapensjón."

4) § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3.** Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, upphæddirnar til uppihaldshjálp, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

1) Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.:

| **Fólkapensjón** | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Fólkapensjón – støk | 2012 | 135.252,00 |
| Fólkapensjón - gift hvør | 2012 | 100.524,00 |

| **Mótrokning í inntøku fyri fólkapensjónistar** | Ár | |
|---|---|---|
| Mótrokningarfrí inntøka | 2012 | 59.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2012 | 50 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2013 | 58.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2013 | 45 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2014 | 56.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2014 | 45 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2015 | 54.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2015 | 40 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2016 | 52.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2016 | 40 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2017 | 50.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2017 | 40 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2018 | 40.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2018 | 35 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2019 | 40.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2019 | 35 |
| Mótrokningarfrí inntøka | 2020- | 30.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningarprosent | 2020- | 30 |

| **Minsta upphædd í fólkapensjón** | Ár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Minsta upphædd í fólkapensjón – støk | 2012-14 | 78.000,00 |
| Minsta upphædd í fólkapensjón – støk | 2015-17 | 54.000,00 |
| Minsta upphædd í fólkapensjón – gift hvør | 2012-17 | 54.000,00 |

| **Fyritíðarpensjón** | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 71.256,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 56.628,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 70.824,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 63.948,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 22.992,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 19.968,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 21.708,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 17.424,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2012 | 33.564,00 |
| Hjálparviðbót | 2012 | 35.544,00 |
| Røktarviðbót | 2012 | 70.956,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2012 | 33.240,00 |
| Mótrokningarfrí inntøkuupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 2012 | 91.500,00 |

2) Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Upphædd | 2012 | 7.488,00 |

3) Lóg um almenna forsorg:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd sbrt. § 9, stk. 2 – støk | 2012 | 50.028,00 |
| Grundupphædd sbrt. § 9, stk. 2 - gift og samlivandi sum hjún í part | 2012 | 39.756,00 |
| Upphædd sbrt. § 13, stk. 1 – støk | 2012 | 88.680,00 |
| Upphædd sbrt. § 13, stk. 1 – gift og samlivandi sum hjún í part | 2012 | 69.672,00 |
| Barnaviðbót | 2012 | 12.804,00 |

4) Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. |
|---|---|---|
| Barnagjald sbrt. § 5 | 2012 | 12.804,00 (árliga) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 739,45 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 1.265,29 (mánaðarliga) |
| Barnagjald sbrt. § 15, stk. 1 og 2 | 2012 | 12.804,00 (árliga) |
| Økt barnagjald sbrt. § 15, stk. 3 | 2012 | 25.608,00 (árliga) |
| Barnaískoyti sbrt. § 19a | 2012 | 1.620,00 (um ársfj.) |

5) Aftaná § 3 verður sett:

"**§ 4.** Giftur pensjónistur, sum fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón svarandi til stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hann er fluttur inn.

*Stk.* 2. Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón svarandi til stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin er fluttur inn.

*Stk. 3.* Giftur pensjónistur, sum, hóast liðugt viðgjørdur, framhaldandi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi og er á visiteraðum bíðilista til varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón svarandi til stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at pensjónisturin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur.

*Stk. 4.* Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi, hóast liðugt viðgjørdur, og er á visiteraðum bíðilista til varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón svarandi til stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur."

6) § 6 verður orðað soleiðis:
"**§ 6.** Landsstýrismaðurin ásetur við kunngerð í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári javnaðu almannaveitingarnar fyri komandi ár.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein liður í politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatti av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

***Broytingar í lógaruppskotinum í høvuðsheitum***

Talan er um fleiri ymiskar broytingar í lógaruppskotinum. Eitt nú verður upphæddin til fólkapensjónistar løgd saman og gjørd fult skattskyldug.

Ein minstaupphædd verður ásett, sum í eina skiftistíð til og við 2017 viðførir, at fólkapensjónin ikki lækkar niður um eina ávísa upphædd, uttan mun til hvussu stór skattskylduga inntøkan[1] er hjá pensjónistum umframt sosiala pensjón og samhaldsfasti.

Eisini verður ein skiftisskipan gjørd, sum merkir, at mótroknast kann í fólkapensjónini við ymiskum mótrokningarprosentum og mótrokningarupphæddum. Skiftisskipan fer sambært lógaruppskotinum at galda til og við 2020.

Fyriskipanin viðvíkjandi uppihaldi á stovni verður broytt. Sostatt fara fólk á stovni sambært lógaruppskotinum ikki longur at fáa eina serliga upphædd í samband við stovnsuppihald, men tey fara í staðin at varðveita pensjónina og at gjalda fyri uppihaldið samsvarandi reglunum um gjald fyri uppihald á sambýlum.

Í galdandi lóg verður grundupphæddin í fólkapensjónini ikki javnað, meðan viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar hevur verið javnað sambært javningarprosenti í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Frameftir verða hesar tríggjar upphæddir lagdar saman í eina fólkapensjón, sum øll verður javnað við einum ávísum javningarprosenti, sum hevur grundarlag í lønargongdini á arbeiðsmarknaðinum og prísvøkstrinum. Javningin er ásett sambært lóg um javningarprosent, sum er ein partur í politisku avtaluni. Aðrar veitingar á almannaøkinum, verða framvegis javnaðar sambært javningarprosenti í lógini um áseting og javning av almannaveitingum.

Í lógini eru eisini settar inn nýggjar veitingar til § 9, stk. 2 og § 13 í forsorgarlógini. Hesar veitingar vísa sambært galdandi lóg ávikavist til grundupphæddina í fólkapensjónini og samlaðu fólkapensjónina. Av tí hesar upphæddir verða broyttar við pensjónsnýskipanini, er neyðugt at áseta sjálvstøðugar upphæddir til hesar greinar í forsorgarlógini. Við uppskotinum verða veitingarnar frameftir javnaðar á sama hátt sum almannaveitingarnar annars.

[1] Viðvíkjandi inntøkugrundarlagnum, verður víst til § 20 í galdandi lóg um almannapensjónir.

***Samanseting av fólkapensjónini***
Grundleggjandi í politisku avtaluni eru tveir eginleikar. Eitt lógarásett krav um uppsparing til egna eftirløn og ein broyting í samansetingini av fólkapensjónini. Fyri fólkapensjónina verður frameftir galdandi, at øll fólkpensjónin verður skattskyldug.

Verandi grundupphædd og viðbót til fólkapensjónina verður avtikin. Samstundis verða fólkapensjónistar frameftir ikki fevndir av viðbót til ávísar pensjónistar. Ístaðin verður nýggj samlað upphædd kallað fólkapensjón, sum samstundis verður fult skattskyldug.

Nýggja upphæddin til fólkapensjón er ásett við støðií galdandi grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar aftaná skatt, fyri ein fólkapensjónist uttan aðra inntøku umframt pensjónina og samhaldsfasta. Tann samlaða upphæddin er síðani umroknað til skattskylduga inntøku hjá ávikavist einum støkum og einum giftum pensjónisti.

**Talva 1: Lýsing av muni í pensjónsinntøku hjá støkum og hjúnum**

| | Galdandi skipan, 2011 | | | Nýskipan, 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Støk | Hjún (Hvør) | | Støk | Hjún (Hvør) |
| Pensjón* | 95.712 | 73.080 | | 135.252 | 100.524 |
| | | | | | |
| Eftir skatt** | 116.492 | 96.460 | | 119.452 | 99.424 |
| -um mðn. | 9.708 | 8.038 | | 9.954 | 8.285 |
| | | | | | |
| Fyri húsarhald | Støk | Hjún | | Støk | Hjún |
| Eftir skatt** | 116.492 | 192.920 | | 119.452 | 198.848 |
| - um mðn. | 9.708 | 16.076 | | 9.954 | 16.570 |

* Upphæddin er áðrenn skatt hjá pensjónistum uttan aðra inntøku. Er ikki íroknað samhaldsfasta.
** Í upphæddini er íroknað samhaldsfasti.

Í talvuni sæst munurin millum fólkapensjónina hjá einum støkum pensjónisti og einum giftum pensjónisti. At broyta pensjónsskipanina frá at vera partvís skattskyldug til at vera fult skattskyldug, fer sostatt ikki at viðføra nakra stóra broyting í mun til, hvussu nógv pensjón verður útgoldin í mun til hjúnastøðuna. Sum sæst, verður munurin eftir skatt øktur eitt sindur. Orsøkin til hetta finst í skattaskipanini og ynskinum sambært semjuni, at pensjónistar við lágari inntøku fara at fáa økta inntøku úr samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Fyri nakrar fólkapensjónistar við lágari inntøku afturat fólkapensjónini, kann broytingin í sjálvum sær viðføra eina inntøkulækking. Fyri at sleppa undan hesum, verður eitt hámark sett í kommunuskattinum, sum bert er galdandi fyri fólkapensjónistar. Hvussu tað fer at ávirka inntøkuna hjá einum fólkapensjónisti, verður greitt frá seinni í almennu viðmerkingunum.

***Minstaupphædd í fólkapensjón***
Samsvarandi hoyringssvarunum hevur pensjónsfylgibólkurin broytt semjuna um pensjónsnýskipan soleiðis, at ásett verður ein minsta upphædd fyri fólkapensjón í eitt ávíst tíðarskeið. Hetta verður gjørt fyri at minka um munin í inntøku aftaná skatt fyri pensjónistar við høgari inntøku, sum annars høvdu mist upp til 3.000 kr/mðn. orsakað av broytingini. Hetta kann kallast eitt slag av grundarupphædd, soleiðis at skilja, at eitt mark verður sett fyri, hvussu nógv kann mótroknast í fólkapensjónini við støði í aðrari inntøku. Markið verður bert

galdandi til og við 2017 og broytist sum víst í talvu 2. Aftaná 2017 verður mótroknað við skattskyldugu inntøkuni í allari fólkapensjónini.

**Talva 2: Minstaupphædd í fólkapensjón**

| Minstaupphædd fyri fólkapensjón | Støk | Gift |
|---|---|---|
| 2012-2014 | 78.000 | 54.000 |
| 2015-2017 | 54.000 | 54.000 |

At nýta eitt mark fyri, hvussu lágt mótroknast kann í fólkapensjónini við støði í aðrari inntøku, fer at merkja, at allir fólkapensjónistar, sum hava rætt til fulla fólkapensjón, fara í minsta lagi at fáa eina pensjónsveiting áðrenn skatt, svarandi til talvu 2. Munur fer at verða millum støk og gift frá 2012 til 2014. Frá 2015 til 2017 verður hetta minstamark eins fyri bæði støk og gift. Aftaná 2017 verður mótroknað í allari fólkapensjónini hjá bæði støkum og giftum pensjónistum.

Talva 3 lýsir broytingina í fólkapensjónini í mun til verandi skipan, og hvussu minstaupphæddin fer at ávirka mótrokningina. Í verandi skipan er talan um, at mótrokna í viðbótini við støði í inntøku omanfyri mótrokningarfríu upphæddina, sum eru 60.400 kr. í 2011. Bert grundupphæddin er eftir, um skattskylduga inntøkan er omanfyri ávíkavist 125 tkr. fyri støk og 110 tkr. fyri gift.

**Talva 3: Broytingar í samansetingini av pensjón til fólkapensjónistar**

| | Galdandi skipan | Pensjóns-nýskipan |
|---|---|---|
| Grundupphædd støk | 50.028 | - |
| Grundupphædd gift | 39.756 | - |
| Viðbót støk | 38.268 | - |
| Viðbót gift | 29.616 | - |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.416 | - |
| | | |
| Fólkapensjón samlað støk | - | 135.252 |
| Fólkapensjón samlað gift | - | 100.524 |
| | | |
| Viðbótin byrjar at minka, tá inntøkan fer uppum: | 60.400 | - |
| Viðbótin er burtur, tá inntøkan fer uppum (støk): | 125.000 | - |
| Viðbótin er burtur, tá inntøkan fer uppum (gift):* | 110.000 | - |
| | | |
| Fólkapensjónin byrjar at minka, tá inntøkan fer uppum: | - | 59.000 |
| Bert minstaupphæddin er eftir, tá inntøka fer uppum (støk): | - | 174.000 |
| Bert minstaupphæddin er eftir, tá inntøka fer uppum (gift):** | | 153.000 |

* Mótroknað verður við støði í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá hjúnunum.
** Mótroknað verður bert við støði í inntøkuni hjá tí einstaka pensjónistinum í hjúnalagnum.

Broytingin viðvíkjandi minstuupphæddini fer at merkja, at ein upphædd (sí talvu 2) verður eftir, hóast inntøkan hjá einum støkum pensjónisti fer uppum 174 tkr. ávíkavist 153 tkr. hjá einum giftum pensjónisti.

Munurin í inntøku sambært talvu 3, har bert grundupphædd smb. verandi skipan ávíkavist minstaupphædd smb. nýskipanini er eftir, er eisini orsakað av broytingini í mótrokningarprosentinum frá 60% til 50%.

Skipanin við minstuupphædd í pensjónini fyri gift og støk broytist sambært lógaruppskotinum til og við 2017, tá skipanin verður avtikin. Aftaná verður tann skattskylduga inntøkan mótroknað í allari fólkapensjónini.

Í talvu 4 verður mett um skipanina við útgangsstøði í einari árligari framrokning av fólkapensjónsupphæddini á 1% hvørt ár, samstundis sum verandi skattareglur eru galdandi. Í 2015 verður minstaupphæddin sambært lógaruppskotinum minkað frá 78 tkr. niður í 54 tkr. fyri ein stakan pensjónist. Hetta fer at merkja, at mótroknast kann við umleið 80 tkr. meira av inntøkuni í 2015 í mun til árini framanundan.
Minstaupphæddin fer ikki at verða broytt fyri giftar pensjónistar, og sum lýst verður í talvu 4, fer munurin í inntøkumarkinum ikki at broytast so nógv frá 2012 til og við 2017.

**Talva 4: Meting av inntøku, har bert minstaupphædd í fólkapensjón er eftir 2012-2017**

| Ár | Fólkapensjónin byrjar at minka, tá inntøkan fer uppum | Minstaupph. í fólkapensjón er eftir, tá inntøkan fer uppum (støk) | Minstaupph. í fólkapensjón er eftir, tá inntøkan fer uppum (gift) |
|---|---|---|---|
| 2012 | 59.000 | 174.000 | 153.000 |
| 2013 | 58.000 | 188.000 | 164.000 |
| 2014 | 56.000 | 189.000 | 164.000 |
| 2015 | 54.000 | 267.000 | 178.000 |
| 2016 | 52.000 | 269.000 | 179.000 |
| 2017 | 50.000 | 270.000 | 179.000 |

Lógaruppskotið hevur við sær, at minstaupphæddin er burtur galdandi frá 2018. Tá verður mótroknað í allari fólkapensjónini. Í talvu 5 er mett um, hvønn týdning hetta hevur fyri inntøkuna hjá einum støkum og einum giftum fólkapensjónisti.

**Talva 5: Meting av inntøku, tá fólkapensjónin verður fult mótroknað í 2018**

| Ár | Fólkapensjónin byrjar at minka, tá inntøkan fer uppum | Fólkapensjónin er burtur tá, inntøkan fer uppum (støk) | Fólkapensjónin er burtur tá, inntøkan fer uppum (gift) |
|---|---|---|---|
| 2018 | 40.000 | 449.000 | 343.000 |

Mett verður sostatt, at fólkapensjónin í 2018 fer at verða burtur hjá ein støkum fólkapensjónsti, um skattskylduga inntøkan fer uppum 449 tkr. Tað sama er galdandi fyri ein giftan fólkapensjónist, sum hevur ein skattskylduga inntøka yvir 343 tkr. Tølini fara at broytast eitt sindur, so hvørt sum framrokningin av fólkapensjónsupphæddini broytist.

***Mótrokning við støði í skattskyldugu inntøkuni***

At mótrokna í fólkapensjónini fer at merkja, at skattskylduga inntøkan umframt fólkapensjón, fyri inntøkubólkar yvir eitt mótrokningarmark, verður mótroknað í upphæddini til fólkapensjón.

Høvuðsendamálið við broytingini er at styrkja hugin at hava inntøku í pensjónsárunum, bæði við arbeiði og egnari uppspardari eftirløn. Ein trupulleiki við galdandi skipan er, at tað í alt ov lítlan mun loysir seg hjá fólkapensjónistum at arbeiða, tá árliga inntøkan umframt pensjónina fer upp um umleið 60.000 kr. Fleiri orsøkir eru til hetta. Sambært galdandi lóg verður mótroknað í fólkapensjónini, tá ársinntøkan umframt pensjónina fer upp um 60.400 kr. Hetta merkir, at fyri hvørjar 100 kr. í inntøku omanfyri 60.400 kr., verður pensjónsviðbótin sambært galdandi lóg lækkað við 60 kr. Harumframt dettur rætturin til viðbót til ávísar pensjónistar burtur hjá støkum pensjónistum, tá ársinntøkan umframt pensjónina er hægri enn 60.000 kr. Giftir pensjónistar missa rættin til viðbótina, tá ársinntøkan umframt pensjónina hjá báðum samanlagt er hægri enn 80.000 kr. Fyri viðbót til ávísar pensjónistar er samstundis galdandi, at talan ikki er um stigvísa mótrokning, men at viðbótin dettur burtur í einum, tá inntøkan fer upp um inntøkumarkið. Harafturat skal fólkapensjónisturin gjalda skatt av inntøkuni sum er eftir, umframt grundupphæddina.

Politiska avtalan um pensjónsnýskipan er øll lógarfest og harvið eisini tann parturin, sum seinni skal koma í gildi. Mótrokningarfría upphæddin í fólkapensjónini er í galdandi lóg ásett í lóg um áseting og javning av almannaveitingum, og tí verður mett, at mótrokningarprosentið eisini eigur at verða ásett í somu lóg, har flestu aðrar upphæddir á almannaveitingum eisini eru ásettar.

Broytingarnar í mótrokningini, sum sambært galdandi lóg verður javnað hvørt ár, verða við støði í semjuni settar í verk í stigum:

**Talva 6: Skiftisskipan viðvíkjandi mótrokning í fólkapensjónini**

| Mótrokningarfrí upphædd | Mótrokningarprosent | Galdandi frá / til | |
|---|---|---|---|
| 59.000 | 50 | 2012 | |
| 58.000 | 45 | 2013 | |
| 56.000 | 45 | 2014 | |
| 54.000 | 40 | 2015 | |
| 52.000 | 40 | 2016 | |
| 50.000 | 40 | 2017 | |
| 40.000 | 35 | 2018 | 2019 |
| 30.000 | 30 | 2020 | frameftir |

Mótroknast kann við støði í øllum inntøkum umframt sosialu pensjónini og pensjón úr samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Mótroknað verður í allari fólkapensjónini.

Torført er at meta um, í hvønn mun broytingarnar fara at stuðla upp undir arbeiðsvirknið hjá fólkapensjónistum, og harvið í hvønn mun fólkapensjónistar fara at broyta atburð mótvegis arbeiðsmarknaðinum. Men fortreytirnar fyri at røkka hesum endamáli, eru í øllum føri betri.

Myndin niðan fyri vísir inntøkuna eftir skatt hjá støkum fólkapensjónistum í ymsum inntøkubólkum, sambært galdandi skipan og sambært pensjónsnýskipanini, tá mótroknað verður við 50% omanfyri 59.000 kr. Av myndini sæst, at ein fólkapensjónistur, ið hevur árliga inntøku, umframt pensjónina og samhaldsfasta upp á 100.000 kr., sambært galdandi skipan hevur áleið somu inntøku aftaná skatt, sum ein fólkapensjónistur við inntøku beint omanfyri 60.000 kr.

Orsøkin til brotnu linjuna við 60.000 kr. í galdandi skipan er ein kombinatión av, at viðbót til ávísar pensjónistar fellur burtur í einum, tá inntøkan fer upp um 60.000 kr., og at mótrokning í pensjónini byrjar, tá ársinntøkan fer upp um mótrokningargrundarlagið.

**Mynd 1: Inntøka aftaná skatt hjá støkum fólkapensjónistum við inntøku umframt pensjón og samhaldsfasti**




At kommunur hava ymisk skattaprosent hevur vanliga við sær, at tøka inntøkan hjá einum pensjónisti er ymisk, alt eftir hvar í landinum bústaðurin er. Tá fólkapensjónin verður bruttofiserað, tað merkir í hesum sambandi fult skattskyldug, hevur tað vanliga ein øktan mun í inntøkuni hjá pensjónistum í ávikavist kommunum við lágum og høgum skattaprosentum.

Hjá støkum pensjónistum uttan aðra inntøku enn pensjónina, er munurin í dag umleið 250 kr. um mánaðin millum "dýrastu" og "bíligastu" kommununa. Tá øll fólkapensjónin er broytt til skattskylduga veiting, hækkar munurin upp í 460 kr. um mánaðin. Fyri at minka um henda mun, verður broyting gjørd í skattaásetingarlógini, sum setur hámark fyri kommunuskattaprosenti hjá fólkapensjónistum.

**Mynd 2: Munur í inntøku hjá støkum fólkapensjónistum aftaná skatt um mðn.**




Myndin omanfyri vísir munin í inntøku um mánaðin aftaná skatt millum galdandi skipan og pensjónsnýskipanina. Í døminum er í nýskipanini roknað við einum kommunuskattahámarki á 19,75% galdandi fyri fólkapensjónistar, samanborið við eitt kommunuskattaprosent á 21% í verandi skipan[2]. Sum sæst av myndini, fara stakir fólkapensjónistar, sum hava árliga inntøku umframt pensjón frá 0 til umleið 154.000 kr. at fáa eina hægri inntøku aftaná skatt, orsakað av pensjónsnýskipanini. Fyri fólkapensjónistar við skattskyldugari inntøku omanfyri umleið 154.000 kr., fer pensjónsnýskipanin at merkja eina minking í inntøku aftaná skatt, samanborið við galdandi skipan.

**Talva 7: Inntøka aftaná skatt um mánaðin hjá støkum fólkapensjónistum**

| | Árlig inntøka umframt pensjónina | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 0 kr. | 50 tkr. | 100 tkr. | 150 tkr. | 200 tkr. | 250 tkr. | 300 tkr. | 350 tkr. | 400 tkr. | 450 tkr. |
| Galdandi skipan | 9.708 | 12.224 | 12.901 | 14.609 | 17.001 | 19.067 | 20.959 | 22.851 | 24.692 | 26.501 |
| Pensjónsnýskipan | 9.954 | 12.346 | 13.738 | 14.688 | 16.133 | 18.017 | 19.883 | 21.700 | 23.508 | 25.308 |
| Munur um mðn. | 246 | 122 | 837 | 79 | -868 | -1.050 | -1.076 | -1.151 | -1.184 | -1.193 |

Ein bruttofisering av fólkapensjónini saman við mótrokning í fólkapensjónini hevur við sær, at pensjónistar við aðrari inntøku omanfyri umleið 155.000 kr. fara at missa eina upphædd í mun til galdandi skipan. Í talvuni sæst, at hægsta upphæddin, ein fólkapensjónistur fer at missa, tá viðkomandi hevur eina inntøku á í minsta lagi 350.000 kr. umframt pensjónina, verður umleið 14.000 kr. um árið.

***Serlig viðurskifti fyri giftum pensjónistum***

Ávirkanin á fíggjarstøðuna hjá giftum pensjónistum er rættuliga ymisk. Ein partur av politisku avtaluni í sambandi við pensjónsnýskipanina er, at pensjónistar frameftir einans verða mótroknaðir við egnari inntøku. Sambært galdandi skipan, verður mótroknað í pensjónini við helvtini av samlaðu inntøkuni hjá hjúnunum. Tað merkir, at mótroknað hevur verið í møguligari arbeiðs- ella eftirlønarinntøku hjá hjúnafelaga.

Fyri at lýsa avleiðingarnar fyri giftar pensjónistar, er tískil neyðugt at taka hædd fyri samlaðu broytingunum fyri hesar – tað vil siga bæði samansetingini av pensjónini sambært lóg um

[2] Víst verður eisini til uppskotið um broyting av áseting av kommunuskatti.

áseting og javning av almannaveitingum og broytingini í mótrokning hjá hjúnafelaga sambært almannapensjónslógini.

Fyri at lýsa broytingina, sum pensjónsnýskipanin hevur í inntøkuni hjá giftum pensjónistum, er neyðugt at hava atlit til, hvussu inntøkan hjá hjúnunum er samansett: Hvussu stór inntøkan er tilsamans og eisini, hvussu inntøkurnar eru býttar ímillum hjúnini.

Ein uppgerð yvir giftar fólkapensjónistar vísir, at 3.360 giftir fólkapensjónistar eru. Av hesum eru 519 gift við einum ikki-pensjónisti. Av restini, tað vil siga 2.704 pensjónistum, eru umleið 30% í hjúnalagi, har ongin hevur aðra inntøku umframt fólkapensjón og samhaldsfasta, umleið 30% eru í hjúnalagi, har bert tann eini fólkapensjónisturin hevur inntøku, og umleið 30% eru í hjúnalagi, har bæði hava inntøku. Bert ein lítil partur er í hjúnalagi, har báðir fólkapensjónistar hava somu inntøku. Restin, svarandi til umleið 300 persónar, hava ikki upplýst inntøku í sambandi við pensjónina.

Í galdandi skipan hevur helvtin av felags inntøkuni týdning fyri, hvussu nógv verður mótroknað í pensjónini hjá giftum pensjónistum. Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu talið av giftum pensjónistum við ymiskari felags inntøku er í prosentum av øllum giftum pensjónistum við upplýstari inntøku. Uppgerðin vísir, at umleið 75% av øllum giftum pensjónistum eru í hjúnalagi við eini felags inntøku til og við 80.000 kr., sum eisini er markið fyri viðbót til ávísar pensjónistar. Nærum 80% hava eina felags inntøku undir 100.000 kr.

**Talva 8: Felags inntøka undir galdandi skipan.**

| Felags inntøka | % av samlað |
|---|---:|
| Onga inntøku | 33 |
| -80.000 | 43 |
| 80.001-100.000 | 3 |
| 100.001-150.000 | 8 |
| 150.001-200.000 | 4 |
| 200.001-250.000 | 5 |
| 250.001-300.000 | 2 |
| 300.001+ | 2 |
| Samlað | 100 |

Í pensjónsnýskipanini verður mótrokningin broytt soleiðis, at mótroknað verður við støði í persónligu inntøkuni fyri allar fólkapensjónistar. Fyri giftar pensjónistar kann hetta hava nógv at siga, serliga fyri tey, har annar hevur alla inntøkuna.

**Talva 9: Egin inntøka hjá giftum pensjónistum**

| Egin inntøka | % av samlað |
|---|---|
| Onga inntøku | 47 |
| -59.000 | 27 |
| 59.001-100.000 | 6 |
| 100.001-150.000 | 4 |
| 150.001-200.000 | 4 |
| 200.001-250.000 | 6 |
| 250.001-300.000 | 2 |
| 300.001-400.000 | 2 |
| 400.001+ | 2 |
| Samlað | 100 |

Sum sæst omanfyri, hava nærum 75% av giftum pensjónistum eina inntøku undir markinum fyri mótrokningarfríu upphæddini sambært pensjónsnýskipanini. Tað vísur eisini, at bara ein lítil partur av giftu pensjónistunum hava eina inntøku, har mótrokningin hevur við sær, at fólkapensjónin verður burtur. Tað merkir sostatt, at væntast kann, at avtøkan av mótrokningini ímillum hjúnafelagar fer at kosta meira fyri landskassan. Tað er tó í høvuðsheitum orsakað av bruttoskipanini og ikki so nógv av inntøkuni sjálvari.

Aftaná at hava hugt at inntøkuni hjá hjúnunum, verða nú hugt at, hvussu inntøkan er ímillum hjúnini. Av omanfyrinevndu 2.704 giftum pensjónistum, hava umleið 90% svarandi til 2.506 upplýst inntøku og eru gift við einum øðrum fólkapensjónisti. Út frá hesum hagtølum, er gjørligt at lýsa, hvussu inntøkusamansetingin er ímillum hjúnini.

**Mynd 3: Hjún við inntøku uppgjørd eftir inntøkubýti**




Á myndini síggjast 7 inntøkubýti, sum lýsa samansetingina í inntøkuni hjá hjúnafeløgunum undir verandi skipan. Helvtin av øllum pensjónistahjúnum hava eina inntøkusamanseting, har bert tann eini hevur alla inntøkuna. Bert 17% hava inntøkuna býtta sínámillum á annan hátt,

umframt bólkin á 33%, sum onga inntøku hevur. Hugt verður nærri at giftum pensjónistum við inntøkuslagi 100/0, tvs. har bert tann eini pensjónisturin hevur inntøku, og hvussu hesin bólkur er spjaddur, tá hugt verður at inntøkuni.

**Mynd 4: Inntøka hjá hjúnum við inntøkuslagi 100/0 í % av øllum hjúnaløgum við uppgjørdari inntøku**




Tað samlaða talið av giftum pensjónistum á myndini svarar til 50% av øllum hjúnum við uppgjørdari inntøku. Myndin vísir, hvussu inntøkan hjá giftum pensjónistum við inntøkuslagi 100/0 er býtt út á ymiskar inntøkubólkar.

Av myndini sæst, at ein triðingur av øllum giftum pensjónistum hava inntøkuslag 100/0, og samstundis eru í inntøkubólkinum 1-54.999. Tað merkir, at teir flestu giftu pensjónistarnir ikki fara at missa við broytingini av mótrokningini í felags inntøkuni.

**Mynd 5: Inntøkubroyting, tá giftir pensjónistar eru í inntøkuslagi 100/0, og mótrokning er í egnari inntøku**



**Talva 10: Inntøkumunur hjá giftum pensjónistum um mánaðin aftaná skatt**

| Árlig samlað inntøka umframt pensjón fyri pensjónistahjún, har bert tann eini hevur inntøku | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **15 tkr.** | **55 tkr.** | **75 tkr.** | **105 tkr.** | **145 tkr.** | **175 tkr.** | **205 tkr.** |
| Galdandi skipan | Hava 100 % | 9.622 | 13.263 | 14.749 | 16.766 | 19.728 | 21.995 | 24.203 |
| | Hava 0 % | 8.038 | 7.729 | 7.199 | 6.133 | 5.961 | 5.961 | 5.961 |
| Pensjónsnýskipan | Hava 100 % | 9.727 | 12.327 | 13.294 | 15.600 | 18.625 | 20.833 | 22.992 |
| | Hava 0 % | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 |
| Munur um mðn. | Hava 100 % | 105 | -936 | -1.455 | -1.166 | -1.103 | -1.162 | -1.211 |
| | Hava 0 % | 247 | 556 | 1.086 | 2.152 | 2.324 | 2.324 | 2.324 |
| Felags munur um mðn. | | 352 | -380 | -369 | 986 | 1.221 | 1.162 | 1.113 |

Fyri giftar pensjónistar í inntøkubólki til og við umleið 50.000 kr., svarandi til samlaða inntøku á 110.000 kr. um árið umframt pensjón og samhaldsfasta, fer broytingin av mótrokningini væntandi at betra um felags inntøkuna. Talan er her um umleið 2/3 av øllum giftum pensjónistum. Fyri giftar pensjónistar í inntøkubólkinum ímillum 50.000 kr. og umleið 75.000 kr. (svarandi til felags inntøku á 100.000 kr. til 150.000 kr. um árið) fer inntøkan eftir skatt væntandi at minka eitt sindur, fyri síðani at økjast til og við inntøku frá umleið 125.000 kr. (svarandi til samlaða inntøku á umleið 250.000 kr. um árið).

**Mynd 6: Dømi um broyting í felags inntøku hjá pensjónistahjúnum**




Av myndini sæst dømi upp á aðrar samansetingar av inntøku hjá pensjónistahjúnum. Myndin gevur eina hóming av, at pensjónsnýskipanin fer at hava við sær, at jú meira lík inntøkan er hjá einum pensjónistahjúnum við inntøku omanfyri uml. 200 tkr. tilsamans, jú meira fara hjúnini at missa í inntøkuni, tá samanborið er við galdandi skipan. Hinvegin fer broytingin í mótrokningini at hava við sær, at tann samlaða inntøkan hjá einum pensjónistahjúnum verður betri, um inntøkan umframt pensjónina bert er hjá øðrum av hjúnunum.

Fyri pensjónistar giftir við ikki-pensjónistum er serstakliga trupult at meta um felagsinntøkuna, men umleið 20% av hesum bólki hevur onga inntøku, og ein tilsvarandi partur hevur minni enn helvtina av samlaðu inntøkuni, um umroknað verður svarandi til, hvussu nógv pensjón verður útgoldin teimum. Hesin bólkur kann vænta at fáa mest burturúr eini broyting í mótrokningini ímillum hjúnafelagar.

Fólkapensjónistar, ið ikki hava inntøku afturat pensjónini, og sum eru gift við einum ikki-pensjónisti, verða betri stillað við nýskipanini. Sambært galdandi skipan, verður inntøkan hjá ikki-pensjónistum mótroknað í pensjónini hjá pensjónistunum. Hesir pensjónistar hava eftir galdandi skipan 5.884 kr. eftir um mánaðin, um so er, at hjúnafelagin er virkin á arbeiðsmarknaðinum og hevur eina løn á umleið 220.000 kr. Við pensjónsnýskipanini hækkar tøka inntøkan hjá hesum pensjónisti til umleið 8.200 kr. eftir skatt.

Hjá pensjónistum, ið eru giftir við einum ikki-pensjónisti, men sum sjálvir hava inntøku afturat pensjónini, hevur pensjónsnýskipanin við sær eina lækking í tøku inntøkuni, tá inntøkan er hægri enn umleið 140.000 kr. árliga. Hesi missa upp í 3.400 kr. um mánaðin. Hjá pensjónistum við inntøku undir 140.000 kr. árliga, verður talan um eina hækking í tøku inntøkuni. Hvussu nógv tøka inntøkan hækkar, er treytað av inntøkuni hjá hjúnafelaganum.

***Broytingar í samband við uppihald á stovni***
Sambært semjuni um pensjónsnýskipan verður lógin viðvíkjandi uppihald á stovni avtikin. Pensjónistar, sum í dag búgva á stovni og røktarheimi og sostatt fáa niðursetta pensjón (upphædd til persónligan tørv), fara við nýskipanini at fáa vanliga pensjón. Hetta verður galdandi fyri bæði fyritíðarpensjónistar og fólkapensjónistar. Sambært seinastu kunngerð um áseting og javning av almannaveitingumer upphæddin til persónligan tørv til persónar undir 60 ár kr. 14.256,00 um árið. Fyri personar yvir 60 ár er upphæddin til persónligan tørv kr. 11.892,00 um árið. Upphæddin er skattskyldug.

Samstundis sum pensjónistarnir fara at fáa vanliga pensjón, verður skipanin broytt soleiðis, at húsaleiga skal gjaldast av pensjónini.

Fyri fyritíðarpensjónistar fer hetta at merkja eina munandi broyting í inntøkuni. Fyri ein fyritíðarpensjónist undir 60 ár, fer hetta at merkja eina inntøkuhækking aftaná skatt uppá kr. 11.300 um mánaðin. Aftaná metta húsaleigu og gjald fyri heilsutrygd, verður mánaðarliga upphæddin umleið 5.500 kr. størri enn undir verandi skipan.

Fyri ein fyritíðarpensjónist millum 60 og 66 ár fer hetta at merkja eina inntøkuhækking aftaná skatt uppá kr. 11.500 um mánaðin. Aftaná metta húsaleigu og gjald fyri heilsutrygd, verður mánaðarliga upphæddin umleið 5.700 kr. størri enn undir verandi skipan.

Fyri ein fólkapensjónist fer hetta at merkja eina inntøkuhækking aftaná skatt uppá kr. 6.600 um mánaðin. Aftaná metta húsaleigu og gjald fyri heilsutrygd, verður mánaðarliga upphæddin umleið 800 kr. størri enn undir verandi skipan.

***Javning av fólkapensjónini***
Sambært semjuni um pensjónsnýskipan verður grundalagið undir javning av upphæddini til fólkapensjón broytt. Soleiðis verður javningargrundarlagið framyvir gjørt í aðrari lóggávu, meðan upphæddin framvegis verður kunngjørd sambært lóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Lógaruppskotið hevur við sær, at fólkapensjónin framyvir verða javnað við grundarlag í løgtingslóg um javning av fólkapensjón, meðan aðrar veitingar verða javnaðar sambært hesari lóg.

Fyri javningina av fólkapensjónini fer hetta at merkja, at fólkapensjónina í størri mun enn higartil, fer at fylgja prís- og lønargongdini í samfelagnum annars.

***Avleiðingar fyri § 9 í forsorgarlógini***
Við teirri nýskipanini, sum avtalan leggur upp til, verður grundupphæddin og viðbótin til fólkapensjónistar sambært almannapensjónslógini løgd saman til eina upphædd og verður samstundis fult skattskyldug. Hetta gevur trupulleikar fyri ásetingina av forsorgarveitingunum sambært § 9, tí forsorgarlógin vísir beinleiðis til grundupphæddina hjá fólkapensjónistum.
Neyðugt er tí at broyta § 9 soleiðis, at hon ikki longur vísir til grundupphæddina hjá fólkapensjónistum, men heldur verður ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Endamálið er ikki at broyta hesa upphædd, men talan er um eina tekniska broyting, ið er ein neyðug avleiðing av pensjónsnýskipanini.

Grundupphæddin til fólkapensjónistar hevur ikki verið javnað, og sostatt hevur upphæddin, sum § 9 í forsorgarlógini vísir til, verið óbroytt síðan 1999. Við hesi broyting fer upphæddin at vera javnað eins og aðrar veitingar sambært lógini um áseting og javning av almannaveitingum.

***Avleiðingar fyri § 13 í forsorgarlógini***
Upphæddin, sum verður veitt sambært § 13 í forsorgarlógini, er tann sama, sum verður veitt til fólkapensjónistar, sum ikki hava aðra inntøku – tó eru reglurnar viðvíkjandi skattskyldu ymiskar fyri varandi veiting og fólkapensjón. Pensjónsnýskipanin hevur sum nevnt við sær víðfevndar broytingar í samansetingini av fólkapensjónini, har pensjónin hækkar og verður skattskyldug. Sostatt broytast fortreytirnar fyri varandi veiting. Neyðugt er tí at broyta § 13 soleiðis, at hon ikki longur vísir til upphæddina hjá fólkapensjónistum, men heldur verður ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Endamálið er ikki at broyta hesa upphædd, men talan er um eina tekniska broyting, ið er ein neyðug avleiðing av pensjónsnýskipanini.

Við hesi broyting fer upphæddin at vera javnað eins og aðrar veitingar sambært lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Hetta merkir at samlaða upphæddin sambært § 13 verður framroknað. Sambært Almannastovuni eru tað í løtuni einans 10 persónar, sum fáa varandi veiting eftir § 13.

***Hoyring***
Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið til broyting í ásetingarlógini eru komnar frá Landsfelag Pensjónistanna (skjal 13), MBF (skjal 15), Nærverkið (skjal 16) og Samtak (skjal 18).

Í svørunum verður millum annað víst á, at tað er gott, at mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin. Samstundis verður víst á, at fólkapensjónin framvegis skal hava eina grundupphædd. Við støði í hesum hevur pensjónsfylgibólkurin gjørt av at nýta eina minstuupphædd í fólkapensjónini í eina skiftistíð.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar

Fíggjarligu avleiðingarnar av pensjónsnýskipanini eru treytaðar av, um fólkapensjónistar fara at broyta atburð mótvegis arbeiðsmarknaðinum. Fortreytirnar hjá fólkapensjónistum at arbeiða broytast, tað er tó ikki gjørligt at siga nakað um, í hvønn mun fólkapensjónistar fara at broyta atburð. Viðvíkjandi eftirlønarútgjøldum væntast ikki stórvegis broytingar upp á stutt sikt. Metingin fyri fíggjarligu avleiðingunum hevur tískil støði í verandi inntøkugrundarlagi, og sostatt skal fyrivarni takast fyri møguligari broyttari arbeiðsinntøku hjá pensjónistunum.

Víst verður til Fíggjarligt yvirlit, har fíggjarligu avleiðingarnar fyri pensjónsnýskipanina verða lýstar.

Umframt omanfyrinevndu eru fíggjarligu avleiðingarnar fyri landskassan av, at upphæddin sambært § 9 og § 13 í forsorgarlógini frameftir fer at verða javnað, leysliga mett at verða 100-200 tús. kr. árliga. Broytingin í hesi lóg kemur í gildi 1. januar 2012, og fyrstu ferð, ið javnað verður, er sostatt í 2013.

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

### Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### Sosialar avleiðingar

Uppskotið hevur ta avleiðing, at flestu fólkapensjónistar, við ongari ella lítlari inntøku afturat pensjónini, fáa hægri tøka inntøku. Flestu fólkapensjónistar við lutfalsligari høgari inntøku afturat pensjónini, fáa eina lægri almannapensjón.

### Millumtjóða sáttmálar

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Talva: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Viðv. § 1, nr. 1
Við hesari ásetingini verður upphæddin, sum fólk fáa at liva fyri sambært §§ 9, stk. 2 og 13, stk. 1 í forsorgarlógini, sett inn í lógina um áseting og javning av almannaveitingum. Hetta merkir so eisini, at hendan upphæddin frameftir verður javnað eins og aðrar veitingar sambært lógini.

Viðv. § 1, nr. 2
Ásetingin um, at grundupphæddin í fólkapensjónini ikki verður javnað, verður strikað. Hetta er ein liður í pensjónsnýskipanini, og javningin av fólkapensjónini verður framd við støði í serligari lóg um hetta.

Viðv. § 1, nr. 3
Ásetingin sigur, at fólkapensjónin verður javnað sambært serligari lóg.

Viðv. § 1, nr. 4
Lógargreinin vísir nakrar talvur, har tær einstøku veitingarupphæddirnar v.m. verða lýstar. Hesar verða frá 1. januar 2013 broyttar við kunngerð við støði í teirri javning, sum lóggávan fyriskrivar.

Viðv. § 1, nr. 5
Við hesum ásetingum í § 4, stk. 1 og 2 í lógini, fara giftir pensjónistar, harav annar hjúnafelagin er heimabúgvandi, og hin er á stovni góðkendur sambært forsorgarlógini, hóast hjúnastøðuna at fáa pensjón svarandi til stakan pensjónist. Samstundis verður gjaldsskipanin

eisini broytt soleiðis, at hesir pensjónistar eisini koma at rinda fyri uppihaldið, eins og teir vóru stakir.

Við ásetingunum í § 4, stk. 3 verður lagt upp til, at giftur pensjónistur, sum hóast liðugt viðgjørdur framvegis er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi og er á visiteraðum bíðilista til stovnspláss, fær pensjón eins og ein stakur pensjónistur, og at viðkomandi kemur at rinda fyri uppihaldið. Heimild fyri gjaldinum verður sett inn í sjúkrahúslógina.

Við ásetingunum í § 4, stk. 4 fær hjúnafelagin hjá pensjónistinum sambært stk. 3, og sum er eftir heima, pensjón eins og stakur pensjónistur.

Viðv. § 1, nr. 6
Við hesari lógarbroytingini verður ásett, at landsstýrismaðurin við kunngerð í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári, skal lýsa galdandi veitingarupphæddir fyri komandi ár. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst at tryggja, at veitingarnar eru kendar, áðrenn tær koma til útgjaldingar. Her skal serliga havast í huga, at bæði fólka- og fyritíðarpensjónin verða útgoldnar mánaðarliga frammanundan. Pensjónin fyri januar verður sostatt vanliga útgoldin undan jólum. Sambært nýggju javningarlógini, sum pensjónsnýskipanin leggur upp til, skal árliga javningarprosentið fyri fólkapensjón ásetast í seinasta lagi 1. november, og sostatt hevur landsstýrismaðurin ein mánaða at lýsa nýggju veitingarupphæddirnar.

Viðv. § 2
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, tann 1. mars 2011

**Rósa Samuelsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 155/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um almannapensjónir o.a.**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 26. mai 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Allar pensjónir sambært §§ 6-8 eru settar saman við eini grundupphædd og eini viðbót.”

2) Í § 18 verður stk. 1 strikað, og stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 1 og 2.

3) § 19, stk. 1 verður orðað soleiðis:
”**§ 19.** Fólkapensjón verður lækkað við støði í inntøkugrundarlagnum sambært § 20, sum ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum.”

4) § 19, stk. 5 verður orðað soleiðis:
”*Stk. 5.* Pensjónin dettur burtur hjá einum fólkapensjónisti, tá hon er lægri enn 1/40 av pensjónsupphæddini, og hjá einum fyritíðarpensjónisti, tá hon er lægri enn 1/40 av grundupphæddini.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**
Hetta lógaruppskotið er ein liður í politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l. og í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj løggava tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesi lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

***Broytingar í lógaruppskotinum í høvuðsheitum***
Hetta lógaruppskotið hevur við sær fýra broytingar, ið ikki eru beinleiðis tengdar at hvørji aðrari. Grundupphædd og viðbót til fólkapensjónistar verður avtikin, og ístaðin verður hugtakið "Fólkapensjón" nýtt í samband við veitingar til fólkapensjónistar.

Áseting av mótrokningarprosenti verður tikið úr almannapensjónslógini og sett inn í lóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Hjá giftum fólkapensjónistum verður frameftir ikki mótroknað í inntøku hjá hjúnafelaga.

Fyri fólkapensjónistar verður grundarlagið fyri, nær pensjónin dettur burtur, broytt til at verða 1/40 part av allari fólkapensjónini.

***Grundupphædd og viðbót verður avtikin***
Verandi grundupphædd og viðbót til fólkapensjónina verður avtikin. Samstundis verða fólkapensjónistar frameftir ikki fevndir av viðbót til ávísar pensjónir. Ístaðin verður nýggj samlað upphædd kallað Fólkapensjón, sum samstundis verður fult skattskyldug. Henda upphædd verður áleið tann sama eftir skatt fyri ein fólkapensjónist uttan aðra inntøku, sum grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónir verður eftir skatt sambært galdandi skipan.

**Talva 1: Lýsing av muni í pensjónsinntøku hjá støkum og hjúnum**

| | Galdandi skipan, 2011 | | | Nýskipan, 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Støk | Hjún (Hvør) | | Støk | Hjún (Hvør) |
| Pensjón* | 95.712 | 73.080 | | 135.252 | 100.524 |
| | | | | | |
| Eftir skatt** | 116.492 | 96.460 | | 119.452 | 99.424 |
| -um mðn. | 9.708 | 8.038 | | 9.954 | 8.285 |
| | | | | | |
| Fyri húsarhald | Støk | Hjún | | Støk | Hjún |
| Eftir skatt** | 116.492 | 192.920 | | 119.452 | 198.848 |
| - um mðn. | 9.708 | 16.076 | | 9.954 | 16.570 |

* Upphæddin er áðrenn skatt hjá pensjónistum uttan aðra inntøku. Er ikki íroknað samhaldsfasta.
** Í upphæddini er íroknað samhaldsfasti.

Í talvuni sæst munurin millum fólkapensjónina hjá einum støkum pensjónisti og einum giftum pensjónisti. At broyta pensjónsskipanina frá at vera partvís skattskyldug til at vera fult

skattskyldug, fer sostatt ikki at viðføra nakra stóra broyting í mun til, hvussu nógv pensjón verður útgoldin í mun til hjúnastøðuna.

*Áseting av mótrokningarprosenti*
Við tí nýskipanini, sum avtalan leggur upp til, verður mótrokningin í viðbótini til fólkapensjónina broytt líðandi yvir nøkur ár. Ein talva, sum vísir, hvussu mótrokningin skal fremjast, verður í hesum sambandi sett inn í lógina um áseting og javning av almannaveitingum. Í talvuni verða bæði ásett mótrokningarprosent og ein mótrokningarfrí inntøkuupphædd.

Broytingarnar í mótrokningini, sum sambært galdandi lóg verður javnað hvørt ár, verður við uppskotinum sett í verk í stigum:

**Talva 2: Skiftisskipan viðvíkjandi mótrokning í fólkapensjónini**

| Mótrokningarfrí upphædd | Mótrokningarprosent | Galdandi frá / til | |
|---|---|---|---|
| 59.000 | 50 | 2012 | |
| 58.000 | 45 | 2013 | |
| 56.000 | 45 | 2014 | |
| 54.000 | 40 | 2015 | |
| 52.000 | 40 | 2016 | |
| 50.000 | 40 | 2017 | |
| 40.000 | 35 | 2018 | 2019 |
| 30.000 | 30 | 2020 | frameftir |

Politiska semjan um pensjónsnýskipan verður øll lógarfest og harvið eisini tann parturin, sum seinni skal koma í gildi. Mótrokningarfríu upphæddirnar eru í galdandi lóg ásettar í lóg um áseting og javning av almannaveitingum, og tí verður mett, at mótrokningarprosentið eisini eigur at ásetast í somu lóg, har flestu aðrar upphæddir á almannaveitingum eisini eru ásettar.

*Mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin*
Ávirkanin á fíggjarstøðuna hjá giftum pensjónistum er rættuliga ymisk. Ein partur av politisku avtaluni í sambandi við pensjónsnýskipanina er, at pensjónistar frameftir einans verða mótroknaðir við støðu í egnari inntøku. Sambært galdandi skipan, verður pensjónin mótroknað við støði í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá hjúnunum. Tað merkir, at mótroknað hevur verið við møguligari arbeiðs- ella eftirlønarinntøku hjá hjúnafelaga.

Fyri at lýsa avleiðingarnar fyri giftar pensjónistar er tískil neyðugt at taka hædd fyri samlaðu broytingunum fyri hesar – tað vil siga bæði samansetingini av pensjónini og broytingini í mótrokning hjá hjúnafelaga sambært hesari lóg.

Fyri at lýsa broytingina, sum pensjónsnýskipanin hevur í inntøkuni hjá giftum pensjónistum, er neyðugt at hava atlit til, hvussu inntøkan hjá hjúnunum er samansett: Hvussu stór inntøkan er tilsamans og eisini, hvussu inntøkurnar eru býttar ímillum hjúnini.

Ein uppgerð yvir giftar fólkapensjónistar vísir, at 3.360 giftir fólkapensjónistar eru. Av hesum eru 519 gift við einum ikki-pensjónisti. Av restini, tað vil siga 2.704 pensjónistar eru umleið 30% av giftum fólkapensjónistum í hjúnalagi, har ongin hevur aðra inntøku umframt fólkapensjón og samhaldsfasta, umleið 30% eru í hjúnalagi, har bert tann eini fólkapensjónisturin hevur inntøku og umleið 30% eru í hjúnalagi har bæði hava inntøku. Bert

ein lítil partur er í hjúnalagi, har báðir fólkapensjónistar hava soma inntøku. Restin, svarandi til umleið 300 persónar, hava ikki upplýst inntøku í sambandi við pensjónina.

Í galdandi skipan hevur helvtin av felags inntøkuni týdning fyri, hvussu nógv verður mótroknað í pensjónini hjá giftum pensjónistum. Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu talið av giftum pensjónistum við ymiskari felags inntøku er í prosentum av øllum giftum pensjónistum við upplýstari inntøku. Uppgerðin vísir at umleið 75% av øllum giftum pensjónistum eru í hjúnalagi við eini felags inntøku til og við 80.000 kr., sum eisini er markið fyri viðbót til ávísar pensjónistar. Nærum 80% hava eina felags inntøku undir 100.000 kr.

**Talva 3: Felags inntøka undir galdandi skipan.**

| Felags inntøka | % av samlað |
|---|---|
| Onga inntøku | 33 |
| -80.000 | 43 |
| 80.001-100.000 | 3 |
| 100.001-150.000 | 8 |
| 150.001-200.000 | 4 |
| 200.001-250.000 | 5 |
| 250.001-300.000 | 2 |
| 300.001+ | 2 |
| Samlað | 100 |

Í pensjónsnýskipanini verður mótrokningin broytt soleiðis, at mótroknað verður í persónligu inntøkuni fyri allar fólkapensjónistar. Fyri giftar pensjónistar kann hetta hava nógv at siga, serliga fyri tann part, har tann eini parturin hevur alla inntøkuna.

**Talva 4: Egin inntøka hjá giftum pensjónistum**

| Egin inntøka | % av samlað |
|---|---|
| Onga inntøku | 47 |
| -59.000 | 27 |
| 59.001-100.000 | 6 |
| 100.001-150.000 | 4 |
| 150.001-200.000 | 4 |
| 200.001-250.000 | 6 |
| 250.001-300.000 | 2 |
| 300.001-400.000 | 2 |
| 400.001+ | 2 |
| Samlað | 100 |

Sum sæst omanfyri, hava nærum 75% av giftum pensjónistum eina inntøku undir markinum fyri mótrokningafríu upphæddini sambært pensjónsnýskipanini. Tað vísur eisini, at bara ein lítil partur av giftu pensjónistunum hava eina inntøku, har mótrokningin hevur við sær, at fólkapensjónin verður burtur. Tað merkir sostatt, at væntast kann, at avtøkan av mótrokningini ímillum hjúnafelagar fer at kosta meira fyri landskassan. Tað er tó í høvuðsheitum orsakað av bruttoskipanini og ikki so nógv av inntøkuni sjálvari.

Aftaná at hava hugt at inntøkuni hjá hjúnunum, verða nú hugt at, hvussu inntøkan er ímillum hjúnini. Av omanfyrinevndu 2.704 giftum pensjónistum, hava umleið 90% svarandi til 2.506

upplýst inntøku og eru gift við einum øðrum fólkapensjónisti. Út frá hesum hagtølum, er gjørligt at lýsa, hvussu inntøkusamansetingin er ímillum hjúnini.

**Mynd 1: Hjún við inntøku uppgjørd eftir inntøkubýti**




Á mynd 1 síggjast 7 sløg av inntøkubýti, sum lýsa samansetingina í inntøkuni hjá hjúnafeløgunum undir verandi skipan. Helvtin av øllum pensjónistahjúnum hava eina inntøkusamanseting, har bert tann eini hevur samlaðu inntøkuna. Bert 17% hava inntøkuna býtta sínámillum á annan hátt, umframt bólkin á 33%, sum onga inntøku hevur. Hugt verður nærri at giftum pensjónistum við inntøkuslagi 100/0, tvs. har bert tann eini pensjónisturin hevur inntøku, og hvussu hesin bólkur er spjaddur, tá hugt verður at inntøkuni.

**Mynd 2: Inntøka hjá hjúnum við inntøkuslagi 100/0 í % av øllum hjúnaløgum við uppgjørdari inntøku**




Tað samlaða talið av giftum pensjónistum á mynd 2 svarar til 50% av øllum hjúnum við uppgjørdari inntøku. Myndin vísir, hvussu inntøkan hjá giftum pensjónistum við inntøkuslagi 100/0 er býtt út á ymiskar inntøkubólkar.

Við grundarlagi í lýsingini av inntøkuni hjá pensjónistahjúnunum kann gerast ein lýsing av, hvat broytingin av mótrokningini millum hjúnini fer at merkja fyri inntøkuna. Samanlíknað verður í fyrstu syftu við útgangsstøði í omanfyrinevndu inntøkusløgum. Síðani verða meira homogen inntøkusløg samanlíknað.

**Mynd 3: Inntøkubroyting, tá giftir pensjónistar hava í inntøkubýti 100/0, og mótroknað verður í helvtini av felags inntøkuni**



Um mótrokningin ikki verður broytt, fara inntøkunar hjá pensjónistahjúnum at síggja út sum víst á mynd 3. Tá talan er um at geva eina minstuupphædd í fólkapensjón, fer hetta at merkja, at tann sum onga inntøku hevur umframt pensjónina, bert fer at fáa minstuupphæddina, tá helvtin av samlaðu inntøkuni fer uppum 154.000 kr. Hetta svarar til at fáa umleið tað sama aftaná skatt, sum við verandi skattafríu grundupphædd.

Fyri pensjónist sum hevur alla inntøkuna verður eisini bert minstaupphæddin eftir. Viðkomandi fer tó at missa umleið 1.000 kr. um mánaðin í mun til verandi skipan, og samlaða inntøkan hjá hjúnunum fer at verða umleið 1.000 kr. minni um mánaðin samanborið við verandi skipan.

Tá hugt verður at mynd 4 sæst, at broytingin í mótrokningini fer at merkja, at flest øll pensjónistahjún fara at fáa meira í samlaðari inntøku um mánaðin aftaná skatt. Fyri ein bólk, sum hevur eina felags inntøka á umleið 110.000 kr. – 170.000 kr., fer broytingin av mótrokningini tó at merkja eina minni inntøku uppá í mesta lagi umleið 400 kr. um mánaðin.

**Mynd 4: Inntøkubroyting smb. nýskipanini, tá giftir pensjónistar hava í inntøkubýti 100/0, og mótrokning er í egnari inntøku**




Av mynd 2 sæst, at ein triðingur av øllum giftum pensjónistum hava inntøkubýti 100/0 og samstundis eru í inntøkubólkinum 1-54.999. Tað merkir, at teir flestu giftu pensjónistarnir ikki fara at missa við broytingini av mótrokningini í felags inntøkuni sambært mynd 3.

**Talva 5: Inntøkumunur hjá giftum pensjónistum um mánaðin aftaná skatt, tá mótroknað verður í egnari inntøku**

| Árlig samlað inntøka umframt pensjón fyri pensjónistahjún, har bert tann eini hevur inntøku | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **15 tkr.** | **55 tkr.** | **75 tkr.** | **105 tkr.** | **145 tkr.** | **175 tkr.** | **205 tkr.** |
| Galdandi skipan | Hava 100 % | 9.622 | 13.263 | 14.749 | 16.766 | 19.728 | 21.995 | 24.203 |
| | Hava 0 % | 8.038 | 7.729 | 7.199 | 6.133 | 5.961 | 5.961 | 5.961 |
| Pensjónsnýskipan | Hava 100 % | 9.727 | 12.327 | 13.294 | 15.600 | 18.625 | 20.833 | 22.992 |
| | Hava 0 % | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 | 8.285 |
| Munur um mðn. | Hava 100 % | 105 | -936 | -1.455 | -1.166 | -1.103 | -1.162 | -1.211 |
| | Hava 0 % | 247 | 556 | 1.086 | 2.152 | 2.324 | 2.324 | 2.324 |
| Felags munur um mðn. | | 352 | -380 | -369 | 986 | 1.221 | 1.162 | 1.113 |

Fyri giftar pensjónistar í inntøkubólki til og við umleið 55.000 kr., svarandi til samlaða inntøku á 110.000 kr. um árið umframt pensjón og samhaldsfasta, fer broytingin av mótrokningini væntandi at betra um felags inntøkuna. Talan er her um umleið 2/3 av øllum giftum pensjónistum. Fyri giftar pensjónistar í inntøkubólkinum ímillum 55.000 kr. og umleið 75.000 kr. (svarandi til felags inntøku á 110.000 kr. til 150.000 kr. um árið) fer inntøkan eftir skatt væntandi at minka eitt sindur, fyri síðani at økjast til og við inntøku umleið 125.000 kr. (svarandi til samlaða inntøku á umleið 250.000 kr. um árið).
Um inntøkan er meira eins millum hjúnini sæst, at um mótroknað verður í helvtini av felags inntøkuni, sum undir verandi skipan, fer samlaða inntøkan hjá einum pensjónistahjúnum skjótt at minka, um felagsinntøkan er hægri enn 200.000 kr. um árið.

**Mynd 5: Dømi um broyting í felags inntøku hjá pensjónistahjúnum, tá mótroknað verður í helvtini av felags inntøkuni**




Jú meira eins inntøkan fer at verða hjá einum pensjónistahjúnum, jú minni týdning hevur ein broyting av mótrokningini. Hetta sæst av teirri reyðu kurvini á mynd 5 samanborið við mynd 6. Hinvegin hevur avtøka av mótrokningini stóran týdning fyri hjún, har inntøkan ikki er eins, í hvussu so er fyri samlaðu inntøkurnar omanfyri 200.000 kr. Hetta sæst av teirri bláu kurvini á mynd 5 samanborið við mynd 6.

**Mynd 6: Dømi um broyting í felags inntøku hjá pensjónistahjúnum, tá mótroknað verður í egnari inntøku**




Av myndini sæst dømi upp á aðrar samansetingar av inntøku hjá pensjónistahjúnum. Myndin gevur eina hóming av, at pensjónsnýskipanin fer at hava við sær, at jú meira lík inntøkan er hjá einum pensjónistahjúnum, jú meira fara hjúnini at missa í inntøkuni, tá samanborið er við galdandi skipan. Hinvegin fer broytingin í mótrokningini at hava við sær, at tann samlaða inntøkan hjá einum pensjónistahjúnum verður betri, um inntøkan umframt pensjónina bert er hjá øðrum av hjúnunum.

Fyri pensjónistar giftir við ikki-pensjónistum er serstakliga trupult at meta um felagsinntøkuna, men umleið 20% av hesum bólki hevur onga inntøku, og ein tilsvarandi partur hevur minni enn helvtina av samlaðu inntøkuni, um umroknað verður svarandi til, hvussu nógv pensjón verður útgoldin teimum. Hesin bólkur kann vænta at fáa mest burturúr eini broyting í mótrokningini ímillum hjúnafelagar.

Fólkapensjónistar, ið ikki hava inntøku afturat pensjónini, og sum eru giftir við einum ikki-pensjónisti, verða betri stillaðir við nýskipanini. Sambært galdandi skipan, verður inntøkan hjá ikki-pensjónistum mótroknað í pensjónini hjá pensjónistunum. Hesir pensjónistar hava eftir galdandi skipan 5.884 kr. eftir um mánaðin, um so er, at hjúnafelagin er virkin á arbeiðsmarknaðinum og hevur eina løn á umleið 220.000 kr. Við pensjónsnýskipanini hækkar tøka inntøkan hjá hesum pensjónisti til umleið 8.200 kr. eftir skatt.

Hjá pensjónistum, ið eru giftir við einum ikki-pensjónisti, men sum sjálvir hava inntøku afturat pensjónini, hevur pensjónsnýskipanin við sær eina lækking í tøku inntøkuni, tá inntøkan er hægri enn umleið 140.000 kr. árliga. Hesi missa upp í 3.400 kr. um mánaðin. Hjá pensjónistum við inntøku undir 140.000 kr. árliga, verður talan um eina hækking í tøku inntøkuni. Hvussu nógv tøka inntøkan hækkar, er treytað av inntøkuni hjá hjúnafelaganum.

Politiska semjan um pensjónsnýskipan er, at mótrokningin ímillum pensjónistahjún skal vera broytt soleiðis, at mótroknað bert verður í egnari inntøku. Broytingar í samansetingini av fólkpensjónini hevur tó havt ta ávirkan á mótrokningina, sum sæst omanfyri.

Um mótrokningin ikki broytist, fer mótrokningin í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá einum hjúnum at hava við sær, at tann sum onga inntøku hevur, skjótt fer at missa pensjónina. Bert minstaupphæddin fer sostatt at verða eftir. Tá minstaupphæddin fer burtur frá og við 2018, kann mótrokning sambært verandi skipan hava við sær, at tann av pensjónistahjúnnum, sum onga inntøku hevur, knappliga fer at missa pensjónina um felags inntøkan fer uppum 200.000 kr. Tá mótroknað verður í egnari inntøka, fer hetta ikki at henda fyri tann, sum onga inntøku hevur.

***Broyting viðvíkjandi partvísari pensjón (brøk-pensjón)***
Sambært Norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd hevur ein bólkur av fólkapensjónistum rætt til fólkapensjón frá Føroyum grundað á teirra uppihald í Føroyum, áðrenn tey blivu 67 ár. Sambært tølum frá Almannastovani kunnu 142 fólk verða umfatað av hesum. Fyri hendan bólk er galdandi, at tey hava rætt til eitt ávíst tal av 40. pørtum av grundarupphæddini í galdandi lóg. Av tí, at grundarupphæddin verður avtikin, verður ístaðin sett 1/40 partur av fólkapensjónini sum grundarlag fyri, hvussu nógv kann verða útgoldið í pensjón. Sambært galdandi lóg varð upphæddin umleið 1.250 kr. fyri støk, og umleið 990 kr. fyri gift.

Við hesum uppskoti verður upphæddin fyri støk 3.381 kr. og fyri gift 2.513 kr. Sostatt er talan um, at hesin bólkur av fólkapensjónistum fer at fáa meira útgoldið orsakað av pensjónsnýskipanini.

***Hoyring***
Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið til broyting í almannapensjónslógini eru komnar frá Landsfelag Pensjónistanna (skjal 13), MBF (skjal 15), Nærverkið (skjal 16) og Samtak (skjal 18).

Í svarini verður millum annað víst á, at tað er gott at mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin. Samstundis verður víst á at fólkapensjónina framvegis skal hava eitt grundupphædd. Við støði í hetta, hevur pensjónsfýlgibólkurin gjørt av, at nýta eitt minstuupphædd í fólkapensjónini í eina skiftistíð.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni um talið av fólkapensjónistum og inntøkum teirra, er tað møguligt at meta um kostnaðin av at avtaka mótrokningina millum giftar fólkapensjónistar.

Um hugt verður eftir, hvussu inntøkurnar síggja út fyri hendan bólk av pensjónistum, sæst at munurin í útreiðslum landskassans gevur 1 mió. kr. eyka, tá mótroknað ikki verður millum hjúnafelagar. Avtøka av mótrokningini millum hjún vísir seg sostatt at geva minni útreiðslur fyri landskassan, tá hugt verður eftir fólkapensjónistahjúnum.

Tá hugt verður eftir muninum viðvíkjandi fólkapensjónisti giftur við ikki-pensjónisti, verður tað torførari at meta um eina broyting í sambandi við avtøku av mótrokningini. Tó ber til at

siga, at broytta mótrokningin hjá fólkapensjónistum, sum eru giftir við ikki-pensjónistum, leysliga mett hevur við sær øktar útreiðslur fyri landskassan á 3 mió. kr. um árið. Her er ikki tikin hædd fyri, at pensjónistar møguliga broyta atburð mótvegis arbeiðsmarknaðinum.

Ein samlað meting av avtøku av mótrokningini verður sostatt ein eyka útreiðsla fyri landskassan á 2 mió. kr.

Mett verður, at ein fíggjarlig avleiðing av uppskotinum um at gera fólkapensjónina fult skattskylduga, fer at vera í sambandi við tillutan av partvísari pensjón (brøk-pensjón) til fólkapensjónistar uttan fyri Føroyar. Ein broyting í tí skattskyldugu upphæddini fer at hava við sær, at hesin bólkur fer at fáa meira útgoldið, og landskassin fer at fáa eina meirútreiðslu á umleið 1,4 mió. kr.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri Almannastovuna í sambandi við um- og eftirrokning av pensjónini. Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ta avleiðing, at flestu fólkapensjónistar, við ongari ella lítlari inntøku afturat pensjónini, fáa hægri tøka inntøku. Flestu fólkapensjónistar við lutfalsligari høgari inntøku afturat pensjónini fáa eina lægri almannapensjón.

**Millumtjóða sáttmálar**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Talva: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Viðv. § 1, nr. 1
Hendan lógarbroytingin er ein avleiðing av, at fólkapensjónin verður broytt til eina samlaða upphædd, og ikki sum áður eina samansetta pensjón við grundupphædd og viðbót.

Viðv. § 1, nr. 2
Hendan lógarbroytingin er ein avleiðing av, at fólkapensjónin verður broytt til eina samlaða upphædd, og ikki sum áður eina samansetta pensjón við grundupphædd og viðbót.

Viðv. § 1, nr. 3
Við hesari lógarbroytingini verða reglurnar um, hvussu mótrokning verður framd í fólkapensjónini fluttar yvir í lógina um áseting og javning av almannaveitingum. Áður varð bert mótroknað í viðbótini, men framftir verður mótroknað í allari fólkapensjónini. Hinvegin verður mótrokningin ikki longur tengd at hjúnafelagainntøku.

Viðv. § 1, nr. 4
Í sambandi við, at býtið millum grundupphædd og viðbót verður burtur í fólkapensjónini, gerst eisini neyðugt at áseta eitt nýtt minstamark fyri, nær almannapensjónin dettur burtur. Áður var hetta markið 1/40 av grundupphæddini, men frameftir verður hetta 1/40 av allari fólkapensjónini.

Viðv. § 2
Gildiskomuregla

Almannamálaráðið, tann 1. mars 2011

**Rósa Samuelsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 168/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

### § 1

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
”**§ 1.** Viðbót verður veitt til ávísar pensjónistar v.fl., sum hava bústað í Føroyum. Giftir pensjónistar fáa eina viðbót í felag.
*Stk. 2.* Árliga viðbótarupphæddin verður ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Upphæddin verður útgoldin í trimum saman við veitingunum fyri apríl, juli og desember mánað.”

2) Í § 2, stk. 1, nr. 1 verður ”pensjón” broytt til: ”fyritíðarpensjón”.

3) § 2, stk. 1, nr. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis: ”Persónum, sum afturút hava fingið játtað fyritíðarpensjón frá ávikavist 1. apríl, 1. juli og 1. desember.”

4) Í § 3 verður sum stk. 2 sett:
“*Stk. 2.* Rætturin til viðbótina verður tikin við, tá pensjón verður um- og eftirroknað, sbr. §§ 21 og 21a í almannapensjónslógini. Reglurnar í almannapensjónslógini í § 22, stk. 1 um upplýsingarskyldu og § 23 um afturgjaldsskyldu eru eisini galdandi fyri veiting sambært hesari lóg.”

5) § 4 verður strikað.

6) Í § 5, stk. 2 verður ”Kærunevndina í almannamálum” broytt til: ”Kærunevndina í almanna- og heilsumálum”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein liður í politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l. og í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggava tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesi broytingini er sostatt tengdur at hesum.

***Broytingar í lógaruppskotinum í høvuðsheitum***

Í lógaruppskotinum eru fleiri broytingar. Eitt nú fer viðbót til ávísar pensjónistar ikki longur at verða veitt fólkapensjónistum.

Eftir- og umrokning sambært almannapensjónslógini og afturgjaldsskylda verða nú eisini staðfest í lógini.

Veitingin verður framvegis skattafrí, men hendan áseting verður flutt frá hesari lógini til skattaásetingarlógina.

Lógin hevur víst til kærunevndina í almannamálum sum kærumynduleika. Hetta verður broytt, so víst verður til kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

***Fólkapensjónistar fara ikki at fáa viðbót***

Sambært semjuni um pensjónýskipanina fer viðbót til ávísar pensjónistar ikki at verða veitt fólkapensjónistum. Fólkapensjónistar fara at fáa eina nýggja fólkapensjónsupphædd, har grundarlagið undir veitingini verður ein upphædd svarandi til grundarupphæddina, viðbótina og viðbót til ávísar pensjónistar, umroknað til eina fult skattskylduga upphædd.

Talið av pensjónistum, sum fáa útgoldið viðbót til ávísar pensjónistar sambært galdandi skipan, er umleið 1700 stakir pensjónistar og 850 giftir pensjónistar. Men av tí, at samlaða viðbótin bert verður goldin til ein pensjónist, tá talan er um pensjónistahjún, kann roknast við, at samlaða talið av fólkapensjónistum, sum hevur ágóðan av viðbót til ávísar pensjónistar, er nærum 3.400, svarandi til meira enn helvtina av øllum fólkapensjónistum í Føroyum.

Eitt inntøkumark er fyri, hvussu høg árliga inntøkan kann vera hjá einstaka pensjónistinum ella pensjónistahjúnunum, um viðbótin kann veitast. Fyri stakar pensjónistar er inntøkumarkið 60.000 kr., og fyri pensjónistahjún er markið 80.000 kr. í samlaðari inntøku.

Broytingin hevur við sær, at fólkapensjónistar, sum hava eina skattskylduga inntøku, sum er lægri enn inntøkumarkið fyri viðbót til ávísar pensjónistar, ikki fara at fáa minni í fólkapenpensjón aftaná skatt.

**Talva 1: Dømi um meirinntøku aftaná nýskipanina fyri fólkapensjónistar við lágari inntøku**

| Inntøka (kr. /ár) | 10.000 | 20.000 | 30.000 | 40.000 | 50.000 | 60.000 | 70.000 | 80.000 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stakur pensjónistur | | | | | | | | |
| Munur í inntøku aftaná skatt um mðn. | 221 | 197 | 163 | 147 | 122 | 694*) | 741*) | 799*) |
| Pensjónistahjún í felag | | | | | | | | |
| Munur í inntøku aftaná skatt um mðn. | 403 | 386 | 352 | 327 | 302 | 277 | 261 | 831*) |

*) Pensjónistar við hesi inntøku hava ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar sambært galdandi lóg.

Mett verður, at øll sum hava fingið viðbót til ávísar pensjónistar, fara at fáa meira aftaná nýskipanina. Tann minsti munurin er at finna hjá teimum, sum liggja beint undir inntøkumarkinum fyri viðbót til ávísar pensjónistar. Soleiðis fer ein stakur pensjónistur bert at fáa umleið 100 kr. meira um mánaðin, um árliga inntøkan er beint undir 60.000 kr.

Fyri tey, sum sambært galdandi lóg hava eina inntøku beint omanfyri inntøkumarkið, verður broytingin størst. Hesir fólkapensjónistarnir hava higartil ikki fingið viðbót til ávísar pensjónistar. Orsakað av, at viðbótin frameftir gerst ein partur av sjálvari fólkapensjónini, fer hesin bólkurin av fólkapensjónistum eisini at fáa eina upphædd, sum er nógv størri enn frammanundan.

***Avleiðingar viðvíkjandi afturgjaldi***

Ongar ásetingar hava verið um afturgjald av viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. í lógini, svarandi til ásetingarnar í § 21a í almannapensjónslógini. Ásetingarnar um eftirrokning av viðbót til ávísar pensjónistar fara at leggja endaligu uppgjørdu inntøkuna í viðkomandi álmanakkaári til grund fyri útgjald av viðbótini.

Hendan broyting hevur við sær, at Almannastovan árliga fer at eftirrokna viðbót til ávísar pensjónistar vísandi til ásetingarnar í almannapensjónslógini. Viðbótin verður sostatt útgoldin við støði í inntøkuni, sum liggur til grund fyri pensjónsútrokningini útgjaldingardagin, tó við møguligum broytingum, sum standast av endaligu uppgjørdu skattaintøkuni viðkomandi álmanakkaár.

***Avleiðingar viðvíkjandi skattafríu upphæddini***

Í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar hevur higartil verið ásett, at upphæddin er skattafrí. Hendan áseting verður strikað í uppskotinum, men verður flutt til skattaásetingarlógina í staðin. Upphæddin til viðbót til ávísar pensjónistar fer sostatt framvegis at vera ein skattafrí veiting.

***Hoyring***

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum.

Ongar viðmerkingar hava verið til uppskotið til broytingar í hesi lógini.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar

Seinnu árini hava tað verið umleið 2.600 fólkapensjónistar, sum við hvørt útgjald hava fingið veitingina viðbót til ávísar pensjónistar. Árliga veitingin í 2011 verður 7.488 kr. árliga. Í 2011 væntast fólkapensjónistar tilsamans at fáa útgoldið umleið 19 mió. kr. í viðbót til ávísar pensjónistar, og sostatt kann játtanin fyri 2012 lækkast við hesi upphædd.

Víst verður eisini til Fíggjarligt yvirlit, har samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar fyri pensjónsnýskipanina verða lýstar.

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Hesar broytingar hava bert smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri landið, tvs. Almannastovuna. Talið av málum um viðbót lækkar, tí fólkapensjónistarnir fara burturav, tá viðbótin verður løgd inn í fólkapensjónina. Hinvegin skulu eftirverandi málini um- og eftirroknast samsvarandi almannapensjónslógini. Broytingarnar hava ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

### Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### Sosialar avleiðingar

Uppskotið hevur ta avleiðing, at flestu fólkapensjónistar, við ongari ella lítlari inntøku afturat pensjónini fáa hægri tøka inntøku. Flestu fólkapensjónistar við lutfalsligari høgari inntøku afturat pensjónini, fáa eina lægri almannapensjón.

### Millumtjóða sáttmálar

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Talva: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Viðv. § 1, nr. 1, 2 og 3
Við hesari lógarbroytingini verður viðbót til ávísar pensjónistar ikki longur veitt fólkapensjónistum. Hetta merkir tó ikki, at teir fólkapensjónistar, sum í dag kunnu fáa viðbótina, missa hesa. Viðbótin verður flutt yvir í fólkapensjónsupphæddina. Hetta merkir, at fólkapensjónin verður hækkað við somu krónuupphædd. Munurin verður kortini tann, at hendan viðbótin tá gerst skattskyldug og verður mótroknað í aðrari inntøku eftir vanligu reglunum í pensjónslógini.

Við verandi skipan er støðan tann, at ein pensjónistur ella eini hjún, sum forvinna 1 krónu undir inntøkumarkið í § 3 fáa alla viðbótina, meðan tann ella tey, sum forvinna 1 krónu yvir inntøkumarkið í § 3 missa alla viðbótina. Við broytingini verður viðbótin sum partur av fólkapensjónini frameftir mótroknað stigvíst eftir inntøkuni. Hendan lógarbroytingin ger tó einki við hendan ójavna hjá fyritíðarpensjónistum, tí teir ikki eru fevndir av lógarbroytingini.

Broytingin í § 1, stk. 2 í lógini er einans av tekniskum slag og ásetur, nær og hvussu viðbøturnar sambært hesari lógini verða útgoldnar. Hetta er einans ein nágreining av verandi skipan.

Viðv. § 1, nr. 4
Grundarlagið undir útgjaldinum av viðbót til ávísar pensjónistar v. fl. verður víðkað til at fevna um endaligu uppgjørdu skattainntøkuna í viðkomandi álmanakkaári, vísandi til ásetingarnar í almannapensjónslógini, og ikki bert inntøkuna, sum liggur til grund fyri pensjónsútrokningini útgjaldsdagin. Hetta merkir við øðrum orðum, at viðbótin frameftir verður um- og eftirroknað eins og almannapensjónirnar.

Viðv. § 1, nr. 5
Ásetingin um, at viðbótin til ávísar pensjónistar (fyritíðarpensjónistar) ikki er skattskyldug, er ein skattaáseting, ið ikki eigur at standa í hesari lógini, men í skattalógini. Hendan ásetingin verður tí tikin burtur og flutt yvir í skattalóggávuna.

Viðv. § 1, nr. 6
Talan er einans um eina tekniska broyting viðvíkjandi heitinum á kærunevndini.

Viðv. § 2
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, tann 1. mars 2011

**Rósa Samuelsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 160/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg**

**§ 1**

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 8. desember 2010, sum rættað við kunngerð nr. 119 frá 17. des. 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 9, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Sum hjálp til uppihald verður sambært stk. 1 vanliga í mesta lagi útgoldin ein grundupphædd, sum er ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir.”

2) § 13, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“**§ 13.** Tá ið ein persónur, ið ikki er fevndur av veitingum eftir løgtingslóg um almannapensjónir, varandi hevur tørv á hjálp til sítt og familjunnar uppihald, kann hjálp veitast soleiðis, at viðkomandi fær eina upphædd, sum er ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. jan. 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein avleiðing av avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar, um eina pensjónsnýskipan.

Við teirri nýskipani, sum avtalan leggur upp til, verður upphæddin til fólkapensjónistar sambært almannapensjónslógini broytt munandi, og grundupphæddin og viðbótin verða avtiknar. Sambært uppskotinum verður fólkapensjónin frameftir ein upphædd, sum verður fult skattskyldug. Hetta gevur trupulleikar fyri ásetingina av forsorgarveitingunum sambært § 9 og § 13, tí forsorgarlógin vísir beinleiðis til ávikavist grundupphæddina hjá fólkapensjónistum og samlaðu pensjónina hjá fólkapensjónistum. Neyðugt er tí at broyta § 9 soleiðis, at hon ikki longur vísir til grundupphæddina hjá fólkapensjónistum, men heldur verður ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Á sama hátt verður neyðugt at broyta § 13 soleiðis, at hon ikki longur vísir til pensjónina hjá fólkapensjónistum, men heldur verður ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Endamálið er í hvørgum føri ikki at broyta hesa upphæddina, men er talan um eina tekniska broyting, ið er ein neyðug avleiðing av pensjónsnýskipanini.

Grundupphæddin til fólkapensjónistar hevur ikki verið javnað, og sostatt hevur upphæddin, sum § 9 í forsorgarlógini vísir til, og sum er ein partur av upphæddini, ið § 13 í forsorgarlógin vísir til, verið óbroytt síðan 1999. Við hesi broytingini fer upphæddin at verða javnað sambært lógini um áseting og javning av almannaveitingum.

***Hoyring***

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum.

Ongar viðmerkingar hava verið til uppskotið til broytingar í hesi lógini.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Hetta uppskotið hevur í sjálvum sær ongar fíggjarligar avleiðingar. Men javningin fer leysliga mett at hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan upp á 100-200 tús. kr. árliga, um javnað verður við 1% hvørt ár. Broytingin í hesi lóg kemur í gildi 1. januar 2012, og fyrstu ferð, ið javnað verður, er sostatt í 2013

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at uppskotið ikki viðførir umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður, at uppskotið hvørki viðførir umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**Avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar**
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir umsitingarligar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Talva: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Viðv. § 1, nr. 1
Við hesari lógarbroytingini verður vanliga mesta upphæddin, veitt sambært § 9 í forsorgarlógini, ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, heldur enn at vísa til grundupphæddina í fólkapensjónini.

Viðv. § 1, nr. 2
Við hesari lógarbroytingini verður veitingin til uppihaldshjálp, veitt sambært § 13 í forsorgarlógini, ásett sum ein sjálvstøðug upphædd í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, heldur enn at vísa til fólkapensjónina.

Viðv. § 2
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, tann 1. mars 2011

**Rósa Samuelsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 162/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti

### § 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 1, stk. 1 verður skattaskalin orðaður soleiðis:

"Galdandi frá 1. januar 2012 til 31. desember 2014:
Er inntøkan minni enn kr. 30.000,-, verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 8,25% |
| 70.000 | 140.000 | 3.300 | 70.000 | 19,25% |
| 140.000 | 250.000 | 16.775 | 140.000 | 22,25% |
| 250.000 | 400.000 | 41.250 | 250.000 | 34,25% |
| 400.000 | | 92.625 | 400.000 | 36,25% |

Galdandi frá 1. januar 2015:
Er inntøkan minni enn kr. 30.000,-, verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 8,25% |
| 70.000 | 140.000 | 3.300 | 70.000 | 19,25% |
| 140.000 | 250.000 | 16.775 | 140.000 | 22,25% |
| 250.000 | | 41.250 | 250.000 | 34,25%” |

**2)** Í § 8 verður stk. 2 orðað soleiðis:

“*Stk. 2.* Skattur teirra, sum nevnd eru í § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, er 35% eftir, at inntøkan er minkað við bundnum eftirlønargjaldi eftir § 2 í løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn, um A-inntøkan stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS, ella skipi, sum eftir stk. 1, 2. pkt. verður javnmett við skip, ið er skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum annars lýkur treytirnar í løgtingslógini um FAS. Inntøka eftir 1. pkt. verður tikin við í skattagrundarlagið, men í inntøkuskattinum skal loyvast ein frádráttur, sum svarar til tann partin av inntøkuskattinum, sum kann verða førdur til ta A-inntøku, sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS. Skatturin eftir 1. pkt. fer 100% í landskassan.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012. § 1, nr. 2 hevur tó virknað frá 1. januar 2014.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

Víst verður eisini til útrokningar og viðmerkingar í frágreiðingini “Pensjónsnýskipan 2009 – Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar”, sum er hjálagt sum skjal 21.

### *Skattaflyting*

Við uppskotinum verða skattaprosentini í ásetingarlógini hækkað við 1,25%, so landsskattainntøkurnar økjast. Fíggjarmálaráðið fer í sama viðfangi undir samráðingar við kommunurnar um ger av avtalu um, at kommunurnar lækka kommunuskattaprosentini við 1,25%, so kommunuskattainntøkurnar lækka.

Endamálið við uppskotinum er at taka innaftur meirútreiðslurnar hjá landskassanum, sum stava frá bruttofiseringini av fólkapensjónini, og at fáa kommunurnar at lata meirinntøkurnar aftur til landskassan, sum stava frá bruttofiseringini.

Ein týðandi partur av pensjónsnýskipanini er at bruttofisera fólkapensjónsupphæddirnar. Í hesum høpi merkir bruttofisering, at fólkapensjónsupphæddirnar verða gjørdar skattskyldugar. Um einki annað verður gjørt, so minkar inntøkan hjá pensjónistum eftir skatt. Fólkapensjónsupphæddirnar verða tí hækkaðar, so at inntøkan hjá einstaka pensjónistinum eftir skatt verður óbroytt. Hækkingin av fólkapensjónsupphæddunum ger, at pensjónsútreiðslurnar hjá landskassanum hækka munandi.

Bruttofiseringin førir til eitt sera stórt umbýti av inntøkum millum land og kommunur og kirkjukassar. Tá landskassin økir útreiðslurnar til fólkapensjón sera nógv, fær landskassin ein part av útreiðslunum innaftur í landsskatti. Ein onnur ávirkan er, at kommunurnar fara at fáa sera stórar hækkingar í kommunuskattinum, tí landskassin økir útreiðslurnar til fólkapensjón. Fíggjarmálaráðið hevur tí gjørt útrokningar av, hvussu nógv landsskatturin skal hækka og kommunuskatturin skal lækka, so kommunurnar hvørki eru betri ella verri fyri aftaná umleggingina.

### *Eykaskattur á háinntøkur framtil 2012*

Eykaskatturin á háinntøkur, sum skulu stegða í 2011, heldur fram til og við 2014. Hetta verður gjørt fyri at fíggja eina minstuupphædd í fólkapensjónini (fyrrverandi grundupphædd) til pensjónistar.

### *FAS-skipan*

Sum lógin er orðað nú, kunnu sjómenn undir FAS-skipanini ikki draga inngjald til eftirlønarskipan frá í skattskyldugu inntøkuni, av tí einfaldu orsøk, at eingin heimild er, sum

loyvir frádrátt í FAS-inntøkuni. Nakrir sjómenn, sum sigla undir FAS-skipanini, velja tí at spara saman av skattaðum peningi. Samansparing av skattaðum peningi skal ikki skattast, tá hon verður útgoldin við eftirlønaraldur.

Tá hesir somu persónar arbeiða uppi á landi, skulu teir gjalda til eina skipan, har teir kunnu draga eftirlønargjaldið frá í skattskyldugu inntøkuni. Hetta er sostatt ein eftirlønarskipan, har peningurin skal skattast, tá hann kemur til útgjaldingar við pensjónsaldur.

Fyri at sleppa undan, at FAS-sjómenn skulu hava tvey ymisk sløg av eftirlønarskipanum, verður mælt til, at frádráttur verður loyvdur í FAS-inntøkuni áðrenn skatt. Hetta viðførir, at FAS-sjómenn frá 2014 fáa frádrátt í skattskyldugu inntøkuni áðrenn skatt eins og aðrir skattgjaldarar. Broytingin ger sostatt, at FAS-sjómenn kunnu gjalda inn á somu eftirlønarkontu, tá teir sigla við FAS-skipum, sum tá teir arbeiða í landi.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

***Skattaflyting***

Landskassin ber byrðuna av, at fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar. Tá atlit er tikið til broyttar mótrokningarreglur fyri fólkapensjónina, verður mett, at pensjónsútreiðslurnar hjá landskassanum skulu hækka 190 mió. kr. Øktu pensjónsútreiðslurnar føra so í øðrum lagi til, at skattainntøkurnar hækka. Mett verður, at landsskattainntøkurnar vaksa 100 mió. kr., kommunuskattainntøkurnar vaksa við 102 mió. kr., og kirkjuskattainntøkurnar vaksa við 2,9 mió. kr.

Netto verða útreiðsluøkingin og skattainntøkuvøksturin sum víst í talvuni niðanfyri:

| | **Pensjónsútreiðslur (mió. kr.)** | **Skatta inntøkuvøkstur (mió. kr.)** | **Skattaflyting og játtanarlækking (mió. kr.)** | **Netto (mió. kr.)** |
|---|---|---|---|---|
| **Landskassin** | -190,2 | 99,0 | 103,4 | 12,3 |
| **Kommunur** | | 101,7 | -100,5 | 1,2 |
| **Kirkjan** | | 2,9 | -2,9 | 0 |
| **Almennir kassar, tils.** | | | | **13,5** |

Ætlanin við hesum uppskoti er at taka meirinntøkuna hjá kommununum og kirkjukassunum innaftur til landskassan. Við at hækka landsskattaprosentini við 1,25% fær landskassin umleið 100 mió. kr. í meirinntøku.

Fíggjarmálaráðið ger í árinum 2011 avtalu við kommunurnar um at lækka kommunuskattaprosentini við 1,25% galdandi fyri 2012. Við hesum minka inntøkurnar hjá kommununum við umleið 100 mió. kr.

Við verandi búskaparliga virksemi fær landskassin ein lítlan inntøkumiss, meðan kommunurnar fáa ein lítlan inntøkuvinning.

Orsakað av, at pensjónsútreiðslurnar vaksa so nógv, fer eisini kirkjan at fáa ein inntøkuvøkstur. Vøksturin verður mettur til umleið 2,9 mió. kr. Landskassin tekur hesa upphædd innaftur við at játtanin til kirkjuna verður lækkað 2,9 mió. kr.

Skatturin hjá einstaka skattaborgaranum verður óbroyttur, um landsskattaprosentini verða hækkað 1,25%, og kommunuskattaprosentini verða lækkað 1,25%.

***Eykaskatturin á háinntøkur verður framlongdur til 2015***

Eykaskatturin á háinntøkur hevur fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri borgarar, ið hava inntøku omanfyri 400.000 krónur árliga.

Eykaskatturin hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Mett verður, at skatturin fer at geva skattainntøkur til landið upp á umleið 13 mió. krónur árliga.

***FAS-skipan***

Mett verður , at uppskotið hevur munandi fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Mett verður, at skattafrádrátturin og endurgjald til reiðarafyritøkurnar fer at kosta landskassanum umleið 2,8 mió. kr. árliga í mun til í dag, tá hon verður sett í gildi í 2014.

Uppskotið hevur positivar sosialar avleiðingar, tí siglandi undir FAS-skipani framyvir fara at hava eftirløn við skattafrádrátti, soleiðis at samansparda virðið í eftirlønarskipanini verður munandi størri, enn tá spart verður saman av skattaðum pengum.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Fyrisitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

## Kap. 3. Hoyring

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið til javningarlóg eru komnar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag (skjal 7), Føroya Kommunufelag (skjal 8), Kommunusamskipan Føroya (skjal 11), Landsfelag Pensjónista (skjal 13) og SAMTAK (skjal 18).

Parturin um skattafrádrátt fyri persónar undir FAS-skipanini hevur ikki verið til hoyringar, men uppskotið er gjørt í samráð við manningarfeløg og pensjónsnýskipanarfylgibólkin.

## Kap. 4. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
**Nr. 1.**
Við uppskotinum verða skattaprosentini í ásetingarlógini hækkað við 1,25%, so landsskattainntøkurnar økjast. Fíggjarmálaráðið fer í sama viðfangi undir samráðingar við kommunurnar um at lækka kommunuskattaprosentini við 1,25%, so kommunuskattainntøkurnar lækka.

Harumframt verður mælt til, at eykaskatturin á háinntøkur verður framlongdur til 1. januar 2015.

**Nr. 2.**
Við uppskotinum verður mælt til, at A-inntøka hjá fult skattskyldugum persónum, sum stavar frá skipi, skrásett í FAS og øðrum líknandi skipi, sum nærri ásett í lógartekstinum, verður minkað við bundna eftirlønargjaldinum eftir § 2 í løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn, áðrenn hon verður skattað við 35%. Í aðrar mátar er stykkið óbroytt í mun til galdandi lóggávu.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi 1. januar 2012.

Fíggjarmálaráðið, 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/ Petur Alberg Lamhauge

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 167/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 133 frá 28. desember 2010, verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 29, nr. 13 verður "grundupphædd av fólkapensjón eftir § 2" strikað, og eftir "løgtingslóg um almannapensjónir o.a." og áðrenn "veitingar," verður sett: "viðbót eftir løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.".

2) Í § 47, stk. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:

"Allar skattskyldugar inntøkur, sum eru funnar eftir reglunum í hesari lóg, undantiknar tær, sum nevndar eru í § 2, stk. 1, litra a), b), h) og i) ávikavist § 47, stk. 2, verða skattaðar við prosenti (líkningarprosentinum), sum er tað sama fyri allar persónligar skattgjaldarar í kommununi."

3) Í § 47 verður eftir stk. 1 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2.* Persónur, sum fær fólkapensjón, skal í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2012 til 31. desember 2021 í mesta lagi gjalda niðanfyri nevnda kommunuskatt:

| Ár | Kommunuskattahámark |
|---|---|
| 2012-15 | 19,75% |
| 2016-19 | 20,25% |
| 2020-21 | 20,75% |
| 2022- | líkningarprosentið." |

Stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 3 og 4.

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj løggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

Víst verður eisini til útrokningar og viðmerkingar í frágreiðingini “Pensjónsnýskipan 2009 – Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar”, sum er hjálagt sum skjal 21”.

***Endamál við uppskotinum um bruttofisering***
Higartil hevur grundupphæddin í fólkapensjónini ikki verið tikin við í skattskyldugu inntøkuna. Broytingin førir við sær, at pensjónistar nú fara at gjalda skatt av allari inntøku. Bæði umboð fyri Landsfelag Pensjónista og limir í politiska fylgibólkinum hava hildið hetta verið meir virðiligt enn verandi skipan, har grundupphæddin og viðbót til ávísar pensjónistar ikki hava verið tikin við í skattskyldugu inntøkuna hjá skattaborgarum.

Broytingin hevur eisini fyrisitingarligar fyrimunir. Tá pensjónsinntøkur eru undir vanligari skattskyldu kunnu pensjónsinntøkur lættari samanberast við vanligar lønarinntøkur og við ymsar almannaveitingar.

Ein munur er tó eftir millum skattaviðurskiftini hjá pensjónistum og løntakarum. Vanligir løntakarar gjalda fleiri arbeiðsmarknaðargjøld, ALS-gjald, gjald til samhaldsfasta eftirlønargrunnin og gjald til barsilsgrunnin. Sjálvt um inntøkan hjá pensjónistum av fólkapensjón verður skattskyldug, so merkir skattskyldan kortini ikki, at teir fara at gjalda hesi arbeiðsmarknaðargjøld.

***Endamál við uppskotinum um kommunuskattahámark fyri pensjónistar***
Við uppskotinum verður sett hámark fyri, hvussu høgt kommunuskattaprosent pensjónistar í kommununum við teim hægstu skattaprosentunum skulu gjalda.

Ein av broytingunum í pensjónsnýskipanini er, at fólkapensjónsupphæddirnar verða bruttofiseraðar. Í hesum høpi merkir bruttofisering, at fólkapensjónsupphæddirnar verða gjørdar skattskyldugar. Um bert hetta varð gjørt, so hevði inntøkan eftir skatt hjá pensjónistum minka. Tað er tí neyðugt, at fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar munandi.

Fyri pensjónistar, sum bert hava fólkapensjónsinntøku og sum búgva í lágskattakommunum og miðalskattakommunum merkir hetta, at teir fara at hava eina nakað hægri inntøku eftir pensjónsnýskipanina enn teir høvdu áðrenn.

Hinvegin vísa útrokningar, at pensjónistar, sum bert hava undir 60.000 kr. um árið í inntøku, og sum búgva í háskattakommunum, fara at hava minni eftir, tá pensjónsnýskipanin er framd.

***Kommunuskattahámark fyri pensjónistar***
Fyri at sleppa undan hesi óynsktu avleiðing av pensjónsnýskipanini verður hámark sett fyri kommunuskattin, so pensjónistar ikki koma at gjalda meir enn 19,75 % í kommunuskatti. Við hesari broyting verður tryggjað, at eisini teir pensjónistar, sum búgva í háskattakommununum og sum bert hava fólkapensjónina at liva av, koma at hava eina nakað hægri inntøku eftir skatt aftaná pensjónsnýskipanina.

Ásetingin um kommunuskattahámark er ætlað sum ein skiftisskipan, sum verður í gildi í 10 ár.

Hámarkið verður stigvís hækkað fram til 2022 sum víst í talvu 1 undir kap. 2. Frá og við 2022 fara pensjónistar í háskattakommununum at gjalda sama kommunuskattaprosent sum aðrir skattaborgarar í kommununi.

Av tí, at pensjónistar í háskattakommununum ikki fara at gjalda fullan kommunuskatt, fara háskattakommunurnar at vera fyri skattainntøkumissi orsakað av hesi lóg. Politiski fylgibólkurin ætlar tí, at landskassin skal endurrinda kommunununum fyri metta inntøkumissin komandi 10 árini. Hetta endurgjald verður veitt á árligu fíggjarlógunum. Greitt verður nærri frá fíggjarligu avleiðingunum í kapitul 2.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

***Kommunuskattahámark fyri pensjónistar***
Ætlaða kommunuskattahámarkið fyri pensjónistar førir við sær, at pensjónistar, sum bert hava inntøkur frá fólkapensjón fara at gjalda minni í kommunuskatti, enn um einki hámark varð sett. Fyri láginntøkupensjónistarnar í háskattakommununum førir hetta við sær, at inntøkan eftir skatt hækkar við pensjónsnýskipanini.

Broytingin ávirkar ikki inntøkurnar hjá lág- og miðalskattakommununum.

Kommunuskattahámarkið fyri pensjónistar merkir fyri háskattakommunurnar, at tær fara at missa umleið 6,6 mió. kr. í kommunuskatti fyrsta árið, tá hámarkið verður sett til 19,75 prosent.

Av tí, at háskattakommunurnar longu frammanundan eru fíggjarliga illa sperdar, ætlar politiski fylgibólkurin at hesar kommunurnar skulu fáa metta inntøkumissin av kommunuskattahámarkinum endurrindaðan á fíggjarlógini. Saman við játtanini til endurgjald á fíggjarlógini er uppskotið sostatt inntøkuneutralt fyri háskattakommunurnar.

Uppskotið førir við sær størri útreiðslur fyri landskassan í skiftistíðini 2012-2021. Meirútreiðslan til endurgjald til kommunurnar verður mett til umleið 6,6 mió. kr. árliga í árunum 2012-15. Frá 2016 verður kommunuskattahámarkið hækkað til 20,25 prosent. Harvið verður skattamissurin hjá kommununum minni, og tí lækkar metta endurgjaldið til kommunurnar til 4,4 mió. kr. Frá 2020 verður kommunuskattahámarkið hækkað til 20,75 % og endurgjaldið lækkar samsvarandi niður í 2,5 mió. kr. Frá 2022 verður hámarkið avtikið og tískil verður endurgjaldið til kommunurnar eisini avtikið. Metti kostnaðurin hjá landskassanum til endurgjald til háskattakommunurnar sæst í Talvu 1.

Kommunuskattahámarkið fyri pensjónistar fer at hava sum umsitingarliga avleiðing fyri landsmyndugleikarnar, at Fíggjarmálaráðið á hvørjum ári skal rokna metta inntøkumissin hjá háskattakommununum. Metti inntøkumissurin verður roknaður útfrá miðalinntøkuni hjá pensjónistum og faldað við talinum av pensjónistum í einstøku háskattakommununum. Upphæddin verður sett á fíggjarlógina á hvørjum ári inntil 2022.

Fyri háskattakommunurnar hevur kommunuskattahámarkið ta umsitingarligu avleiðing, at ein partur av inntøkuni ikki kemur til kommunurnar sum skattur, men sum eitt endurgjald frá landskassanum.

*Talva 1: Fíggjarligar avleiðingar av kommunuskattahámarkinum*

| | **2012-2015** | **2016-2019** | **2020-2021** | **2022 og fram** |
|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattahámark | 19,75% | 20,25% | 20,75% | Onki |
| Endurgjald til kommunur frá landskassanum (mió. kr.) | 6,6 | 4,4 | 2,5 | 0 |

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis umsitingligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar, tí mett verður, at broytingar í skipanunum hjá TAKS koma at kosta 250.000 kr.

Uppskotið hevur tær sosialu avleiðingar, at tað forðar fyri, at pensjónistar í háskattakommunum ikki fáa minni inntøku orsakað av pensjónsnýskipanini.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið ella í mun til altjóða avtalur og reglur.

***Bruttofisering av fólkapensjónini***

Bruttofiseringin av fólkapensjónini, t.e. at fólkapensjónin verður gjørd skattskyldug, fær ikki ávirkan á tøku inntøkuna hjá pensjónistum. Samstundis sum fólkapensjónin verður gjørd skattskyldug, so verða allar pensjónsupphæddir hækkaðar, so tøka inntøkan hjá pensjónistum ikki minkar.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Hoyring**

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið eru komnar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag (skjal 7), Føroya Kommunufelag (skjal 8), Kommunusamskipan Føroya (skjal 11), Landsfelag Pensjónista (skjal 13) og SAMTAK (skjal 18).

**Kap. 4. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

**Nr.1**
Broytingin ber í sær, at ein fólkapensjón framyvir er at rokna sum ein fult skattskyldug veiting eins og eittnú ein lønarinntøka. Fyri at hetta ikki skal hava við sær inntøkumiss fyri pensjónistin, verður fólkapensjónsupphæddin hækkað í almannalóggávuni.

Í galdandi lóggávu er tað ásett í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., at viðbótin ikki er skattskyldug.

Seinna lið í broytingini er ein avleiðing av, at ásetingin um skattafrítøku verður strikað í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

**Nr. 2 og 3**
Við uppskotinum verður mælt til, at hámark verður sett fyri, hvussu høgt kommunuskattaprosent pensjónistar í kommununum við teim hægstu skattaprosentunum skulu gjalda.

**Til § 2**
Áseting um ígildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, tann 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 164/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 25. mai 2009, verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 2, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis:

   "Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin frá 1. januar 2012 at rokna: 2%."

2) Í § 2, stk. 2 verður 4. pkt. orðað soleiðis:

   "Ásetti prosentparturin er frá 1. januar 2012 at rokna: 2 %."

3) Í §§ 8 og 9 verður "Toll- og Skattstova Føroya" broytt til: "TAKS".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

Víst verður eisini til útrokningar og viðmerkingar í frágreiðingini “Pensjónsnýskipan 2009 – Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar”, sum er hjálagt sum skjal 21”.

### *Endamál við uppskotinum*

Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Ein av broytingunum í pensjónsnýskipanini er at fólkapensjónsupphæddirnar verða bruttofiseraðar. Í hesum høpi merkir bruttofisering, at fólkapensjónsupphæddirnar verða gjørdar skattskyldugar. Um bert hetta varð gjørt, so hevði inntøkan eftir skatt hjá pensjónistum minkað nógv. Tað er tí neyðugt, at fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar munandi.

Fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar munandi, men skatturin hjá pensjónistum hækkar við somu upphædd, so um einki annað verður gjørt, so fáa pensjónistar, sum onga aðra inntøku hava enn fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirløn, eina óbroytta inntøku eftir nýskipanina.

Útrokningar vísa, at stakir pensjónistar, sum hava egininntøku úr umleið 60.000 og upp til 160.000 fáa munandi hægri tøka inntøku eftir skatt, tá nýskipanin er framd.

Politiski fylgibólkurin hevur ynskt, at tøka inntøkan hjá pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum eisini skal vaksa, nú pensjónsnýskipanin verður framd.

Politiski fylgibólkurin er tí vorðin samdur um at hækka inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin úr 1,75 % og upp í 2 prosent. Hetta førir við sær, at inntøkan hjá pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, hækkar við uml. 250 kr. um mánaðin eftir skatt.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Mett verður, at hetta fer at føra til, at útgjaldið kann hækkast úr 2.690 kr. um mánaðin (32.280 kr. um árið) og upp í umleið 3.075 kr. um mánaðin (36.900 um árið).

Hækkingin av útgjaldinum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum førir til, at tøka inntøkan hækkar um 3.000 kr. árliga hjá teimum pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri skattainntøkurnar hjá landinum. Pensjónistar fara at gjalda meira skatt, men hinvegin førir hægra gjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, at keypsorkan hjá øðrum borgarum fer at minka og harvið fer skatturin hjá øðrum skattaborgarum av minka.

Sum arbeiðsgevari má landið økja inngjaldið til arbeiðsmarknaðaeftirlønargrunnurin við 0,25%. Hetta kostar landinum góðar 5 mió. kr. um árið.

Uppskotið hevur sosialar avleiðingar, tí mett verður, at uppskotið fer at føra til, at útgjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fer at hækka úr 2.690 kr. um mánaðin (32.280 kr. um árið) og upp í umleið 3.075 kr. um mánaðin (36.900 um árið).

Hækkingin av útgjaldinum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum førir til, at tøka inntøkan hækkar um 3.000 kr. árliga hjá teimum pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið ella í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

## Kap. 3. Hoyring

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið eru komnar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag (skjal 7), Landsfelag Pensjónistara (skjal 13) og SAMTAK (skjal 18).

## Kap. 4. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

Nr. 1.
Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Nr. 2.
Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Nr. 3.
Við uppskotinum verður heitið Toll- og Skattstova Føroya broytt til TAKS. Talan er um eina dagføring.

### Til § 2

Áseting um ígildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, tann 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 156/2010: Uppskot til løgtingslóg um javning av fólkapensjón**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um javning av fólkapensjón**

**§ 1**

Fyri hvørt ár verður roknað eitt javningarprosent, sum verður nýtt at javna fólkapensjónina.

**§ 2**

Javningarprosentið verður útroknað sum miðaltalið av: 1) prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaðar skeiðnum, sum endar 1. oktober í inniverandi ári, samanborið við undanfarna tólv mánaða skeið, og: 2) prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum 3. ársfjórðing í inniverandi ári í mun til 3. ársfjórðing árið fyri.
*Stk. 2.* Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá fíggjarmálaráðnum, verður javningarprosentið sett til prosentvísu broytingina í lønarkarminum.
*Stk. 3.* Er roknaða javningarprosentið minni enn null, verður javningarprosentið sett til null.
*Stk. 4.* Hevur javningarprosentið í eitt ella fleiri ár verið ásett sambært stk. 3, verður ikki javnað aftur, fyrr enn akkumleraða javningarprosentið er komið upp um støðið áðrenn hetta.

**§ 3**

Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð javningarprosentið í seinasta lagi 1. november hvørt ár.

**§ 4**

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri útrokningini av javningar-prosentinum, herundir reglur, sum taka atlit til broytingar í hagtalsgrundarlagnum fyri útrokningini av javningarprosentinum.

**§ 5**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

Ein týðandi partur av pensjónsnýskipanini er nýggja lóggávan um javning av fólkapensjónini. Málið er at gera javningina av fólkapensjónini meira støðuga, soleiðis at fólkapensjónin í størri mun fer at fylgja gongdini í føroyska búskapinum sum heild.

Sambært verandi lóggávu verða grundupphæddirnar ikki javnaðar, meðan viðbøturnar verða javnaðar við 1 prosentum um árið. Roknað av allari upphæddini, svarar hetta til eina javning á 0,5 prosent.

Hetta hevur ført til, at fólkapensjónin javnan hevur mist virði sammett við lønarlagið annars í samfelagnum. At pensjónirnar eru dragnaðar afturum lønirnar, hevur síðan ført til stórt trýst á politisku myndugleikarnar, sum so hava gjørt sera stórar broytingar av pensjónunum í einum.

Sambært uppskotinum, skulu pensjónirnar javnast við miðal av lønargongdini og prísgongdini.
Broytingin av javningini fer at gera, at pensjónirnar fara at fylgja munandi betri við gongdini í búskapinum og lønargongdini enn nú.

Tað fer tí ikki so ofta at verða neyðugt hjá politisku myndugleikarnum at taka støðu til pensjónsupphæddirnar. Roknast kann við, at longri áramál kann ganga, áðrenn tað verður neyðugt hjá politisku myndugleikunum at endurskoða pensjónsupphæddirnar.

Við uppskotinum verður farið burtur frá verandi javning av fólkapensjón, har bara viðbótin verður javnað. Í nøkur ár varð viðbótin javnað við 4 prosentum, síðan við 3 prosentum og nú við 1 prosenti um árið. Grundupphæddin er ikki javnað hesi árini. Tey árini, tá viðbótin varð javnað við 4 prosentum, hækkaði samlaða pensjónin (grundupphæddin pluss viðbøtur) við 1,3 prosentum. Tað skal tó viðmerkjast, at í tíðarskeiðinum 2004 til 2010 er útgjaldið frá samhaldsfasta (sum øll fáa, uttan mun til inntøku) hækkað úr 700 kr. upp í 2.690 kr. um mánaðin.

Verandi javningarskipan hevur sum nevnt omanfyri ført til, at sjálv fólkapensjónin hevur mist virði í mun til lønarlagið í samfelagnum. Mælt verður tí til at broyta javningarskipanina soleiðis, at pensjónirnar betri fylgja við lønarlagnum og prísgongdini, soleiðis, at tað ikki so ofta verður neyðugt at gera politisk tiltøk fyri at broyta pensjónsviðurskiftini.

Ætlanin við uppskotinum er, at samlaða fólkapensjónsupphæddin verður javnað á hvørjum ári við einum og sama javningprosenti, sum fylgir vøkstrinum í prístalinum og lønarlagnum í føroyska samfelagnum. Hetta hevur við sær, at borgarin, sum fær fólkapensjón, fær part í vøkstrinum, tá ið vøkstur er í prístalinum og lønarlagnum.

Fólkapensjónin fer tó ikki at minka í teimum førum, tá vøksturin í prístalinum og lønarlagnum er negativur. Í hesum førum verður javningin sett til null, og javningin tekur ikki við fyrr enn roknaða javningarprosentið er komið upp um aftur støðið, tá javningin varð nullstillað.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Uppskotið hevur fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Fíggjarmálaráðið má hvørt ár gera upp javningarprosentið, og Almannamálaráðið má hvørt ár javna fólkapensjónina við javningarprosentinum. Verandi javning við 1 prosentum av viðbótunum svarar til eina upphædd á umleið 5 mió. kr. árliga. Um til dømis lønarhækkingin eitt ár er 3 prosent og brúkaraprístalshækkingin er 1 prosent, so verður javningarprosentið 2 prosent. Við hesum fyritreytum verður javningin umleið 14 mió. kr. Talan er sostatt um eina hækking av javningini við 9 mió. kr.

Tølini kunnu tó ikki samanberast beinleiðis. Pensjónsjáttanin á fíggjarlógini, ið verður javnað er hægri av tveimum orsøkum. Onnur orsøkin er, sum nevnt, at øll pensjónsupphæddin verður javnað. Hin orsøkin er, at pensjónsútreiðslurnar í 2012 eru bruttopensjónir, og tískil eru væl hægri enn í dag. Viðmerkjast skal eisini at bruttofiseringin ger, at pensjónistar fara at gjalda vanligan skatt av síni inntøku, og at teir tí fara at gjalda nakað meir í skatti av pensjónshækkingum enn nú. Pensjónistar fara at gjalda ein skatt av pensjónshækkingum, sum líkist nógv tí skatti vanligir løntakarar gjalda av sínum lønarhækkingum. Samanumtikið verður munurin á gomlu javningarskipanini og nýggju tí væl minni enn 9 mió. kr.

Samlaða ávirkanin av bruttofiseringini og nýggju javningarlógini er tískil at pensjónir fara at fylgja betri við gongdini í lønum og prísum, og at pensjónistar skattliga verða viðgjørdir á sama hátt sum løntakarar.

Uppskotið hevur sosialar avleiðingar, tí fólkapensjónistar fara at fáa eina størri javning enn í dag, orsakað av, at øll fólkapensjónsupphæddin fer at verða javnað. Gongdin í fólkapensjónini fer eisini í stóran mun at fylgja samfelagsgongdini, og kann tí metast at vera meira rættvís og rímilig.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið ella í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Hoyring**

Uppskotið hevur frá 7. juli til 1. september 2010 verið sent til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, sí yvirlit í skjal 1. Eisini hevur uppskotið verið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið til javningarlóg eru komnar frá Fakfelagssamstarvinum (skjal 4), Landsfelag Pensjónistara (skjal 13) og SAMTAK (skjal 18).

Hoyringssvarini hava gjørt vart við, at tað var óheppið at brúka lønaravtaluna hjá privat settum. Í endaliga uppskotinum verður tikið støði í lønini hjá alment settum starvsfólki.

**Kap. 4. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

Í greinini verður lýst, at endamálið við ásetingini er at gera eina útrokning av einum javningarprosenti, sum skal nýtast at javna fólkapensjónsupphæddirnar við. Javningin tekur støði í upphæddini, sum er galdandi, tá javningin verður útroknað.

**Til § 2**

*Stk 1.* Snýr seg um útrokning av javningarprosentinum.

Mælt verður til at brúka miðal av: 1) prosentvísu broytingini í lønarsáttmálanum hjá Fíggjarmálaráðnum (karmurin), og: 2) prosentvísu broytingini av prístalinum.

Sum dømi kann nevnast, at karmurin um lønarhækkingina, sum varð avtalað 1. oktobur í 2009, var 3 %, og at karmurin í 2010 var 1 %.

Lønarbroytingin verður roknað sum vigað miðal av lønini í tólv mánaða skeiðinum fram til 1. oktobur samanborið við lønina í undanfarna tólv mánaða skeið.

Tann prosentvísa broytingin av prístalinum, sum verður nýtt í javningini, tekur støði í prístalinum fyri 3. ársfjórðing, sum verður kunngjørt 1. oktober á hvørjum ári, samanborið við prístalið fyri 3. ársfjórðing árið fyri.

*Í stk. 2* verður mælt til, at hámark verður sett fyri, hvussu nógv prístalið kann ávirka javningina av fólkapensjónini. Sambært stk. 3, kann javningin ikki verða hægri enn broytingin í sáttmálalønini. Hetta skal avmarkað sveiggini, sum kunnu verða í teimum førum, har prístalið í einum tíðarskeiði hækkar óvanliga nógv, sum kann geva landskassanum eyka stórar útreiðslur til at javna fólkapensjónina við. Mett verður eisini, at tað er óheppið, um fólkapensjónin hækkar meira enn almennar lønir.

*Stk. 3* ásetir, at javningarprosentið ikki kann verða negativt.

*Stk. 4* ásetir, at um javningarposentið í nøkur ár hevur verið null, tí roknaða javningaprosentið hevur verið negativt, verður javningaprosentið ikki positivt aftur, fyrr enn akkumuleraða javningarprosentið kemur upp um støðið, tá roknaða javningarprosentið gjørdist negativt. Henda áseting er gjørd fyri, at fólkapensjónin ikki fyrst skal verjast móti afturgongd í samfelagnum, fyri síðan at fáa fullan ágóða frá lønarframgongd og príshækking frá einum sera lágum støði. Ein annar háttur at lýsa hesa áseting er, at hon tryggjar, at pensjónin ikki skal hækka tvær ferðir, fyri eina og somu lønar- og príshækking.

**Til § 3**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetir í seinasta lagi 1. november á hvørjum ári javningarprosentið í kunngerð. Tað er av týdningi, at talgrundarlagið fyri javnaðu fólkapensjónini er klárt í novembur mánaði, so at fyrisitingin hevur tíð til at fyrireika skipanirnar til nýggju javnaðu fólkapensjóninsupphæddirnar, og at teir borgarar, ið fáa fólkapensjón, verða kunnaðir í góðari tíð.

**Til § 4**

Henda grein gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur fyri útrokningini av javningarprosentinum. Hetta kann vera neyðugt, um uppgerðin av hagtølunum, sum eru grundarlag undir útrokningini av javningarprosentinum, verður broytt. Um hagtalsliga uppgerðin av til dømis lønunum ella prísunum verður broytt, kann landsstýrismaðurin gera samsvarandi broytingar í útrokningini av javningarprosentinum.

**Til § 5**

Lógin kemur í gildi 1. januar 2012. Sostatt verður fyrsta útrokningin av javningarprosentinum kunngjørd í seinasta lagi 1. november 2012. Hetta javningarprosentið verður brúkt til javning av fólkapensjónini fyri 2013.

Fíggjarmálaráðið, tann 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 170/2010: Uppskot til løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (Eftirlønarskattalógin)**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (Eftirlønarskattalógin)

### Kapittul 1

*Vavið*

**§ 1.** Persónur, sum hevur fylt 18 ár, men ikki 67 ár, og hevur fulla skattskyldu til Føroyar, hevur skyldu at rinda til eftirløn.
*Stk. 2.* Persónur, sum í sínum setanarviðurskiftum vinnur tænastumannaeftirlønarrætt, er ikki fevndur av hesi løgtingslóg við atliti at tí løn, hann vinnur sambært tænastumannastarvinum.
*Stk. 3.* Lesandi uttanlands, sum hevur varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar, hevur ikki skyldu at gjalda inn til eftirlønarsamansparing eftir hesi løgtingslóg av inntøku, ið er forvunnin uttanlands.

**§ 2.** Bundna eftirlønargjaldið er frá 1. januar 2012 í minsta lagi 1,5 prosent av A og B-inntøkuni, og eftirlønargjaldið hækkar við 1,5 prosent árliga til 15 prosent í 2021.
*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin hevur við teimum avmarkingum, sum eru nevndar í § 1, stk. 2 og § 4, skyldu at inngjalda eftirlønargjaldið hjá løntakara. Er eftirlønargjaldið ásett í starvssáttmála, er hesin prosentpartur galdandi í tann mun, hann er hægri enn ásett í stk. 1.
*Stk. 3.* Persónur við B-inntøku skal gjalda eftirlønargjald sambært stk. 1. Gjaldið verður goldið á sama hátt sum B-skattur.
*Stk. 4.* Uttan mun til prosentásetingina í stk. 1, hevur eingin skyldu til at gjalda meiri enn 100.000 krónur árliga í eftirlønargjaldi. Upphædd oman fyri 100.000 krónur kann verða goldin útaftur av eftirlønarveitara, tá TAKS hevur játtað umsókn um útgjalding hjá eftirlønar-

samansparara, ið eftirlønarveitari avgreiðir. Umsóknin skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 1. juni árið eftir.
*Stk. 5.* Eftirlønarsamansparari kann sjálvboðin inngjalda meira enn tað í stk. 1 nevnda prosentgjald, ávikavist ta í stk. 4 nevndu upphædd, til ta góðkendu eftirlønarskipanina.
*Stk. 6.* Persónur, sum er fyltur 15 ár, men ikki 18 ár, og persónur, sum er fyltur 67 ár, men ikki 70 ár, kann velja at gjalda sjálvboðið ella gjøgnum arbeiðsgevaraskipan til eftirlønarskipan. Inngjaldið kann halda fram til í seinasta lagi, tá eftirlønarútgjald byrjar, ella til eftirlønarsamanspararin fyllir 70 ár.
*Stk. 7.* Persónur sambært § 1, stk. 1, ið ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan, hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu hjá einum av TAKS góðkendum eftirlønarveitara. Freistin at stovna eftirlønarkontu er sett til 1. januar 2012 fyri tann, ið er fyltur 18 ár, men ikki 67 ár tann 1. januar 2012. Persónur, ið verður 18 ár eftir 1. januar 2012, skal í seinasta lagi á 18 ára føðingardegi sínum stovna eftirlønarkontu.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta nærri reglur fyri tann, ið er fevndur av aðrari eftirlønarskipan uttanlands sum part av arbeiðssáttmála við útlendskan arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, og har arbeiðið verður útint uttan fyri Føroyar.

**§ 3.** Av inngoldna eftirlønargjaldinum kann ein partur verða brúktur til trygging, meðan restin skal verða nýtt til eftirlønarsamansparing. Tað er einans frádráttarrættur í skattskyldugu inntøkuni sambært § 13 fyri tryggingar, ið fevna um avlamistrygging, óarbeiðsføristrygging, eftirsitutrygging til hjúnafelaga, fráskyldan hjúnafelaga, sambúgvaeftirlønartrygging og barnatrygging.

**§ 4.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður rindað av øllum A og B-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu forvinna, tó so at niðanfyri nevndu peningaupphæddir eru undantiknar:

1. Uppihaldspeningur sambært hjúnabandslóggávuni.
2. Barnapeningur sambært ”lov om børns retsstilling”.
3. Fólkapensjón.
4. Lutaeftirløn.
5. Lívrentu o.a.
6. Fyritíðarpensjón herundir veitingar frá vardum verkstaði.
7. Avlamisveiting.
8. Óarbeiðsførisveiting.
9. Forsorgarhjálp eftir forsorgarlógini.
10. Útbúgvingarstuðul.
11. Vinningur av eydnuspæli, legati, sømdargávum o. l..
12. Starvsfólk hjá danska statinum í Føroyum og persónur, sum í samanhangandi 5 ára tíðarskeið arbeiðir í Føroyum, tó treytað av, at hesi frammanundan hava eina eftirlønarsamansparing uttanlands, sum lýkur treytirnar í hesi løgtingslóg.
13. Persónur, ið fær eftirlønarútgjald sambært hesi lóg.

**§ 5.** Eftirlønarsamansparárin eigur persónliga sína uppsparing, ið er undandrigin ræði hjá eftirlønarsamansparara, og er vard fyri úttøku ella aðrari rættarsókn frá ognarum. Eftirlønarsamansparingin kann ikki avhendast, veðsetast ella verða nýtt sum mótrokning fyri møguligum kravi frá eftirlønarveitara.
*Stk. 2.* Eftirløn kann ikki verða fyri rættarsókn, fyrr enn hon er útgoldin.
*Stk. 3.* Flyting frá einum eftirlønarveitara í Føroyum til annan eftirlønarveitara í Føroyum er ikki at meta sum útgjald í skattligum høpi.
*Stk. 4.* Henda løgtingslóg forðar ikki fyri, at eftirlønarsamansparing, ið eru inngoldin eftir 1. januar 2012, kann gerast partur av felags búnum, sum í sambandi við hjúnaskilnað verður býtt og flutt millum eftirlønarsamansparingar og eftirlønarveitararnar hjá hjúnafeløgunum, uttan at avgjald verður rindað til landskassan.

## Kapittul 2

*Eftirlønarveitarar*

**§ 6.** TAKS góðkennir eftirlønarveitara, ið er skrásettur og hevur heimstað í Føroyum.
*Stk. 2.* Eftirlønarsamansparing skal stovnast í lívstryggingarfelagi, eftirlønargrunni ella peningastovni.
*Stk. 3.* Umsitingar- og avgreiðslugjald av eftirlønarskipan hjá tí einstaka persóninum verður goldið av eftirlønarsamansparingini.
*Stk. 4.* Eftirlønarveitarar senda árliga teldutøka kunning til TAKS um upplýsingar hjá øllum teimum, ið eru skrásett í eftirlønarskipanini hjá eftirlønarveitaranum. Kunningin skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 20. januar eftir inntøkuárið ella fyrsta gerandisdag eftir 20. januar. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, hvørjar upplýsingar skulu sendast til TAKS, og hvussu hesar upplýsingar skulu latast TAKS.

*Eftirlønarskipanir, stovnaðar uttanlands*

**§ 7.** Persónur, sum er frítikin fyri at gjalda inn eftir § 4, nr. 12, skal í staðin fyri inngjald eftir § 2 gjalda til eftirlønaruppsparingina uttanlands, men frádráttur verður ikki veittur í Føroyum av hesum inngjaldi. Inngjaldsprosentið til útlendsku skipanina skal í minsta lagi vera 8/15 av inngjaldinum, ásett í § 2.
*Stk. 2.* Sáttmálasett starvsfólk hjá danska statinum í Føroyum kunnu gjalda til arbeiðsgevaraeftirlønarskipan í Danmark við frádrátti í skattskyldugu inntøkuni í Føroyum, men er hetta treytað av, at eftirlønarskipanin lýkur treytirnar fyri frádrátti í hesi løgtingslóg.

## Kapittul 3

*Íløgureglur fyri eftirlønarveitarar*

**§ 8.** Eftirlønarsamansparingar í peningastovni skulu vera á serligari eftirlønarinnlánskontu, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum.
*Stk. 2.* Í eftirlønarhøpi í sambandi við virðisbrævahandil skal eftirlønarsamanspararin í peningastovni vera bólkaður sum smákundi sambært "bekendtgørelse for Færøerne om investor-beskyttelse ved værdipapirhandel”.
*Stk. 3.* Tað verður einans loyvt eftirlønarsamansparararanum at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í londum í Zone A øki. Tað er eftirlønarveitari, ið, vegna eftirlønaruppsparara, fremur virðisbrævahandilin.

**§ 9.** Eftir hesum leisti er loyvt eftirlønarsamansparara hjá lívstryggingarfelag, eftirlønargrunni og peningastovni at hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv sambært hesum lista:

| **Aldur í ár** | **Hægst loyvdi prosentparturin av samansparda virðinum í børsskrásett partabrøv** |
|---|---|
| - 34 | 80 |
| 35 - 44 | 70 |
| 45 - 49 | 60 |
| 50 - 54 | 55 |
| 55 - 59 | 50 |
| 60 - 64 | 35 |
| 65 - 69 | 25 |
| 70 - | 15 |

*Stk. 2.* Tá partabrævaparturin hjá einum persóni er oman fyri hámarkið, sum er ásett í talvuni í stk. 1, verður rebalanserað.
*Stk. 3.* Persóni, yngri enn 60 ár, verður ikki álagt at selja av partabrævagoymslu, hóast

virðið av partabrævapartinum er oman fyri tað hægst loyvda. Rebalanserað verður við, at íløgur bert kunnu verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabræva-parturin er komin niður á hægst loyvda markið fyri partabrævapartin sambært stk. 1.
*Stk. 4.* Hjá persóni, ið er 60 ár ella eldri, skal íløguróðin rebalanserast niður á hægst loyvda partabrævapart í seinasta lagi fyrsta handilsdag eftir, at persónurin er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár, sum ásett í talvuni í stk. 1.
*Stk. 5.* Virðisbrævagoymslan verður gjørd upp til marknaðarvirðið í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari ynskir at byrja útgjald, og í fyrsta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari gerst 67 ár, og í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari gerst 70 ár.
*Stk. 6.* Tað er skylda hjá eftirlønarveitara at tryggja, at ásetingarnar í hesi grein verða fylgdar.

## Kapittul 4

*Útgjaldshættir*

**§ 10.** Eftirlønarsamansparari kann í fyrsta lagi byrja eftirlønarútgjald, tá hann verður 67 ár við undantak av stk. 5, og í seinasta lagi tann dagin, hann verður 70 ár. Í samanspiringartíðarskeiðnum er alt virði, ið er knýtt at eftirlønarsamanspøringini, at meta sum lutaeftirløn, um eftirlønar-samansparari ikki hevur valt alla ella part av eftirlønarsamanspøringini sum lívlanga veiting. Tað áliggur eftirlønarveitaranum í seinasta lagi 6 mánaðar áðrenn eftirlønarsamsparin gerst ávikavist 67 ár og 70 ár at eftirlønarsamanspararan um ásetingina í stk. 7.
*Stk. 2.* Eftirlønarveitarin boðar TAKS frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn útgjald byrjar. Í fráboðanini til TAKS verður ásett, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.

Lutfallið verður býtt soleiðis:

1) í minsta lagi 45% sum lívlong veiting (lívrenta).
2) í mesta lagi 55% sum lutaeftirløn.
3) í mesta lagi 10% sum kapitalútgjald.

Lívlong veiting (lívrenta) er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann tryggjaði persónurin er á lívi, og fellur síðan burtur, tá ið tann, sum hevur rætt til eftirlønina, doyr. Goldið verður A-skattur av útgjaldinum.
Lutaeftirløn er eftirlønarskipan, ið verður útgoldin í eins stórum lutum yvir eitt í minsta lagi 10 ára skeið. Goldið verður A-skattur av útgjøldunum.
Kapitalútgjald er í mesta lagi 10 prosent av samlaðu eftirlønarsamanspøring, sum verður útgoldin sum ein upphædd. Rindað verður avgjald upp á 45 prosent til landskassan. Eftirlønarveitari rindar vegna eftirlønarsamanspararan avgjaldið til landskassan, samstundis sum eftirlønarsamanspararin fær útgoldið upphæddina.
*Stk. 3.* Frá valda útgjaldsdegi sambært stk. 2 er valið bindandi, og lutfallið kann einans broytast frá lutaeftirløn til lívlanga veiting, og tað er TAKS, ið gevur loyvi eftir skrivligari áheitan frá eftirlønar-samansparara umvegis eftirlønarveitara.
*Stk. 4.* Eftirlønarparturin av lívlangari veiting skal ongantíð vera kravdur at vera hægri enn 70 prosent av eini arbeiðaraløn. Upphædd, ið er oman fyri ta kravdu lívlongu veitingina, kann flytast til lutaeftirlønarsamanspøringina.
Landsstýrismaðurin ásetir árliga reglur fyri uppgerð av eini arbeiðaraløn. Uppgerðin er galdandi frá 1. januar á hvørjum ári.
*Stk. 5.* Fyri eftirlønarsamansparara, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at hann, grundað á sjúku, hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, ber til at byrja eftirlønarútgjald, áðrenn eftirlønarsaman-spararin verður 67 ár, sum er ásett í stk. 1. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønar-samanspøringini kann byrja eftir áheitan frá Almannastovuni. Upphædd, ið skuldi

verið brúkt til lívrentu, kann ístaðin verða brúkt til lutaeftirløn. 10 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald og rest sum lutaeftirløn.
*Stk. 6.* Eftirlønin kann í seinasta lagi fara í útgjald sama dag, sum eftirlønarsamansparari verður 70 ár. Útgjald av lutaeftirløn og lívlangari veiting byrja samstundis.
*Stk. 7.* Verður ikki fráboðað 2 mánaðir fyri 70 ára aldur sambært stk. 2, verður alt uppspart eftirlønarvirði gjørt upp, og lutfallið verður býtt við 50 prosent í lutaeftirløn og 50 prosent í lívrentu.

**§ 11.** Eru fleiri eftirlønarsamansparingar hjá ymsum eftirlønarveitarum, gevur eftirlønarsamansparari heimild til høvuðseftirlønarveitara um at savna saman frá hinum eftirlønarveitarunum samlaðu virðini á eftirlønarkontum. Harafturat frá hvørjum eftirlønarveitara hvussu tær ymsu eftirlønarútgjaldingarnar skulu fara fram. Høvuðseftirlønarveitari sendir vegna eftirlønareigara eina samlaða uppgerð og útgjaldsætlan sambært § 10, stk. 2 til TAKS til góðkenningar og avgreiðslu. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri mannagongd og kostnað.
*Stk. 2.* Tá TAKS hevur givið útgjaldsloyvi, ber til hjá eftirlønarveitara at gjalda eftirlønina út eftir tí áseting, sum er galdandi fyri ta einstøku eftirlønarupphæddina. Tað er ikki loyvt eftirlønarveitara at broyta nakað av tí, ið TAKS hevur ásett og góðkent.
*Stk. 3.* Er virðið á eftirlønarsamansparingini minni enn 200.000 krónur, tá ið hon verður uppgjørd við eftirlønaraldur sambært § 10, stk. 2, kann øll upphæddin verða útgoldin sum kapitalútgjald ella sum A-inntøka yvir 3 ár. Er virðið á eftirlønarsamansparingini minni enn 400.000 krónur við eftirlønaraldur, kann øll uppsparingin útgjaldast sum lutaeftirløn yvir í minsta lagi 5 ár.

*Útgjald við deyða*

**§ 12**. Í samansparingartíðarskeiðnum er eftirlønin at meta sum lutaeftirløn, um ikki lívlong veiting er vald. Tá eftirlønarsamansparari doyr, fellur samansparda eftirlønarupphæddin til njótunartilskilaða sambært eftirlønarsáttmálanum.
*Stk. 2.* Njótunartilskilaði kann fáa eftirlønina útgoldna í einum við at rinda avgjald upp á 45 prosent til landskassan av eftirlønarsamansparingini upp til 1 millión krónur, og A-skatt av upphædd, sum er oman fyri 1 millión krónur.
*Stk. 3.* Um njótunartilskilaði er hjúnafelagi ella sambúgvandi, tó ikki barn, kann hann velja at fáa alla ella part av eftirlønarsamansparingini flutta skatta- og avgjaldsfrítt til sína egnu eftirlønarsamansparing, og verður tann samanlagda eftirlønarsamansparingin fevnd av ásetingunum í hesi lóg.
*Stk. 4.* Hevur eftirlønarsamanspararin eingi nærmastu avvarðandi, og er eingin njótunartilskilaður innsettur, verður eftirlønarupphæddin umløgd til eitt kapitalútgjald, og goldið verður avgjald upp á 55 prosent til landskassan. Peningaupphæddin verður síðan partur av búnum.
*Stk. 5.* Skiftirætturin sendir skjøl til góðkenningar hjá TAKS vísandi til hesa grein.

## Kapittul 5

## Skattur av eftirlønarsamansparing

*Inngjald við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni*

§ **13**. Inngjøld til eftirlønarskipan sambært hesi lóg verða goldin á eftirlønarkonto, stovnað sambært § 2, stk. 7.
*Stk. 2.* Sambært § 1, stk. 1, við undantak av ásetingum í § 1, stk. 2 og § 4, skal persónur rinda inn á eftirlønarkonto bæði av A-inntøku og av B-inntøku við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni. Sami skattligi frádráttar-rættur er við

sjálvbodnum inngjaldi sambært § 2, stk. 5 og 6, og inngjaldi sambært § 7, stk. 2 og stk. 5 í hesi grein.

*Stk. 3.* Frádrátturin í skattskyldugu inntøkuni fylgir inntøkuárinum, har inngjaldið sambært stk. 2 er farið fram.

*Stk. 4.* Um eingin eftirlønarkonta er stovnað, verður uppspart eftirlønargjald sett á depotkontu hjá TAKS uttan rentutilskriving.

*Stk. 5.* Hjá B-skattgjaldarum verður eftirlønargjaldið goldið mánaðarliga saman við fyribils B-skattinum. Tá skatturin er álíknaður, verður uppgerð send skattgjaldaranum. Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu gjalda inn til egna eftirløn av yvirskoti við sølu av vinnuvirki. Skuld til eftirlønargjald víkir fyri skattaskuld.

*Stk. 6.* Rindar persónur sjálvboðin inngjøld til eftirlønarskipan, og hetta er at skilja sum roynd at sleppa undan at gjalda skuld til tað almenna, er tað loyvt TAKS at taka peningaupphædd av eftirlønarkontu hjá viðkomandi fyri at rinda skuldina til tað almenna.

*Stk. 7.* Har tryggingarveitari rindar eftirlønargjaldið hjá persóni, ið fær fulla ella partvísa óarbeiðsførisveiting, kann eftirlønargjaldið, ið tryggingarveitarin rindar, ikki dragast frá í skattskyldugu inntøkuni hjá hesum persóni.

*Stk. 8.* Tá persónur, ið hevur verið undir avmarkaðari skattskyldu til Føroya, kemur undir fulla skattskyldu til Føroya, verður alt innvinningartíðarskeiðið fevnt av eftirlønargjaldskyldu.

**§ 14.** Rentur og annar vinningur í eini eftirlønarskipan eru hvørki skatta- ella avgjaldskyldug í samansparingartíðarskeiðnum.

*Stk. 2.* Tað sama er galdandi fyri vinning og tap við innloysing ella sølu av partabrøvum, sølu av tekningarrætti, vinningi og tapi vegna kursbroytingar av lánsbrævagoymslu, útlutan av avtøkuvinningi ella líknandi, tá virðisbrøvini eru partur av eini eftirlønarsamansparing.

*Stk. 3.* Í samband við útgjald verður rentutilskriving, uppspart bonus og annar vinningur sambært stk. 1 og 2 roknað upp í samlaðu útgjaldsupphæddina, og goldið verður avgjald og skattur.

*Inngjald uttan frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni*

**§ 15.** Inngjald til eftirlønarskipan í Føroyum, sum ikki kemur undir treytirnar í hesi løgtingslóg, hevur ikki frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni.

*Stk. 2.* Útgjald sambært stk. 1 verður ikki skattað, tó skal rentutilvøkstur viðgerast eftir kapitalvinningsskattalógini í samansparingartíðarskeiðnum, og virðisøking av eini slíkari eftirlønarskipan verður skattað árliga, ið eftirlønarveitari rindar beinleiðis til landskassan vegna eftirlønarsamansparara. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur.

## Kapittul 6

## Ymiskar ásetingar

*Javning av upphæddum*

**§ 16.** Upphæddirnar, sum eru ásettar í § 2 stk. 4, § 10, stk. 4, § 11, stk. 3, § 12, stk. 2 og § 18 í hesi løgtingslóg verða árliga javnaðar í mun til prístalið 1. juli 2012, sum veður sett til 100 Broytingin í upphæddunum verður útroknað hvønn 1. juli og kunngjørd av landsstýrismanninum sum galdandi fyri komandi álmanakkaár.

*Ásetingar um revsing*

**§ 17.** Verður ásetingin í § 6, stk. 4 ikki fylgd, verða dagbøtur upp á 50.000 kr. álagdar fyri hvønn dag, ið fer út um fyrsta gerandisdag eftir 20. januar.

*Stk. 2.* Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í § 9 og § 11, stk. 2 sendir TAKS í fyrsta lagi eina ávaring. Um brotið ikki

verður rættað, kann eftirlønar-upphæddin verða flutt til annan eftirlønar-veitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønareigaran.

## Kapittul 6
*Skiftisásetingar*

**§ 18.** Persónur, sum er føddur áðrenn 1. januar 1957, og sum fram til 1. januar 2012 hevur goldið til eftirlønarskipan uttanlands við frádráttarrætti í Føroyum, kann, eftir at henda løgtingslóg er komin í gildi, halda áfram við at gjalda til hesa eftirlønarskipan í staðin fyri at gjalda bundna eftirlønargjaldið eftir § 2 í hesi løgtingslóg
*Stk. 2.* Eftirlønarupphæddir, ið eru inngoldnar sambært rentutryggingarlógini, og sum skulu gjaldast út við deyða, kunnu í staðin verða fluttar til eftirlønarsamansparingarkontu hjá hjúnafelaga ella sambúgva eftir reglunum í hesi løgtingslóg.
*Stk. 3.* Eftirlønarupphæddir, ið eru innvunnar sambært rentutryggingarlógini, kunnu fylgja leistinum í hesi løgtingslóg í sambandi við hjúnaskilnað. Flyting millum kontur skal fráboðast TAKS.
*Stk. 4.* Eftirlønarskipanir sambært rentutryggingarlógini kunnu verða fluttar til eftirlønarskipan eftir hesi løgtingslóg og undir somu treytum uttan at vera viðgjørdar sum útgjald. Eftirlønarskipan, ið verður flutt sambært hesum stykki, verður fevnd av teimum nýggju útgjaldsreglunum í hesi løgtingslóg.
*Stk. 5.* TAKS kann loyva, at tað framhaldandi verður inngoldið við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni á eftirlønarskipan, tá eftirlønarskipanin er stovnað áðrenn 1. januar 2012, um inngjøld eftir 1. januar 2012 lúka treytirnar í hesi løgtingslóg.

**§ 19.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í løgtingslógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í løgtingslógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í løgtingslógini um uppihald á stovni o.l., í løgtingslógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, ásetingarlógini, løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

### *Inngangur*

Løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn, nevnd eftirlønarskattalógin (stytt ESL), verður við hesum løgd fyri Løgtingið.

Endamálið er at fremja eina bundna eftirlønarsamansparing fyri allar borgarar við tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Talan er um nýggja lóggávu á økinum.

Dagførdar reglur verða gjørdar um inngjald og útgjald av eftirlønarsamansparing, t.e. hvørji sløg av samansparing geva frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, og hvussu samansparingin verður skattað, tá hon kemur til útgjaldingar. Hetta eru reglur, sum í dag eru ásettar í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. (Rentutryggingarlógin), men sum frameftir fara at verða ásettar í nýggju eftirlønarskattalógini við ávísum broytingum.

Tá samansparingin til eftirløn veksur, gerst eftirlønin sum frálíður so mikið stór, at stórur partur av fólkinum ikki fer at tørva fulla fólkapensjón. At fólkapensjónsútreiðslurnar lutfalsliga fara at minka førir við sær, at landskassin í framtíðini fer at kunna røkja vælferðartænastur til eldri sum t.d. heimarøkt, ellisheim og sjúkrarøkt.

Fyri at eftirlønarsamansparingin skal vera til gagns fyri einstaklingin og fyri samfelagið, skal samansparingin tryggja, at fólk í størri mun fíggjarliga klárar at forsyrgja sær, tá tey gerast pensjónistar. Tí er neyðugt, at eftirlønarsamansparing verður gjørd við leypandi útgjaldingum og ikki sum kapitaleftirlønútgjald í einum. Eisini er neyðugt, at eftirlønin í fyrsta lagi kemur til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum. Við verandi lóggávu, er møguligt at taka eftirlønina út við 60 ára aldur. Hetta tryggjar ikki, at persónurin hevur nóg mikið eftir at liva av, tá persónurin verður pensjónistur.

Við støði í pensjónsnýskipanini verður mælt til, at eftirlønarsamansparing verður gjørd við frádrátti í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjaldi eftir hesum leisti:

- Í minsta lagi 15 prosent eftirlønarsamansparing av øllum A- og B-inntøkum.
- Eyka sjálvboðið inngjald gevur frádrátt.
- Eftirlønarsamansparing kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við 67. ári.
- Eftirlønin skal útgjaldast sum í minsta lagi 45 prosent lívlong veiting og í mesta lagi 55 prosent lutaeftirløn.
- Møguligt er at fáa 10 prosent av samansparingini útgoldið sum kapitalútgjald, tá útgjald byrjar.

*Eftirlønarsamansparing í Føroyum í dag*
Hóast nógvir løntakarar í dag rinda til eftirlønarsamansparing, eru tað langt frá øll, ið rinda, og fleiri rinda ov lítla munagóða eftirlønarsamansparing samanborið við onnur lond.

Nærum allir løntakarar hjá tí almenna rinda til eftirlønarskipan, ið sáttmálapartarnir á arbeiðsmarknaðinum, t.e. arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg, hava avtalað seg fram til við lønarsamráðingum gjøgnum mong ár.

Stórur partur av løntakarunum á privata arbeiðsmarknaðinum rinda eftirløn, serliga í stórum og vælskipaðum fyritøkum. Kortini eru ikki øll, ið rinda eftirløn, og er tað serliga smærri sjálvstøðug vinnurekandi umframt starvsfólk hjá smáfyritøkum sum t.d. handlum, gistingarhúsum, matstovum, kioskum og hýruvognsfyritøkum, ið ikki gjalda til eftirløn.

Í fleiri pørtum av privata arbeiðsmarknaðinum rindar arbeiðsgevari eftirløn, ið verður útgoldin saman við lønini. Síðan stendur tað til starvsfólkið sjálvt, um tey rinda til eftirløn ella ikki. Ásannast má, at nógv av teimum, ið hava slíkt frælsi, velja eftirlønargjald frá, og hava tí størri tøka inntøku, enn tey, ið rinda eftirløn.

## *Rentutryggingarlógin*

Rentutryggingarlógin, ið kom í gildi í 1971, hevði gomlu donsku “renteforsikringsloven” frá 1958 sum fyrimynd. Sama ár, ið føroyingar settu rentutryggingarlógina í gildi, settu danir sína rentutryggingarlóg úr gildi og í staðin var Pensionsbeskatningsloven sett í gildi.
Rentutryggingarlógin hevur í nógv ár havt dagføring fyri neyðini. Fleiri undanfarin landsstýri hava tí havt ætlanir um at endurskoða og dagføra rentutryggingarlógina, men einki munagott er hent.

Hóast nýggj eftirlønarskattalóg verður sett í gildi, verður verandi rentutryggingarlógin framvegis í gildi fyri allar inngjaldingar, ið er farnar fram til og við 2011, eins og útgjald fylgir ásetingum í rentutryggingarlógini. Størsti munurin verður, at ikki kann gjaldast inn sambært rentutryggingarlógini við frádrátti í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjøld eftir 2012. Møguleiki verður fyri at flyta eftirlønarsamansparing millum hjún í samband við hjúnaskilnað og við deyð, uttan at tað verður fevnt av avgjaldi og skatti.

***Nýggjar ásetingar í eftirlønarskattalógini og høvuðsbroytingar í mun til rentutryggingarlógina***

*Øll á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda 15 prosent til eftirløn í seinasta lagi í 2021.*
Sambært uppskotinum skulu allir borgarar frá 18 til 67 ár, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, gjalda til eftirlønarsamansparing.

Gjaldast skal til eftirlønarsamansparing av øllum a-inntøkum og b-inntøkum og teimum veitingum, ið eru tengdar at arbeiðsmarknaðinum, tað eru útgjøld frá arbeiðsloysisskipanini, barsilsskipanini og dagpeningaskipanini.

Gjaldið verður í 2012 sett til 1,5 prosent av øllum inntøkum. Gjaldið hækkar við 1,5 prosent-point um árið til tað í 2021 er komin upp á kravdu 15 prosentini.

Fyri ein persón, sum í dag als ikki rindar til eftirløn, verður sostatt ein long skiftisskipan. Hetta verður gjørt, fyri at kravda samansparingin ikki skal fáa ov stóra ávirkan á keypsorkuna hjá tí einstaka.

Øll inngjøld til eftirlønarsamansparing sambært hesi løgtingslóg geva frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, og fyri arbeiðsgevaraskipan tað sum á fakmáli verður nevnt burtursíggingarrættur.

*Eftirlønin verður sett saman av 3 sløgum av útgjaldi*
1. Lívlang veiting (ofta nevnt Lívrenta).

Hetta er ein eftirlønarsamansparing, har samanspsrarin fær eitt fast eftirlønarútgjald so leingi, sum persónurin er á lívi. Útgjald verður skattað sum vanlig a-inntøka.

2. Lutaeftirløn.

Er ein eftirlønarsamansparing, har samansparda virðið við útgjald verður býtt yvir í minsta lagi 10 ár. Tá øll uppsparda upphæddin er útgoldin eftir minst 10 árum, steðga útgjaldingarnar. Útgjald verða skattað sum vanlig a-inntøka.

3. Kapitalútgjald.

Hetta er ein avloysari fyri kapitaleftirløn. Kapitalútgjald er eitt útgjald í einum, tá hin einstaki byrjar útgjald av eftirlønarsamansparingini. Kapitalútgjaldið er ásett til í mesta lagi at vera 10 prosent av samlaða virðinum av eftirlønarsamansparingini Rindað verður avgjald á 45 prosent av útgoldnu kapitalupphæddini.

Mælt verður til, at í minsta lagi 45 prosent av eftirlønarsamansparingini verður brúkt til eina lívrentu, meðan í mesta lagi 55 prosent kann verða brúkt til lutaeftirløn og í mesta lagi 10 prosent til kapitalútgjald.

Omanfyrinevndu ásetingarnar tryggja sum frá líður, at tann einstaki spararin hevur eina rímiliga stóra eftirløn tey fyrstu 10 árini av pensjónistalívinum og síðani eina minni eftirløn, so leingi persónurin livir.

*Einki útgjald fyrr enn við pensjónsaldur*
Pensjónin kann sum høvuðsregla í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá pensjónsaldrinum, ið er 67 ár. Útgjald av lívlangari veiting og lívrentu byrjar samstundis og í seinasta lagi, tá persónurin gerst 70 ár. Við ikki at loyva útgjald fyrr enn við pensjónsaldur tryggjar landskassin sær, at samansparingin ikki er brúkt, áðrenn uppspararin kemur til pensjónsaldur.

*Tryggingar*
Sambært verandi Rentutryggingarlóg er loyvt at brúka part av eftirlønarinngjaldinum at keypa tryggingar fyri. Ætlanin er, at henda skipan skal halda fram. Tó er einki krav um, at ávísur partur av upphæddin skal nýtast til tryggingar. Tríggjar orsøkir eru til hetta. Ávísir borgarar hava sera lítlan tryggingartørv, t. d. eldri fólk við ongum forsyrgjaraskyldum og ongum húsaláni ella støk við ongum forsyrgjaraskyldum. Hin orsøkin er, at tað er sera dýrt hjá fólki, sum hava ávís brek ella ávísar sjúkur at lata seg tryggja. Nógv ynskja tí als ikki at nýta ein stóran part av inngjaldinum til tryggingar. Triðja orsøkin er, at keyp av tryggingum minkar um samansparingina, og tað er tí týdningarmikið, at ongin samansparari við lóg verður álagdur at keypa tryggingar.

*Kapitalpensjónin avtikin*
Kapitalpensiónin er í verandi líki ein sera góð skipan fyri tann einstaka og ein sera vánalig skipan fyri landskassan. Um ein persónur rindar til kapitalpensjón kunnu 57 % dragast frá hjá øllum teimum, sum hava skattskylduga inntøku yvir 250.000 kr. Hinvegin fær landskassin bert 35 % í avgjaldi, tá upphæddin verður goldin út. Útgjald av kapitaleftirløn kann gerast tá spararin er 60 ár, og sostatt hevur landskassin onga trygd fyri, at spararin hevur nakað at liva av, tá hann verður pensjónistur.

At frádráttarrætturin fyri kapitalpensjónir verður avtikin, ger, at størri partur av eftirlønarsamansparingini verður útgoldin sum leypandi mánaðarligar gjaldingar (sum lutaeftirlønir og lívlangar veitingar) frá og við at fólk at gerast pensjónistar. Landskassin røkkur sostatt tveimum málsetningum við broytingini. Annar er, at landskassin fær trygd fyri, at inngjøldini veruliga verða nýtt til eftirlønarendamál, tað er, at borgarin nýtir útgjaldingarnar at liva av, tá hann ella hon er vorðin pensjónistur. Hin er, at landskassin kann mótrokna í fólkapensjónini, tá eftirlønirnar gerast rímiliga stórar, og sostatt fara útreiðslurnar til fólkapensjón at minka í framtíðini.

*Frítøka fyri inngjald til eftirløn*
Einstakir bólkar skulu ikki gjalda til eftirløn. Tænastumenn fáa sum part av setanini rætt til eina eftirløn. Um teir eisini gjalda inn til eftirløn sambært hesi løgtingslóg, fara teir at fáa tvær eftirlønir. Tí eru tænastumenn frítiknir fyri at gjalda til bundnu eftirlønina av síni tænastumannaløn.

Persónar, sum gjalda til eftirlønarskipan sambært sáttmála teir hava við útlendskan arbeiðsgevara fyri arbeiði, ið verður útint uttanlanda, eru eisini frítiknir at gjalda til bundnu eftirlønina av løn goldnari av útlendska arbeiðsgevaranum.

Einki krav er heldur um, at fyritíðarpensjónistar skulu gjalda til eftirløn. Fyritíðarpensjónistar kunnu sigast at vera í tveimum bólkum. Annar bólkurin eru tey, sum ongantíð hava verið í einum vanligum arbeiðsmarknaðarrelateraðum arbeiði á arbeiðsmarknaðinum. Hesin bólkur av fólki fevnir m.a. um menningartarnaði og psykisk sjúk, og fáa tey aloftast lívlanga almenna veiting, fyrst sum fyritíðarpensjón, og við pensjónsaldur fáa tey fólkapensjón restina av lívinum.

Hin bólkurin eru tey, sum gerast fyritíðarpensjónistar í miðjum arbeiðsaldri. Roknað er við, at flestu løntakarar brúka 2-5 prosent av teimum 15 prosentunum til tryggingar. Um ein partur verður nýttur til óarbeiðsføristrygging, so eru treytirnar vanliga, at um tann tryggjaði gerst óarbeiðsførur, so rindar tryggingarfelagið honum ávísan prosentpart av lønini, t.d. 50

prosent, sum tryggingargjald. Harumframt rindar tryggingarfelagið eisini eftirlønargjald fyri tann tryggjaða. Hetta verður nevnt gjaldsundantøka.

Tí verður ikki hildið at vera rætt at seta lógarkrav um at skula rinda eftirlønargjald av fyritíðarpensjónini.

Lesandi eru undantikin gjaldi til eftirløn av útbúgvingarstuðlinum.
*Hámark fyri inngjald til lógarbundnu eftirlønina*
Eingin borgari verður kravdur at rinda meir enn 100.000 kr. árliga til lógarbundnu eftirlønina. Endamálið við løgtingslógini er, at allir borgarar skulu hava eina hóskandi samansparing, tá teir gerast 67 ár. Um einki hámark er, so er vandi fyri, at samlaða samansparingin verður órímiliga stór hjá teimum, sum hava sera stóra inntøku.

*Einki frádráttarhámark fyri inngjald til eftirløn*
Einki forðar fólki fyri at gjalda inn meir enn lógarkravdu 15 prosentini. Ofta velja fólk at rinda eyka inn til eftirlønarsamansparing seinastu árini, áðrenn tey gerast pensjónistar. Øll inngjøld sambært løgtingslógini verða drigin frá í skattskyldugu inntøkuni.

*Íløgureglur*
Eftirlønarsamansparingin kann støðlast (plaserast) fyri at kunna geva eitt betri avkast. Íløgurnar mugu røkjast forsvarliga, og uttan at spararin átekur sær ov stóran váða. Tað verður tí ásett, at parturin av samansparingini, sum kann setast í partabrøv, skal minka, so hvørt sum persónurin nærkast pensjónsaldrinum.

Ein lítil partur av spararunum velur at røkja sínar íløgur sjálvur. Løgtingslógin ásetir, at virðisbrøv bert kunnu handlast gjøgnum peningastovnar, har spararin fær ráðgeving sambært nýggju reglunum um vegleiðing hjá peningastovnum av teirra íløguviðskiftafólkum.

*Útgjald við deyða*
Tá eftirlønarskipan og tryggingarskipan verða stovnað, skal tryggingartakarin samstundis taka støðu til, hvør skal fáa tryggingina og samansparingina, tá hin tryggjaði doyr. Hetta verður nevnt at innseta ein njótunartilskilaðan. Innsetan av njótunartilskilaðum seir ikki tilsíðis vanligu arvareglurnar, sum t.d. reglurnar um tvangsarv.

Við deyða verður 45 prosent avgjald goldið av upphædd upp til 1 mió. kr. Av upphæddini omanfyri 1 mió. kr. verður vanligur a-skattur goldin.

Tað verður møguligt hjá hjúnum og sambúgvandi at kunna flyta frá eftirlønarkontu hjá tí deyða til eftirlønarkontu hjá tí eftirlivandi partinum.

*Eftirlønarsamansparingin kann flytast millum hjúnafelagar í sambandi við hjúnaskilnað*
Møguligt verður hjá hjúnafelagum sum part av, at búgvið verður skift í samband við hjúnaskilnað, at flyta uppspardar eftirlønarupphæddir millum eftirlønarkontur hjá hvørjum øðrum uttan at rinda avgjald og skatt av fluttu eftirlønarsamansparingini.

*Frádráttur verður bert veittur fyri inngjøld til føroyskar eftirlønarskipanir*
Ein lutfalsliga stórur partur av løntakarunum, serliga innan heilsuverkið, rindar til danskar eftirlønarskipanir. Hetta er farið fram, hóast føroysk tryggingarlóggáva bert loyvir føroyingum at vera viðskiftafólk í føroyskum tryggingarfeløgum.

Eftirlønarskattalógin fer í framtíðini bert at geva frádrátt í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjøld til føroyskar eftirlønarskipanir. Neyðugt verður tí, at tey fakfeløgini, sum higartil hava havt avtalu við danskan eftirlønarveitara, annaðhvørt stovna føroyskan eftirlønarkassa ella gera avtalu við onkran av verandi eftirlønarveitarum í Føroyum.

*Skiftisskipan fyri spararar, ið gjalda til danskar eftirlønarskipanir*
Ætlanin er tó, at tey, sum ikki hava so nógv ár eftir á arbeiðsmarknaðinum, skulu kunna halda fram at gjalda til danskar eftirlønarveitarar, um tey ynskja tað. Tey, sum eru fødd fyri 1. januar 1957, kunnu halda fram at gjalda til ta skipan, tey hava í dag. Tey, sum eru fødd frá og við 1. januar 1957, skulu gera avtalu við føroyskan veitara um inngjøld frá og við 2012, og tað fevnir eisini um tey, ið ikki hava stovnað eina eftirlønarskipan og eru fødd fyri 1. januar 1957.

*Ígildiskoma*
Meðan uppsparing sambært rentutryggingarlógini verður útgoldin sambært ásetingunum í rentutryggingarlógini, er ætlanin sambært lógaruppskotinum, at samansparing inngoldin frá og við 2012 skal útgjaldast eftir nýggju løgtingslógini, ið fær virknað frá 1. januar 2012.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar og umsitingligar avleiðingar fyri landið. Útreiðslur landskassans til fólkapensjónir fara at minka, so hvørt sum eftirlønarsamansparingin fer at fíggja ellisárini hjá fólki. Øktu eftirlønirnar fara at tálma útreiðsluvøksturin til fólkapensjón. Henda útreiðslutálman er ein týðandi partur av málsetninginum við pensjónsnýskipanini. Hvussu stóra ávirkan økta samansparingin fær á útreiðslugongdina sæst í yvirlitinum yvir ávirkan av pensjónsnýskipani sum heild. Hetta sæst í “Fíggjarligt yvirlit” á síðu 11-15 fremst í bókini.

Umsitingarligi kostnaðurin hjá TAKS fer at vaksa munandi, bæði tá atlit verður tikið til menning av nýggjari KT-skipan, umframt umsiting av nýggju eftirlønarskattaskipanini.

Tøkniliga verður eftirlønarsamansparingin frá 2012 skipað talgild gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS, sum longu nú koyrir á Elektron. Henda loysn er einføld og minkar um manuella arbeiðið hjá TAKS.

Umleið 600 persónar gerast pensjónistar á hvørjum ári. Við byrjan av útgjaldi av eftirlønini skal TAKS góðkenna, at útgjaldshátturin lýkur treytirnar í løgtingslógini. Hetta má gerast manuelt, tó kunnu oyðubløð verða nýtt í stóran mun.

Umsitingarligi kostnaðurin hjá TAKS til íverksetan verður 2,5 mió. kr. í 2011 og 0,1 mió. kr. í 2012. Árligu rakstrarútreiðslurnar frá 2012 og frameftir eru mettar at verða 1,7 mió. kr. Útreiðslurnar síggjast í talvu 4 í “Fíggjarligt yvirlit” á síðu 11-15 fremst í bókini.

Mett verður ikki, at uppskotið fær fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Fyri borgarar, sum í dag ikki gjalda til eftirlønarsamansparing, fer uppskotið at hava negativar fíggjarligar avleiðingar. Við at gera eina langa skiftisskipan yvir 10 ár, har bert 1,5

prosent verður goldið fyrsta árið, minkar ávirkanin á tøku inntøkuna hjá teimum, sum í dag einki gjalda til eftirløn og trygging.

Uppskotið hevur bæði positivar og negativar fíggjarligar avleiðingar fyri pensjónsveitarar. Við bundnu eftirlønarsamansparingini, ið sum heild bert kann inngjaldast í Føroyum, fara føroyskir pensjónsveitarar at fáa ein munandi vøkstur í teirra virksemi. Hetta verður ein stórur fíggjarligur fyrimunur fyri vinnuna. Av negativum fíggjarligum avleiðingum fyri pensjónsveitararnar kann nevnast, at teimum verður álagt fleiri umsitingarligar ábyrgdir serliga í samband við árliga kunning til TAKS, uppgerð í samband við útgjald og at fylgja við, at íleggjarar fylgja íløgureglunum.

Uppskotið hevur positivar sosialar avleiðingar, serliga fyri ávísar samfelagsbólkar, við tað at alt fleiri løntakarar fara at spara upp til egna eftirløn og eisini, at løntakarar, ið ikki frammanundan hava havt eina eftirlønarskipan, nú fara at verða fevndir av eini eftirlønarskipan.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórar avleiðingar fyri vinnuna sum heild. Tó fer tað at ávirka smáu óskipaðu arbeiðsgevararnar, tí starvsfólk teirra ofta ikki gjalda til eftirløn. Tey verða nú fevnd av hesi løgtingslóg og skulu gera avtalu við øll starvsfólk um at gjalda til eftirløn av øllum útgoldnum lønum.

Løntakarar í fiskivinnuni gjalda lutfalsliga lítið til eftirløn. Tað verður tí neyðugt næstu 10 árini at broyta sáttmálar teirra munandi.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur beinleiðis avleiðingar fyri altjóða avtalur og reglur, serliga við atliti at Hoyvíkssáttmálanum og sínámillum avtalu millum Danmark og Føroyar um felags tryggingarmarknað.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | (Ja) |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

## Kap. 3. Hoyring

Uppskotið hevur frá 9. august til 1. september 2010 verið til hoyringar hjá hoyringspørtunum hjá Fíggjarmálaráðnum og Almannamálaráðnum, sí yvirlit í skjali 1. Eisini er uppskotið almannakunngjørt á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Viðmerkingar til uppskotið eru komnar frá:

Almannastovuni (skjal 2)
Betri Pensjón (skjal 3)
Fakfelagssamstarvinum (skjal 4)
Farmakonomforeningen (skjal 5)
Felagnum Føroyskir Peningastovnar (skjal 6)
Føroya Arbeiðsgevarafelag (skjal 7)
Føroya Kommunufelag (skjal 8)
Føroya Skipara- og Navigatørfelag (skjal 9)
Innlendismálaráðnum (skjal 10)
Kommunusamskipan Føroya (skjal 11)
Lærarafelagnum (skjal 12)
Landsfelag Pensjónista (skjal 13)
Lív (skjal 14)
MBF (skjal 15)
Nærverkinum (skjal 16)
Pharma Danmark (skjal 17)
SAMTAK (skjal 18)
Stovnum hjá Ríkinum (skjal 19)
Tryggingareftirlitinum (skjal 20)

Við støði í hoyringssvarunum eru fleiri broytingar gjørdar í lógaruppskotinum.

## Kap. 4. Serligar viðmerkingar

### Ad. § 1:

**Til stk. 1.**
Frameftir skulu øll, ið eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum, rinda til eftirløn. Talan er um persónar, sum hava fylt 18 ár men ikki 67 ár, sum skulu gjalda til eftirlønarsamansparing við frádráttarrætti og tí sum á fakmáli verður nevnt burtursíggingarrætti í skattskyldugu inntøkuni. Skyldan at rinda til eftirløn fevnir um allar arbeiðsbólkar á arbeiðsmarknaðinum, sum til dømis privat sett, alment sett, sjálvstøðug vinnurekandi, frítíðaravloysarar og øll inntøka, eisini samsýning fyri fundapening, viðbøtur o.s.fr.

Tá talan er um setanarviðurskifti á bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðinum, so er eftirlønargjald ein partur av lønini, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gjørt avtalu um. Avtalurnar eru gjørdar av fakfeløgum, sum hava samrátt seg til eftirlønargjald við arbeiðsgevarar. Talan hevur verið um prosentpart av lønini, ið er rindað til eftirløn.

Á privata arbeiðsmarknaðinum, har eingin fakfelagssáttmáli er galdandi, hevur eftirlønin verið avtalað millum arbeiðsgevara og starvsfólk. Kortini eru tað fleiri starvsfólk á privata

arbeiðsmarknaðinum, ið ikki hava havt eitt eftirlønargjald knýtt at lønini. Fleiri arbeiðsgevarar hava enntá rindað eftirlønargjaldið afturat lønini, og so hevur tað verið starvsfólkið sjálvt, ið hevur gjørt av, um eftirløn verður rindað ella ikki. Í slíkum førum hava tey allar flestu starvsfólkini valt at fáa eftirlønina sum vanliga løn og hava tí onga eftirlønaruppsparing.

Orðingin fevnir um øll á arbeiðsmarknaðinum, ið hava fulla skattskyldu til Føroya.
At skyldan at rinda eftirløn er ásett fyri fult skattskyldug er eisini grundað á fleiri viðurskifti. Fyri tað fyrsta, so er tað at stovna og hava eina virkna eftirlønarskipan eisini talan um eitt rímiligt inngjald til eftirlønarskipanina, tí umsitingarkostnaður er eisini ein týðandi partur av eftirlønarsamansparingini. Tey, ið eru avmarkað skattskyldug, eru einans upp til 180 dagar í Føroyum og fleiri eru væl styttri tíðarskeið enn 180 dagar, og tá eru umsitingarkostnaðurin ov stórur til, at tað lønar seg.

Fyri tað næsta hevði ein slík eftirlønarskipan eisini fevnt um útlendingar, herundir útlendingar, ið sigla undir FAS-skipanini. Ætlanin við FAS-skipanini er ikki, at slíkir persónar skulu vera við í eftirlønarskattaskipan í Føroyum, tí persónarnir eru møguliga fevndir av øðrum eftirlønarreglum í teirra heimlondum.

Tað er rímiliga lætt at umsita eftirlønarsamansparing hjá teimum, ið eru fult skattskyldug alt árið. Støðan hjá teimum, ið fyrst eru avmarkað skattskyldug og síðani gerast fult skattskyldug, er eitt sindur øðrvísi. Avmarkað skattskyldug eru í mesta lagi 180 dagar í Føroyum og rinda eitt ávíst prosentgjald í skatti av allari inntøku síni, uttan nakran frádráttarmøguleika í skattskyldugu inntøkuni. Men gerast tey fult skattskyldug í árinum orsakað av, at tey hava verið meira enn 180 dagar í Føroyum, so gerast tey fevnd av løgtingslógini um eftirlønarskipan. Tað merkir, at tey hava skyldu at rinda eftirløn fyri alt árið, og má tí ein javning av skattinum gerast, soleiðis at tey bæði verða fevnd av frádráttarrætti og skattaáseting.

Í setanarviðurskiftum er eftirlønargjald ein partur av lønini, ið sáttmálapartarnir hava samrátt seg til. Tá talan er um avmarkaða starvstíð- og skattskyldu, hevur arbeiðsgevarin ikki skyldu at rinda til bundnu eftirlønina, t.v.s. at lønarútreiðslur til ein persón við avmarkaðari skattskyldu, kann vera lægri enn til ein persón, ið skal hava eftirlønargjald umframt lønina. Tað kann eisini hugsast, at arbeiðsgevari rindar lønarupphædd, ið svarar til eftirløn til tann avmarkaða skattskylduga. Men harafturímóti kann ein persónur, ið er fevndur av avmarkaðari skattskyldu, rinda hægri skatt enn ein við fullari skattskyldu. Persónur, ið er avmarkað skattskyldugur, fær ikki nakran frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, men rindar harafturímóti ein bruttoskatt.

Her skulu arbeiðsmarknaðarpartarnir gera av, hvussu tann møguligi trupulleikin verður loystur, tí her er talan um viðurskifti, ið løgtigslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn ikki taka atlit til.

Ásetingin um, at persónur, ið hevur fylt 18 ár men ikki 67 ár, skal rinda til eftirlønarsamansparing, fevnir um tað bundna gjaldið. Tað er kortini einki, ið forðar fyri, at persónur, ið er eldri enn 15 ár men ikki 18 ár og persónur, ið er 67 ár og ikki 70 ár, rindar sambært arbeiðsgevaraskipan ella sjálvboðið inn til eftirlønarskipan við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni.

**Til stk. 2.**
Sambært løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirløn við seinni broytingum er talan um eina tilsøgn frá landinum um eftirløn, ið er knýtt at tænastumannastarvinum.

Lønti tænastumaðurin vinnur sær nóg mikið av eftirlønarrættindum og peningarættindum til, at honum ikki nýtist at vera fevndur av hesi løgtingslóg, tá talan er um løn frá tænastumannastarvinum. Tænastusett hjá danska statinum, sum útinna arbeiði í Føroyum, eru somuleiðis fevnd av áseting um tænastumannasetan, um tey kunnu skjalprógva tænastumannasetanina.

Øll onnur inntøka, ið tænastumannasetti forvinnur, kemur undir vanligu ásetingina í § 1, stk. 1.

Tey starvsfólk, ið eru sett í starv hjá tí almenna undir heitinum "tænastumannalíknandi starv, uttan at vera tænastumannastarv" ella líknandi orðing, skulu gjalda til eftirløn sambært áseting í § 1, stk. 1, um tey ikki í setanarsáttmála hava áseting um, at tey vinna sær eftirlønarrætt eins og tænastumannasett sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirløn.

**Til stk. 3.**
Eftir § 1, stk. 3 í skattalógini kunnu føroysk lesandi varðveita fulla skattskyldu til Føroyar, meðan tey eru uttanlands í lestrarørindum. Velja tey at varðveita fulla skattskyldu til Føroyar, eru tey eftir innanhýsis føroyskum reglum skattskyldug av globalinntøkuni í Føroyum, t.v.s. av allari inntøku síni uttan mun til, hvaðani hon stavar. Lesandi kunnu frítakast fyri at gjalda skatt í Føroyum, um tey eftir einum tvískattasáttmála verða mett at verða skattliga heimahoyrandi í einum øðrum landi.

Lesandi, ið hava varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar, meðan tey eru lesandi uttanlands, eru undantikin gjaldskyldu til eftirlønarskipan fyri lønarinntøku uttanlands, t.v.s. at tey rinda ikki eftirlønargjald av inntøkuni uttanlands til eftirlønarsamansparing í Føroyum. Men starvast tey í styttri ella longri tíðarskeið í Føroyum, verður rindað til eftirløn av inntøku.

**Ad. § 2**

**Til stk. 1.**
Sambært lógini skal rindast til eftirløn av A-inntøku, B-inntøku, útgjaldi frá arbeiðsloysisskipanini, útgjaldi frá barsilsskipanini, útgjaldi frá dagpeningaskipanini, nevndarsamsýningum og viðbótum. Ásetingin í stk. 1 er at rokna sum eitt minsta mark soleiðis at skilja, at um partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava avtalað ein hægri sats, so er hesin galdandi.

Ásetingin um 1,5 prosent í 2012 er ætlað teimum, ið frammanundan ikki hava eftirlønarskipan. Eftirlønarskipanir, ið eru skipaðar sum kollektivar eftirlønarskipanir, stovnaðar við sáttmála millum arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum ella ímillum ein ávísan arbeiðsgevara og allar arbeiðstakarar, sum starvast í virkinum hjá arbeiðsgevaranum, kunnu halda áfram við støði í tí, sum sáttmálin sigur, og í minsta lagi tí prosentupphædd, ið er ásett í hesari lóg.

Øll tey, sum í dag hava eina eftirlønarskipan, har prosentparturin er hægri enn 1,5 prosent, kunnu halda fram at gjalda tað sama prosentgjaldið til eftirlønarskipanina, sum tey higartil hava gjørt. Í 2021 skal eftirlønarinngjaldið vera minst 15 prosent av inntøkuni. Tað er rættiliga ymiskt, hvussu prosentparturin er hjá ymisku yrkisbólkunum, enntá er onkur fakbólkur, sum í dag rindar 18 prosent í eftirlønargjaldi.

Prosentsatsirnir fyri árini 2012 og fram til 2021 eru gjørdir stigvísir, fyri at skiftið frá 1,5 prosentum til 15 prosent ikki skal kennast ov brádligt hjá teimum, ið ikki enn eru byrjað upp á eftirlønarsamansparing.

Tað skal eisini gjaldast eftirlønargjald sambært áseting í § 2 av samsýning fyri nevndararbeiði og aðrari samsýning, ið er A-inntøka.

**Til stk. 2.**
Øll tey, sum í dag hava eina eftirlønarskipan, har prosentparturin er hægri enn 1,5 prosent, kunnu halda áfram at gjalda tað sama prosentgjaldið til eftirlønarskipanina, sum tey higartil hava gjørt.

Telduskipanin hjá TAKS fer frameftir ikki at loyva, at løn fer um afturhaldsskipanina, uttan at eftirlønargjaldið er partur av lønarflytingini. Skattaskipanin hjá TAKS fer einans at taka atlit til tær peningaflytingar, ið eru positivt nevndar í § 4, stk. 1, har einki gjald fer til eftirløn, men øll onnur peningaflyting er fevnd av gjaldskyldu.

**Til stk. 3.**
Persónar, ið hava B-inntøkur (t.d. løntakarar, ið starvast uttanlands og hava varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar), fáa uppkrav um gjald til eftirlønarsamansparing sambært stk. 1.
Tað er serliga hesin bólkurin av fólki, ið hevur B-inntøku, ið ikki rættiliga er komin í gongd við at spara saman til eftirlønarsamansparing. Við hesum lógaruppskotinum verða persónar, ið hava B-inntøkur, sjálvstøðug vinnurekandi og onnur, eisini fevndir av eftirlønarsamansparing.

Eftirlønargjaldið verður knýtt at v-talinum, áðrenn frádráttur verður veittur. Eftirlønargjaldið verður rindað á sama hátt sum B-skattur.

**Til stk. 4.**
Árlig eftirlønarsamansparing upp á 100.000 krónur fevnir eisini um tryggingarpartin av inngjaldinum, sambært § 3. Upphæddin 100.000 krónur er ásett fyri, at gjaldið ikki skal vera órímiliga stórt fyri tær høgu inntøkurnar. 100.000 krónur svarar til 15 prosent av eini inntøku á umleið 670.000 kr. um árið. Mett verður, at tað skal vera samsvar ímillum, hvat ein eftirløntur persónur skal brúka av eftirlønarsamansparing við eftirlønaraldur og tað gjald, hann verður kravdur eftir við støði í A-inntøkuni og B-inntøkuni.

Fyri eftirlønarinngjald, ið er omanfyri 100.000 krónur árliga, kann tann parturin av upphæddini, sum er omanfyri 100.000 krónur, verða goldin út aftur frá eftirlønarsamansparing, um søkt verður um tað hjá TAKS. Umsóknin, ið eftirlønarveitari sendir vegna eftirlønarsamansparara til TAKS um útgjald, skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 1. juni árið eftir, at inngjaldið er goldið. Tíðarásetingin fyri umsóknini er grundað á fyrisitingarlig atlit fyri at forða fyri at skula umlíkna fleiri ár aftur í tíð og/ella flyta frádrátt fram í tíð.

Eftirlønarinngjald fyri hvørt einstakt inngjaldsár verður upplýst á sjálvuppgávuni/ skattauppgerðini, ið verður send øllum skattskyldugum. Eftirlønarsamansparari kann tí síggja á yvirlitinum, hvussu nógv er inngoldið umframt kunning frá eftirlønarveitara.

Tað er somuleiðis møguligt at fráboða TAKS, at ein ynskir ikki at rinda eftirlønargjald omanfyri 100.000 krónur, soleiðis at tað sjálvvirkandi steðgar, tá markið er nátt. Tá sleppur ein undan at søkja um at fáa pening endurgoldnan.

**Til stk. 5.**
Sambært hesi áseting er møguligt sjálvboðið at inngjalda til eina eftirlønarskipan.

Her verður millum annað hugsað um t.d. sjálvstøðug vinnurekandi, ið selja part av síni vinnufyritøku ella alla fyritøkuna.

Einki ovara mark er fyri inngjaldi, t.v.s. at inngjaldsupphæddin er óavmarkað fyri bæði arbeiðsgevaraskipan og sjálvboðin inngjøld. Øll inngjøld fylgja reglunum um frádráttarrætt, sonevnda burtursíggingarrætt, útgjaldshátt, avgjald og skatt, tá eftirlønin verður goldin útaftur.

**Til stk. 6.**
Áseting um at persónur, ið er 15 ár, men ikki fyltur 18 ár, kann inngjalda til eftirløn, er grundað á, at tað eru fleiri, ið eru í vinnu og fevnd av starvssáttmála, ið hevur áseting um eftirlønargjald. Somuleiðis ber tað teimum til at rinda sjálvboðið eftirlønargjald.

Persónur, sum er 67 ár men ikki 70 ár, kann eisini gjalda inn til eftirløn. Persónur avger sjálvur, um rindað verður eftirlønargjald ella ikki. Gjaldast kann inn til eftirlønarsamansparing, til persónur byrjar eftirlønarútgjald og í seinasta lagi til persónur gerst 70 ár. Tað verður eingin frádráttur veittur í skattskyldugu inntøkuni ella sokallaður burtursíggingarrættur givin fyri inngjald til eftirlønarskipan til persón, ið arbeiðir eftir 70 ára aldur. Tað er ásett í lógina fyri at tryggja, at eftirlønarsamansparing kemur til útgjaldingar, meðan persónurin er pensjónistur.

**Til stk. 7.**
Persónur sambært § 1, stk. 1, ið ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan, hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu hjá einum av TAKS góðkendum eftirlønarveitara. Á heimasíðuni hjá TAKS verður listi yvir góðkendar eftirlønarveitarar, ið tey gjaldskyldugu kunnu rinda eftirlønina til.

Freistin at stovna eftirlønarkontu er sett til 1. januar 2012 fyri tann, ið verður 18 ár men ikki 67 ár tann 1. januar 2012. Persónur, ið verður 18 ár eftir 1. januar 2012, skal í seinasta lagi á 18 ára føðingardegi sínum stovna eina eftirlønarkontu. Tað er einki í hesi lóg, ið forðar fyri, at persónur yngri enn 18 ár stovnar eftirlønarkonto, kortini er 15 ára aldursmark niðureftir.

Persónur, ið er 15 ár men ikki fyltur 18 ár, kann við arbeiðsgevaraskipan ella sjálvboðið rinda til eftirlønarsamansparing. Tá slíkur persónur verður 18 ár, er hann skyldugur at rinda inn, og møguligt inngjald í tíðarskeiðnum frammanundan gerst partur av samlaðu eftirlønarsamansparingini.

**Til stk. 8.**
Her verður m.a. tikið atlit til tey, ið sigla undir DIS-skipanini, har tað ikki er møguligt at vera frítikin fyri at gjalda til útlendsku eftirlønina og møguliga trygging sambært starvssáttmála.

**Ad. § 3:**

Sera ymiskt er, í hvønn mun tann einstaki hevur tørv á at tryggja seg sjálvan og síni næstu. Summi hava tørv á at tryggja hjúnafelaga og/ella børn ávíst lívstíðarskeið, meðan onnur hvørki hava hjúnafelaga, sambúgva ella børn undir 18 ár at taka atlit til, og tí kunnu tey spara eina størri upphædd til egna eftirløn.

Tryggingar kunnu stovnast sum partur av eftirlønarskipan. Talan er um hesar tryggingar: Avlamistrygging, óarbeiðsføristrygging, eftirsititrygging til hjúnafelagan, fráskildan hjúnafelaga, sambúgvandi og barnatryggingar.

Avlamistrygging er trygging til tryggjaða sjálvan.

Óarbeiðsføristrygging er ein leypandi veiting, sum persónur fær útgoldið, um hann missur arbeiðsførið heilt ella lutvíst.

Tryggingar, ið fevna um eftirsititrygging til hjúnafelaga, fráskildan hjúnafelaga, sambúgvandi og barnatryggingar, eru at skilja sum fíggjarlig trygging av familju við deyða.

Viðvíkjandi njótunartilskilaða so er tað nærri útgreinað í viðmerkingunum til § 12. Eftirlønaruppsparari kennir best til síni egnu lívsviðurskifti í mun til tørv á trygging. Tí verður tað litið upp til eftirlønaruppsparara eftir ráðgeving frá tryggingarveitarunum at áseta tryggingartørvin og part av eftirlønarinngjaldinum, ið skal fara til tryggingar.

Mælt verður til, at uppsparari og tryggingarfeløg í felag áseta tryggingarpartin, har tann lóggevandi parturin ger karmarnar, ið partarnir sjálvir taka støðu út frá. Ynskiligt er, at uppsparingarparturin er minst 2/3 av eftirlønarinngjaldinum.

Vísir tað seg seinni, at landsstýrismaðurin staðfestir, at tryggingarparturin gerst ov stórur sum heild, verður støða tikin til, um møguligt hámark skal setast fyri tryggingarpartin. Tær tryggingar, ið verða inngoldnar við frádrátti í skattskyldugu inntøkuni, eru skattskyldugar við útgjald.

**Ad. § 4:**

Her eru nevndar inntøkur og peningaupphæddir, ið persónar fáa, og av hesum peningaupphæddum skal ikki rindast eftirlønargjald.

Nr. 4 og 5. Lívrenta og Lutaeftirløn. Tað skal ikki rindast gjald av eftirlønarútgjaldi, hvørki tá talan er um útgjalding av eftirlønarsamansparing til eftirlønarsamansparara sjálvan, ella um talan er um útgjalding av eini fluttari eftirlønarsamansparing. Hetta er bæði galdandi føroysk og útlendsk eftirlønarútgjøld.

Nr. 6. Tey, ið hava fingið tilsøgn um fyritíðarpensjón, eru bólkur av fólki, ið hevur fingið endaliga tilsøgn um gjald av fyritíðarpensjón fram til eftirlønaraldur, og tá tekur vanlig fólkapensjón við. Tað verður á henda hátt tryggjað fyritíðarpensjónisti lívlanga veiting frá tí almenna. Tey, ið aloftast eru fevnd av fyritíðarpensjón longu frá 18 ára aldri, eru menningartarnað fólk og tey, ið eru sálarliga sjúk. Henda eftirlønarskattalóg er ein arbeiðsmarknaðareftirlønarskipan og fevnir um persónar, ið eru á arbeiðsmarknaðinum. Kortini eru tað tey, ið hava verið á arbeiðsmarknaðinum gjøgnum styttri ella longri tíðarskeið, ið vegna arbeiðsskaða, óhapp ella sjúku verða tillutað fyritíðarpensjón. Summi teirra hava eftirfylgjandi møguliga niðursetta arbeiðstíð. Løn, ið fyritíðarpensjónistur, ið frammanundan hevur verið á arbeiðsmarknaðinum, vinnur sær við løntum arbeiði, er fevnd av eftirlønarsamansparingargjaldi og útgjaldi sambært ásetingunum í hesi lóg, hetta er tó ikki galdandi fyri veitingar frá vardum verkstaði.

Nr. 7. Avlamisveiting er veiting frá Almannastovuni.

Nr. 8. Óarbeiðsføristrygging fevnir um útgjald frá trygging fyri niðursett ella mist arbeiðsføri. Eftirlønargjaldið, ið tann óarbeiðsføri møguliga sjálvur rindar, kann dragast frá í skattskyldgu inntøkuni.

Nr. 9. Studningur, ið lesandi fáa frá t.d. Studni og Statens Uddanelsesstøtte verður ikki fevndur av inngjaldskyldu til eftirlønarsamansparing.

Nr. 10. Tað skal heldur ikki rindast eftirlønargjald av vinningum frá eydnuspæli, legatum, sømdargávum o.l. eingangsinntøkum.

Nr. 11. Persónar, ið hava stovnað eftirlønarsamansparing uttanlands og arbeiða í Føroyum í styttri tíðarskeið, kunnu halda fram við inngjaldi til ta útlendsku eftirlønarsamansparingina. Sama er galdandi fyri starvsfólk, ið eru sett í starv í Føroyum av danska statinum. Mett verður, at tað kann gerast torført at fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi frá útlandinum, um fremmand arbeiðsmegi treytaleyst hevur skyldu at gjalda bundna eftirlønargjaldið eftir hesi løgtingslóg. Hetta hava danskir myndugleikar víst á í hoyringsskrivum umframt donsk fakfeløg. Treytin fyri, at loyvi verður givið fyri inngjaldi til eftirlønarskipan uttanlands, er m.a., at eftirlønarveitari góðtekur, at eftirlønarskipanin ikki loyvir inngjaldi til kapitaleftirløn av peninginum úr Føroyum, og eftirlønarsáttmálar eru góðtiknir av TAKS.
Við styttri tíðarskeið er at skilja minni enn 5 samanhangandi ár. Uppskotið forðar ikki fyri, at ein persónur hevur fleiri tíðarskeið á 5 samanhangandi ár.
Mett verður ikki, at tað er ráðiligt at krevja, at virðisøkingin av eftirlønarsamansparingini verður býtt millum Føroyar og landið, har inngjaldið er farið sambært eftirlønarsáttmálunum, tí hetta hevði uttan iva havt við sær, at útlendsku eftirlønarveitararnir ikki høvdu verið áhugaðir í at umsitið eftirlønirnar.

Nr. 12. Persónur, ið fær útgoldið eftirlønarútgjald sambært hesi lóg, rindar ikki til eftirlønarsamansparing.

**Ad. § 5:**

**Til stk. 1-2.**
Eftirlønarsamanspararin eigur persónliga sína eftirløn, ið ikki er undir hansara “ræðisrætti”, men er vard fyri úttøku og aðrari rættarsókn frá ognarum. Eftirlønarsamansparingin kann

heldur ikki avhendast ella veðsetast, ella verða nýtt sum mótrokning fyri møguligum kravi frá eftirlønarveitara. Við ræðisrætti skilst, at samansparari ikki fysiskt hevur ræðisrætt til peningaupphæddina, men sum samansparari avger hann, um og hvussu samansparingin møguliga skal setast í virðisbrøv o.s.fr.

Eftirløn kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hon er útgoldin. Flyting av eftirløn frá einum eftirlønarveitara til annan eftirlønarveitara er ikki at meta sum útgjald í skattligum høpi.

**Til stk. 3.**
Eftirlønarsamansparari avger sjálvur, hvønn eftirlønarveitara viðkomandi ynskir at brúka.

**Til stk. 4.**
Her er talan um málsøki, ið danskir myndugleikar umsita, nevniliga persóns-, familju- og arvarættur. Men tað er einki í eftirlønarskattalógini, ið forðar fyri, at bæði eftirlønarsamansparingin og sjálvt eftirlønarútgjaldið verða býtt millum hjúnini í samband við hjúnaskilnað.

**Ad. § 6:**

**Til stk. 1.**

Kunnað verður á heimasíðuni hjá TAKS hvørjar eftirlønarveitarar, ið eftirlønarsamansparing kann rindast til.

Góðkenning kann einans gerast av eftirlønarveitara, sum er skrásettur hjá Skráseting Føroya og hevur heimstað í Føroyum. Hetta merkir, at feløg sum til dømis eru dóttirfeløg av útlendskum veitara kunnu góðkennast. Ásetingin er gjørd fyri at tryggja, at eftirlønarveitara er álagt at fylgja føroyskari lóggávu, og at TAKS hevur heimild at áleggja eftirlønarveitarum krøv og hava eftirlit v.m.

**Til stk. 2.**

*Tryggingarfeløg:*
Tryggingarfeløgini fylgja ásetingunum í lóg um tryggingarvirksemi, ið er eitt yvirtikið málsøki sambært heimastýrislógini. Sambært reglunum í tryggingarlógini hevur Tryggingareftirlitið fíggjarligt eftirlit við tryggingarfeløgum. Tryggingareftirlitið hevur ikki beinleiðis eftirlit við tryggingartakarum uttan so, at feløgini t.d. ikki hava hildið reglurnar um góðan sið. Tað er Tryggingareftirlitið, ið við konsesssjón gevur tryggingarfeløgum loyvi at virka í Føroyum, og tað er somuleiðis Tryggingareftirlitið, ið hevur eftirlit við, at galdandi lóggáva verður fylgd innan tryggingarøkið. Eftirlitið fevnir eisini um kostnaðarstøðið og ómaksgjøld. Tryggingareftirlitið skal tryggja, at m.a. ómaksgjøld eru samsvarandi við veruliga kostnaðin, eins og Tryggingareftirlitið skal tryggja, at eftirlønarsamansparing hjá fólki, verður umsitin á ein nøktandi hátt. Lóg um Tryggingarvirksemi regulerar ikki avtalurnar millum tryggingarfeløg og tryggingartakarar.

*Peningastovnar:*
Tað er danska Fíggjareftirlitið (Finanstilsynet), ið gevur loyvi til, at peningastovnur kann verða settur á stovn og verða rikin sum peningastovnur. Tað er somuleiðis Fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við føroyskum peningastovnum.

Meðan peningastovnarnir fylgja millum annað “lov om finansiel virksomhed”, ið er danskt málsøki, er tað Fíggjarmálaráðið, ið virkar fyri, at partar av donsku lóggávuni, ið viðvíkja Føroyum, verða settir í gildi við kongligari fyriskipan.

**Til stk. 3.**
Henda áseting er fyri at sleppast kann undan at ymisk gjøld skulu rindast einsæris. Tað ber eisini til við skifti av eftirlønarveitara at rinda gjaldið av flyting av eftirlønarsamansparing.

**Til stk. 4.**
Ein bundin eftirlønarskipan fyri allar persónar, sum hava fylt 18 ár men ikki 67 ár, hevur við sær, at talan er um sera stórar peningaupphæddir, ið persónarnir koma at gjalda inn gjøgnum eitt heilt arbeiðslív umframt møguligt sjálvboðið inngjald. Eftirlønarsamanspararin fær skattligan frádrátt í inntøkuni fyri alt inngjaldið.

Av tí, at talan er um eina bundna eftirlønarskipan við frádráttarrætti/burtursíggingarrætti í skattskyldugu inntøkuni, er sera týdningarmikið, at eftirlønarsamanspararin og tað almenna hava kunnleika um mest týðandi kostnaðar- og avkastviðurskiftini.

Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, hvørjar upplýsingar skulu sendast teldutøkir til TAKS á hvørjum ári.

**Ad. § 7:**

**Til stk. 1.**
Inngjaldsprosentið til útlendsku skipanina skal í minsta lagi vera 8/15 av inngjaldinum eftir § 2. Lutfallið fyri inngjaldi er hereftir á leið tað sama sum tað, sum er ásett í mun til tað kravda inngjaldið. Sum dømi kann nevnast, at um eftirlønarinngjaldið er 15 prosent av bruttolønini t.v.s. av óskattaðum pengum, so er kravið til inngjald til ta útlendsku eftirlønarskipanina 8 % av skattaðum pengum.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 4, nr. 11.

Henda áseting ger tað møguligt hjá eitt nú dønum, ið arbeiða styttri tíðarskeið í Føroyum, at rinda til teirra verandi eftirlønarskipan í Danmark av skattaðum peningi í Føroyum. Tá tey so við eftirlønaraldur fáa eftirlønina útgoldna, verður skattur ikki rindaður av útgjaldi, ið er inngoldið av skattaðum peningi í Føroyum.

**Til stk. 2.**
Sáttmálasett starvsfólk hjá danska statinum í Føroyum kunnu gjalda til arbeiðsgevaraeftirlønarskipan í Danmark við sokallaðum burtursíggingarrætti í skattskyldugu inntøkuni í Føroyum. Hetta treytað av, at eftirlønarskipanin lýkur treytirnar fyri frádrátti í hesi løgtingslóg, tað vil siga, at í mesta lagi 10% er kapitalútgjald, restin kann sparast saman sum lívlong veiting ella lutaeftirløn. Eisini ber til at keypa tryggingar, ið lúka treytirnar í hesi lóg.

Fyritreytin fyri sokallaðum burtursíggingarrætti er, at TAKS hevur góðkent eftirlønarsáttmálan. Tað er arbeiðsgevarin, ið hava skyldu til at senda avrit av eftirlønarsáttmálanum til TAKS. Síðan gevur TAKS eina skrivliga váttan fyri

eftirlønarsáttmálan. Har tað eru fleiri eins eftirlønarsáttmálar fyri eins størv, er nóg mikið við góðkenning av tí eina, ið fevnir um allar.

**Ad. § 8:**

**Til stk. 1.**
Eftirlønarsamansparingar í peningastovni skulu vera á serligari eftirlønarinnlánskontu, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum. Uppspard eftirløn kann støðlast í puljum, sambært reglunum í kunngerð: "bekendtgørelse for Færøerne om puljepension og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v."

**Til stk. 2.**
Virðisbrævahandlar í peningastovnum eru álagdir at fylgja reglunum sambært hesi løgtingslóg og øðrum lógum við kunngerðum, ið eru galdandi innan fíggjarvirksemi, ið er galdandi, og sum verða settar í gildi fyri Føroyar. Talan er í løtuni um m.a. “lov om finansiel virksomhed”, “bkg. for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel” og “bkg. om værdipapirhandleres udførelse af ordre”. Tað verður á eftirlønarøkinum alla tíðina eitt krav um, at eftirlønarsamansparin skal verjast á besta og tryggasta hátt. Eftirlønarsamansparin skal í eftirlønarhøpi verða bólkaður sum smákundi/detailkundi sambært "bekendtgørelse for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel”, sum er ein partur av MiFID (Markets in Financial Instruments Directive). Handil t.v.s. keyp og søla av virðisbrøvum kann eftirlønarsamansparari einans gera sum smákundi og við persónligum samskifti við peningastovnin, ið hevur skyldu til at veita ráðgeving. Sostatt ber ikki til hjá eftirlønarsamansparara sjálvum at gera børshandlar um netbanka. Hetta er ásett fyri at tryggja, at íløgurnar gerast á ein hóskandi og gagnligan hátt fyri eftirlønarsamanspararan.

**Til stk. 3.**
Tað verður einans loyvt eftirlønaruppspararanum umvegis eftirlønarveitarum at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í sonevndum londum í zone A-bólki. Tað er danska Fíggjareftirlitið, ið bólkar ymisk lond á henda zone A-lista. At vera bólkaður á hesum lista merkir, at børsirnir (keypsskálarnir) í hesum londum verða mettir sum “serliga” tryggir at gera virðisbrævaíløgur í.

**Ad § 9:**

**Til stk. 1.**
Ásetingin um hægst loyvda prosentpartin av uppsparda partabrævapartinum, ið er ásettur, og býtið millum vinnugreinar ásett eftir § 9 skal verða fylgd av tryggingarveitarum, bæði av tryggingarfeløgum, eftirlønargrunnum og peningastovnum.

Ásett verður, hvussu nógv kann setast í børsskrásett partabrøv alt eftir aldri hjá eftirlønarsamansparara. Partabrøv geva vanliga betri avkast enn lánsbrøv yvir eitt longri áramál. Eftirlønarsamansparing er ein sera long langtíðar íløga. Tað eru tí góðar fakligar grundgevingar fyri at loyva ungum eftirlønarsamansparararum í stóran mun at gera partabrævaíløgur. Hinvegin eru partabrøv ein munandi ótryggari íløga enn lánsbrøv. Tað er tí neyðugt at verja seg ímóti, at samanspararar missa stórar partar av eftirlønarsamansparingini stutt áðrenn teir gerast pensjónistar. Partabrævaparturin má tí minka so hvørt, sum samansparin kemur nærri eftirlønaraldri. Íløgureglurnar eru tí gjørdar soleiðis, at

partabrævaparturin støðugt minkar gjøgnum alt inngjalds- og íløgutíðarskeiðið, soleiðis at tá persónurin nærkast eftirlønaraldri, eru einans 25% av partabrøvunum eftir í virðisbrævagoymsluni. Í øllum útgjaldingartíðarskeiðnum av eftirlønarsamansparingini er loyvt at hava 15 prosent í virðisbrøvum av eftirlønarupphæddini.

**Til stk. 2.**
Tryggjast skal, at partabrævaparturin javnan verður rebalanseraður. At rebalansera merkir, at samanspararin kann gera keyp ella skal fremja sølu í íløgurøðini, sum á donskum verður umrøtt sum portefølje, soleiðis at parturin og slagið av íløgum er í tráð við aldur, váða og onnur viðurskifti hjá eftirlønaruppspararanum.

**Til stk. 3.**
Parturin av partabrøvum kann vera komin upp um tað mest loyvda, tí persónur grundað á aldur hevur fingið eitt lægri hámark fyri partabrævaparti sambært talvuni í stk. 1. Partabrævaparturin kann til dømis eisini verða vaksin grundað á kurshækkingar. Munur verður gjørdur á reglunum fyri rebalansering alt eftir aldri hjá eftirlønar-samanspararanum. Hjá samanspararum yngri enn 60 ár verður rebalanserað við at samansparari, sum er komin upp um partabrævahámarkið, bert kann keypa lánsbrøv.

Uppspararin kann ikki keypa nýggj partabrøv, fyrr enn tað kann fara fram innan fyri loyvda hámarkið. Eftirlønarsamanspararin verður sostatt ikki tvungin til at selja út av síni partabrævagoymslu. Nýggj inngjøld á eftirlønarsamansparingina viðvirka til at hækka partin, sum ikki frammanundan er settur í partabrøv. Eftirlønarsamansparari kann eisini selja av partabrævagoymsluni, tá tað er til hansara fyrimun. Á henda hátt verður partbrævaparturin sum frálíður minni.

**Til stk. 4.**
Eftirlønarsamansparari eldri enn 60 ár skal aktivt rebalansera sína íløgurøð, so partabrævaparturin er innan fyri hámarkið í stk. 1. Rebalanserast skal í seinasta lagi fyrsta handilsdagin eftir, at eftirlønarsamanspararin er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár. Íløgurøð er at skilja sum portefølja á donskum.

**Til stk. 5.**
Orsøkin til uppgerðina av virðisbrævagoymsluni er grundað á útrokningargrundarlagið fyri samlaðu eftirlønarsamansparingina. Tá tann samlaða saldan av virðisbrøvum, lánsbrøvum, innistandandi o.ø. er tøk, ber til at rokna eftirlønarútgjaldsætlan fyri samlaðu eftirlønarsamansparingini, har útgjaldið skal fylgja ásetingini í § 10, stk. 2.

**Til stk. 6.**
Við skylduna hjá eftirlønarveitara meinast, at tá eftirlønarveitari eftir áheitan og sum part av tænastum fyri eftirlønarsamanspararar ger íløgur í virðisbrøv, skulu atlit takast til loyvda prosentpartin í stk. 1.

**Ad. § 10:**

**Til stk. 1.**
Útgjaldið hjá eftirlønarsamansparara kann í fyrsta lagi byrja við 67 ára aldur við undantaki av stk. 5. Útgjaldið kann í seinasta lagi byrja við 70 ára aldur.

Í samansparingartíðarskeiðnum er samlaða virðið, so sum innistandandi peningur, virðisbrøv, lánsbrøv, íløguprógv o.a., ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum lutaeftirløn, um samansparari ikki hevur valt alla ella part av eftirlønarsamansparingini sum lívlanga veiting. Frá valda útgjaldsdegi er valið, ið er gjørt sambært § 10, stk. 2, galdandi.

**Til stk. 2.**
Summir eftirlønarsamanspararar avgera ikki fyrr enn við pensjónsaldur, hvussu samansparingin skal býtast sundur á ymsu eftirlønarskipanirnar. Pensjónsaldurin er í fyrsta lagi frá 67 ára aldri og í seinasta lagi við 70 ára aldur.

Í minsta lagi 45 prosent av eftirlønarsamansparing skulu nýtast til lívlanga veiting, og í mesta lagi 55 prosent skulu nýtast til lutaeftirløn. Møguleiki er tí fyri at fáa eitt kapitalútgjald upp til 10 prosent av samlaðu samansparingini.

Nr. 1. Lívlong veiting:
Við lívlanga veiting skilst veiting, har útgoldin verður ein ávís mánaðarlig ella árlig peningaupphædd, so leingi tann tryggjaði persónurin er á lívi og fellur síðan burtur, tá ið tann, sum hevur rætt til eftirlønina, doyr, t.v.s. at tann, ið hevur rætt til lívlongu veitingina, doyr. Rætturin til lívlanga veiting er ásettur í tryggingarskjalinum. Tað er eftirlønarsamanspararin sjálvur, og um eftirlønarsamansparari hevur sett í sáttmálan ein njótunartilskilaða, ið er ein greitt tilskilaður persónur, ið kemur í staðin fyri tann deyða, fær hesin eftirlønina útgoldna so sum ásett er í tryggingarskjalinum. Sum njótunartilskilaður kann vera hjúnafelagi, fráskildur hjúnafelaga, sambúgvandi, lívsarvingar, ættleidd børn og stjúkbørn. Talan kann vera um eftirsitiveiting, avlamisveiting, eftirlønartrygging ella líknandi (rentutrygging) veiting, ið er at skilja sum arvarenta. Í tryggingarskjalinum skal vera tilskilað tí, sum kann fáa veitingarnar útgoldnar, at tey ikki hava rætt til at velja ímillum lutaútgjald ella kapitalútgjald. Útgjald skal vera leypandi, so leingi sum hjúnafelagin, fráskildur hjúnafelagi /sambúgvandi/lívsarvingar eru á lívi ella tað, ið er ásett í eftirlønarskjalinum.

Tann, ið yvirtekur slíka veiting, fær veitingina so leingi hann er á lívi. Tá tann seinni doyr, steðgar veitingin, og møgulig restupphædd fer í felagspuljuna hjá tí samlaða eftirlønarskaranum. Goldið verður A-skattur av útgjaldinum av eini lívlangari veiting.

Barnarentur: Tíðaravmarkað leypandi útgjald til børn, ættleidd børn, fosturbørn. Útgoldið verður til barnið, men ongantíð longri tíðarskeið enn ásett í eftirlønarsáttmálanum.

Nr. 2. Lutaeftirløn:
Ein lutaeftirløn er ein eftirløn, sum verður goldin í eins stórum lutum yvir minst 10 ár. Útgjaldið kann verða mánaðarliga. Tað ber til at tryggja seg longri enn tey 10 árini. Tað er ikki sett nakað hámark fyri, hvussu nógv ár lutaeftirlønarútgjald kann fevna um. Tað veldst eisini um eftirlønarinngjaldið og virðisøkingina av eftirlønarsamansparingini.

Lutaeftirlønarparturin kann gerast størri enn 55 prosent orsakað av, at peningur kann verða fluttur frá lívlangu veitingini ella kapitalútgjaldi til lutapartin, tí tað er ásett eitt hámark fyri, hvussu stórur partur av eftirlønarsamansparingini skal vera partur av lívlangari veiting, sambært § 10, stk. 4.

Nr. 3. Kapitalútgjald:
Kapitalútgjald er at skilja sum, at í mesta lagi 10 prosent av samansparingini kann verða útgoldið í einum, samstundis sum eftirlønarútgjaldið byrjar. Tað er eftirlønarveitarin, ið

vegna eftirlønarsamansparara rindar 45 prosent í avgjaldi til TAKS, samstundis sum kapitalútgjaldið verður goldið.

Eftirlønarsamansparari avger sjálvur, hvussu hann ynskir at spara upp. Nakrir eftirlønaruppspararar gjalda til eina lívlanga veiting heilt frá ungum árum. Fyri lívlangar veitingar svarar 1,5 árs útgjaldsveiting til umleið 10 prosent av kapitalvirðinum av samansparingini. Fyri at javnseta uppsparing til lívlangar veitingar við lutauppsparingar verður loyvt teimum, ið spara upp til einans lívlangar veitingar, at fáa eina upphædd, ið svarar til 1,5 árs veiting útgoldna í einum við eftirlønaraldur, sum eitt kapitalútgjald. Avgerðin um at spara upp í lívlangar veitingar frá byrjan er tí ikki ávirkað, og viðkomandi fær útgoldið eitt kapitalútgjald, tá eftirlønarútgjald byrjar.

Uppaftur aðrir eftirlønaruppspararar hava bæði eftirlønarsamansparing til lívlanga veiting og eftirlønarsamansparing, ið ikki er greinað. Hesir uppspararar kunnu við útgjald fáa útgoldið 1,5 árs gjald í einum av tí lívlangu veitingini, og 10 prosent í einum av tí eftirlønarsamansparing, ið ikki er sundurgreinað.

Virðið á lívlangu veitingini skal vera í minsta lagi eins stórt sum virðið á tí, sum verður goldið til lutaeftirløn. Trupulleikin er, at ein uppsparing til eina lívlanga veiting ikki hevur nakað neyvt ásett virði, júst tí tað er ein rættur til eina lívlanga veiting. Tað er tó møguligt at gera sundurbýtið so neyvt, at tað er nóg gott at tryggja ætlanini við hesi lóg. Ásett verður tí, at árliga útgjaldið av lívlongu veitingini skal vera eins stórt og árliga gjaldið frá lutaeftirlønarpartinum, um roknað verður við eini lutaeftirløn yvir 15 ár.

**Til stk. 3.**
Her er talan um, at valið av einum ávísum degi er skeringspunktið fyri eftirlønarveitingini. Tað ber einans til at broyta lutaeftirlønarpartin til lívlanga veiting. TAKS gevur slíkt loyvi eftir skrivligari áheitan frá eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara.

**Til stk. 4.**
Her verður serliga hugsað um tey, ið gjalda heilt nógvan pening til eftirlønarsamansparing gjøgnum eitt langt arbeiðslív og hava ikki gagnnýtt møguleikan í § 2, stk. 4, har persónar kunnu fáa pening útaftur, um søkt verður um tað, tá hámarkið fyri inngjaldi er nátt.

Somuleiðis kann talan vera um fólk, sum í longri tíðarskeið hava inngoldið sjálvboðið eftirlønargjald. Talan kann somuleiðis vera um eina flyting av eftirlønarsamansparing hjá hjúnafelaga/sambúgvandi, ið ger, at eftirlønarsamansparingin gerst stór.

**Til stk. 5.**
Henda áseting merkir, at persónur kann byrja at fáa útgoldið sína eftirløn áðrenn 67 ára aldur, hóast persónurin er arbeiðsførur og ikki avlamin, tí hann hevur sjúku, ið skyldast íbornari ílegusjúku, ið ger at miðallivialdurin hjá honum er niðursettur. Tey, ið hava eina diagnosu við íbornum sjúkuílegum, kunnu liva “væl” og hava eitt virkið arbeiðslív og rinda inn til egna eftirløn. Tað er ætlanin, at har tað er staðfest, at miðallivialdur fyri tí ávísu sjúkuni er lægri enn miðal livialdurin hjá “frískum”, at hesi við “sjúkum ílegum” kunnu byrja útgjald fyrr enn 67 ára aldur og í mun til miðalaldur hjá fráskum fólki við hægri miðallivialdri.

Fyri tað fyrsta so er ymiskt, um, nær ella hvussu tann íborna ílegusjúkan ger seg galdandi, tað er eisini sera ymiskt frá fólki til fólk, og slíkt er sera torført at meta um. Fyri tað næsta so er tað ymiskt, hvussu fólk røkja seg sjálvan og sína sjúku, og um fleiri aðrar sjúkur leggjast

afturat. Lógarsmiður hevur tikið atlit til, at tað skal vera ein rímiligheit í øllum hesum kravda inngjaldi. Tað skal geva meining fyri fólk at rinda inn, og tað skal vera rímiligt.

Tað er somuleiðis hugsað um tey, ið gerast álvarsliga sjúk av krabbasjúkum, hjartasjúkum, nýrasjúkum, arbeiðsskaða, ferðsluvanlukku o.s.fr., ið anno 2011 kunnu hava vánalig framtíðarútlit (prognosu), men sum um nøkur ár kunnu lekjast og vera fevnd av miðallivialdrinum, ið er fyri íbúgvar í Føroyum.

Henda eftirlønarskipan, ið verður ein bundin eftirlønarskipan í Føroyum, hevur ikki sín líka í nøkrum øðrum landi enn, og tí fæst ikki íblástur til, hvussu slíkar støður sum miðallivialdur og sjúkur skulu ásetast í hesari lóg. Tað er í øllum førum greitt, at tað skal vera rímiligheit í inngjaldinum og tí, persónur kann fáa útaftur.

Almannastovan, sum í dag umsitur fyritíðarpensjónsøkið, er tann myndugleiki, ið vegna eftirlønarsamansparara sendir áheitan til TAKS um, at ávísir eftirlønarsamanspararar vegna álvarsama sjúku lúka krøvini fyri væntaðan lægri miðallivialdur og tí kunnu byrja eftirlønarútgjald áðrenn 67 ára aldur. TAKS setur í verk útgjald eftir áheitan frá Almannastovuni og eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara sambært § 10, stk. 2.
Um til dømis tann væntaði miðallivialdurin hjá einum persóni verður mettur at vera 10 ár lægri enn miðallivialdurin, so ber til at byrja útgjald av eftirlønini frá 57 ára aldri.

Fyri persón har tað grundað á álvarsama sjúku ikki ber til at tekna eina lívrentu, verður upphæddin, sum skuldi verið brúkt til lívrentu, ístaðin brúkt til lutaeftirløn. Soleiðis verður kravið fyri hesar persónar, at í minsta lagi 90 prosent skal brúkast til lutaeftirløn, meðan 10 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald.

**Til stk. 6.**
Eftirlønin kann í seinasta lagi fara í útgjald sama dag, sum eftirlønarsamansparara verður 70 ár. Útgjald av lutaeftirløn og lívlangari veiting byrja samstundis. Hetta stykki er ásett fyri at fyribyrgja, at tann lívlanga veitingin og lutaeftirlønin verða skumpað nógv ár út í framtíðina.

**Til stk. 7.**
Verður ikki rættstundis fráboðað í seinasta lagi 2 mánaðir fyri 70 ára aldur, verður alt uppspart eftirlønarvirði gjørt upp, og lutfallið verður býtt við 50 prosent í lutaeftirløn og 50 prosent í lívrentu. Henda áseting fer at gera, at eftirlønarsamansparari tekur støðu til síni eftirlønarviðurskifti. Um eingin støða kortini er tikin, er hetta ásett í lógina og verður einki kapitalútgjald goldið.

**Ad. § 11:**

**Til stk. 1.**
Tað er ikki óhugsandi, at eftirlønarsamansparari hevur fleiri eftirlønarskipanir hjá ymiskum eftirlønarveitarum, t.d. hjá tryggingarfelag og hjá peningastovni. Henda áseting hevur týdning, tá tað skal gerast upp, út frá einum skeringsdegi, hvat endaliga saldan á eftirlønarsamansparingini er. Støða skal takast til, hvussu nógv av eftirlønarupphæddini skal til ávikavist lívlanga veiting, lutaeftirløn og kapitalútgjald sambært § 10, stk. 2.

Roknast skal við, at TAKS skal brúka umleið 2 mánaðir til at viðgera hvørja einstaka eftirlønarútgjaldsætlan treytað av, at eftirlønarveitarin hevur flýggjað TAKS allar neyðugar upplýsingar.

**Til stk. 2.**
Útgjaldshátturin kann bert broytast eftir umsókn og góðkenning hjá TAKS.

**Til stk. 3.**
Hetta verður gjørt fyri at minka um umsitingarkostnaðin av nýggju eftirlønarskipanini. Til dømis loysir tað seg ikki at gera lívlangar veitingar fyri helvtina av 400.000 kr., tí kostnaðurin av at gera skipanina er stórur, og upphæddirnar verða ov smábýttar.

Er virðið á eftirlønarsamansparingini minni enn 200.000 krónur, tá ið hon verður uppgjørd við eftirlønaraldur sambært § 10, kann øll upphæddin verða útgoldin sum kapitalútgjald ella sum A -inntøka yvir 3 ár. Er virðið á eftirlønarsamansparingini minni enn 400.000 kr. við eftirlønaraldur, kann øll uppsparingin útgjaldast sum A -inntøka yvir í mesta lagi 5 ár.

**Ad. § 12:**

**Til stk. 1.**
Ásetingarnar í hesi løgtingslóg taka einans atlit til skatt og avgjald á skattaøkinum og ber hetta í sær, at spurningar um arvarætt og arvaavgjald verða viðgjørdir eftir lóggávuni um arv ávikavist arvaavgjald. Tað eru ymisk krøv til eftirlønarsáttmálar í tryggingarfelag og peningastovnum viðvíkjandi nærmasta avvarðandi og njótunartilskilaða, ið á donskum verður umrøtt sum “begunstiget”.

Hjá tryggingarfeløgum er tað ein treyt, at tað ikki eru innsett onnur í eftirlønarsáttmálan (policen) sum njótunartilskilað, enn tey nærmastu hjá tí tryggjaða/tryggingartakaranum sambært tryggingaravtalulógini. Talan er um hjúnafelaga, fráskildan hjúnafelaga, lívsarvingar, ættleidd børn/forsturbørn ella lívsarvingar hjá ættleiddum/fosturbørnum ella ein navngivnan persón, ið hevur felags bústað við tí tryggjaða, tá viðkomandi verður innsettur, ella lívsarvingarnir hjá tí innsetta ella tann sum tryggingarlóggávan til ein og hvørja tíð loyvir sum innsettur sum njótunartilskilaður.

Í eftirlønarsáttmálum hjá peningastovnum kann ikki verða tikin avgerð um útgjald til onnur enn nærmastu avvarðandi, ið er at skilja sum hjúnafelaga, fráskildur hjúnafelaga, sambúgvandi og lívsarvingar, stjúkbørn, fosturbørn og lívsarvingar teirra.

Tað eru fastar reglur fyri, hvør kann setast inn sum njótunartilskilaður, har tað verður givið frádráttur í skattskyldugu inntøkuni.

Henda eftirlønarskattalóg loyvir hesum at verða innsett sum njótunartilskilaður:
Nærmasti avvarðandi, hjúnafelagi, ein navngivin persónur, ið hevur felags bústað við tryggingareigaranum (sambúgvandi), fráskildur hjúnafelagi, børn og teirra lívsarvingar, fosturbørn og teirra lívsarvingar og børn hjá sambúgvandi og teirra lívsarvingar. Tað kann somuleiðis verða tikin avgerð um, at fleiri av hesum nevndu kunnu býta eftirlønarsamansparingin og somuleiðis í hvørjum lutfatlli.

Sambúgvi, eisini kallað samlivandi, er ein navngivin persónur, sum hevði felags bústað við eftirlønarsamanspararan, tá njótunartilskilaði sambúgvin varð innsettur í eftirlønarsáttmálan. Alsamt størri partur av samlivandi pørum í Føroyum liva saman uttan at vera gingin saman í hjúnalag. Um ein sambúgvi doyr, kann vantandi vígslubræv geva trupulleikar fyri tann, ið eftir situr, um tað ikki í eftirlønarsáttmálanum er ásettur ein njótunartilskilaður sambúgvi. Tá viðkomandi eftirlønarsamansparari doyr, kann tann njótunartilskilaði fáa eftirlønina útgoldna, men hædd verður tikin fyri arvi til lívsarvingar eftir arvalóggávuni, ið ikki verður sett til síðis av hesi eftirlønarskattalóg.

**Til stk. 2.**
Í samband við útgjald til nærmasta avvarðandi ella njótunartilskilaða verður rindað avgjald á 45 prosent av samanspardu upphæddini upp til 1 mió. krónur, og av restupphæddini verður A-skattur rindaður. Eru fleiri nærmastu avvarðandi t.d. børn, so er talan um, at upphæddin upp til 1 mió. krónur verður býtt millum børnini, og rindað verður avgjald á 45 prosent. Av restini verður goldin A-skattur.

**Til stk. 3.**
Er njótunartilskilaði hjúnafelagi ella sambúgvi hjá tí deyða eftirlønarsamanspararanum, kann hann fáa eftirlønarrættin fluttan á sína egnu eftirlønarsamansparing. Rætt til at yvirtaka eftirlønarsamansparingina, skatta- og avgjaldsfrítt, sum part av síni egnu eftirlønarsamansparing, sambært hesi eftirlønarskattalóg, hava einans hjúnafelagar og sambúgvar, harafturímóti ikki børn, ættleidd børn, fosturbørn og stjúkbørn og teirra lívsarvingar. Eisini her skal takast atlit til arvarættin hjá lívsarvingum.

Njótunartilskilaði avger sjálvur, hvussu tann møguliga flutta eftirlønarsamansparingin verður samansett sambært ásetingini í eftirlønarsáttmála og hesi eftirlønarskattalóg.

**Til stk. 4.**
Talan er um eina persónliga eftirlønarsamansparing, og tikið verður hædd fyri, um eftirlønarsamansparari hevur nærmastu avvarðandi ella njótunartilskilaðan, so skulu tey hava møguleika at arva og/ella taka yvir part av eftirlønarsamansparingini.

Tá eftirlønarsamansparari hvørki hevur nærmasta avvarðandi ella njótunartilskilaðan, skulu 55 prosent í avgjaldi rindast, tí tað er veittur ein skattligur frádráttur av inngjaldi og ávøkstri í samansparingartíðarskeiðnum.

**Til stk. 5.**
TAKS góðtekur einans váttan frá skiftirættinum um andlát og útgjaldsætlan fyri eftirlønarsamansparing.

**Ad. § 13:**

**Til stk. 1.**
Her er áseting um, at persónur skal rinda inn til eftirlønarsamansparing av allari skattskyldugari inntøku. Samstundis verður veittur frádráttur í skattskyldugu inntøkuni fyri alt inngoldið eftirlønargjald.

**Til stk. 2.**
Við burtursíggingarrætti meinast ein arbeiðsgevaraskipan, har arbeiðsgevari rindar eftirlønargjald hjá løntakara. Tað samlaða eftirlønargjaldið verður beinanvegin skattliga frádrigið í inntøkuni, og tí skal eitt slíkt eftirlønargjald ikki skrivast á sjálvuppgávuna sum egið inngjald og harvið veitast frádráttur fyri. Talan er um at síggja burtur frá gjaldinum, tí verður tað nevnt burtursíggingarrættur. Á donskum verður sama fyribrigdi kallað "bortseelsesret".

Tað eru fleiri arbeiðssáttmálar, har arbeiðsgevari rindar eitt arbeiðsgevaraeftirlønargjald og løntakarin sjálvur rindar eitt eftirlønargjald. Vanligt er, at arbeiðsgevarin rindar bæði arbeiðsgevara- og løntakaraeftirlønargjaldið til eftirlønarveitara í samband við hvørja lønarútrokning og -flyting.

**Til stk. 3.**
Tíðarskeiðið fyri inngjaldi til eftirløn við skattligum frádrátti í inntøkuni er frá 1. januar til 31. desember. TAKS fer at veita vegleiðing á heimasíðuni og á Vinnuglugganum um, hvussu tey við B-inntøku á mest skynsaman hátt sjálvi rinda til egna eftirlønarskipan. TAKS kann somuleiðis senda inngjaldingarkort til tey, ið ynskja tað.

**Til stk. 4.**
Tá eftirlønaruppsparari hevur stovnað eftirlønarkontu hjá eftirlønarveitara verður eftirløn, ið stendur á depotkontu hjá TAKS, flutt til eftirlønarveitara, ið eftirlønarsamansparari ynskir.

**Til stk. 5.**
Eftirlønargjaldið av B-inntøku skal gjaldast saman við fyribils B-skattinum.

**Til stk. 6.**
Skyldug gjøld til tað almenna, tað veri seg skattur, meirvirðisgjald ella líknandi, skulu gjaldast, áðrenn persónur kann fáa skattligan frádrátt í inntøkuni fyri sjálvboðið inngjald til eftirlønarsamansparing. Vísir tað seg, at persónur hevur inngoldið á eftirlønarsamansparing, har tað kann skiljast sum roynd at sleppa undan at gjalda skuld til tað almenna, er tað loyvt TAKS at seta seg í samband við eftirlønarveitara og fáa pening útaftur av eftirlønarkontu og fluttan til TAKS, har mótrokning kann fara fram. Tað er ein fyritreyt, at talan um óvanliga stór inngjøld til eftirløn í mun til inntøkuna, samstundis sum viðkomandi hevur skuld til tað almenna, sum er fallin til gjaldingar.

**Til stk. 7.**
Her er talan um, at tryggingarveitarin rindar eftirlønargjaldið fyri eftirlønarsamansparara, tí tað er ásett í tryggingaravtaluni. Tað verður eisini umrøtt sum gjaldsundantøka.

**Til stk. 8.**
Avmarkað skattskyldugur til Føroyar er persónur, sum ikki hevur bústað í Føroyum, og sum er í Føroyum í styttri tíðarskeið enn 180 dagar. Eftir 180 dagar er viðkomandi fevndur av fullari skattskyldu, og verður tá alt innvinningartíðarskeiðið fevnt av eftirlønargjaldsskyldu.

**Ad. § 14:**

**Til stk. 1-3.**
Rentur fevna um bæði vanligar rentur á kontu í peningastovni og serligar "samansparingarrentur". Harumframt umfatar lógin eisini rentur av lánsbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum, sølu av tekningarættum, har uppsparda upphæddin er nýtt til partabrøv í virðisbrævagoymslu hjá uppsparara, ella har rentan stavar frá puljuskipanum, har rentan er tengd at avkastinum í tí einstøku puljuni.

Tilskriving av bonus er at skilja sum, at tann samlaða bonusupphæddin, sum er tøk í tryggingarfelagnum, verður býtt ímillum teir einstøku tryggingareigararnar. Bonus í samband við skipan í lívstryggingarfelag ella eftirlønargrunni, har limur er tryggjaður eina veiting og luttekur í yvirskotinum hjá felagnum, telur eisini sum samanspart bonus.

Tilskrivaða bonusupphæddin verður nýtt í samsvari við tryggingaravtaluna at keypa trygging fyri, soleiðis, at tær avtalaðu tryggingarveitingarnar verða størri. Í samansparingartíðarskeiðinum er bonus hvørki skatt- ella avgjaldsskyldugt. Rentutilskriving, bonus og vinningur verða útgoldin saman við samanspardu eftirlønini og skattað á sama hátt.

**Ad. § 15:**

**Til stk. 1.**
Víst verður til lógartekst.

**Til stk. 2.**
Renta og annar ávøkstur av eini slíkari eftirlønarskipan verður skattaður í samband við útgjald av eftirlønini við 37 prosent í 2012, 36 prosent í 2013 og 35 prosent í 2014 og eftirfylgjandi ár. Sum renta og ávøkstur er at meta munurin millum samlaðu inngjøldini og útgjaldið. Inngjøldini verða ikki tald við í skattskyldugu inntøkuna.

**Ad. § 16:**

Árliga verða upphæddirnar javnaðar við prístalsvirðinum 1. juli 2012 sett til 100. Broytingin í upphæddunum verður útroknað hvønn 1. juli og kunngjørd av landsstýrismanninum sum galdandi fyri komandi álmanakkaár.

**Ad. § 17:**

**Til stk. 1.**
Tvingsilsdagsbótin á 50.000 krónur er grundað á, at TAKS á hvørjum ári í góðari tíð skal senda sjálvuppgávu/skattauppgerð til øll skattskyldug við upplýsingum um m.a., hvussu nógvan pening eftirlønarveitarar hava fingið í eftirlønargjaldi og saldo o.s.fr. Freistin hjá TAKS at senda slíka fráboðan til øll tey skattskyldugu er sera stutt, tí skattaborgarin skal hava upplýsingarnar í góðari tíð. Freistin hjá skattaborgarum at senda sjálvuppgávuna rættstundis inn aftur til TAKS er 1. mai (sambært uppskoti, sum væntandi verður samtykt av løgtinginum, áðrenn nýggja pensjónslóggávan kemur í gildi) á hvørjum ári. Kemur slík sjálvuppgáva ov seint inn, verður bót á upp til 5.000 krónur áløgd skattgjaldaranum. Tí er tað

rímiligt, at eftirlønarveitarin heldur sína upplýsingarskyldu, og sendir upplýsingarnar rættstundis inn til TAKS, borgaranum til frama.

TAKS hevur ásannað, at ár eftir ár er tað trupult at fáa upplýsingarnar frá summum eftirlønarveitarum til tíðina, og tað hevur verið neyðugt at rykt eftir upplýsingum ferð eftir ferð. Higartil hevur tað ikki verið møguligt at revsa eftirlønarveitarar fyri at lata upplýsingar ov seint inn. Talan er um upplýsing av øllum tølum fyri allar eftirlønarupphæddir, ið eru fevndar av upplýsingarskyldu, og tað er sera óheppið fyri bæði TAKS og skattgjaldaran, at upplýsingarnar ikki koma rættstundis inn til TAKS. Peningur, ið kemur inn fyri dagbøtur, fer í landskassan.

**Til stk. 2.**
Um eftirlønarveitari ikki heldur sína útgjaldsætlan, verður fyrst send ein ávaring. Verður brotið ikki rættað, kann eftirlønarupphæddin verða flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønarsamanspararan, tvs. at eftirlønarveitari, ið ikki hevur rættað brotið, kemur at bera allan kostnaðin av at flyta eftirlønarupphæddina umframt missin, ið eftirlønarsamanspararin hevur av brotinum.

**Ad. § 18:**

**Til stk. 1.**
Við uppskotinum verður mælt til, at persónur, sum er føddur áðrenn 1. januar 1957, og sum fram til 1. januar 2012 hevur goldið inn til eina eftirlønarskipan uttanlands við frádráttarrætti í Føroyum, skal kunna halda áfram við at gjalda inn til hesa eftirlønarlønarskipan í staðin fyri at gjalda bundna eftirlønargjaldið eftir § 2 í uppskotinum. Henda eftirlønarskipan fevnir serliga um starvsfólk, ið starvast innan heilsuøkið.

**Til stk. 2.**
Henda áseting skal geva eftirlivandi hjúnafelaga ella sambúgva (innsettur sum njótanartilskaði) møguleika fyri at flyta tann partin av eftirlønini, ið er uppspard sambært Rentutryggingarlógini til sína egnu eftirlønarsamansparing. Eftirlønin kann einans verða flutt til eftirlønarskipan, ið hevur virknað eftir 1. januar 2012 og verður fevnd av útgjaldingarreglunum sambært hesi eftirlønarskattalóg.

**Til stk. 3.**
Henda lóg letur upp fyri møguleikanum har eftirløn gerst partur av búnum, ið skal gerast upp í samband við hjúnaskilnað. Sambært rentutryggingarlógini er ein flyting til aðra eftirlønarskipan hjá øðrum persóni at skilja sum útgjald og rindast skulu avgjald og skattur av slíkari flyting. Á henda hátt verður møguleiki fyri at flyta millum hjúnafelagar uttan at rinda avgjald. TAKS skal hava fráboðan um slíka flyting.

**Til stk. 4.**
Hóast tað við flyting av eftirlønarsamansparingar- og eftirlønartryggingarkontumr nærum er tað sama, sum hevur verið galdandi frammanundan sambært rentutryggingarlógini, er munurin kortini tann, at skiftið frá lutaeftirlønarsamansparing, lutaeftirlønartrygging og lívlangari veiting gevur heimild til at í mesta lagi 10 prosent av samlaðu eftirlønarupphæddini verður goldið út sum kapitalútgjald av uppsparda eftirlønarvirðinum. Tað er t.d. ikki galdandi í rentutryggingarlógini, har flytingin av lutaeftirlønarsamansparing og lutaeftirlønartrygging ikki hevur sama møguleika fyri kapitalútgjaldi. Men við flyting av

eini kapital- og lutaeftirlønarsparing verða harafturímóti minst 45 prosent av samlaðu eftirlønarsamansparingini, ið verður flutt til nýggju útgjaldsreglurnar, fevnd av lívlangari veiting, meðan restin kann fara til lutaeftirløn og hægst 10 prosent sum kapitalútgjald.

**Til stk. 5.**
Hjá eftirlønarveitarum verður loyvt at halda fram við eftirlønarinngjaldum við tí treyt, at til ber at skilja ímillum pening, ið er inngoldin sambært Rentutryggingarlógini og pening, ið er inngoldin sambært hesi eftirlønarskattalóg. Tað skal vera greiður skilnaður millum peningaupphædd og virðisøking millum báðar eftirlønarskipanirnar ávikavist eftir rentutryggingarlógini og hesi lóg. Ber tað ikki til hjá eftirlønarveitara at ganga hesum kravi á møti, verður nýggj eftirlønarkonta stovnað, ið skal fylgja ásetingunum í hesi lóg.

**Ad. § 19:**

Áseting um gildiskomu.

**Kap. 5. Fylgiskjøl**

Skjal um útgjald á síðu 127.

Fíggjarmálaráðið, tann 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/ Petur Alberg Lamhauge

**Skjal um útgjald í samband við deyða:**

Í hesum skjali eru dømir fyri, hvussu eftirlønarsamanasparing kann verða útgoldin í samband við deyða eftir eftirlønarskattalógini.

# Lívlong veiting/Lívrenta

### Dømi 1 - Rein lívrenta (uttan tryggingarpart)




Tá ið eigarin fyllir 67 ár, verður lívrentan útgoldin og fellur burtur við deyða.

### Dømi 2 - Rein lívrenta (uttan tryggingarpart)




Doyr eigarin áðrenn 67 ára aldur, verður einki útgoldið, heldur ikki til arvingar ella búgvið.

**Dømi 3 - Lívrenta við hjúnafelagaeftirløn (eftirsiturenta)** við deyða áðrenn 67 ára aldur




Doyr eigarin áðrenn 67 ára aldur og útgjalding er ikki byrjað, tekur hjúnafelagaeftirlønin við, men verður í fyrsta lagi útgoldin, tá ið eftirsitandi hjúnafelagin er 67 ár, og útgjalding heldur fram so leingi, sum eftirsitandi hjúnafelagin livir.

Hevur eftirsitandi hjúnafelagin sjálvur eina eftirløn fær eftirlivandi hjúnafelagin soleiðis útgoldið tvær lívrentur við 67 ára aldur.

Er samlaða lívrentu parturin stórur kann ein partur av lívlangari veiting umleggjast til lutaeftirløn sambært § 10, stk. 4.

**Dømi 4 - Lívrenta við barnaeftirløn,** við deyða eftir 67 ára aldur




Er útgjalding byrjað, men eigarin doyr aftaná at útgjald er byrjað, tekur barnarentan við og verður útgoldin beinanvegin inntil 24 ára aldur hjá barni.

**Dømi 6 - Lívrenta við barnaeftirløn,** við deyða áðrenn 67 ára aldur




Doyr eigarin áðrenn 67 ára aldur og útgjalding er ikki byrjað, tekur barnarentan við og verður útgoldin beinanvegin inntil 24 ára aldur hjá barninum.

# Lutaeftirløn

Útgoldin yvir í minsta lagi 10 ár, og garanteraða upphæddin verður altíð útgoldin, dømini eru fyri tíðarskeið á 10 ár

**Dømi 7**




Tá ið eigarin fyllir 67 ár, verður lutaeftirlønin útgoldin og fellur burtur eftir 10 árum.

**Dømi 8**
Tá ið eigarin fyllir 67 ár, verður lutaeftirlønin útgoldin, men um eigarin doyr, áðrenn 10 ár eru liðin, fer útgjaldingin til eftirverandi antin til hjúnafelaga, lívsarvingar ella búgvið.




Um njótunartilskilaði er hjúnafelagin ella sambúgvin fær eftirsitandi hjúnafelagin ella sambúgvin restupphæddina útgoldna í einum upp til 1 mió. kr. móti at rinda avgjald upp á 45 prosent, og upphædd oman fyri 1 mió. kr. móti at rinda vanligan A-skatt. Njótunartilskilaður, hjúnafelagi ella sambúgvin kann tó velja heldur at flyta restupphædd av eftirlønini inn á sína egnu eftirlønarsamansparing.

Er njótunartilskilaði ein lívsarvingur fær hann restupphæddina útgoldna í einum upp til 1 mió. kr. móti at rinda avgjald 45 prosent, og upphædd oman fyri 1 mió. krónur móti at rinda vanligan A-skatt. Eru fleiri lívsarvingar verður upphæddin býtt javnt millum teirra ella tað, ið møguliga er ásett í eftirlønarsáttmála ella testamenti. Eru t.d. tvey børn, so verður 1 mió. kr. býtt í 2 partar, rindað verður 45 prosent í avgjaldi av 500.000 kr. hjá hvørjum barni. Upphædd, ið er omanfyri 1 mió. kr., verður eisini býtt í 2 partar og A-skattur rindaður.

**Dømi 9**
Doyr eigarin áðrenn 67 ára aldur, og eingin útgjalding er byrjað, verður samansparda virði av lutaeftirlønininini útgoldið, antin til hjúnafelaga, lívsarvingar ella búgvið.




Er njótunartilskilaður hjúnafelagin ella sambúgvandi, fær eftirsitandi hjúnafelagin ella sambúgvandi samansparda virðið av lutaeftirlønini útgoldið í einum móti at rinda avgjald 45 prosent upp til 1 mió. kr., og upphædd oman fyri 1 mió. kr móti at rinda vanligan A-skatt.

Er njótunartilskilaður lívsarvingur, fær hesin samansparda virðið av lutaeftirlønini útgoldið í einum móti at rinda avgjald 45 prosent upp til 1 mió. kr., og upphædd oman fyri 1 mió. kr. móti at rinda vanligan skatt.

**Dømi 10**
Um eingin njótunartilskilaður ella lívsarvingur eru, verður samansparda eftirlønarvirðið útgoldið sum eingangsupphædd til búgvið móti 55 prosent í avgjaldi til landskassan.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 165/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 107 frá 26. november 2010, verðar gjørdar hesar broytingar:

Aftaná § 12 verður sett:

"**§ 12a.** Frá 1. januar 2012 ber ikki til at rinda inn á eftirlønarskipan sambært hesi løgtingslóg við frádráttarrætti og burtursíggingarrætti í skattskyldugu inntøkuni.
*Stk. 2.* Allar eftirlønarskipaninir, ið eru fevndar av hesi løgtingslóg fram til 31. desember 2011, verða framhaldandi galdandi og fylgja útgjaldsleistinum, ið er ásettur í hesi løgtingslóg.
*Stk. 3.* Tá eftirlønareigari doyr, ber til hjá njótunartilskilaða at taka yvir eftirlønarskipanina og fylgja ásetingunum í løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn í samband við útgjald.
*Stk. 4.* Í sambandi við sundurlesing og hjúnaðaskilnað er flyting av eftirlønarsamansparing millum hjún ikki at meta sum útgjald sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 5.* Flyting av eftirlønarsamansparing millum hjún er ikki at meta sum útgjald sambært hesi løgtingslóg."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið er ein partur av politisku avtaluni, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan. Fyri at røkka endamálinum í avtaluni er neyðugt við lógarbroytingum í almannapensjónslógini, í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar, í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, í lógini um forsorg, í lógini um uppihald á stovni o.l., í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, skattaásetingarlógini, lógini um landsskatt og kommunuskatt og rentutryggingarlógini. Samstundis verður nýggj lóggáva tilvirkað viðvíkjandi javning av fólkapensjónini, eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn. Ætlaði virknaðurin av hesari lógarbroytingini er sostatt tengdur at øllum hesum broytingum.

*Broytingar í lógaruppskotinum í høvuðsheitum*

Í rentutryggingarlógini (RTL) eru ásetingar um, hvørjar eftirlønarsamansparingar og hvørjar tryggingar kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni, og hvussu ymsu sløgini av eftirlønarsamansparingum skulu skattast, tá tey koma til útgjaldingar.

Við pensjónsnýskipanini er ein nýggj lóg gjørd, lógin um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (stutt nevnd Eftirlønarskattalógin ella ESL), sum fer at áseta reglurnar fyri inngjøld til eftirløn, útgjald og tryggingar frá og við 2012. Reglurnar fyri inngjøld til samansparingar og tryggingar, sum longu eru inngoldin og verða inngoldin fram til ársenda 2011, verða framvegis ásettar í Rentutryggingarlógini (RTL).

Niðanfyri verður nærri greitt frá, hvørjar broytingar verða framdar í RTL í samband við pensjónsnýskipanina.

*Skattligur frádráttur fyri inngjøld til eftirlønarskipanir og tryggingar verður ikki longur veittur við heimild í rentutryggingarlógini:*

Frá ársbyrjan 2012 kunnu eftirlønarinngjøld og tryggingargjøld ikki longur gerast við heimild í rentutryggingarlógini. Nýggj inngjøld frá og við 2012 kunnu bert gerast við heimild í og sambært ásetingum í nýggju lógini um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (ESL).

Í einum longum skiftistíðarskeiði fer RTL kortini at vera ein virkin lóg, tí øll útgjøld av samansparingum, sum eru inngoldin til og við 31. desembur 2011, sum eru inngoldin við heimild í RTL, fara framvegis at verða útgoldin sambært ásetingunum í RTL. Hetta merkir, at inngjøld, sum higartil eru framd við heimild í RTL, eisini fara at vera útgoldin eftir ásetingunum í RTL, so hvørt sum samansparingarnar koma til útgjaldingar tey næstu 50 árini.

*Flyting av samansparing sambært rentutryggingarlógini, so hon kemur undir nýggju eftirlønarskattalógina:*

Tað verður møguligt at flyta samansparing, sum er framd eftir reglunum í rentutryggingarlógini, saman við samansparing sum verður framd eftir nýggju eftirlønarskattalógini. Hetta verður serliga fyrimunarligt fyri tey, sum bert hava framt eina lítla samansparing eftir gomlu reglunum, sum tey so ynskja at leggja saman við nýggju samansparingini.

Somuleiðis verður møguligt at flyta samansparing eftir RTL frá øðrum hjúnafelaganum/ sambúgvanum til nýggja samansparing eftir ESL hjá hinum hjúnafelaganum/sambúgvanum, tá annar parturin doyr.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri borgarar, sum gjalda kapitaleftirløn, tí tey ikki longur kunnu gjalda til kapitaleftirløn, sum higartil hevur givið stórar skattafyrimunir.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Frádráttur verður ikki veittur fyri inngjald til kapitaleftirløn frá 1. januar 2012. Harvið sleppur landið undan at veita skattafrádrátt til hetta slag av eftirløn, sum bert í lítil ella ongan mun gagnar landskassanum.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur sosialar avleiðingar, avleiðingar í fyri umhvørvið ella avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

## Kap. 3. Hoyring

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar. Men innihaldið hevur verið umrøtt í samband við eftirlønarskattalógina.

## Kap. 4. Serligar viðmerkingar

### Ad. § 1

Henda áseting skal geva eftirlivandi hjúnafelaga ella sambúgva (innsettur sum njótanartilskaði) møguleika fyri at flyta tann partin av eftirlønini, ið er samanspard sambært Rentutryggingarlógini til sína egnu eftirlønarsamansparing. Eftirlønin kann einans verða flutt til eftirlønarskipan, ið hevur virknað eftir 1. januar 2012 og verður fevnd av útgjaldingarreglunum sambært løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn.

Henda áseting letur upp fyri møguleikanum har eftirløn gerst partur av búnum, ið skal gerast upp í samband við sundurlesing og hjúnaskilnað. Á henda hátt verður møguleiki fyri at flyta millum hjúnafelagar uttan at rinda avgjald. TAKS skal hava fráboðan um slíka flyting.

### Ad. § 2

Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, tann 1. mars 2011

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 161/2010: Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

Løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 22. desember 2009, fer úr gildi við árslok 2011.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**
Hetta uppskot er ein liður í ætlanunum um eina pensjónsnýskipan. Í januar 2000 varð nýggj almannapensjónslóg sett í gildi í Føroyum. Tá vórðu ásetingarnar um pensjónsviðurskifti hjá fólki, sum fara á stovn, tiknar burturúr pensjónslógini, og ein nýggj lóg um uppihald á stovni kom ístaðin. Lógin um uppihald á stovni o.l. er grundarlagið undir verandi skipan, har pensjónistar, sum hava havt uppihald á bústovnum, ellis- og røktarheimum og pensjónistar, sum eru innlagdir á sjúkrahús ella sálarsjúkrahús í meira enn 6 mðr., fáa niðursetta pensjón - ella tað, sum í vanligari talu hevur verið nevnt "lummapengar".

Leggjast skal aftrat, at skipanin er øðrvísi fyri tey, ið búgva á sambýlum. Pensjónistar, sum búgva á sambýlum innan eldrarøktina, Trivnaðartænastuna og Deildina fyri sinnisveik varðveita í dag sína pensjón og rinda fyri uppihaldið.

Tá almannapensjónslógin og lógin um uppihald á stovni vórðu settar í gildi, var politiska ætlanin sambært almennu viðmerkingunum, at ein nýggj skipan skuldi setast í verk í 2001 soleiðis, at pensjónistar, sum fingu bútilboð ella vórðu innløgd, skuldu varðveita rættin til pensjón og fáa skyldu til at rinda fyri uppihaldið.

Síðani hevur spurningurin um pensjónsviðurskiftini hjá teimum, sum búgva á stovni, verið umrøddur við jøvnum millumbili í politisku skipanini og millum fakfólk og áhugafeløg.

Í almenna kjakinum um bústaðarviðurskifti hjá fólki við serligum tørvi verður ofta borið fram, at í Føroyum verða fólk á stovni institutionaliserað. Hóast tað ofta verður hugsað um hølisviðurskifti í hesum sambandi, so er spurningurin um institutionalisering eins nógv ein spurningur um, hvørt fólk, sum búgva á stovni, skulu hava somu rættindi sum fólk í líknandi støðu, sum búgva heima. T.v.s. um borgarin - tá hann flytur á stovn - varðveitir tey grundleggjandi rættindi, sum hann vildi havt, um viðkomandi búði heima.

Nevnast kann, at í sambandi við danska sosialreformin í 1990unum varð pensjónsskipanin í Danmark broytt soleiðis, at frameftir skuldu øll, sum hava rætt til pensjón, varðveita pensjónina og ístaðin rinda fyri uppihaldið á stovninum. Innan sosialrætt var gamla skipanin, har fólk mistu sína pensjón, nevnd totalinstitutionalisering.

Við pensjónsnýskipanini verður lagt upp til, at allir pensjónistar, bæði fyritíðarpensjónistar og fólkapensjónistar fara at fáa vanliga pensjón uttan mun til, um teir búgva á stovni ella heima. Samstundis verður lagt upp til, at pensjónistarnir í staðin skulu rinda fyri uppihaldið.

Tá skipanin verður broytt á hendan hátt, er ikki longur tørvur á lógini um uppihald á stovni o.l. Tó eru onkrar av ásetingunum framhaldandi viðkomandi, og eru hesar innarbeiddar í uppskotini um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og lutvíst í kunngerð við heimild í forsorgarlógini.

Upplýsast skal, at hetta lógaruppskot er broytt í mun til tað uppskot, sum varð sent til hoyringar hjá avvarðandi pørtum. Uppskotið, sum varð sent til hoyringar, legði upp til, at fyritíðarpensjónistar skuldu varðveita sína pensjón, meðan fólkapensjónistar framhaldandi skuldu fáa niðursetta pensjón. Politiski fylgibólkurin er síðani blivin samdur um, at øll búfólk á stovni skulu varðveita rættin til pensjón.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tað, at pensjónistar, sum uppihalda sær á stovni frameftir fara at fáa pensjón eins og øll onnur, og at hesir koma at rinda fyri uppihaldið. Víst verður annars til viðmerkingarnar í uppskotunum um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir og broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

**Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið leggur upp til munandi bata í rættarstøðuni hjá uml. 390 pensjónistum, ið búgva á stovni. Fólk, sum búgva á stovni, fáa nú somu rættarstøðu, sum aðrir borgarar í líknandi støðu, tá tað kemur til fíggjarlig viðurskifti og skyldur at forsyrgja sær sjálvum.

Lógaruppskotið hevur eisini við sær ein munandi bata í fíggjarviðurskiftunum hjá teimum búfólkum, sum eru fevnd av broytingini. Upphæddin til persónligan tørv, og sum búfólkini eftir verandi skipan fáa útgoldið er ymisk, alt eftir um persónurin er undir ella yvir 60 ár. Fyri persónur undir 60 ár er upphæddin umleið 1.200 kr./mðn. Fyri persónur yvir 60 ár er upphæddin umleið 1.000 kr./mðn.
Væntandi hava búfólkini undir 67 ár rætt til hægstu fyritíðarpensjón, sum er umleið 12.500 kr./mðr. aftaná skatt og gjald til Heilsutrygd. Húsaleigan og gjald fyri uppihald væntast at verða tilsamans 5.500 kr./mðn. Tað vil siga, at tiltøkupeningurin hjá fyritíðarpensjónistum verður umleið 6.750 kr./mðr.
Fyri fólkapensjónistar hevur upphæddin til persónligan tørv verið umleið 1.000 kr./mðn umframt samhaldsfasta, og hevur hetta givið hesum bólkinum eina samlaða upphædd aftaná skatt uppá umleið 3.200 kr./mðn. Við nýskipanini fær pensjónisturin, óansæð hjúnastøðu eina upphædd aftaná skatt uppá umleið 9.900 kr./mðn. Hetta er íroknað samhaldsfasta. Aftaná gjald til Heilsutrygd og gjald fyri uppihald og húsaleigu (tils. 5.500 kr./mðn.) fer fólkapensjónisturin at hava umleið 4.100 kr. eftir um mánaðin.

Upplýsast skal tó eisini, at í verandi skipan fáa búfólk á stovnunum nakrar tænastur, sum stovnurin rindar kostnaðin av – eitt nú heilivág, fysioterapi, hárfríðkan o.a. Broytingin kemur at hava við sær, at búfólk koma at gjalda fyri hesar tænastur, og játtanin til stovnarnar kann sostatt lækkast samsvarandi. Sambært upplýsingum frá Nærverk, eru útreiðslurnar til hesar tænastur umleið 1.000 kr./mðr. pr. búfólk. Gerast skal vart við, at upphæddin á 1.000 kr./mðr. bert er vegleiðandi og skal takast við stórum fyrivarni.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Ongar viðmerkingar.

Almannamálaráðið, tann 1. mars 2011

**Rósa Samuelsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 28. februar 2011

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 158/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið

### § 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið verður gjørd hendan broyting:

Í § 5 verður sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um gjald fyri uppihald á Psykiatriska depli fyri persónar, ið eru liðugt viðgjørdir og fáa pensjón. Gjaldið kann tó í mesta lagi verða tað, sum búfólk á sambýlum, góðkend sambært § 32, stk. 2 í forsorgarlógini, rinda."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

## 1. Almennar viðmerkingar

Sambært uppskoti til semju um pensjónsnýskipan, er politisk semja um, at øll skulu hava rætt til at varðveita sína pensjón samstundis sum tey hava skyldu til at rinda fyri uppihald. Tað er eisini semja um at tey fólkini, sum í dag hava uppihald á Psykiatriska deplinum, og eru liðugt viðgjørd, eisini verða umfataði av broytingini, t. e. at hesi fólk eisini fáa pensjón og fara at gjalda fyri uppihaldið.

Heilsumálaráðið hevur áður umrøtt spurningin við Almannamálaráðið og Landssjúkrahúsið um pensjón til tey, sum eru liðugt viðgjørd og hava á uppihald á Psykiatriska deplinum, tí onki annað búpláss er at skriva tey út til. Fyri at kunna liva upp til politisku semjuna um, at persónarnir á Psykiatriska depli skulu javnt stillast við onnur og fáa pensjón og gjalda fyri uppihaldið hevur tað verið neyðugt at fáa eina lógarheimild til tess, og partarnir hava verið samdir um, at henda heimild skuldi fáast í sjúkrahúslógini.

Broytingarnar, ið nú verða framdar við pensjónsnýskipanini og sjúkrahúslógini, merkja, at núverandi skipan, har fólk sum eru liðugt viðgjørd, innskrivaði og missa pensjónina, verður broytt soleiðis, at tey varðveita pensjónina og skulu so rinda sjúkrahúsverkinum eina upphædd svarandi til tað fólk rinda fyri uppihald á sambýlum.

**Ummælir**
Hetta ítøkiliga lógaruppskotið hevur ikki verið sent til hoyringar, men er ein partur av arbeiðinum við sjálvari pensjónsnýskipanaravtaluni.

## 2. Avleiðingar av uppskotinum

“Uppskot til løgtingslóg um avtøku av lógini um uppihald á stovni”, sum hetta broytingaruppskot er partur av vísir fíggjarligar, umsitingarligar og sosialar avleiðingar fyri tey fólk ið eru liðugt viðgjørd og hava uppihald á Psykiatriska depli.

## 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1:**
Treytin er, at persónarnir hava verið í viðgerð á Psykiatriska deplinum, men hóast liðugt viðgjørdir – framhaldandi eru innskrivaðir á sjúkrahúsinum orsaka av at tað ikki er nakað búpláss at útskriva teir til.

Tá tað verður víst til, at gjaldið í mesta lagi kann verða tað sum búfólk á sambýlum, góðkend sambært § 32,stk. 2 í forsorgarlógini, rinda, er talan um sambýlini innan Deildina fyri sinnisveik. Hesi rinda í løtuni uml. 5500 kr. fyri uppihaldið t.e. húsaleigu, el/hita, mat v.m.

**Til § 2:**
Lógarbroytingin fær gildi samstundis sum pensjónsnýskipanin fær gildi, t.e. 1. januar 2012. Hetta merkir at lógin er galdandi fyri uppihald hjá liðugt viðgjørdum sjúklingum á Psykiatriska depli eftir gildiskomuna. Av tí at fleiri av fólkunum, ið hava uppihald á deplinum og fara at fáa pensjón frá 1. januar 2012, eru liðugt viðgjørd áðrenn hesa dagfesting hevur lógin eisini virknað fyri persónar, ið eru liðugt viðgjørdir áðrenn 1. januar 2012.

Heilsumálaráðið, tann 1. mars 2011

**John Johannessen**
landsstýrismaður

/Poul Geert Hansen

# Yvirlit yvir hoyringspartar

Uppskotið til pensjónsnýskipan varð kunngjørt á einum fundi fyri innbjóðaðum áhugapørtum á Hotel Hafnia 24. juni 2010. Eftir fundin vórðu lógaruppskotini send til hoyringar um miðan juli. Tó varð lóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn fyrst sent til hoyringar 9. august 2010. Hoyringsfreistin fyri øll lógaruppskotini varð sett til 1. september 2010.

Øll lógaruppskotini vórðu løgd á heimasíðina hjá Fíggjarmálaráðnum og Almannamálaráðnum samstundis, sum tey vórðu send til hoyringar.

Niðanfyristandandi talva vísir partarnir á hoyringslistanum hjá Fíggjarmálaráðnum og Almannamálaráðnum í sambandi við pensjónsnýskipanina. Á listanum er sett "X", har sum Fíggjarmálaráðið og/ella Almannamálaráðið hava móttikið hoyringsskriv frá pørtunum.

**Talva 1: Yvirlit yvir hoyringspartarnir. (X=hoyringsskriv móttikin).**

| | |
|---|---|
| **Fakfeløg:** | |
| | Akademikarafelag Føroya (AKF) |
| | Almanna- og heilsurøktarafelagið |
| | Arkitektafelag Føroya |
| | Bioanalytikarafelagið |
| | Blaðútgevarafelag Føroya |
| | Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya |
| X | Dansk Farmaceutforening, Pharma Danmark |
| | Ergoterapeutfelagið |
| | Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum |
| X | Farmakonomforeningen |
| | FAS Serlæknafelag Føroya |
| | Felag tænastumanna landsins |
| X | Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (Fakfelagssamstarvinum) |
| | Felagið Maskinmeistaralærarar |
| | Føroya Arbeiðarafelag |
| | Føroya Byggifrøðingafelag |
| | Føroya Fiskimannafelag |
| | Føroya Handverkarafelag |
| X | Føroya Lærarafelag (Fakfelagssamstarvinum) |
| | Føroya Postfelag |
| | Føroya Prentarafelag |
| | Føroya Psykiatrifelag |
| X | Føroya Skipara- og Navigatørfelag |
| | Føroya Tekniska Lærafelag |
| | Føroya Verkfrøðingarfelag |
| | Fysioterapeutfelag Føroya |
| | Havnar Arbeiðmannafelag |
| X | Havnar Arbeiðskvinnufelag (Fakfelagssamstarvinum) |
| | Heilsuhjálparafelag Føroya |
| | Hjálparlæknaráð Føroya |
| | HK Føroya deild |
| | Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag |

| | |
|---|---|
| | Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag |
| | Kost- og føðslufelag Føroya |
| | Lærarafelag Handilsskúlans |
| | Landsfelag Handverkaranna |
| | Ljósmøðrafelag Føroya |
| | Magistarafelag Føroya |
| | Maskinmeistarafelagið |
| | Motorpassarafelag Føroya |
| | Musikklærarafelag Føroya |
| X | Pedagogfelagið (Fakfelagssamstarvinum) |
| | Rithøvundafelag Føroya |
| | S & K Felagið |
| X | Samtak |
| | Starvsfólkafelag Føroysku Sparikassanna |
| | Starvsfólkafelagið í Føroya Banka |
| X | Starvsmannafelagið (Fakfelagssamstarvinum) |
| | Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara |
| | Yrkisfelagið Trygdin |

**Arbeiðsgevarar:**

| | |
|---|---|
| X | Føroya Arbeiðsgevarafelag |

**Áhugabólkar:**

| | |
|---|---|
| X | Landsfelag Pensjónista |
| X | Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum |

**Almennir myndugleikar:**

| | |
|---|---|
| | Almannamálaráðið |
| X | Almannastovan |
| | Fíggjarmálaráðið |
| | Fiskimálaráðið |
| X | Føroya Kommunufelag |
| | Heilsumálaráðið |
| X | Innlendismálaráðið |
| X | Kommunusamskipan Føroya |
| | Løgmansskrivstovan |
| | Mentamálaráðið |
| X | Nærverkið |
| X | Ríkisumboðið og stovnarnir undir statinum |
| X | Tryggingareftirlitið |
| | Vinnumálaráðið |

**Pensjónsveitarar:**

| | |
|---|---|
| X | Betri Pensjón |
| X | Felagið Peningastovnar |
| | Forsikring og Pension Danmark |
| X | Lív |

| **Flokkar:** |
| --- |
| Fólkaflokkurin |
| Javnaðarflokkurin |
| Miðflokkurin |
| Sambandsflokkurin |
| Sjálvstýrisflokkurin |
| Tjóðveldi |

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Dagur:** 10-07-2010
**J.nr.:** 2009-99110/0050
**(at tilskila í svari)**

*Att. Johnhard Klettheyggj*

**5 lógaruppskot til for-hoyring – pensjónsnýskipan**

Víst verður til teldupost, dagf. 06-07-2010, har 5 lógaruppskot verða send Almannastovuni til forhoyringar. Niðanfyri eru okkara viðmerkingar.

**Lóg um viðbót til ávísar pensjonistar**

Til § 1, 4)
Fyri at umganga at fáa nýggj hugtøk inn (”veruliga ársinntøkan” og ”endurskoða”) verður skotið upp, at stk. 2 verður orðað nakað soleiðis: “*Stk. 2.* Tá pensjón verður um- og eftirroknað, sbr. §§ 21 og 21a í almannapensjónslógini, verður viðbótin tikin við (ella rætturin til viðbótina). Reglurnar í almannapensjónslógini § 22, stk. 1 um upplýsingarskyldu og § 23 um afturgjaldsskyldu eru eisini galdandi fyri veiting sambært hesari lóg.”

**Lóg um áseting og javning av almannaveitingum**

Til § 1, 3)
Skilja vit tað rætt, at ætlanin er at hava eina serliga lóg um javning av fólkapensjón? Um so er, skilja vit ikki, hví grundupphædd sbrt. forsorgarlógini verður tikin við í tí lógina. Vilja mæla frá, at so verður. Fólkapensjónin verður við nýskipanini tann veiting, sum minst líkist einari almannaveiting, tí samhaldsfasta eftirlønin er ein samantengdur partur av veitingini hjá fólkapensjonistum. Tað er tí óheppi at knýta forsorgarveitingar at fólkapensjónini. Í viðmerkingunum undir *Avleiðingar fyri § 9 í forsorgarlógini* stendur tó, at henda grundupphædd verður javnað sum aðrar veitingar sambært lóg um áseting og javning av almannaveitingum. Men undir *Kap. 3 Serligar viðmerkingar* stendur aftur, at upphæddin frameftir verður javnað eins og fólkapensjónin.

§ 1, 4), 4)
*Grund*upphædd til varandi veiting kann ongantíð blíva hægri enn grundupphædd til fyribils veiting. Varandi veiting er ætlað teimum, sum ov leingi hava fingið fyribils veiting og tí mugu *niður* á annað og lægri veitingarstøði. Tað eru tey, sum ikki lúka treytirnar fyri pensjón og tað ikki hevur eyðnast við fyriskipanum at menna arbeiðsførleikan at hjálpa teimum til fíggjarligt sjálvbjargni. § 13-veitingin er ”pr. definitión” lægri enn fyribils veitingin eftir § 9. Loysnin er at kallað hesa *upphædd*, ikki *grund*upphædd. Tí sum skilst er upphæddin, sum ásett er sambært § 13, stk. 1 samløgan av verandi *grundupphædd og viðbót* til fólkapensjón.

Tað er alneyðugt at hava eina *grund*upphædd til mat, klæði, persónliga røkt vm. Tað er í so nógvum samanhangum, at ein grundleggjandi uppihaldsupphædd er neyðug at hava, tá metast skal um fíggjarliga tørvin. Søguliga hevur grundupphæddin verið tann sama í

forsorgarlógini, avlamispensjónslógini og fólkapensjónslógini. Og hon hevur verið javnað. Hóast grundupphæddin í fólkapensjónini ikki hevur verið javnað í nógv ár, er tað hesa, man hevur valt at brúka í forsorgarlógini og øðrum høpi, har fíggjarlig meting skal gerast. Tað er ikki rætt og rímiligt í longdini. Grundupphæddirnar í fyritíðarpensjónini og fólkapensjónini vóru upprunaliga sama upphædd. Nú er munurin á grundupphæddini fyri støk í fólka- og fyritíðarpensjónin kr. 19.824 um árið ella 1.652 kr. um mánaðin!

Ein grundupphæddin til mat, klæði vm. er neyðug í sambandi við

- persónliga viðbót til pensjonistar sbrt. § 12 í almannapensjónslógini og kunngerð um persónliga viðbót (§ 4, stk. 2). *Henda kunngerð má broytast, um fólkapensjónin verður broytt. Grundupphædd í forsorgarlógini kundi so verði brúkt í staðin fyri, sum nú, grundupphæddin í fólkapensjónini?*
- rímiligar stakútreiðslur (§ 15, stk. 1) og útreiðslur til tannviðgerð, heilivág, sjúkuviðgerð vm. (§ 15, stk. 2),
- stak- og loypandi veiting (§13, stk. 2 og 3),
- meting sambært lóg um uppihald á stovni (§ 6, stk. 2), hvat møguliga skal setast av til hjúnafelaga, áðrenn gjald verður roknað
- meting sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar (§ 13, stk. 2) um møguliga avskriving av skuld
- meting av gjaldsevnum í sambandi við afturgjald av veitingum, latnar við afturgjaldsskyldu
- og møguliga øðrum sambandi

Verður grundupphæddin í forsorgarlógini § 9, stk. 2 sum skotið er upp, er tað sostatt avgerandi neyðugt, at hon verður javnað sum aðrar almannaveitingar. § 13, stk. 1-upphæddin hevur fylgt fólkapensjónsveitingini higartil, men avgerandi munurin millum veitingarnar er samhaldsfasta eftirlønin hjá fólkapensjonistum.

**Lóg um almenna forsorg**

Skotið verður upp, at ”upphædd” verður broytt til ”grundupphædd” í § 9, stk. 2.

Her verður sagt í viðmerkingunum, at endamálið er ikki at broyta grundupphæddirnar, men at tær frameftir verða javnaðar sambært lóg um áseting og javning av almannaveitingum.

**Lóg um almannapensjónir**
Onga viðmerking

**Lóg um uppihald á stovni**
Onga viðmerking

Vinaliga

Maria Jacobsen
*deildarleiðari*

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Dagur:** 15.09.2010
**J.nr.:** 2009-99110/0050
**(at tilskila í svari)**

*Att. Eyðun Mohr Hansen, aðalstjóri*

**Viðmerkingar til uppskot um eftirlønaruppsparing og skattt av eftirløn**

Víst verður til teldupost, dagfestur 9. august 2010, har uppskot til løgtingslóg um eftiruppsparing og skatt av eftirløn verður sent Almannastovuni til ummælis. Av óvart eru vit í summarfrítíðini komin til at "forleggja" áheitanina. Hóast farin útum freistina, velja vit at gera okkara viðmerkingar, tí vit meta tað týdningarmikið at gera hesar viðmerkingar.

**Til § 4., nr. 5:**
Hvat er óarbeiðsførisveiting = avlamisveiting? Almannastovan kennir ikki fyrstnevnda hugtak.

**Til § 4., nr. 4 og 7:**
Fyritíðarpensjón og forsorgarhjálp eftir forsorgarlógini eru peningaupphæddir, sum eru undantiknar kravi um tvungið eftirlønargjald. Ímillum tey, sum hervið í avmarkaðan mun ella als ikki koma at spara upp til eftirløn eru

1) persónar, sum bara fáa fyritíðarpensjón, t.v.s. fáa kompensatión fyri vantandi ella skerdan arbeiðsførleika og harvið vantandi/skerdan møguleika at vinna inntøku, meðan tey eru í vinnuførum aldri - almannapensjónslógin
2) persónar, sum eina styttri ella longri tíð (ofta í nógv ár) fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tí tey mugu siga frá sær arbeiði fyri at ansa barni, ið ber brek heima – sbr. § 17 í forsorgarlógini
3) persónar, sum orsakað av skaða, sjúku ella av øðrum orsøkum mugu brúka eitt (eyka) tíðarskeið uppá - yvir eitt áramál - at *endurmenna* sín arbeiðsførleika við at *útbúgva* seg (endurbúgving) - sbr. § 18, stk. 1 í forsorgarlógini
4) persónar, sum vegna vantandi barnaansing, sjúku, barnsburð, arbeiðsloysi e.a. eina avmarkaða tíð eru avskorin frá at forvinna tað, sum er neyðugt til egna og familjunnar uppihald - sbr. § 9 í forsorgarlógini
5) persónar, sum liva av varandi uppihaldsveiting, tí tey av samansettum sosialum og heilsuligum orsøkum ikki eru før fyri at uppihalda sær og sínum - sbr. § 13 í forsorgarlógini

Hvussu er ætlanin at tryggja seg ímóti øktum munum millum tey, ið hava havt fullan møguleika at spara upp til eftirløn og tey, sum av heilsuligum grundum ikki hava havt møguleikan at spara upp? Kann ein vandi vera fyri, at so hvørt sum privata uppsparingin veksur og alsamt fleiri verða óheft av øðrum veitingum, so missa solidarisku skipanirnar – fólkapensjónin og samhaldsfasti – samfelagsligan áhuga?

Smyrilsvegur 20 – Postboks 3096 – FO-110 Tórshavn – Tel. 35 35 10 - Faks 35 35 11
almannastovan@almannastovan.fo – www.almannastovan.fo

 Skjal 2

Almannastovan vil mæla til eina skipan við uppsparing til aldurseftirløn fyri – í minsta lagi – tær veitingar, sum hava samband við vantandi arbeiðsmøguleikar orsakað av breki ella sjúku hjá persóninum sjálvum ella av at uppihalda barni við breki/sjúku heima. T.v.s. fyri fyritíðarpensjonistar, uppihaldarar, ið fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku og persónar, sum mugu fáa sær nýggja útbúgving (endurbúgving), orsakað av skaða ella sjúku.

Tað kann tykjast órímiligt fyri persónar, nevndir undir 1)-2), at ójavnin í vanliga arbeiðsføra aldrinum í mun til aðrar borgarar, hvat inntøku- og arbeiðsmøguleikum viðvíkur, skal fylgja teimum og útdýpast inn í pensjónsaldurin. Hetta kunnu vera fólk, sum eru blivin óarbeiðsfør í ungum aldri, ongantíð hava verið arbeiðsfør, tí tey eru fødd við breki ella hava verið avskorin frá arbeiðsmarknaðinum, tí tey eru bundin heima í nógv ár av at ansa brekaðum barni.

Persónar, nevndir undir 3) eru t.d. persónar, sum orsakað av íkomnum skaða ella sjúku, hava verið noyddir til at endurmenna sín arbeiðsførleika við at taka eina nýggja (teoretiska) útbúgving. Er tað rímiligt at hetta tíðarskeið við endurbúgving hevur við sær týðandi minking í møguleikunum at spara upp til eftirløn. Vit tosa ikki um tey, sum vegna brek ella sjúku fáa endurbúgvingarstuðul til fyrstu útbúgvingina, tí tey eru á jøvnum føti við onnur ung, ið skulu nema sær útbúgving. Tey, ið kunnu endurbúgva seg við uppvenjing ella umskúling á arbeiðsmarknaðinum, fáa løn, ið verður útgoldin sum A-inntøka – sbr. § 18, stk. 3 í forsorgarlógini. Harvið verður teirra eftirlønaruppsparing tryggjað í tann mun, veitingarupphædd loyvir tí. Sama er við teimum, ið eru í vardum starvi, ið eisini fáa fullu lønina útgoldnað av arbeiðsgevaranum, har Almannastovan so endurrindar partin av lønini, ið er avtalað at vera stuðulspartur (§ 18a í forsorgarlógini).

Ein skipan kundi verið funnin fyri fyritíðarpensjonistar, har eitt eftirlønargjald verður roknað fyri hvørt útgjald av skattskylduga partinum av fyritíðarpensjónini (grundupphædd og viðbót), lagt omaná veitingina og flutt í eftirlønargrunn. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku er ein nettoveiting, ið verður roknað við grundarlag í lønarinntøkuni (brutto), sum umsøkjarin hevði frammanundan. Tað er ikki ógjørligt at útrokna eitt eftirlønargjald út frá hesum fyri arbeiðsgevara (Almananstovuna) og viðkomandi sjálvan, hóast besta loysnin hevði verið at útgoldið endurgjaldið sum eina skattskylduga inntøku á sama hátt sum sjúkradagpening, barsilspengar o.a.

Tað fær eisini avleiðingar fyri eftirlønaruppsparingina, at uppihaldsveitingar eftir § 9 ikki innihalda eitt eftirlønargjald, men avleiðingarnar eiga at vera meiri avmarkaðar, tí talan er um eina veiting avmarkaða tíð (fyribils hjálp).

Hjá teimum, ið fáa varandi veiting sbrt. forsorgarlógini § 13 – svarandi til fólkapensjóns-upphædd – inniber skipanin eisini skerdan møguleika at spara upp til eftirløn. Viðmerkjast skal tó, at fólkapensjónsaldurin viðførur hjá hesum eina hækking í samlaðari veiting í og við, at tey koma at fáa samhaldsfasta aftrat.

Vinaliga

Petra Johnsdóttir Joensen
*stjóri*

/ Maria Jacobsen
*deildarleiðari*

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
160 Argir

Tórshavn, 02.09.2010

**Hoyringssvar til lógaruppskot um eftirlønaruppsparing**

Vit vilja við hesum koma við viðmerkingum og spurningum til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn.

Nú vit hava fingið hesa lóg til hoyringar, kunnu vit staðfesta, at lógin um eftirlønaruppsparing og lóg um skatt av eftirløn eru lagdar saman til eina lóg. Hetta halda vit er skilagott, soleiðis at tað er ein lóg, sum regulerar hesi viðurskifti.

**Viðmerkingar og spurningar:**

**Í § 3 stendur:** Av inngoldna eftirlønargjaldinum kann ein partur verða brúktur til trygging við deyða og Óarbeiðsføristrygging, meðan restin skal verða nýtt til eftirlønaruppsparing.

Eftir núverandi rentutryggingarlóg er møguligt at flyta ein part av eftirlønargjaldinum til eina sokallaða skattakotu 4, sum merkir, at tann parturin av gjaldinum ikki verður drigin frá í skattskyldugari inntøku, og útgjaldið harvið verður skattafrítt. Hetta er galdandi fyri m.a. bólkatryggingar (Samlagstryggingar), ið flestu fakfeløg hava, og sum vanliga fevnir um tryggingarveitingar við deyða og Bráðsjúku (hættislig sjúka).

Mælt verður til, at hetta eisini verður møguligt í nýggju lógini.

**Í § 6 stk. 3, stendur:** Landsstýrismaðurin ger í kunngerð nærri áseting um umsitingar- og avgreiðslugjøld.

Mælt verður til, at hetta verður strikað. Orsøkin til hetta er, at tað skal verða upp til eftirlønarveitaran, at áseta umsitingar- og avgreiðslugjøld. Eftirlønaruppspararan kann síðani velja tann veitara, ið hann metir hevur bestu tænastuna. Vit eru hinvegin samd í ásetingini í §4 stk. 3, um

at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um kostnað og avgreisðugjøld í samband við flyting frá einum eftirlønarveitara til annan.

**Í § 9 stendur:** Eftir hesum leisti er loyvt eftirlønaruppsparara og eftirlønarveitara at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í keypsskála sambært hesum lista:

| **Aldur:** | **Hægst loyvdi prosentparturin av uppsparda virðinum í børsskrásett partabrøv:** |
|---|---|
| – 34 | 80 |
| 35 – 44 | 70 |
| 45 – 49 | 60 |
| 50 – 54 | 55 |
| 55 – 59 | 50 |
| 60 – 64 | 35 |
| 65 – 69 | 25 |
| 70 – | 15 |

Vit ganga út frá, at hetta bert er galdandi fyri uppsparingar eftir nýggju lógini, tvs. at allar uppsparingar fyri 1. januar 2011 kunnu fylgja gomlu lógini.

Mælt verður til at hetta kemur at framganga í nýggju lógini.

**Í § 10, stk. 3 stendur:** Lutfallið, ið eftirlønaruppsparari hevur gjørt í seinasta lagi við 67 ára aldur, kann ikki broytast, tó við undantaki av stk. 5.

Mælt verður til, at stk. 3 verður broytt til í staðin fyri ”í seinasta lagi við 67 ára aldur” til ”við 67 ára aldur ella í seinasta lagi við 70 ára aldur, tá farið verður frá við eftirløn.”

Um valt verður at halda fram at arbeiða eftir 67 ár, meta vit, at støða til lutfallið skal gerast, tá farið verður úr starvi.

**Í § 10, stk. 7 verður staðfest at:** persónar, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at viðkomandi grundað á sjúku hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, skal tað bera til hjá viðkomandi persóni at byrja eftirlønarútgjald fyrr enn við 67 ára aldur, sum er ásett í stk. 1.

Vit meta, at hetta kann vera trupult at umsita. Hvør skal meta um, og hvørjar sjúkur skulu møguliga verða umfataðar?

**Í § 19 stendur:** Frá 1. januar 2011 ber ikki til at rinda pening inn á eftirlønarskipan við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni sambært Rentutryggingarlógini Ll. nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutrygging v.m. (Rentutryggingarlógin).

*Stk. 2.* Rentutryggingarlógin verður framhaldandi galdandi fyri tær skipanir og peningaupphæddir, ið eru á eftirlønarkontum tann 31. desember 2010.

Er hetta eisini galdandi fyri lívstryggingaravtalur, ið fevna um veitingar við deyða, sum eru galdandi 31. desember 2010?

Omanfyri hava vit gjørt viðmerkingar og sett spurningar til lógaruppskotið um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn, og møta vit fegin til hoyringsfund til nærri útgreining av lógaruppskotinum. Somuleiðis frætta vit fegin, um spurningar eru til okkara hoyringssvar.

Samanumtikið meta vit, at lógaruppskotið fevnir um tey viðurskifti, sum eiga at vera við í einum slíkum lógaruppskoti, hóast vit á nøkrum økjum kundu hugsað okkum tað øðrvísi.

Vit vilja staðiliga mæla til, at ein lóg um eftirlønaruppsparing í Føroyum kemur í gildi 1. januar 2011.

Vinarlig heilsan
Betri pensjón

Mortan Poulsen

Til
Politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið

Tórshavn 1. septembur 2010

# Svarskriv til politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið í samband við lógaruppskotini, ið liggja til grund fyri pensjónsnýskipanini

*Eftir at hava luttikið í viðgerðini og kjakinum um pensjónsnýskipanina, sendir Fakfelagssamstarvið nú endaligt svarskriv til politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið. Svarskrivið fevnir um viðmerkingar umframt spurningar, sum Fakfelagssamstarvið ynskir at fáa útgreinaðar frá politiska fylgibólkinum og viðkomandi ráðum, eftir at uppskot um lógargrundarlag undir pensjónsnýskipanini nú er tøkt. Saman við hesum svarskrivi, verður framhaldandi víst á viðurskifti, ið vit hava tikið fram í øðrum svarskrivum.*

*Nevnast skal, at fleiri viðurskifti í lógargrundarlagnum eru jalig og viðkomandi. Vit hava tó valt ikki at seta sjóneykuna á hesi viðurskifti, men á tey viðurskifti, sum vit meta verða óheppin og ógreið.*

## Skynsamir uppspararar straffaðir

Fakfelagssamstarvið ger enn einaferð vart við, at omanfyri nevndu fakfeløg, og onnur, ið hava verið skynsom og spart upp til munadygga eftirløn, verða straffað við pensjónsnýskipanini. Somu skynsomu feløg skulu nú rinda meira til tey, ið hava ligið sjóvarfallið av sær, og ikki spart upp til egna eftirløn. Fakfeløgini hava farnu árini samstundis fráskrivað sær rættin til lønarhækkingar fyri ístaðin at økja um eftirlønina. Hetta hevur ført við sær lægri realløn fyri limir hjá feløgunum í Fakfelagssamstarvinum. Tí fer Fakfelagssamstarvið at hava vakið eyga við samráðingunum komandi tíðina fyri at tryggja, at tey, ið ikki hava nøktandi eftirlønaruppsparing, ikki fáa ókeypis ágóðar, nú tað er eitt krav, at øll skulu spara upp sambært §2 í uppskoti til løgingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn. Okkara fatan er, at summar ásetingar í lógaruppskotunum gera seg inn á sáttmálaviðurskifti hjá feløgunum.

## Høvuðsendamálið neyvan nátt

Sambært viðmerkingum til lógaruppskotini er høvuðsendamálið (við broytingini) at "...styrkja hugin at hava inntøku í pensjónsárunum, við arbeiði og egnari uppspardari eftirløn". Tað er okkara greiða fatan, og egnar útrokningar vísa eisini, at so er ikki. Við ætlaðu broytingunum og mótrokningunum, loysir tað seg ikki at hava nevniverda egininntøku, umframt fólkpensjónina. Vit heita tí á politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið at vísa okkum á tøl sum staðfesta, at høvuðsendamálið við pensjónsnýskipanini verður rokkið næstu árini.

Onnur viðkomandi sannroynd er, at mótrokningin í fólkapensjónini, broytta skattingin av kapitalpensjónini og tað, at bert 10% kunnu setast av til kapitalpensjón, vil helst hava ta avleiðing, at uppsparingarhugurin og atferðin broytist hjá fakfeløgum og limum tess. Tað vil gerast nógv meira attraktivt at fáa eftirlønarpartin útgoldnan sum løn og sjálv/-ur seta hann inn á bundna kontu í banka. Skatturin av útgoldnari kapitalpensjón verður 45% og hetta er umleið tað sama sum vanlig inntøkuskatting. Tí er lítil fyrimunur við at seta á eftirlønarkontu í tryggingarfelagi í mun til at seta inn sjálv/-ur á bankabók. Fakfeløg og stakpersónar fara tí helst at royna at halda seg til minsta inngjald sambært lógini (3% í 2011) og fólk fara at gjalda størri part á privatar uppsparingarkontur í banka. Trýstið á útgjaldið til fólkapensjón vil tí økjast og tí kann vera ivasamt um skipanin fer at hanga saman fíggjarliga um 10-15 ár.

## Sipið ístaðin til lønarhækkingar sum heild

Í §2 stk 2 í uppskoti til løgtingslóg um javning av fólkapensjón stendur, at: "tímalønin, sum verður nýtt til áseting av lønarhækkingini, er grundtímalønin pr 1. oktober hjá Føroya Arbeiðarafelag...". Fakfelagssamstarvið metir tað vera óheppið at sipa verður til lønarsáttmála hjá einstøkum felag. Hetta er heldur ikki vanlig siðvenja, og vit heita tí á fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið um at broyta hetta, soleiðis at grundarlagið er tann, til einhvørja tíð, galdandi lønarkarmur.

## Hjúnaskilnaður hoyrir ikki heima í lógargrundarlagnum

Í uppskoti til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn, verður m.a. hjúnaskilnaður nevndur og at eftirløn í samband við hjúnaskilnað _kann_ verða partur av felags búgvi. Talan er um luta- og kapitalpartin ella partin sum er inngoldin til ótilskilaðan útgjaldshátt (tí hesin verður mettur sum lutapartur). Fakfelagssamstarvið metir, at eitt býti av eftirløn, í samband við hjúnaskilnað kann føra við sær, at meginreglan, um at øll sum fráliður hava eina nøktandi eftirløn, kann verða brotin. Tí mæla vit staðiliga til, at hesin parturin av lógini verður hildin uttanfyri pensjónslóggávuna. Eitt sera viðkomandi dømi er um kvinna, ið hevur arbeitt niðursetta tíð og tískil hevur lága eftirløn, verður skild frá manni, sum hevur alla eftirlønina tilskilaða sum lívrentu. Tá fær maðurin helvtina av eftirlønini hjá konuni. Maðurin fær tá enn betur eftirløn og konan stendur at kalla eftir við ongum og fíggjarliga livigrundarlagið á ellisárum er tá fullkomiliga avskeplað. Hópin av øðrum øðrvísi dømum um hetta eru eisini.

## Fleiri eru í vanda fyri at detta niður ímillum fíggjarliga av hægri pensjónsaldri

Ein veruleiki, sum umboð fyri politiska fylgibólkin í farna samskiftinum ikki hava viljað sæð í eyguni er, at fleiri fakbólkar eru serliga útsettir fyri at verða kropsliga og sálarliga útbrendir væl áðrenn 60-ára aldur. Skerjingar í starvsfólkahópum, skilaleysar rationaliseringar og effektiviseringar hava eisini tær avleiðingar, at fólk eru og verða niðurslitin væl undan pensjónsaldri. Samstundis eru flestu av hesum persónum, ið eru kropsliga og sálarliga útbrendir, ikki búskaparliga óheftir av tí at húsalán og annað framvegis skal gjaldast; oftani fram til 67-ára aldur. Stórur vandi er herumframt fyri, at hesi ikki fáa útgoldna óarbeiðsføristrygging. Við uppskotnu meginreglu um, at eftirløn í fyrsta lagi skal útgjaldast við 67 ár og vantandi upplýsing og ætlanum um fyritíðarpensjónsøkið, er hópur av persónum, sum í komandi tíðum kunnu koma í sera óhepna støðu og als ikki megna at svara hvørjum sítt. Hetta má støða takast til frá politiskari síðu.

### Útrokningar, í sambandi við fyritíðarpensjónir og hækkandi eftirlønaraldur, vanta

Hóast politiska kjakið um hægri eftirlønaraldur fyribils er lagt á ís, er í svarum frá Fíggjarmálaráðnum grundgivið fyri týdninginum fyri pensjónsnýskipanina, at hesin aldur verður hækkaður. Í tráð við hetta fer Fakfelagssamstarvið *enn* einaferð at eftirlýsa útrokningar sum vísa væntaða økta kostnaðin á fyritíðarpensjónsøkinum. Hesi tøl eiga so at verða sammett við ætlaðu sparingarnar á fólkapensjónsøkinum.

Við vón um framhaldandi gott samskifti.

**Føroya Pedagogfelag**

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**

**Føroya Lærarafelag**

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

**Starvsmannafelagið**

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postboks 2039 165 Argir
Færøerne

1. september 2010

**Høringssvar vedrørende udkast til pensionsreform på Færøerne**

Farmakonomforeningen har modtaget en række lovforslag i udkast, og har konkret taget stilling til forslag til lov om ændring af lagtingslov om arbejdsmarkedspensionsfonden og forslag til lov om efterløn(pensions)opsparing og beskatning af efterløn/pension.

Farmakonomforeningen takker for muligheden for med dette høringssvar at kommenterer forslagene.

Pensionskassen for Farmakonomer har aktuelt 62 medlemmer der bor på Færøerne og er dækket af en dansk pensionsordning jf. overenskomst indgået mellem Fíggjarmálaráðið og Farmakonomforeningen. Den nuværende ordning betyder, at der bliver ydet 15 % arbejdsgiverpensionsbidrag til Pensionskassen for Farmakonomer.

Farmakonomforeningen har altid lagt vægt på en god og tryg pensionsordning for medlemmerne, hvorfor også Farmakonomforeningen i årevis har prioriteret højere pension ved overenskomstfornyelserne.

Alle farmakonomer, både de danske og færøske er i en fælles solidarisk ordning, der er aftalt mellem overenskomstens parter som et af mange vilkår for ansættelsen.

Farmakonomer har altid betragtet denne kollektive ordning som god og vigtig for fællesskabet og det har været en grundlæggende forudsætning for, at pensionen forbliver samme sted, så når man skifter arbejdsplads indenfor faget eller skifter arbejde mellem Danmark og Færøerne forbliver pensionsopsparingen i samme kasse med færre omkostninger til følge. Denne forankring i samme pensionskasse betyder, at medlemmerne undgår udsving i forsikringsdækningen på grund af forskellige aftaler og vilkår.

Reformen er derved, efter Farmakonomforeningens opfattelse et anslag mod et fleksibelt arbejdsmarked med et stort og kompetenceopdateret arbejdskraftudbud. Den nuværende fleksibilitet betyder blandt andet, at det er muligt for apotekerne på Færøerne at tiltrække arbejdskraft ved spidsbelastninger eller ferieperioder, da det har væ-

Sankt Peders Stræde 36 · 1453 København K · Telefon 3312 0600 · Fax 3314 0666 · e-mail ff@farmakonom.dk · www.farmakonom.dk

ret attraktivt og ikke forbundet med store vanskeligheder for danske farmakonomer at arbejde i kortere perioder, for herefter at vende tilbage til Danmark.

Lovforslaget vil betyde, at de farmakonomer der både har arbejdet på Færøerne og i Danmark i fremtiden vil få deres pensionsopsparing delt i to. Hvis man forestiller sig, at en farmakonom, efter flere års arbejde på Færøerne beslutter sig for i en årrække at arbejde i Danmark, vil de foreslåede regler betyde, at denne fraflytning vil udløse skat, og pensionsmidlerne i det færøske selskab kan udbetales til forbrug før den fastsatte pensionsalder.

Det har gennem mange år været Farmakonomforeningens klare opfattelse, at det ikke skal være muligt at trække bundne pensionsmidler ud til forbrug, inden pensionstilværelsen, men at pensionsmidlerne netop skal bruges til at sikre medlemmerne en tryg og gunstig alderdom. Lovforslaget gør efter Farmakonomforeningens opfattelse op med dette mål.

Det fremsatte lovforslag vil også betyde, at de farmakonomer der i dag bor og arbejder på Færøerne i fremtiden skal have deres pension indbetalt til et færøsk selskab. Denne gruppe af farmakonomer er ikke så stor, at det efter Farmakonomforeningens opfattelse vil være muligt, at forhandle en optimal aftale med en færøsk pensionsudbyder. I dag er denne gruppe farmakonomer i et forsikringsfællesskab med fagfæller der har identiske risici hvilket ikke kan findes i andre selskaber.

Dernæst indeholder det fremsatte reformforslag et krav om, at indbetalinger fra og med 2010 kun anvendes til ordninger med tidligste pensionsalder på 67 år, og med et særligt ydelsesmønster. Særligt alderskravet synes at være særdeles udfordrende. De fleste farmakonomer har gennemført deres uddannelse i begyndelsen af 20èrne. Et krav om tidligst pensionsalder på 67 år vil for de fleste betyde et krav om 45 år på arbejdsmarkedet inden mulighed for tilbagetrækning. Farmakonomer arbejder indenfor et fag med stor nedslidning så krav om 45 år på et krævende arbejdsmarked synes at være særdeles udfordrende.

Afslutningsvis må Farmakonomforeningen anføre, at forslaget indebærer overenskomstændringer og etablering af pensionsaftaler med færøske udbydere inden 2011 samt evt. opsigelse af de nuværende aftaler.

Det anses for urealistisk at nå at få alle disse forhold på plads i tide. Det er helt afgørende for Farmakonomforeningen, at der ikke opstår huller i medlemmernes forsikringsdækninger, da konsekvenserne for enkelte skadesramte medlemmer eller efterladte kan blive uoverskuelige. Det vil derfor være nødvendigt, at der afsættes den fornødne tid til dette arbejde.

Med venlig hilsen

Susanne Engstrøm
formand

# FELAGIÐ PENINGASTOVNAR

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 ARGIR

Att.: Petur Alberg Lamhauge

Tórshavn 1. september 2010

Okkara tilv./Our ref.:
/F-ggja-Penin-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar til uppskot til lóg um løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn

Felagið Føroyskir Peningastovnar hevur fingið fleiri lógaruppskot, sum hanga saman við ætlaðu eftirlønarskipanini, til hoyringar. Talan er um sera týðandi lóggávu, sum hevur stóra jaliga ávirkan á tí føroysku uppsparingina. Felagið Peningastovnar tekurundir við "Uppskot til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn", men við fyrivarni fyri niðanfyristandandi viðmerkingum.

Felagið Føroyskir Peningastovnar hevur ongar viðmerkingar til hinar lógirnar, sum vóru sendar til hoyringar.

**Yvirskipaðar viðmerkingar.**
Gott var um tær mongu kunngerðirnar (sum enn ikki eru tøkar) vóru sendar til hoyringar samstundis sum sjálvt lógaruppskotið. Tískil ganga vit út frá, at kunngerðirnar verða sendar til hoyringar heilt skjótt – nú tað bert eru fýra mánaðir til lógin skal setast í gildið. Harumframt ynskja vit at vísa á, at lógaruppskotið viðførur tíðarkrevjandi, tekniskar og fyrisitingarligar broytingar.

Um tann endaliga lóggávan og kunngerðir ikki fyriliggja í endaligum og viðtiknum líki sum skjótast, meta vit tískil at gildiskoman skal útsetast til 1. jan. 2012.

**Ad. § 1, stk. 2**

*"persónar ið eru millum 18 ár og 67 ár"*

Galdandi pensjónsaldur átti at verið ásettur á einum stað, soleiðis at tað við møguligum framtíðar reguleringum bert skal broytast á einum stað

**Ad. Kapittul 1, Vavi**
**Ad. § 1, stk. 2**
Tænastumenn eiga at koma undir somu eftirlønarskipan, m.a. grundað á skyldur landskassans yvir eitt longri tíðarskeið. Hetta eigur eisini at verða gjørt við m.a. at bruttoficera teirra inntøkuviðurskifti. Høvuðsargumentið aftanfyri tí nýggju eftirlønarskipanini er, at landið uppá sikt fer at hava størri útreiðslur av pensjónum, enn tað er ført fyri at gjalda. Eftirløn til tænastumenn er og verður ein skylda hjá landskassanum, og mett verður tí, at tað er ikki meira enn rímiligt, at tænastumenn fáa somu møguleikar sum aðrir samfelagsborgarar sjálvir at ráða fyri placering av teirra uppsparing. Hetta kann gerast við at bruttoficera tænastumannalønirnar.

**Ad. § 2, stk. 7**
Skotbráið er ov stutt, sí eisini omanfyristandandi yvirskipaðu viðmerkingar

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Felagið Føroyskir Peningastovnar metir, at skotbráðið kann gerast alt ov stutt, serliga um lógin ikki verður samtykt á tingið fyrr enn fram móti ársenda. Nógvir eftirlønartakarar skulu jú m.a. hava stovnað eina nýggja eftirlønarkonto umframt ivaleyst ein nýggjan eftirlønarsáttmála.

**Ad. § 4, stk. 1**
Eitt nýtt nr. 8, ið ásetur, at um útgjald verður góðkent áðrenn 67 ára aldur sambært grein 10, stk. 7, átti at verið innsett. Hetta so at tað ikki verður sett krav um inngjald til eftirløn í hesum tíðarskeiði.

**Ad. § 4. stk. 1. nr. 4**
Veiting til fyritíðarpensjónistar eigur eisini at verða bruttoficerað, og eiga tey eisini at verða fevnd av skipanini eins og onnur.

**Ad. § 4, stk. 1. nr. 5**
Fleiri óarbeiðsføristryggingar hava eitt innbygt gjald til eftirløn, sokallaða ”gjaldsundantøku”. Hetta skal tryggja tí óarbeiðsføra eina nøktandi uppsparing á eftirlønaraldri. Um tryggjaði hevur gjaldsundantøku á síni óarbeiðstrygging, so eigur hendan at verða frítikin pensjónsgjald, sum ásett í § 4, stk. 2 nr. 5. Hinvegin, um eingin gjaldsundantøka er teknað á óarbeiðsføristryggingini, so eigur hendan ikki at verða frítikin pensjónsgjald, tá móttakarin av óarbeiðsføristryggingini ikki hevur møguleika at spara upp til pensjón á annan hátt.

**Ad. § 5, stk. 3, annað pkt.**
*”Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um kostnað og avgreiðslugjøld.”*

Orðingin átti at verið strikað, ella umbýtt við *“Avgreiðslugjaldið fyri at flyta eina eftirlønarskipan frá einum eftirlønarveitara til annan, skal standa í rímiligt mát við kostnaðin hjá eftirlønarveitaranum”*. Hetta orsakað av, at Landsstýrismaðurin vanliga ikki hevur vitan um teir kostnaðir, sum eru tengdir av at flyta eina eftirløn. Tað hevði tískil verið skilabest at latið tað upp til eftirlønarveitararnar.

**Ad. § 5, stk. 4**
*”Eftirlønin kann í sambandi við hjúnaskilnað gerast partur av felags búnum. Eftirlønaruppsparingar, ið eru inngoldnar eftir 1. januar 2011, kunnu vera partur av felags búnum, og kann í samband við hjúnaskilnað býtast og flytast millum eftirlønaruppsparingarnar og eftirlønarveitarar hjá hjúnafeløgum uttan at rinda avgjald til landskassan.”*

Okkum kunnugt, er endamálið ikki at broyta siðvenju fyri, hvørjar eftirlønir kunnu verða hildnar uttan fyri felagsogn/búgvi, sí tó viðmerkingina niðanfyri. Tískil eigur greinin, at skrivast meira greitt, fyri ikki at skapa óneyðugan iva. Tað eigur at framganga av tekstinum, at bert *um* ein eftirlønarskipan er fevnd av felagsogn/búgvi, kann eftirlønin deilast og flytast millum hjúnafelagar uttan avgjald til landskassan

Av tí at tað sambært lógaruppskotinum er møguligt hjá tí einkulta uppspararinum at útseta val av endaligum útgjaldshátti, átti tað at verið avklárað, hvussu ein slík uppsparing, har einki val er gjørt, skal deilast í samband við hjúnaskilnað.

**Ad. Kapittul 2, Eftirlønarveitarar**
**Ad. § 6, stk. 1**
*”TAKS góðkennir eftirlønarveitararnar, ið skulu fylgja ásetingunum, ið eru settar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi og “lov om finansiel virksomhed.”.*

Peningastovnar eru sum útgangsstøðið ikki fevndir av ”løgtingslóg um tryggingarvirksemi”, og tryggingarfeløg eru sum útgangsstøðið ikki fevnd av ”lov om finansiel virksomhed”.

Tískil skal man ístaðin fyri “og” skriva “ella” í tekstinum: .. *løgtingslóg um tryggingarvirksemi ella “lov ella finansiell virksomhed.”*

**Ad. § 6, stk. 1**
*”TAKS góðkennir eftirlønarveitarar,..”*

Skulu teir einstøku peningastovnarnir søkja um góðkenning ella verða teir automatiskt góðkendir?

**Ad. § 6, stk. 3**
”*…og skal vera í samsvar við veruliga kostnaðin av  at umsita eftirlønarskipanina. Landsstýrismaðurin ger í kunngerð nærri áseting um umsitingar- og avgreiðslugjøld.*”

Setningurin átti at verið strikaður, og tað eigur at vera upp til hvørt eftirlønarfelag sjálvt at áseta sítt egna umsitingar- og avgreiðslugjald og ein møguligan vinning. Príspolitikkur er upp til hvørt eftirlønarfelag sær og er eitt kappingarelement. Kappingareftirlitið hevur eftirlit av at gjøgnumskygni er á marknaðinum, og at fyritøkur ikki hava ónormalan vinning av hesum virksemi.

Vit meta tað sera óheppið, um almennu mynduleikarnar byrja at gera nærri ásetingar um príspolitikk generelt úti á privata marknaðinum. Eftir okkara tykki eigur tað at vera upp til hvønn eftirlønarveitara sjálvan at áseta síni egnu umsitingar- og avgreiðslugjøld. Hinvegin eigur lógin at leggja upp til, at eftirlønarskipaninar hjá tí einstaka eru so mobilar sum møguligt, soleiðis at eftirlønaruppspararin uttan stóran kostnað kann flyta sína eftirløn, til tann eftirlønarveitara jf. viðmerkingarnar til § 6, stk. 1., ið hann metir bjóðar tað bestu tænastuna/besta prísin. Príspolitikkurin eigur tí at vera upp til hvønn einstaka eftirlønarveitara sær og er avgjørt eitt kappingarelement. Kappingareftirlitið hevur samstundis eftirlit við gjøgnumskygni á marknaðinum, og at fyritøkur ikki hava ónormalan vinning. Vit meta tí, at omanfyri standandi setningur í § 6 stk. 3 eigur at strikast.

**Grein 6. stk. 4.**
Peningastovnarnir ganga út frá, at verandi upplýsingar, sum Elektron, vegna peningastovnarnar, sendur til TAKS ársultimo, eru nøktandi. Um ikki, ganga peningastovnarnir út frá, at TAKS ger vart við hetta í góðari tíð.

**Ad. § 6, stk. 5**
*”… Verður ásetingin ikki fylgd, verða dagbøtur á 100.000 kr. álagdar fyri hvønn dag, ið fer útum fyrsta gerandisdag eftir 20. januar.*”

Orðingin átti at verið strikað.
Bótin eigur at standa í mun til lógarbrotið. Tískil verður mælt til, at áseta bótina sambært grein 18 stk. 2. Sostatt verður møguligt at taka støðu til, um brotið er grundað á teknisk viðurskifti ella onnur viðurskifti, sum eftirlønarveitarin ikki hevur ávirkan á.

**Ad. § 6, stk. 6**
”*Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í § 11, stk. 2 um útgjaldsætlan frá TAKS sambært hesi lóg verður eftirlønarupphæddin flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønareigara.*”

Ein slík flyting eigur bert at kunna fara fram eftir, at eftirønarveitarin hevur fingið eina rímiliga freist frá TAKS. Hetta gevur einum eftirlønarveitaranum møguleika at rætta ein møguligan feil. Um so er, at eftirlønarveitarin ikki rættar ein møguligan feil, eigur man at kunna flyta eftirlønina.

**Ad. Kapittul 3, Íløgureglur fyri eftirlønarveitara**

Í lógartekstinum eigur greitt at standa, at uppspard eftirløn kann ”plaserast” sambært reglunum í ”*bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v”*, og sum nærri ásett av Landsstýrismanninum.

**Ad. § 8, stk. 1**
”*Eftirlønaruppsparingar í peningastovni skulu verða nýttar til íløgur á ein hóskandi og gagnligan hátt fyri eftirlønareigaran.*”

Orðingin eigur at verða strikað, ella broytt til “Eftirlønaruppsparingar kunnu verða nýttar til íløgur”, hetta orsaka av, at greinin er ógreið og verður tískil torfør at umsita í praksis. Hartil er eisini at siga, at peningastovnar longu eru fevndir av reglum um ”góðan sið”.

Um greinin framhaldandi skal verða galdandi, eigur man vegna kappingarstøðuna eisini at lata greinina verða galdandi fyri eftirlønir hjá øðrum eftirlønarveitarum enn peningastovnum, t.d. tryggingarfeløg og eftirlønarfeløg (pensionskasser).

**Ad. § 8, stk. 2**
*“Markets in Financial Instruments Directive (MiFID).”*

Skilabetur hevði verið at víst til tær kunngerðir, sum koma í gildið í næstum og ikki til sjálvt MiFID direktivið. Hetta fyri ikki at skapa óneyðugan iva um, hvørjar reglur eru galdandi fyri virðisbrævahandil og eisini fyri at umganga, at peningastovnar og aðrir virðisbrævahandlarar skulu fylgja tveimum ymiskum reglum, sum regulera sama øki. Tískil átti “*Markets in Financial Instruments Directive (MiFID*)” at verið strikað og heldur átti at verið víst til ”*”bekendtgørelse om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel”* og *”bekendtgørelse om værdipapirhandleres udførelse af ordre”*.

Sambært upplýsingum frá Fíggjareftirlitinum verða omanfyrinevndu kunngerðir settar í gildið í Føroyum í seinasta lagi 1. januar 2011.

**Ad. § 8, stk. 3**
*”Markets in Financial Instruments Directive (MiFID).”… “Hvørki eftirlønareigari ella eftirlønarveitari kann broyta skrásetingina frá smákunda/detailkunda til aðra kundaáseting við eftirlønaruppsparing*”

Sambært omanfyristandandi átti orðini “*Markets in Financial Instruments Directive (MiFID)”* at verið strikað og ístaðin verið skrivað: ”*”bekendtgørelse om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel”*”.

Grein 4, stk. 4 saman við fylgiskjali 1, avsnit b, í ”*bekendtgørelse om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel*” inniheldur nøktandi verju í sambandi við umflokking av detailkundum. Harafturat skal nevnast, at somu viðurskift bert eiga at regulerast á einum staði. Tí átti orðingin ”*Hvørki eftirlønareigari ella eftirlønarveitari kann broyta skrásetingina frá smákunda/detailkunda til aðra kundaáseting við eftirlønaruppsparing*” at verið strikað.

**Ad. § 8, stk. 4**
”*Tað verður einans loyvt eftirlønaruppsparraranum sjálvum at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í keypsskálum í londum í Zone A sambært “lov om finansiel virksomhed”, og harafturat skulu ásetingarnar í MiFID fylgjast.*”

Umframt at ”MiFID” eigur at verða umbýtt við ”*”bekendtgørelse om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel” og ”bekendtgørelse om værdipapirhandleres udførelse af ordre”*”, sum nevnt omanfyri, er greinin nakað ógreið. Um endamálið við greinini er at skerja møguleikarnar hjá uppspararinum at fremja sonevndar ”execution-only-handler”, fer tað eisini at avmarka møguleikan hjá uppspararinum at fremja aðrar handlar. ”Execution-only-handler” eru avmarkaðir sambært grein 19 í ”*bekendtgørelse om*

*investorbeskyttelse ved værdipairhandel*", og eru eisini avmarkaðir til ávís virðisbrøv – sonevnd "ikke kompleks finansielle instrumenter". Ásetingin átti tískil at verið broytt soleiðis, at tað bert verður víst til, at "execution-only-handler" bert kunnu fremjast sambært reglunum hesum víðvíkjandi í *"bekendtgørelse om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel"*

**Ad. § 8, stk. 5**
*" Tað er einans loyvt at støðla eftirlønaruppsparing sambært "bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v.. Puljupensjón hjá peningastovni er fevnd av íløguráðgevingini sambært MiFID-reglunum."*

Orðingin "*Puljupensjón hjá peningastovni er fevnd av íløguráðgevingini sambært MiFID-reglunum*" eigur at strikast. Hetta kemst av, at MiFID-reglurnar ikki eru egnaðar at regulera tey viðurskifti, at tað ikki er kundin, sum eigur aktivini í puljuni, men eftirlønarveitarin. Harafturar inniheldur "*bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v*" greiðar reglur, sum tryggjar kundum innlit í íløgurnar í puljuni.

**Ad. § 9, stk. 1**
*"Eftir hesum leisti er loyvt eftirlønaruppsparara og eftirlønarveitara at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í keypsskála sambært hesum lista."*

Tað átti at verið greitt nærri frá, hvørji virðisbrøv og marknaðir ásetingin vísur til. Vit mæla til, at víst verður til virðisbrøv fevnd av grein 12, stk. 1. nr. 3 í "*bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v"* og teimum handilsstøðum, ið er fevnd av grein 12. stk. 11. í somu kunngerð.

Ásetingin skal bert fevna um uppspararan og ikki eftirlønarveitaran. Hetta kemst av, at tað er uppspararin og ikki eftirlønarveitarin, sum hevur endaliga ábyrgd av, hvussu uppsparingin er investerað. Eftirlønarveitarin eigur bert at hava eina ráðgevaraábyrgd mótvegis uppspararunum.

Parturin av børsskrásettum partabrøvum eigur at uppgerast í mun til tað samlaða virðið hjá tí einstaka veitaranum.

Skal hetta skiljast sum um, at tað bert er beinleiðis eksponeringin sum avmarkast í mun til tey áløgdu mørkini, ella er endamálið at eisini avmarka tað einkultu íløguna í aktiur td. íløgur í aktiubaseraðum íløgufeløgum.

**Ad. § 9, stk. 1**

| ***"Aldur*** | ***Hægst loyvdi prosentparturin av uppsparda virðinum í børsskrásett partabrøv*** |
|---|---|
| *– 34* | *80 %* |
| *35 – 44* | *70 %* |
| *45 – 49* | *60 %* |
| *50 – 54* | *55 %* |
| *55 – 59* | *50 %* |
| *60 – 64* | *35 %"* |
| *65 – 69* | *25 %* |
| *70 –* | *15 %* |

Viðmerkjast skal, at fleiri peningastovnar eru av tí fatan, at listin í grein 9 stk.1 er ov konservativur, og tískil fer at kosta uppspararinum nógvan pening. Um uppspararin hevði fingið møguleika at hava 100% partabrøv fram til 60 ára aldur fyri síðani at niðurtrappa, hevði uppspararin, undir vanligum umstøðum, havt meira enn um viðkomandi fylgdi listanum í grein 9, stk. 1.

Peningastovnarnir meta, at listin er ov konservativur og kemur at "kosta" uppspararinum nógv. Peningastovnarnir meta tískil at tað hevði verið ein fyrimunur um listin varð gjørdur meira tíðarhóskandi.

**Ad. § 9, stk. 1, 2, 3, 4 og 6**
*"parta…"*

Um annað enn partabrøv eru fevnd (sí viðmerking omanfyri), eiga orðini *"partabrøv" "partabrævaparturin"* og líknandi at verið umbýtt við *"virðisbrøv", "virðisbrævaparturin"* og líknandi.

**Ad. § 9, stk. 3**
Seinasti orðing: *"rebalancera verður við…."*

Seinasti setningur í stk. 3 átti at verið umbýttur við td. hesum: *"í slíkum førum kann íløgan ikki verða gjørd í børsskrásett (ella partabrævagrunda "investeringsforeninger") áðrenn partabrævaparturin er undir tí í grein 9. stk. 1. nevnda marki".*

Tað eigur at framganga av lógini, at markið skal verða í mun til tað samlaða virðið av eftirlønaruppsparingini hjá tí einstaka veitaranum.

**Ad. § 9, stk. 4 og 5**
Tað eigur at verða lagt afturat, at eftirlønarveitarin kann gera uppsparingina upp til marknaðarvirðið, men hevur ikki skyldu til tess. Síðani kann eftirlønarveitarin, um tað er tekniskt møguligt, fremja uppgerðina til marknaðarvirðið uttan at bera ábyrgd mótvegis uppspararinum. Men at tað til einhvørja tíð er ábyrgdin hjá uppspararinum at fylgja mørkunum, sum eru ásett í lógini.

Av umsitingarligum orsøkum, átti uppgerðin til marknaðarvirðið at verið gjørd í seinasta lagi tann seinasta handilsdagin áðrenn fyrsta útgjaldsdag.

**Ad. Kapittul 4, Útgjaldshættir**
**Generel viðmerking**
Peningastovnarnir meina, at tað sjálvsagt, sum higartil, skal verða møguligt hjá kundunum at velja eina tryggjaða lívrentu, ið fellur í arv.

**Ad. § 10, stk. 2, 3, 4 og § 11, stk. 1**
At nýta 67- ársdagin ella fyrsta gerandisdag, sum skeringsdag verður sera torført at umsita. Tískil verður mælt til, at ístaðin nýta seinasta gerandisdag áðrenn ella dagin fyri fyrsta útgjald. Hetta hevði framvegis tryggja, at einki útgjald hevði farið fram uttan góðkenning frá TAKS.

**Grein 10, stk. 2.**
*"Alt uppspart eftirlønarvirði verður gjørt upp, og lutfallið verður býtt."*

Tað er ikki greitt, hvør hevur ábyrgd av at samskipa uppgerðina av uppsparingini. Heldur ikki er nøkur vegleiðing gjørd um, hvussu uppsparingin skal gerast upp. Fleiri eftirlønaruppsparararar hava fleiri uppsparingar í fleiri eftirlønarfeløgum. Er tað kundin, TAKS ella høvuðseftirlønarveitarin, sum hevur hesa ábyrgd og fer TAKS at gera eina vegleiðing?
**Ad. § 10, stk. 4**

*”Um TAKS ikki í seinasta lagi gerandisdagin fyri, at eftirlønaruppspararin gerst 67 ár, hevur móttikið skrivliga áheitan um valið av, hvussu viðkomandi ynskir útgjaldsformin,verður útgjaldsstøðan ásett til: 50 prosent til lívrentu, og 50 prosent til lutaeftirløn*”

Tað eigur at útgreinast, hvør tað er, sum velur hvørja lívrentu og ratupensión, sum skal útgjaldast.

**Ad. § 10, stk. 6.**
Um so er, at uppspararin hevur tryggjað sær eina ”nøktandi” lívlanga veiting, eigur viðkomandi umframt hetta, at kunna velja sær eitt hægri kapitalútgjald enn tey 10%.

**Ad. § 10, stk. 8**
”*...tó so, at kapitalútgjaldið í mesta lagi kann vera 10 prosent*”

Hesi 10% eiga at verða roknaði av teimum samlaðu eftirlønarútgjøldunum og ikki bert av uppsparingini, gjørd í tíðarskeiðinum frá viðkomandi varð 67 ár til 70 ár.

**Ad. § 10, stk. 9**
*”Útgjald av lutaeftirløn og lívlongari veiting byrja samstundis”*

Setningurin átti at verið strikaður, tá ið slík áseting tikist at vera uttan endamál.

**Ad. 12, stk. 4.**
Greinin er ikki greið. Tað eigur ikki at vera eitt krav, at hjúnafelagi/sambúgvin er á lívi. Tað skal vera møguligt at útgjaldið fellur í arv til onnur enn njótunartillskilaða.

**Ad. Kapittul 5, Skattur av eftirlønaruppsparing**
**Ad. § 16, stk. 1 og 4**
”*Heldur skattskyldan hjá einum persóni uppat eftir § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt í sambandi við fráflyting, ella gerst ein persónur eftir ásetingunum í einum tvískattasáttmála heimahoyrandi í Danmark, Grønlandi ella øðrum ríki, skal skattur rindast av eftirlønini í seinasta lagi fráflytingardagin.*”

”*Skattsetingin eftir stk. 1 verður strikað, um persónurin aftur antin gerst skattskyldugur í Føroyum eftir § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt ella heimahoyrandi í Føroyum eftir ásetingunum í einum tvískattasáttmála. Strikingin ber í sær, at upphæddin, sum er kravd inn eftir stk. 2, við tilskrivaðum rentum v.m. aftur verður partur av eftirlønarskipan og umsitin av eftirlønarveitara.*”

Ásetingarnar um fráflytingarskatting eru hvørki greiðar ella skilagóðar. Einki verður upplýst um, hvussu hetta verður skattað, ella um skatting skal fara fram, sum um at øll upphæddin kom til útgjald í einum árið ella yvir eitt nú 10 ár.

Um eftirlønin verður “verandi“ í Føroyum og persónurin fer av landinum í nøkur ár (t.d. í arbeiðs - ella lestrarørindum) er eingin orsøk at skatta eftirlønina beinanvegin.

Skilabetur er heldur, at Føroyar tryggjar sær (beskatningsretten) rættin at skatta eftirlønina, tá ið hon verður útgoldin, um ikki annað er avtalað í tvískattaavtalu.

**Ad. Kapittul 6, Mannagongd fyri persónar har bústaður er ókendur**
**Ad. § 17, stk. 1**
”*Eftirlønarvirðið kann í 5 ár verða umsitið av eftirlønarveitara, meðan eftirlønarveitari áhaldandi roynir at finna eftirlønareigaran.*”
Tað átti at verið nøktandi, at veitarin bert roynir at finna uppspararin og tískil átti orðið :*”áhaldandi”* at verið strikað.

**Ad. Kapittul 7, Skiftisreglur**
**Ad. § 19, stk. 5**
*"TAKS kann loyva at tað framhaldandi verður inngoldið á eftirlønarskipan, sum er stovnað áðrenn 1. januar 2011, tá inngjøld eftir 1. januar 2011 uppfylla treytirnar í hesi lóg."*

Tað átti at verið lagt afturat, at slík inngjøld verða gjørd við frádrátti sambært hesi lóg.

**Ad. § 21.**
Skotbráið er ov stutt, og tað verður torført hjá veitarunum at tillaga virksemið til 1. januar 2011. Tískil verður mælt til at útseta gildiskomuna til 1. januar 2012, sí tær innleiðandi viðmerkingarnar.

Vinarliga
**Felagið Føroyskir Peningastovnar**

Gordon Rajani

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Faroe Employers' Association**

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 ARGIR

Att.:

Tórshavn 1. september 2010

Okkara tilv./Our ref.:
3391-2725/Esthe/F-ggja-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar um eftirlønarskipan

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fingið fleiri lógaruppskot, sum hanga saman við ætlaðu eftirlønarskipanini, til hoyringar.

Teir limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum fáast við eftirlønartryggingar og líknandi skipanir, hava havt umboð í bólkinum, sum hevur fyrireikað tann tryggingartekniska partin av uppskotinum. Tí ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki beinleiðis viðmerkingar til hendan partin av uppskotinum. Heldur ikki gera vit viðmerkingar til broytingar í almannalóggávuni.

**Yvirskipað**
Yvirskipað er at siga, at soleiðis sum demografisku útlitini eru, so metir Føroya Arbeiðsgevarafelag, at eftirlønarskipanin, sum stig nú eru tikin til, er bæði týdningarmikil og neyðug. Samanumtikið er tó at siga, at Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at tað eru ov nógv ógreið viðurskifti viðvíkjandi inngjaldinum, bæði inngjaldsskylduni og tí meiri praktiska partinum. Harafturat verður í lógaruppskotunum fleiri ferðir víst til ymsar kunngerðir. Hesar kunngerðir er ikki gjørdar enn, og tað er sera óheppið at seta nýggju skipanina í gildi, uttan at hesar eru klárar.

Tí mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til at brúka meira tíð til at fáa øll viðurskifti upp á pláss, áðrenn nýggja eftirlønarskipanin verður sett í gildi.

**Ítøkiligar viðmerkingar**
Føroya Arbeiðsgevarafelag harmast um, at tað ikki fæst politisk semja um at hækka pensiónsaldurin. Sum fleiri ferðir áður er víst á, so er føroyski arbeiðsmarknaðurin lítil, og tað hevur tí týdning at varðveita fólk á arbeiðsmarknaðinum so leingi, sum gjørligt.

Eisini metir Føroya Arbeiðsgevarafelag tað vera sera óheppið, at ætlanin er at hækka landsskattaprocentið og samstundis bert heita á kommunurnar um at lækka kommunuskattaprocentið. Hetta er ikki nóg góð trygd fyri, at skattaprocentið ikki hækkar, og tí átti bólkurin, sum arbeiðir við eftirlønarnýskipanini, at lagt seg eftir at fáa eina greiða avtalu við kommunurnar, áðrenn landsskatturin verður hækkaður.

Í sambandi við, at pensiónsveitingarnar skulu bruttoficerast, er ætlanin at gjaldið í samhaldsfasta eftirlønargrunnin skal hækka við 0,25% frá arbeiðsgevara og sama frá løntakara. Tað vil siga, at inngjaldið hækkar, meðan útgjaldið verður skattað, soleiðis at landskassin fær hægri skattainntøkur. Hetta kann ikki annað enn fatast sum ein eykaskattur á bæði vinnu og løntakara, og Føroya Arbeiðsgevarafelag átalar henda háttin at snýkja eyka skattainntøkur til landið. Er hetta

avleiðingin av at bruttoficera peniónsveitingarnar, var tað betur ógjørt. Serliga tá hugsað verður um, at eisini hækkingar í øðrum gjøldum eru væntandi.

Til uppskotið til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn setur Føroya Arbeiðsgevarafelag nakrar grundleggjandi spurningar. Tað er ógreitt, soleiðis sum uppskotið liggur nú, hvar inngjaldsskyldan liggur. Er tað soleiðis, at tað verður álagt arbeiðsgevarunum at gjalda nýggja eftirlønargjaldið? Tað vil siga, at á allar flytingar verða 3% løgd omaná – ikki bara lønarflytingar, men eisini fundarpengar, viðbøtur v.m.

Ella er tað soleiðis, at fyri tey, sum ikki longu hava eftirlønarskipan, verður lønin lækkað við teimum 3 procentunum, sum nú skulu til eftirløn? Um so er, átti hetta at framgingið nógv týðiligari av viðmerkingunum til uppskotið.

Og hvussu við umsitingini av skipanini? Tað er okkum ikki greitt, hvørjar ætlanir eru hesum viðvíkjandi. Er tað soleiðis, at tey, sum í dag hava privata eftirlønarskipan leysa av arbeiðsgevarinum, ikki longur kunnu flyta hesar pengar sjálvi? Skulu allar flytingar fara umvegis arbeiðsgevaran? Hvussu við teimum, sum hava fleiri arbeiðsgevarar? Ella skifta arbeiðsgevara mitt í árinum?

Umsitingarliga partin hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørt vart við í fleiri umførum undir arbeiðnum við nýggju eftirlønarskipanini, og ynskir framvegis at vera við til at finna eina haldbara loysn hesum viðvíkjandi. Vit hava í fleiri umførum havt fundir við embætisfólkini, sum hava fyrireikað eftirlønarnýskipanina, um hendan partin. Vit hava spurt eftir, hvussu hetta tekniskt skal fara fram, men enn hava vit ikki fingið greiðu á hesum partinum.

Tað er vert at gera vart við, at tey eftirlønargjøld, sum eru avtalaði í sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum, framhaldandi eru galdandi, um lógin um eftirlønaruppsparing verður samtykt. Tað vil siga, at tær bindingar, sum arbeiðsgevarin hevur í hesum sáttmálum, ikki verða loystar ella avloystar av lógini. Tí er tað sera týdningarmikið, at lóg og sáttmálar kunnu virka saman og ikki ímóti hvørjum øðrum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fer tí at biðja um ein fund við umboð fyri bólkin, sum fyrireikar nýskipanina til tess at fáa greitt nærri sjónarmiðum sínum, og til tess at fáa greiðu á, hvussu ætlanin er, at nýggja skipanin reint umsitingarliga skal hanga saman.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jóhan Páll Joensen
formaður

Avrit av hesum brævi er sent Almannamálaráðnum.

# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-103_1.2
dags. 01-09-2010

**Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið**

***Viðv.: Hoyring um nýggja pensjónsskipan***

Felagið hevur 13/07-2010 móttikið uppskot um lógarbroytingar í samband við nýggju ætlaðu pensjónsumskipanina. Uppskotið er viðgjørt á stýrisfundi 24/08-2010.

Pensjónsmál eru ein landsuppgáva. Felagið tekur tí uppskotið til nýggja pensjónsskipan til eftirtektar og hevur viðgjørt hettar við støði í møguligum avleiðingum fyri kommunurnar.

**Flyting av skatti ímillum kommunur og land**
Í uppskotinum verður heitt á kommunurnar at lækka kommunuskattin við einum prosenti. Hetta tí at inntøkurnar frá kommunuskatti fara at hækka í samband við bruttofiseringina av fólkapensjónini. Samstundis verður landsskattaprosentið hækka við einum prosenti.

Seinni er komið fram frá FMR, at kommunurnar skulu lata 1,25 % av kommunuskattinum til landið.

Ein avtala um hettar verður ímillum landið og kommunurnar.

Sum fylgja av bruttofiseringini av fólkapensjónini fáa kommunur, við lutfalsliga nógvum fólkapensjónistum, eina størri meirinntøku í skatti, enn kommunur við færri fólkapenjónistum.

Í hesum sambandi skal nevnast, at talið av fólkapensjónistum í kommununum í dag varierar frá um 8 % , har fáir eru, til yvir 20 %, í teimum kommunum nógvir eru.[1]

Umráðandi fyri felagið er, at kommunurnar, um tær játtað at lækka kommunuskattin við ávísum prosenti, verða hildnar skaðafríðar. Pensjónsmál eru, sum nevnt, landsmál, og er tað tí landið, sum stendur fyri fíggingini og ikki kommunurnar.

Ein avleiðing av flytingini av ávísum skattaprosenti frá kommunum til land kann verða, at kommunur, sum missa eitt skattaprosent til landið, ikki verða uppvigaðar av meirinntøku frá bruttofiseringini. Hesar kommunur mugu tí frameftir vaksa um inntøkurnar á annan hátt, t.d. við at hækka skattaprosenti og so eru vit líka vítt.

[1] Tøl frá Landsbankanum, løgd fram í kunningarfundi í Kvívík 24. august 2010.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

# FØROYA KOMMUNUFELAG

Felagið metir tí , at kommunur, sum kunnu koma at missa inntøkur eiga at kompenserast av landinum, sum er ábyrgdari av pensjónsskipanini. À hendan hátt verður ikki gjørdur munur á kommunum við nógvum og fáum pensjónistum.

**Reglulig endurskoðan**
Ein broyting í býtinum ímillum lands- og kommunuskatt, um ein slík avtala fæst í lag við kommunurnar, eigur at endurskoðast regluliga.

Hetta tí at landsmyndugleikarnir, í longdini, væntandi fáa minni útreiðslur til pensjónir, tí pensjónistar fáa hægri inntøkur við síðuna av fólkapensjónini - privata pensjón og arbeiðsinntøku. Í longdini fara pensjónistarnir tí sjálvir í størri mun at fíggja sín aldurdóm.

Í slíkum føri, har landsins útreiðslur til fólkapensjón minka, metir felagið, at ávísa prosentið frá kommunuskattinum eigur at falla aftur til kommunurnar, tá landið ikki longur hevur brúk fyri hesari fíggingini til fólkapensjónir, sum tað av fyrstan tíð var ætlað til.

**Hámark á kommunuskattaprosent**
Í pensjónsuppskotinum verður hámark sett á kommunuskattaprosenti fyri pensjónistar til 20 % (2011-14), 20, 5 % (2015-18) og 21 % (2019-20). Aftaná 2021 gjalda fólkapensjónistar líkningarprosentið.

FMR metir, at útreiðslurnar til endurgjald til kommunurnar fyri skattahámarkið verður 6,3 mió. í 2011, sum skal berast aftur til kommunurnar. So í núverandi støðu, har boðað er frá, at undirskotið á fíggjarlógini skal minkast, skal løgtingið finna 6,3 mió. til endamálið á fíggjarlógini fyri 2011.

Felagið stendur fast við, sum áður nevnt, at kommunurnar standa skaðafríðar, tá talan er um eina landsuppgávu.

Tað eru kommunurnar, sum, í verandi lóggávu, hava ábyrgdina av at kommunalu uppgávurnar verða loystar á besta hátt og fígging fæst til vega til tess. Tískil er tað ógvuliga umráðandi, at landsmyndugleikarnir kunnu tryggja at hesin peningurin verður afturborin kommununum, eisini frameftir.

Hetta síggjast í ljósi av møguleikanum fyri at kommunur frameftir fara at seta skattaprosentið upp, so kommunalu uppgávurnar verða loystar nøktandi.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi

Skjal 9

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Jekaragøta 10, Boks 248, FO-110 Tórshavn. Tlf. 316973 Fax: 318516 E-mail: fsn@olivant.fo**

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
FO-165 Argir

Tórshavn tann 01-09-2010
J. nr.: 2010025-2
Viðgjørt ED/ÁJ
Tykkara J.nr.:

**Fíggjarmálaráðið: Viðmerkingar til lógaruppskot um pensjónsnýskipan**

Føroya Skipara- og Navigatørfelag (FSN) tekur sum heild undir við, at ein ávísur partur av øllum inntøkum verður uppspardur til eftirløn. Felagið tekur undir við, at partur av uppsparda peninginum kann nýtast til tryggingar. Vit hava staðfest, at almennu avlamisveitingarnar als ikki eru nøktandi í einum framkomnum samfelag. Tískil má ein munagóð avlamistrygging verða partur av eini eftirlønarskipan. Vit mæla til, at hetta verður tikið við í lógaruppskotið.

Somuleiðis mæla vit til, at gjald fyri samlagstrygging kann fara av uppsparda peninginum. Samfelagið hevur stóran áhuga í, at avmarka sosialu avleiðingarnar og tá fólk í góðum árum doyggja, ella verða rakt av eini lívshóttandi sjúku.

Ásetingin um, at uppspardi peningurin í fyrsta lagi kann úgjaldast við 67 ár, er heilt burtur við eftir okkara metan. Mangir av limum okkara eru noyddir at gevast við sjólívinum, áðrenn nevnda aldur. FSN sær onga orsøk til at forða uppspararunum at fáa sín egna pening aftur, í rímuligari tíð. Um treytir verða settar til longri útgjaldstíðarskeið, so er onki sum forðar fyri, at byrjast kann at gjalda út við 60 ára aldur. Tey, sum hava góða inntøku í mong ár, koma at uppspara stórar peningaupphæddir. Eingin orsøk er at tvinga hesi, at vera verandi á arbeiðsmarknaðinum, tá hesi saktans hava ráð at gevast.

Hóast FAS og DIS ikki beinleiðis eru nevnd av lógaruppskotinum, vil felagið loyva sær at gera nakrar viðmerkingar um pensjonsviðurskifti hjá teimum, sum starvast undir hesum serstøku skattaviðurskiftum.

Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin (FAS), er ein nógv vaksandi vinnugrein. Í løtuni hevur FSN meir enn 150 virknar limir í FAS skipanini. Sum nú er, fáa hesir ikki frádrátt í inntøkuni fyri pensjóns inngjøld. Vit hava fingið at vita frá TAKS, at hetta kemst av, at FAS skipanin skal verða útreiðslu nevtral fyri landið og at ongir frádráttir verða loyvdir yvirhøvur, í FAS inntøkuni. Fyri at halda limir okkara skaðaleysar, hava vit gjørt sáttmála broyting við okkara eftirlønarveitarar, soleiðis

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Jekaragøta 10, Boks 248, FO-110 Tórshavn. Tlf. 316973 Fax: 318516 E-mail: fsn@olivant.fo**

at pensjóns inngjøld hjá FAS-arum fer til eina serliga uppsparingar skipan, har goldið verður inn av skattaðum peningi og útgjaldið verður skattafrítt. Vit duga illa at ímynda okkum, at ein slík skipan kann virka saman við pensjónsreforminum. Vit mæla til, at reíðaríini fáa refusión av eftirlønarútreiðslunm, soleiðis at til ber hjá reiðarínum at flyta eftirlønrgjaldið, sum eitt arbeiðsgevaragjald.

**DIS og onnur fløgg**

Ein kanning gjørd í 2009 av Granskingardeplinum fyri økismenning, vísti, at knappliga 1000 føroyskir skipsyvirmenn sigla við skipum, undir øðrum fløggum. Størsti partur av hesum eru undir DIS nettolønarskipanini og hesir gjalda ikki skatt í Føroyum. Ein annar stórur partur, siglir undir norskum flaggi og hesir gjalda skatt eftir grein 25 B í skattalógini.

Av tí, at her er talan um stóran part av føroyska arbeiðsmarknaðinum, er umráðandi, at pensjónsreformurin eisini tekur viðurskiftini hjá hesum yrkisbólkum við, tá pensjónsreformurin endaliga verður gjørdur. Hesir eru í mongum førum, bundnir av sáttmála, at hava eftirlønar uppsparing í ávísum útlendskum pensjónskassum.

Teir allarflestu føroysku navigatørar, sum sigla í øðrum londum, eru hvílandi limir hjá okkum. Harumframt hevur felagið gott samstarv við navigatørfeløg í øðrum londum. Vit vilja fegnir ráðgeva og vegleiða Fíggjarmálaráðnum í pensjónsviðurskiftum, hjá sjómonnum yvirhøvur.

Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Eyðstein Djurhuus, form.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Fíggjarmálaráðið

01. september 2010
Mál: 2195-068/10-2
Tygara skriv:
Viðgjørt: NF

**Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn**

Víst verður til teldubræv dagfest 9. august 2010 frá Fíggjarmálaráðnum, har biðið verður um hoyringsviðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppspsring og skatt av eftirløn.

Innlendismálaráðið hevur lisið uppskotið og hevur fylgjandi viðmerkingar:

**Til § 4:**
Hvussu við vinningi í eyðnuspæli, legatir, sømdargáva o.l. eingangsinntøkur.
Er ætlanin, at eftirlønargjald skal gjaldast av hesum inntøkum eisini? Um ikki eiga hesar inntøkur at undantakast í § 4.

**Til § 6, stk. 5:**
Talan er um heimild til at geva fyrisitingarligar tvingsilsbøtur.

Alment kann fylgjandi sigast um fyrisitingarligar tvingsilsbøtur:

*"Efter retsplejelovens § 997, stk. 3, kan der i domme, hvorved nogen tilpligtes at opfylde en forpligtelse mod det offentlige, som tvangsmiddel fastsættes en fortløbende bøde, der tilfalder statskassen (tvangsbøder).*

*Undertiden opstår der spørgsmål om i lovgivningen at indsætte bestemmelser om administrative tvangsbøder, dvs. tvangsbøder, som ikke pålægges af domstolene, men af forvaltningen.*

*Sådanne bøder kan ofte opfattes som en straf, og de er ikke omgærdet af samme retssikkerhedsgarantier som tvangsbøder pålagt af domstolene. Der bør derfor kun gives hjemmel til administrative tvangsbøder, såfremt der foreligger et helt særligt behov for effektiv kontrol og håndhævelse på det pågældende område. Også andre forhold må komme i betragtning, herunder hvor let konstaterbare de forhold, der udløser tvangsbøderne, er."*

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo

Sambært hesum er stk. 5 ikki nóg neyvt orðað. Tað skal skrivast úttrykkiliga, hvat brot kann hava við sær, at ein tvingsilsbót kann verða givin.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið eigur eisini gjølla at verða greitt frá, hví mett verður, at tað er neyðugt at hava heimild til fyrisitingarliga tvingsilsbót.

Ein tvingsilsbót uppá 100.000 kr. um dagin er rættuliga høg upphædd, og nógv hægri enn vanliga støddin av tvingsilsbótum, ið ofta eru nakrar hundrað krónur til nakrar túsind krónur um dagin. So stór fyrisitingarlig tvingsilsbót má sum útgangsstøði roknast at vera rættartrygdarliga heldur betonkiligt.

Fíggjamálaráðið eigur tí í viðmerkingunum til lógaruppskotið at greiða nærri og gjøllari frá, hví ráðið hevur júst hevur valt hesa upphæddina og grundgeva fyri hesum valinum. Og um møguligt eisini at vísa á onnur føri, har líknandi fyrisitingarligar tvingsilsbøtur eru heimilaðar.

**Til § 8, stk. 5:**
Hvat merkir "støðla"?

**Til § 13, stk. 7:**
"... og er hetta at skilja sum roynd at sleppa undan at gjalda skuld til tað almenna, ..."
Hetta er ikki ein nóg neyv áseting.
T.d . Hvør skal avgera, um tað er ein roynd at sleppa undan at gjalda skuld til tað almenna? Hvat skal dentur leggjast á, tá metingini verður gjørd? Er tað líkamikið hvussu stóra upphædd talan er um ? osfr.

**Til § 21:**
Skal ongin lóg setast úr gildi?

**Til viðmerkingar**
**s. 20 (§ 2, stk. 4).** Hvat um søkt verður aftan á freistina 1. juni? Ber ikki til at fáa peningin omanfyri kr. 100.000 útgoldnan tá?

**s. 20 ovarliga:** "Til stk. 4" skal vera "Til stk. 5"

Nella Festirstein, deildarstjóri

Skjal 11

Kommunusamskipan Føroya

Til Fíggjarmálaráðið

Kvíggjartún 1

Postsmoga 2039

Fo 165 Argir

R. C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481
ksf@ksf.fo
www.ksf.fo

Tórshavn 1.september 2010

**Viðv. Uppskot til nýggja Pensjónsnýskipan**

Í teldupostum dagfestir 13. juli, 14 juli og 10 august hava ávikavist Almannaráðið og Fíggjarmálaráðið hvør sent Kommunusamskipan Føroya fimm lógaruppskot til hoyringar. Tilsamans er talan um tíggju lógaruppskot, sum øll eru partar av eini umfatandi pensjónsnýskipan, sum ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum politiskum flokkum er samdur um at leggja fram.

Uppskotini eru hesi:

Frá Fíggjarmálaráðnum:
- Uppskot til lóg um javning av fólkapensjón
- Uppskot til lóg um broyting av ásetingarlógini
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt
- Uppskot til lóg um broyting av lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
- Uppskot til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn

Frá Almannamálaráðnum:
- Uppskot til lóg um uppihald á stovni o.l.
- Uppskot til lóg um áseting og javning av almannaveitingum
- Uppskot til lóg um almannapensjónir o.a.
- Uppskot til lóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl.
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg

Hoyringsfreistin var í fyrstu atløgu sett til at verða 20. august fyri níggju av teimum tíggju lógaruppskotunum, ímeðan seinasta uppskotið hevði hoyringsfreist 1. september. Kommunusamskipan Føroya heitti í skrivi dagfest 11. august á Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið um, at hoyringsfreistin fyri øll uppskotini varð sett til 1.september. Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið hava síðani játtað at hoyringsfreistin fyri øll uppskotini verður broytt til 1. september.

Lógaruppskotini hava eisini verið viðgjørd á fundi 30. august millum umboð úr KSF, embætisbólkin, ið gjørdi tilmæli um pensjónsnýskipan og fíggjarmálaráðharran.

Kommunusamskipan Føroya fer ikki at viðgera hvørt einstakt uppskot, men í fyrstu atløgu at viðgera pensjónsnýskipanina í síni heild, og hvørjar fíggjarligar avleiðingar uppskotini hava á kommunala geiran.

Harumframt verða einstakar ítøkiligar viðmerkingar gjørdar til nøkur av uppskotunum, og viðfestar í øðrum skjali.

**Viðmerkingar**
Kommunusamskipan Føroya fegnast um, at tað umsíðir røkist fyri, at vit fáa framt eina haldføra eftirlønar- og pensjónsskipan, sum tryggjar øllum eina rímiliga inntøku, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum. Hetta er eitt neyðugt stig at taka, til tess at føroyska samfelagið skal kunna møta teimum avbjóðingum broytta aldurssamansetingin í samfelagnum hevur við sær

Men tað eru fleiri viðurskifti í pensjónsnýskipanin, sum reisa ivamál og hava tørv á nærri útgreining.

**Bruttofiseringin av pensjónunum og hámark í kommunuskattinum fyri pensjónistar**
Ein av størstu broytingunum við pensjónsnýskipanini er bruttofiseringin av fólkapensjónini. Framyvir verður øll pensjón skattskyldug. Fyri at einstaki pensjónisturin ikki skal hava eina lægri inntøku, er neyðugt at økja pensjónina munandi, soleiðis at realinntøkan hjá tí einstaka verður áleið tann sama sum í dag. Sambært uppskotinum verður neyðugt hjá landinum at økja útreiðslurnar til pensjónir við umleið 145. mió. kr. Samstundis vaksa skatta inntøkurnar hjá landinum við uml. 82 mió. kr., soleiðis at nettoútreiðslurnar hjá landinum verða 63 mió. kr. Harumframt eru aðrar útreiðslur av pensjónsnýskipanin 24 mió. kr. Samlaðu útreiðslurnar hjá landinum av pensjónskipanini eru sostatt 87 mió. kr. Fyri samlaða kommunala geiran merkir bruttofiseringin av pensjónini sambært útrokningum hjá Fíggjarmálaráðnum, eina meir inntøku fyri kommunurnar á 84 mió. kr.

Bruttofiseringin av fólkapensjónini ger, at pensjónistar við lágum inntøkum, sum búgva í kommunum við høgum skattaprosenti fáa minni inntøkur eftir 2011. Til tess at fyribyrgja hesum er sett eitt hámark á kommunuskattin fyri pensjónistar fram til 2021, soleiðis at hesir pensjónistar ikki missa av pensjónsnýskipanini.

Hetta eru rættiliga umfatandi og týðandi broytingar í mun til skattliga býti millum land og kommunur. Kommunusamskipan Føroya kann als ikki góðtaka at kommunurnar bert verða roknaðar sum einhvør annar hoyringspartur í slíkum máli. Kommunusamskipan Føroya var á fyrsta sinni kunna um bruttofiseringina í samband við at fyrstu uppskotini vóru send til hoyringar 13. juli. Hetta er ikki nøktandi. Kommunurnar áttu, í øllum førum í mun til skattliga partin, at verði í fyrireikandi arbeiðinum.

Høvdu kommunurnar verið við frá byrjan, er lítil ivi um, at størri dentur hevði verið lagdur á at útgreina fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar.

**Býti í lands- og kommunuskatti**
Sambært uppskotinum er tað eitt politiskt ynski, at pensjónsnýskipanin er skattliga neutral, og tí verður í uppskotinum heitt á kommurnar um at lækka skattin við einum prosenti, samstundis sum landið hækkar landsskattin við einum prosenti á øllum stigum.

Á fundi í KSF húsinum 30. august boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at útrokningargrundarlagi ikki var heilt rætt, og at tað helst varð neyðugt at lækka kommunuskattin við 1,25 prosentum fyri at pensjónsnýskipanin skal verða skattliga neutral. Samstundis vóru ábendingar um, at Fíggjarmálaráðið umhugsaði at lóggeva ein lækking í kommunuskattinum á 1,25 prosent.

Hetta seinasta fer Kommunusamskipan Føroya undir ongum umstøðum at góðtaka. Ein møgulig lóggeving um lækking av kommunuskatti hevði verið eitt sera vítt fevnd inntriv í ein hin týdningarmesta partin av kommunala frælsinum, nevniliga at áseta egið skattaprosent. Tí vil Kommunusamskipan

Føroya staðiliga mæla til, at tað framhaldandi verður talan um eina áheitan á kommunurnar at lækka skattin og ikki um ein lógaráseting.

**Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum**
Ein annar grundleggjandi trupulleiki við lógaruppskotinum er, at fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum verða gjørdar upp í mun til tann samlaða kommunala geiran, og ikki í mun til einstøku kommunurnar. Veruleikin er at uppskotið rakar einstøku kommunurnar sera ymiskt. Millum annað eru fíggjarligu avleiðingarnar treytaðar av aldurssamansetingini í einstøku kommununum, samansetingini av pensjónistum í mun til hjúnarstøðu, inntøkugrundarlagi v.m. At fíggjarligu avleiðingarnar eru so ymiskar fyri einstøku kommunurnar talar avgjørt eisini fyri, at tað eru kommunurnar, ið sjálvar áseta hvussu nógv kommunuskattaprosenti skal lækka. Tað er møguligt, at nakrar kommunur fáa rúm at lækka skattin við meira enn 1,25 %, ímeðan aðrar bert kunna lækka skattin við til dømis einum prosenti.

Av tí at fíggjarligu avleiðingarnar eru so ymiskar, fer Kommunusamskipan Føroya at heita á Fíggjarmálaráðið um útgreina fíggjarligu avleiðingarnar niður á einstøku kommunurnar, heldur enn bert á tann samlaða kommunala geiran.

**Fíggjarligar avleiðingar framyvir**
Annar trupulleiki við uppskotinum er, at fíggjarligu avleiðingarnar bert eru greinaðar fyri árið 2011 og ikki fyri alt tíðarskeiðið fram til 2025, tá pensjónsnýskipanin skal verða fullførd. Í tíðarskeiðinum fram til 2025 fara fram grundleggjandi broytingar, millum annað ein skiftisskipan viðvíkjandi mótrokningargrundarlagnum, og ein skiftisskipan í mun til hámark fyri kommunuskatti hjá pensjónistum. Skipanir sum hava ávirkan á, hvussu fíggjarligu avleiðingarnar verða fyri tær einstøku kommunurnar.

Lítil ivi er um at størstu sparingar við pensjónsnýskipanini liggja í, at landskassans útreiðslur til pensjónir við tíðini fara at minka munandi so hvørt sum uppsparingin hjá tí einstaka til eftirløn veksur. Sambært viðmerkingunum til fleiri av uppskotinum skal hesin peningur nýtast til at bøta um tænasturnar á eldraøkinum. Men gongst sum ætlað so verður eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita 1 januar 2013, og sostatt eisini fíggjarliga ábyrgdin av eldraøkinum og tilhoyrandi tænastum. Tá eiga sparingarnar at koma kommunala geiranum til góðar og ikki landskassanum.

**Arbeiðið framyvir**
Kommunusamskipan Føroya metir sum áður nevnt ikki at fíggjarligu útgreiningarnar eru neyvar nokk, og at tað tískil er trupult neyvt at meta um, hvørjar fíggjarligar avleiðingar uppskotini koma at hava fyri einstøku kommunurnar. Kommunusamskipan Føroya hevur ikki atgongd til alt tað hagtalsgrundarlag, ið er neyðugt fyri at gera hesar útgreiningar. Mælt verður tí til, at ein útgreining av fíggjarligu avleiðingunum fer fram í samráð millum kommunufeløgini og Fíggjarmálaráðið, samstundis sum viðgerðin av innkomnu hoyringsskrivunum fer í gongd.

Vinarliga vegna Kommunusamskipan Føroya

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Aðalskrivari

Skjal 11

Kommunusamskipan Føroya

Til Fíggjarmálaráðið

Kvíggjartún 1

Postsmoga 2039

Fo 165 Argir

R. C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481
ksf@ksf.fo
www.ksf.fo

Tórshavn 1.september 2010

***Serligar viðmerkingar til einstøku uppskotini***

**Uppskotini frá Fíggjarmálaráðnum**

**-Uppskot til lóg um broyting av ásetingarlógini:** Við hesum verður ásett at landskatturin veksur við einum 1% prosenti á øllum stigum.
Í viðmerkingunum stendur, at meirinntøkurnar av hjá kommununum verða 84 mió. kr. Einki stendur um, hvussu verður komið fram til hesa upphædd. Á fundi í KSF húsinum 30. august vísti Fíggjarmálaráðið á at hendan upphædd fekst við at falda ein metta meirinntøku pr. fólkapensjónist (14.573 kr.) við talinum av fólki 67 ár og eldri. Úrslitið verður sambært hesum, at kommunurnar fáa eina meirinntøku uppá knappar 87 mió. kr., ið er 3 mió. kr. meir enn tær 84 mió. kr. sum annars verða nevndar í hesum uppskotinum.

KSF ivast í um hesin útrokningarhátturin er fult eftirfarandi. Er til dømis tikin hædd fyri hjúnastøðuni hjá pensjónistunum, hvussu nógvir pensjónistar í dag frásiga sær fólkapensjón, og hvussu nógvir pensjónistar í dag ikki fáa viðbót. Hetta eru alt avgerandi faktorar, um tað skal kunna ásetast, hvussu inntøku grundarlagi hjá kommununum broytist pr. 1 januar 2011.

Tí er umráðandi at fíggjarligu avleiðingarnar verða nærri útgreinaðar, soleiðis sum nevnt er í hoyringsskrivinum.

**-Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt:** Við hesum verður ásett hámark fyri, hvussu nógv pensjónistar í kommunum við hægstu skattaprosentum koma at gjalda í kommunuskatti. Fyri at háskatta kommunurnar ikki skulu missa inntøkur, verður inntøku missurin endurrindaður av landinum. Talan er um eina skiftisskipan í 10 ár, sum í byrjanini kostar landskassanum 6,3 mió.kr, og samsvarandi kemur háskatta kommununum til góðar.

Vit hava á fundi í KSF húsinum 30. august fingið at vita frá Fíggjarmálaráðnum, at upphæddirnar eru roknaðar soleiðis: Hvør kommunu missir fyri hvønn pensjónist 1744 kr. fyri hvørt prosent, hon er omanfyri 21 prosent. Hetta tal verður so faldað við talið av pensjónistum falda við prosentum yvir 21 prosent.

Aftur her er talan um rættiliga stóra óvissu, tí talan er bert um miðaltøl. Hevur ein háskatta kommuna nógvar ríkar pensjónistar, fær hon ikki allan ágóðan av hesum, við tað pensjónisturin ongantíð skal gjalda meira enn 21 prosent. Seinastu prosentini verða ikki tikin inn í skatti, men verða latin kommununi sum eitt endurgjald frá landskassanum, rokna út eftir ein miðaltalið fyri allar kommunurnar.

Á talvuni síðu 4 eigur at standa ja og ikki nei útfyri fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**-Uppskot til lóg um broyting av lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin:** Við hesum verður inngjaldið til samhaldsfast økt úr 1,75% til 2,00%. Hetta kostar kommunum uml. 1- 1,5 mió. kr. Tískil skal eisini standa í yvirlitinum á síðu 3, at hetta hevur fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar fyri kommunrnar.

**-Uppskot til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn:** Hevur ásetingar um inngjald, skatt, frádrátt í skatt, íløgureglur og útgjald v.m. Í flestu førum viðurskifti, ið viðgera pensjónsviðurskiftini hjá einstaka. Tó eru ásetingar ið viðvíkja kommununum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður í fleiri førum nevnt, at avgjald skal latast til landskassan, millum annað tá ið kapital eftirløn skal gjaldast, ella tá ið útgjald í sambandi við deyða skal fara fram. KSF gongur út frá at hesin peningur verður býttur millum lands og kommunukassa <u>eftir sama leisti sum í dag.</u>

**-Uppskot til lóg um javning av fólkapensjón**: Ongar viðmerkingar

**<u>Frá Almannamálaráðnum:</u>**

**-Uppskot til lóg um uppihald á stovni o.l.:** Við hesum uppskotið skulu fyritíðarpensjónistar ikki longur missa pensjónina, tá ið tey flyta á stovn. Í staðin fáa tey fulla pensjón og hevur hetta sambært Fíggjarmálaráðnum við sær eina meirinntøku fyri kommunurnar á 1,2 mió. kr.

KSF tekur fult undir við uppskotinum, og mælir til at tað sama eigur at verða galdandi fyri fólkapensjónistar á ellis- og røktarheimum.

**-Uppskot til lóg um áseting og javning av almannaveitingum:** Við hesum verða broytingar gjørdar í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Millum annað verður broytingin í mótrokning í inntøku fyri pensjónistar gjørd fyri komandi 10 árini. Hetta uppskotið hevur nærum somu viðmerkingar, sum fleiri av hinum uppskotinum frá Almmannaráðnum. Viðmerkingarnar innihalda ávíst hagtalsgrundarlag um pensjónistar. Millum annað hjúnastøðu, inntøkugrundarlag v.m. Hesir upplýsingar átti eisini at verið gjørdir upp í mun kommunur.

**-Uppskot til lóg um almannapensjónir o.a.:** Við hesum verður millum annað samansetingin av pensjónini broytt grundleggjandi. Viðmerkingarnar innihalda áleið somu hagtøl, sum fleiri av hinum uppskotinum, men her er heldur eingin tilvísing til kommunurnar.

**-Uppskot til lóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl.:** Hevur til endamáls at broyta samansetingina av pensjón, soleiðis at talan verður um eina upphædd, nevnd fólkapensjón. Júst somu viðmerkingar sum til uppskot til lóg um áseting og javning av almannaveitingum.

**-Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg:** Er ein konsekvensbroyting í forsorgarlógini. KSF hevur ongar viðmerkingar

Vinarliga vegna Kommunusamskipan Føroya

Eyðun Christinansen
Aðalskrivari

Almannamálaráðið
Fíggjarmálaráðið
110 Tórshavn

Tórshavn 26. januar 2011

**Viðmerkingar til uppskot um broyting í Løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**

Í sambandi við broytingar í mótrokningsreglunum í fólkapensjónini er ætlanin at lækka útgjaldið hjá tænastumonnum, sum eru farnir frá við eftirløn við einum høggi pr. 1. januar 2011. Føroya Lærarafelag metir, at hetta setir rættartrygdina hjá hesum bólki til viks, og loyvir sær tí at koma við viðmerkingum um hesi viðurskiftini.

*1. Inntøkan hjá eftirløntum lærara á endaløn lækkar við 15% eftir skatt í einum høggi*

Sambært nýggju pensjónsskipanini fær eftirløntur lærari, sum hevur fullan eftirlønaraldur umleið kr. 2.550 minni eftir skatt enn eftir núverandi skipan. Henda lækking svarar til umleið 15%. Í sambandi við síðstu broytingarnar av tænastumannaeftirlønarlógini í 1997 var spurningurin frammi, um Landsstýrið kundi lækka útgjaldið uttan skiftisskipan. Niðurstøðan var greið. Tað bar ikki til at lækka eftirlønina fyri tey, sum eru eftirlønt ella ávegis inn í eftirlønarlívið uttan skiftisskipan. Fyri tann einstaka er tað avgerandi fyri rættartrygdina, at samlaða inntøkan tvs. eftirløn + grundupphædd eftir skatt í eini skiftistíð er á nøkurlunda sama støði eftir broytingina sum áðrenn.

*2. Grundupphæddin í fólkapensjónini er partur av útrokningargrundarlagnum í tænastumannapensjónini*

Í 1996 metti Landsstýrið, at tænastumannaeftirlønirnar vóru ov høgar í mun til vanligu tænastumannalønina og ov truplar at umsita, tí var núgaldandi skipan ásett við broyting av tænastumannaeftirlønarlógini. Egineftirlønin, sum tænastumenn fáa í mun til eftirlønarárini, var tá lækkað við umleið 20 %, samskipanarfrádrátturin tikin burtur og grundupphæddin í fólkapensjónini var gjørd til part av útrokningargrundarlagnum av eftirlønini. Fyri tey 60 til 67 ára gomlu, sum fóru úr starvi við eftirløn, var ein ávísur prosentpartur av grundupphæddini í fólkapensjónini ásettur at vera partur av tænastumannapensjónini. Landsstýrið metti, at tað var neyðugt at geva teimum, sum fóru niður í eftirløn eina serliga lívsvarandi viðbót í eini skiftistíð. Hetta var gjørt fyri at verja rættartrygdina hjá hesum bólki. Í viðmerkingunum til lógina sigur Landsstýrið: "Samskipanarfrádrátturin fellur burtur í broytingaruppskotinum, tvs. at tænastumannaeftirlønarmóttakari fær eftirløn + fólkapensjón." (Løgtingstíðindi 1996 bls. 188)

*3. Viðmerkingar um at seta eftirlønina niður í Løgtingslóg nr. 24 frá 14. mars 1997* (Løgtingstíðindi 1996)

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið, sigur Landsstýrið:

*" Tað ber ikki til at lækka eftirlønir, sum eru vorðnar aktuellar, og verður tí skotið upp, at veitt verður persónlig viðbót, sum er munurin á verandi eftirløn og eftirlønini eftir nýggju útrokningini...."*

Grundgevingin:
*"Orsøkin til hetta er, tænastumenn, sum eru í hesum bólki (60-67 ár), nærkast eftirlønaraldri og tí hava lagt sær pensjonistalívið til rættis við væntan um at fáa eina ávísa eftirløn, og ber tí ikki til at lækka hesa dag frá degi.*
( løgtingstíðindi 1996 bls. 195)

Um rættartrygdina:
*"Fyri at tryggja rættartrygdina hjá tænastumonnum verður ein tillagingarskipan gjørd, sum fevnir um árini 1997 til ár 2010, har eftirlønin ikki lækkar tey fyrstu 7 árini."* (Løgtingstíðindi1996. bls. 190 og 196)

*4. Rættartrygd og etikkur*
Samanumtikið var niðurstøðan hjá Landsstýrinum, at fólk hava lagt sær pensjonistalívið til rættis við væntan um at fáa ávísa eftirløn, og ber ikki til at lække hesa dag frá degi. Fyri okkara eftirløntu tænastumenn er samlaða útgjaldið samansett av tænastumannaeftirløn og grundupphæddini í fólkapensjónini. Rættartrygdin verður sett til viks, um ein skiftistíð ikki verður gjørd á sama hátt sum, tá undanfarna tænastumanneftirlønarlóg varð sett í gildi. Tað er broytingin í samlaða útgjaldinum eftir skatt, sum er avgerandi fyri metingina um rættartrygdin verður varðveitt hjá tí einstaka. Í sambandi við hoyringina av lógini komu fakfeløgini eisini inn á møguligt brot á § 73 í Grundlógini, men her er niðurstøðan hjá landsstýrinum, at so er ikki, *um bert útgjøldini ikki verða lækkað.* Tað er tí neyðugt at gera eina skiftisskipan fyri at fáa eina loysn, sum varðveitir rættartrygdina.
Tað undrar okkum at spurningurin um manglandi rættartrygd ikki er viðgjørdur í skrivliga tilfarinum um nýskipanina. Tað sæst ikki aftur í tilfarinum, um hesin spurningur yvirhøvur hevur verið frammi í viðgerðini.

Tað er ikki etiskt rætt at taka pening frá eldri fólki, sum hava vunnið sær hesi rættindi í einum longum arbeiðslívið, og hava lagt sítt lív til rættis næstu árini innan teir fíggjarligu karmar, tey hava vunnið sær. Tað er ikki etiskt forsvarligt at minka teirra útgjøld overnight við upp til kr. 3.000? Um so var, at talan var um eina generella lækking av øllum almennum lønum uppá 15 %, so kundi Lærarafelagið tikið undir við broytingini hjá teimum eftirløntu, men tað kann ikki góðtakast, at útgjaldið verður lækka til ein avmarkaðan bólk av veikum borgarum í einum høggi. Tað er vanlig rættarsiðvenja í øllum londum kring okkum at gera eina skiftisskipan í sambandi við broyting ella lækking av eftirlønum og pensjónum. Vanlig

sømiligheit krevur tað. Løgtingið tók støðu til henda spurning í 1997. Eitt einmælt Løgting samtykti tá, at neyðugt var við eini skiftisskipan fyri ikki at seta rættartrygdina til viks!

Heilsan
f/Føroya Lærarafelag

Páll Poulsen, formaður

Til:
Fíggjarmálaráðið
Almannamálaráðið
Politiska pensjónsfylgibólkin

**<u>Viðv. lógaruppskotum viðv. pensjónsnýskipan, ið send eru Landsfelag Pensjónista til hoyringar</u>**

Hin 12. juli 2010 fingu vit 5 lógaruppskot frá Almannamálaráðnum til ummælis, har hoyringsfreistin varð sett til 20. august. Og hin 21. juli fingu vit 5 lógaruppskot afturat frá Fíggjarmálaráðnum, har hoyringsfreistin somuleiðis varð sett til 20. august 2010.

Hin 10. august heittu vit á Almannamálaráðið via e-mail um, at hoyringsfreistin varð longd til 10. september. 15 dagar seinni, hin 25. august fingu vit svar frá Almannamálaráðnum, har sagt varð, at Fíggjarmálaráðið ikki útsetir sína freist longur enn til 1. september og at Almannamálaráðið heldur seg til somu freist.

Vegna ov stutta hoyringsfreist og vegna tess at Landsfelag Pensjónista fær sera lága játtan á fíggjarlógini (Landsfelag Pensjónista fær sum er bert 250.000 kr. á fíggjarlógini), hevur Landsfelag Pensjónista ikki fíggjarorku at hava lønt skrivstovufólk at skriva ummæli v.m. fyri felagið. Tessvegna hevur felagið hvørki havt stundir ella orku at viðgera øll hesi 10 lógaruppskot á nøktandi hátt.

Tórshavn, hin 1. september 2010
Landsfelag Pensjónista

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
165 Argir

**Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um javning av fólkapensjón.**

Landsfelag Pensjónista tekur ikki undir við verandi uppskoti, at tímalønin hjá arbeiðarum skal verða grundarlag undir komandi javning av fólkapensjónini, hetta grundað á, at ein stórur partur av lønarhækkingum á arbeiðsmarknaðinum fara til viðbøtur, serviðbøtur og líknandi, meðan bert ein lítil partur kemur upp á tímalønina/grundlønina.

Landsfelag Pensjónista mælir í staðin til, at samlaði prosentvísi lønarkarmurin hjá alment settum verður nýtt sum grundarlag undir javningini av fólkapensjónini. Tí verður mælt til at § 2, fyrsta petti verður broytt soleiðis:

§ 2. Javningarprosentið verður útroknað sum helvtin av prosentvísu broytingini av samlaðu broytingini í lønarkarminum hjá alment settum hin 1. oktober inniverandi ár í mun til samlaða lønarkarmin 1. oktober árið fyri, og helvtin av prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum 3. ársfjórðing í inniverandi ári í mun til 3. ársfjórðing árið fyri.

Landsfelag Pensjónista mælir somuleiðis til at grunduppphæddin, ið verður nýtt í § 12 í pensjónslógini - um stuðul vegna serliga trupul kor - verður javnað frá 1999 støði til nútíðarstøði. Mælt verður til, at henda upphædd verður í minsta lagi sama upphædd, sum nýtt verður í donsku pensjónslógini t.v.s. 5.448 kr. fyri bæði gift og ógift.

Tórshavn hin 31. august 2010

Landsfelag Pensjónista

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
165 Argir

**<u>Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti</u>**.

Landsfelag Pensjónista tekur ikki undir við, at landsskattastigin sum fráboðað verður broyttur, soleiðis at fólk, ið vinna yvir 400.000 kr. árliga hin 1. januar skulu gjalda 2% minni í landsskatti enn tey skulu gera í 2011. Hetta tí at politiski myndugleikin við slíkum skattalætta til høgtlønt ger, at landskassin árliga missir 11. mió. kr. Og tí at slíkir áhaldandi skattalættar til breiðastu herðarnar eru við til at undirgrava og oyðileggja okkara samfelag sum eitt vælferðarsamfelag fyri øll. Áhaldandi skattalættar til høgtlønt hava við sær, at tað bert verða tey við rímuliga høgum inntøkum, sum í framtíðini kunnu keypa sær vælferðartænastur og taka av vælferðartilboðum, meðan tey við lágum inntøkum mugu klára seg sum frægast við discount/minimums vælferðartænastum - ella ongum almennum vælferðartænastum.

Í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti verður harumframt mælt til, at føroysku kommunurnar skulu lækka kommunuskattaprosent sítt við einum prosenti, soleiðis at landið kann hækka landsskattin í ásetingarlógini við einum prosenti, hetta sum lið í umbýti av inntøkum millum land og kommunur sum lið í bruttofisering av fólkapensjónini. Hvørt kommunurnar kunnu taka undir við slíkum uppskoti at lækka kommunuskattaprosenti er trupult at meta um. Landsfelag Pensjónista metir, at hetta er spurningur, sum landsstýrið má greiða saman við kommununum.

Landsfelag Pensjónista
Tórshavn, hin 31. august 2010

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
165 Argir

**Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**.

Landsfelag Pensjónista tekur fult undir við, at inngjaldið til samhaldsfasta verður hækkað úr 1,75 % upp í 2 %

Landsfelag Pensjónista
Tórshavn, hin 31. august 2010

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
165 Argir

**Viðvíkjandi bundnu eftirlønaruppsparingini**.

Landsfelag Pensjónista er kunnað um at Fíggjarmálaráðið ætlar at seta í verk bundna eftirlønaruppsparing við lóg við gildi at rokna frá 1. januar 2011.
Boðað er frá, at inngjaldið skal í minsta lagi skal vera 3% fyrsta árið. Og at inngjaldið skal hækka við 1,5 % um árið og verður 15% í 2019.

Sagt verður, at øll, sum hava arbeiðsinntøku og líknandi arbeiðstengdar inntøkar, skulu gjalda inn til skipanina.
Sum hetta uppskot er skikkað í løtuni, fer komandi lóg um bundna eftirlønaruppsparing ikki at fevna um fyritíðarpensjónistar. Hetta er sera órógvandi, tí fyritíðarpensjón er pensjón, sum sjúkurakt/arbeiðsskerd fáa frá tí almenna í staðin fyri mista arbeiðsinntøku ella manglandi arbeiðsinntøku.

Landsfelag Pensjónista heitir tí á Fíggjarmálaráðið at syrgja fyri, at eisini fyritíðarpensjónistar verða fevndir av komandi lóg um bundna eftirlønaruppsparing.

Landsfelag Pensjónista
Tórshavn, hin 31. august 2010

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 165
165 Argir

# Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Landsfelag Pensjónista tekur undir við, at fólkapensjónistar í øllum landinum skulu ganga undir sama kommunuskattahámark, sum í mesta lagi kann vera 20%. Og tekur undir við at inntøkumissurin hjá háskattakommununum verður endurgoldin av landskassanum.

Fíggjarmálaráðið grundgevur gjølliga fyri hesi áseting, men vit finna onga grundgeving fyri at broyta og síðan avtaka hetta hámark.

Landsfelag Pensjónista mælir tí til at ásetingarnar um at kommuskattahámarkið hjá fólkapensjónistum kann verða hægri enn 20%, - at rokna frá 2015 verða strikaðar.

Landsfelag Pensjónista heldur, at slíkt kommunuskattahámark upp á 20% átti at verði ásett fyri allar skattgjaldarar í landsins kommunum og ikki bert fyri fólkapensjónistar. Og skuldu háskattakommunur fingið inntøkumissin endurgoldnan frá landskassanum.

Landsfelag Pensjónista
Tórshavn, hin 31. august 2010

**Ummæli/viðmerkingar til Løgtingsmál nr. xx/2010: Uppskot til løgtingslóg um áseting og javning almannaveitingum**

Fólkapensjón fyri øll

Í mun til gomlu ellisrentuskipanina, sum bert varð veitt "værdigt trængende" sum eitt slag av olmussu, bóru hugsjónarmenn fyri hálvari øld síðan so í bandi, at vit fingu **fólkapensjón fyri øll** sum ein sjálvsagdan rætt. Nógv varð gjørt fyri at beina fyri gamla hugburðinum, at tað var skomm at "liggja samfelagnum til byrðu"og at tey, sum hetta gjørdu vóru olmussudýr, og í staðin fáa fólk at fata, at fólkapensjónin var ein **rættur**, sum øll áttu. Í árunum, sum farin eru, er hugburðurin so nógv broyttur, at flest allir samfelagsborgarar halda tað vera ein sjálvsagdan rætt at taka við fólkapensjónini, tá tann tíð er komin. Hugburðarbroytingin er vorðin væl stuðlað av, at allir verandi fólkapensjónistar og mangir komandi við minnast, at teir saman við skattinum rindaðu serstakt pensjónsgjald inn í landskassan, og at landskassin tí eisini er pensjónskassi teirra, sum teir sjálvandi skulu hava eina pensjónsveiting burtur úr, hvussu stór ella lítil, hon enn er.

Seinastu tíðina hava vit hoyrt tingfólk greiða frá, at í nýggjasta pensjónsskipanaruppskotinum er tað eydnast at varðveita fólkapensiónina fyri øll, og hava vit eisini kunnað lisið hetta m.a. á politiskum heimasíðum. Landsfelag Pensjónista fagnar hesum, og fara vit tí – nú nýggjasta uppskotið er sent til hoyringar - við góðum huga at kanna uppskotið til komandi fólkapensjónsskipan fyri øll.

**Bruttofisering av fólkapensjón**

**Landsfelag Pensjónista tekur fult undir við, at fólkapensjónin verður bruttofiserað, soleiðis at fólkapensjónisturin rindar skatt av allari síni inntøku, men tó fær áleið somu upphædd útgoldna eftir skatt, sum hann fekk áður. Tó verður mett, at hædd eisini eigur at verða tikin fyri, at grundupphæddin í fólkapensjónini hevur staðið í stað seinastu 12 árini, og at fólkapensjónin tí er munandi lækkað í mun til broytingarnar í samlaða lønarlagnum.**

**Mótrokning millum hjúnafelagar.**

**Landsfelagið fegnast um, at mótrokning millum hjúnafelagar loksins verður avtikin og heldur, at henda broyting nú beinir burtur ein missmunin í pensjónsviðurskiftunum millum ógiftar og giftar fólkapensjónistar.**

Uppskot til mótrokning í egnari inntøku í árunum frá 2011 til 2025

Uppskotsstillarin mælir til, at mótrokning í egnari inntøku verður broytt soleiðis at mótrokningar-prosentið komandi 14 árini, í 10 stigum, verður lækkað frá 60% til 20%. Meðan mótrokningarfría upphæddin sama tíðarskeið verður lækkað úr 59.800 kr. niður í 10.000 kr.

Eisini verður skotið upp, at mótroknað verður í allari fólkapensjónini (pensjónsviðbótum og grundupphædd) við øllum inntøkum uttan samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Grundupphædd og pensjónsviðbót skulu tí verða lagdar saman við viðbót til ávísar pensjónistar, so lættari verður at mótrokna.

Skilt verður framvegis millum stakar pensjónistar og hjún, hóast hesi heiti eru sera misvísandi í nútíðar samfelagnum. Vígslubrævið er framvegis avgerandi. Tað hevði tí lýst veruleikan betur, um lóggávan skilti millum gift og ógift. Skilnaðurin er undir øllum umstøðum høpisleysur, nú meirilutin av hjúnum eru ógift.

**Fíggjarligar avleigingar fyri láginntøkubólkin í 2011**
Eitt høvuðsmál hjá Landsfelag Pensjónista er støðugt at royna at bøta um korini hjá teimum pensjónistum, sum lítið annað hava at liva av enn fólkapensión og samhaldsfasta. Í fyrstu atløgu kunnu vit fegnast um, at ógiftir fólkapensjónistar við aðrari inntøku, sum árliga er millum 0 og 155.000 kr. sambært viðmerkingunum (síða 9 av 19) í høvuðsheitum fara at fáa eina hægri inntøku eftir skatt, sum fylgi av pensjónsnýskipanini. Tess meira hugstoytt er tað at kanna veruligu tølini, sum sýna, at inntøkuvøksturin eftir skatt hjá ógiftum fólkapensjónistum, sum hava 0 kr í øðrum inntøkum einans er 151 kr. um mánaðan og í bólkinum frá 10.000 kr. til 50.000 kr. er 17 kr. og upp í 118 kr. um mánaðan, meðan bólkurin frá 60.000 kr. til 120.000 kr. fær ein inntøkuvøkstur eftir skatt, sum liggur millum 589 kr. og 884 kr. um mánaðan.

Hesi tøl sýna greitt, at ikki ber til at tosa um ein homogenan bólk við øðrum inntøkum frá 0 kr. til 155.000 kr. Tvørtur ímóti eru her 2 ymiskir bólkar av pensjónistum, har teir mongu undir 60.000 kr. markinum lítið og einki fáa burtur úr pensjónsnýskipanini – summi ikki so frægt sum fyri eitt rugbreyð ella ein kaffipakka – meðan bólkurin oman fyri 60.000 kr. fær eina munandi inntøkuhækking.

Landsfelag Pensjónista skilir ikki, hví politiski fylgibólkurin heldur tað verða so serstakliga týdningarmikið, at pensjónistar, ið vinna meira enn 60.000 kr. árliga skulu fáa so nógv meira burturúr peningaliga. Landsfelag Pensjónista heldur, at tað var meira týdningarmikið, at politiska valdið hugsaði um, hvussu teir í alt 4.320 fólkapensjónistarnir, ið einans vinna millum 0 kr. og 60.000 kr. skulu klára seg, heldur enn einans at hugsa um tey fáu, sum vinna millum 60.000 kr. og 155.000 kr.

Í viðmerkingunum til uppskotið sæst, at heili 70 % av øllum fólkapensjónistum í landinum hava inntøkur, ið liggja nógv lægri enn 60.000 kr. árliga.

- Heili 3.366 fólkapensjónistar ella 54,5% av øllum fólkapensjónistum, hava inntøku, ið einans liggur millum 0 kr.og 5.000 kr. árliga
- 328 fólkapensjónistar hava inntøku, ið liggur millum 5.000 kr. og 19.999 kr. árliga
- 384 fólkapensjónistar hava inntøku millum 20.000 og 39.999 kr. árliga
- og 242 hava inntøku millum 40.000 kr. og 59.999 kr.

<u>Ógvusligur inntøkumissur í 2011 hjá miðal- og hægru inntøkunum</u>
Sum skilst fer uppskotið til nýggja mótrokningarskipan í 2011 at hava við sær, at tey sum vinna meir enn uml. 155.000 kr. hava áleið somu inntøku eftir skatt, sum tey hava í dag. Men so tekur mótrokningin dyk á seg (talva 4) soleiðis, at tann sum hevur eina inntøku á 350.000 kr. í 2010 missir heilar 46.080 kr. burtur av eftir skatt í 2011. Hetta ógvusliga inntriv – inntøkumissur á stívliga 13% - skal henda frá degi til dags. Men í veruleikanum er hetta inntriv nógv størri, tí upplýst verður eisini, at <u>øll fólkapensjónin verður burtur, tá inntøkan fer upp á 345.650 kr. hjá ógiftum og 277.400 kr. hjá giftum</u> (talva 2). Tað merkir, at ógiftur pensjónistur við hesi inntøku í januar mánaða 2011 fær 14,5 % minni í inntøku enn hann fekk í december mánaða í ár, tí einki oyra longur verður útgoldið í fólkapensjón. Gifti pensjónisturin fer at fáa áleið sama miss í prosentum. Í veruleikanum verður inntøkumissurin tó nógv størri, tí verður tikið hædd fyri, at grundupphæddin ikki verður skattað, sum er, kann inntøkumissurin lættliga metast at koma heilt upp á 20-22%. Einki fakfelag kundi hugsast at góðtikið slíkan inntøkumiss fyri nakran av limum sínum og hevur heldur ongantíð gjørt tað, tað vit vita. Landsfelag Pensjónista kann heldur ikki á nakran hátt

góðtaka hetta. Fleiri samanberingar kunnu verða gjørdar bæði innlendis og í grannalondunum, sum vísa at eingin góðtekur inntriv, sum enntá eru nógv minni enn hetta.

Vit fara í hesum sambandi at loyva okkum at minna á, at fyri einum ári síðan sýttu bæði embætismenn og tingfólk fyri at frásiga sær eina lønarhækking upp á 3%. Flestu teirra hava inntøkur, sum fáur fólkapensjónistur kann so mikið sum droyma um. At hesin sami valdmikli samfelagsbólkur nú krevur, at fólkapensjónistar skulu lata sær lynda nú á nýggjárinum at missa upp til áleið 20% av teirra inntøkum er so óhoyrt, at vit sakna orð fyri tí.

Henda mótrokningin er út um alt mark ov ógvuslig, serstakliga tá hugsað verður um, at í Danmark verður ikki mótroknað í grundupphæddini í fólkapensjónini fyrr enn **arbeiðsinntøkan** fer uppum 277.700 kr. og er grundupphæddin í fólkapensjónini ikki burtur fyrr enn **arbeiðsinntøkan** fer upp um 490.100 kr. árliga. Í Danmark verður ikki mótroknað í grundupphæddini av inntøkum frá egnari pensjónsuppsparing.

Landsstýrið og løgtingið eiga at leggja sær í geyma at Føroyar – framvegis - eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, sum eisini gjøgnum BLOKKIN rindar stóran part av fólkapensjónsútgjaldinum, og at lóggevandi valdið í Føroyum tískil ikki eigur at seta í verk nýggja pensjónsskipan, ið er so út av lagi nógv verri enn danska fólkapensjónsskipanin.

Verður henda mótrokningin framd, kann tað lættliga henda, at fíggjarliga javnvágin hjá teimum pensjónistum, sum longu hava nýtt part av síni lívsinntøku til uppsparing til egna pensjón, fer í sor.

**Fólkapensión fyri øll er ikki varðveitt í uppskotinum!**
Verður mótrokning í fólkapensjónini so ógvuslig, sum uppskotið leggur upp til, fáa fólkapensjónistar við miðalinntøkum og nakað hægri inntøkum ikki longur rætt at fáa nakað fólkapensjónsútgjald. Tá verður føroyska fólkapensjónsskipanin niðurlagað sum samhaldsføst sosialskipan, og vit fáa eina fátækrapensjónsskipan til teirra, ið hava lága ella onga eftirlønar uppsparing. Talan verður ikki longur um fólkapensión fyri øll, um hundraðtals pensjónistar nú á nýggjárinum verða blakaðir heilt burtur úr skipanini og mong onnur einans fáa ein brotpart av teirri fólkapensjón, tey áður fingu, einans tí tey í sínum virkna arbeiðslívi hava gjørt júst tað, sum nú fer at verða kravt av øllum: at spara upp til egna pensjón.

Tey tingfólk, sum í dag greiða fólki frá, at tað er eydnast at varðveita fólkapensjónina sum eina samhaldsfasta skipan fyri øll, fara tíverri skeiv. Fólkapensjónin verður ikki fyri øll komandi ár, verður uppskotið samtykt, og skipanin kann tá ikki av røttum verða kallað fólkapensjón.

Hetta fer at fáa negativar avleiðingar fyri undirtøkuna fyri fólkapensjónsskipanini, tí ikki kann væntast, at borgarar við góðum egnum pensjónsskipanum, teirra millum løgtingslimir, fara at hava tann stóra áhugan í at røkja eina almenna pensjónsskipan, sum teir sjálvir einki fáa burtur úr.

Verður mótrokning framd í tí líki sum lagt verður upp til í verandi pensjónsuppskoti, er vandi fyri at føroyska fólkapensjónin fánar burtur og blívur ein olmussukend fátækrapensjón.

Grundupphæddin í fólkapensjónini
Landsfelag Pensjónista kann ikki taka undir við, at grundupphæddin í fólkapensjónini verður avtikin. Grundupphæddin má metast at vera sjálv fólkapensjónin fyri øll, tann rættur sum øll hava til fáa útgjald úr landskassanum. Tó eigur grundupphæddin í fólkapensjónini at verða dagførd og

regulerað og ikki framhaldandi standa í stað á 1999 støði. Og eigur grundupphæddin at vera eins høg til gift og ógift.
Mælt verður til, at grundupphæddin verður ásett til 5.448 kr. um mánaðin fyri bæði gift og ógift eins og í donsku fólkapensjónsskipanini. Í grundupphæddini skal kunna mótroknast við øllum inntøkum uttan egnari pensjón. Hetta fyri at stimbra hugin at spara upp til egna pensjón, sum jú er eitt høvuðsendamál við pensjónsnýskipanini.

Mótrokning í egnari inntøku 2010 - 2025
**Í árunum frá 2010 til 2025 er ætlanin at mótrokningarprosentið í 10 stigum skal lækka úr 60% niður í 20% og er ætlanin somuleiðis at lække mótrokningarfríu inntøkuna úr 59.800 kr. niður í 10.000 kr. At mótrokningarprosentið verður lækkað niður í hóskandi støði er broyting, ið er góð og neyðug. At lække mótrokningarfríu upphæddina er hinvegin ætlan, ið er til ampa fyri lágløntar fólkapensjónistar, tí hon skerjir møgulleikarnar hjá lágløntum at fáa meira burturúr av peningi við at arbeiða. Tað fer við øðrum orðum ikki at loysa seg betur at arbeiða, enn tað ger nú, hjá lágløntum fólkapensjónistum, um mótrokningarfría inntøkan verður alsamt lækkað. Og er hetta í mótstríð við ætlananirnar í uppskotinum, har dentur verður lagdur á at "tað skal loysa seg at arbeiða". Sambært uppskotinum skal mótrokningarprosentið lækkast heilt niður í 20% í 2025 og samstundis skal mótroknast av øllum inntøkum yvir 10.000 kr. Slík broyting í mótrokningarreglunum er broyting, sum ikki í serligan mun gagnar teimum mongu lágløntu, sum royna at hava parttiðararbeiði at vinna sær pening afturat pensjónini, - men gagnar slík mótrokning hinvegin í serligan mun høgtløntum, sum varðveita stóran part av fólkapensjónini, sjálvt um tey hava høgar arbeiðsinntøkur ella aðrar inntøkur afturat fólkapensjónini.**
**At lække galdandi mótrokningarfríu upphæddina, ið nú er uml. 60.000 kr., er broyting sum er til skaða og ógagns fyri teir sera mongu lágløntu fólkapensjónistarnar, ið royna at arbeiða at vinna sær peningaligt ískoyti afturat fólkapensjónini.**

Mótrokningarskipanin fer einamest at gagna háinntøkunum í 2021-2025.
Hyggja vit nærri at teimum útrokningum fyri tíðarskeiðið 2021-2025, sum vit hava fingið úr fíggjarmálaráðnum, leggja vit merki til nakað sera áhugavert. Meðan giftir fólkapensjónistar fara at verða blakaðir úr fólkapensjónskipanini í 2011, tá inntøkan verður hægri enn **277.400 kr.** og ógift, tá inntøkan er farin upp um **345.650 kr.**, vísa framskrivingar av Excel-útrokningar hjá Kára Petersen, búskaparfrøðingi, at gift í 2025 fara at fáa fólkapensión líka til inntøkan er komin upp um **658.920 kr**. og ógift til inntøkan er komin upp um **882.890 kr**.
Hesi tøl vísa, at mótrokningin í fólkapensjónini fer at vera sera lagalig um 10-15 ár í mun til ta harðrendu viðferð, sum fólkapensjónistar við hægri inntøkum fara at fáa um bert fáar mánaðar.

Landsfelag Pensjónista kann ikki góðtaka, at núverandi fólkapensjónistar skulu mótroknast í fólkapensjónini nógv harðrendari enn tey, sum gerast pensjónistar um 10-15 ár og seinri.

### Hví broyta mótrokningina?

"Høvuðsendamálið við broytingini er at styrkja hugin at hava inntøku í pensjónsárunum við arbeiði og egnari uppspardari eftirløn", soleiðis stendur at lesa í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Landsfelag Pensjónista undrast á, at hetta skal vera høvuðsendamálið heldur enn at veita fólkapensjónistum best møguligar fíggjarligar umstøður.

### Fer høvuðsendamálið við broytingini at halda?

Óstortliga framferðin mótvegis teimum pensjónistum, sum longu hava spart upp til egna pensjón, kann ikki haldast at fara at fremja hugin hjá øðrum at gera tað sama. Skulu myndugleikarnar gera

sær hugsing um at fáa breiða undirtøku fyri hesum høvuðsendamáli, eigur at verða farið nógv lagaligari fram móti teimum, sum spara upp til egna pensjón.

Um broytingarnar fara at eggja pensjónistum at arbeiða meir enn teir longu gera, tykist okkum ivasamt, og vit síggja, at uppskotsstillarin sjálvur ivast (síða 7 av 19). Men um so er, hvat arbeiði man vera at fáa hjá pensjónistum í dag? Verður mótrokningarfría upphæddin lækkað, soleiðis sum lagt verður upp til, fer hetta at skaða inntøkumøguleikarnar hjá teimum fleiri túsund fólkapensjónistunum, sum hava inntøku undir 60.000 kr. árliga. Og sum hava størstan tørvin á at vinna sær pening afturat fólkapensjónini.

**Samanumtikið**
Hóast glottar eru í uppskotinum fyri fólkapensjónistar, t.d at mótrokning millum gift verður avtikin og at kommunuskattahámark verður ásett, er uppskotið sum heild til so stórt ógagns fyri stóran hóp av fólkapensjónistum, at vit meta, at Almannamálaráðið eigur at leggja stórt arbeiði í at fáa uppskotið á rættkjøl. Niðanfyri hevur Landsfelag Pensjónista sett upp nøkur mál, sum vit meta eiga at verða rokkin í eini fólkapensjónsnýskipan, og skal landsfelagið enn einaferð bjóða seg fram at vera við til at gjøgnumarbeiða nýskipanaruppskotið, so vit í Føroyum kunnu fáa eina virðiliga fólkapensjónsskipan fyri øll.

**Niðurstøða og tilmæli:**

Mugu hava eina rættvísa og universella fólkapensjónsskipan fyri øll
Føroyska samfelagið eigur at fáa eina samhaldsfasta universella fólkapensjónsskipan fyri allar fólkapensjónistar – eina sosialskipan sum øll eiga at fáa gagn av. Eina fólkapensjónsskipan sum eigur at verða løgd í fasta legu frá fyrsta degi, og ikki sum hetta uppskot leggur upp til - verða broytt í tíð og ótíð - komandi 14 árini. Eisini er tað serstakliga týdningarmikið at uppskotið til nýggja fólkapensjónsskipan verður broytt, soleiðis at núverandi fólkapensjónistar ikki verða fyri grovum missmuni í mun til teir fólkapensjónistar, sum koma til í 2025 og seinni.

1. Landsfelag Pensjónista mælir tískil til, at mótrokningarprosentið verður fast ásett til 30% frá fyrsta degi, og at mótrokningarfría upphæddin verður í minsta lagi á sama støði sum hon er í dag (í løtuni uml. 60.000 kr.) og eigur henda upphædd at verða dagførd og regulerað uppeftir á hvørjum ári.

2. Landsfelag Pensjónista mælir somuleiðis til, at grundupphæddin verður varðveitt og verður ásett til í minsta lagi 5.448 kr. um mánaðin fyri bæði gift og ógift (sum er júst sama upphædd, sum verður nýtt sum grundupphædd til ávikavist gift og støk fyri árið 2010 í donsku fólkapensjónini).

3. Landsfelag Pensjónista mælir frá, at mótroknast skal í allari grundupphæddini við øllum inntøkum. Mótroknað eigur at kunna verða í grundupphæddini við øllum øðrum inntøkum enn inntøkum frá egnari pensjónsuppsparing. Hetta fyri at stimbra hugin at spara upp til egna pensjón.
4. Landsfelag Pensjónista heldur at tað er í lagi, at landsstýrið ætlar at víðka um inntøkugrundarlagið hjá landskassanum at fíggja okkara vælferðarsamfelag. Landsfelag Pensjónista mælir til, at hetta m.a. verður gjørt við at hækka landsskattin hjá høgtløntum, herundir høgtløntum fólkapensjónistum, við tveimum prosentum. - Hetta heldur enn at taka alla fólkapensjónina frá einum parti av fólkapensjónistunum.

Tískil verður mælt til at, landsskattastigin fyri árið 2011 verður broyttur soleiðis, at eitt skattastig verður sett afturat inn í landsskattatalvuna fyri 2011 - hetta soleiðis at fer inntøkan upp um 600.000 kr. verða latnar 160.000 kr. av 600.000 kr. og 38% av restini. Hetta nýggja skattastig, ið er ætlað háinntøkum, eigur at verða galdandi í árunum framyvir.

Samstundis má skattahámarkið hækkast við 2%, soleiðis at tað kemur uppá 54%.

Soleiðis fær landskassin fleiri inntøkur og vit varðveita samstundis samhaldsfasta prinsippið, at tað eru breiðastu herðarnir, ið skulu bera tyngstu byrðurnar. Á slíkan hátt fáa vit eina solidariska, rímuliga og rættvísa fólkapensjónsskipan sum verður fyri øll.

Tórshavn, hin 31. august 2010

Landsfelag Pensjónista

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg

Í uppskoti til broyting av løgtingslóg um almenna forsorg verður mælt til, at orðingar viðv. § 9, stk. 2, 1. pkt. og § 13, stk. 1 verða broyttar, tí tær vísa til verandi grundupphædd í fólkapensjónini og verandi fólkapensjónskipan, sum ætlandi verður broytt við lóg hin 1. januar 2011, og sum ikki longur kunnu brúkast sum ávísingargrundarlag undir veitingum eftir § 9 og § 13, ið snúgva seg um hjálp til undirhald.
Í uppskotinum verður mælt til, at grundupphæddin, ið frameftir skal verða nýtt í sambandi við tørvsveitingar sambært § 9 og § 13 í forsorgarlógini, í 2011 verða tær somu sum nú t.v.s. 4.169 kr. til støk og 3.313 kr. til gift. Og skulu hesar grundupphæddir síðan javnast við 3% árliga at rokna frá 2012.

Vegna tess at grundupphæddin í fólkapensjónini verður nýtt sum grundarlag undir tørvsveitingum í § 9 og § 13 í forsorgarlógshøpi – og grundupphæddin í fólkapensjónini hevur staðið í stað síðan 1. jan 1999, t.v.s. seinastu 12 árini, er henda upphædd, sum er ætlað at verða gjald fyri mat, drekka, klæðir og aðrar leysar útreiðslur, púra afturútsigld og kann tí ikki nýtast í tí líki, hon er nú (hevur staðið í stað síðan 1. januar 1999 - og hevur verið 4.169 kr. til ógift og 3.313 kr. til gift).

Landsfelag Pensjónista mælir til, at grundupphæddin verður hækkað til nútíðarstøði og eigur síðan at verða hækkað árliga við hóskandi javningarprosenti.

Tilmæli
Landsfelag Pensjónista mælir til, at grundupphæddin, ið nýtt verður í donsku Servicelógini/-“forsorgarlógini” og donsku fólkapensjónslógini, ið fyri árið 2010 er kr. 5.448 til bæði gift og ógift verður nýtt sum grundarlag undir nýggju grundupphæddini í § 9 og § 13 í forsorgarlógini í staðin fyri gomlu afturúrsigldu føroysku grundupphæddina, ið hevur staðið í stað síðan 1999. Komandi nýggja og nútíðarjavnaða grundupphæddin má sjálvsagt javnast á hvørjum ári við samlaða lønarvøkstrinum og samlaða prísvøkstrinum.

Tórshavn, hin 31. august 2010
Landsfelag Pensjónista

Skjal 14

Komið

01. SEP. 2010

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráði
Kvíggjartún 1
165 Argir

Hoyvík, 31. august 2010

***Hoyringssvar til Lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn***

Eg havi fingið omanfyri nenvda lógaruppskot til hoyringar, og eg havi hesar viðmerkingar:

- at strika regulin um at útgjald av eini pensjón í seinasta lagið skal byrja við 70 ára aldur
- at víðka listan í §3 til eisini at fevna um trygging til sjúku og vannlukku - ella avtaka listan
- at avmarka heimildina hjá landsstýrismanninum í §6 stk 3 og §5 stk 3
- at pensjónistar ikki missa rættindi, tá pensjónir vera tvangsfluttar til annan veitara
- greiðari orðing um hvønn kærast kann til og hvørja heimild hesin kærustovnur hevur
- áseting í §§ 9, 10 eiga heldur at umfata kravda kunning til pensjónseigarar
- §10 stk 3 at pensjónistar skulu hava loyvi at broyta í síni pensjón eftir 67 ár
- uppgerðarháttur í §10 skal vera meira greiður
- gildiskoman skal broytast til 1.1 2012
- fleiri nøvn skulu kunnu setast á sum njótunartilskilaður umframt nærmasti avvarandi

__§2 stk. 6__ sigur at útgjald av eini pensjón skal byrja í seinasta lagið við 70 ára aldur. Eftir at fyrsta pensjónin er byrja at gjalda út, tá kann ikki longur inngjaldast til nakra aðra pensjón. Hetta er ein munandi avmarking í mun til verandi reglur. Tað stríður í móti ynskinum um tann rúmliga arbeiðsmarknaðin, sum skal tryggja at fólk vera leingi á arbeiðsmarknaðnum. Mælt verður til at strika hesar reglur, og í staðin geva møguleika fyri meira fleksibitetiti, í samband við at fari verður frá við pensjón.

Eitt aðalmál við pensjónsreforminum er, at fólk skulu vera longur á arbeiðsmarknaðinum. Fyritreytin fyri hesum er tann rúmligi arbeiðsmarknaðurin. Tað er umráðandi at skapa neyðuga fleksibilitetin, so at fólk kunnu laga yvirgongdina til pensjónstilverðina eftir egnum tørvi og førleika. Hetta er ein fyritreyt fyri, at fólk kunnu vera longur á arbeiðsmarknaðinum. Stórur dentur hevur verið lagdur á at skapa rúmliga arbeiðsmarknaðin seinastu áruni.

Í staðin fyri at skapa rúmligari umstøður, er lógaruppskoti ein avmarking í mun til verandi reglur. Fólk, sum eru við at fara frá við pensjón undir komandi skipan, fáa ikki sama møguleika at lagi arbeiði til egnan tørv. Vandi er fyri, at fólk tá fara fyrr av arbeiðsmarkninum, beint í móti ætlanini.

__§3__ avmarkar trygging í samband við eina pensjónsskipan, til bert at kunna fevna um lívstrygging og tryggingar við óarbeiðsføri. Men flestu pensjónsskipanir hava í dag trygging við hættisliga sjúku, og lógaruppskotið tvingar fakfeløg og virkir at broyta hesar pensjónssáttmálar. Harvið missa limir og starvsfólk vunna rættin til trygging við hættisliga sjúku. Mælt verður tí til, at víðka listan til eisini at fevna um trygging til sjúku og vannlukku ella at strika listan.

Ásetingin í uppskotinum avmarkar eisini møguleikan hjá pensjónsveitarum at bjóða fram nýggj produktir. Hetta kann føra til minni kapping, og at føroyingar ikki fáa atgongd til nýggj tryggingarproduktir (sum partur av pensjónsuppsparingini).

Ein listi yvir loyvdar tryggingar, er ein avmarking sum ikki endiliga tænir tí persónliga tørvinum, og tí eigur at takast støða til, um hesin listin yvirhøvur tænir sínum endamáli?

<u>§6 stk. 3 og §5 stk. 3</u> ásetur at landsstýrismaður skal gera kunngerð um umsitingar- og avgreiðslugjald. Ásetingin gevur landsstýrismanninum rættuliga víða heimild at broyta í pensjónsavtalum. Avtalur sum eru privatrættligar avtalur millum tryggingartakara og pensjónsfelag. Mælt verður til at avmarka heimildina hjá landsstýrismanninum til bert at galda fyri kravda kunning í samband við pensjónsavtalur.

Tað tykist ikki at vera samsvar millum viðmerkingar og lógartekst. Í viðmerkingum verður bert tosa um heimild um kravda kunning í samband við umsitingargjøld, men í lógartekstinum er talan um eina generella heimild í samband við umsitingargjøld.

Ein pensjónsavtala er ein privatrættlig avtala millum pensjónsmótakara og pensjónsfelag. Heimildin gevur landsstyrismanninum møguleika at broyta eina privatrættliga avtalu millum kunda og tryggingartakara. Tað er óvist hvørjar avleiðingar hetta fær fyri pensjónsmóttakara, og spurningurin um hvussu rættindi hjá pensjónseigarum vera tryggjaði, er ósvaraður.

Ætlanin er, at tað skal vera frí kapping á pensjónsmarknaðinum. Tí er óheppi, at landsstýrismaðurin fær heimild at broyta í pensjónsavtalum. Um eingin avmarking er í heimildini hjá landsstýrismanninum, er torført hjá pensjónseigarum og pensjónsveitarum at vita á hvørjum grundarlagi, ein avtala er gjørd á.

<u>§ 3 stk. 6</u> at eftirlønin verður flutt til annan veitara, uttan kostnað, um pensjónsveitarin ikki heldur ásetingina í §11 stk. 2. Mælt verður til at broyta ásetingina, so at pensjónistar ikki missa rættindi, tá pensjónir vera fluttar til annan veitara, tá pensjónsveitarin brýtur ásetingarnar hjá TAKS.

Tá ein pensjón verður flutt til annan veitara, missur pensjónseigari vunnin rættindi og skal gera eina nýggja avtalu við nýggjan veitara. Serliga um ein gomul pensjón skal flytast, er torført ella ógjørligt at fáa líka góðar treytir frá øðrum pensjónsfelagið. Tí kann nýggja avtalan blíva verri enn gamla avtalan, og tvangsflytingin kann føra við sær, at pensjónistur fær minni útgoldið í pensjón.

Samstundis gevur henda áseting pensjónsveitarum møguleika, at koma úr pensjónssáttmálum, sum geva undirskot. Tá skulu bert reglurnar hjá TAKS brótast, og pensjónin verður flutt til annan veitara. Hetta er óheppi fyri pensjónseigaran.

<u>§3 stk 7</u> áseting um kærur. Orðingin kann tykist nakað ógreið, og óvist er hvønn kærast kann til og hvørja heimild hesin kærustovnur hevur.

**§9** áseting um hægsta mark fyri partabrøvum í eini pensjónsskipan. Fíggjarligu váðarnir er nógvir, og váðin frá partabrøvum er bert ein av mongum váðum. Tí vil hægsta markið neyvan føra til eina nøktandi avmarking av fíggjarliga váðanum. Ein lýðandi minkingin av partabræva lutfallinum, sum byrjar so tíðiliga sum við 35 ár, er ein ásetingin, sum verður tung at hava eftirlit við. Fyri allar partar. Harumframt er tað ein avmarking hjá pensjónseigara, at samanseta persónligu pensjónina eftir egnum tørvi og ynski. Mælt verður í staðin til at gera eina áseting um kravda kunning til pensjónseigarar. Bert við innlit í egin viðurskifti, kunnu pensjónseigarar fáa innlit í váðan, og harvið vera før fyri at avmarka fíggjarliga váðan.

Tað er umraðandi at stýra fíggjarliga váðan á pensjónsuppsparingunum. Ov stórur váði, og vandi er fyri at partur av pensjónini verður mistur – ov lítil váði og vandi er fyri at uppsparingin veksur ov lítið. Fíggjarligur váði er við øllum íløgum, eisini lánsbrøvum, fastari ogn m.v.

At tryggja øllum pensjónsuppspararar atgongd til holla og góða ráðgeving, er neyðugt fyri at fáa innlit í egnan fíggjarligan vanda, og harvið avmarka hann. Fíggjarligu viðurskifti hjá okkum øllum eru sera ymist. Tí finnist ikki ein fastur regul sum er rættur fyri øll. Í grannalondum okkara finnast ei heldur tílíkar avmarkingar. Tó so at 20% reglan í ein vissan mun er galdandi.

**§10** stk. 2 um uppbýti pensjónina í lívlanga veiting, luta- og og kapitalpensjón. Hetta er eitt stórt inntriv í frælsi hjá hvørjum einstaka at seta saman sína pensjón. Hetta er ein munandi avmarking í mun til galdandi reglur. Avleiðingin er, at tað framyvir verður meira torført at seta saman sína pensjón, so hon hóskar til júst egnan tørv. Mælt verður til at strika hesa áseting, og í staðin áseta reglur um kravda kunning.

Lívlang veiting er ein partur av tí 'góðu pensjónsskipani'. Men havast skal í huga, at pensjónin er persónlig og uppspararing eigur sjálvur pengarnar. Tí eri yvasamt um fólk halda tað vera rímuligt, at mynduleikin skal seta so stórar avmarkingar í, hvussu pensjónin skal setast saman.

Tað, sum hevur størst ávirkan á støddina av pensjónina er, hvussu leingi tú hevur verið á arbeiðsmarknaðnum. Jú longri á arbeiðsmarkninum, tess meira er goldið inn og tess meira verður útgoldið í pensjón. T.d. verður tann lívlanga veitingin 2 ferðir størri um tú arbeiðir til 67 í mun til 60 ár. So um lógin skal trygga, at lívlanga veitingin hevur eina hóskandi stødd, so er betur at hava fokus á, at tey sum eru før fyri tí, vera sum longst á arbeiðsmarkaðnum, heldur enn at áseta eitt ávíst lutfall, sum skal til lívlanga veiting.

**§10 stk. 3** at tað ikki verður loyvt at gera broytingar í pensjónini eftir 67 ár. Fíggjarligu fyritreytirnar broytast alla tíðina, eisini hjá pensjónistum. Tá hetta hendur, broyta vit eisini okkara 'privatøkonomi'. Um broytingin er til tað betra, so brúka við meira. Er broytingin til tað verra, tá spara vit.

Men henda áseting ger tað torført hjá pensjónistum at laga pensjónina til broyttar fyritreytir, t.d. um hjúnarfelagin fellur frá. Pensjónistar eiga at hava somu møguleikar sum onnur. Mælt verður til at broyta hesa áseting, so pensjónistar fáa loyvi at broyta í pensjónini.

**<u>§10 viðmerkingar</u>** Tað tykist ikki at vera samsvar millum viðmerkingar og lógartekst. Lógin sigur at uppbýti millum lívslanga veting, luta- og kapitaleftirløn tekur støði í uppsparda (skattliga) virðinum av pensjónunum. Men í viðmerkingunum verður nevnt, at uppbýti skal takað støði í at útgjaldinum, og lutfalli millum lutapensjón og lívrentu skulu vera líka stór. Hesin ymisku uppgerðarháttir føra til heilt ymisk úrslit, tá pensjónin skal roknast. Tí er umráðandi at avklára hvønn háttur verður nýttur.

**<u>§21 í gildiskoma.</u>** Uppskotið sigur, at lógin skal koma í gildi 1.1 2011. Hetta tikist at vera stutt skábrá, tá hugsa verður um, at pensjónsfeløg skulu góðkendast av TAKS.

Hvat skal eitt fakfeløg gera, um teirra pensjónsfelag ikki verður góðkent? Flestu Føroysku feløg vera vantandi goðkend. Men tað er meira óvist er við donsku pensjónskassunum. Mælt verður til at gildiskoman av hesi lóg verður 1.1. 2012.

**Í Fylgiskjali 1 eru ásetingar um njótunartilskiljaðan umrøddar**. Uppskotið er at bert eitt navn kann standa sum njótunartilskiljaður. Hvussu verður tá møguligt at tryggja børnini, tá talan er um fleiri enn 1 barn

Kravið um eitt navn skal standa á, merkir at tað ikki verður møguligt at nýta "nærmasti avvarandi". Hetta verður nýtt í dag á flestu pensjónum. "Nærmasti avvarandi" merkir at pengarnir fyrst fara til hjúnarfelagaðan. Um ógift, tá fara pengarnir til børn, o.s.fr. Pengarnir koma rætta staði, og man sleppur frá allatíðina at siga til pensjónsfelagið at njótunartilskilaður skal broytast. Tí er stórur fyrimunur at nýta ásetinga "nærmasti avvarandi".

Mælt verður til at loyvi fleiri nøvnum sum njótunartilskila, og tað framhaldandi verður loyvi at innseta "nærmasti avvarandi".

Vinarliga

Poul Ch. Thomassen

Poul Christoffur Thomassen

Ábyrgdarhavandi aktuar

Garðavegur 3

188 Hoyvík

Skjal 14

Komið
01. SEP. 2010
Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráði
Kvíggjartún 1
165 Argir

Hoyvík, 31. august 2010

***Hoyringssvar til Lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn***

Eg havi fingið omanfyri nenvda lógaruppskot til hoyringar, og eg havi hesar viðmerkingar:

- at strika regulin um at útgjald av eini pensjón í seinasta lagið skal byrja við 70 ára aldur
- at víðka listan í §3 til eisini at fevna um trygging til sjúku og vannlukku - ella avtaka listan
- at avmarka heimildina hjá landsstýrismanninum í §6 stk 3 og §5 stk 3
- at pensjónistar ikki missa rættindi, tá pensjónir vera tvangsfluttar til annan veitara
- greiðari orðing um hvønn kærast kann til og hvørja heimild hesin kærustovnur hevur
- áseting í §§ 9, 10 eiga heldur at umfata kravda kunning til pensjónseigarar
- §10 stk 3 at pensjónistar skulu hava loyvi at broyta í síni pensjón eftir 67 ár
- uppgerðarháttur í §10 skal vera meira greiður
- gildiskoman skal broytast til 1.1 2012
- fleiri nøvn skulu kunnu setast á sum njótunartilskilaður umframt nærmasti avvarandi

**§2 stk. 6** sigur at útgjald av eini pensjón skal byrja í seinasta lagið við 70 ára aldur. Eftir at fyrsta pensjónin er byrja at gjalda út, tá kann ikki longur inngjaldast til nakra aðra pensjón. Hetta er ein munandi avmarking í mun til verandi reglur. Tað stríður í móti ynskinum um tann rúmliga arbeiðsmarknaðin, sum skal tryggja at fólk vera leingi á arbeiðsmarknaðnum. Mælt verður til at strika hesar reglur, og í staðin geva møguleika fyri meira fleksibitetiti, í samband við at fari verður frá við pensjón.

Eitt aðalmál við pensjónsreforminum er, at fólk skulu vera longur á arbeiðsmarknaðinum. Fyritreytin fyri hesum er tann rúmligi arbeiðsmarknaðurin. Tað er umráðandi at skapa neyðuga fleksibilitetin, so at fólk kunnu laga yvirgongdina til pensjónstilverðina eftir egnum tørvi og førleika. Hetta er ein fyritreyt fyri, at fólk kunnu vera longur á arbeiðsmarknaðinum. Stórur dentur hevur verið lagdur á at skapa rúmliga arbeiðsmarknaðin seinastu áruni.

Í staðin fyri at skapa rúmligari umstøður, er lógaruppskoti ein avmarking í mun til verandi reglur. Fólk, sum eru við at fara frá við pensjón undir komandi skipan, fáa ikki sama møguleika at lagi arbeiði til egnan tørv. Vandi er fyri, at fólk tá fara fyrr av arbeiðsmarkninum, beint í móti ætlanini.

**§3** avmarkar trygging í samband við eina pensjónsskipan, til bert at kunna fevna um lívstrygging og tryggingar við óarbeiðsføri. Men flestu pensjónsskipanir hava í dag trygging við hættisliga sjúku, og lógaruppskotið tvingar fakfeløg og virkir at broyta hesar pensjónssáttmálar. Harvið missa limir og starvsfólk vunna rættin til trygging við hættisliga sjúku. Mælt verður tí til, at víðka listan til eisini at fevna um trygging til sjúku og vannlukku ella at strika listan.

Ásetingin í uppskotinum avmarkar eisini møguleikan hjá pensjónsveitarum at bjóða fram nýggj produktir. Hetta kann føra til minni kapping, og at føroyingar ikki fáa atgongd til nýggj tryggingarproduktir (sum partur av pensjónsuppsparingini).

Ein listi yvir loyvdar tryggingar, er ein avmarking sum ikki endiliga tænir tí persónliga tørvinum, og tí eigur at takast støða til, um hesin listin yvirhøvur tænir sínum endamáli?

**§6 stk. 3 og §5 stk. 3** ásetur at landsstýrismaður skal gera kunngerð um umsitingar- og avgreiðslugjald. Ásetingin gevur landsstýrismanninum rættuliga víða heimild at broyta í pensjónsavtalum. Avtalur sum eru privatrættligar avtalur millum tryggingartakara og pensjónsfelag. Mælt verður til at avmarka heimildina hjá landsstýrismanninum til bert at galda fyri kravda kunning í samband við pensjónsavtalur.

Tað tykist ikki at vera samsvar millum viðmerkingar og lógartekst. Í viðmerkingum verður bert tosa um heimild um kravda kunning í samband við umsitingargjøld, men í lógartekstinum er talan um eina generella heimild í samband við umsitingargjøld.

Ein pensjónsavtala er ein privatrættlig avtala millum pensjónsmótakara og pensjónsfelag. Heimildin gevur landsstyrismanninum møguleika at broyta eina privatrættliga avtalu millum kunda og tryggingartakara. Tað er óvist hvørjar avleiðingar hetta fær fyri pensjónsmóttakara, og spurningurin um hvussu rættindi hjá pensjónseigarum vera tryggjaði, er ósvaraður.

Ætlanin er, at tað skal vera frí kapping á pensjónsmarknaðinum. Tí er óheppi, at landsstýrismaðurin fær heimild at broyta í pensjónsavtalum. Um eingin avmarking er í heimildini hjá landsstýrismanninum, er torført hjá pensjónseigarum og pensjónsveitarum at vita á hvørjum grundarlagi, ein avtala er gjørd á.

**§ 3 stk. 6** at eftirlønin verður flutt til annan veitara, uttan kostnað, um pensjónsveitarin ikki heldur ásetingina í §11 stk. 2. Mælt verður til at broyta ásetingina, so at pensjónistar ikki missa rættindi, tá pensjónir vera fluttar til annan veitara, tá pensjónsveitarin brýtur ásetingarnar hjá TAKS.

Tá ein pensjón verður flutt til annan veitara, missur pensjónseigari vunnin rættindi og skal gera eina nýggja avtalu við nýggjan veitara. Serliga um ein gomul pensjón skal flytast, er torført ella ógjørligt at fáa líka góðar treytir frá øðrum pensjónsfelagið. Tí kann nýggja avtalan blíva verri enn gamla avtalan, og tvangsflytingin kann føra við sær, at pensjónistur fær minni útgoldið í pensjón.

Samstundis gevur henda áseting pensjónsveitarum møguleika, at koma úr pensjónssáttmálum, sum geva undirskot. Tá skulu bert reglurnar hjá TAKS brótast, og pensjónin verður flutt til annan veitara. Hetta er óheppi fyri pensjónseigaran.

**§3 stk 7** áseting um kærur. Orðingin kann tykist nakað ógreið, og óvist er hvønn kærast kann til og hvørja heimild hesin kærustovnur hevur.

**§9** áseting um hægsta mark fyri partabrøvum í eini pensjónsskipan. Fíggjarligu váðarnir er nógvir, og váðin frá partabrøvum er bert ein av mongum váðum. Tí vil hægsta markið neyvan føra til eina nøktandi avmarking av fíggjarliga váðanum. Ein lýðandi minkingin av partabræva lutfallinum, sum byrjar so tíðiliga sum við 35 ár, er ein ásetingin, sum verður tung at hava eftirlit við. Fyri allar partar. Harumframt er tað ein avmarking hjá pensjónseigara, at samanseta persónligu pensjónina eftir egnum tørvi og ynski. Mælt verður í staðin til at gera eina áseting um kravda kunning til pensjónseigarar. Bert við innlit í egin viðurskifti, kunnu pensjónseigarar fáa innlit í váðan, og harvið vera før fyri at avmarka fíggjarliga váðan.

Tað er umraðandi at stýra fíggjarliga váðan á pensjónsuppsparingunum. Ov stórur váði, og vandi er fyri at partur av pensjónini verður mistur – ov lítil váði og vandi er fyri at uppsparingin veksur ov lítið. Fíggjarligur váði er við øllum íløgum, eisini lánsbrøvum, fastari ogn m.v.

At tryggja øllum pensjónsuppspararar atgongd til holla og góða ráðgeving, er neyðugt fyri at fáa innlit í egnan fíggjarligan vanda, og harvið avmarka hann. Fíggjarligu viðurskifti hjá okkum øllum eru sera ymist. Tí finnist ikki ein fastur regul sum er rættur fyri øll. Í grannalondum okkara finnast ei heldur tílíkar avmarkingar. Tó so at 20% reglan í ein vissan mun er galdandi.

**§10** stk. 2 um uppbýti pensjónina í lívlanga veiting, luta- og og kapitalpensjón. Hetta er eitt stórt inntriv í frælsi hjá hvørjum einstaka at seta saman sína pensjón. Hetta er ein munandi avmarking í mun til galdandi reglur. Avleiðingin er, at tað framyvir verður meira torført at seta saman sína pensjón, so hon hóskar til júst egnan tørv. Mælt verður til at strika hesa áseting, og í staðin áseta reglur um kravda kunning.

Lívlang veiting er ein partur av tí 'góðu pensjónsskipani'. Men havast skal í huga, at pensjónin er persónlig og uppspararing eigur sjálvur pengarnar. Tí eri yvasamt um fólk halda tað vera rímuligt, at mynduleikin skal seta so stórar avmarkingar í, hvussu pensjónin skal setast saman.

Tað, sum hevur størst ávirkan á støddina av pensjónina er, hvussu leingi tú hevur verið á arbeiðsmarknaðnum. Jú longri á arbeiðsmarkninum, tess meira er goldið inn og tess meira verður útgoldið í pensjón. T.d. verður tann lívlanga veitingin 2 ferðir størri um tú arbeiðir til 67 í mun til 60 ár. So um lógin skal trygga, at lívlanga veitingin hevur eina hóskandi støðd, so er betur at hava fokus á, at tey sum eru før fyri tí, vera sum longst á arbeiðsmarkaðnum, heldur enn at áseta eitt ávíst lutfall, sum skal til lívlanga veiting.

**§10 stk. 3** at tað ikki verður loyvt at gera broytingar í pensjónini eftir 67 ár. Fíggjarligu fyritreytirnar broytast alla tíðina, eisini hjá pensjónistum. Tá hetta hendur, broyta vit eisini okkara 'privatøkonomi'. Um broytingin er til tað betra, so brúka við meira. Er broytingin til tað verra, tá spara vit.

Men henda áseting ger tað torført hjá pensjónistum at laga pensjónina til broyttar fyritreytir, t.d. um hjúnarfelagin fellur frá. Pensjónistar eiga at hava somu møguleikar sum onnur. Mælt verður til at broyta hesa áseting, so pensjónistar fáa loyvi at broyta í pensjónini.

**§10 viðmerkingar** Tað tykist ikki at vera samsvar millum viðmerkingar og lógartekst. Lógin sigur at uppbýti millum lívslanga veting, luta- og kapitaleftirløn tekur støði í uppsparda (skattliga) virðinum av pensjónunum. Men í viðmerkingunum verður nevnt, at uppbýti skal takað støði í at útgjaldinum, og lutfalli millum lutapensjón og lívrentu skulu vera líka stór. Hesin ymisku uppgerðarháttir føra til heilt ymisk úrslit, tá pensjónin skal roknast. Tí er umráðandi at avklára hvønn háttur verður nýttur.

**§21 í gildiskoma.** Uppskotið sigur, at lógin skal koma í gildi 1.1 2011. Hetta tikist at vera stutt skábrá, tá hugsa verður um, at pensjónsfeløg skulu góðkendast av TAKS.

Hvat skal eitt fakfeløg gera, um teirra pensjónsfelag ikki verður góðkent? Flestu Føroysku feløg vera vantandi goðkend. Men tað er meira óvist er við donsku pensjónskassunum. Mælt verður til at gildiskoman av hesi lóg verður 1.1. 2012.

**Í Fylgiskjali 1 eru ásetingar um njótunartilskiljaðan umrøddar**. Uppskotið er at bert eitt navn kann standa sum njótunartilskiljaður. Hvussu verður tá møguligt at tryggja børnini, tá talan er um fleiri enn 1 barn

Kravið um eitt navn skal standa á, merkir at tað ikki verður møguligt at nýta "nærmasti avvarandi". Hetta verður nýtt í dag á flestu pensjónum. "Nærmasti avvarandi" merkir at pengarnir fyrst fara til hjúnarfelagaðan. Um ógift, tá fara pengarnir til børn, o.s.fr. Pengarnir koma rætta staði, og man sleppur frá allatíðina at siga til pensjónsfelagið at njótunartilskilaður skal broytast. Tí er stórur fyrimunur at nýta ásetinga "nærmasti avvarandi".

Mælt verður til at loyvi fleiri nøvnum sum njótunartilskila, og tað framhaldandi verður loyvi at innseta "nærmasti avvarandi".

Vinarliga

Poul Christoffur Thomassen

Ábyrgdarhavandi aktuar

Garðavegur 3

188 Hoyvík

Skjal 15

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún
Postsmoga 2039
165 Argir

Tórshavn tann
J. nr. a.07-07-10
Viðgjørt AD/LS
Tykkara j. nr.

**Hoyringssvar til lógaruppskot í samband við pensjónsnýskipanina**

**Hoyringssvar til Lóg um javning av fólkapensjón**

MBF hevur ongar viðmerkingar til uppskotið, tá vit ikki halda at vit kenna nóg væl til støðuna hjá fólkapensjónistum og tí ikki kunnu gjøgnumskoða fyrimunir og vansar við uppskotinum.

**Hoyringssvar til Lóg um broyting av ásetingarlógini**

Svar sum omanfyri

**Hoyringssvar til uppskot til lóg um broyting av lóg um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin**

Svar sum omanfyri

**Bundna eftirlønaruppsparingin**

Lagt verður upp til, at frá 1. januar 2011 verður bundin eftirlønaruppsparing sett í gildi fyri øll. Sum vit lesa uppleggi fer uppsparingin tó ikki at galda fólk, ið fáa fyritíðarpensjón. Her síggja vit fyri okkum, at um nøkur ár verða tað bert fyritíðarpensjónistar, ið ikki fara at hava nakra ískoytispensjón og tí eru noydd bert at liva av almennu fólkapensjónina. Hetta inniber at fyritíðarpensjónistar fáa ein nógv lægri livifót enn aðrir føroyingar.

Her fara vit at heita á politiska myndugleikan um at bera so í bandi, at ein pensjónnýskipan eisini verður gjørd fyri fyritíðarpenjónistar. Hvussu tað kann skipast hava vit ikki nakað endaligt uppskot uppá, men ein møguleiki er, at almenni myndugleikin átekur sær at gjalda uppsparingina ella at fyritíðarpensionisturin heldur áfram at fáa fyritíðarpensjón eisini aftaná fólkapensjónsaldur.

Hetta skriv er eisini sent Almannamálaráðnum

Vinarliga v/ MBF

Anna Suffía Durhuus

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Mánadag – fríggjadag kl. 09 – 16
Tel: +298 317373
Fax: +298 310813
mbf@mbf.fo

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Almannamálaráðið
Att: Doris Bjarkhamar
Eirargarður 2
100 Tórshavn

| | |
|---|---|
| Tórshavn tann | 20.08.10 |
| J. nr. | a. 07-07-10 |
| Viðgjørt | AD/LS |
| Tykkara j. nr. | |

**Hoyringssvar lógaruppskot í samband við pensjónsnýskipanina.**

Fyrst av øllum fer MBF enn einaferð at tala at tíðarskeiðinum fyri hoyringsfreist, í hesum førinum, at lógaruppskotini verða latin feløgunum at viðgera í hægstu summarferiutíð har tað er ógjørligt er at savna fólk at viðgera lógaruppskotini.

**Hoyringssvar til uppskot um broyting í løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

MBF fegnast um, at tað nú verður lagt upp til at fyritíðarpensjonistar, ið búgva á bústovni, røktarheimi ella á Psykiatriska deplinum frameftir skulu varðveita sína fyritíðarpensjón. Galdandi skipan við lummapengum er ein ójavni sum MBF hevur víst á í fleiri ár. Fyriliggjandi uppskot er í trá við ST sáttmálan og birtir upp undir javnrættindini fyri fólk við breki.

Viðmerkjast skal, at MBF heldur, at henda skipan eigur at halda fram eftir at farið verður yvir til fólkapensjón.

**Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**

MBF hevur ikki viðmerkingar til partin viðvíkjandi fólkapensjón, tá vit ikki er før fyri at gjøgnumskoða fyrimunir og vansar við broytingunum har lagt verður upp til at leggja alt saman til eina fólkapensjón, sum so verður fult skattskyldug. Upplýst verður at henda upphædd verður áleið tann sama aftaná skatt, so tað er gott, men hvussu vil tað síggja út komandi árini við teim sparingum sum vit alla tíðina fáa smoygt niður yvir okkum.

Sambært viðmerkingunum er ein grundleggjandi partur av avtaluni, at øll skulu vera umfataði av lógarásettum kravi um at gjalda til egnu eftirløn. Sum vit lesa lógaruppskotið ávirkar nýggja pensjónsskipanin tó ikki viðurskiftini hjá fólki, ið fáa fyritíðarpensjón og undrast MBF stórliga á, at ongin skipan verður gjørd fyri at tryggja fyritíðarpensionistum eins virðilig kor tá tey gerast fólkapensjonistar sum hjá øllum øðrum.

Her fara vit at heita á politiska myndugleikan um at bera so í bandi at ein pensiónnýskipan eisini verður gjørd fyri fyritíðarpensionistar.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Mánadag – fríggjadag kl. 09 – 16
Tel: +298 317373
Fax: +298 310813
mbf@mbf.fo

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum
Faroe Islands` Union for the Handicapped

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

Ongin viðmerking. Hava svara spurninginum omanfyri.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjonistar v.fl.**

Ongin viðmerking

**Uppskot til løgtingslóg um broyting um almenna forsorg**

Ongin viðmerking

Hettar skriv er eisini sent Fíggjarmálaráðnum

Vinarliga v/ MBF

Anna Suffía Durhuus

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Mánadag – fríggjadag kl. 09 – 16

Tel: +298 317373
Fax: +298 310813
mbf@mbf.fo

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Tórshavn, tann:** 23. august 2010
**J.nr.:** 10/01145 NV-8
(at tilskila í svari)

**Tygara skriv.:**

**Viðgjørt:** Majbritt Lamhauge Jacobsen

**Viðmerkingar til pensiónsnýskipan**

Víst verður til teldupost, dagfestur 12. juli 2010, har Almannamálaráðið sendir fleiri uppskot, í sambandi við pensiónsnýskipanina, til hoyringar.

Nærverkið hevur í áður – í undan hoyring – gjørt viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar og víst verður sum heild til nevndu viðmerkingar.
Nærverkið skal tó við hesum endurtaka høvuðssjónarmiðini viðv. teimum broytingum, ið sambært uppskotunum, fara at hava avleiðingar fyri búfólk á stovnum hjá Nærverkinum.

Nærverkið vil vísa á, at Nærverkið fegnast um, at tað nú vónandi er undirtøka fyri at geva búfólkunum pensjón. Tíverri røkkur henda undirtøkan bara til tey búfólkini, sum eru undir 67 ár, og mett verður, at tað fær nakrar óhepnar avleiðingar.

Í fyrsta lagi verður tað ymiskt frá búfólki til búfólk. Sum dømi kann nevnast, at Nærverkið hevur ein stovn, har eitt búfólk fær pensjón, meðan hini fáa lummapening. Broytingin í pensjónsreforminum hevur ta avleiðing, at viðkomandi búfólk í framtíðini fær lummapening, meðan hini fáa pensjón.
Tað snýr seg í hesum sambandi ikki einans um pening, men eisini um virðing fyri tí einstaka menniskjanum, og rættinum til at ráða yvir egnum pengum.

Uppskotini fáa harumframt eisini umsitingarligar avleiðingar. Hetta hevur týdning á fleiri økjum.
Størri umsiting verður í mun til innkrevjing av egingjaldi frá borgarum, umframt í mun til fíggjarmynstrinum av stovnunum mótvegis landskassanum. Her verður hugsað um eina standardisering av tyngdarmeting og /ella standardisering av stovnstænastum. Harumframt má Nærverkið støðugt roknað út, um aldurin á búfólkunum fær avleiðingar í mun til játtanina, og hvørja ferð eitt nýtt búfólk kemur inn, skal støða takast til, um játtanin skal broytast.

Sambært teimum útrokningum, sum Almannamálaráðið hevur gjørt, eru tær fíggjarligu avleiðigarnar av at búfólk verða fólkapensjónistar ikki so ógvusligar, og tí hevur Nærverkið ilt við at skilja, hví broytingin ikki eisini fer at umfata búfólk, sum eru fylt 67 ár.

Argjavegur 26, Postsmoga 3037, FO-110 Tórshavn
Tel +298 36 00 00, Faks +298 36 00 01
naerverk@naerverk.fo, www.naerverk.fo

Nærverkið hevur fingið upplýst frá Almannamálaráðnum, at tær útrokningar og viðmerkingar ið upprunaliga komu frá Almannamálaráðnum, ikki eru rættar og tí kann Nærverkið ikki taka støðu hesum viðvíkjandi í verðandi løtu.

Vinaliga

Mary J. í Garði
stjóri

Argjavegur 26, Postsmoga 3037, FO-110 Tórshavn
Tel +298 36 00 00, Faks +298 36 00 01
naerverk@naerverk.fo, www.naerverk.fo

Skjal 17

pharma danmark

Figgjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
FO-165 Argir
Færøerne

**31.08.2010**

Ref.: 10-1040

Pharmadanmark
Rygårds Alle 1
2900 Hellerup

Telefon 3946 3600
Direkte 39 46 36 22

Fax 3946 3639

mg@pharmadanmark.dk
pharmadanmark.dk

**Vedrørende høring om pensionsreform**

Pharmadanmark har modtaget høringsmateriale vedrørende reform af pensionssystemet på Færøerne.

Pharmadanmark har overenskomst med Figgjarmálaráðið for farmaceuter ansat i det færøske apoteksvæsen. Det fremgår af overenskomsten, at der indbetales et pensionsbidrag på 18 % af alle løndele. Pensionsbidraget indbetales for en del af farmaceuternes vedkommende til en ordning i Føroya Lívstrygging og for andres vedkommende til Pensionskassen for Apotekere og Farmaceuter (PAF) i Danmark.

Pharmadanmark har følgende kommentarer til reformen:

Det fleksible arbejdsmarked der findes i dag, hvor højt kvalificeret arbejdskraft skifter mellem ansættelse på Færøerne og i Danmark, risikerer at blive begrænset af den kommende pensionsreform. Det er Pharmadanmarks opfattelse at det færøske sundhedssystem har stort udbytte af, at de sundhedsprofessionelle medarbejdere bliver kompetenceløftet og videreuddannet uden for Færøerne. Det er udbredt at farmaceuter med færøsk oprindelse der er uddannet i Danmark begynder deres arbejdsliv på en dansk arbejdsplads for senere at finde ansættelse på Færøerne. Det sker ligeledes ofte at danske farmaceuter i perioder tager beskæftigelse på Færøerne for senere at vende tilbage til det danske arbejdsmarked. Disse farmaceuter, hvis arbejdsliv både omfatter Danmark og Færøerne, vil få deres pensionsopsparing delt mellem to ordninger, hvilket kan medføre at de får øgede omkostninger forbundet med deres pensionsordninger samt et mindsket overblik over deres pensionsforhold.

Farmaceuter der i dag har deres pensionsopsparing i et dansk pensionsselskab vil fremover skulle have deres pension indbetalt i et færøsk pensionsselskab for at kunne få fradrag for indbetalingerne. Pensionsforhold er kompliceret at gennemskue for de fleste og dette bliver kun forstærket af at man tvinges til at have flere ordninger, hvor der kan være udsving i forsikringsdækningerne fra ordning til ordning.

Med reformen må indbetalinger fra og med 2010 kun anvendes til ordninger med tidligste pensionsalder på 67 år og med et særligt ydelsesmønster. Pensionsordningen i Pensionskassen for Apotekere og Farmaceuter opfylder umiddelbart kravene til ydelsesmønsteret men ikke til aldersgrænsen idet ordningen kan komme til udbetaling ved pensionering efter det fyldte 60. år. Med

det påtænkte krav om at en privat pensionsopsparing først må komme til udbetaling fra og med det 67. år, er der tale om en væsentlig ændring i de forudsætninger som er gældende for farmaceuternes pensionsordninger i dag. Pharmadanmarks medlemmer anvender en stor del af deres løn til opsparing og har gjort det i forudsætning til, at de kan gå på pension tidligere.

Afslutningsvist må Pharmadanmark fremføre at tidsplanen for pensionsreformen virker ambitiøs, grænsende til det urealistiske. Det er væsentligt for Pharmadanmark, at sikre at foreningens medlemmer får de bedst mulige pensionsforhold og det er derfor nødvendigt med tid til at overveje hvordan denne opgave løses bedst muligt, ligesom det kan være nødvendigt at gå i dialog med både danske og færøske pensionsudbydere for at sikre dette. Pharmadanmark ser derfor gerne at der afsættes rigelig tid til at implementere disse mulige ændringer samt at der bliver tale om en lang overgangsperiode.

Med venlig hilsen

Mette Guldberg

Mette Guldberg
Forhandlingskonsulent

Skjal 18

Samtak

Tórshavn 3. September 2010

## Fylgibræv til hoyringsskrivini

Pensjónsuppskotið hevur leingi verið ávegis, og kunna vit møguliga fegnast um, at tað er komið somikið langt, at tað er sent til hoyringar. Tað eru eisini fleiri góð ting í pensjóns-uppskotinum, men pensjónsuppskotið í verandi líki livir ikki upp til eitt av aðalendamálunum, nevniliga at javna út og tryggja øllum eina góða tilveru í ellisárunum.

Tað er onki at ivast í, at talið á eldri fólki er vaksandi, og tað er jaligt í tann mun, at fólk liva longri. Men tað er ikki bara jaligt, at lutfalsliga talið av eldri er nógv hægri, tí um hugt verður at fólkasamansetingini yvir nøkur ára tíggju sæst, at t.d. munandi færri 20 – 40 ára gomul eru í Føroyum í dag í mun til fyri t.d. 20 árum síðani, og hetta kemst eisini av eini tilvitaðari fólkafráflyting, ið hevur serstakliga neiliga ávirkan í landinum. Tað vera framvegis fødd nógv børn í Føroyum – 2,6 børn fyri hvørja kvinnu í burðardyggum aldri, men tað eru alt ov nógv 20 – 40 ára gomul, og serstakliga kvinnur, ið velja at flyta í onnur lond.

Fyri at framtíðartryggja Føroyar er neyðugt, at vit fáa ein nógv betri og greiðari ungdóms-, útbúgvingar- og familjupolitikk. Tað eru ov fáar útbúgvingar, sum kunna takast í Føroyum, landið hevur ongan ungdómspolitikk og familjupolitikkurin er ov veikur. Tað hjálpir heldur ikki, at okkara sosialu skipanir ikki kunna kappast við tær donsku. Forsorgarlógin og onnur sosial lóggáva er dømi um hetta.

Alt hetta ger, at tað er ov lætt hjá fólki at taka avgerð um at flyta av landinum, og tíverri eru ov fá, sum venda aftur. Hetta ávirkar eisini bruttotjóðarúrtøkuna skeiva vegin, og er sostatt við til at gera støðuna í Føroyum enn meir vónleysa. Hetta mugu vit sum samfelag vera tilvitað um fyri at kunna venda skeivu gongdina við fráflytingini. Tað er gjørligt, men nøkur tilvitað val mugu takast, so at tað ikki gerst ein sjálvfylgja at flyta av landinum, tá ið tú ert í 20'unum. Fyri at framtíðartryggjað landið er eisini neyðugt við støðugum búskaparvøkstri.

Við pensjónsuppskotinum hevur løgtingið fingið ein søguligan møguleika at fremja ein av størstu og mest kollveltandi sosialu broytingunum í Føroya søgu, men tíverri tykist tað sum, at tikið verður ikki heilhjartað av hesum møguleika.

Tað er ikki nógv í manglar fyri at gera uppskotið gott, men tað er grundleggjandi at hetta verður gjørt, tí annars er hetta bert eitt uppskot sum tryggjar framtíðar gjaldføri landskassans, og ikki eitt uppskot, ið tryggjar fólkið her býr í nóg stóran mun.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

Tað mangla nøkur uppskot og ásetingar. T.d. er ikki nakra úttømandi listi av veitingum og stuðli, ið er eftirlønargevandi, og eingin áseting er um, hvør ið rinda skal. Hetta er eitt stórt brek. Politiski fylgibólkurin hevur eisini valt at taka forsorg og fyritíðarpensjón út úr uppskotinum, sum gevur eftirløn, og einki verður t.d. sagt um barnsburðarskipanina og Als. Skal tann sum fær veitingina úr Als og úr Barnsburðarskipanini sjálvur rinda 3% í eftirløn ella verður veitingin løgd omaná hesar veiting, og hvussu er við sjúkradagpeningaskipanini, frítíðarlønini o.s.fr.. Er hædd tikið fyri hesum í fíggjarlógini 2011?

Tað eru eisini nøkur viðurskifti, sum eru ógreið í mun til verandi eftirlønargrunnar hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, t.d. um hesi framhaldandi kunna gera íløgur sum higartil, um arvarætt og um hvussu goldið verður út. Eisini er tað eitt brek, at kunngerðirnar, ið víst verður til í uppskotunum, ikki eru sendar til hoyringar samstundis við uppskotinum.

Samtak skilir ikki, at uppskot verður gjørt fyri øll, men at tænastumannaeftirlønirnar verða undantiknar. Um frávik skal gerast fyri ein bólk, hví so ikki gera frávik fyri aðrar bólkar? Arbeiðarafeløgini hava eftirløn, sum er 9,4% og væntast kann, at hon skjótt verður væl hægri, hví kunnu hesi ikki vera undantikin skipanini, tá ið t.d. tænastumannaeftirlønir kunna vera undantiknir.

Grundhugsanin má vera, at skal lógaruppskotið vera galdandi fyri øll, so skal tað galda øll. Samtak hevur tí í viðmerkingunum sagt, at verandi fólk, við rætti til tænastumannaeftirlønir kunna varðveitast, men at ongi nýggj størv við tænastumannaeftirløn eiga at vera sett eftir 1. Januar 2011. Veruleikin er eisini, at tað eru sera fá, sum í dag vera sett við tænastumannaeftirløn, og eru politikarir sjálvir ein stórur bólkur, sum framyvir skal vinna sær rætt til tænastumannaeftirløn samstundis sum øll onnur vera undirløgd uppskotinum um 15% uppsparing.

Samtak hevur gjørt viðmerkingar til øll lógaruppskotini, ið send eru til hoyringar í summar. Til sjálvt uppskotið um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn eru viðmerkingar gjørd til hvørja lógargrein sær, og í hinum lógaruppskotinum eru viðmerkingar gjørdar í endanum á uppskotinum. Viðmerkingarnar hjá Samtak eru skrivaðar við bláum fyri at hesar skulu víkja frá lógartekstinum.

Vegna Samtak,

Sonja J. Jógvansdóttir, ráðgevi

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn**

***Kapittul 1***

*Vavi*

**§ 1.** Persónar, ið eru millum 18 ár og 67 ár og hava fulla skattskyldu og bústað í Føroyum, gjalda til sína egnu eftirløn.

Tað er óheppið at áseta, at persónar skulu "*gjalda til sína egnu eftirløn*". Í dag er høvuðsreglan hon, at løntakarar ikki gjalda til sína eftirløn, tí sambært teimum sáttmálaum, sum fakfeløgini hava samaráðst seg fram til, eru tað arbeiðsgevararnir, sum rinda eftirlønargjøldini.

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga so at siga einki um, hvørt myndugleikarnir ætla at broytingar skulu fremjast í galdandi sáttmálum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og hetta er spell, tí politiski myndugleikin eigur at melda greiðari út hvat liggur í orðingini, at persónar framyvir ***sjálvir*** skulu gjalda sína egnu eftirløn.

Í yvirlitinum yvir møguligar avleiðingar á síðu 17 í álitinum verður upplýst, at lógaruppskotið ikki fær fyrisitingarligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir. Hetta átti at verið útgreinað meira.

Hinvegin stendur í viðmerkingini til uppskotið at; "Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórar avleiðingar fyri vinnuna sum heild. Tó fer tað at ávirka smáu óskipaðu arbeiðsgevararnar, tí starvsfólk teirra ofta ikki gjalda til eftirløn. Tey verða nú umfataði av hesi lóg og smáu arbeiðsgevararnir skulu gjalda til eftirløn av øllum útgoldnum lønum... " Merkir hetta, at tað er ein skylda hjá arbeiðsgevarum at rinda eftirlønina.

Samtak heldur, at grein 1 skal broytast soleiðis at staðfest verður at persónar, ið eru millum ?? og 67 ár og hava fulla skattskyldu og bústað í Føroyum skulu hava eftirløn av allari løn og øllum viðbótum og stuðli, sum eru endurgjald fyri løn – herundir frítíðarløn, Als, forsorgarhjálp, sjúkradagpening, barnsburðargjald, v.m.."

Við at varðveita greinina sum hon er, er ivamál, hvat ið er eftirlønargevandi og hvør skal rinda. Landið kann sostatt skapa ein stóran trupulleika skaptur fyri øll tey, sum ikki hava rætt til eftirløn samsvarandi sáttmála á arbeiðsmarknaðinum umframt, at tey við leysari tilknýti til arbeiðsmarknaðin vera fyri vanbýti, um eftirløn ikki verður rindað omaná allar veitingar, ið eru endurgjald fyri løn.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak



Spurningurin er, nær tvungið skal vera at spara upp – Tað hevði verið áugavert við einum kjaki um, nær uppsparingin skal byrja – er tað rætt at byrja við 18 ára aldur? Stórsti kapitaltørvurin hjá fólki er í ungum árum, tá ið ung fólk nema sær útbúgving, seta búgv og fáa eina familju.

*Stk. 2.* Persónur, sum í sínum setanarviðurskiftum vinnur tænastumannaeftirlønarrætt, er ikki fevndur av hesi løgtingslóg við atliti av tí løn, hann vinnur sambært tænastumannastarvinum.

Henda grein skal strikast. Tá ið ein eftirlønarskipan verður gjørd eigur hon at fevna um øll sum fáa a- og b-inntøku ella sum fáa endurgjald fyri løn. Við at frítaka tænastufólk, sigur løgtingið at øll eru líka fyri lógini, men summi eru meir líka enn onnur.

Tað eru framvegis fitt av tænastumannastørvum á arbeiðsmarknaðinum, og hesi skulu hava loyvi at halda fram við skipan síni, og fáa tann eftirlønarrætt, sum tey eru sett eftir, men eftir 2011 skal tað bannast at seta fleiri fólk við tænastumannaeftirløn. Tænastumenn kunna setast, men eftirlønin skal vera innan karmarnar á hesi lóg, sum hjá øllum øðrum her á landi.

Tað eru ikki so nógv tænastumannastørv eftir í Føroyum, og innan at kalla allar vanligar starvsbólkar, verður fleiri tænastumannastørv ikki sett. Hetta er t.d. galdandi fyri lærarar og pedagogar. Innan einasta yrkið, har nógv størv vera nýsett við tænastueftirløn eru løgtings- og landsstýrislimir. Nøkur heilt fá onnur størv, sum framvegis geva rætt til tænastumannaeftirløn eru aðaðstjórar, tollarar og yvirlæknar.

Feløgini í Samtak halda ikki, at rætt er at løgtings- og landsstýrisfólk lóggeva seg sjálvi úr eftirlønaruppskotinum, samstundis sum øll onnur á arbeiðsmarknaðinum skulu tvingast í henda eftirlønarkarmin. Tvørturímóti skuldi løgtingsløn og landsstýrismannaløn givið prosentvísa eftirløn, eins og skotið er upp, at allir aðrir starvsbólkar hava. Viðvíkjandi tænastumannaeftirlønunum hevur landsgrannskoðanin eisini í áravís verið sera atfinngarsamur, tí einki veruligt yvirlit er yvir tey, ið rætt hava til tænastumannaeftirløn, og peningurin til tænastumannaeftirløn verður ikki settur av samstundis sum lønin verður útgoldin. Hesum trupulleika slepts undan framyvir, um fleiri størv, sum geva rætt til tænastumannaeftirløn ikki verða sett.

**§ 2.** Tvungna eftirlønargjaldið er í minsta lagi 3 prosent av A-inntøkuni, tá eftirlønarskipanin verður sett í gildi 1. januar 2011, og hækkar við 1,5 prosent um árið fram til 2019, tá eftirlønargjaldið er minst 15 prosent av A-inntøkuni.

Spurningurin er, um 15% er rætta gjaldið, og um nóg mikið er gjørt fyri at kanna aðrar møguleikar fyri eftirløn t.d. at styrkja samhaldsfasta enn meir.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin hevur við teimum avmarkingum, sum eru nevndar í § 1, stk. 2 og

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak



§ 4 skyldu til at inngjalda eftirlønargjaldið hjá løntakara, samstundis sum lønin verður ávíst um afturhaldsskipanina.

*Stk. 3.* Sjálvstøðug vinnurekandi og persónar við B-inntøkum skulu gjalda eftirlønargjald sambært stk. 1. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetir hvussu gjaldið verður goldið.

*Stk. 4.* Uttan mun til prosentásetingina í stk. 1, er tað ikki álagt nøkrum at gjalda meiri enn 100.000 kr. um árið. Upphædd omanfyri 100.000 kr. verður goldin útaftur eftir umsókn til TAKS fyri 1. juni árið eftir. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ger nærri ásetingar um javning av hesi upphædd.

*Stk. 5.* Uppsparari kann sjálvboðin inngjalda meira enn tað í stk. 1 nevnda prosentgjald, ávikavist ta í stk. 4 nevndu upphædd, til ta góðkendu eftirlønarskipanina.

*Stk. 6.* Persónur, sum er millum 67 og 70 ár, kann gjalda til eftirlønarskipan. Inngjaldið kann fara fram, til viðkomandi byrjar útgjald og í seinasta lagi til persónur gerst 70 ár.

*Stk. 7.* Persónar sambært § 1, stk. 1 hava skyldu at stovna eftirlønarkontu hjá einum av TAKS góðkendum eftirlønarveitara. Freistin at stovna eftirlønarkontu er sett til 1. januar 2011. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri eftirlønarsáttmálum.

Hvørjar eru hesar reglur? Tað hevði verið gott at fingið eitt útkast til hoyringar av hesum reglum.

*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta nærri reglur fyri tey, ið eru fevnd av øðrum eftirlønarskipanum uttanlands sum part av arbeiðssáttmála við útlendskan arbeiðsgevara.

Hvørjar eru hesar reglur? Tað hevði verið gott at fingið eitt útkast til hoyringar av hesum reglum.

**§ 3.** Av inngoldna eftirlønargjaldinum kann ein partur vera brúktur til trygging við deyða og óarbeiðsføristrygging, meðan restin skal verða nýtt til eftirlønaruppsparing. Tað er einans frádráttarrættur fyri tryggingar góðkendar av TAKS.

Hvat merkir henda áseting. Tað er fleiri løntakarafeløg, sum hava tryggingar og eftirlønir í Danmark, kann mismunur gerast á verandi skipanum og teimum í Føroyum. Hvørjar ásetingar nýtir TAKS, tá ið ein trygging skal góðkennast? Hetta stendur einki viðmerkt um, í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

**§ 4.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður kravt av øllum A og B-inntøkum, sum tey gjaldsskyldugu fáa, tó so, at niðanfyri nevdu peningaupphæddir eru undantiknar:

Samtak



1. uppihaldspeningur sambært hjúnabandslóggávuni
2. barnapeningur sambært "lov om børns retsstilling"
3. fólkapensjón
4. fyritíðarpensjón
5. óarbeiðsførisveiting
6. leypandi útgjald í samband við deyða eftirlønareigarans
7. forsorgarhjálp eftir forsorgarlógini

Síðani eftirlønarbroytingin var løgd fram á vári í 2007 var greitt sagt, at øll sum fáa løn ella lønarlíknandi veitingar/stuðul skulu fáa eftirløn, tó leggur henda grein upp til undantøk, sum víkir frá teimum politisku útsagnunum.

Samtak hevur fleiri ferðir reist spurningin um, hvat verður eftirlønargevandi, og hevur søkt um at fingið innlit í hetta. Svarini frá ávísum politikarum og embætisverkinum hevur verið, at alt sum var løn ella endurgjald fyri løn skuldi verða eftirlønargevandi. Í januar 2010 skrivaði politiski fylgibólkurin til Samtak "Meginreglan er, at gialdast skal til eftirlønarskipanir av veitingum, sum koma i staðin fyri løn. Sum tildømis arbeidsloysisstudul, sjúkradagpeningur og barnsburðarveiting..."

Um meginreglan, sum politiski fylgibólkurin leggur upp til skal haldast, so átti fyritíðar-pensjón og forsorgarhjálp eftir forsorgarlógini ikki verið undantikin, og nøkur av hinum punktunum kunna viðgerast nærri. Sjálvsagt skal eftirløn ikki rindast av fólkapensjón, men í grundini kunna øll hini punktini vera eftirlønargevandi. Samtak heldur tó, at tað í øllum føri skal vera eftirlønargevandi at fáa forsorgarhjálp umframt fyritíðarpensjón, so hesir bólkar ikki vera nógv verri stillaði í ellisárum enn tey longu eru.

Er hædd tikið fyri í fíggjarlógini 2011 fyri, at eftirlønargjald skal rindast omaná veitingar, sum koma ístaðin fyri løn? Hví er frítíðarlønin ikki nevnd positivt í lógaruppskotinum sum eftirlønargevandi. Fyri summar starvsbólkar er frítíðarlønin 12% av lønini, meðan tað fyri aðrar, sum fáa frí við løn einans er 1,5%. Eftirløn átti sjálvsagt at skulla verið lagt omaná alla frítíðarløn.

**§ 5.** Eftirlønaruppspararin eigur persónliga sína egnu uppsparing, ið er vard fyri úttøku ella aðrari rættarsókn frá ognarum. Eftirlønaruppsparingin kann ikki avhendast, veðsetast, ella verða nýtt sum mótrokning fyri møguligum kravi frá eftirlønarveitara.

*Stk. 2.* Eftirløn kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hon er útgoldin.

*Stk. 3.* Flyting frá einum eftirlønarveitara til annan eftirlønarveitara er ikki at meta sum útgjald. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um kostnað og avgreiðslugjøld.

Samtak



*Stk. 4.* Eftirlønin kann í sambandi við hjúnaskilnað gerast partur av felags búnum. Eftirlønaruppsparingar, ið eru inngoldnar eftir 1. januar 2011, kunnu vera partur av felags búnum, og kann í samband við hjúnaskilnað býtast og flytast millum eftirlønaruppsparingarnar og eftirlønarveitarar hjá hjúnafeløgum uttan at rinda avgjald til landskassan.

**Kapittul 2**
*Eftirlønarveitarar*

**§ 6.** TAKS góðkennir eftirlønarveitararnar, ið skulu fylgja ásetingunum, ið eru settar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi og "lov om finansiel virksomhed."
*Stk. 2.* Tann einstaka eftirlønaruppsparingin kann stovnast í lívstryggingarfelagi, eftirlønarkassa ella peningastovni, ið hevur loyvi at virka í Føroyum.

**til stk. 1 og 2;** Hóast hvørki lógaruppskotið ella viðmerkingarnar hava nærri frágreiðing um, hvat liggur í hugtakinum "eftirlønarveitari" , so skal hetta hugtak helst skiljast sum tað lívstryggingarfelag, tann eftirlønargrunnur ella tann peningastovnur, sum skal umsita eftirlønina. Tað kann tykjast løgið, at uppskotsstillararnir brúka eitt hugtak, sum ikki áður er brúkt í føroyskum lógarteksti, og ikki við einum orði greiða frá hvussu hetta hugtak skal skiljast.

Hví skal Taks góðkenna eftirlønarveitarar ? Nú skal ein eftirlønargrunnur lúka tær treytir, sum ásettar eru í lógini um tryggingarvirksemi, og slíkir grunnar skulu hava loyvisbræv (koncessión) frá Tryggingareftirlitinum sambært grein 7 í lógini um tryggingarvirksemi . Er tað ikki nokk, at viðkomandi eftirlønargrunnur hevur fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum ?? Hví verður einki nevnt í viðmerkingunum, um hvat endamálið er við kravinum um góðkenning frá Taks.

Tá grein 6 í lógaruppskotinum eisini hevur áseting um, at eftirlønarveitarar (tvs eisini eftirlønargrunnar) skulu fylgja ásetingunum, sum eru settar í "***lov om finansiel virksomhed***", so verður als einki nevnt í viðmerkingunum, um hvat hetta merkir fyri ein eftirlønargrunn, sum eitt ella fleiri fakfeløg hava sett á stovn. Tað er ikki nøktandi, at Fíggjarmálaráðið ikki greinar út hvørjar avleiðingarnar møguliga koma at verða fyri einstaka eftirlønargrunnin, tí lógin er eftir orðingini ætlað peningastovnum og líknandi stovnum.

Í grein 5, stk. 1 í lógini stendur:

***I denne lov forstås ved:***

1) ***Finansielle virksomher:***
   a) ***Pengeinstitutter,***
   b) ***(sættes ikke i kraft for Færøerne)***
   c) ***Fondsmæglerselskaber***

Samtak



*d) Investeringsselskaber*

*e) (sættes ikke i kraft for Færøerne)*

*…..*

***5) Administrationsselskab:***
***Et selskab, hvis virksomhed består i administration af institutter for kollektiv investering i værdipapirer (UCITS).***

Er tað grein 5, stk. 1, nr. 5, sum sipað verður til tá uppskotið til grein 6, stk. 1 vísir til, at eftirlønarveitarar skulu fylgja lov om finansiel virksomhed?

Tað er ikki nøktandi, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið ikki greiða nærri frá m.ø. hesum viðurskiftum, tá lógaruppskotini verða send til hoyringar.

*Stk. 3.* Umsitingar- og avgreiðslugjald av eftirlønarskipan hjá tí einstaka persóninum verður goldið av uppsparda eftirlønarvirðinum/inngjaldinum. Tað skal verða greitt tilskilað, hvat umsitingar- og avgreiðslugjaldið fevnir um, og skal vera í samsvar við veruliga kostnaðin av at umsita eftirlønarskipanina. Landsstýrismaðurin ger í kunngerð nærri áseting um umsitingar- og avgreiðslugjøld.

Víst verður í grein 6, stk. 3 í lógaruppskotinum til, at landsstýrismaðurin "ger í kunngerð nærri ásetingar um umsitingar- og avgreiðslugjøld".

Uppskot til slíka kunngerð átti at verið send út til hoyringar samstundis, sum lógaruppskotið varð sent út, tí fyri rættarstøðuna hjá bæði eftirlønargrunnunum og tann einstaka limin í grunninum er tað rættuliga umráðandi longu nú at vita, hvussu ein slík kunngerð fer at verða orðað.

*Stk. 4.* Eftirlønarveitarir senda árliga teldutøka kunning til TAKS um eftirlønarviðurskifti hjá øllum teimum, ið eru skrásett í eftirlønarskipanini hjá eftirlønarveitarum. Kunningin skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 20. januar hvørt ár, ella fyrsta gerandisdag eftir 20. januar.

*Stk. 5.* Verður ásetingin ikki fylgd, verða dagbøtur á 100.000 kr. álagdar fyri hvønn dag, ið fer útum fyrsta gerandisdag eftir 20. januar.

*Stk. 6.* Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í § 11, stk. 2 um útgjaldsætlan frá TAKS sambært hesi lóg verður eftirlønarupphæddin flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønareigara.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak



Til stk 4, 5, og 6; Kravið um, at eftirlønarveitarar hvørt ár skulu senda Taks kunning um eftirlønarviðurskiftini er skilagott.

Hinvegin er tíðarfreistin alt ov stutt, tí við túsundtals limum er tað ikki sannlíkt, at eftirlønargrunnurin kann senda Taks hesa kunning áðrenn 20. januar. Lógarásetingin eigur at áseta ein realistiska freist, tí tað eigur ikki at vera soleiðis, at lóggávuvaldið setir freistir, sum trupult ella ógjørligt at halda.

Forvitnisligt hevði verið at fingið nærri frágreiðing, um tey sum hava gjørt lógaruppskotið hava kannað um tey, sum í dag umsita eftirlønarskipanir halda seg kunnu halda eina tílíka freist.

Viðvíkjandi uppskotinum um, at dagbótin fyri ikki at halda innsendingarfreistina skal verða kr. 100.000, so er hetta fullkomuliga burturvið. Tað kann ikki bera til, at ein eftirlønargrunnur, sum ikki heldur eina tílíka freist skal gjalda kr.100.000,00 hvønn dag farið verður út um freistina, tí í vanligu eftirlønargrunnunum fer hetta jú at raka tann einstaka eftirlønaruppspararan. Freistin átti at verið ásett til 1. apríl, soleiðis eru stundir at gera tað arbeiði, ið Taks krevur, umframt at bótin fyri ov seina innlating eigur at linkast munandi.

Grein 6, stk. 6 hevur áseting um at eftirlønarupphæddin skal flytast til annan eftirlønarveitara at umsita, um ásetingin í grein 11, stk. 2 ikki verður hildin. Hendan orðinger alt ov avgjørd, tí grundirnar til, at grein 11, stk. 2 ikki fult út verða hildnar, kunnu vera so ymiskar. Tað kann tí ikki vera rætt, at eitt hvørt brot á grein 11, stk. 2 skal hava sum avleiðing, at eftirlønarupphæddin skal flytast til annan eftirlønarveitara at umsita.

*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um klagur, herundir um klagað kann verða til serstakan stovn.

*Eftirlønarskipanir stovnaðar uttanlands*

**§ 7.** Persónur, sum áðrenn 1. januar 2011 hevur stovnað eina eftirlønarskipan í einum lívstryggingarfelag, eftirlønarkassa ella peningastovni við heimstaði í Danmark, Grønlandi ella í øðrum ríki, sum hevur loyvi til at reka lívstryggingarvirksemi v.m. í hesum ríki, kann biðja TAKS góðkenna, at eftirlønarskipanin hevur frádráttarrætt í Føroyum. Góðkenningin er treytað av, at krøvini í nr. 1-6 eru lokin:

**1.** Eftirlønarskipanin skal antin vera ein lívlong veiting ella ein lutaeftirløn, sum frádráttur er veittur fyri eftir løgtingslóg um skatt av rentutrygging v.m. fram til 1. januar 2011.

**2.** Eftirlønarskipanin skal vera skipað í gjaldstig (tarif).

**3.** Persónurin skal góðtaka,
a) í sambandi við fráflyting ella skifti í skattligum heimstaði at verða skattaður eftir § 13 í hesi lóg av inngjøldum, sum frádráttur er veittur fyri í Føroyum,
b) at lívstryggingarfelagið, eftirlønargrunnurin ella peningastovnurin átekur sær skyldurnar í nr. 4.

**4)** Lívstryggingarfelagið, eftirlønarkassin ella peningastovnurin lýkur treytir í stk. 2 og játtar at taka á seg tær skyldur, sum settar verða tryggingarfeløgum v.m., sum útbjóða eftirlønarskipanir í Føroyum umfataðar av løgtingslóg um eftirlønaruppsparing, herundir tær skyldur, sum eru nevndar í § 120p í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

**5)** Lívstryggingarfelagið, eftirlønarkassin ella peningastovnurin skal hava góðkenning eftir stk. 2, sum ikki er afturkallað.

**6)** Tað skal kunna lata seg gera umvegis sáttmála um umbýti av upplýsingum, tvískattasáttmála el. líkn. at sanna heimildina hjá lívstryggingarfelagnum, eftirlønarkassanum ella peningastovninum eftir nr. 4 í hesum stykki.

*Stk. 2.* Lívstryggingarfeløg, eftirlønarkassar ella peningastovnar, sum hava loyvi at reka virksemi í Føroyum, kunnu biðja TAKS um loyvi at bjóða út eftirlønarskipanir við frádráttarrætti í Føroyum til persónar, sum uppfylla treytirnar í stk. 1. Verður tryggingarfelagið m.v. góðkent, verður eftirlønarskipanin, tá hon verður stovnað, góðkend fyri persónin, í tann mun lívstryggingarfelagið, eftirlønarkassin ella peningastovnurin vegna TAKS innheitar eina váttan, sum er umrødd í stk. 1, nr. 3. Góðkenning av tryggingarfelagnum v.m. til at bjóða út eftirlønarskipanir við frádráttarrætti fer fram, tá niðanfyri nevndu treytir eru loknar:

**1)** Eftirlønarskipanin skal lúka treytirnar í stk. 1, nr. 1-6.
**2)** Lívstryggingarfelagið, eftirlønargrunnurin ella peningastovnur skal lúka treytirnar stk. 1, nr. 4.
**3)** Treytirnar, sum eru umrøddar í nr. 2, skulu kunna sannast eins og skyldurnar eftir stk. 1, nr. 6.

*Stk. 3.* TAKS kann afturkalla eina góðkenning, sum er givin eftir stk. 1 ella 2, um hon ikki longur verður mett at lúka treytirnar fyri góðkenning.

*Stk. 4.* Um skipanin ikki verður góðkend eftir hesi áseting, verða útgjøldini skattliga viðgjørd eftir § 15 í hesi lóg.

*Stk. 5.* Umrokning frá fremmandum gjaldoyra í samband við avrokning av inngjaldi og

avrokning av inntøkuskatti og avgjaldi av útgjaldingum eftir hesi lóg skal gerast til miðalkursin hjá Tjóðbankanum falsdagin ella inngjaldsdagin ávikavist avrokningardagin.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann í kunngerð áseta nærri reglur um góðkenning av eftirlønarskipanum eftir stk. 1 og 2 umframt afturkalling eftir stk. 3.

**Kapittul 3**
*Íløgureglur fyri eftirlønarveitarar*

**§ 8.** Eftirlønaruppsparingar í peningastovni skulu verða nýttar til íløgur á ein hóskandi og gagnligan hátt fyri eftirlønareigaran.

*Stk. 2.* Eftirlønaruppsparingar í peningastovni skulu vera á serligari eftirlønarinnlánskontu, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum og skulu íløgurøktin og umsitingin av eftirlønaruppsparingini fylgja “lov om finansiel virksomhed v.m.” og “Markets in Financial Instruments Directive (MiFID).”

*Stk. 3.* Í eftirlønarhøpi skal eftirlønareigari av eftirlønaruppsparing í peningastovni vera bólkaður sum smákundi, sum er tað sama sum detailkundi sambært “Markets in Financial Instruments Directive (MiFID).” Hvørki eftirlønareigari ella eftirlønarveitari kann broyta skrásetingina frá smákunda/detailkunda til aðra kundaáseting við eftirlønaruppsparing.

*Stk. 4.* Tað verður einans loyvt eftirlønaruppspararanum sjálvum at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í keypsskálum í londum í Zone A sambært “lov om finansiel virksomhed”, og harafturat skulu ásetingarnar í MiFID fylgjast.

*Stk. 5.* Tað er einans loyvt at støðla eftirlønaruppsparing sambært “*bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v.*. Puljupensjón hjá peningastovni er fevnd av íløguráðgevingini sambært MiFID-reglunum.

**§ 9.** Eftir hesum leisti er loyvt eftirlønaruppsparara og eftirlønarveitara at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv í keypsskála sambært hesum lista:

| **Aldur** | **Hægst loyvdi prosentparturin av uppsparda virðinum í børsskrásett partabrøv** |
|---|---|
| – 34 | 80 |
| 35 – 44 | 70 |
| 45 – 49 | 60 |
| 50 – 54 | 55 |
| 55 – 59 | 50 |
| 60 – 64 | 35 |
| 65 – 69 | 25 |
| 70 – | 15 |

Samtak



*Stk. 2.* Tá partabrævaparturin hjá einum persóni er omanfyri hámarkið, sum er ásett í talvuni í stk. 1, verður rebalanserað.

*Stk. 3.* Hjá persóni yngri enn 60 ár verður ikki álagt eftirlønaruppsparara ella eftirlønarveitara at selja av partabrævagoymslu, hóast virðið av partabrævapartinum er omanfyri tað hægst loyvda. Rebalanserað verður við at íløgur bert kunnu verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabrævaparturin er komin niður á hægst loyvda partabrævapartin.

*Stk. 4.* Hjá persóni, ið er 60 ár ella eldri, skal íløgurøðin (porteføljan) rebalaserast niður á hægst loyvda partabrævapart í seinasta lagi fyrsta handilsdag eftir, at persónur er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár, sum ásett í talvuni í stk. 1.

*Stk. 5.* Virðisbrævagoymslan verður gjørd upp til marknaðarvirðið sama dag sum persónur gerst 67 ár ella fyrst komandi handilsdag eftir, at eftirlønareigari er vorðin 67 ár.

*Stk. 6.* Fyri eftirlønir teknaðar eftir lívstryggingarklassa III, har øll rentan ella partur av rentuni verður ásett eftir gongdini á marknaðarvirðinum á virðisbrøvum, má lutfallið av partabrøvum í mun til samlaðu virðisbrøvini, sum áseta rentuna, ikki vera hægri enn ásetta markið í stk. 1.

Til stk 1-6; Lógargreinin ásetur at avmarkingin fyri íløgur er galdandi fyri eftirlønaruppsparara og ***eftirlønarveitara***. Av tí at íløgurnar hjá t.d. Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelag ella Havnar Arbeiðsmannafelag ikki verða oyramerktar til tann einstaka limin, so er ilt at síggja hvussu hendan regla kann verða galdandi fyri ein slíkan eftirlønargrunn, væl at merkja um markið fyri hægstloyvda partinum í børsskrásett partabrøv (fyri elsta aldursbólk) ikki svarar til núverandi ásetingarnar hjá grunninum.

Tíverri er heldur ongin frágreiðing um hesar spurningar í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so ilt er at síggja hvat arbeiðsbólkurin hevur hugsað sær, at reglan skal umsitast tá talan er um felags íløgur fyri stórt talan av løntakarum í ymiskum aldursbólkum.

**Kapittul 4**
*Útgjaldshættir*

**§ 10.** Um sæð verður burtur frá stk. 7 kann eftirlønareigari í fyrsta lagi byrja eftirlønarútgjald, tá viðkomandi persónur gerst 67 ár.

*Stk. 2.* Eftirlønareigarin skal velja at fáa eftirlønina útgoldna sum niðanfyri ásett í seinasta lagi gerandisdagin fyri at viðkomandi gerst 67 ár við virknaði frá sama degi. Alt uppspart

eftirlønarvirði verður gjørt upp, og lutfallið verður býtt:

1) Í minsta lagi 45% sum lívlanga veiting.
2) Í mesta lagi 10% sum kapitalútgjald.
3) Í mesta lagi 55% sum lutaeftirløn.

Við lívlong veiting skilst at goldið verður ein ávís peningaupphædd, so leingi tann tryggjaði persónurin er á lívi. Kapitalútgjald er at skilja, sum at peningaupphæddin verður útgoldin í einum. Lutaeftirløn er peningaupphædd, ið verður goldin í eins stórum lutum yvir minst eitt 10 ára skeið.

*Stk. 3.* Lutfallið, ið eftirlønaruppsparari hevur gjørt í seinasta lagi við 67 ára aldur kann ikki broytast, tó við undantaki av stk. 5.

*Stk. 4.* Um TAKS ikki í seinasta lagi gerandisdagin fyri, at eftirlønaruppspararin gerst 67 ár, hevur móttikið skrivliga áheitan um valið av, hvussu viðkomandi ynskir útgjaldsformin, verður útgjaldsstøðan ásett til: 50 prosent til lívrentu, og 50 prosent til lutaeftirløn.

*Stk. 5.* Um kapitalútgjald kortini ynskist, er seinasta freist at senda skrivliga áheitan til TAKS síðsta gerandisdag fyri, at persónur gerst 70 ár. Tá verða 10 prosent útgoldin av upphæddini, ið er farin til lutaeftirlønaruppsparing.

*Stk. 6.* Eftirlønaruppsparingin verður uppgjørd tá persónur gerst 67 ár. Eftirlønarparturin av lívlangari veiting skal ongantíð vera kravdur hægri enn 70 prosent av eini arbeiðaraløn. Upphæddin, ið er omanfyri ta kravdu lívlangu veitingina kann flytast til lutaeftirlønaruppsparingina. Landsstýrismaðurin ásetur næri reglur fyri uppgerð av kapitalvirðinum av einari lívlangari veiting og uppgerð av eini arbeiðaraløn.

*Stk. 7.* Fyri persónar har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at viðkomandi grundað á sjúku hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, skal tað bera til hjá viðkomandi persóni at byrja eftirlønarútgjald fyrr enn við 67 ára aldur, sum er ásett í stk. 1.

*Stk. 8.* Útgjald av eftirlønaruppsparing, ið er inngoldin, meðan persónurin er millum 67 og 70 ár, kann verða útgoldið sum lívlang veiting, lutaeftirløn ella kapitalútgjald, tó so at kapitalútgjaldið í mesta lagi kann vera 10 prosent.

*Stk. 9.* Eftirlønin kann í seinasta lagi fara í útgjald sama dag sum eftirlønareigari gerst 70 ár. Útgjald av lutaeftirløn og lívlongari veiting byrja samstundis.

**§ 11.** Eftirlønareigari kunnar TAKS og eftirlønarveitarar um, at viðkomandi ynskir at byrja uppá eftirlønarútgjald. Eftirlønarveitarar senda skrivliga kunning til TAKS um saldo á eftirlønarkontu, virði á virðisbrævagoymslu og útgjaldsætlan hjá eftirlønaruppsparara í

seinasta lagi tann dagin, ið persónur gerst 67 ár ella fyrsta gerandisdag aftaná.

*Stk. 2.* Tá útgjaldsloyvi er fingið frá TAKS ber til hjá eftirlønarveitara /eftirlønarveitarum at gjalda eftirlønina út eftir áseting fyri hvat er galdandi fyri ta einstøku eftirlønarupphæddina. Tað er ikki loyvt eftirlønarveitara at broyta nakað av tí, ið TAKS hevur ásett og góðkent.

*Stk. 3.* Tá ein eftirlønaruppsparing skal útgjaldast, og virðið er minni enn 100.000 krónur, kann øll upphæddin verða útgoldin í einum og verður skattað sum vanligt kapitalútgjald við 45% í avgjaldi. Er tann samlaða eftirlønaruppsparingini minni enn 400.000 kr. við eftirlønaraldur, kann øll uppsparingin gjaldast sum lutaeftirløn.

Mælt verður til, at henda upphædd og aðrar upphæddir í hesum lógaruppskoti verður prístalsviðgjørd.

*Útgjald við deyða*

**§ 12.** Um eftirlønareigari doyr fellur uppsparda eftirlønarupphæddin til njótunartilskilaða í eftirlønarsáttmála ella nærmasta avvarðandi.

Er talan um alla eftirløn, ella er talan um part av upphæddini, t.d. tað sum kann verða lutaeftirløn? Hvussu verður við teimum eftirlønarveitarum, sum t.d. Havnar Arbeiðsmannafelag ella Føroya Arbeiðarafelag, sum hevur ein eitt sindur øðrvísi arvarætt enn tað í hesum skjali? Kunna limirnir í eftirlønarkassanum framhaldandi avgera, hvønn arvarætt tey vilja hava ella er tað tvungið at fylgja ásetingunum í hesi grein?

Tá ið Føroya Arbeiðarafelag hevur sett spurningar viðvíkjandi arvarætti og øðrum tekniskum viðurskiftum, hevur svarið á ymiskum fundum verið, at eftirlønargrunnurin lýkur allar treytir, og tí ikki skal broyta nakað. Er hetta framvegis so?

*Stk. 2.* Njótunartilskilaður kann fáa eftirlønina útgoldna við at rinda avgjald á 45 prosent til landskassan av eftirlønaruppsparingini upp til 1 millión krónur. Njótunartilskilaði rindar Askatt av upphæddini sum er omanfyri 1 millión krónur.

*Stk. 3.* Um njótunartilskilaði er antin hjúnafelagi ella sambúgvandi, tó ikki barn, kann viðkomandi velja at fáa alla ella part av eftirlønaruppsparingini flutta avgjaldsfrítt til sína egnu eftirlønaruppsparing.

*Stk. 4.* Njótunartilskilaður, ið er fevndur av stk. 3 kann taka yvir eftirlønarútgjaldið, ið tann deyði hevði, tá viðkomandi doyði. Við lívlanga eftirlønarveiting, ið samstundis fevnir um eina lívstrygging, fær njótunartilskilaði útgoldið eftirlønina so leingi sum njótunartilskilaði er á lívi. Við lutaeftirløn fær njótunartilskilaði ta tíðaravmarkaða útgjaldið samsvarandi tíðarskeið, ið tann deyði eftirlønareigarin sjálvur hevði kunnað fingið, tó skal samlaða

útgjaldstíðarskeiðið vera minst 10 ár.

*Stk. 5.* Er eingin innsettur sum njótunartilskilaður (og tvingsilsarvingur) verður eftirlønarupphæddin umløgd til eitt kapitalútgjald, og goldin verður A-skattur av eftirlønarupphæddini. Peningaupphæddin verður síðan partur av búnum.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur fyri uppgerð av skattliga virðinum á eftirlønum sambært hesi lóg.

## Kapittul 5
## Skattur av eftirlønaruppsparing

*Inngjald við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni*

§ **13**. Inngjaldið skal gjaldast inn á eina eftirlønarkonto hjá eigaranum av eftirlønini.

*Stk. 2.* Ein persónur sum er millum 67 og 70 ára gamal kann gjalda inn á eftirlønarkonto bæði av A-inntøku, B-inntøku og við sjálvbodnum inngjaldi við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni ella burtursíggingarrætti. Inngjald kann fara fram til útgjald byrjar og í seinasta lagi, tá persónur gerst 70 ár.

*Stk. 3.* Fyri arbeiðsgevaraskipan er antin fullur frádráttarrættur ella burtursíggingar-rættur í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjald til eftirlønaruppsparing. Frádráttur í skattskyldugu inntøkuni fyri inngoldið gjald til eftirløn verður gjørt upp samstundis sum líkningin verður gjørd. Frádrátturin fylgir inntøkuárinum, har inngjaldið er farið fram.

*Stk. 4.* Allar B-inntøkur hava skyldu til at rinda inn til eftirlønaruppsparing. Eftirlønargjaldið er í minsta lagi tað alment setta prosentinngjaldið, ið er galdandi sambært § 2 í hesi løgtingslóg. Frádrátturin í skattskyldugu inntøkuni er treytaður av, at inngjaldið til eftirløn er goldið áðrenn 1. mai árið eftir inntøkuárið.

*Stk. 5.* Hjá B-skattgjaldarum verður eftirlønargjaldið goldið mánaðarliga saman við fyribils B-skattinum. Tá skatturin er álíknaður verður rokning send ella ov nógv goldið eftirlønargjald verður afturgoldið. Skuld til eftirlønargjald víkir fyri skattaskuld. Hevur persónur bæði A- og B-inntøku verður eftirlønargjald mótroknað í A-inntøku. Um eingin eftirlønarkonta er stovnað, verður uppspart eftirlønargjald sett á depotkontu hjá TAKS uttan rentutilskriving.

*Stk. 6.* Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu heilt ella lutvíst gjalda inn til egna eftirløn av yvirskoti við sølu av vinnuvirki. Inngjaldið til eftirløn skal vera inngoldið áðrenn 1. mai árið eftir, at viðkomandi hevur selt vinnuvirkið heilt ella lutvíst. Frádrátturin fylgir inntøkuárinum.

*Stk. 7.* Rindar persónur sjálvboðin inngjøld til eftirlønarskipan, og hetta er at skilja sum roynd at sleppa undan at gjalda skuld til tað almenna, er tað loyvt TAKS at taka peningaupphædd av eftirlønarkontu hjá viðkomandi fyri at rinda skuldina til ta almenna.

*Stk. 8.* Har tryggingarveitari rindar eftirlønargjaldið hjá persóni, ið móttekur fulla ella partvísa óarbeiðsførisveiting, kann eftirlønargjaldið, ið tryggingarveitarin rindar, ikki dragast frá í skattskyldugi inntøkuni hjá viðkomandi persóni.

**§ 14.** Rentur og annar vinningur í eini eftirlønarskipan eru hvørki skatta- ella avgjaldskyldug í uppsparingartíðarskeiðnum.

*Stk. 2.* Tað sama er galdandi fyri vinning og tap við innloysing ella sølu av virðis-brøvum, sølu av tekningarrætti, vinningi og tapi vegna kursbroytingar av lánsbrævagoymslu, útlutan av avtøkuvinningi ella líknandi, tá virðisbrøvini eru partur av eini bundnari eftirlønaruppsparing.

*Stk. 3.* Í samband við útgjald verður rentutilskriving, uppspart bonus og annar vinningur sambært stk. 1 og 2 roknað uppí samlaða útgjaldið, og goldin verður skattur og avgjald samsvarandi kapittli 5 tá útgoldið verður.

*Inngjald uttan frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni*

**§ 15.** Inngjald til eina eftirlønarskipan, sum ikki kemur undir treytirnar í hesi løgtingslóg, kann ikki dragast frá, tá skattskylduga inntøkan verður gjørd upp.

*Stk. 2.* Útgjald verður ikki skattað, tó skal renta og annar ávøkstur av eini slíkari eftirlønarskipan verða skattað í samband við útgjald av eftirlønini. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur.

*Fráflyting úr Føroyum*

**§ 16.** Heldur skattskyldan hjá einum persóni uppat eftir § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt í sambandi við fráflyting, ella gerst ein persónur eftir ásetingunum í einum tvískattasáttmála heimahoyrandi í Danmark, Grønlandi ella øðrum ríki, skal skattur rindast av eftirlønini í seinasta lagi fráflytingardagin.

*Stk. 2.* Skattur eftir stk. 1 verður goldin til TAKS, men verður umsitin av Landsbanka Føroya.

*Stk.3.* Skattað eftirløn eftir stk. 1 verður útgoldin, tá ið vanligu treytirnar fyri útgjaldi eru loknar og verður annars skattliga viðgjørd eins og eftirløn fevnd av § 15, stk. 2.

*Stk. 4.* Skattsetingin eftir stk. 1 verður strikað, um persónurin aftur antin gerst skattskyldugur í Føroyum eftir § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt ella heimahoyrandi í

Samtak



Føroyum eftir ásetingunum í einum tvískattasáttmála. Strikingin ber í sær, at upphæddin, sum er kravd inn eftir stk. 2, við tilskrivaðum rentum v.m. aftur verður partur av eftirlønarskipan og umsitin av eftirlønarveitara.

**Kapittul 6**
*Mannagongd fyri persónar har bústaður er ókendur*

**§ 17.** Eftirlønaruppsparing í kontuførandi peningastovni, ið sambært uppgerð hoyrir til persón, ið er 67 ár, men hvørs bústaður er ókendur, tá útgjald eigur at byrja, skal gerast upp, og eftirlønarveitari skal halda áfram at umsita eftirlønina á mest skynsama hátt fyri eftirlønareigaran. Eftirlønarvirðið kann í 5 ár verða umsitið av eftirlønarveitara, meðan eftirlønarveitari áhaldandi roynir at finna eftirlønareigaran. Um uppspararin ikki hevur givið seg til kennar eftir hesi 5 árini, eftir at útgjald skuldi verið byrjað, verður lýst preklusivt proklama við áheitan á eftirlønareigaran um at geva seg til kennar.

*Stk. 2.* Um eftirlønareigarin ella nærmasti avvarðandi hansara ikki gevur seg til kennar eftir stk. 1, áðrenn freistin er úti, verður eftirlønarupphæddin flutt til Landsbankan at umsita. Um ánari 5 ár seinni framvegis ikki hevur givið seg til kennar, verður peningaupphæddin, ið er sjálv eftirlønin við tilskriving av rentu v.m., endaliga flutt til Landskassan. Tað kann tá ikki gerast krav uppá eftirlønarupphæddina, hvørki av møguligum ánara ella av nærmasta avvarðandi.

*Revsireglur*

**§ 18.** Brot á § 11, stk. 2 verður revsað við sekt.

*Stk.2.* Tað kann áleggjast eftirlønarveitarum v.m. (løgfrøðiligum persónum) revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**Kapittul 7**
*Skiftisreglur*

**§ 19.** Frá 1. januar 2011 ber ikki til at rinda pening inn á eftirlønarskipan við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni sambært rentutryggingarlógini Ll. nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutrygging v.m. (rentutryggingarlógini).

*Stk. 2.* Rentutryggingarlógin verður framhaldandi galdandi fyri tær skipanir og peningaupphæddir, ið eru á eftirlønarkontum tann 31. desember 2010.

*Stk. 3.* Eftirlønarupphæddir, ið sambært rentutryggingarlógini skal gjaldast út, kann í staðin verða flutt frá uppsparingareftirlønini hjá tí deyða til eftirlønaruppsparingarkontu hjá hjúnafelaga ella sambúgva eftir reglunum í hesi lóg.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

*Stk. 4.* Eftirlønarupphæddir sambært rentutryggingarlógini kunnu fylgja leistininum í hesi lóg í samband við hjúnaskilnað.

*Stk. 5.* TAKS kann loyva at tað framhaldandi verður inngoldið á eftirlønarskipan, sum er stovnað áðrenn 1. januar 2011, tá inngjøld eftir 1. januar 2011 uppfylla treytirnar í hesi lóg.

**§ 20.** Eftirlønarskipanir, ið nevndar eru í § 9 í rentutryggingarlógini kunnu verða fluttar frá Danmark, Grønlandi ella øðrum ríki til Føroyar, umframt at heimilað verður, at eftirlønarskipan við lívlangari veiting, ið er stovnað í Føroyum, Danmark, Grønlandi ella øðrum ríki verður flutt til eftirlønarskipan eftir hesi lóg og undir somu treytum uttan at vera viðgjørdar sum útgjald. Eftirlønarskipan, ið verður flutt sambært hesum stykki, verður fevnd av teimum nýggju útgjaldsreglunum í hesi lóg.

**§ 21.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

Samtak

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. September 1983, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 22. desember 2009, verður hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 47, stk. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:
"Allar skattskyldugar inntøkur, sum eru funnar eftir reglunum í hesari lóg, undantiknar tær, sum nevndar eru í § 2, stk. 1, litra a, b, h og i ávikavist § 47, stk. 2 verða skattaðar við prosenti (líkningarprosentinum), sum er tað sama fyri allar persónligar skattgjaldarar í kommununi."

2) Í § 47 verður eftir stk. 1 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2.* Persónur, sum fær fólkapensjón, skal í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2011 til 31. desember 2020 í mesta lagi gjalda niðanfyri nevnda kommunuskatt:

| **Ár** | **Kommunuskattahámark** |
|---|---|
| 2011-14 | 20% |
| 2015-18 | 20,5% |
| 2019-20 | 21% |
| 2021- | líkningarprosentið" |

Stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 3 og 4.

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011

**Viðmerkingar:**

Samtak fegnast um, at kommunuskatturin verður javntsettur fyri allar fólkapensjónistar, soleiðis at óansæð hvar í landinum tú býrt, so rindar tú sama skatt. Feløgini halda ikki, at rætt er at avtaka hesa meginreglu í 2021, tvørturímóti mælir Samtak til, at ásett verður í lógini um landsskatt og kommunuskatt, at tað ikki verður landafrøðiligur munur á skattaprosentinum.

Mælt verður til, at broyta kommunuskatta- og landsskattaskipanina, soleiðs at skattur verður ásettur einans eftir inntøku og ikki landafrøðiliga, og at kommunuskatturin eisini verður lutfalshækkandi, eins og landsskatturin. Sí eisini viðmerkingar til lógina um áseting av skatti.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirlønargrunn**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 25. mai 2009, verður hesar broytingar gjørdar:

1) Í §2, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis:

   Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin frá 1. januar 2011 at rokna: 2%.

2) Í § 2, stk. 2 verður 4. pkt. orðað soleiðis:

   Ásetti prosentparturin er frá 1. januar 2011 at rokna: 2 %.

3) Í §§ 8 og 9 verður "Toll- og Skattstova Føroya" broytt til: "TAKS".

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. Januar

**Viðmerkingar:**

Feløgini í Samtak mæla til at samtykkja omanfyristandandi uppskot, men samstundis at kanna, hvønn týdning tað hevði havt, um samhaldsfasti varð styrktur enn meiri enn uppskotið leggur upp til. Um samhaldsfasti verður enn meir styrktur kann hetta ávirka kravið um tey 15% soleiðis, at uppsparingarkravið kann lækkast nakað.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Skjal 18

Samtak

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um javning av fólkapensjón**

**§ 1.** Fyri hvørt fíggjarár verður roknað eitt árligt javningarprosent, sum verður nýtt at javna fólkapensjónina.
*Stk 2.* Upphæddirnar, sum vera javnaðar, eru tær galdandi pensjónsupphæddirnar.

**§ 2.** Javningarprosentið verður útroknað sum helvtin av prosentvísu broytingini í tímalønini 1. oktober inniverandi ár í mun til tímalønina 1. oktober árið fyri, og helvtin av prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum 3. ársfjórðing í inniverandi ári í mun til 3. ársfjórðing í árið fyri.

*Stk. 2.* Tímalønin, sum verður nýtt til áseting av lønarhækkingini, er grundtímalønin pr. 1. oktober hjá Føroya Arbeiðarafelag frároknað eftirlønargjøld og frároknað viðbøtur fyri starvsaldur.

*Stk. 3.* Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa broytingin í tímalønini, verður javningarprosentið sett til broytingina í tímalønini.

*Stk. 4.* Er roknaða javningarprosentið minni enn null, verður javningaprosentið sett til null.

*Stk. 5.* Hevur roknaða javningarprosentið í eitt ella fleiri ár verið minni enn null, soleiðis at javningarprosentið hevur verður sett til null, verður pensjónin ikki javnað aftur fyrr enn roknaða javningarprosentið í tíðarskeiðinum er komið upp um støðið áðrenn javningarprosentið varð sett til null.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð javningarprosentið í seinasta lagi 1. november hvørt ár.

**§ 4.** Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri útrokningina av javningar-prosentinum, herundir reglur sum taka atlit til broytingar í hagtalsgrundarlagnum fyri útrokningini av javningarprosentinum.

**§ 5.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011

**Viðmerkingar;**

Mælt verður frá at javna fólkapensjónina á henda hátt. Tað hevði verið betri at ásett, at fólkapensjónin verður javnað við 4% ella 3,5% árliga, tí at javningin annars verður alt ov tengd av óvissum viðurskiftum, og fólkapensjónin verður sum heild afturúrsigld, tí at grundlønarvøksturin í sáttmálunum hjá Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðarafeløgunum annars er bert ein partur av veruliga lønarvøkstrinum.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

Lønarvøksturin seinastu nógvu árini hjá arbeiðarafeløgunum hevur verið spjaddur í grundløn, eftirløn, aldusrviðbøtur og ymiskar aðrar viðbøtur. T.d. kann nevnast, at partur av lønarvøkstrinum í 2010 var nýttur til at broyta allar viðbøtur til prosentvísar hækkingar umframt at eftirlønin vaks. Í 2007 var stórur partur av lønarvøkstrinum nýttur til at styrkja aldursviðbøturnar og upphæddirnar fyri arbeiði á skiftivaktum á flakavirkjum vóru hækkaðar. Í 2001, 2003 og 2005 hevur lønarvøksturin somuleiðis verið nýttur til onnur viðurskifti, soleiðis at grundlønarvøksturin bert er ein partur av tí veruliga lønarvøkstrinum.

Tað er onki sum bendur á, at støðan verður øðrvísi framyvir, tvørturímóti hava arbeiðarafeløgini í Samtak ætlan um bæði at styrkja grundløn, men eisini at fáa nýggjar viðbøtur í sáttmálan, og at styrkja tær verandi.

Feløgini í Samtak mæla tískil til, at fólkapensjónin øll sum hon er, árliga verður javnað við einum fastásettum prosentvísum satsi, eins og gjørt verður í dag við summar almennar veitingar. Feløgini meta at javningin skuldi verið 4% ella í minsta lagi 3,5% árliga, á henda hátt verða fólkapensjónirnar ikki afturútsigldar.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Skjal 18

Samtak

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 1, stk. 1 verður skattaskalin orðaður soleiðis:

"Galdandi frá 1. januar 2011:
Er inntøkan minni enn kr. 30.000,- verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 8,0% |
| 70.000 | 140.000 | 2.800 | 70.000 | 19,0% |
| 140.000 | 250.000 | 15.400 | 140.000 | 22,0% |
| 250.000 | 400.000 | 38.500 | 250.000 | 34,0% |
| 400.000 | | 88.000 | 400.000 | 36,0% |

Galdandi frá 1. januar 2012:

Er inntøkan minni enn kr. 30.000,- verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 8,0% |
| 70.000 | 140.000 | 2.800 | 70.000 | 19,0% |
| 140.000 | 250.000 | 15.400 | 140.000 | 22,0% |
| 250.000 | | 38.500 | 250.000 | 34,0%" |

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. Januar 2011.

Skjal 18

Samtak

**Viðmerkingar;**
Mælt verður til at bíða við at samtykkja omanfyrinevnda uppskot til vissa er fingin fyri, at kommunuskattaprosentið lækkar tilsvarandi. Fyribils úttalilsir frá kommunum benda á, at tær onga ætlan hava um at lækka kommunuskattin, úrsliti av hesi broyting verður tískil hægri skattur til øll.

Samtak mælir til, at skattalækkingin í 2012 verður strikað. Skattaprosentið fyri lønir omanfyri 250.000 kr samsvarar væl við hugtakið um, at breiðastu herðarnar lyfta tyngstu byrðarnar, og síggja vit ikki nakra orsøk til at lækka skattin fyri hægstu lønirnar. Samtak tekur undir við teirri skattabroyting, sum Landsfelag Pensjónista hevur skotið upp, soleiðis at inntøkur omanfyri 600.000 kr rinda meir í skatti, og at skattahámarkið verður flutt úr 52% til 54%.

Sum heild halda feløgini í Samtak, at tørvur er á at eftirhyggja skattalógirnar, og at styrkja meginregluna um lutfalsligan skatt. Kommunuskatturin átti somuleiðis at verið lutfallshækkandi ístaðin fyri lutfalsjavnur, sum í dag, og skatturin skuldi verið eins fyri allar kommunur. Sum støðan er í løtuni, kann tað vera upp í 18.000 kr á muni árliga, hvat ein vanligur arbeiðsmaður rindar í skatti, tí tað eru heili 7,5% á muni millum hægsta og lægsta kommunuskattaprosenti.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1, 3 og 4, § 3, stk. 1 og § 7, stk. 1 verður ávikavist "pensjonistur" og "pensjónistur" broytt til: "fólkapensjónistur".

2) Í § 3, stk. 3 og 5 og § 4, stk. 1 verður ávikavist "pensjonisturin" og "pensionisturin" broytt til: "fólkapensjónisturin".

3) Í § 4, stk. 1 verður "pensjonistum" broytt til: "fólkapensjónistum".

4) § 4, stk. 3 verður strikað, og stk. 4 og 5 verða hereftir stk. 3 og 4.

5) Í § 5, stk. 1 verður "Pensjonistar" broytt til: "Fólkapensjónistar".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

**Viðmerkingar:**
Feløgini í Samtak halda tað vera sera jaligt, at skotið verður upp, at fremja omanfyrinevndu broyting, og mæla løgtinginum til at taka undir við uppskotinum. Verandi skipan við lummapeningi til fólk, ið búgva fast á stovni hoyrir ikki nútíðini til. Tað eru eisini dømi um fólk, ið lata seg útskriva ov tíðliga av stovnum (innan 6 mánaðir) av tí at tey eru í vanda fyri at missa sína pensjón. Hetta kann broytast, um viðkomandi ikki er í vanda fyri at missa sína veiting.

Eisini eru upphæddirnar, ið fólk fáa í lummapeningi á stovni serstakliga lágar, og hava tey sum fáa tær ikki nakran møguleika at liva eitt virkið lív, um tey ikki eru somikið heppin at hava avvaraðandi, sum stuðla teimum fíggjarliga.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Skjal 18

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um áseting og javning av almannaveitingum**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 12. desember 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 verður aftaná "løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl." sett inn: ", lóg um almenna forsorg (offentlig forsorg)".

2) § 2, stk. 1 seinasta pkt. verður strikað.
3) Í § 2 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Tó verða upphæddin til fólkapensjón sambært § 3, nr. 1 og upphæddin til persónligan tørv sambært § 3, nr. 2 javnaðar sambært lóg um javning av fólkapensjón.

4) § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3.** Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, upphæddirnar til uppihaldshjálp, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

1) Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.:

| **Fólkapensjón** | Byrjunarár | Kr. Árliga |
|---|---|---|
| Upphædd til fólkapensjón – støk | 2011 | 132.312,00 |
| Upphædd til fólkapensjón - gift hvør | 2011 | 98.364,00 |

| **Mótrokning í inntøku fyri fólkapensjónistar** | Byrjunarár | |
|---|---|---|
| Mótrokningafrí inntøka | 2011 | 59.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2011 | 45 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2012 | 58.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2012 | 45 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2013 | 56.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2013 | 45 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2014 | 54.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2014 | 40 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2015 | 52.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2015 | 40 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2016 | 50.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2016 | 40 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2017 | 40.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2017 | 35 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2019 | 30.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2019 | 30 |

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

| | | |
|---|---|---|
| Mótrokningafrí inntøka | 2021 | 20.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2021 | 25 |
| Mótrokningafrí inntøka | 2025 | 10.000,00 (kr. árliga) |
| Mótrokningaprosent | 2025 | 20 |

| **Fyritíðarpensjón** | Byrjunarár | Kr. Árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2011 | 69.852,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón - gift hvør | 2011 | 55.512,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2011 | 69.432,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2011 | 62.688,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2011 | 22.536,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón - gift hvør | 2011 | 19.584,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2011 | 21.276,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2011 | 17.088,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2011 | 32.904,00 |
| Hjálparviðbót | 2011 | 34.848,00 |
| Røktarviðbót | 2011 | 69.552,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2011 | 32.592,00 |
| Mótrokningafrí inntøkuupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 2011 | 89.700,00 |

2) Løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.:

| | Byrjunarár | Kr. |
|---|---|---|

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

| | | |
|---|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv til persónar 60 ár og eldri | 2011 | 11.772,00 (árliga) |
| Gjald fyri umlætting | 2011 | 128,87 (um samdøgrið) |

3) Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. Árliga |
|---|---|---|
| Upphædd | 2011 | 7.344,00 |

4) Lóg um almenna forsorg:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd sbrt. § 9, stk. 2 – støk | 2011 | 50.028,00 |
| Grundupphædd sbrt. § 9, stk. 2 - gift og samlivandi sum hjún í part | 2011 | 39.756,00 |
| Upphædd sbrt. § 13, stk. 1 – støk | 2011 | 87.912,00 |
| Upphædd sbrt. § 13, stk. 1 – gift og samlivandi sum hjún í part | 2011 | 69.084,00 |
| Barnaviðbót | 2011 | 12.552,00 |

5) Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. |
|---|---|---|
| Barnagjald smb. § 5 | 2011 | 12.552,00 (árliga) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2011 | 728,88 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 2011 | 1.240,36 (mánaðarliga) |
| Barnagjald smb. § 15, stk. 1 og 2 | 2011 | 12.552,00 (árliga) |
| Økt barnagjald smb. § 15, stk. 3 | 2011 | 25.104,00 (árliga) |
| Barnaískoyti sbrt. § 19a | 2011 | 1.590,00 (um ársfj.) |

5) § 6 verður orðað soleiðis:
"**§ 6.** Landsstýrismaðurin ásetur við kunngerð í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári javnaðu almannaveitingarnar fyri komandi ár.

Samtak

**Viðmerkingar:**

Politiski fylgibólkurin segði í viðmerkingini til uppskot um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn, at "Pensjóns- og eftirlønarskipanir hava tvey høvuðsendamál:

> 1. Ein javnan av inntøku til pensjónistar við eini lágari inntøku og harvið at fyribyrgja fátækt millum tey eldru.
> 2. Varðveita eina rímiliga inntøku, tá fólk fara frá eini tilveru sum løntakarar til tilveruna sum pensjónistar."

Feløgini í Samtak halda, at høvuðsendamálini eru sera góð og skilagóð, men at uppskotið omanfyri er í greiðari andsøgn við høvuðsendamálið, tí at tað í besta føri varðveitir tann mun, ið er á fólki í arbeiðslívinum, men vænta vit, at veruliga úrslitið verður, at gjógvin verður størri millum ymiskar lønarbólkar í ellisárum. Tað eru fleiri hættir at javna út, og mæla vit til, at nýta lutfalshækkandi skatt og eina skilagóðari mótrokningarskipan, ið tekur hædd fyri, at øll ikki megna at spara so nógv upp.

Skatturin í Føroyum er ikki serliga lutfalshækkandi, so henda meginregla kann styrkjast, t.d. við at broyta skipanina um kommunuskatt, so kommunuskatturin eisini er lutfalshækkandi, og hevði tað verið rætt, at fingið fleiri skattastigar, og at prístalsjavna hesar á hvørjum ári.

Feløgini í Samtak mæla staðiliga frá at gera mótrokningina sum í omanfyrinevnda uppskoti, tí at inntøkumunurin á fólki í arbeiðslívinum verður øktur alsamt í pensjónsárum um mótroknast skal eftir eini inntøku á 10.000 kr, sum skotið er upp at gera eftir 2025.

Við pensjónsuppskotinum hevur løgtingið ein søguligan møguleika at gera eitt uppskot, sum lættir um tilveruna hjá øllum pensjónistum - og møguleiki er at gera eitt uppskot, sum javnar út sosialt.

Fyri ein part av løntakaranum, sum ikki hava høga inntøku og teimum, sum hava eitt leyst tilknýti til arbeiðsmarknaðin verður tað ikki nógv, ið verður spart upp. Og skal tað mótroknast eftir 10.000 kr í inntøku, gevur tað als ikki meining at stríðast við at seta nakað til síðis til ellisárini. Pensjónsuppskotið skuldi heldur roynt at birt undir, at øll ynskja eina broyting í eftirlønini. Fyri vællønt fólk, ið fáa eina høga pensjón frá ungum árum hevur tað ikki eins nógv at týða sum tað hevur fyri tey við lægri inntøku. Tað vera serliga kvinnur, lágløнt og fólk, við leysum tilknýti til arbeiðsmarknaðin, ið fara at svíða um mótrokningin verður sum skotið er upp í hesum uppskoti.

Fyri at royna at varðveita hugtakið um, at breiðastu herðarnar bera tyngstu byrðarnar, so skuldi verandi mótrokningarfríu upphædd verið varðveitt og javna á hvørjum ári. Síðani kundi verið mótroknað við t.d. 30%. Fyri inntøkur omanfyri 150.000 kr kundi verið mótroknað við 40% og fyri inntøkur omanfyri 250.000 kundi verið mótroknað við 50%.

Samtak

Viðvíkjandi upphæddunum, sum víst er í talvuni í uppskotinum verður mælt til at dagføra allar satsir. Grundarupphæddin er ikki javnað síðani 1999, hon átti at hækkast munandi. Samtak tekur undir við Landsfelag Pensjónista, ið mælir til at hækkað grundarupphæddina til 5448 kr um mánaðin.

Annað dømi um gjald, sum átti at hækkað munandi er barnagjaldið. Viðvíkjandi barnagjaldinum í grein 3 punkt 5 verður mælt til at hækkað barnagjaldið smb §5 og barnagjaldið sambært § 15, 1 og 2 til tað dupulta t.v..s. 25.104 kr árliga, so at upphæddin er meir í tráð við veruliga kostnaðin av at hava eitt barn.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um almannapensjónir o.a.**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 26. mai 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Allar pensjónir sambært §§ 6-8 eru settar saman við eini grundupphædd og eini viðbót."

2) Í § 18 verður stk. 1 strikað, og stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 1 og 2.

3) § 19, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 19.** Fólkapensjón verður lækkað við støði í inntøkugrundarlagnum sambært § 20, sum ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum."

4) § 19, stk. 5 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 5.* Pensjónin dettur burtur hjá einum fólkapensjónisti, tá hon er lægri enn 1/40 av upphæddini til fólkapensjón, og hjá einum fyritíðarpensjónisti, tá hon er lægri enn 1/40 av grundupphæddini."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

**Viðmerkingar:**

Samtak mælir frá at avtaka grundarupphæddina í fólkapensjónini, men heldur at varðveita hesa meginreglu, og at dagføra satsin fyri grundarupphæddina. Samtak heldur tó at tað er í lagi at mótrokna í grundarupphæddini hjá fólki, ið hava høgar inntøkur, soleiðis at bæði fólkapensjón og grundarupphædd eru burtur, tá ið inntøkurnar eru fleiri 100.000 kr. Landsfelag Pensjónista hevur eitt uppskot, ið er vert at umhugsa hesum viðvíkjandi.

Samtak tekur undir við at øll pensjónin (grundarupphædd + viðbót) men satsirnir skulu dagførast, tí grundarupphæddin er ikki hækkað síðani 1999. Sí eisini viðmerkingar omanfyri um hetta mál.

Tað er jaligt, at inntøkurnar hjá hjúnaðarfelagum ikki vera mótroknaðar hjá hvør øðrum. Hetta hevur verið eitt stórt brek við verandi skipan.

Viðvíkjandi greinini um brøkpensjón so er neyðugt at taka hædd fyri, at tað eru alsamt fleiri, ið flyta til Føroyar sum vaksin, t.d. tí tey fáa føroyskan maka ella tey fáa varandi arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Fleiri av hesum hava ongan møguleika at fáa fulla pensjón, tí tey uppfylla ikki treytirnar t.v.s. tey hava ikki verið her í 40 ár, og tey náa helst ikki at spara serliga nógv upp á arbeiðsmarknaðinum.



Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

Nógv av teimum, sum flyta hendaveg eru úr londum, har pensjónsskipanir ikki eru ella har Føroyar onga avtalu hava við um sosialar veitingar. Føroyar hava í løtuni bert avtalu við Norðanlond um brøkpensjón, og hetta rakar pensjónistar og fyritíðarpensjónistar sum eru fødd uttanfyri Norðanlond sera meint, sum einans hava búð í Føroyum í nøkur fá ár, og tískil fáa sera lágar veitingar.

Samtak hevur reist henda spurning fleiri ferðir í Almannaráðnum, og mæla vit til, at undantak kann gerast frá regluni um brøkpensjón bæði viðvíkjandi vanligari fólkapensjón, men eisini í reglunum um fyritíðarpensjón. Á henda hátt ber til at fyribyrgja, at útlendingar uttanfyri norðanlond gerast sera illa fyri fíggjarliga, tá ið hesir gerast pensjónistar ella um tey gerast fyritíðarpensjónistar. Fyri landið er talan um eina lítla kr upphædd, um henda broyting skal gerast, tí tað eru so fá, men fyri tey húski, ið hetta rakar er talan um munin um tey at klára seg ella ikki.



Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg**

**§ 1**

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 2. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 9, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
   ”*Stk. 2.* Sum hjálp til uppihald verður sambært stk. 1 vanliga í mesta lagi útgoldin ein grundupphædd, sum er ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir.”

2) § 13, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   “**§ 13.** Tá ið ein persónur, ið ikki er fevndur av veitingum eftir løgtingslóg um almannapensjónir, varandi hevur tørv á hjálp til sítt og familjunnar uppihald, kann hjálp veitast soleiðis, at viðkomandi fær eina upphædd, sum er ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir.”



**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. jan. 2011.

**Viðmerkingar:**
Eins og Landsfelag Pensjónista mælir til, so heldur Samtak, at grundarupphæddin í fólkapensjónini skal varðveitast og hækkast til 5.448 kr um mánaðin fyri gift og støk, eftirsum at grundarupphæddin ikki er hækkað síðani 1999. Skulu pensjónirnar bruttofiserast, so er tað upphæddin 5.448 kr, ið skal verða grundarlagið fyri hækkingini og ikki verandi satsur.

Grundarupphæddin eigur at javnast við einum føstum prosentvísum satsi á uml 4%. Sí fleiri viðmerkingar um hetta mál í hoyringsskrivi um áseting og javning av almannaveitingum.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001, verða gjørdar hesar broytingar:
1) § 1 verður orðað soleiðis:

”**§ 1.** Viðbót verður veitt til ávísar pensjónistar v.fl., sum hava bústað í Føroyum. Giftir pensjónistar fáa eina viðbót í felag.
*Stk. 2.* Árliga viðbótarupphæddin verður ásett í lógini um áseting og javning av almannaveitingum. Upphæddin verður útgoldin í trimum saman við veitingunum fyri apríl, juli og desember mánaða.”
2) Í § 2, nr. 1 verður ”pensjón” broytt til: ”fyritíðarpensjón”.

3) § 2, nr. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis: ”Persónum, sum afturút hava fingið játtað fyritíðarpensjón frá ávikavist 1. apríl, 1. juli og 1. desember.”

4) Í § 3 verður sum stk. 2 sett:

“*Stk. 2.* Rætturin til viðbótina verður tikin við, tá pensjón verður um- og eftirroknað, sbr. §§ 21 og 21a í almannapensjónslógini. Reglurnar í almannapensjónslógini í § 22, stk. 1 um upplýsingarskyldu og § 23 um afturgjaldsskyldu eru eisini galdandi fyri veiting sambært hesari lóg.”

5) § 4 verður strikað.

6) Í § 5, stk. 2 verður ”Kærunevndina í almannamálum” broytt til: ”Kærunevndina í almanna- og heilsumálum”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011

**Viðmerkingar:**
Treytað av, at upphæddirnar til fólkapensjónina verða hækkaðar, mælir Samtak til, at omanfyrinevnda uppskot verður samtykt.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Samtak

**Grein 1**

Í lógaruppskotinum stendur, at Persónar í Føroyum "*gjalda til sína egnu eftirløn*".

Hetta er ein óheppin orðing, tí sum nú er, so eru tað arbeiðsgevararnir, sum gjalda eftirlønargjøldini, og um lógin fer at áseta, at tað eru løntakararnir sjálvir, sum skulu gjalda til sína eftirløn, so kunnu arbeiðsgevar-arnir fara at tulka hetta soleiðis, at sáttmálarnir skulu broytast, og tað kann neyvan vera ætlanin hjá teimum, sum hava gjørt hetta lógaruppskot.

**Grein 6**

Hvørki í lógartekstinum ella í viðmerkingunum verður nevnt nakað um, hví "eftirlønarveitarar" skulu fylgja ásetingunum í lógini um finansiel virksomhed. Eftirlønargrunnarnir eru undir neyvum eftirliti av Tryggingareftirlitinum.

Tað undar okkum, at einki verður nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, hvør orsøkin er til, at m.a. eftirlønargrunar nú eisini skulu fylgja ásetingunum í lógini um finansiel virksomhed, sum jú fyri meginpartin regulerar viðurskiftini hjá peningastovnum.

**Grein 9**

Vit skilja ikki hvussu tey sum hava gjørt hetta lógaruppskot hava ímyndað sær, at eftirlitsmyndugleikarnir skulu hava eftirlit við, at ásetingin um hægst loyvda partin í partabrøvum skal verða hildin, tá talan er um limir í eftirlønargrunnum, tí hesir hava jú gjørt felags íløgur, og aldursbýtið liggur millum 18 og 67 ár.

Á fundinum skiltu vit, at hendan áseting bert var ætlað privatum eftirlønaruppspararum, men vit skulu viðmerkja, at í grein 9 stendur "eftirlønarveitara", og sambært grein 6, so tykist hugtakið "eftirlønarveitari" eisini at fevna um eftirlønargrunnar, so her tykist ikki at vera samsvar millum grein 6 og grein 9.

**Grein 12**

Vit skilja ikki rættuliga um ætlanin er, at eftirlønaruppsparingar altíð skulu arvast. Soleiðis kann grein 12 væl lesast og einki verður nevnt í viðmerkingunum.

Í nógvum eftirlønargrunnum er tað soleiðis, at uppspard eftirløn ikki fellur í arv, ella at bert partur av uppsparingini fellur í arv.

Um løggávuvaldið ætlar at forða eftirlønargrunnum í sjálvir at áset í hvønn mun uppspard eftirløn kann arvast, so má tað greitt ásetast í lógini ella um ikki annað, so nevnast í viðmerkingunum.

Samtak

Vit halda tó, at lógin ikki eigur at taka ræðsirættin frá eftirlønargrunnunum, tí tað eigur eisini framyvir at vera soleiðis, at grunnarnir sjálvir eiga at taka støðu til, um skipanin skal vera partvíst samhaldsføst, soleiðis at uppsparing hjá persóni, sum doyr áðrenn eftirlønaraldur, skal falla til grunnin, ella um uppsparda eftirlønin skal arvast fult ella partvíst.

**Grein 17**

Vit hald ikki tað er rætt, at uppspard eftirløn nakrantíð skal fara í landskassan. Vit halda hinvegin, at uppspard eftirløn, sum ikki verður tikin út innan t.d. 5 ár eigur at koma hinum limunum í eftirlønargrunninum til góðar, soleiðis at peningurin fellur til grunnin.

Føroya Arbeiðarafelag • Føroya Fiskimannafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
www.samtak.fo • samtak@samtak.fo • tlf 584131
Stoffalág 17 • FO-100 Tórshavn

Skjal 19



Fra: Rigsombudet [riomfr@fo.stm.dk]
Sendt: 11. oktober 2010 12:03
Til: FMR FMR
Cc: Kristina Samuelsen; Ina Hammershaimb
Emne: Høringssvar vedr. "Uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt
av eftirløn"
Vedhæftede filer: Brev til Rigsombudsmanden.pdf; Bilag 1 - perst.pdf; Bilag 2 - fmn.pdf; Bilag 3
- skm.htm

Til Fíggjarmálaráðið.

Fíggjarmálaráðið har den 9. august 2010 sendt "Uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn" i høring.

Rigsombudet fremsendte den 18. august 2010 en dansk oversættelse af lovforslaget til Statsministeriet med henblik på en høring af relevante danske ministerier/myndigheder for så vidt angår lovforslagets mulige konsekvenser for personer ansat ved de statslige myndigheder på Færøerne. Ifølge Personalestyrelsens oplysninger har staten 245 ansatte på Færøerne, hvoraf 83 er overenskomstansatte, mens de resterende 162 er tjenestemænd og tjenestemandslignende med ret til tjenestemandspension.

Statsministeriet har på baggrund af Rigsombudets henvendelse anmodet Finansministeriet (Personalestyrelsen), Skatteministeriet, Økonomi- og Erhvervsministeriet, Beskæftigelsesministeriet, Justitsministeriet, Forsvarsministeriet og Indenrigs- og Sundhedsministeriet om bemærkninger til lovforslaget.

Statsministeriet har modtaget vedlagte bemærkninger fra Personalestyrelsen, Skatteministeriet og Forsvarsministeriet, der hermed fremsendes til Fíggjarmálaráðið med henblik på det videre arbejde med lovforslaget.

Statsministeriet bemærker i deres svarskrivelse af 8. oktober 2010 til Rigsombudet, der ligeledes er vedlagt, at Statsministeriet kan tilslutte sig Forsvarsministeriets forslag med en undtagelse af statsligt overenskomstansatte på Færøerne. Dette forslag anvises ligeledes af Personalestyrelsen som en mulig løsning. Statsministeriet forudsætter herved, at statslige tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte allerede er undtaget med udkastets § 1, stk. 2. Rigsombudet kan tilslutte sig forslaget om en undtagelse af statsligt overenskomstansatte på Færøerne.

Rigsombudet skal endelig henvise Fíggjarmálaráðiðs opmærksomhed på de skattemæssige problemstillinger, der rejses af Personalestyrelsen, Skatteministeriet og Forsvarsministeriet i deres høringssvar.

Med venlig hilsen
Dan M. Knudsen
Rigsombudsmand på Færøerne
Postboks 12
FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 35 12 00
Fax: +298 31 08 64
E-post (Journalen): riomfr@fo.stm.dk
Hjemmeside: www.rigsombudsmanden.fo

<<Brev til Rigsombudsmanden.pdf>> <<Bilag 1 - perst.pdf>> <<Bilag 2 - fmn.pdf>> <<Bilag 3 - skm.htm>>

Skjal 19

**STATSMINISTERIET**
**CHRISTIANSBORG**
**Prins Jørgens Gård 11, 1218 København K**

Telefon 33 92 33 00 - Telefax 33 11 16 65
CVR-NR. 10-10-39-40
EAN-lokationsnummer 5798000000032

Dato: 8. oktober 2010
J.nr. 4030-0009
Sagsbeh.: Omr. II / Nordatlantisk Sekretariat

Rigsombudsmanden på Færøerne

**Vedr. forslag til lagtingslov om pensionsopsparing og beskatning af pension**

Rigsombudsmanden har ved brev af 18. august 2010 fremsendt udkast til lagtingslovforslag om pensionsopsparing og beskatning af pension med anmodning om Statsministeriets indhentelse af udtalelser fra relevante danske myndigheder mv.

Statsministeriet har anmodet Finansministeriet (Personalestyrelsen), Skatteministeriet, Økonomi- og Erhvervsministeriet, Beskæftigelsesministeriet, Justitsministeriet, Forsvarsministeriet og Indenrigs- og Sundhedsministeriet om bemærkninger til udkastet.

Statsministeriet har modtaget vedlagte bemærkninger fra Personalestyrelsen, Skatteministeriet og Forsvarsministeriet.

Statsministeriet skal bemærke, at ministeriet kan tilslutte sig Forsvarsministeriets forslag om en undtagelse af statsligt overenskomstansatte på Færøerne. Statsministeriet forudsætter herved, at statslige tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte allerede er undtaget med udkastets § 1, stk. 2.

Med venlig hilsen

Søren Langelund Klit

PERSONALESTYRELSEN
FINANSMINISTERIET

# Notat

september 2010
LLA

## om forslag til lagtingslov om pensionsopsparing og beskatning af pension

Med det modtagne udkast til lagtingslov om pensionsopsparing og beskatning af pension vil der for personer på Færøerne blive fastlagt regler, der **bl.a.**

- pålægger arbejdsgiverne pligt til at betale pensionsbidrag (stigende op til 15 pct i 2019) til 'pensionsudbydere' som skal være godkendt af de færøske skattemyndigheder
- giver de enkelte personer fradragsret for pensionsbidragene i den færøske skat (der forudsættes beskattet til Færøerne ved udbetalingen)
- regulerer investeringsporteføljen i relation til den enkelte person
- fastlægger aldersudbetalingstidspunktet til 67 år.

Som det fremgår af vedlagte oversigt har staten 245 ansatte på Færøerne.
De fordeler sig på følgende ansættelsesområder:

A. 161 tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte med ret til pension efter den danske tjenestemandspensionslov
B. 83 overenskomstansatte, hvor det i den kollektive overenskomst er aftalt, at pensionsbidrag indbetales til den i overenskomsten navngivne pensionsordning

Hovedparten af disse ansatte vil arbejde på Færøerne i en kortere eller længere årrække for så at vende tilbage til Danmark, hvor de typisk også vil være som pensionister.

**ad A Tjenestemænd**
Personalestyrelsen er gået ud fra, at også danske tjenestemænd og tjenestemandslignende med ret til en skattefinansieret, ikke-fondsbaseret tjenestemandspension med lovforslagets § 1, stk. 2. vil være undtaget fra den lagtingslovbestemte arbejdsmarkedspension, som med forslaget vil blive indført på Færøerne. Lovforslaget specificerer ikke, at det kun undtager færøske tjenestemænd. Opsparing, rentefradrag, investeringsregler (som reguleres i lagtingslovforslaget) er jo irrelevant for en tjenestemandspensionsordning.

**Ad B. Overenskomstansatte**
For så vidt angår de overenskomstansatte vil lagtingslovforslaget umiddelbart medføre, at den statslige arbejdsgiver forpligtes til at indbetale bidrag til pensionsopsparing efter lagtingsloven samtidig med, at de kollektive overenskomster forpligter den til at indbetale det overenskomstaftalte bidrag til den i overenskomsten fastlagte pensionsordning. Det vil med andre ord – fremadrettet - føre til 'dobbelt pensionsopsparing'. Se i øvrigt bilag 2 med lidt mere konkrete bemærkninger i relation til lagtingslovforslaget.

Det er ikke hensigtsmæssigt,

1. at statslige arbejdsgiver pålægges at betale sådanne 'dobbelte pensionsbidrag med deraf følgende merudgifter for staten – ej heller
2. at de statsansatte, der arbejder på Færøerne, skal spare dobbelt op i 2 obligatoriske pensionsordninger *(hvor de kun for skattefradrag for bidragene til lagtingsfastlagte pensionsordning)*, hvilket

Forsvarsministeriet har foreslået, at statsligt overenskomstansatte på Færøerne, der i henhold til overenskomsten er dækket af en arbejdsmarkedspensionsordning, undtages fra loven.
Det forekommer at være et godt forslag, der vil skære igennem de fleste af de komplicerede 'regelkrydsninger' for statslige arbejdsgivere, danske pensionsinstitutter og de statsligt ansatte, der udsendes til Færøerne.

En sådan undtagelsesbestemmelse må skulle suppleres med regler, der afklarer det skattemæssige problemstilling, om en statsansat kan få fradragsret i skatteopgørelsen på Færøerne for bidragsindbetaling til den overenskomstaftalte, obligatoriske arbejdsmarkedspensionsordning i de aktive år – og derefter flytte til Danmark og betale skat af udbetalingen som pensionist.

Med et antal statsansatte på ca 80 personer, vil der være tale om et minimalt mistet skatteprovenu for Færøerne ved at give statsansatte fradragsret for disse pensionsbidrags**ind**betalinger, mens de arbejder på Færøerne, mens pensions**ud**betalingerne til sin tid vil blive beskattet til Danmark, hvor de typisk vil bo som pensionister.

BILAG 1

Skjal 19

| Ansatte på danske overenskomster og danske tjenestemænd på Færøerne, 2. kvartal 2010 | Kommunekode | | |
|---|---|---|---|
| | 970 | 971 | |
| | Sum | Sum | |
| | Ansættelseskvote | Ansættelseskvote | I alt |
| Personalekategori | - | - | |
| 0046 Jurister/økonomer | 3,0 | 5,9 | 8,9 |
| 0054 Maskinmestre | - | 2,0 | 2,0 |
| 0093 Særligt aflønnede | - | 1,0 | 1,0 |
| 0188 Officerer | - | 4,0 | 4,0 |
| 0193 Socialrådgivere | - | 1,4 | 1,4 |
| 0200 SPEC.ARB (3F) | - | 2,0 | 2,0 |
| 0201 Tjenestemænd | 3,0 | 27,8 | 30,8 |
| 0208 Tjm.ans.stampersonel | - | 10,0 | 10,0 |
| 0211 Tjenestemandslign. | - | 16,0 | 16,0 |
| 0224 Servicemedarbejdere | - | 2,0 | 2,0 |
| 0238 Edb-Medarb. HK | - | 1,0 | 1,0 |
| 0240 Kontorfunktionærer | 17,1 | 32,6 | 49,7 |
| 0247 Rengøringsassistent | - | 5,6 | 5,6 |
| 0276 Stampersonel Cs | - | 2,0 | 2,0 |
| 0293 Særligt aflønnede | - | 1,5 | 1,5 |
| 0303 Polititjenestemænd | - | 100,9 | 100,9 |
| 0694 Særl.afløn.timeløn | - | 0,2 | 0,2 |
| 0747 Rengøringsassistent | 2,0 | 2,7 | 4,7 |
| 9046 Jurister/økonomer chef | - | 1,0 | 1,0 |
| Ansatte på Færøerne i alt | 25,1 | 219,6 | 244,7 |

Heraf overenskomstansatte: 83,0 årsværk

PERSONALESTYRELSEN
FINANSMINISTERIET

Bilag 2

Forslaget til lagtingslov rejser bl.a. følgende problemstillinger:

**1. Nyansatte**

Lovforslaget pålægger pligt til pensionsopsparing efter de i lovforslaget beskrevne retningslinjer. For statsansatte, der efter 1.1.2011 nyansættes på overenskomstvilkår til arbejde på Færøerne, og som ikke har en før 1.1.2011 etableret pensionsordning, vil der være pligt til at betale pensionsbidrag efter lovforslaget *(og med fradragsret i den pågældendes færøske skat).*

Samtidig skal den statslige arbejdsgiver betale de overenskomstaftalte bidrag til den danske pensionsordning - antagelig uden at der er skattefradragsret for disse pensionsbidrag på Færøerne (og næppe heller i Danmark, da han som bosiddende på Færøerne ikke beskattes i Danmark)

Spørgsmålet vil også være, om de pensionsrettigheder, der kan knyttes til sådanne bidrag, i det danske pensionsinstitut vil være undtaget fra beskatning, når de til sin tid kommer til udbetaling i Danmark.

**Om fraflytterskat**

En person med opsparet pension efter lovforslaget, der flytter fra Færøerne, skal senest på fraflytningsdagen betale "fraflytterskat" "af pensionen, jf. forslagets § 16. Dvs. den pågældende, der flytter tilbage til Danmark, skal skaffe likvider til at betale alm. indkomstskat af pensionsopsparingen til de færøske skattemyndigheder. Efter § 16, stk. 3 udbetales sådan beskattet pension til den pågældende efter lagtingslovens regler (dvs som 67-årig osv) uden at skulle beskattes ved udbetalingen (vil sådan udbetaling også være undtaget fra beskatning, hvis han som pensionist er bosiddende i Danmark ?)

**2.Allerede ansatte**

For allerede ansatte, hvis pensionsordning er etableret inden 1.1.2011, kan de færøske skattemyndigheder godkende (fradragsret for) indbetalinger til den hidtidige pensionsordning (i Danmark) forudsat, at indbetalingerne opfylder betingelserne i lagtingsloven.
I forslagets § 7 stilles en række betingelser for godkendelse af de forannævnte pensionsordninger/pensionsinstitutter i udlandet.

Hvis forslagets § 16 om fraflytningsskat også gælder for opsparing i danske pensionsinstitutter, der er baseret på pensionsbidrag, omfattet af færøsk skattefradrag, vil de pågældende personer få samme likviditetsbehov som foran nævnt i pkt. 1b. Ligesom der vil opstå spørgsmål om sådan opsparing kan friholdes for indkomstskat, når den pgl som pensionist får udbetalt pensionen fra det danske pensionsinstitut.

Om de danske pensionsinstituttet vil være i stand til at opfylde de krav som de færøske skattemyndigheder stiller i medfør af loven kan ikke umiddelbart vurderes. Men under alle omstændigheder vil det være ekstra administrativt besvær at skulle administrere en del af en formue, som klausuleret efter færøske regler.

FORSVARSMINISTERIET

Statsministeriet
Christiansborg
Prins Jørgens Gård 11
1218 København K

Sagsbehandler: MAS
Sagsnummer.: 2010/002805

9. september 2010

HØRING VEDR. FORSLAG TIL LAGTINGSLOV OM PENSIONSOPSPARING OG BESKATNING AF PENSION

Statsministeriet sendte den 26. august 2010 forslag til lagtingslov om pensionsopsparing og beskatning af pension i høring.

Forsvarsministeriet finder, at lovforslaget på en række punkter fremstår uklart. Herunder fremgår det ikke entydigt, om der reelt vil være mulighed for, at danske overenskomstaftalte, tjenestemands- og tjenestemandslignende pensionsordninger vil kunne blive godkendt til erstatning for den færøske pensionsordning. På det foreliggende grundlag skønnes det ikke tilfældet.

Forslaget synes ikke at tage stilling til, at der er medarbejdere på Færøerne, som er ansat på danske vilkår og følgelig allerede er forpligtet til at indbetale til pensionsordninger. En vedtagelse af lovforslaget i dets nuværende form vil efter Forsvarsministeriets vurdering betyde, at der skal indbetales dobbeltpension for de pågældende medarbejdere med en ikke ubetydelig økonomisk belastning til følge.

I forhold til lovforslagets § 1, stk. 2, har Forsvarsministeriet forstået forslaget og dets bemærkninger således, at det alene er færøske tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte, der vil kunne undtages fra den lovpligtige pensionsordning. Forsvarsministeriet finder det uhensigtsmæssigt, at undtagelsen alene vil omfatte færøske tjenestemænd, idet det i forhold til danske tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte med i forvejen gunstige pensionsordninger vil betyde, at der skal indbetales pension til to forskellige pensionsordninger.

I forhold til militært personale, som i dag har en pligtig afgangsalder på 60 år, vil der endvidere opstå det skisma, at pensionsudbetalingen først vil kunne påbegyndes syv år efter pensionstidspunktet, da udbetalingstidspunktet er fastsat til det fyldte 67. år. Forsvarsministeriet finder, at den forsinkede udbetaling ikke er hensigtsmæssigt for personalet, såfremt det omfattes af den lovpligtige ordning.

For så vidt lovens § 7 giver denne mulighed for, at udenlandske pensionsordninger kan godkendes som fradragsberettigede under en række nærmere fastsatte betingelser. Godkendelsen vedrører alene rate- og livslange pensionsordninger. Forsvaret har imidlertid udsendt personale på Færøerne, der alene har en kapitalpension i Danmark. Godkendelse af lovforslaget i dets nuværende form vil for denne gruppe kunne føre til skævvridning, idet sådanne pensionsordninger ikke vil være fradragsberettigede i modsætning til eksempelvis ratepensioner.

Ved flytning fra Færøerne beskattes personalet umiddelbart af den opsparede pension. Forsvarsministeriet vurderer, at der i relation hertil kan opstå problemer med dobbeltbeskatning, idet personalet risikerer også at blive beskattet af pensionen i Danmark på udbetalingstidspunktet. Idet dette er et skattemæssigt anliggende – som skattemyndighederne forventeligt vil håndtere – vil Forsvarsministeriet ikke behandle denne problemstilling nærmere.

Samlet finder Forsvarsministeriet det således uhensigtsmæssigt, såfremt danske arbejdsgivere pålægges at betale dobbelt pensionsbidrag til personale ansat i henhold til danske overenskomster med tvungne pensionsordninger. Følgelig bør der efter Forsvarsministeriets opfattelse arbejdes for, at dansk overenskomst-, tjenestemands- og tjenestemandslignende ansat personale undtages fra den lovbestemte pensionsordning, idet førnævnte personalegrupper allerede er dækket pensionsmæssigt.

En undtagelse kan efter Forsvarsministeriets opfattelse eksempelvis ske ved, at § 1, stk. 2 udvides til også at gælde danske tjenestemænd og tjenestemandslignende ansatte samt ved at indsætte et nyt stk. 3, med henblik på at undtage *"personer mellem 18 og 67 år, der på Færøerne er ansat af den danske stat og aflønnet i henhold til dansk kollektiv aftale med tilhørende aftalt pensionsordning"*, fra lagtingsloven.

Forsvarsministeriet finder, at undtagelsen alternativt kan ske ved, at landsstyremanden får bemyndigelse til at undtage danske pensionsordninger i en bekendtgørelse, på samme måde som det er tilfældet for DIS-ordningen, jf. § 2, stk. 8.

Eventuelle spørgsmål til ovenstående kan rettes til fuldmægtig Marianne Simmelkjær på mail mas@fmn.dk eller telefon 339 22423.

Med venlig hilsen

Pernille Reuter Eriksen
kontorchef

<u>Ekstern kopi:</u>
Forsvarskommandoen
Farvandsvæsenet

Skjal 19

**Fra:** Anders Nielsen [Anders.N@skat.dk]
**Sendt:** 1. oktober 2010 08:58
**Til:** Anders Nielsen; Søren Klit
**Emne:** SV: Høringssvar vedr. færøsk pensionslov [RELEASABLE TO INTERNET TRANSMISSION]

Kære Søren

Hermed bemærkninger tilskåret.

Skatteministeriet har følgende bemærkninger.

Overgangsreglen i § 7

Efter den særlige overgangsregel i § 7, kan personer, der inden 2011 har etableret en pensionsordning i Danmark, Grønland eller i et andet rige i et institut, som har tilladelse til at drive virksomhed i det pågældende rige, anmode TAKS om at godkende ordningen. Bemærkningerne til bestemmelsen efterlader imidlertid det indtryk, at det kun er syddanske pensionsudbydere, der kan komme ind under godkendelsesordningen. Det kan selvfølgelig være, at der rent faktisk ikke er andre end lige præcis *syddanske* udbydere, der i dag udbyder pensionsopsparing til syddanske pensionsopsparere, men ellers er det lidt usikkert, om f.eks. en tysk ordning vil kunne godkendes. Det kunne man godt anbefale koncipisterne at uddybe.

Uklarheden går igen i § 7, stk. 2, hvorefter institutter, som har tilladelse til at drive virksomhed i Færøerne, kan anmode TAKS om tilladelse til at udbyde pensionsordninger i Færøerne. Det er umiddelbart svært ved at se, hvorledes denne regel adskiller sig fra § 6, stk. 2, der fastsætter, at opsparing skal ske i institutter med tilladelse til at drive virksomhed i Færøerne. Menes der ikke med § 7, stk. 2, at de pågældende institutter skal have tilladelse til at drive virksomhed i Danmark, Grønland eller i "det pågældende rige"? Ellers er der vel ikke brug for § 7, stk. 2?

Skatteforhold ved fraflytning

En ordning, der enten er etableret på Færøerne eller er omfattet af overgangsreglen i § 7, vil efter forslaget være fradragsberettiget. En syddansker, der omfattes af sådan pensionsopsparing ved arbejde på Færøerne, får derved fradrag i færøsk indkomst for indbetalingerne. Ved ophør af færøsk skattepligt beregnes en fraflytterskat på fraflytningstidspunktet, jf. forslagets § 16. Det kan for en umiddelbar betragtning virke relativt indgribende, men reelt er der alene tale om en fremrykket beskatning, som isoleret set kan ses som en "betaling" for den ydede fradragsret for indbetalingerne. (Med fraflytterskatten tackles et problem, som gælder for alle lande, der opererer med fradragsberettiget pensionsopsparing, nemlig at skatteprovenu kan gå tabt ved fraflytning). Der betales altså ikke yderligere skat til Færøerne, når pensionen til sin tid kommer til udbetaling til den pågældende person, der vel typisk på dette tidspunkt vil være bosat i Danmark.

Spørgsmålet er imidlertid, om der efter danske regler vil kunne ske beskatning én gang til. Udbetalingerne ses at ville være omfattet af den danske pensionsbeskatningslovs § 53 A, hvilket som udgangspunkt betyder, at de vil være skattefri. Da den danske pensionsbeskatningslov opererer med et princip om symmetri, således at fradragsberettigede indbetalinger modsvares af skattepligt ved udbetaling, og tilsvarende at ikke fradragsberettigede indbetalinger modsvares af skattefrihed ved udbetaling, gælder dog efter § 53 A, stk. 5, at udbetalinger, der modsvares af indbetalinger, som der ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst har været fradragsret for i Danmark eller udlandet, er skattepligtige. Principielt kan man sige, at denne bestemmelse ikke umiddelbart tager højde for færøsk fraflytningsskat. Der har jo faktisk været fradrag for de færøske indbetalinger, og den danske bestemmelse siger intet om korrektion for betalt fraflytningsskat (hvilket ud fra den beskrevne symmetribetragtning ellers vil være rimeligt).

Det *kan* dog være, at man med forslaget prøver at sige, at fraflytterskatten beregnes, og at resten, den "beskattede" pension, jf. forslagets § 16, stk. 3, er at opfatte som en nyoprettet, ikke fradragsberettiget pension efter forslagets § 15, jf. henvisningen i § 16, stk. 3, til § 15, stk. 2. Udbetalinger fra en sådan pension synes for en umiddelbar betragtning ikke at være skattepligtig efter den danske pensionsbeskatningslovs § 53 A.

I givet fald bør det beskrives nærmere, dels i lovtekst, dels i bemærkningerne (som pt. fsva. § 16 er ikke eksisterende).

Pensionsbeskatningslovens § 40 A.

En person, der bor i Færøerne på pensioneringstidspunktet, vil være skattepligtig til Færøerne både af færøsk og evt. syddansk pensionsopsparing. Færøerne har beskatningsretten, jf. protokollen til den nordiske dobbeltbeskatningsoverenskomst. Dette gælder dog kun indkomstskattepligtige udbetalinger.

Er der tale om afgiftspligtige udbetalinger fra en syddansk pensionsordning, dvs. først og fremmest fra kapitalpensioner, reguleres det ikke i dobbeltbeskatningsoverenskomsten, hvilket som udgangspunkt betyder, at Danmark kan afgiftsbelægge udbetalingen. Efter pensionsbeskatningslovens § 40 A er der dog etableret en deleordning mellem Danmark og Færøerne vedrørende afgift efter den danske pensionsbeskatningslov, som en fuldt skattepligtig på Færøerne skal betale ved udbetalingen af den syddanske ordning. Det færøske lovforslag ses ikke at influere herpå – andet end hvad der følger af, at pensionsopsparing i et syddansk institut i fremtiden synes at ville blive begrænset, såfremt lovforslaget gennemføres i sin aktuelle form.

Mvh

Skjal 19

Anders Nielsen
Specialkonsulent
4487

---

**Fra:** Søren Klit [mailto:sk@stm.dk]
**Sendt:** 10. september 2010 14:45
**Til:** Anders Nielsen
**Emne:** VS: Høringssvar vedr. færøsk pensionslov [RELEASABLE TO INTERNET TRANSMISSION]

Kære Anders

Hermed til orientering høringssvar fra Forsvarsministeriet.

mvh
Søren

Søren Langelund Klit
Specialkonsulent, Statsministeriet
Direkte telefon +45 33 92 22 44
Personlig e-post sk@stm.dk

---

**Fra:** FMN-MAS Simmelkjær, Marianne [mailto:FMN-MAS@mil.dk]
**Sendt:** 10. september 2010 14:30
**Til:** Søren Klit
**Emne:** Høringssvar vedr. færøsk pensionslov [RELEASABLE TO INTERNET TRANSMISSION]

RELEASABLE TO INTERNET TRANSMISSION

Kære Søren

Hermed Forsvarsministeriets høringssvar, jf. vedhæftede.

Venlig hilsen

**Marianne Simmelkjær**
fuldmægtig

**Forsvarsministeriet**
Personalekontoret (2. kontor)
Holmens Kanal 42, DK-1060 København K

Telefon: +45 3392 2423
Fax: +45 3392 0655
Mail: mas@fmn.dk
www.fmn.dk

RELEASABLE TO INTERNET TRANSMISSION

---

Vi goer opmaerksom paa, at denne e-mail kan indeholde information, der kun er beregnet for modtageren. Hvis du ved en

Skjal 19

fejltagelse har modtaget e-mailen, maa du ikke anvende indholdet i nogen sammenhaeng og vi beder dig venligst informere afsender om fejlen ved at bruge besvar-funktionen. Samtidig beder vi dig slette alle kopier af e-mailen i dit system uden at videresende eller kopiere den. Selvom e-mailen og enhvert vedhaeftet fil efter vores overbevisning er fri for virus og andre fejl, som kan paavirke computeren eller it-systemet, hvori den modtages og laeses, aabnes den paa modtagerens eget ansvar. Vi paatager os ikke noget ansvar for tab eller skade, som er opstaaet i forbindelse med at modtage eller aabne e-mailen. Hvis du har problemer med at aabne vedhaeftede filer, kan du finde information paa dette link http://forsvaret.dk/FKIT/Pages/winmail.aspx .

Please note that this message may contain confidential information. If you have received this message by mistake, please inform the sender of the mistake by sending a reply, and then delete the message from your system without making, distributing or retaining any copies of it. Although we believe that the message and any attachments are free from viruses and other errors that might affect the computer or IT system where it is received and read, the recipient opens the message at his or her own risk. We assume no responsibility for any loss or damage arising from the receipt or use of this message. If you are having trouble opening attached files, you can get further information via this link http://forsvaret.dk/FKIT/Pages/winmail.aspx

Tryggingareftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
165 Argir
Føroyar

Tórshavn 20. september 2010
Journalnr.: 10/00237-5

## Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn

### *Almennar viðmerkingar*

Lógaruppskotið er sum so væl úr hondum greitt og viðger í høvuðsheitum tey evni, sum eru neyðug í sambandi við stovnsetan av einari tvungnari eftirlønarskipan, har møguleiki er fyri einum valfríum yvirbygningi, og skatting av eftirløn.

Lógaruppskotinum tørvar kortini allýsingar av ymiskum hugtøkum, sum ger, at tað í ávísum førum er trupult at skilja, hvat er galdandi. Í uppskotinum er ikki altíð samsvar ímillum lógartekstin og viðmerkingarnar. Harumframt skilst ikki greitt, hvussu verður við teimum verandi eftirlønarskipanunum, og um møguleiki eisini verður framyvir at tekna kollektivar eftirlønarskipanir, stovnaðar við sáttmála millum arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum ella ímillum ein ávísan arbeiðsgevara og allar arbeiðstakararnar, sum starvast í virkinum hjá arbeiðsgevaranum.

Tað tykist sum høvuðsdentur er lagdur á tann partin, sum snýr seg um uppsparing til eftirløn, meðan tryggingarparturin (lívrenta o.a.), sum verður mett at vera ein týðandi partur av einari eftirlønarskipan, ikki er nógv viðgjørdur í lógaruppskotinum.

Viðmerkjast skal, at hoyringsfreistin hevur verið ov stutt hjá Tryggingareftirlitinum til at gera viðmerkingar í, serliga tá ið hugsað verður um, at uppskotið fevnir um eftirlønarskipanir, har regluverkið er sera umfatandi. Tað sæst ikki í uppskotinum, hvør hevur fingið uppskotið til hoyringar.

### ***Ítøkiligar viðmerkingar***

Til § 1 samanborið við § 2, stk. 7
§ 1, stk. 1, samanborið við § 2, stk. 7 førir við sær, at verandi eftirlønarskipanir – undantikið tænastumannaeftirlønir – ikki kunnu halda áfram. Framhald av verandi eftirlønarskipanum er ikki nevnd, hvørki í lógaruppskotinum ella í viðmerkingunum til uppskotið.

Í § 1, stk. 1 verður ásett, at gjaldast skal inn til egna eftirløn, og at seinast 1. januar 2011 skal ein eftirlønarkonta stovnast hjá einum av TAKS góðkendum eftirlønarveitara. Hetta gevur ein ábending um, at allir persónar millum 18 og 67 ár og sum hava fulla skattaskyldu og bústað í Føroyum skulu í seinasta lagi 1. januar 2011 stovna eina nýggja eftirlønarskipan.

Til § 2, stk. 4
Ætlanin við ásetingini má vera, at upphæddir, sum eru omanfyri 100.000 kr. kunnu gjaldast aftur av eftirlønarveitara til eftirlønaruppsparara, tá ið TAKS hevur givið loyvi til hetta.

Ásetingin tykist ógreið í mun til hvør, ið skal endurrinda upphæddina , ið er omanfyri 100.000 kr. Somuleiðis er ógreitt, á hvønn hátt eftirlønaruppspararin skal kunna gera av, um goldnar eru meiri enn 100.000 kr. í inngjaldi.

Sambært § 6, stk. 4 skal TAKS árliga í seinasta lagi 20. januar hava upplýsingar um eftirlønarviðurskiftini hjá øllum teimum, ið eru skrásett í eftirlønarskipanini hjá eftirlønarveitaranum.

Uppskotið til løgtingslóg nevnir onki um líknandi ella viðkomandi upplýsingar til eftirlønaruppsparara um inngoldið eftirlønargjald fyri undanfarin ár, góðskrivaða rentu, goldin fyrisitingaravgjøld og møguligt gjald fyri vágafulnað (risikodækning) teknaður sambært § 3.

Upplýst eigur at vera um, hvussu og nær eftirlønaruppspararin fær upplýsingarnar, sum eru viðkomandi til tess at fáa endurgoldið upphæddina, sum er størri enn eftirlønargjaldið á 100.000 kr.

Upplýst eigur eisini at vera, at eftirlønaruppspararin, aftan á at hava fingið loyvi frá TAKS, kann fáa upphæddina, sum er størri enn árliga eftirlønargjaldið á 100.000 kr., útgoldna frá eftirlønarveitaranum.

<u>Til § 2, stk. 7</u>
Ásetingin tykist at forða fyri eftirlønarskipanum, ið eru skipaðar sum kollektivar eftirlønarskipanir, upprættaðar við sáttmála millum arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum ella ímillum ein ávísan arbeiðsgevara og allar arbeiðstakararnar, sum starvast í virkinum hjá arbeiðsgevaranum.

Upplýst eigur at vera, at dagfestingin 1. januar 2011 einans er galdandi fyri persónar, sum nú eru millum 18 og 67 ár.

Upplýst eigur somuleiðis at vera, at persónar, ið verða 18 ár aftaná 1. januar 2011, skulu í seinasta lagi á teirra 18 ára føðingardegi stovna eina eftirlønarkonto.

<u>Til § 3</u>
Sambært § 3 er einans frádráttarrættur fyri tryggingar góðkendar av TAKS. Tað er neyðugt í lógini at uppreksa tær tryggingar, ið geva frádráttarrætt, hetta fyri at gera viðurskiftini meira greið. Av serligu viðmerkingini til § 3 skilst, at tað er *ynskiligt, at uppsparingarparturin er minst 2/3 av eftirlønarinngjaldinum. Vísir tað seg seinni, at tryggingarparturin gerst ov stórur sum heild, verður støða tikin til, um møguligt hámark skal setast fyri tryggingarpartin.* Skal hetta skiljast, sum at í mesta lagi 1/3 av inngjøldunum skulu nýtast til tryggingar (og fyrisiting)? Um TAKS skal nýta hetta í sambandi við góðkenningina, eigur hetta at vera ásett í lógini.

Á fyrstu reglu í serligu viðmerkingunum til § 3 verður víst til “lívstryggingarklassan” í løgtingslóg um tryggingarvirksemi. Her er rættast at nýta orðingina “lívstrygginarflokkarnir”, av tí at 6 lívstryggingarflokkar eru í alt.

Upplýst eigur at vera, hvussu nógv av eftirlønargjaldinum, sum í mesta lagi kann nýtast til teir nevndu vágafulnaðirnar (risikodækninger).

Í viðmerkingunum verður sagt, at eftirlønaruppspararin kennir best síni egnu lívsviðurskifti í mun til tørv á trygging. Tí verður tað litið upp til eftirlønaruppsparara og tryggingarveitara at áseta tryggingartørvin og tann partin av eftirlønargjaldinum, ið skal fara til tryggingar. Mælt verður til, at uppspararin og tryggingarfeløgini saman áseta tryggingarpartin innan teir karmar, sum lóggávuvaldið ásetir, og síðani kunnu partarnir sjálvir taka avgerðina út frá hesum.
Skal síðsti setningurin omanfyri skiljast soleiðis, at TAKS í sambandi við góðkenning av hvørjar tryggingar kunnu fáa frádrátt, sbrt. § 3, 2. pkt., eisini góðkennir støddina á teirri upphædd, ið kann nýtast til keyp av nevndu vágafulnaðum (risikodækninger)?

Í so fall eigur hetta at standa beinleiðis antin í lógini ella í øllum førum í viðmerkingunum.

Somuleiðis eigur at standa – møguliga í viðmerkingunum at ein av vágafulnaðunum (risikodækning) kann teknast í eini samlagstrygging (gruppelivsordning). Samlagstryggingar eru tær mest vanligu nýttu tryggingarnar at tryggja ímóti avlamni og deyða. Vanliga eru treytirnar betri, um tryggingarnar verða teknaðar kollektivt í staðin fyri einkultvís. Eisini verður í teimum kollektivu skipanunum vanliga avtalað

nakrir fulnaðir, sum gera, at teir persónar, sum tryggingin fevnir um, hava nakrar grundleggjandi fulnaðir. Royndirnar vísa, at tað eru nógv fólk, sum ikki taka støðu til tryggingarnar, fyrr enn tað er ov seint.

Til § 5, stk. 1
Sambært § 5, stk. 1 eigur eftirlønaruppspararin persónliga sína egnu uppsparing, ið er vard fyri úttøku ella aðrari rættarsókn frá ognarum. Sambært § 13, stk. 7 kann TAKS í ávísum førum taka peningaupphædd av eftirlønarkonto fyri at rinda skuld til tað almenna. Um hetta er eitt undantak til § 5, hevði tað verið greiðari, um víst var til hetta í § 5.

Til § 5, stk. 4
Í ásetingini stendur, at eftirlønin kann í sambandi við hjúnaskilnað gerast partur av felags búnum.

Í hesum føri kann ikki talan verða um, at sjálv eftirlønin gerst partur av felags búnum, men heldur at upphæddin, sum er spard upp á teirri í § 2, stk. 7 nevndu konto, kann gerast partur av felags búnum.

Orðingin tykist hava við sær, at meginreglan er, at uppsparda upphæddin er serogn, tá ið tað stendur, at uppsparingin "kann" gerast partur av felags búnum.

Tá ið talan er um hjúnaskilnað, er støðan aloftast tann, at partarnir sjáldan eru samdir um flestu viðurskifti. Oftast er ósemja um, hvussu búgvið skal býtast. Tað vildi tískil verið hóskandi um upplýst varð undir hvørjum nærri ásettum treytum, at eftirlønaruppsparingin kann gerast partur av felags búnum, ella hvør ger av, um ein eftirlønaruppsparing skal verða partur av felags búnum.

Til § 6, stk. 1
TAKS góðkennir eftirlønarveitarar, ið skulu fylgja ásetingum, ið eru ásettar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi og "lov om finansiel virksomhed".

Ætlanin er neyvan, at eftirlønarveitarar skulu fylgja ásetingunum í báðum teimum nevndu lógunum.

Talan má heldur vera um eftirlønarveitarar, sum lúka treytirnar í antin løgtingslóg um tryggingarvirksemi ella "lov om finansiel virksomhed", sum TAKS góðkennir.

Til § 6, stk. 2
Orðingin "Tann einstaka eftirlønaruppsparingin" tykist at føra við sær, at møguligt verður ikki at hava kollektivar skipanir sum nevndar omanfyri undir Til § 2, stk. 7.

Sambært § 6, stk. 2 kann tann einstaka eftirlønaruppsparingin stovnast í lívstryggingarfelagi, eftirlønarkassa ella peningastovni, ið hevur loyvi at virka í Føroyum. Orðingin: "hevur loyvi til at virka í Føroyum" verður skilt soleiðis, at tað snýr seg um loyvir sambært *løgtingslóg um tryggingarvirksemi* ella *lov om finansiel virksomhed*.

Niðanfyri verður greitt nærri frá, hvør hevur loyvi til at reka lívstryggingarvirksemi í Føroyum, treytað av, at landsstýrismaðurin setur í gildi kunngerð sbrt. § 217, stk. 2 í tryggingarlógini:

Tann 1. sept. 2008 kom *løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi* (tryggingarlógin) í gildi. Nýggja lógin leggur upp til, at Føroyar skulu gerast partur av evropeiska tryggingarmarknaðinum, bæði innan skaða- og lívstryggingarøkið. Rættarstøðan sambært *løgtingslóg nr. 13 frá 3. februar 1996 um tryggingarvirksemi*, sum fór úr gildi 1. sept. 2008, var, at í § 9, stk. 4 í gomlu lógini var ein avmarking, soleiðis at tryggingarbærur váði í Føroyum, knýttur at føroyskum áhugamálum, herundir lívstryggingar, kundi einans verða teknaður í tryggingarfeløgum, hvørs stovnarar kundu skjalprógva, at parta- ella ábyrgdarpeningurin var føroyskur ella íslendskur, og sum høvdu loyvi frá Tryggingareftirlitinum at reka tryggingarvirksemi.

Sambært § 218, stk. 3 í nýggju tryggingarlógini samtykti Løgtingið, at § 9, stk. 4 í gomlu tryggingarlógini framhaldandi verður galdandi fyri lívstryggingarvirksemi og tvørgangandi eftirlønargrunnar, til landsstýrismaðurin hevur sett í gildi ta kunngerð, sum er nevnd í § 217, stk. 2, 2. pkt.

Landsstýrismaðurin hevur sostatt heimild til at áseta, nær útlendsk feløg kunnu fáa rætt til at reka lívstryggingarvirksemi í Føroyum, sbrt. § 217, stk. 2, í tryggingarlógini. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, at feløg, sum eru fevnd av § 1, stk. 3-6, í tryggingarlógini, kunnu fáa rætt til at reka lívstryggingarvirksemi sambært tryggingarlógini.

Orsøkin til at henda áseting var sett inn í tryggingarlógina var eftir øllum at døma, at nýggja rentutryggingarlógin ikki varð løgd fyri Løgtingið.

Verður henda kunngerð sett í gildi, merkir hetta, at felagstryggingarmarknaðurin millum Føroyar og Ísland verður víðkaður, og at sínámillumavtalan millum Føroyar og Danmark kann víðkast til eisini at fevna um lívstryggingarvirksemi. Aftaná at slík sínámillum avtala er gjørd millum londini, kunnu útlendsku feløgini, um tey hava loyvi til at reka tryggingarvirksemi í heimlandinum, byrja at reka tryggingarvirksemi í Føroyum, eftir at hetta er fráboðað Tryggingareftirlitinum, sbrt. §§ 22-23 í tryggingarlógini. Sí eisini undir "Til § 7" og "Til avleiðingar av uppskotinum".

Til § 6, stk. 3
Í síðsta punkti stendur, at landsstýrismaðurin ger í kunngerð nærri áseting um umsitingar- og avgreiðslugjøld.

Tryggingareftirlitið skal í hesum føri gera vart við, at umsitingargjøld hjá lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum eru ein partur av tøkniliga grundarlagnum, sum skal fráboðast Tryggingareftirlitinum, sbrt. §§ 14 og 15 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi. Sambært § 15, stk. 5 kann Tryggingareftirlitið áseta nærri reglur um eitt nú kostnaðarsatsir. Tryggingareftirlitið hevur við hesi heimild givið út kunngerð nr. 8 frá 15. desember 2008 um meginreglur fyri útrokning og býti av yvirskoti (kontributiónsmeginreglan), t.e. býti av yvirskoti av eginogn og bonus til tryggingartakararnar, umframt kunngerð nr. 9 frá 15. desember 2008 um støðisrentu viðvíkjandi lívstryggingarvirksemi.

Um Fíggjarmálaráðið ásetir reglur um umsitingar- og avgreiðslugjøld kunnu hesar vera í stríð við tøkniliga grundarlagið hjá tryggingarfeløgunum/eftirlønargrunnunum umframt eftir teimum reglum, sum Tryggingareftirlitið kann hava ásett við heimild í § 15, stk. 5 í tryggingarlógini. Gjørt verður vart við, at eftirlitið ásetir reglur um tøkniliga grundarlagið við tí fyrivarni, at feløgini/eftirlønargrunnarnir skulu megna at halda sínar skyldur mótvegis teimum tryggjaðu/limunum, og at onki verður býtt út til nøkur tryggjaði/limir, men at øll verða viðgjørd eins.

Til § 6, stk. 6 og § 11, stk. 2
Sambært ásetingini í § 6, stk. 6 skal eftirlønarveitarin flyta eftirlønarupphæddina til ein annan eftirlønarveitara uttan kostnað fyri eigaran av eftirlønarskipanini, um eftirlønarveitarin ikki heldur ásetingarnar í § 11, stk. 2 um útgjaldsætlan.

Ásetingarnar, sum eru galdandi fyri útgjald av eftirløn frá lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, mugu antin vera lívstrygginaravtalan ella eftirlønarregulativið hjá eftirlønargrunninum, sum bæði eru fráboðaði til Tryggingareftirlitið sum ein partur av tí tøkniliga grundarlagnum, sbrt. §§ 14 og 15 í tryggingarlógini. Brot á tøkniliga grundarlagið er í stríð við reglurnar um góðan tryggingarskikk, og eftirlitið vil í tílíkum føri áleggja tryggingarfelagnum/eftirlønargrunninum at rætta viðurskiftini.

Hvørjar reglur kann talan vera um, at TAKS hevur ásett og góðkent í sambandi við útgjald av eftirløn sambært § 11, stk. 2, síðsta punkt?

<u>Til § 6, stk. 7</u>
Sambært ásetingini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um klagur, herundir um klagað kann verða til serstakan stovn.

Gjørt verður vart við, at Tryggingareftirlitið er klagustovnur, tá ið lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar fremja brot á ásetingarnar um góðan skikk, sbrt. § 35 samanborðið við § 194 í tryggingarlógini. Landsstýrismaðurin hevur gjørt uppskot til kunngerð um góðan skikk.

<u>Til § 7</u>
Sambært ásetingini kann eitt lívstryggingarfelag, ein eftirlønargrunnur ella peningastovnur við heimstaði í Danmark v.m. fáa góðkenning frá TAKS, um tær í stk. 1, nr. 1-6 nevndu treytir verða loknar.

Soleiðis sum.§ 7, stk. 1 er orðað, eru tær nevndu treytirnar einans viðkomandi fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar, og eiga peningastovnar tískil ikki at verða nevndir.

Somuleiðis skulu lívstryggingarfeløg og/ella eftirlønargrunnar sambært stk. 1, nr. 4 lúka treytirnar í stk. 2 um, at hava loyvi til at reka virksemi í Føroyum.

Tað tykist ikki heilt greitt, hvussu § 7 skal skiljast. Eftir yvirskriftini og innihaldinum annars, kann hetta skiljast sum reglur fyri eftirlønarskipanir stovnaðar uttanlands. Tó er ein tíðaravmarking fyrst í ásetingini um, at lívstryggingarfeløg, eftirlønarkassar ella peningastovnar við loyvi til at reka virksemi í Føroyum, kunnu bjóða eftirlønarskipanir til persónar, sum áðrenn 1. januar 2011 hava stovnað eftirlønarskipan hjá útlendskum felagi. Sambært serligu viðmerkingunum snýr tað seg um persónar, sum áðrenn 1.januar 2011 hava tekna eftirlønarskipan hjá donskum eftirlønarveitara.

Sambært § 7, stk. 1, skal lívstryggingarfelagið hava loyva at reka lívstryggingarvirksemi í hesum ríki, meðan sama felag, sbrt. § 7, stk. 2, skal hava loyvi til at reka virksemi í Føroyum. Fyri at eitt felag skal hava loyvi til at reka tryggingarvirksemi í Føroyum skal tað hava loyvi til at reka tryggingarvirksemi í heimlandinum, eins og sínámillum avtala skal vera gjørd millum Føroyar og heimlandið um felags tryggingarmarknað.

Ein fortreyt er sostatt, at ein avtala er gjørd millum Føroyar og eitt nú Danmark um rætt til at reka sínámillum lívstryggingarvirksemi í ávikavist Føroyum og Danmark.

Ein onnur fortreyt fyri hesum er, at landsstýrismaðurin í góðari tíð innan tann 1. januar 2011í kunngerð ásetir nærri reglur um lívstrygging tvørtur um landamørk sambært § 217, stk. 2 í tryggingarlógini. Verður samanborið við samsvarandi áseting í donsku *pensionsbeskatningsloven* tykjast ongar tíðaravmarkingar at vera. Er hetta so, merkir tað, at Danmark skal gera sínámillum avtalu við Føroyar um felags tryggingarmarknað fyri lívstryggingarøkið, har treytirnar fyri feløgini í báðum londunum ikki verða eins.

§ 1, stk. 5 í tryggingarlógini er orðað soleiðis:

> "*Stk. 5.* Um ein sínámillum avtala millum Føroyar og ES er gjørd, ella Føroyar gera beinleiðis sínámillum avtalu við einstøk ES-lond ella lond, sum ES hevur avtalu við, eru §§ 23, 27, 34, 35, 37-43 og § 193, stk. 1, galdandi fyri tænastuveitingar í Føroyum, sum eitt tryggingarfelag veitir, har loyvi er fingið í einum ES-landi ella einum landi, sum ES hevur avtalu við, um so er, at føroysk tryggingarfeløg hava sama rætt í viðkomandi landi."

Í sambandi við sínámillumavtaluna millum Føroyar og Danmark hevur Finanstilsynet givið út eina kunngerð um tænastuveitingarvirksemi, *Bekendtgørelse nr. 996 af 12. august 2010 om tjenesteydelsesvirksomhed ydet her i landet af forsikringsselskaber, der er meddelt tilladelse på Færøerne.* Sambært § 2 í hesi kunngerð kunnu føroysk tryggingarfeløg reka tænastuveitingarvirksemi í Danmark, tá ið avtala er gjørd millum Danmark og Føroyar um, at donsk tryggingarfeløg hava somu rættindi í Føroyum. Í fyrstu atløgu fevnir kunngerðin bara um skaðatryggingarvirksemi, men kann hendan við avtalu víðkast til eisini at fevna um lívstryggingarvirksemi.

Sum víst á omanfyri skulu tryggingarfeløgini hava sama rætt í teimum londunum, sum hava gjørt sínámillum avtalu. Tað ber tí ikki til hjá Danmark at gera sínámillumavtalu við Føroyar uttan at seta sum treyt, at donsku feløgini fáa sama rætt í Føroyum, sum føroysk feløg fáa í Danmark. Hetta kann t.d. gerast við at strika orðingin í § 7, stk. 2, seinast pkt.: "sum uppfylla treytirnar í stk. 1.". Hóast landsstýrismaðurin ger kunngerð eftir § 217, stk. 2, í tryggingarlógini, er hetta ikki nóg mikið til at donsku tryggingarfeløgini hava loyvi til at reka tryggingarvirksemi í Føroyum. Sum nevnt krevst eisini ein sínámillum avtala millum londini. Sí eisini undir "Til § 6, stk. 2".

Harumframt kann nevnast, at tað ikki er vist, at eftirlønarveitararnir megna at lúka tær ásettu treytirnar. Eftirlønarveitararnir skulu átaka sær somu skyldur sum tryggingarfeløg, sum bjóða út eftirlønarskipanir í Føroyum. Hetta merkir, at útlendsku feløgini binda seg til at halda seg kunnaði um allar broytingar á tryggingarøkinum, sum verða framdar framyvir í Føroyum. Feløgini skulu eitt nú halda eyga við, hvørji fyrisitingar- og avgreiðslugjøld verða ásett, sbrt. § 6, stk. 3. Merkir ein góðkenning eisini, at tey útlendsku feløgini skulu lata TAKS árliga fráboðan, sbrt. § 6, stk. 4? Ella verður skift um upplýsingar við SKAT í Danmark?

Í sambandi við útgjald eru eisini trupulleikar, bæði tá ið talan er um útgjald við avlamni og við deyða. Sambært lógini er ikki vist, at til ber at gjalda út við avlamni. Gjaldast skal treyðugt út, tá ið restlivialdurin er styttri samanborið við miðallivialdurin. Við deyða er ikki vist at uppsparingin verður útgoldin, eins og lógin leggur upp til. Um tað altíð skal gjaldast út við deyða, má ein eykatrygging (reservesikring) teknast, sum ikki er eitt vanligt produkt hjá eftirlønargrunnum.

Í sambandi við fráflyting verður ásett í lógini, at uppsparingin skal skattast. Í § 7, stk. 1, nr. 3, litra a, eigur at verða víst til § 16 og ikki til §13. Ein fortreyt fyri at skatta øll inngjøld aftaná 1. januar 2011 er, at skilnaður verður gjørdum á inngjøldum áðrenn og aftaná 1. januar 2011. Sambært lógini skal gerast upp á føðingardegnum. Á tryggingarøkinum verða uppgerðir altíð gjørdar tann 1. í komandi mánaða aftaná føðingardagin.

Harumframt kann spurningur verða settur við tíðarfreistina 1.januar 2011.

<u>Til §§ 8 og 9</u>
Ásetingarnar nevna ikki hvørjar íløgureglur eru galdandi fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar, burtursæð frá, at § 9, stk. 6 nevnir lívstryggingarflokk III.

Merkir hetta, at tað stendur lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum heilt frítt at gera íløgur ella skulu feløgini/eftirlønargrunnarnir fylgja íløgureglunum í kapittul 11 í tryggingarlógini?

Tað vildi verið hóskandi at nevnt, at pengar (midler) til fulnað fyri eftirlønarskipanir við rentugaranti skulu fylgja íløgureglunum í kapittul 11 í tryggingarlógini.

<u>Til § 10, stk. 2</u>
Í viðmerkingunum stendur, at tá ið talan er um lívslanga veiting kunnu hjúnafelagar taka yvir eftirlønir hjá hvørjum øðrum. Fortreytin fyri hesum er, at eftirsitandi hjúnafelagin antin er settur inn sum njótunartilskilaður í eftirlønarsáttmálan ella talan er um kollektiva avtalu um eftirlønarskipan við afturat knýttari eftirløn til hjúnafelaga/samlivandi, treytað av, at tað ber til at stovna kollektivar skipanir.

Gjørt verður vart við, at eftirløn hjá bæði hjúnafelaga/samlivandi og børnum kunnu vera lutfalsliga kostnaðarmiklar.

Í fylgiskjali 1 til viðmerkingarnar verður nevnt, at uppsparda eftirlønin kann gjaldast út eftir 4 útgjaldshættum.
Talan er ikki um 4 "útgjaldshættir", men heldur í hvørjum føri (t.e. nær) ið eftirlønin kann gjaldast út.

Einans í nr. 4 "smærri upphæddir" er talan um ein útgjaldshátt – ikki í nr. 1-3.

Nr. 3 “við avlamni” verður ikki nevnt í sjálvum lógartekstinum. Í lógini verður einans nevnt útgjald við eftirlønaraldur og við deyða.

Undir “Ad. 2. Við deyða” í fylgiskjal 1 verður nevnt, at hjúnafelagi/samlivandi kann taka yvir eftirlønina hjá hinum. Hetta fer ikki fram við deyða, men skal vera avtalað við eftirlønarveitara í seinasta lagi áðrenn gjald av lívlongu veitingini byrjar.

Ein fortreyt fyri at kunna taka yvir eftirlønina er antin at njótunartilskilaður er settur inn í eftirlønarsáttmálan ella at talan er um kollektiva eftirlønarskipan við eftirløn til hjúnafelaga/samlivandi. Sama er galdandi fyri rentu til børn.

Til § 10, stk. 7
Soleiðis sum ásetingin er orðað, kann ein persónur fáa útgoldið sína eftirløn áðrenn 67 ára aldur, hóast persónurin er fult arbeiðsførur og ikki avlamin.

Ásetingin eigur at verða broytt soleiðis, at talan verður um antin avlamiseftirløn, sum verður nevnd sum ein “útgjaldsháttur” í viðmerkingunum. Avlamiseftirløn verður útgoldin, tá ið arbeiðsførið hjá einum persóni er niðursett við einum ávísum prosenttali, vanliga 66%.

Tað er ikki møguligt at gjalda út lívlanga veiting til persónar, sum hava útlit til ein lægri miðallivialdur, við tað at lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar ikki mugu tekna eftirlønarskipanir við lívlangari veiting til persónar, har tað er skjalprógva, at hesir hava lækkaðan livialdur. Hetta er í stríð við góðan tryggingarskikk.

Um lækni kann skjalprógva, at ein persónur hevur lækkaðan livialdur, skal ein eftirlønarskipan við lívlangari veiting broytast til antin eina lutaeftirløn ella eitt kapitalútgjald (útgoldið í einum).

Í lógini eigur at verða nevnt, hvat ein lívlong veiting kann broytast til, tá ið talan er um persón við lækkaðum livialdri.

Til § 12
Her eigur at verða nevnt, at útgjald av eftirløn við deyða til njótunartilskilaða v.m. er treytað av, at tað í eftirlønarskipanini er settur inn njótunartilskilaður í eftirlønarsáttmálan, ella at talan er um kollektiva avtalu um eftirlønarskipan við afturat knýttari eftirløn til hjúnafelaga/samlivandi, sbr. tað sum er nevnt undir Til § 10, stk. 2.

Til § 13, stk. 1.
Ásetingin vildi verið greiðari, um nevnt varð, at gjaldast skal inn á eina eftirlønarkonto, stovnað sambært § 2, stk. 7.

Til avleiðingar av uppskotinum
Í talvuni um avleiðingar av uppskotinum er upplýst, at ongar avleiðingar eru í mun til altjóða avtalur og reglur. Viðmerkingarnar viðgera ikki annars henda spurning.

Sum fylgja av Hoyvíkssáttmálanum varð sínámillum avtala gjørd millum Ísland og Føroyar 1. september 2008 um felags tryggingarmarknað. Avtalan fevnir í fyrsta umfari bara um skaðatryggingarvirksemi, og ikki um lívstryggingarvirksemi orsakað av avmarkingunum í § 217, stk. 2, og § 218, stk. 3, í tryggingarlógini. Sambært avtaluni millum Ísland og Føroyar skal Tryggingareftirlitið skrivliga boða íslendska fíggjareftirlitinum frá, tá ið landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett í gildi ta kunngerð, sum er nevnd í § 217, stk. 2, soleiðis at felags tryggingarmarknaðurin millum Ísland og Føroyar eisini kemur at fevna um lívstryggingarvirksemi. Landsstýrismaðurin hevur ikki sett nevndu kunngerðina í gildi, av tí at skattligu viðurskiftini á økinum ikki eru fingin í rættlag enn.

Sínámillum avtala er eisini gjørd millum Føroyar og Danmark um felags tryggingarmarknað, sum í fyrstu atløgu bara fevnir um skaðatryggingarvirksemi, sbrt. verandi avmarkingum í tryggingarlógini.

Mælt verður til, at tað í viðmerkingunum verður greitt nærri frá spurninginum um møguligar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, undir hesum við Ísland og Danmark.

***Aðrar viðmerkingar***
Mælt verður til at orðið "eftirlønargrunnur" verður nýtt ístaðin fyri "eftirlønarkassi".

Mælt verður til at orðið "tryggingarflokkur" verður nýtt ístaðin fyri "tryggingarklassi

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

Tryggingareftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
165 Argir
Føroyar

Att. Herborg Sloan

**Tórshavn 3. november 2010**
Journalnr.: 10/00237-15

**Ískoytisviðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn**

Víst verður til fund í arbeiðsbólkinum í Fíggjarmálaráðnum 22. september 2010, har ymiskir spurningar í sambandi við uppskotið til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn vóru viðgjørdir. Í hesum sambandi vóru nakrir spurningar settir Tryggingareftirlitinum.

Annar spurningurin var av tøkniligum slagi, og varð settur í mun til upplýsingarnar í skrivinum "Pension: Udland, flytning og skat". Sambært hesum skrivi skulu donsku tryggingarfeløgini/eftirlønargrunnarnir lúka m.a. hesar treytir:

> "Godkendelse kræver, at ordningen opfylder lovens krav:
> - Adskille nye og gamle indbetalinger og gevinst/værdiforøgelse
> - Udbetaling fra 67 år og senest ved 70 år
> - Sammensætning af udbetaling: Min 45 % livrente, max 55 % rate og max 10 % kapitaludbetaling.
> - Der må ikke indbetales til kapitalpension. Dog kan op til 10 % være kapitaludbetaling.
> - Lev. af data: p-tal (tre cifret) "

Á fundinum varð upplýst, at slíkar upplýsingar verða fráboðaðar elektroniskt. Spurningurin var, um donsku tryggingarfeløgini/eftirlønargrunnarnir vóru sinnaði at broyta teirra KT-skipanir fyri at lúka hesi krøv frá TAKS.

Tað ber illa til hjá Tryggingareftirlitinum at meta um, í hvønn mun donsk tryggingarfeløg/eftirlønargrunnar eru áhugaðir/sinnaðir til at gera slíkar broytingar. Tryggingareftirlitið kann generelt upplýsa, at tá ið tað snýr seg um at gera broytingar í KT-skipanum í donskum feløgum, skal hetta vanliga fráboðast í góðari tíð, t.d. kann roknast við, at tað tekur í minsta lagi eitt ár frá tí at ynski um broyting er ført fram, til broytingin er gjørd í skipanini.

Nøkur feløg/eftirlønargrunnar hava nýggjar KT-skipanir, har tað tøkniliga ber til at gera broytingar, um ynski er um tað. Í smáum feløgum/grunnum, har tøkniligu skipanirnar eru gamlar, er ivasamt um tað ber til at gera slíkar broytingar.

Eftirlønargrunnar í Danmark eru helst afturhaldandi, um ábyrgdin at halda lóggávu í fremmandum landi, verður løgd á eftirlønargrunnin. Hetta verður mett sum ein stór uppgáva, sum eftirlønargrunnar ikki uttan víðari taka á seg. Tað tykist ikki vera nakar trupulleiki hjá einum donskum eftirlønargrunni at rinda eftirløn til eitt annað land. Tað, sum eftirlønargrunnurin ofta ikki ynskir, er at taka óneyðuga ábyrgd á seg í hesum sambandi, t.d. at binda seg til at kenna reglurnar í viðkomandi útlandi.

Er ætlanin at tað framhaldandi skal bera til at halda fram í verandi donsku eftirlønarskipanum, er tað helst ein meira gongd leið, at ábyrgdin verður løgd á tryggingartakaran, soleiðis at viðkomandi tryggingartakari sjálvur skal skjalprógva, at peningurin verður inngoldin, og at eftirlønarskipanin lýkur tær treytir, sum eru ásettar í føroysku lógini. Tað verður neyvan ein trupulleiki hjá tryggingartakarunum at fáa tryggingarfeløgini/eftirlønargrunnarnar at vátta, at skipanin lýkur ávísar treytir. Hetta er nakað heilt annað enn at áleggja tryggingarfeløgum/eftirlønargrunnum, at tey alla tíðina skulu fylgja við og halda seg kunnaðan um lóggávuna í einum øðrum landi.

Mett verður, at teir stóru eftirlønargrunnarnir, sum hava nógvir tryggingartakarar í Føroyum, helst vilja fráboða tær kravdu upplýsingarnar. Ynskir Fíggjarmálaráðið ítøkiliga at fáa vátta, um so er, verður mælt Fíggjarmálaráðnum til at venda sær til ein av teimum stóru eftirlønargrunnunum við einum slíkum fyrispurningi.

Hin spurningurin var av løgfrøðiligum slagi.

Á fundinum í Fíggjarmálaráðnum vóru avleiðingarnar av at hava eina tíðaravmarking í § 7 somuleiðis viðgjørdar (sbr. við § 15 c í donsku pensionsbeskatningsloven, sum er uttan tíðaravmarking). Víst verður til viðmerkingarnar til § 6, stk. 2, § 7 og til viðmerkingarnar í mun til Hoyvíkssáttmálan seinast í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá Tryggingareftirlitinum, har greitt verður frá, at tað ikki ber til at fáa sínámillum avtalu við Danmark við slíkari tíðaravmarking í § 7 í lógaruppskotinum. Ein avleiðing av hesum er, at tað ikki ber til at nýta orðingina: “lívstryggingarfelag ella eftirlønargrunnur, ið hevur loyvi at virka í Føroyum”, av tí at treytin fyri at donsk tryggingarfeløg/eftirlønargrunnar lógliga kunnu reka tryggingarvirksemi í Føroyum er, at sínámillum avtalu er gjørd við Danmark um lívstryggingarvirksemi.

Er ætlanin við uppskotinum at geva øllum persónum, sum hava teknað eftirlønarskipan áðrenn 1. januar 2011 í t.d. Danmark, møguleika fyri at varðveita hesa skipan við frádráttarrætti, verður tað mett neyðugt at broyta § 7. Verður hildið fast um treytina um tíðaravmarking, verður tað mett neyðugt at seta sjálvstøðuga grein í uppskotið, har nevnda lívstryggingarvirksemi verður gjørt lógligt. Tað má í hesum føri ganga greitt fram av viðmerkingunum, at hetta er ein serlig áseting í mun til løgtingslóg um tryggingarvirksemi (tryggingarlógina). Av tí at hetta snýr seg um tryggingarfeløg/eftirlønargrunnar, sum hava loyvi til at reka virksemi í Danmark, verður tað somuleiðis neyðugt at hoyra Finanstilsynet.

Tryggingareftirlitið metir ikki tað ber til at gera slíka broyting í tryggingarlógini, av tí at tryggingarlógin er gjørd við teirri fortreyt, at sínámillum avtalur kunnu gerast tvørtur um landamørk. Tað tykist tí ikki vera í samsvar við tryggingarlógina, at donsk tryggingarfeløg/eftirlønargrunnar kunnu reka tryggingarvirksemi í Føroyum, uttan at sínámillum avtala er gjørd um hetta virksemi sambært tryggingarlógini.

At enda skal viðmerkjast, at uppskotið viðger útgjald og prosentpartar í sambandi við útgjald. Upplýsast kann, at í sambandi við eftirlønarsamansetingar verður hugt eftir *inngjøldum,* og ikki eftir útgjøldum, t.e. tað verður gjørt av í sambandi við stovnan av lívstryggingini, hvussu stórur partur av *inngjaldinum* skal nýtast til ymisku tryggingarnar.

Í sambandi við tíðaravmarkingina í § 7 verður tosað um eftirlønarskipan. Tað tykist ikki greitt, um hetta eisini fevnir um samlagstryggingar.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein

Skjal 21

# Pensjónsnýskipan 2009

## Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar

**Fíggjarmálaráðið**

Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar
© 2009, Fíggjarmálaráðið
Uppseting: Fíggjarmálaráðið
Útgávan kann takast niður frá www.fmr.fo

# Yvirlit:


1 INNGANGUR ..... 2

2 SAMANDRÁTTUR ..... 3

2.1 ENDAMÁL VIÐ NÝSKIPANINI ..... 3
2.2 TRUPULLEIKI: FLEIRI ELDRI OG FÆRRI ARBEIÐSFØR ..... 3
2.3 SOSIALI SÁTTMÁLIN ..... 4
2.4 EFTIRLØNARSKIPANIN EIGUR AT BYGGJA Á TRÍGGJAR SÚLUR ..... 4
2.5 HØVUÐSBROYTINGAR AV PENSJÓNSSKIPANINI ..... 4
2.6 ÁVIRKAN AV TILTØKUM ..... 6

3 SØGA OG ALTJÓÐA RÁK ..... 7

3.1 ENDAMÁL VIÐ PENSJÓNSSKIPANUM ..... 7
3.2 SØGULIGT UM PENSJÓNSSKIPANIR ..... 7
3.3 TANN SOSIALI SÁTTMÁLIN FER IKKI AT HALDA Í FRAMTÍÐINI ..... 7
3.4 HALDFØRAR PENSJÓNSSKIPANIR ..... 8
3.5 ES HEVUR 11 MÁL FYRI PENSJÓN ..... 8
3.6 TILMÆLIÐ HJÁ HEIMSBANKANUM ..... 9

4 YMISK SLØG AV PENSJÓNSSKIPANUM ..... 10

4.1 FYRIMUNIR OG VANSAR VIÐ UPPSPARINGSFÍGGJAÐUM OG SKATTAFÍGGJAÐUM SKIPANUM ..... 10
4.2 LÝSING AV YMSUM SLØGUM AV PERSÓNLIGARI EFTIRLØN ..... 11
4.3 BROYTING FRÁ ALMENNARI PENSJÓN YVIR MÓTI PERSÓNLIGARI UPPSPARING ..... 13

5 DEMOGRAFISKAR ÚTGREININGAR ..... 14

5.1 SØGULIGAR FYRITREYTIR FYRI FÓLKAFRAMSKRIVING ..... 14
5.2 LONGRI LIVITÍÐ OG BROYTT FÓLKASAMANSETING ..... 15

6 BÚSKAPARLIGAR ÚTGREININGAR ..... 17

6.1 VAKSANDI ÚTREIÐSLUR TIL PENSJÓN, SJÚKRARØKT OG ELDRARØKT ..... 17
6.2 ELDRAÚTREIÐSLUR Í MUN TIL BTÚ ..... 18
6.3 NÝSKIPAN ELLA HÆGRI SKATTATRÝST ..... 20

7 PENSJÓNSSKIPANIR Í FØROYUM Í DAG ..... 22

7.1 SÚLA 1: ALMANNAPENSJÓNIR ..... 22
7.2 SÚLA 2: PERSÓNLIG EFTIRLØNARUPPSPARING ..... 24
7.3 SÚLA 3: ONNUR FRÍ UPPSPARING ..... 25

8 EFTIRLØNARSKIPANIR Í ØÐRUM LONDUM ..... 26

8.1 SKIPANIR Í OKKARA GRANNALONDUM ..... 26
8.2 FØROYSKA EFTIRLØNARUPPSPARINGIN Í MUN TIL EFTIRLØNARUPPSPARING Í ØÐRUM LONDUM ..... 28

9 TILMÆLI UM EINA FRAMTÍÐAR PENSJÓNSSKIPAN ..... 29

9.1 NÝSKIPANIN LOYSIR MEGINPARTIN AV FÍGGINGARTRUPULLEIKUNUM ..... 29
9.2 MÁLSETNINGAR FYRI NÝGGJU PENSJÓNSSKIPANINA ..... 30
9.3 BROYTINGAR Í SÚLU 1: ALMANNAPENSJÓN ..... 31
9.4 BROYTINGAR Í SÚLU 2 OG 3: PERSÓNLIG UPPSPARING OG FRÍ UPPSPARING ..... 40

10 BÚSKAPARLIGA ÁVIRKANIN AV PENSJÓNSNÝSKIPANINI ..... 50

10.1 YVIRLIT YVIR ÚTREIÐSLUGONGD VIÐ OG UTTAN TILTØK ..... 52

APPENDIX 1: FYRITREYTIR FYRI FÓLKAFRAMSKRIVING ..... 54

APPENDIX 2: FYRITREYTIR FYRI ÚTROKNINGUNUM ..... 56

APPENDIX 3: ÍLØGUREGLUR ..... 57

APPENDIX 4: DEKNINGSGRADIR ..... 59

# 1 Inngangur

Fólkasamansetingin í Føroyum er í einari stórari broyting. Talið av eldri fólki er alsamt vaksandi, meðan talið av fólki í arbeiðsførum aldri ikki broytist nógv komandi árini. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst. Fyri at útreiðslurnar til pensjónir og eldratænastur ikki skulu vaksa til eitt støði, har landskassin ikki longur kann fíggja tær, hevur landsstýrið tikið stig til at nýskipa pensjónsskipanina.

Fíggjarmálaráðið setti í juni 2006 ein arbeiðsbólk at gera eitt uppskot um nýskipan av pensjónsviðurskiftunum og arbeiðið byrjaði á heysti 2006. Frá byrjan vóru Una Joensen og Birgit V. Ottosen úr Fíggjarmálaráðnum og Kári Petersen úr Landsbankanum sett í arbeiðsbólkin. Birgit V. Ottosen fór úr bólkinum í tíðliga í 2007. Una Joensen fór úr bólkinum í desembur 2007. Ina Hammershaimb úr Fíggjarmálaráðnum var sett í bólkin í mars 2008.

Veksandi talið av pensjónistum er eitt fyribrigdi, sum ger seg galdandi í øllum vesturheiminum. Tí eru nógvar frágreiðingar skrivaðar um hetta evnið, og flestu lond í Vestureuropa hava longu gjørt týðandi broytingar í pensjónsskipanunum. Arbeiðsbólkurin hevur kunnað seg um pensjónsskipanir í hinum Norðurlondunum og um broytingarnar, sum eru framdar.

Fyri at gera eitt uppskot um pensjónsnýskipan í Føroyum er neyðugt at taka støði í demografisku gongdini í Føroyum og gera broytingaruppskot til verandi skipanir og lóggávu.

Arbeiðsbólkurin hevur leitað sær serkønan stuðul til týðandi partar av frágreiðingini og uppskotinum. Av hesum kunnu serliga nevnast:
- Poul Christoffur Thomassen, aktuarur, hevur gjørt fólkaframskrivingar við ymsum fortreytum.
- Almannaráðið hevur kunnað og medvirkað, so uppskotið í so stóran mun sum gjørligt kann vera í tráð við almannalóggávu annars.
- Føroysku fíggjarstovnarnir, bæði peningastovnar og pensjónsfeløg, hava medvirkað til, at parturin um uppspardar eftirlønir varð tillagaður til verandi lóggávu og verandi skipanir.

Arbeiðsbólkurin hevur havt framløgur fyri áhugapørtunum fyri at fáa teirra metingar tiknar við í arbeiðinum. Bólkurin hevur havt fundir við hesar áhugabólkar:
- Landsstýri
- Løgting (umboð fyri flokkarnar)
- Fakfeløg
- Arbeiðsgevarafelagið
- Landsfelag Pensjónista
- Peningastovnar
- Pensjónsfeløg

Bólkurin hevur havt framløgur við búskaparligum útgreiningum og uppskoti til nýskipan fyri áhugapørtunum í februar 2007 og í juli 2008.

Í nógvum førum hevur bólkurin broytt nýskipanaruppskotið eftir uppskotum frá áhugaðu pørtunum, tó við teirri avmarking, at broytingaruppskotini ikki hava verið í beinleiðis andsøgn til endamálið við nýskipanini.

Bólkurin hevur avmarkað seg til at lýsa fíggjarligu avleiðingarnar av veksandi tal av eldri fólki. Aðrar fylgur, til dømis veksandi starvsfólkatørv í almenna sektorinum, hevur bólkurin ikki viðgjørt.

Arbeiðsbólkurin hevur í semju við fíggjarmálaráðharrarnar í tíðini arbeiðið er farið fram, tilevnað uppskotið óheft av partapolitiskum fyrilitum.

8. juni 2009

Ina Hammershaimb Kári Petersen

# 2 Samandráttur

Talið av eldri fólki í Føroyum er skjótt veksandi, meðan talið av arbeiðsførum verður nærum óbroytt. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst. Við einum nógv størri tali av pensjónistum fara útreiðslurnar til pensjónir og til røkt av eldri fólki at vera nógv størri enn í dag. Um einki verður gjørt, so verður útreiðsluvøksturin so stórur, at skattatrýstið veksur úr sløkum 50 prosent av BTÚ upp í sløk 60 prosent av BTÚ. Hesin útreiðsluvøkstur er so stórur, at tað fer ikki at bera til at hækka skattin svarandi til útreiðsluvøksturin. Tað er tí neyðugt at gera tiltøk nú, sum gera, at útreiðsluvøksturin ikki verður so stórur.

## 2.1 Endamál við nýskipanini

Í einum vælferðarsamfelagi sum okkara er tað týdningarmikið, at øll fáa eina virðiliga og góða tilveru, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum við pensjón. Skipanin av pensjónsøkinum er tí ein týðandi lutur í øllum vælferðarsamfeløgum.

Eftirlønarskipanir hava tvey høvuðsendamál. Annað er at tryggja pensjónistar móti fátækradømi og hitt at tryggja pensjónistum eina rímiliga inntøku, tá fólk fara frá eini tilveru sum løntakarar til tilveruna sum pensjónistar.

Pensjónsnýskipanin hevur eisini tvey høvuðsendamál. Annað endamálið við nýskipanini er at gera eina pensjónsskipan, sum er haldfør, t.e. at hon tolir, at talið av pensjónistum verður munandi hægri enn í dag.

Hitt endamálið er at tryggja almennu tænasturnar uppá longri sikt. Hetta kann bert gerast við at gera fíggjarlógina haldføra, t.e. umskipa útreiðslumynstrið, so at nóg mikið verður til almennu tænasturnar, sjálvt um talið av pensjónistum verður munandi hægri enn í dag.

**Endamál:**
At gera eina fíggjarliga haldføra pensjónsskipan, sum tryggjar øllum eina rímiliga inntøku, tá tey gerast pensjónistar, og sum tryggjar, at almennu myndugleikarnir kunnu veita borgarunum hóskandi vælferðartænastur, eisini við einum stórum vøkstri í talinum av eldri fólki.

## 2.2 Trupulleiki: Fleiri eldri og færri arbeiðsfør

Tær almennu pensjónsskipanirnar eru undir trýsti í flestu londum, tí talið av pensjónistum økist skjótari enn talið av fólki í arbeiðsførum aldri. T.d. væntar OECD, at útreiðslurnar til almennar eftirlønir og almennar vælferðartænastur fara at hækka munandi í mun til BTÚ tey næstu 50 árini. Tí hava nógv lond tey seinastu árini gjørt broytingar í teirra eftirlønarskipanum fyri at minka um pensjónsútreiðslurnar og fyri at útvega fígging til vaksandi pensjónsútreiðslur í framtíðini.

Talið av eldri fólki veksur skjótt, meðan talið av fólki í arbeiðsførum stendur í stað. Henda gongdin førir við sær, at pensjónsútreiðslurnar, ellisrøktarútreiðslurnar og sjúkrarøktarútreiðslurnar fara at veksa skjótt. Hinvegin ger óbroytta talið av arbeiðsførum, at útlit eru til at inntøkur landskassans ikki fara at veksa so skjótt.

Um einki verður gjørt, so hendir í fyrsta lagi tað, at tað almenna fer ikki longur at kunna útinna vælferðartænasturnar innan til dømis skúlaverk, heilsuverk og almannaverk. Í øðrum lagið verður skattatrýstið so høgt, at vandi er fyri fólkafráflyting.

Fleiri hættir eru at fíggja stóru útreiðsluhækkingarnar:

- Hækka skattatrýstið, fyri at fíggja øktu útreiðslurnar til pensjónir og røktartænastur.
- Økja um uppsparingina hjá hvørjum einstøkum. Hvør einstakur fíggjar harvið ein størri part av síni egnu pensjón.
- Minka um talið á teimum, sum fáa fólkapensjón við at hækka pensjónsaldurin.
- Minka um pensjónina hjá teimum, sum hava arbeiði ella sum hava eina góða uppsparda eftirløn.

Í uppskotinum verður mælt til, at allir hesir hættir at fíggja vaksandi útreiðslurnar verða nýttir.

## 2.3 Sosiali sáttmálin

Grundleggjandi kunnu vit skilja ímillum tvey sløg av eftirlønarskipanum:

1. Hvør einstakur sparir upp til sína egna pensjón. (uppsparingsfíggjaðar skipanir).
2. Pensjónirnar hjá teimum eldru verða fíggjaðar av skattagjaldingum hjá teimum yngru (skattafíggjaðar pensjónsskipanir). Tey yngru rokna samstundis við, at onnur fara at gjalda teirra pensjón, tá tey verða gomul. Hetta verður kallað sosiali sáttmálin millum ættarliðini.

Verandi skattafíggjaða skipan er sum heild góð, men hevur tann vansa, at tað er trupult at fíggja skattafíggjaðar pensjónsskipanir, tá talið av eldri fólki veksur, meðan talið av skattgjaldarum stendur í stað.

## 2.4 Eftirlønarskipanin eigur at byggja á tríggjar súlur

Mælt verður til, at ein framtíðar eftirlønarskipan fyri føroyska samfelagið byggir á tríggjar súlur:

1. Eina almannapensjón, ið er skattafíggjað.
2. Eina sáttmálabundna ella lógarbundna persónliga uppsparing.
3. Eina fría uppsparing.




*Mynd 1: Tær tríggjar súlurnar í pensjónsnýskipanini.*

Hetta er leisturin, ið Heimsbankin mælir til at lond nýta, tá tey uppbyggja teirra eftirlønarskipanir, og sum nógv lond eisini hava nýtt sum leist, tá tey hava skipað hetta øki.

## 2.5 Høvuðsbroytingar av pensjónsskipanini

Við at broyta persónligu uppsparingina (súlu 2) verður tað gjørligt at broyta almannapensjónirnar (súlu 1). Í uppskotinum verður mælt til at økja persónligu uppsparingina í súlu 2, soleiðis at tað verður gjørligt at minka og umskipa almannapensjónirnar í súlu 1. Harvið verður tað framvegis gjørligt hjá tí almenna at tryggja vælferðartænasturnar í framtíðini.

Eitt av høvuðsmálunum er at minka um almannapensjónirnar, soleiðis at ein pensjónistur, sum ikki hevur aðra inntøku enn almannapensjón, framvegis fær somu upphædd, meðan tey, sum hava møguleika fyri tí, sjálvi spara upp til eftirløn og tí fáa minni almannapensjón.

Broytingarnar í súlu 1 kunnu tí bert gerast við atliti til tær broytingar, ið verða gjørdar í súlu 2.

### *2.5.1 Broytingar í súlu 1*

Tilmælið er at varðveita almannapensjónina sum súlu 1, men at gera nakrar tillagingar, soleiðis at vit fáa eina fíggjarliga haldføra skipan. Broytingarnar í súlu 1:

| **Broytingar í súlu 1: Almannapensjón** | | |
|---|---|---|
| **Nr.** | **Broyting** | **Útgreining** |
| 1 | Leggja viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman | Leggja viðbótina saman við viðbót til ávísar pensjónistar, soleiðis at bert ein viðbót verður. |
| 2 | Leggja grundupphædd og viðbót saman til eina fólkapensjón | Varðveita samlaðu upphæddina av grundupphædd og viðbót í fólkapensjónini, men leggja upphæddirnar saman, og gera tað møguligt at mótrokna í allari fólkapensjónini.<br>Varðveita SAMEG sum hann er í dag. |
| 3 | Gera allar almannapensjónir skattskyldugar, men geva ein frádrátt í skattinum | Gera allar almannapensjóninir skattskyldugar, og samstundis geva ein frádrátt í skattinum, so broytingin er inntøkuneutral fyri ein pensjónist, sum ikki hevur aðrar inntøkur enn almenna pensjón. |
| 4 | Broyta mótrokning í almannapensjónini í mun til aðra inntøku | Umskipa mótrokningina, so mótroknað verður við munandi lægri prosenti enn í dag. Eisini skal mótroknast frá fyrstu krónu og ikki bert av inntøku oman fyri 58 tús. kr. Á henda hátt fara fólk at varðveita hugin at arbeiða eftir 67. ár, um annars tey hava hug og orku. |
| 5 | Javna almannapensjónir við lønarjavning minus 1% | Lønarjavna pensjónirnar við lønarhækkingini minus 1%. |
| 6 | Livitíðarindeksera pensjónsaldurin | Livitíðarindeksera pensjónsaldurin – tað er at hækka pensjónsaldurin, so hvørt væntaða livitíðin hækkar. |

### *2.5.2 Broytingar í súlu 2*

Í dag hevur meginparturin av føroysku lønmóttakarunum eina persónliga uppsparing sum ein part av teirra starvssetan, men enn eru ov nógv, ið ikki hava eina slíka uppsparing. Somuleiðis eru nógv, sum hava alt ov lítla uppsparing. Mælt verður til, at ein lógarbundin persónlig uppsparing verður sett á stovn. Broytingarnar í súlu 2:

| **Broytingar í súlu 2: Lógarbundin uppsparing** | | |
|---|---|---|
| **Nr.** | **Broyting** | **Útgreining** |
| 1 | 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn | 15% av skattskyldugu inntøkuni skal gjaldast til uppsparingar og tryggingar. Kravt verður tó ikki, at inngjaldið er meir enn 80.000 kr. um árið. Inngjald yvir 15% ella 80.000 kr./ár er sjálvboðið.<br>Goldið verður eisini til eftirløn av inntøku, ið kemur í staðin fyri arbeiðsinntøku sum t.d. ALS, barsilsgjald og somuleiðis av nøkrum fyritíðarpensjónsveitingum og forsorgarveitingum. |
| 2 | Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til uppsparing | Av teimum 15% er tað loyvt at keypa sær tryggingar. Onki krav er um hvussu nógv kann brúkast til tryggingar (t.d. óarbeiðsføristrygging, lívstrygging, hjúnafelagatrygging og barnatrygging.). Men málið er, at í miðal skulu 2/3 av inngjaldinum (t.e. minst 10 %) fara til uppsparing. |
| 3 | Útgjald frá almenna pensjónsaldrinum | Tann persónliga eftirlønaruppsparingin kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum (í løtuni 67 ár). |
| 4 | Í mesta lagi 10 % kapitalútgjald | 10 % av samlaðu uppsparingini kann gjaldast sum kapitalútgjald. Fyri lívlanga veiting svarar 1,5 árs veiting til umleið 10 % av kapitalvirðinum. 1,5 árs veiting kann útgjaldast av lívlangari veiting sum kapitalútgjald. Kapitalútgjald verður skattað við 45%. |
| 5 | Helvt um helvt av restini til lívlanga veiting og ratueftirløn | Av restini, minst 90 % av samlaðu uppsparingini, skal minst 50% nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár. Tó er ikki neyðugt at tekna eina lívlanga veiting, sum er størri enn arbeiðaraløn, pt. 214.000 kr. árliga. |
| 6 | Undantak fyri smáar eftirlønaruppsparingar | Er uppsparingin við pensjónsaldur minni enn 100.000 kr., kann hon øll gjaldast sum kapitalútgjald. Er uppsparingin minni enn 400.000 kr., kann øll uppsparingin gjaldast sum ratueftirløn. |

### *2.5.3 Broytingar í súlu 3*

Fría uppsparingin er uppsparing, sum hvør einstakur fremur í mun til sín egna tørv og egnu ynski. Súla 3 er tær sjálvbodnu inngjaldingar, sum fara upp um 15% av skattskyldugu inntøkuni. Tað er sjálvboðið at gjalda meira enn 15 % til eftirlønaruppsparing. Broytingarnar í súlu 3 eru hesar:

| **Broytingar í súlu 3: Frí uppsparing** | | |
|---|---|---|
| **Nr.** | **Broyting** | **Útgreining** |
| 7 | Sjálvboðin uppsparing yvir 15 % | Kann uppsparast í ratueftirløn ella lívlanga veiting. Við útgjald kann í mesta lagi 20 % takast út sum kapitalútgjald. |

**Eitt samlað uppskot:**
Arbeiðsbólkurin hevur lagt seg eftir at gera uppskot til eina samlaða loysn, ið ger, at almenna pensjónin pluss uppsparda eftirlønin geva eitt hóskandi livistøði.

Broytingarnar í almennu pensjónini og økta persónliga uppsparingin minka munandi um vøksturin í eldraútreiðslunum.

Tann lægri útreiðsluvøksturin í pensjónsútreiðslunum ger, at landskassin framvegis fer at hava fíggjarorku at røkja eldratænasturnar í framtíðini.

Einstakir lutir í tilmælinum eiga tí ikki at vera tiknir burturúr, uttan at onnur tiltøk við sama virknaði verða sett ístaðin.

Tað er sera týdningarmikið, at allir borgarar vita, hvussu teirra pensjónsviðurskifti og hvussu røktartænasturnar vera í framtíðini. Hesum røkka vit einans við at seta í verk eina fíggjarliga haldføra skipan, ið ger, at landskassin megnar at røkja sínar skyldur í framtíðini.

## 2.6 Ávirkan av tiltøkum

Verða eingi tiltøk framd, so veksa almennu útreiðslurnar til eldraøkið úr 9,6 prosentum upp í 19,4 prosent av BTÚ. Verður roknað við einum BTÚ, sum tað er nú, nevniliga um 13 mia. kr., so svarar hetta til, at hallið á fíggjarlógini økist við 1.300 mió. kr.

Um skattatrýstið verður sett so langt upp, at tað almenna kann røkja sínar skyldur, so fer hetta at føra til fráflyting, og harvið til at enn færri arbeiðsfør vera í Føroyum.

Tað almenna fer ikki at kunna røkja sínar skyldur, m.a. at gjalda pensjónir og at taka sær av teimum eldru, og heldur ikki at røkja aðrar almennar uppgávur.

Verður uppskotið samtykt sum tað er, so verður útreiðsluvøksturin tálmaður munandi. Í staðin fyri at veksa til 19,4 prosent av BTÚ, veksa útreiðslurnar bert til 12,7 prosent av BTÚ. Verður roknað við einum BTÙ á 13 mia. kr., so svarar hetta til, at hallið á fíggjarlógini bert hækkar við 400 mió. kr.

Verður pensjónsnýskipanaruppskotið samtykt sum tað er, loysir tað 70 prosent av fíggingartrupulleikunum, ið stavar frá vaksandi talinum av eldri fólki.

# 3 Søga og altjóða rák

## 3.1 Endamál við pensjónsskipanum

Týdningarmiklasta endamálið við eini pensjónsskipan er at fyribyrgja fátækradømi millum pensjónistar. Eitt annað týðandi endamál hjá eini pensjónsskipan er at tryggja eina rímiliga inntøku, tá farið verður frá eini tilveru sum løntakari til eina tilveru sum pensjónistur.

Harumframt er sera týðandi, at samlaða pensjónsskipanin er fíggjarliga haldfør. Ein fíggjarliga haldfør skipan er ein skipan, ið tryggjar, at stóri vøksturin í talinum av eldri fólki, ikki fer at føra við sær stórar skattahækkingar.

## 3.2 Søguligt um pensjónsskipanir

Eftir 2. heimsbardaga settu nógv lond í verk sokallaðar samtíðarfíggjaðar pensjónir (PAYG ella pay-as-you–go) Hetta eru tær, sum í hesum frágreiðing verða nevndar almannapensjónir, har tey, ið arbeiða, gjalda pensjón til tey, sum eru givin at arbeiða. Í Føroyum kom fólkapensjónin seinast í 1950'unum, og seinni kom so SAMEG, ið eru fíggjaðar við ávikavist skatti og arbeiðsmarknaðargjøldum. Sigast kann, at almannapensjónin byggir á ein óskrivaðan sosialan sáttmála millum ættarliðini, har tey ættarliðini, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, gjalda teimum eldru, ið eru farin av arbeiðsmarknaðinum, pensjón umvegis skattin ella við arbeiðsmarknaðargjøldum. Hesar skipanir byggja sostatt ikki á uppsparing.

Tann sosiali sáttmálin byggir á, at tey sum nú eru arbeiðsfør gjalda pensjón til tey sum nú eru eldri, við tí óbeinleiðis fyritreyt, at tey, sum nú eru ung, fara at gjalda pensjónina hjá teimum, sum nú eru miðaldrandi.

Í samtíðarfíggjaðum skipanum, kann sigast, at "limaskapur" er álagdur, við tað at øll gjalda inn eftir áleið somu treytum. Í skipanum við uppsparing er møguleiki fyri meira individuellum loysnum.

## 3.3 Tann sosiali sáttmálin fer ikki at halda í framtíðini

Demografiska gongdin førir næstu árini við sær, at talið av pensjónistum tvífaldast, meðan talið av arbeiðsførum verður óbroytt. Hetta setur sosiala sáttmálan undir stórt trýst, ikki bert í Føroyum, men í øllum Vesturheiminum.

Í Føroyum eru í dag 4 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist, meðan demografiskar framskrivingar vísa, at hetta talið fellur til 3 arbeiðsfør fyri hvønn pensjónist í 2020. Í 2030 verða bert 2,5 sum arbeiða fyri hvønn pensjónist og í 2040 verða bert 2 arbeiðsfør fyri hvønn pensjónist. Við hesi demografisku gongdini, har lutfallið millum fólk í arbeiðsførum aldri í mun til pensjónistar fellur so nógv, hækka útreiðslurnar til almannapensjónir og aðrar vælferðartænastur til eldri sera nógv, meðan almennu inntøkurnar ikki veksa so skjótt. Demografisku broytingarnar eru nærri útgreinaðar í kap. 5.

Um ikki stórar broytingar verða gjørdar í pensjónsskipanini, fer ikki at bera til hjá yngru ættarliðunum at halda óskrivaða sosiala sáttmálan. Tey, ið skulu gjalda almennu útreiðslurnar verða alt ov fá at gjalda tær stóru økingarnar í bæði pensjóns-, og røktar- og heilsuútreiðslunum.

Um ikki stórar broytingar verða gjørdar, so økjast almennu pensjóns- og røktarútreiðslurnar sera nógv. Fyri at skilja, hvat fylgjurnar eru av einki at gera, er tað er sera týðandi at hava í huga, at eingin mekanisma er sum noyðir yngru ættarliðini at gjalda tað høga skattatrýstið, sum skal til at fíggja høgu eldraútreiðslurnar.

Einki er, sum forðar framtíðar skattaborgarum í at geva framtíðar pensjónistum eina sera vánaliga pensjón og vánaliga sjúkra- og eldrarøkt.

Tað er heldur ikki sannlíkt, at føroyingar, sum taka útbúgving í londum, sum hava haldførar skipanir við lægri skattatrýsti vilja koma aftur til Føroyar, um Føroyar tá hava eitt alt ov høgt skattatrýst.

Samanumtikið kann sigast, at uttan stórar broytingar í pensjónsskipanini er ikki sannlíkt, at yngru borgararnir ynskja ella yvirhøvur kunnu halda sosiala sáttmálan um at gjalda nóg høgan skatt til at halda verandi støði á vælferðartænastunum á almanna- og heilsuøkinum.

### 3.4 Haldførar pensjónsskipanir

Demografisku broytingarnar eru ikki eitt serstakt føroyskt fyribrigdi. Gongdin er tann sama í okkara grannalondum, og flestu teirra hava longu sett í verk stórar broytingar á pensjónsøkinum[1]. Í stuttum kann sigast, at tær broytingar, ið flestu lond hava gjørt í teirra eftirlønarskipanum, hava eitt ella bæði av hesum eyðkennum:

- Spart verður í størri og størri mun upp í grunnum, sum t.d. í pensjónskassum.
- Skráseting av pensjónsinngjøldum hjá einstøkum borgarum og harvið styrkja tað aktuariska rættvísið. Hetta merkir at fólk fáa í størri mun pensjón í mun til, hvussu nógv (ella í hvussu nógv ár) tey hava goldið inn.

Í Brundtland frágreiðingini frá 1987[2] verður haldførishugtakið allýst sum, at núlivandi ættarlið fáa sín tørv uppfyltan uttan at forða fyri, at framtíðarættarliðini fáa teirra tørv uppfyltan. Tað merkir t.d., at núlivandi ættarlið ikki eigur at skuldarbinda samfelagið so nógv, fyri t.d. at fíggja vaksandi útreiðslur til pensjónir, at tað gongur útyvir vælferðina hjá framtíðar ættarliðum.

Javnvágin millum ættarliðini ávirkast m.a. av hvørjar pensjónsskipanir eru galdandi. Ein av grundunum er, at uppspardar eftirlønir ikki verða ávirkaðar av t.d. demografiskum broytingum, eins og almannapensjónir gera tað. Í eini uppsparingarskipan eru útgjaldingarnar beinleiðis tengdar at inngjøldunum, meðan tað í almannapensjónum fer fram ein javning millum ættarlið og í ættarliðum.

### 3.5 ES hevur 11 mál fyri pensjón

Í 2001 samtykti ES 11 felagsmál fyri at tryggja nøktandi og haldførar pensjónsskipanir. Arbeiðsbólkurin heldur, at tey í stóran mun eru viðkomandi fyri føroysk viðurskifti og bólkurin hevur tí í stóran mun tilevnað nýskipanaruppskotið í tráð við hesi mál.

Hesi 11 mál kunnu býtast í tríggjar høvuðsbólkar:

Nøktandi pensjónir:

1. tryggja pensjónistunum eitt rímiligt livistøði og ein rímiligan lut í samfelagsins vælferð.
2. tryggja øllum atgongd til pensjónir, so livistøðið áðrenn pensjónsaldur kann varðveitast á einum rímiligum støði sum pensjónistur.
3. styrkja solidaritet í og millum ættarlið.

Fíggjarligt haldføri:

4. fáa stóra luttøku á arbeiðsmarknaðinum.
5. tryggja at pensjónsskipanin stuðlar undir, at fólk verða longri á arbeiðsmarknaðinum.
6. tryggja at pensjónsskipanin stuðlar undir ein haldføran fíggjarpolitikk.
7. tryggja javnvág millum inngjald frá teimum í arbeiði og veitingar til pensjónistar.
8. tryggja høga trygd og høgan vinning av uppspardari pensjón.

Nútíðargerð:

9. tryggja at pensjónsskipanin stuðlar uppundir ein smidligan arbeiðsmarknað.
10. tryggja javnstøðu millum kynini.
11. økja um gjøgnumskygni í pensjónsskipanum.

[1] Í nógvum førum er talan um so stórar broytingar, at tær kunnu kallast veruligar pensjónsnýskipanir.
[2] World Commision on Environment and Development (1987).

### 3.6 Tilmælið hjá Heimsbankanum

Heimsbankin mælir til at byggja pensjónsskipanir upp í trimum súlum[3]:

Súla 1: Ein almenn skattafíggjað skipan, hvørs endamál er at tryggja tey gomlu ímóti fátækradømi
Súla 2: Sáttmálabundin ella lógarbundin persónlig uppsparing
Súla 3: Sjálvboðin persónlig uppsparing

Skattafíggjaða súlan syrgir fyri neyðugu javningini, fyri at tryggja eitt minstamark fyri livistøðið hjá pensjónistunum. Sáttmálabundna ella lógarbundna uppsparingin syrgir fyri, at tey, ið hava møguleika, so vítt gjørligt sjálvi tryggja sær aldurdómin. Sjálvbodna persónliga uppsparingin er uppsparing sum tann einstaki fremur til sín egna persónliga tørv. Saman geva hesar tríggjar súlur bestu fíggjarligu trygd á ellisárum.

Arbeiðsbólkurin hevur lýst verandi skipanir við støði í leistinum hjá Heimsbankanum. Somuleiðis er nýskipanaruppskotið skipað eftir hesum leisti.

[3] "Averting The Old Age Crisis: Policies to Protect the Old and Promote Growth - A World Bank Policy Research Report". Heimsbankin (1994).

# 4 Ymisk sløg av pensjónsskipanum

Vanliga verður skilt í millum tvey høvuðssløg av pensjónsskipanum.

- Skattafíggjaðar pensjónir
- Uppsparingsfíggjaðar eftirlønir

Við almannapensjónum, ið eru skattafíggjaðar ella fíggjaðar við arbeiðsmarknaðargjøldum, er møguleiki at javna millum inntøkubólkarnar, og harvið tryggja eitt minsta livistøði hjá pensjónistum. Við persónligari uppsparing skulu tey, ið hava møguleika, sjálvi tryggja sær eina hóskandi inntøku, tá tey gevast at arbeiða.

## 4.1 Fyrimunir og vansar við uppsparingsfíggjaðum og skattafíggjaðum skipanum

Stórir munir eru á skattafíggjaðum almannapensjónum og persónligum uppsparingsfíggjaðum pensjónum.

Skattafíggjaðu pensjónsskipanirnar, sum vit kenna væl á okkara leiðum, hava bæði fyrimunir og vansar sammet við uppsparingsfíggjaðar skipanir.

Ein av fyrimununum við skattafíggjaðum pensjónum er, at øll fáa eins út sum pensjónistar, uttan mun til um tey hava goldið nógv í skatti ella tey als einki hava goldi í skatti í arbeiðslívinum. Skattafíggjaðu skipanirnar virka sostatt sum eitt sosialt trygdarnet, tá borgarin kemur til pensjónsaldur.

Ein annar av fyrimununum er, at borgarin hevur rættiliga stóra trygd fyri upphæddini, hann fær útgoldna, tá hann verður pensjónistur. Skattafíggjaðar pensjónir verða vanliga bert broyttar spakuliga, og borgarin veit tískil í hampuligari tíð frammanundan, hvussu nógv hann fer at hava at liva fyri, tá hann verður pensjónistur. Um samanborið verður við uppsparingsfíggjaðar pensjónsskipanir, so ávirkast uppsparingsfíggjaða eftirlønin nógv av, hvussu stórt avkastið er av uppsparingini.

Ein triði fyrimunur er, at borgarin ikki sjálvur ber váðan av, um hann livir stutt ella leingi. Fólkapensjónin verður goldin út eitt stutt tíðarskeið, um borgarin livir stutt, og verður útgoldin leingi, um borgarin livir leingi. Við uppsparingsfíggjaðum pensjónum er tað uppspararin, sum ber váðan av, at hann ikki veit, um hann fær eitt stutt ella langt lív. Fær hann eitt stutt lív, so er ikki neyðugt, at útvega eina stóra eftirlønaruppsparing. Fær hann hinvegin eitt langt lív, hevur hann tørv á einari stórari pensjónsuppsparing.

Ein av veikleikunum við skattafíggjaðum pensjónum er, at tær eru truplar at fíggja, tá talið av eldri folki veksur skjótt, meðan talið av arbeiðsførum stendur í stað, tí ov fá verða at gjalda vaksandi pensjónsútreiðslurnar. Tískil eru komandi pensjónistar í vanda fyri, at tað almenna ikki fer at klára sínar skyldur at gjalda pensjónir og at veita sjúkrarøkt og eldrarøkt. Til samanberingar kann nevnast, at við eini uppsparingsfíggjaðari skipan eru útgjaldingarnar tryggjaðar við akkumuleraðum kapitali.

Tann mest týðandi grundgevingin fyri uppsparingsfíggjaðum pensjónsskipanum er tí, at tær eru ikki eins viðkvæmar fyri broytingum í fólkasamansetingini, tí útgjaldingarnar í framtíðini eru grundaðar á uppsparing, sum hin einstaki sjálvur eigur. Eitt skjótt vaksandi tal av pensjónistum minkar tí ikki so nógv um møguleikarnar fyri at fáa eina rímiliga pensjón.

Ein vansi við uppsparingsfíggjaðum skipanum er, at tað tekur nógv ár áðrenn uppsparingin er nóg stór at geva eina hóskandi eftirløn. Ein eftirlønarskipan tekur umleið 40 ár at byggja upp, og svarar tað til, at tað tekur eitt heilt arbeiðslív at spara upp til sína egnu eftirløn.

Tá inngjøldini verða broytt, er stórur munur á, nær hesar broytingar fáa virkna á útgjaldið. Í almannapensjónum hækkar útgjaldið samstundis sum skatturin. Hinvegin merkist ein hækking í inngjaldinum til eina persónliga uppsparing ikki í útgjaldinum fyrr enn tey ættarliðini, ið hækka inngjøldini fáa pensjón. Tað vil siga, at ein slík hækking ikki fær fullan virkna fyrr enn eftir 35 til 40 ár, ið er tíðin tað tekur at spara upp til eina fulla eftirløn.

Uppsparingsfíggjaðar skipanir hava sum heild betri insitamentsvirkningar enn almannapensjónir. Í fyrsta lagi tí at pensjónsinngjøld ikki avlaga arbeiðsútboðið á sama hátt sum skattir til almannapensjónir. Um skattaborgarin fær álagt at rinda meira skatt til pensjónir hjá øðrum, minkar hetta um hugin at arbeiða. Um skattaborgarin fær álagt at rinda meira til sína egnu pensjón (við skattafrádrátti), so minkar hetta ikki eins nógv um hugin at arbeiða, um tann einstaki veit, at inngjaldið kemur honum sjálvum til gagns seinni í lívinum. Í øðrum lagi skunda persónligar uppsparingar undir at verða longri á arbeiðsmarknaðinum, tí tess longur tann einstaki arbeiðir, tess

fleiri ár rindar hann til eftirlønina og tess færri verða pensjónsárini. Tí verður árliga inntøkan í pensjónsárunum munandi hægri, um tann einstaki velur at arbeiða nøkur ár aftrat.

Sum nevnt omanfyri er stórur munur á skattafíggjaðum og uppsparingsfíggjaðum pensjónsskipanunum, tá hugt verður eftir, hvør ber váðan av øktum livialdri. Við almannapensjón er tann einstaki tryggjaður pensjón alt lívið. Óvissan hjá tí einstaka, hvussu leingi hann livir, verður borin av tí almenna, sum á henda hátt virkar sum eitt tryggingarfelag. Hjá einum pensjónisti við persónligari uppsparing er tað hinvegin so, at hann sjálvur ber váðan, tí tess longri hann livir, tess lægri árliga pensjón fær hann. Hetta kann hann tó tryggja seg ímóti við at keypa sær eina lívlanga veiting frá einum tryggingarfelagi, og harvið flyta váðan yvir á tryggingarfelagið.

Hækkandi livialdur ávirkar eisini skipaninar sera ymiskt. Er talan um almannnapensjón, so má tað almenna gjalda pensjón í eitt vaksandi áramál, um livialdurin økist. Sostatt er tað samfelagið, ið ber fíggingarváðan av hækkandi miðallivialdrinum, tá talan er um almannapensjónir. Er talan um persónliga uppsparing, so førir øktur livialdur til, at minni verður í eftirlønarinntøku um árið, um livialdurin økist. Sostatt er tað tann einstaki, ið ber váðan, tá talan er um uppsparingsfíggjaðar skipanir.

*Talva 1: Fyrimunir og vansar við skattafíggjaðum og uppsparingsfíggjaðum pensjónsskipanum.*

| **Skattafíggjaðar pensjónsskipanir** |
|---|
| Fyrimunir:<br>• Øll fáa tað sama<br>• Sosialt trygdarnet<br>• Lítil óvissa um pensjónsupphædd<br>• Tann einstaki tørvar ikki at spara serliga nógv upp, um hann verður gamal |
| Vansar:<br>• Trupultt at fíggja, tá talið av eldri fólki veksur og talið av arbeiðsførum er óbroytt<br>• Tá livialdurin hækkar, hækka útreiðslurnar hjá tí almenna<br>• Førir til veksandi skattatrýst, sum minkar arbeiðsútboðið |
| **Uppsparingsfíggjaðar pensjónsskipanir** |
| Fyrimunir:<br>• Eru minni viðbreknar fyri broytingum í talinum av eldri fólki<br>• Einstaki uppspararin kann sjálvur ávirka, hvussu nógv hann fær útgoldið sum pensjónistur<br>• Minkar ikki um arbeiðsútboðið, tí tann einstaki sjálvur eigur uppsparingina<br>• Geva insitament til at arbeiða nøkur ár aftrat, tí hetta minkar um árini á eftirløn og tískil veksur árliga eftirlønin munandi |
| Vansar:<br>• Tekur langa tíð at uppbyggja skipanina fult út<br>• Øll kunnu ikki spara eins nógv upp<br>• Peningurin skal gjaldast nú og goymast til pensjónsárini<br>• Óvissa um virðið á uppsparing og eftirløn<br>• Tann einstaki tørvar størri uppsparing um hann livir leingi |

Høvuðsniðurstøðan er tí, at bæði skattafíggjaðar og uppsparingsfíggjaðar pensjónsskipanir hava fyrimunir og vansar, og at tað er neyðugt at hava báðar. Av tí at uppsparingsfíggjaðar eru betri, tá miðallivialdurin veksur, so er neyðugt, at vit umframt at hava eina skattafíggjaða pensjón eisini fáa eina uppsparingsfíggjaða eftirløn.

## 4.2 Lýsing av ymsum sløgum av persónligari eftirløn

Flestu persónligu eftirlønarskipanirnar eru í dag ein samanseting av trimum teimum mest vanligu hættunum at spara upp til pensjón nevniliga: Kapitaleftirløn, ratueftirløn og lívlangar veitingar. Ymsu fakfeløgini og einstaklingar hava valt sær ymsar samansetingar av teimum trimum høvuðssløgunum av eftirløn.

Niðanfyri er ein lýsing av teimum trimum vanligastu sløgunum av eftirlønaruppsparing.

***Kapitaleftirløn:***
Ein kapitaleftirløn er eftirløn, har spart verður saman til eina upphædd, sum verður rentað og síðan útgoldin í einum við 60 ára aldur ella seinni. Av tí at talan er um eina uppsparda upphædd, so fáa avvarandi hesa upphædd útgoldna, um uppspararin doyr áðrenn pensjónsaldur.

Fyrimunurin við kapitaleftirløn er fyri uppspararan, at uppspararin sjálvur ræður yvir, nær hann brúkar peningin, beinanvegin ella eftir nøkrum árum.

Vansin fyri uppspararan er, at hann ikki veit, um hann fer at liva stutt ella leingi. Um uppspararin ætlar, at uppsparingin skal veita eitt ávíst livistøði í nógv av ellisárunum, hevur hann tann trupulleika, at hann ikki veit, hvussu nógv av uppsparingini hann kann nýta um árið, so hon ikki verður uppi ov tíðliga.

Vansin fyri tað almenna er, at hóast uppsparingin hevur fingið skattafrádrátt, so má tað almenna kortini forsyrgja uppspararanum øll ellisárini.

Ein serligur trupulleiki við kapitaleftirløn er, at hon hevur fingið ov stórar skattligar fyrimunir. Inngjøld geva frádrátt á 55 prosent fyri inntøkur omanfyri miðal, men tá uppsparingin kemur til útgjaldingar, so verður hon bert skattað 35 prosent. Harumframt hava kapitaleftirlønir tann fyrimun, at tær bert vera mótroknaðar í fólkapensjónsviðbótini í einum inntøkuári. Samanumtikið merkir hetta, at tey við høgum inntøkum hava ein serliga stóran fyrimun við at spara upp til kapitaleftirløn í mun til tá spart verður upp til ratueftirløn og lívlangar veitingar.

Møguleiki er eisini fyri fyrst at spara upp til kapitaleftirløn og við pensjónsaldur at leggja hana um til eina ratueftirløn ella at ”keypa” eina lívlanga veiting. (Lívlangar veitingar og ratueftirløn: Sí niðanfyri)

***Ratueftirløn:***
Ein ratueftirløn er ein eftirløn, har spart verður saman til eina upphædd, sum verður rentað og síðan útgoldin í minst 10 ár eftir pensjónsaldur. Av tí at talan er um eina uppsparda upphædd, so fáa avvarandi hesa upphædd útgoldna, um uppspararin doyr áðrenn eftirlønin er liðugt útgoldin.

Fyrimunurin við ratueftirløn er fyri uppspararan, at uppsparingin í øllum førum varar í ein part av pensjónsárunum. Vansin er, at um uppspararin livir leingi og er væl fyri, so er peningurin uppi, meðan uppspararin framvegis er aktivur pensjónistur.

Fyrimunurin fyri tað almenna er, at uppspararin í øllum førum hevur eina rímiliga góða eftirløn tey fyrstu pensjónsárini. Vansin er, at tað almenna má taka sær av uppspararanum, tá hann verður eldri.

Inngjald til ratueftirløn gevur fullan frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, og útgjald verður skattað sum vanlig inntøka.

Ratueftirlønin ella partur av henni kann umleggjast til lívlanga veiting við pensjónsaldur, um uppspararin ynskir hetta.

***Lívlang veiting:***
Ein lívrenta, ella lívlang veiting, er ein eftirløn, har spart verður saman til ein rætt til útgjald av eftirløn, so leingi persónurin livir. Útgoldna eftirlønarupphæddin er treytað av, hvussu stór upphædd er inngoldin, og yvir hvussu langt áramál. Ein lívlang veiting kann samanberast við eina tryggingarskipan.

Ein kann síggja eina lívlanga veiting sum tað øvugta av einari lívstrygging. Ein lívstrygging er ein tryggingarveiting, sum tey avvarandi fáa brúk fyri, um tryggingartakarin doyr. Ein lívlang veiting er ein inntøkutrygging hjá tryggingartakaranum, um hann ella hon ikki doyr, men fær eitt langt lív. Lívlangar veitingar hava tann eginleika, at við einum longum lívi, kann ein gleðast yvir ta góðu íløgu man hevur gjørt, meðan man við einum stuttum lívi ikki hevur tørv á hesi trygging.

Fyrimunurin fyri uppspararan er, at hann hevur nakað at liva av, tá hann gerst gamal, tí eftirlønin verður útgoldin gjøgnum øll pensjónistaárini. Eisini fáa uppspararar, sum liva leingi, fyrimun av at vera í einum felags eftirlønarpulju, har uppsparingin hjá teimum sum ikki liva so leingi, kemur teimum til góðar sum liva leingi. Um uppspararin sjálvur skuldi tryggja sær sama eftirlønarútgjald, skuldi hann spart nógv meira upp, enn um hann er í eini lívrentuskipan saman við øðrum.

Vanliga mótstøðan móti lívlongum veitingum er, at tær ikki verða arvaðar av næstu avvarðandi, men fella aftur til bólkin, ið persónurin er tryggjaður saman við. Á henda hátt halda nógv, at ein partur av uppsparingini verður burturspiltur.

Sigast kann tó, at pensjónskassar, sum selja lívlangar veitingar, hava produkt, sum ger tað møguligt at tryggja teimum avvarðandi útgjald av eini peningaupphædd við deyð, eisini tá uppspararin teknar eina lívlanga veiting. Hetta kostar sjálvandi eina eyka upphædd.

Vansin fyri uppspararan er eisini, at hann fær eitt lægri útgjald tey fyrstu 10 árini, enn um alt var inngoldið til eina ratueftirløn. Hinvegin brúkar uppspararin ikki allan peningin eftir 10 árum, men hevur eftirløn so leingi hann livir.

Fyrimunurin fyri tað almenna er, at uppspararin hevur nakað at liva av, tá hann verður gamal, og tí sparir tað almenna fyri útreiðslur til pensjón.

Inngjald til lívlanga veiting gevur fullan frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, og útgjald verður skattað sum vanlig inntøka.

### 4.3 Broyting frá almennari pensjón yvir móti persónligari uppsparing

Fleiri lond hava gjørt stórar broytingar á teirra pensjónsøki, har tey hava útbygt teirra uppsparingsskipanir. Eitt av endamálunum við at leggja um frá almannapensjónum til persónligar uppsparingar hevur verið at minka um fíggingarváðan hjá tí almenna av væntaðu øktu livitíðini í framtíðini. Við at útbyggja persónligar uppsparingar kann ein tryggja haldførið í vælferðarskipanini.

Persónlig uppsparing kann sostatt bøta munandi um haldførið í vælferðarskipanini, men hetta er treytað av, at tær persónligu uppsparingarnar eru innrættaðar á skilagóðan hátt. Hvussu stórt trýst persónligu uppsparingarnar taka av útreiðslunum til almannapensjónir er treytað av, hvussu hesar persónligu uppsparingar vera útgoldnar.

Um hesar pensjónir verða útgoldnar sum lívlangar veitingar, er samfelagsvinningurin størstur. Um hesar uppsparingar harafturímóti verða útgoldnar sum ratupensjónir er vinningurin minni, tí váðin við hækkandi livialdri verður ikki fluttur til tann einstaka. Tað almenna ber harvið framvegis ta marginalu fíggjarbyrðuna við øktari livitíð, um pensjónsuppsparingin ella partur av henni ikki verður útgoldin sum lívslangar veitingar. Tað er tí útfrá einum samfelagsligum sjónarmiði góðar grundgevingar fyri at seta treytir um, at persónlig uppsparing skal heilt ella lutvíst gjaldast út sum lívlangar veitingar, fyri á tann hátt at minka um útreiðslurnar til almannapensjónir.

Verður øll uppsparingin útgoldin sum kapital- ella ratueftirløn, liggur fíggingarváðin av hækkandi livialdri framvegis hjá tí almenna. Tað eru sostatt av stórum týdningi fyri samfelagið, hvussu eftirlønaruppsparing verður útgoldin. Av tí at tað almenna stuðlar inngjaldi til pensjónsuppsparing gjøgnum skattaskipanina er eisini rímiligt, at samfelagið setir krøv til, hvussu eftirlønaruppsparingin verður útgoldin.

Íslendsku og svensku skipanirnar byggja í stóran mun á lívlangar veitingar. Greitt verður nærri frá hesum í kapitul 8 “Eftirlønarskipanir í øðrum londum”. Donsku arbeiðsmarknaðareftirlønirnar byggja eisini í stóran mun á lívlangar veitingar, og í 2004 mælti danska vælferðarkommisjónin til, at áleggjast skuldi øllum at spara upp til lívlangar veitingar við 6 % av lønini.[4]

Eitt annað rák í grannalondum okkara er, at veitingar úr pensjónskassum verða alt meira lagaðar eftir einstaklingstørvi, har møguleiki er fyri at keypa sær pakkaloysnir, ið júst svara til eins egnu støðu. Um hetta út frá einum samfelagssjónarmiði er gagnligt kann kjakast um, tí tað verða teir veiku bólkarnir, ið verða raktir av minni samhaldsfesti og øktari individualisering.

[4] Kelda: Analyserapport fra Velfærdskommissionen, “Fremtidens velfærd kommer ikke af sig selv”, mai 2004, siða 738.

# 5 Demografiskar útgreiningar

Eins og í grannalondum okkara er aldurssamansetingin í Føroyum í stórari broyting. Talið av eldri fólki fer at vaksa sera nógv, meðan talið av yngri og miðalaldrandi fólki sum heild verður óbroytt.

Fleiri orsøkir eru til hesa gongd. Tríggir høvuðsfaktorar ávirka gongdina í og samansetingina av samlaða fólkatalinum í einum landi: Burðartíttleikin, deyðstíttleikin (livitíðin) og flytingarmynstrið.

## 5.1 Søguligar fyritreytir fyri fólkaframskriving

Í samband við pensjónsnýskipanina hevur arbeiðsbólkurin greinað demografisku gongdina í Føroyum síðan 1950. Poul Christoffur Thomassen, aktuarur, hevur eftir áheitan frá arbeiðsbólkinum gjørt fólkaframskrivingar fram til 2050 við fyritreytum, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt við støði í søguligu gongdini.

Í hesum parti verður greitt frá demografisku gongdini síðan 1950, og hvussu komið er fram til fyritreytirnar í framskrivingini.

Burðartíttleikin minkaði við umleið 30 prosent frá 50árunum til miðskeiðis í 80árunum. Síðan er burðartíttleikin ikki nógv broyttur.

Í framskrivingini er roknað við óbroyttum burðartíttleika.

Deyðstíttleikin er minkaður støðugt seinastu 30 árini, so restlivitíðin hjá 60ára gomlum er longd við 3 árum hesi seinastu 30 árini. Høvuðsorsøkirnar eru sunnari lívsháttur og betri heilsuviðgerðir. Í Vestureuropeisku londunum rokna serfrøðingar við, at restlivitíðin støðugt fer at veksa. Hvørja ferð 10 ár ganga, rokna teir við, at restlivitíðin økist við einum ári.

Føroyska framskrivingin er gjørd við somu fortreyt, nevniliga, at restlivitíðin veksur við einum ári fyri hvørji 10 ár vit koma inn í framtíðina.

Flytingarmynstrið hevur verið óstøðugt seinastu 50-60 árini. Tá búskaparvøksturin hevur verið lítil ella negativur, hava stórar fráflytingar verið úr Føroyum. Tá stór framgongd hevur verið í Føroyum, hevur tilflyting verið. Tilsamans hevur verið talan um eina stóra fráflyting úr Føroyum. 8000 fólk eru flutt úr Føroyum uttan at koma aftur. Mynstrið líkist nógv teimum økjunum í heiminum, har eitt land hevur stór burðaravlop, meðan grannalandið hevur smá burðaravlop. Í nógv flestu førum førir eitt tílíkt mynstur til eina fólkaflyting til landið við lítla burðartíttleikanum. Flytingarnar millum Føroyar og Danmark hava eisini fylgt hesum mynstri. Av tí at føroyska burðaravlopið ikki longur er so nógv størri enn í Danmark, kann roknast við, at fólkafráflytingin í meðal verður væl minni, enn hon hevur verið søguliga sæð.

Í tíðarskeiðnum 1950-2005 fluttu í meðal 140 úr Føroyum árliga. Í framskrivingini er roknað við, at 75 fólk flyta úr Føroyum árliga.

Stórar broytingar eru longu farnar fram í aldursbýtinum. Síðan 1970 hevur talið av ungfólki verið minkandi, meðan talið av miðalaldrandi og eldri fólki er vaksið. Kreppan í 90árunum førdi til serliga stóra fráflyting av ungum fólki, har nógv ikki komu aftur til Føroyar at búgva.

Av tí at talið av miðalaldrandi - ið sum heild eru arbeiðsvirkin - er vaksið so nógv, hevur enn borið væl til at gjalda øktu útreiðslurnar til pensjónir og eldrarøkt.

Frá aldarskiftinum veksur talið av fólki í arbeiðsførum aldri ikki longur, meðan talið av eldri fólki heldur fram at veksa. Fallandi deyðstíttleikin og longda livitíðin verða orsøk til eina nógv broytta fólkasamanseting komandi árini.

Ein neyvari lýsing av fortreytunum fyri framskrivingini er í Appendix 1.

## 5.2 Longri livitíð og broytt fólkasamanseting

Miðallivialdurin hjá føroyingum hevur verið alsamt vaksandi, og á tølunum niðanfyri sæst, hvussu hann er øktur tey seinastu 35 árini, og hvussu nógv ein kann vænta, at hann økist tey komandi 40 árini:

*Talva 2: Livitíðir.*

| | Væntað livitíð hjá 60 ára gomlum | Restlivitíð hjá 60 ára gomlum | Ár sum pensjónistur |
|---|---|---|---|
| **1971-75** | 79,0 | 19,0 | 12,0 |
| **2001-05** | 82,0 | 22,0 | 15,0 |
| **2045-50** | 86,5 | 26,5 | 19,5 |

Í 1975 livdi ein pensjónistur í miðal 12 ár eftir, at hann var pensjóneraður, meðan ein pensjónistur í 2045 kann vænta at liva 19,5 ár, eftir hann er vorðin 67 ár. Henda gongd viðførir, at demografiska samansetingin broytist soleiðis, at tað vera fleiri eldri í mun til yngri fólk.

*Talva 3: Framskriving av demografisku gongdini frá 2009-2050.*

| | 2009 | 2010 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **0-19** | 14.765 | 14.699 | 14.047 | 13.542 | 13.328 | 12.941 |
| **20-64** | 27.278 | 27.390 | 27.656 | 27.144 | 25.802 | 25.572 |
| **65+** | 6.914 | 7.070 | 8.954 | 11.100 | 13.056 | 13.309 |
| **Tilsamans** | **48.956** | **49.159** | **50.657** | **51.786** | **52.186** | **51.822** |
| **Indeks 65+** | **100** | **102** | **130** | **161** | **189** | **192** |

*Talva 4: Fleiri gerast veruliga gomul.*

| | 2009 | 2010 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **65+** | 6.914 | 7.070 | 8.954 | 11.100 | 13.056 | 13.309 |
| **80+** | 1.935 | 1.941 | 2.120 | 3.116 | 4.173 | 5.309 |
| **85+** | 920 | 952 | 1.105 | 1.486 | 2.212 | 2.905 |

Í talvu 3 og 4 sæst, at roknast kann við, at samlaða fólkatalið í Føroyum bert fer at veksa spakuliga komandi árini. Hinvegin kann roknast við, at aldurssamansetingin broytist nógv. Talið á ungum og miðalaldrandi verður nærum óbroytt, meðan talið á eldri veksur nógv. Fólkatalið yvir 65 ár veksur úr 6.914 upp í 13.309, meðan talið á teimum, sum eru yvir 80 veksur úr 1.935 upp í 5.309.




*Mynd 2: Tal av 65ára gomlum og eldri veksur skjótt.*




*Mynd 3: Arbeiðsfør í mun til 65ára gomul og eldri.*

Lutfallið millum fólk í arbeiðsførum aldri í mun til pensjónistar fellur munandi. Í dag eru 4 arbeiðsfør fyri hvønn pensjónist, í 2020 verða 3 arbeiðsfør fyri hvønn pensjónist, meðan tað í 2040 bert vera 2 í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist.

Nevnast kann eisini, at meðan tað í dag eru 14 arbeiðsfør í mun til fólk omanfyri 80 ár, fellur hetta talið heilt niður á 5 í 2050. Áhugin fyri gongdini í talinum av fólki, sum eru yvir 80, stendst av, at tað serliga er hesin bólkurin, sum krevur røkt, og sum tí er serliga útreiðslukrevjandi.

Samstundis sum ein kann staðfesta at fólk liva longri, so sæst eisini at fólk hava eina góða heilsu nógv longri upp í árini enn fyrr. Orsøkin er bæði, at fólk hava minni fysiskt slítandi arbeiði enn fyrr, men eisini at nýggjar medisinskar viðgerðir og skurðviðgerðir kunnu geva fólki bæði heilsu og lívsgóðsku aftur.

Tað, at fólk hava betri heilsu longur upp í árini, merkir, at tey eisini sum heild eru arbeiðsfør longur. Spurningurin, um nær fólk skulu fáa almenna pensjón, eigur tí eisini at vera tikin við, tá hugsað verður um, at gera eina nýggja pensjónsskipan.

# 6 Búskaparligar útgreiningar

## 6.1 Vaksandi útreiðslur til pensjón, sjúkrarøkt og eldrarøkt

Talva 5 vísir eina útgreinaða uppgerð av eldraútreiðslunum fyri árini 1998-2009.

*Talva 5: Almanna- og heilsuútreiðslur til fólk eldri enn 65 ár, í leypandi prísum, øll tøl eru í mió. kr.*

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heilsuútreiðslur** | **160** | **175** | **183** | **198** | **201** | **218** | **233** | **244** | **254** | **275** | **300** | **304** |
| *Sjúkraviðgerð* | 135 | 148 | 153 | 165 | 165 | 180 | 192 | 203 | 210 | 230 | 253 | 255 |
| *Sjúkrakassar* | 25 | 27 | 31 | 33 | 36 | 38 | 40 | 42 | 44 | 45 | 47 | 49 |
| **Almannaútreiðslur** | **459** | **488** | **536** | **576** | **623** | **653** | **674** | **716** | **766** | **831** | **909** | **939** |
| *Røktarheim* | 70 | 72 | 84 | 97 | 101 | 108 | 116 | 126 | 155 | 166 | 187 | 184 |
| *Heimarøkt* | 59 | 61 | 68 | 80 | 82 | 96 | 101 | 107 | 108 | 108 | 115 | 120 |
| *Ellisrøkt í Sandoynni* | 5 | 7 | 7 | 8 | 9 | 11 | 11 | 11 | 11 | 12 | 12 | 13 |
| *Ansingarsamsýning* | 6 | 7 | 7 | 7 | 8 | 10 | 11 | 10 | 12 | 11 | 14 | 15 |
| *Fólkapensión* | 262 | 282 | 312 | 320 | 354 | 359 | 365 | 372 | 372 | 382 | 393 | 400 |
| *Persónligt ískoyti* | 5 | 6 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| *Umsorganararbeiði* | 3 | 3 | 5 | 5 | 6 | 5 | 5 | 7 | 5 | 7 | 6 | 3 |
| *Pensión t. før. í Danmark* | 3 | 1 | 2 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| *Viðbót til ávísar pensiónistar* | 12 | 12 | 12 | 16 | 17 | 17 | 17 | 18 | 19 | 19 | 25 | 25 |
| *SAMEG* | 34 | 37 | 40 | 42 | 44 | 46 | 48 | 63 | 82 | 126 | 157 | 179 |
| **Almanna og heilsuútreiðslur íalt** | **619** | **663** | **719** | **774** | **824** | **871** | **906** | **960** | **1.020** | **1.107** | **1.210** | **1.244** |
| *Indeks vøkstur* | 100 | 107 | 116 | 125 | 133 | 141 | 146 | 155 | 165 | 179 | 195 | 201 |

*Viðmerking: Tølini fyri 1998-2008 eru roknskapartøl, og 2009 er játtan.*

Vaksandi talið av pensjónistum førir við sær, at almennar útreiðslur til fólkapensjónir og vælferðartænastur til eldri fara at økjast munandi.

Talva 6 vísir, at umleið helvtin av útreiðslunum fer til tænastuveitingar til eldri, meðan umleið helvtin av útreiðslunum fer til pensjónir.

*Talva 6: Almanna- og heilsuútreiðslur til fólk eldri enn 65 ár, í føstum prísum, øll tøl eru í mió. kr.*

| | 2009 | 2010 | 2015 | 2020 | 2025 | 2030 | 2035 | 2040 | 2045 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heilsuútreiðslur** | **304** | **311** | **351** | **394** | **441** | **488** | **543** | **574** | **591** | **585** |
| **Almannaútreiðslur** | **939** | **958** | **1.085** | **1.217** | **1.363** | **1.508** | **1.679** | **1.774** | **1.825** | **1.808** |
| *Fólkapensjónir* | 426 | 435 | 492 | 551 | 618 | 684 | 761 | 804 | 827 | 820 |
| *SAMEG* | 179 | 183 | 207 | 232 | 260 | 287 | 320 | 338 | 348 | 345 |
| *Aðrar almannaútreiðslur* | 335 | 339 | 386 | 433 | 485 | 537 | 598 | 632 | 650 | 644 |
| **Almanna og heilsuútreiðslur íalt** | **1.244** | **1.269** | **1.436** | **1.610** | **1.804** | **1.996** | **2.222** | **2.348** | **2.415** | **2.394** |
| *Indeks fyri tal av eldri fólki* | 100 | 102 | 115 | 130 | 145 | 161 | 179 | 189 | 194 | 192 |

### *6.1.1 Framskriving av eldraútreiðslunum í føstum prísum.*

Framskrivingarnar av útreiðslum til eldri eru í føstum prísum (tvs. í dagsins prísum) og við núverandi tænastustøði. Við øðrum orðum, at roknað er við sama tænastustøði hjá teimum eldru sum í dag. Hetta merkir at roknað er ikki við nýggjum heilsuviðgerðum og ikki við hækking av tænastustøðinum í eldrarøktini. Heldur ikki er roknað við realari hækking av pensjónunum.

At framskrivingin er gjørd í føstum prísum merkir, at roknað er við somu príslegu fyri alt tíðarskeiðið, og at útreiðsluvøksturin bert stavar frá vaksandi nýtslu. Fyri pensjónsupphæddirnar merkir fyritreytin um fastar prísir, at pensjónsupphæddirnar bert hækka í samsvar við prísgongdina og at eingir batar verða komandi árini.

Útreiðsluvøksturin vísir tí bert tann vøkstur, sum stavar frá vaksandi talinum av eldri fólki.

Heilsuútreiðslurnar til eldri svara til 40 prosent av øllum heilsuútreiðslum. Í kanningum í øðrum londum verður roknað við, at um 40-45 prosent av heilsuútreiðslunum stava frá heilsuviðgerð av eldri fólki.[5] Nógv bendir á, at hetta eisini er so í Føroyum, m.a. verður 40 prosent av øllum reseptskyldugum heilivági útskrivaður til fólk yvir 65 ár.

### *6.1.2 Eldraútreiðslurnar verða tvífalt so stórar, um talið av eldri fólki verður tvífaldað.*

Í talvu 6 eru eldraútreiðslurnar framroknaðar við talinum av eldri. Útreiðslugongdin vísir, at eldraútreiðslurnar verða um 30 % hægri í 2020, 60 % hægri í 2030 og næstan dupult so stórar í 2040. Eldraútreiðslurnar veksa við 1.150 mió. kr., úr 1.244 mió. kr. í 2009 upp í 2.394 mió. kr. í 2050.

Ein einfald tulking av úrslitinum av framskrivingini er, at veksur talið av eldri fólki til tað dupulta, so veksa útreiðslurnar til pensjónir og tænastur til eldri fólk eisini til tað dupulta.

Eitt annað úrslit er, at pensjónir og eldrarøkt longu í dag eru stórur partur av almennu útreiðslunum, og at um talið av pensjónistum veksur til tað dupulta, so fer hetta at tyngja munandi um skattabyrðurnar.

Ein spurningur sum ofta verður settur er, um tað er rímiligt at rokna við, at eldraútreiðslurnar fara at veksa proportionalt við talið av eldri fólki.

Fleiri mótgangandi tendensir ávirka hesa meting. Samstundis sum meðallivialdurin hækkar, sæst eisini at fólk eru fysiskt væl fyri upp í hægri aldur. Hetta kundi bent á, tað røktarútreiðslurnar (sjúkrarøkt, heimarøkt og ellisrøkt) ikki fara at vera dupult so stórar, sjálvt um talið av eldri verður dupult so stórt. Hinvegin er tað so, at talið av veruliga gomlum veksur sera nógv. Talið av teimum, sum eru yvir 80 ár, trýfaldast, meðan talið av teimum sum eru yvir 85 ferfaldast. Tað er serliga tann eldri bólkurin av pensjónistunum, sum hevur røktartørv, og tað er tí helst rætt, at rokna við, at røktarútreiðslurnar í øllum førum verða tvífalt so stórar sum nú.

Tvey onnur fyribrigdi gera, at ein má rokna við, at eldraútreiðslurnar pr. fólk verða hægri í framtíðini enn nú. So hvørt sum lønir hjá arbeiðandi fólki fer upp, so kemur eisini eitt krav um hægri pensjón. Veksandi realløn førir sostatt til eitt krav um, at pensjónirnar skulu geva vaksandi keypsorku.

Somuleiðis gera tøknilig framstig, at nýggj sløg av heilivági og heilsuviðgerðum koma fram. Hesir nýggju heilivágir og viðgerðir eru ofta dýrar, og bert tað at hesar viðgerðir eru til, ger at fólk ynskja, at heilsuverkið kann bjóða føroyingum tær. Gongdin, har heilsuútreiðslurnar veksa skjótari enn framleiðslan í samfelagnum annars, hevur verið at sæð í grannalondum okkara í nøkur ár.

Fyritreytin um, at eldraútreiðslurnar veksa proportionalt við talið av eldri fólki, er tí at rokna sum eitt minstamark fyri hvussu nógv, útreiðslurnar fara at vaksa.

## 6.2 Eldraútreiðslur í mun til BTÚ

Omanfyri er gjørd ein statisk meting av, hvussu nógv eldraútreiðslurnar økjast í framtíðini. Í hesum parti verða eldraútreiðslurnar roknaðar sum prosent av BTÚ.

Fyri at fáa eina greiðari mynd av hvussu vaksandi talið av eldri fólki ávirkar fíggjar- og búskaparviðurskifti má gerast ein framrokning av eldraútreiðslunum sum prosent av BTÚ.

BTÚ er virðið av samlaðu framleiðsluni og tí er vanligt at rokna skattatrýstið í mun til BTÚ, so ein sær hvussu nógv almennu tænasturnar og veitingarnar kosta sum part av samlaðu framleiðsluni í einum landi.

Ein framrokning av hvussu nógv eldraútreiðslurnar eru av BTÚ, lýsir tí fleiri týðandi viðurskifti.

Í fyrsta lagi vísir framrokningin fíggingarbyrðuna, nevniliga hvussu nógv prosent av samlaðu framleiðsuni í einum landi verður brúktur til eldraútreiðslur. Samstundis vísir framrokningin, hvussu nógv skattatrýstið má økjast fyri at varðveita verandi tænastustøði. Eitt annað sjónarhorn er, at framrokningin vísir, hvussu stórt hallið verður, um skattatrýstið ikki verður økt.

Í øðrum lagi vísir framrokningin, hvussu skjótt útreiðslurnar vaksa, so ein sær, hvussu stórur fíggingartrupulleikin hjá landskassanum verður við ymisk ár.

[5] Til dømis “Sundshedssektoren i tal” (2007) fra Ministeriet for sundhed og forebyggelse, www.sum.dk.

Í triðja lagi vísir framrokningin, um ætlaðu tiltøkini eru nóg munagóð til at halda pensjónsútreiðsluvøkstrinum niðri, so almennu kassarnir fáa nóg stórt rásarúm, so teir kunnu tryggja, at ellis- og sjúkrarøktartænasturnar kunnu haldast á einum hóskandi støði.

### *6.2.1 Fyritreytir fyri útrokningunum*

Talva 7 niðanfyri vísir fyritreytirnar fyri útrokningunum. Í appendix 2 eru útgreiningar um fyritreytirnar.

*Talva 7: Í framskrivingini er roknað við hesum fortreytum.*

| Variabul | Fyritreyt |
|---|---|
| Produktivitetsvøkstur | 2 % |
| Prísvøkstur | 1,5 % |
| Lønarvøkstur | 3,5 % |
| Prísvøkstur hjá almennum vørukeypi | 3,5 % |
| Pensjónsvøkstur | 3,5 % |

- Roknað er við sama tænastustøði sum í dag.
- Produktitetsvøksturin er settur at vera 2 prosent um árið. Av tí at roknað er við, at fólkatalið í arbeiðsførum aldri verður nærum óbroytt, so merkir hetta, at búskaparvøksturin eisini verður umleið 2 prosent.
- Lønarvøksturin er settur at verða 3,5 prosent, meðan inflatiónin er sett til 1,5 prosent.
- Sostatt verður árligi reallønarvøksturin 2 prosent. (Lønarvøkstur minus inflatión).
- Roknað er við, at pensjónssatsirnir veksa við 3,5 prosentum, tað sama sum lønirnar. Hetta merkir, at pensjónirnar verða lønarjavnaðar (hækka í sama mun sum lønir).

### *6.2.2 Útreiðslurnar hækka úr 10 % upp í 20 % av BTÚ*

Ein útrokning av eldraútreiðslunum sum prosent av BTÚ er ikki serliga ítøkilig, og tí kann vera torført at meta út frá hesum tali um, hvussu stórur fíggingartrupulleikin er einstøku árini.

Fyri at lýsa fíggingartrupulleikan betur, er eisini roknað út, hvussu stórt hallið verður á fíggjarlógini einstøku árini, so hvørt sum talið av eldri fólki veksur. Hallið á fíggjarlógini er roknað sum partur av metta BTÚ, í 2009 er tað uml. 13 mia. kr.

Eldraútreiðslurnar eru sum áður nevnt 1.244 mió. kr. Útgangsstøðið er sostatt, at eldraútreiðslurnar eru um 10 prosent av BTÚ.

*Talva 8: Hall á fíggjarlógin orsakað av vaksandi eldriútreiðslum.*

| | BTÚ í leypandi prísum | Eldra-útreiðslur | % av BTÚ | Hall á FL við BTÚ á 13 mia. |
|---|---|---|---|---|
| 2009 | 13.000 | 1.244 | 9,57 | - |
| 2010 | 13.514 | 1.317 | 9,74 | 22 |
| 2020 | 19.304 | 2.352 | 12,18 | 340 |
| 2030 | 26.804 | 4.113 | 15,34 | 751 |
| 2040 | 36.044 | 6.824 | 18,93 | 1.217 |
| 2050 | 50.539 | 9.812 | 19,42 | 1.280 |




*Mynd 4: Gongdin í eldraútreiðslunum.*

Í 2020 verður talið av pensjónistum umleið 30 prosent hægri, og eldraútreiðslurnar verða um 12,2 prosent av BTÚ. Uttan tiltøk verður hallið á fíggjarlógini um 340 mió. kr.

Í 2030 verður talið av pensjónistum 60 prosent hægri, og eldraðútreiðslurnar verða 15-16 prosent av BTÚ. Hallið á fíggjarlógini kemur tá upp á 751 mió. kr.

Í 2040 verður talið av pensjónistum 90 prosent hægri, t.e. nærum tvífalt so stórt sum nú, og eldraútreiðslurnar koma uppá 19 prosent av BTÚ. Hallið á fíggjarlógini er tá komið upp á 1.217 mió. kr.

Eftir hetta veksur talið av pensjónistum ikki longur so skjótt, og útreiðsluvøksturin flatar tí eisini út. Útreiðslustøðið hækkar upp móti 20 prosentum av BTÚ í 2050, svarandi til eitt hall á 1.300 mió. kr.

Seinastu árini hevur skattatrýstið í Føroyum ligið beint undir 50 % av BTÚ. Um eldraútreiðslurnar økjast frá 10 prosent til 20 prosent av BTÚ, so merkir hetta, at samlaða skattatrýstið veksur úr sløkum 50 prosentum upp í 60 prosent.

## 6.3 Nýskipan ella hægri skattatrýst

Eldraútreiðslurnar veksa so skjótt, at neyðugt er at gera stórar tillagingar. Ein møguleiki er at gera stórar hækkingar í skattatrýstinum, ein annar er at broyta pensjónsskipanina, ein triði er at økja um luttøkuna á arbeiðsmarknaðinum.

Í fleiri londum verður arbeitt við at bøta javnvvágina millum útreiðslur og inntøkur landskassans við at fáa fleiri at luttaka á arbeiðsmarknaðinum. Í Føroyum luttekur ein sera stórur partur av fólkatalinum í arbeiðsføra aldrinum á arbeiðsmarknaðinum longu, sum er. Luttøkan í Føroyum er millum tær hægstu í heiminum, og tað er ikki realistiskt at fáa luttøkuna nógv longur upp. Arbeiðsbólkurin hevur tí ikki gjørt meir við at kanna, hvussu ein kann fáa eina hægri arbeiðsluttøku í Føroyum.

### *6.3.1 Hægri eldraútreiðslur føra til nógv hægri skattatrýst og munandi verri almennar tænastur*

Ein beinleiðis niðurstøða er sostatt, at um einki verður gjørt fyri at tálma vøksturin í eldraútreiðslunum, so merkir ein so stór øking av talinum av eldri fólki, at ein má fremja sera stórar skattahækkingar.

Hinvegin er eyðsæð, at tey sum í framtíðini vera skattaborgarar, ikki eru noydd at gjalda eitt so høgt skattatrýst. Tað er ikki sannlíkt, at tey fara at góðtaka so stórar skattahækkingar sum skulu til fyri at varðveita tænastustøðið. Tað er hinvegin sannlíkt, at gongdin fer at føra til eitt munandi hægri skattatrýst, men tá skattatrýstið gerst ov høgt, so fer gongdin at føra til munandi skerjingar í tænastustøðinum.

### *6.3.2 Neyðugt at gera stórar broytingar av pensjónsskipanunum.*

Um ikki skatturin skal hækka og tænastustøðið lækka, er neyðugt, at gera stórar broytingar í pensjónsskipanunum. Í fyrsta lagi er neyðugt at broyta almennu pensjónirnar, m.a. við at hækka pensjónsaldurin, so færri pensjónsmóttakarar vera, og við at gera mótrokningarskipanina, so tey, sum hava góða inntøku, ikki fáa fulla pensjón. Í øðrum lagi er neyðugt at økja um persónligu uppsparingina, so allir borgarar við tíðini gjalda ein størri part av pensjónsútreiðslunum við uppspardari pensjón.

Við at minka um almennu útreiðslurnar til pensjón fáa almennu kassarnir møguleika at halda eitt nøktandi tænastustøði til ellisrøkt og sjúkrarøkt.

Ein onnur áhugaverd niðurstøða úr framskrivingini er, at samfelagið má leggjast um, tí nógv meira arbeiðsmegi í framtíðini má nýtast til eldrarøkt á stovni og til sjúkrarøkt av eldri. Almennir myndugleikar eiga tí beinanvegin at gera alla framtíðar ráðlegging við atliti til økta tørvin á øllum eldraøkjunum, m.a. at útvega nóg mikið av starvsfólki til sjúkrarøkt og eldrarøkt. (Sí annars leysliga meting í parti 6.3.4.)

### *6.3.3 Avbjóðingin er at gera nóg munagóð tiltøk í nóg góðari tíð.*

Føroyskir myndugleikar eru tríggjar ferðir áður byrjaðir at gera eina pensjónsnýskipan, seinast í 80árunum, í 1999, í 2002 og so aftur nú.

Tað er alneyðugt at fara undir broytingarnar og seta tær í verk skjótast tilber. Um tiltøkini vera útsett enn einaferð ella týðandi partar verða tiknir burturúr, so verður seinni neyðugt at gera stórar broytingar, til dømis

stórar skattahækkingar so brádliga, at hetta setur ein hvøkk í búskaparliga virksemið, og fólk fara at flyta av landinum.

Viðmerkjast skal tó, at nógv er hent seinastu árini, har arbeiðsmarknaðarpartarnir sjálvir hava tikið stig til uppspardar eftirlønir. Ein munandi partur av arbeiðsmarknaðinum er nú komin upp á eitt rímiliga høgt uppsparingarprosent í hesum tíðarskeiðinum.

### *6.3.4 Búskaparvøksturin kann ikki loysa fíggingartrupulleikan*

Ein spurningur sum ofta verður havdur frammi er, um ikki produktivitetsvøksturin fer at loysa fíggingartrupulleikarnar hjá almenna sektorinum, ið standast av vaksandi talinum av eldri fólki.

Ein stutt lýsing av árligu útreiðslugongdini vísir, at almenni inntøkuvøksturin ikki stendur mát við útreiðsluvøksturin. Tvørtur ímóti er tað so, at eldraútreiðslurnar fara at veksa nógv skjótari enn inntøkurnar. Gjøgnumgongdin er gjørd í realum støddum, t.e. uttan inflatión.

Um produktivitetsvøksturin er um 2 %, so verður reallønarvøksturin eisini 2 %. Sæð yvir eitt longri áramál sæst, at lønarparturin sum partur av BTÚ er hampuliga støðugur, t.e. um 65 %. Vanliga veksa lønirnar í privata sektorinum, tá produktiviteturin veksur. Lønirnar í almenna sektorinum veksa við umleið sama vøkstri sæð yvir longri áramál. Um hetta ikki var so, so hevði arbeiðsmegin flutt úr almenna sektorinum yvir til privata sektorin, og eingin hevði verið at røkt almennu uppgávurnar.

Vit hava sostatt tríggjar fortreytir:

1. Fyrsta er, at inntøkusíðan veksur við sama vøkstri sum produktivitets- og búskaparvøksturin, nevniliga 2 % um árið.
2. Onnur fortreytin er, at eldraútreiðslurnar til røkt veksa við reallønarvøkstrinum, nevniliga 2 % um árið, pluss vøkstrinum í talinum av eldri fólki nevniliga 3 % um árið, tilsamans 5 %.
3. Triðja fortreytin er, at skattafíggjaðu pensjónsútreiðslurnar veksa við vøkstrinum í talinum av eldri fólki, nevniliga 3 %, pluss roknaða reala vøkstrinum í pensjónsupphæddunum nevniliga 1 %, tilsamans 4 %.

*Talva 9: Í framskrivingini eru hesar tríggjar fortreytir nýttar.*

| Variabul | Frágreiðing um slag av vøkstri | Vakstrar-% |
|---|---|---|
| Inntøkuvøkstur | Produktivitetsvøkstur | 2 % |
| Eldraútreiðslur, røkt | Reallønarvøkstur pluss vøkstur í tali av eldri fólki, 2+3 % | 5 % |
| Eldraútreiðslur, pensjónir | Realur pensjónsvøkstur pluss vøkstur í tali av eldri fólki, 1+3% | 4 % |

Sum sæst, so veksa realu eldraútreiðslurnar meira enn dupult so skjótt sum realu inntøkurnar.

Sagt á annan hátt, so veksa almennu lønirnar eins skjótt og produktivitetsvøksturin í samfelagnum sum heild. Hinvegin so gerast røktartænasturnar ikki meira produktivar, og tí veksa útreiðslurnar til røktartænastur skjótari enn samlaða virksemið í samfelagnum sum heild. Við øðrum orðum so fara røktartænasturnar at vera ein støðugt vaksandi partur av virkseminum í Føroyum.

Talan er ikki um nakað serføroyskt fyribrigdi. Fortreytin um, at røktartænasturnar ikki gerast meira produktivar stendst av, at røktartænasturnar vanliga eru júst persónlig røkt og hjálp, har trupult er at ímynda sær, at nakað tól kann koma í staðin fyri.

Samansetingin av arbeiðsmegini má tí broytast munandi komandi árini. Neyðugt verður at økja starvsfólkatalið til eldrarøkt í sama mun, sum talið av eldri fólki fer at veksa.

Í 2020 verður talið av pensjónistum góð 30 prosent hægri enn í dag, í 2030 verður tað 60 prosent hægri, og miðskeiðis í 2040unum verður talið av pensjónistum 90 prosent hægri enn í dag.

Talið av røktarstarvsfólki og sjúkrarøktarstarvsfólki í eldrarøktini kann í dag leysliga metast til umleið 1.400. Sostatt má talið av røktarstarvsfólki økjast úr 1.400 upp í 1.820 í árunum fram til 2020, og upp í 2.660 ár 2040.

# 7 Pensjónsskipanir í Føroyum í dag

Hesin kapittul lýsir stutt verandi pensjónsskipanir í Føroyum.

Sigast kann, at skipanin, vit hava í Føroyum í dag, í ein ávísan mun er í tráð við ta trý-býttu skipan, ið Heimsbankin tilmælir. Í Føroyum liggur høvuðsvektin á súlu 1 (almannapensjónir):




*Mynd 5: Tær tríggjar súlurnar, sum Heimsbankin mælir til, eru allar at finna í føroysku pensjónskipanunum.*

Av tí at Heimsbankin mælir til, at pensjónsskipanir skulu gerast eftir einum leisti við trimum súlum, verða føroysku pensjónsskipanirnar lýstar við støði í eini samanbering við tær tríggjar súlurnar.

## 7.1 Súla 1: Almannapensjónir

Súla 1 er Almannapensjón, ið er skattafíggjað.

Almannapensjónirnar eru settar saman av:[6]

- Fólkapensjón
  - Grundupphædd
  - Viðbót
  - Viðbót til ávísar pensjónistar
- Útgjald úr SAMEG

Fólkapensjónin verður fíggjað beinleiðis yvir skattin. SAMEG verður fíggjaður av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, sum eitt inngjald frá arbeiðsgevara og arbeiðstakara. Inngjaldið er í mun til inntøkuna, meðan útgjaldið er eins í krónum til allar pensjónistar, uttan mun til hvussu nógv tann einstaki hevur goldið inn.

*Talva 10: Almannapensjónsupphæddir hjá støkum pensjónisti.*

| | SAMEG | Grund upphædd | Føst upph. til øll | Viðbót | Viðbót til áv. pensj. | **Til-samans** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996 | 0 | 3.982 | 3.982 | 735 | 0 | **4.717** |
| 2006 | 1.185 | 4.169 | 5.354 | 2.752 | 445 | **8.551** |
| 2007 | 1.860 | 4.169 | 6.029 | 2.862 | 463 | **9.354** |
| 2008 | 2.230 | 4.169 | 6.399 | 2.976 | 577 | **9.952** |
| 2009 | 2.500 | 4.169 | 6.669 | 3.065 | 594 | **10.328** |

[6] Les meira um almannapensjón á www.almannastovan.fo.

Talva 11: Almannapensjónsupphæddir hjá giftum pensjónisti.

| | SAMEG | Grund upphædd | Føst upph. til øll | Viðbót | Viðbót til áv. pensj. | **Til-samans** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996 | 0 | 3.164 | 3.164 | 584 | 0 | **3.748** |
| 2006 | 1.185 | 3.313 | 4.498 | 2.129 | 223 | **6.850** |
| 2007 | 1.860 | 3.313 | 5.173 | 2.215 | 231 | **7.619** |
| 2008 | 2.230 | 3.313 | 5.543 | 2.304 | 289 | **8.136** |
| 2009 | 2.500 | 3.313 | 5.813 | 2.373 | 297 | **8.483** |

Grundupphæddina í fólkapensjónini og SAMEG fáa øll omanfyri 67 ár útgoldna, uttan mun til um tey hava aðra inntøku. Viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar verða útgoldnar eftir ávísum inntøkutreytum. Ein fólkapensjónistur kann í 2009 forvinna 58.100 krónur uttan at verða mótroknaður í viðbótini. Av tí sum hann forvinnur omanfyri 58.100 krónur verða 60 prosent mótroknað í viðbótini.

Viðbótin til ávísar pensjónistar verður goldin til húsarhald. Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 60.000 kr., og at giftur pensjónistur, saman við hjúnafelaga, ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 80.000 kr.

### *7.1.1 Javning av pensjón*

Grundupphæddin í fólkapensjónini verður ikki javnað. Viðbótin og viðbót til ávísar pensjónistar verða javnaðar við 3 prosentum árliga frá 2009. SAMEG verður ikki javnað við nøkrum føstum satsi, men sum leiðreglu nýtir nevndin fyri grunnin, at veitingin í minsta lagi skal hækka við prístalinum. Seinastu árini hevur hækkingin av SAMEG verið hægri enn prístalshækkingin.

### *7.1.2 Skattur av pensjón*

Grundupphæddin í fólkapensjónini og viðbótin til ávísar pensjónistar eru ikki skattskyldugar, meðan viðbótin í fólkapensjónini og SAMEG eru skattskyldugar upphæddir.

### *7.1.3 Bruttofisering av pensjónini*

Fyri at kunna samanbera pensjónir við aðrar inntøkur er neyðugt at bruttofisera allar veitingarnar.[7] Hesar upphæddir síggjast í talvu 12:

Talva 12: Bruttofiserað pensjónsinntøka í 2009 í kr/mánað.

| | **Pensjón í dag aðrenn skatt** | **Pensjón í dag eftir skatt** | **Bruttofiserað pensjón aðrenn skatt** | **Bruttofiserað pensjón eftir skatt** |
|---|---|---|---|---|
| **Stakur** | 10.328 | 9.482 | 14.175 | 9.482 |
| **Giftur** | 8.483 | 7.828 | 11.169 | 7.828 |

Ein pensjónistur rindar sum nevnt ikki skatt av grundupphæddini og viðbótini til ávísar pensjónistar. Harumframt rindar ein pensjónistur heldur ikki gjald til SAMEG, ALS og barnsburðargrunnin. Hetta ger, at tøka inntøkan hjá pensjónistum er munandi hægri enn tann hjá løntakarum við somu bruttoinntøku.

Hesi tøl skulu lesast soleiðis, at tann upphæddin ein stakur pensjónistur fær netto um mánaðin, sum er 10.328 krónur í 2009, um hann fær fulla almannapensjón, svarar til eina inntøku eftir skatt á 9.482 kr. Skal ein vanligur løntakari fáa 9.482 kr. eftir skatt, skal hann forvinna 14.175 kr. um mð. svarandi til eina ársinntøku á 170.096 kr. Ein stakur pensjónistur hevur sostatt somu inntøku eftir skatt sum ein løntakari við inntøku á 170.096 kr. Ein giftur pensjónistur hevur somu inntøku sum ein løntakari sum forvinnur 11.169 kr. um mð. ella 134.029 kr. um árið.

[7] Bruttofisera vil siga, at rokna tær veitingar, ið eru skattafríar, um til tað tær svara til, um tær vóru skattskyldugar.

### *7.1.4 Pensjónsinntøkur í mun til inntøkur hjá øðrum samfelagsbólkum*

Í talvu 13 niðanfyri er inntøkan hjá pensjónistum samanborin við inntøkurnar hjá øðrum samfelagsbólkum. Fyrst er inntøkan eftir skatt um mánaðin roknað út, síðan eru inntøkurnar roknaðar sum prosent av eini arbeiðarainntøku.

*Talva 13: Yvirlit yvir inntøkur hjá pensjónistum, arbeiðsleysum, arbeiðara og miðal føroyingi í 2009.*

| | Stakur pensjónstur | Giftur pensjónistur | Stakur pensjó-nistur við egnari pensjón ella lønarinntøku á 4.814kr/mð | Hægsti arbeiðs-loysisstuðul | Arbeiðari | Miðal Løntakari |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Áðrenn skatt | 123.936 | 101.797 | 181.699 | 149.918 | 204.623 | 272.422 |
| Eftir skatt | 113.785 | 93.937 | 149.605 | 102.680 | 132.784 | 167.403 |
| Eftir skatt um mð. | 9.482 | 7.828 | 12.467 | 8.557 | 11.065 | 13.950 |
| Í prosent av arbeiðaraløn | 86 % | 71 % | 113 % | 77 % | 100 % | 126 % |

Sum víst í talvu 10 og 11 so eru pensjónirnar meir enn tvífaldaðar seinastu 12 árini. Hetta er framt við bæði at hækka viðbøturnar og við at hækka gjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Munurin á inntøkuni hjá pensjónistum og láglønarbólkum er nú sera lítil. T.d. hava arbeiðsleys minni eftir enn pensjónistar. Somuleiðis koma pensjónistar lættliga at hava meir eftir enn arbeiðarar, sum ikki arbeiða fulla tíð. Harumframt hava pensjónistar, sum hava eina lítla eftirløn ella sum arbeiða um 25 % arbeiðstíð, meir eftir enn arbeiðarar og aðrir láglønarbólkar.

Havast skal í huga, at pensjónistar eru í eini aðrari lívsstøðu enn aðrir bólkar í samfelagnum. Pensjónistar hava sostatt ikki útreiðslur til heimabúgvandi børn, og vanliga hava teir eisini nógv lægri bústaðarútreiðslur enn yngri familjur, sum enn hava stórar lánsútreiðslur.

Sum nevnt omanfyri eru pensjónirnar hækkaðar nógv tey seinnu árini, bæði við at hækka viðbøturnar og við at hækka gjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Politisku raðfestingarnar hava ført til eitt inntøkubýti, har pensjónistar í nógvum førum fáa hægri inntøku enn løntakarar, sum gjalda teirra pensjónir. Uttan mun til hvat ein annars heldur um hesa politisku raðfesting so má ásannast, at hendan gongdin ikki verður møgulig í framtíðini. Ein kann ikki rokna við, at láglønarbólkarnir taka undir við at gjalda meir skatt til pensjónir, sum gerast hægri enn teirra egna inntøka.

## 7.2 Súla 2: Persónlig eftirlønaruppsparing

Súla 2 er persónlig uppsparing til eftirløn, ið ein stórur partur av arbeiðsmarknaðinum hevur sum ein part av teirra starvssetan. Slíkar uppsparingar eru oftast ásettar við kollektivum sáttmálum. Tað eru eisini partar av fólkinum, sum ikki hava eina persónliga pensjónsuppsparing.

Stórir partar av arbeiðsmarknaðinum hava í dag eina persónliga pensjónsuppsparing sum part av teirra starvsetan. Arbeiðsgevari og/ella arbeiðtakari rinda ein part av lønini inn til eina pensjónsskipan. Sera misjavnt er, hvussu nógv løntakarar spara upp og hvussu leingi tey hava spart upp.

Í sáttmálunum, sum eru gjørdir á arbeiðsmarknaðinum sæst, at limirnir í flestu fakfeløgunum í dag rinda millum 6 og 18 prosent av lønini til eftirløn. Tó eru eisini stór feløg, sum gjalda enn minni. Ymiskt er frá sáttmála til sáttmála av hvørjari lønaruphædd eftirlønargjald verður goldið. Um tað er ásett í einum sáttmála, at t.d. 12 prosent verða goldin í eftirlønargjaldi, merkir tað vanliga ikki at 12 prosent vera spard upp til eftirløn, tí ein partur verður nýttur til ymsar tryggingar, so sum barnatrygging, óarbeiðsføristrygging og lívstrygging/ hjúnafelagstrygging.

Tað er ymiskt nær tey ymsu fakfeløgini eru byrjað at spara upp til eftirløn, men sigast kann, at nógv ikki eru byrjað av álvara fyrr enn tað seinasta 10-ára skeiðið, og hjá flestu feløgum er skipanin enn í eini menning, har inngjøldini hækka.

Sum nevnt frammanundan, er ymiskt, hvussu inngjaldið verður býtt millum eftirlønaruppsparing og ymsar tryggingar. Tá talan er um eina eftirløn í sambandi við starvsetan, er tað vanliga, at fakfeløgini hava gjørt avtalur við pensjónsfeløgini. Ymiskt er frá felag til felag, hvussu skipanirnar eru settar saman, og eisini kann tað vera eitt ávíst rásarúm hjá tí einstaka at velja samanseting sjálvur innanfyri nakrar ávísar karmar, sum eru ásettir í sáttmála millum fakfeløg og pensjónsfeløgini.

Eisini er ymiskt frá felag til felag hvat slag av eftirlønaruppsparing, ið goldið verður inn til. Vanliga verður skilt ímillum trý sløg av eftirlønaruppsparingum:

1. Lívlang veiting (lívrenta): Ein lívlang veiting verður útgoldin í mánaðarligum veitingum. Lívlanga veitingin verður útgoldin so leingi ein livir. Útgjalding verður skattað sum vanlig skattskyldug inntøka. Inngjøld kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni.
2. Lutauppsparing (ratuuppsparing): Ein ratuuppsparing verður útgoldin í ratum, í einum ávísum áramáli. Inngjøld kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Inngjaldið kann verða óavmarkað, sostatt fæst óavmarkaður frádráttur í skatti. Útgjald verða skattað sum vanlig skattskyldug inntøka.
3. Kapitaluppsparing: við eini kapitaltrygging verður samansparda upphæddin útgoldin í einum við eftirlønaraldur. Útgjaldingin kann sum høvuðsregla í fyrsta lagi fara fram við 60 ára aldri. Tað, ið verður inngoldið kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni, men eitt hægstamark er ásett fyri inngjaldi um árið. Tá útgoldið verður, skal gjaldast 35% í avgjaldi til Landskassan.

Ymiskt er hvørja útgjaldsskipan tey ymsu fakfeløgini hava, men allar tríggjar skipanirnar verða brúktar í dag.

## 7.3 Súla 3: Onnur frí uppsparing

Súla 3 er onnur frí uppsparing, sum er gjørd eftir egnum ynski. Hetta eru sjálvboðin inngjøld til eftirlønar-skipanir, sum hin einstaki tekur stig til. Vanliga verður hetta gjørt tí einstaki uppspararin hevur ein øðrvísi tørv enn skipanin, sum fakfelagið hevur skipað fyri. Høvuðsmunurin millum súlu 2 og 3 er, at uppsparingin verður framd sjálvboðið, og at tað er hin einstaki, ið tekur stig til uppsparingina.

# 8 Eftirlønarskipanir í øðrum londum

OECD hevur gjørt eina kanning av eftirlønarskipanum í limalondunum.[8] Hon vísir, at tað er sera torført at samanbera skipanirnar í ymsu londunum, tí tær eru so ymiskar og mangan fløktar í uppbygnaði - t.d. við aldursmørkum, ymsum reguleringum (í mun til bæði arbeiðsinntøku áðrenn eftirlønaraldur, aðra eftirlønar-inntøku og reguleringum frá ár til ár), skatting og sosialum gjøldum.

Flestu lond rundan um okkum hava innanfyri tað seinasta 10-ára skeiðið gjørt munandi broytingar á eftirlønar-økinum. Felagseyðkennini fyri hesar broytingar eru t.d., at spart verður í størri og størri mun upp í grunnum (t.d. í pensjónskassum), eftirlønargjøld verða skrásett á einstaklingar (bæði uppsparingar og samtíðarfíggjaðar skipanir) og aktuariska rættvísi í samtíðarfíggjaðu skipanunum verður styrkt – t.e. skapt verður størri samband millum inngjøld og útgjøld hjá teimum einstøku.

Fyri at lækka um samlaðu útreiðslurnar til almannapensjónir hava fleiri lond t.d. hækkað ella ætla at hækka pensjónsaldurin og broytt javningina av veitingunum, sum við tíðini fer at lækka um almennu útreiðslurnar. Talva 14 vísir fleiri av teimum londunum, sum hava gjørt broytingar í efterlønarskipanunum. Nevnd verða lond og árið, har nýskipan er framd á pensjónsøkinum.

*Talva 14: Broytingar í øðrum londum.*

| Land | Ár |
|---|---|
| Ísland | 1997 |
| Belgia | 1997 |
| Kanada | 1997 |
| Svøríki | 1999 |
| Týskland | 2001 |
| Frakland | 2003 |
| Italia | 2004 |
| Níðurlond | 2004 |
| Danmark | 2006 |

## 8.1 Skipanir í okkara grannalondum

Sigast kann at skipanirnar í okkara grannalondum eisini liva upp til tilráðingarnar frá Heimsbankanum, hóast tær eru ógvuliga ymiskar.[9]

### *8.1.1 Íslendska skipanin*

Pensjónsaldurin í Íslandi er 67 ár. Eftirlønarskipanin er ein trý-býtt skipan, ið líkist nógv skipanini, ið Heimsbankin mælir til við eini skattafíggjaðari almannapensjón, eini tvungnari persónligari eftirlønaruppsparing og eini fríari pensjónsuppsparing við skattafyrimuni.

Almannapensjónin er sett saman av eini grundupphædd og eini viðbót. Grundpensjónin svarar til áleið 15 prosent av eini miðal ófaklærdari løn, men saman við viðbót kann henda koma upp í 70 prosent. Viðbótin verður javnað í mun til aðra inntøku. Pensjónin er skattskyldug.

Í Íslandi var longu í 1974 ein tvungin pensjónsuppsparing ásett við lóg fyri allar løntakarar. Í 1997 vóru nakrar stórar broytingar gjørdar í hesi tvungnu uppsparing.

Onnur súlan er í dag ein áløgd persónlig eftirlønaruppsparing, ið verður sett í grunn. Allir løntakarar, arbeiðs-gevarar og sjálvstøðug eru áløgd at vera limir í einum pensjónskassa frá tí, tey eru 16 til 70 ár, og harvið eru tey við til at tryggja teirra egnu pensjón. Tað er álagt við lóg at gjalda inn í minsta lagi 12 prosent, sum skal dekka eina lívslanga veiting tá farið verður av arbeiðsmarknaðinum og eina lívslanga veiting við avlamni. Inngjaldið skal vera so stórt, at útgjaldið svarar til 56 prosent av miðalinntøkuni, um goldið er inn í 40 ár. Um 12 prosent ikki er nøktandi, so má inngjaldið hækkast.

Umframt tvungnu eftirlønaruppsparingina er ávísur møguleiki fyri at stovna sjálvbodnar skipanir við skatta-fyrimuni. Her er ikki krav um, at tær skulu útgjaldast sum lívlangar veitingar. Hesar kunnu útgjaldast frá 60 ára aldri, og skulu tá býtast yvir 7 ár. Um hon verður tikin út við 67 ára aldur, kann hon takast út øll í senn.

[8] ”Pensions at a glance – Public policies across OECD countries” OECD 2005.
[9] Tær norðurlensku pensjónsskipanirnar eru lýstar í ”Ålderspensionssystem i Norden” frá Nordisk Socialstatistisk Kommitté, 2008.

### 8.1.2 Danska skipanin

Danska eftirlønarskipanin byggir somuleiðis á tríggjar súlur, men er eitt sindur øðrvísi enn íslendska skipanin.

Fyrsta súlan er fólkapensjónin, ið er ein skattafíggjað almannapensjón, har aldursmarkið er 65 ár. Fólkapensjónin er sett saman av eini grundupphædd og eini viðbót og er skattskyldug. Viðbótin verður javnað í mun til aðra inntøku. Umleið 20 prosent av pensjónistunum fingu í 2006 alla fólkapensjónina, meðan heili 80 prosent hava aðra inntøku og ogn, sum ger, at fólkapensjónin verður minkað.

Í 2005 svaraði fólkapensjónin og ATP til áleið 45 prosent av brutto miðallønini hjá einum mannligum arbeiðara, ið arbeiðir fulla tíð. Netto eftir skatt er hetta talið nakað hægri og liggur um 55 prosent.

Sum eina avleiðing av hækkandi livialdri, er samtykt at hækka pensjónsaldurin, soleiðis at fíggingin av danska vælferðarsamfelagnum verður tryggjað. Samtykt er, at fólkapensjónsaldurin stigvíst verður hækkaður til 67 ár frá 2024 til 2027. Samstundis er samtykt, at frá 2025 verður pensjónsaldurin livitíðarindekseraður við støði í restlivitíðini hjá 60 ára gomlum, soleiðis at væntaða tíðarskeiðið við fólkapensjón skal verða 14,5 ár. Hetta vil siga, at hækkar miðallivitíðin, hækkar pensjónsaldurin.

Súla 2 er persónligar eftirlønaruppsparingar, sum er ein liður í eini starvsetan. Henda fevnir um ATP (arbejdsmarkedets tillægspensjon) og arbeiðsmarknaðarpensjónir.

ATP er ein tvungin arbeiðsmarknaðarskipan, har øll í arbeiði og arbeiðsleys, ið eru tryggjaði, spara upp til teirra ellispensjón. Goldið verður inn í mun til hvussu nógv ein arbeiðir, uml. 1% av lønini ella 3.000 kr. um árið. Útgjaldið er ein lívlang veiting og útgoldið verður í mun til hvussu nógv er goldið inn.

Útbreiðslan av arbeiðsmarknaðarpensjónum á privata arbeiðsmarknaðinum byrjaði við sáttmálunum í 1989. Arbeiðsmarknaðarpensjónirnar í Danmark eru skipaðar sum avtalur millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Flestu sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum hava ásetingar um inngjald til pensjónsuppsparingar millum 9 og 17 prosent. Ein stórur partur av dønum hava eina pensjónsuppsparing umframt ATP, nevniliga 90% av øllum fulltíðarsettum løntakarum.

Arbeiðsmarknaðarpensjónirnar vera vanliga útgoldnar sum lívlangar veitingar. Vanliga kann ein pensjónistur tó velja at fáa útgoldið ein part av uppsparingini sum eitt einnýtisgjald (kapitalpensjón). Umframt ellispensjón dekka arbeiðsmarknaðarpensjónirnar vanliga eisini óarbeiðsføristrygging umframt lívstrygging og barnapensjón.

Eitt úrslit av at skipa arbeiðsmarknaðarpensjónirnar sum avtalur millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum er, at ein partur av fólkinum ikki hevur egna pensjónsuppsparing. Hetta metti danska Vælferðarkommisjónin sum ein trupulleika í frágreiðingini hon gav út í 2006. Tí mælti Vælferðarkommisjónin til, at seta í verk eina kravda uppsparing til øll, ið ikki høvdu eina frammanundan og til tey, ið høvdu eina uppsparing, sum er lægri enn 6 prosent av bruttolønini. Mælt var til, at øll 6 prosentini skuldu fara til eina lívlanga veiting. Mælt var til, at allir persónar, sum hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin, umframt tey, ið fáa ymsar veitingar, skuldu vera fevnd av kravdu uppsparingini. Tó skuldu lesandi, ið fáa SU og fólkapensjónistar verða undantiknir.

Fyri at minka um trýstið á almennu útreiðslurnar og fyri at minka um fíggjarváðan hjá tí almenna við hækkandi livialdri, mælti Vælferðarkommisjónin til at áleggja við lóg, at ein ávísur partur av uppsparingini skal vera til lívlangar veitingar. Skotið var upp at í minsta lagi 70 prosent av eini uppsparing upp til 36.000 kr. um árið skuldi gjaldast inn til eina lívlanga veiting. Uppsparing omanfyri 36.000 kr. skuldi kunna setast í lívlangar veitingar, ratueftirlønir ella kapitaleftirløn.

Súla trý verður kallað privatar pensjónsskipanir. Hetta eru skipanir, sum tann einstaki sjálvboðin ger avtalu um við ein banka ella eitt tryggingarfelag. Hesar kunnu vera ískoyti til eina arbeiðsmarknaðarpensjón ella tær kunnu vera gjørdar av fólki, ið onga arbeiðsmarknaðarpensjón hava.

### 8.1.3 Svenska skipanin

Í Svøríki eru grundleggjandi broytingar av øllum pensjónsskipanum gjørdar. Hesar vóru gjørdar í 1999 og verða settar í verk í stigum til 2019. Allar eftirlønir eru skildar frá restini av almenna sektorinum, soleiðis at eftirlønarskipanin skal hvíla í sær sjálvari. Svenska skipanin byggir eisini á tær tríggjar súlurnar, ið Heimsbankin tilmælir.

Skipanin er í størstan mun samtíðarfíggjað – tvs. at útgjøldini leypandi verða fíggjað av inngjøldum í sama tíðarskeiði. Einans ein lítil partur verður spardur upp í grunnum. Inngjaldið er 18,5 prosent, býtt við ávikavist 11 prosent og 7,5 prosent millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar. Inngjøldini verða skrásett á tann einstaka inngjaldaran, og tá pensjónsútgjaldið verður útroknað, verður støði tikið í teimum samlaðu inngjøldunum hjá tí einstaka.

Útgjaldið byggir á tríggjar súlur. Fyrstu súluna kalla tey ”Garanti-pensjón”, og tryggjar hon øllum eina minimumsinntøku. Næsta súlan er ”Inntøku-pensjón”, har útgjaldið er í mun til hvussu nógv samlaða inngjaldið hevur verið. Hesar báðar pensjónirnar verða báðar útgoldnar sum lívlangar veitingar. Triðja súlan er tann einasta, ið verður spard upp í grunnum og er her talan um 2,5 prosent av teimum 18 prosentunum. Pensjónsaldurin er 65 ár.

Garanti-pensjónin verður javnað í mun til inntøku-pensjónina. Garanti-pensjónin fellur burtur stigvíst í mun til inntøku-pensjónina og er fallin heilt burtur hjá einum persóni, ið hevur haft eina inntøku omanfyri ein miðal arbeiðara í 40 ár. Pensjónin hjá einum arbeiðara við miðalinntøku, sum hevur arbeitt í 40 ár, er áleið 50 prosent av miðallønini.

At skipanin skal hvíla í sær sjálvari merkir, at hon regluliga verður stillað, soleiðis at haldførið verður varðveitt. Hetta kann t.d. gerast við at stilla pensjónsaldurin og/ella stilla inngjøld og útgjøld.

Vert er at leggja til merkis, at svenska skipanin skilir seg rættiliga nógv frá m.a. donsku skipanini, og verður útfrá einum búskaparligum sjónarmiði, mett at innihalda nøkur av teimum røttu lutunum. Hon er haldfør fyri hækking av livitíð, hon er aktuarisk rættvís – tvs. tað er tætt samband millum inngjøld og útgjøld hjá tí einstaka, og hon hevur innbygd insitament, sum eggja løntakarum til at vera sum longst á arbeiðsmarknaðinum.

## 8.2 Føroyska eftirlønaruppsparingin í mun til eftirlønaruppsparing í øðrum londum

Føroyska eftirlønaruppsparingin er vaksandi og táttaði í 2006 í 5 mia. kr. Av tí, at eftirlønaruppsparingin var á einum sera lágum støði frammanundan, so er eftirlønaruppsparingin vaksin nógv í prosentum seinastu árini.

Hinvegin er føroyska uppsparingin sera lítil, um hugt verður eftir uppsparing pr. íbúgva. Meðan danska og íslendska uppsparingin er 400.000 kr. pr. íbúgva, er føroyska uppsparingin bert 100.000 kr. pr. íbúgva.

Føroyska uppsparingin er eisini sera lítil máld í mun til BTÚ. Danska og íslendska uppsparingin er 130-140 % av BTÚ, meðan føroyska uppsparingin bert er um 45 % av BTÚ.

*Talva 15: Eftirlønaruppsparing í Føroyum, Danmark og Íslandi.*[10]

| | Føroyar | Danmark | Ísland |
|---|---|---|---|
| Eftirlønaruppsparing (mia. DKK) | | | |
| 2004 | 4,1 | 1.843 | 88 |
| 2005 | 4,5 | 2.154 | 122 |
| 2006 | 4,8 | 2.292 | 120 |
| Eftirlønaruppsparing (DKK/Íbúgva) | | | |
| 2004 | 84.896 | 339.724 | 292.662 |
| 2005 | 94.667 | 397.051 | 406.500 |
| 2006 | 100.563 | 422.488 | 399.680 |
| Eftirlønaruppsparing (í % av BTÚ) | | | |
| 2004 | 41,8 | 126,2 | 106,1 |
| 2005 | 45,5 | 138,8 | 119,1 |
| 2006 | 44,0 | 139,9 | 128,9 |

Vanliga verður roknað við, at tá uppsparingsskipanirnar hava virkað eitt nóg langt tíðarskeið so tær eru fult útbygdar, so er uppsparingin tvífalt so stór sum BTÚ. Føroyska uppsparingin er tí enn langt frá endaliga málsetninginum.

[10] Kelda: Landsbankin, Fíggjareftirlitið í Danmark, Fjármálaeftirlitið í Íslandi, Hagstofa Íslands í Íslandi.

# 9 Tilmæli um eina framtíðar pensjónsskipan

Vit hava í kapitul 5 sæð metingar, ið vísa demografisku gongdina fram til 2050. Eisini hava vit í kapitul 6 sæð búskaparligar metingar, ið vísa gongdina í almennu útreiðslunum til eldraøkið, um vit ongar broytingar gera. Harumframt hava vit í kapitul 8 sæð, hvussu onnur lond hava broytt teirra skipanir.

Niðurstøðan er, at fyri at varðveita eina fíggjarliga haldføra skipan mugu broytingar fremjast. Vit eru sein á sjóvarfallinum, men orðafellið sigur "at einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt" – her verður hugsað um, at vit kunnu hyggja eftir teimum broytingum onnur lond hava gjørt, læra av teimum og taka tað besta burturúr.

Hvat er ein góð eftirlønarskipan:

- Hvørjar eginleikar skal ein góð eftirlønarskipan hava?
- Hvørja vekt skulu tær ymsu súlurnar hava?
- Hvør skal hava almannapensjón og hvussu nógv?
- Hvussu skulu tær tríggjar súlurnar innrættast?
- Hvussu nógv skal sparast upp?
- Hvørji krøv skulu setast til inngjald og útgjald í uppsparingsfíggjaðum skipanum?

Í hesum kapitli verða einstøku partarnir av pensjónsnýskipanini gjøgnumgingnir. Uppskotið byggir á tær útgreiningar, sum eru gjørdar í kapitlunum 3-8 í hesi frágreiðing. Í parti 9.1. verður greitt frá, í hvussu stóran mun nýskipanin kann væntast at hjálpa um fíggingina av vælferðarsamfelagnum í framtíðini, og í parti 9.2. verður greitt frá ymsum generellum fyrilitum, ein eigur at hava í huga, tá ein skal samanseta eina hóskandi pensjónsskipan. Í parti 9.3 verður greitt frá uppskotunum til broytingar av almennu pensjónunum, og í parti 9.4 verður greitt frá uppskotunum til broytingar av lógarbundnu og fríu eftirlønunum.

## 9.1 Nýskipanin loysir meginpartin av fíggingartrupulleikunum

Sum áður nevnt, so skal hetta tilmælið lesast sum eitt samlað uppskot, sum hevur við sær, at tørvurin á almennum skattafíggjaðum pensjónum verður væl minni enn annars. Minkaðu útreiðslurnar til pensjón fara at gera tað møguligt hjá landskassanum at fíggja øktu útreiðslurnar til vælferðartænasturnar.

Um uppskotið verður framt í verki, er tað tó ikki nóg mikið til at forða skattahækkingum í framtíðini, men tað ger, at skattahækkingarnar vera munandi minni, enn tær annars høvdu verið. Tiltakið ger sostatt, at fíggjarpolitikkurin og skattafíggjaða pensjónsskipanin gerast munandi meira haldfør, enn tey eru í dag.

Hinvegin er inntrivið ikki nóg umfatandi til, at samlaða pensjónsskipanin er fult haldfør. Hóast uppskotið verður framt í fullum líki, fer vaksandi talið av eldri at føra til skattahækkingar. Verða øll tiltøkini í hesum uppskoti framd so:

1) verður útreiðsluvøksturin til skattafíggjaðar pensjónir tálmaður,
2) landskassin fær møguleika at gjalda stóru útreiðsluøkingarnar til eldrarøkt og sjúkrarøkt, og
3) skattahækkingarnar verða hildnar á einum støði, so roknast kann við, at framtíðar skattgjaldarar eru førir fyri at gjalda tær.

Tiltøkini loysa bert umleið 70 % av fíggingartrupulleikanum av vaksandi talinum av eldri fólki. Sí kapitul 10: Búskaparliga ávirkanin av pensjónsnýskipanini.

Tað er tí neyðugt, at øll tiltøkini í uppskotinum verða framd. Verða týðandi tiltøk tikin burturúr, versnar hallið á fíggjarlógini og fíggingartrupulleikarnir gerast munandi verri, enn verandi útrokningar vísa.

<u>Partar av uppskotinum kunnu tí ikki verða tiknir burturúr, uttan at onnur tiltøk verða framd</u>, ið tryggja eina eins stóra persónliga uppsparing, og eins stórar minkingar í skattafíggjaðu pensjónunum sum hetta uppskotið.

## 9.2 Málsetningar fyri nýggju pensjónsskipanina

### *9.2.1 Framtíðar pensjónsskipanin skal byggja á tríggjar súlur*

Mælt verður til, at framtíðar pensjónsskipanin skal byggja á tilmælið frá Heimsbankanum um trýbýti av pensjónsskipanini. Skipanin í dag byggir sum áður nevnt eisini á hesar tríggjar súlur. Mælt verður til at gera nakrar broytingar í verandi skipan, sum hava til endamál at konsolidera hana, so vit fáa eina fíggjarliga haldføra skipan.

Skipanin, ið verður mælt til, hevur tríggjar súlur við hvør sínum endamáli. Fyrsta endamálið er at fyribyrgja fátækradømi millum pensjónistum. Tað næsta endamálið er at tryggja teimum, ið kunnu spara upp til egna eftirløn ein rímiligan lønardekning, tá farið verður av arbeiðsmarknaðinum. Triðja endamálið er at tryggja smidleika, soleiðis at atlit kann takast til persónligan tørv og persónlig ynskir.

Lønardekningur er eitt týðandi hugtak í pensjónsútrokningum. Pensjónsuppspararar ynskja vanliga at fáa at vita, hvussu stór væntaða uppsparda pensjónin verður í prosent av endalønini (viðhvørt verður pensjónin uppgivin sum prosent av miðallønini í arbeiðslívinum). Lønardekningurin er, hvussu nógv prosent av lønini ein kann vænta at fáa í pensjón.

*Talva 16: Fígging og endamál hjá teimum trimum súlunum í pensjónsskipanini.*

| | **Súla 1**<br>**Almannapensjón** | **Súla 2**<br>**Lógarbundin uppsparing** | **Súla 3**<br>**Frí uppsparing** |
|---|---|---|---|
| **Endamál** | Fyribyrgja fátækradømi millum pensjónistar, við at geva øllum eina tryggjaða minstupensjón | At tryggja øllum pensjónistum ein ávísan lønardekning | At tryggja individuellan tørv og skapa fleksibilitet |
| **Fígging** | Skattafíggjað | Persónlig ella arbeiðsgevarafíggjað | Persónlig |

Verandi pensjónsskipan byggir sum heild á súlu 1. Eftir pensjónsnýskipanaruppskotinum skal ein størri partur av fíggingarbyrðuni hvíla á súlu 2.

### *9.2.2 Samlaði dekningsgradurin skal vera upp móti 60 %*

Eftirlønin í % av seinastu lønini verður nevnt dekningsgradurin. Tá ein persónur verður pensjóneraður, skal hann ístaðin fyri at liva av arbeiðsinntøku til at liva av eini pensjón. Uppsparing kann sigast at vera ein útsetan av nýtslu frá tíðini, tá ein forvinnur pengarnar til einaferð seinni í lívinum. Hvussu nógv skal/ynskir ein pensjónistur at hava at liva av? Útreiðslurnar eru kanska ikki tær somu, tá ein gerst eldri, og tí er kanska ikki neyðugt at hava eins nógv eftir at liva fyri, sum tá ein arbeiðir. Men annars er tað sjálvandi ymiskt, hvussu ein persónur ynskir at býta nýtsluna yvir lívið.

Høvuðsendamálið við pensjónsuppsparing er at tryggja fólki eitt rímiligt livistøði sum pensjónistar. Ein sera týðandi spurningur er tí, hvussu stór eftirlønin skal vera fyri, at vit kunnu siga, at tey hava eina rímiliga pensjón.

Tænastumannaeftirlønirnar hava fingið status sum fyrimynd, sum aðrar eftirlønir verða mettar upp í móti.

Tænastumannaeftirlønirnar geva 60 % í dekningsgradi av seinastu lønini, sum lívsvarandi veiting, um løntakarin hevur arbeitt í 37 ár sum tænastumaður. Tað er ikki realistiskt at rokna við, at løntakarar, sum hava so lítlar inngjaldingar til eftirlønarskipanir sum nú, eftir stuttum áramáli kunnu koma upp á eitt støði, sum tryggjar so góð eftirlønarviðurskifti sum hjá tænastumonnum.

Kortini verður ein eftirløn á 60 % av endaløn ofta tikin fram sum ynskilig, tá spurnarkanningar vera gjørdar millum pensjónsuppspararar. Fær løntakarin 60 % av endaløn í eftirløn, so kennir hann seg ikki at fara ov nógv niður í vælferð.

Fyri at fáa heildarmyndina, so er neyðugt at hyggja eftir, hvat almannapensjónin og uppsparda eftirlønin geva tilsamans. Við teimum fyritreytum, sum arbeiðsbólkurin hevur nýtt, geva almannapensjónin og uppsparda eftirlønin um 70 % av endaløn fyri láglønt og umleið 60 % av endaløn fyri miðalløntakarar. Síðst í parti 9.4.2 verður greitt frá, hvussu tað við pensjónsnýskipanaruppskotinum verður møguligt at koma upp á ein dekningsgrad á umleið 60 %.

## 9.3 Broytingar í súlu 1: almannapensjón

Almannapensjónin skal tryggja øllum pensjónistum eina minstuinntøku. Almannapensjónin verður soleiðis innrættað, at tey, sum hava mest brúk fyri henni, fáa mest, og tey, sum klára at spara upp sjálvi, fáa minni.

Í uppskotinum verður parturin, sum øll fáa, uttan mun til um tey hava eina góða inntøku, gjørdur minni. Parturin sum fólk bert fáa, um tey hava lítla ella onga inntøku verður gjørdur størri.

Almannapensjónin er tann størsti parturin av inntøkuni hjá flestu pensjónistum í dag og fer at vera tað í nógv ár framyvir. Men eftir hesum tilmæli, verður ein munandi partur av fíggingarbyrðuni við tíðini flutt frá skattafíggjaðu pensjónini (súlu 1) til uppsparingsfíggjaðu pensjónina (súlu 2). Sí Appendix 4.

Endamálið við broytingartilmælunum er at fáa eina fíggjarliga haldføra pensjónsskipan og at stimbra undir hugin at arbeiða hjá eldri fólki og somuleiðis at stimbra hugin at spara upp til eftirløn.

Mælt verður til, at gera tær 6 broytingarnarí talvu 17. Niðanfyri talvuna verður greitt frá teimum 6 broytingaruppskotunum.

*Talva 17: Mælt verður til at gera hesar broytingar í súlu 1: Almannapensjón.*

| **Broytingar í súlu 1: Almannapensjón** | | |
|---|---|---|
| **Nr.** | **Broyting** | **Útgreining** |
| 1 | Leggja viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman | Leggja viðbótina saman við viðbót til ávísar pensjónistar, soleiðis at bert ein viðbót verður. |
| 2 | Leggja grundupphædd og viðbót saman til eina fólkapensjón | Varðveita samlaðu upphæddina av grundupphædd og viðbót í fólkapensjónini, men leggja upphæddirnar saman, og gera tað møguligt at mótrokna í allari fólkapensjónini.<br>Varðveita SAMEG sum hann er í dag. |
| 3 | Gera allar almannapensjónir skattskyldugar, men geva ein frádrátt í skattinum | Gera allar almannapensjóninir skattskyldugar, og samstundis geva ein frádrátt í skattinum, so broytingin er inntøkuneutral fyri ein pensjónist, sum ikki hevur aðrar inntøkur enn almenna pensjón. |
| 4 | Broyta mótrokning í almannapensjónini í mun til aðra inntøku | Umskipa mótrokningina, so mótroknað verður við munandi lægri prosenti enn í dag. Eisini skal mótroknast frá fyrstu krónu og ikki bert av inntøku oman fyri 58 tús. kr. Á henda hátt fara fólk at varðveita hugin at arbeiða eftir 67. ár, um annars tey hava hug og orku. |
| 5 | Javna almannapensjónir við lønarjavning minus 1% | Lønarjavna pensjónirnar við lønarhækkingini minus 1%. |
| 6 | Livitíðarindeksera pensjónsaldurin | Livitíðarindeksera pensjónsaldurin – tað er at hækka pensjónsaldurin, so hvørt væntaða livitíðin hækkar. |

### *Til 1: Leggja viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman*

Fyri at gera tað lættari at kunna samanbera pensjónir við aðrar inntøkur og veitingar verður mælt til, at serliga viðbótin til ávísar pensjónistar verður avtikin og at vanliga viðbótin verður hækkað samsvarandi. Bæði viðbótin til ávísar pensjónistar og vanliga viðbótin verða goldnar til pensjónistar, sum ikki hava stórvegis inntøku. Ein tílík umlegging fær tí ongar fíggjarligar avleiðingar.

Um viðbótin til ávísar pensjónistar verður løgd saman við vanligu viðbótini slepst eisini undan sera óhepnu regluni við, at ein pensjónistur, sum forvinnur 1 krónu yvir 60.000 kr., missur alla viðbótina á slakar 7.000 kr. Pensjónistar hava sostatt einki insitament til at arbeiða meir, tá teir koma upp móti 60.000 kr., uttan so at teir kunnu arbeiða seg upp á eina inntøku, sum er um 150.000 kr. og uppeftir. Grundgevingin fyri at taka tílíkar tilvildarligar forðingar burtur er, at arbeiðsevnini og arbeiðshugurin hjá eldri fólki eigur at avgera um tey skulu arbeiða og ikki tilvildararlig mørk í skatta- og sosiallóggávu.

Viðmerkjast skal, at samanlegging av viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar bert verður gjørd fyri fólkapensjónistar. Aðrir bólkar, sum fáa sosialar veitingar, sum eru settar saman út frá folkapensjón, t.d. grundupphædd, viðbót ella viðbót til ávísar pensjónistar, vera ikki ávirkaðir av broytingunum fyri fólkapensjónistar.

### *Til 2: Leggja grundupphædd og viðbót saman til eina fólkapensjón*

Í talvu 18 sæst, at sum almannapensjónin er sett saman í dag, svara viðbøturnar til áleið 30 prosent av samlaðu almannapensjónini.

Mælt verður til at varðveita keypiorkuna av almannapensjónini hjá einum pensjónisti, ið onga aðra inntøku hevur, men at broyta samansetingina soleiðis, at viðbøturnar vera ein størri partur enn í dag. Harvið verður tann upphæddin, sum mótroknast kann í størri. So hvørt sum fólk fáa eina størri eginuppsparing, verða útreiðslurnar hjá landskassanum til pensjón samsvarandi minni.

Sum er, kann landskassin mótrokna í 31 prosentum av samlaðu pensjónini hjá giftum og í 35 prosentum av samlaðu pensjónini hjá støkum. Tað merkir, at ein kann fáa uml. 65-70% av skattafíggjaðu pensjónini útgoldin uttan mun til, um ein hevur sera høga egininntøku, og sostatt uttan mun til, um ein hevur tørv fyri hjálp frá tí almenna.

Upprunaliga var ætlanin at lækka grundupphæddina og hækka viðbótina, so mótroknast kundi í 70 prosentum av samlaðu pensjónini. Av tí, at SAMEG er hækkað so nógv seinastu árini, verður grundupphæddin so lítil, at tað av umsitingarligum orsøkum illa loysir seg at halda fast við grundupphæddina. Fyri ein stakan verður grundupphæddin 598 kr./mð, og fyri gift verður hon bert 45 kr./mð., og hetta er dýrt at umsita. Um ein hevur í huga, at útgjaldið hjá SAMEG støðugt økist, so hevði grundupphæddin í øllum førum verið avtikin eftir nøkrum árum.

Tí verður mælt til, at leggja grundupphæddina og viðbótina saman til eina samlaða upphædd, har mótroknast kann í allari upphæddini. Henda upphædd kann kallast fyri fólkapensjón.

Í framstíðini verður soleiðis bara ein fólkapensjónsupphædd, har mótroknast kann í øllum. Tann nýggja fólkapensjónsupphæddin svarar til at leggja grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman. SAMEG verður óbroytt, og mótroknast kann ikki í SAMEG, heldur ikki eftir pensjónsnýskipanina. SAMEG fer tí at virka á sama hátt, sum grundupphæddin ger nú, t.e. øll fara at fáa hana, uttan mun til, um tey hava aðrar inntøkur.

Henda broyting kann gerast eftir einum ári, so grundupphæddin verður løgd um til viðbót í 2010. Soleiðis kann mótroknast í ávikavist 71 prosentum av pensjónini hjá giftum og 76 prosentum av pensjónini hjá støkum í 2010.

*Talva 18: Núverandi almannapensjónir (2009).*

| | **Grundupphædd og SAMEG** | | **Viðbøtur** | | **Almannapensjónir tilsamans** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Giftur** | 5.813 kr. | 69 % | 2.670 kr. | 31 % | **8.483 kr.** | **100 %** |
| **Stakur** | 6.669 kr. | 65 % | 3.659 kr. | 35 % | **10.328 kr.** | **100 %** |

*Talva 19: Uppskot um broyting av býti millum grundupphædd og viðbøtur (2009).*

| | **Grund-upphædd** | | **SAMEG** | | **Gr. + SAMEG tilsamans** | | **Viðbót** | | **Viðbót t. ávísar** | | **Almanna-pensjónir tilsamans** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | kr. | % | kr. | % | kr. | % | kr. | % | kr. | % | **kr.** | **%** |
| **Giftur** | | | | | | | | | | | | |
| • Í dag | 3.313 | 39 | 2.500 | 29 | 5.813 | 68 | 2.373 | 28 | 297 | 4 | **8.483** | **100** |
| • Uppskot | 0 | 0 | 2.500 | 29 | 2.500 | 29 | 5.983 | 71 | 0 | 0 | **8.483** | **100** |
| **Stakur** | | | | | | | | | | | | |
| • Í dag | 4.169 | 40 | 2.500 | 24 | 6.669 | 64 | 3.065 | 30 | 594 | 6 | **10.328** | **100** |
| • Uppskot | 0 | 0 | 2.500 | 24 | 2.500 | 24 | 7.828 | 76 | 0 | 0 | **10.328** | **100** |

Viðmerkjast skal tó, at tað kann vera eitt sindur misvísandi at samanbera krónuupphæddirnar, tí meðan grundupphæddin í fólkapensjónini er skattafrí eru t.d. SAMEG og viðbótin skattskyldugar. Ein annar skeivleiki kemur, tá ein krónuupphædd verður flutt frá at vera skattafrí til at vera skattskyldug. Fyri at rætta uppá hetta, mugu upphæddirnar stillast, fyri at kunna samanberast. Tað verður gjørt í broytingaruppskoti trý.

### *Til 3: Gera allar almannapensjónir skattskyldugar, men geva ein frádrátt í skattinum*

Í dag er grundupphæddin í fólkapensjónini og viðbótin til ávísar pensjónstar skattafríar, meðan viðbótin og SAMEG er skattskyldugar. Mælt verður til at gera allar pensjónir skattskyldugar. Samstundis verður mælt til at geva ein frádrátt í skattinum, soleiðis at ein pensjónistur, sum bara fær almannapensjón, fer at hava tað sama eftir skatt sum í dag. Hetta er ein partvís bruttofisering av pensjónini.

Upprunaliga var ætlanin at umleggja skipanina við einari fullari bruttofisering. Ætlanin var at hækka pensjónirnar og lata pensjónistar gjalda vanligan skatt av sínum inntøkum. Um hetta var gjørt, hevði tað verið lættari at samanborið pensjónir og vanligar lønir. Tað hevur tó við útrokningum víst seg, at bruttopensjónirnar skuldu verið munandi hægri enn nú, um henda skipan var vald. Trupulleikin við stórum bruttopensjónum hevði verið, at tað verið sera torført at nýtt eina lagaliga mótrokningarskipan, so sum ætlanin er. Um pensjónirnar eru høgar (bruttopensjónir), og mótrokningin er lagalig (25%) so høvdu pensjónistar ikki verið fult mótroknaðir, fyrr enn inntøkan var komin upp á 5-600.000 kr.

Hóast ein bruttopensjónsskipan hevði verið ynskilig, so heldur arbeiðsbólkurin, at tað er meira týðandi at hava eina lagaliga mótrokningarskipan, fyri at tað skal loysa seg at arbeiða sum pensjónistur, og fyri at tað skal loysa seg at spara upp til eftirløn.

Við at gera almannapensjónir skattskyldugar gerast skattaviðurskiftini hjá pensjónistum meira lík teimum hjá øðrum borgarum. Arbeiðandi pensjónistar koma tí at gjalda ein marginalskatt, sum líkist meira tí, sum aðrir borgarar við somu inntøku skulu gjalda. Hetta fer at gagna landskassanum, og hjálpa til at gera tað møguligt at halda tænastustøðið.

Mælt verður til, at gera allar pensjónir skattskyldugar, og samstundis veita ein frádrátt í skattinum til allar pensjónistar á 21.707 kr./ár fyri støk og 15.453 kr./ár fyri gift í 2010.

*Útjavning millum land og kommunur:*
Umleggingin av skatti og pensjónum førir til eitt broytt inntøku- og útreiðslubýti millum land og kommunur.

Um ikki annað verður gjørt, so økjast útreiðslurnar hjá landskassanum, tí pensjónirnar hækka, meðan inntøkurnar hjá kommununum hækka, tí kommunurnar fáa meginpartin av skattinum hjá láginntøkunum. Samanlagt førir broytingin ikki til størri ella minni inntøkur fyri almenna geiran sum heild, tí inntøkur og útreiðslur hækka eins nógv.

Ein háttur at gera broytingina inntøkuneutrala fyri land og kommunur er, at lata hækkaða skattafrádráttin hjá pensjónistum vera ein skattafrádrátt í kommunuskattinum.

*Ójavni millum pensjónistar í ymsum kommunum:*
Um allar pensjónir verða gjørdar skattskyldugar, so fara sera ójøvnu kommunuskattaprosentini at gera, at pensjónistar í ymsum kommunum fara at hava ymisk livikor.

Arbeiðsbólkurin skal tí mæla til, at kommunuskattaprosentið hjá persónum yvir pensjónsaldur ongantíð kann vera yvir 20 prosent.

### *Til 4: Broyta mótrokning í almannapensjónini í mun til aðra inntøku*

Í dag kann ein pensjónistur forvinna 58.100 kr./ár (2009) uttan at verða mótroknaður í viðbótini. Av tí, sum hann forvinnur omanfyri 58.100 kr., verður hann mótroknaður 60 prosent. Hetta merkir, at pensjónisturin missir 6.000 kr. av viðbótini fyri hvørjar 10.000 kr., hann forvinnur omanfyri 58.100 kr. Av restinntøkuni - teimum 4.000 kr. sum eru eftir - rindar borgarin 27 prosent í skatti. Hetta merkir, at hann hevur minni enn 30 prosent eftir av tí inntøkuni sum fer upp um 58.100 kr./ár. Harumframt missir borgarin alla viðbótina til ávísar pensjónistar (7.000 kr./árið) um so er, at inntøkan fer upp um 60.000 kr./ár.

Verandi skipan førir sostatt til, at ein persónur, sum longu hevur forvunnið sær 59.999 kr., og sum velur at forvinna sær 60.000 kr. aftrat, bert hevur 8.000 kr. eftir av teimum eyka 60.000 kr. Hetta svarar til ein effektivan marginalskatt á 87 prosent.

Skipanin í dag førir til, at pensjónistar ikki arbeiða so nógv, sum hugur og orka eru til, men meira við atliti til í hvønn mun teir kunnu rokna við at missa av almennum veitingum, um teir arbeiða. Skipanin við einari so harðari mótrokning ger, at pensjónistar onki insitament hava at arbeiða frá inntøkum umleið 60.000 kr./ár til

120.000 kr./ár. Bert pensjónistar, sum hava inntøkur væl undir 60.000 kr./ár og pensjónistar við fullari inntøku á 120.000 kr./ár, hava nakað insitament til at arbeiða.

Mælt verður tí til, at mótrokningin verður lækkað úr 60% niður í 25%, soleiðis at tað altíð loysir seg at arbeiða og at spara upp til eftirløn. Mælt verður eisini til, at mótrokning byrjar frá fyrstu krónu soleiðis, at pensjónistar í øllum inntøkuflokkum hava sama insitament til at arbeiða, og soleiðis at tað ikki verða skattamørk og mótrokningarmørk, sum avgera, um pensjónistar vilja arbeiða, men heldur hugurin og orkan hjá tí einstaka pensjónistinum at vinna sær nakrar krónur og geva eitt ískoyti til samfelagið.




*Mynd 6: Pensjónsskipan í dag. Vísir hvussu samlaða inntøkan eftir skatt og mótrokning hjá einum stakum pensjónisti broytist, so hvørt sum egininntøkan hjá pensjónistinum veksur.*

Mynd 6 vísir, hvussu samlaða pensjóns- og arbeiðsinntøkan eftir mótrokning og skatt broytist, so hvørt sum pensjónisturin hevur egna inntøku. Myndin vísir sum omanfyri nevnt, at pensjónisturin nærum ongan vinning fær av at forvinna sær úr 60.000 kr./ár upp í 120.000 kr./ár.

Mynd 7 vísir, hvussu samlaða pensjóns- og arbeiðsinntøkan eftir mótrokning og skatt broytist, um mótrokningin verður 25 % samanborið við verandi 60 % mótrokning. Myndin vísir, at ein meira lagalig mótrokning ger, at pensjónistar í øllum inntøkuflokkum hava eitt insitament til at arbeiða.




*Mynd 7: Inntøka eftir skatt og mótrokning, áðrenn og eftir pensjónsnýskipan (Stakur).*

Í talvunum 20 og 21 eru gjørdar samanberingar millum verandi skipan og nýskipanaruppskotið. Talvurnar vísa sum áður nevnt, at nýggja skipanin ger, at pensjónistar í øllum inntøkuflokkum fara at hava insitament til at arbeiða.

*Talva 20: Inntøka eftir skatt og mótrokning, áðrenn og eftir nýskipan (Stakur).*

| Onnur inntøka enn almanna -pensjón kr./ár | Verandi almannapensjón | | | | Við broytingaruppskoti | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Grund-upphædd og SAMEG | Viðbøtur | Skattur | Inntøka eftir skatt og mótr. kr./mð. | SAMEG | Fólka-pensjón | Skattur | Inntøka eftir skatt og mótr. kr./mð. |
| **0** | 6.669 | 3.659 | 846 | 9.482 | 2.500 | 7.828 | 846 | 9.482 |
| **10.000** | 6.669 | 3.659 | 1.138 | 10.023 | 2.500 | 7.620 | 1.087 | 9.866 |
| **20.000** | 6.669 | 3.659 | 1.460 | 10.535 | 2.500 | 7.411 | 1.329 | 10.249 |
| **30.000** | 6.669 | 3.659 | 1.781 | 11.047 | 2.500 | 7.203 | 1.586 | 10.617 |
| **40.000** | 6.669 | 3.659 | 2.103 | 11.558 | 2.500 | 6.995 | 1.846 | 10.982 |
| **50.000** | 6.669 | 3.659 | 2.425 | 12.070 | 2.500 | 6.786 | 2.106 | 11.347 |
| **60.000** | 6.669 | 3.564 | 2.710 | 12.523 | 2.500 | 6.578 | 2.366 | 11.712 |
| **70.000** | 6.669 | 2.470 | 2.838 | 12.134 | 2.500 | 6.370 | 2.626 | 12.077 |
| **80.000** | 6.669 | 1.970 | 2.967 | 12.339 | 2.500 | 6.161 | 2.886 | 12.442 |
| **90.000** | 6.669 | 1.470 | 3.096 | 12.543 | 2.500 | 5.953 | 3.146 | 12.807 |
| **100.000** | 6.669 | 970 | 3.229 | 12.744 | 2.500 | 5.745 | 3.406 | 13.172 |
| **150.000** | 6.669 | - | 4.558 | 14.611 | 2.500 | 4.703 | 4.706 | 14.997 |
| **200.000** | 6.669 | - | 6.292 | 17.044 | 2.500 | 3.661 | 6.245 | 16.583 |
| **250.000** | 6.669 | - | 8.325 | 19.177 | 2.500 | 2.620 | 7.920 | 18.033 |
| **300.000** | 6.669 | - | 10.558 | 21.111 | 2.500 | 1.578 | 9.595 | 19.483 |
| **350.000** | 6.669 | - | 12.792 | 23.044 | 2.500 | 536 | 11.270 | 20.933 |
| **400.000** | 6.669 | - | 15.025 | 24.977 | 2.500 | - | 13.216 | 22.617 |

*Talva 21: Inntøka eftir skatt og mótrokning, áðrenn og eftir nýskipan (Giftur).*

| Onnur inntøka enn almanna -pensjón kr./ár | Verandi almannapensjón | | | | Við broytingaruppskoti | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Grund-upphædd og SAMEG | Viðbøtur | Skattur | Inntøka eftir skatt og mótr. kr./mð. | SAMEG | Fólka-pensjón | Skattur | Inntøka eftir skatt og mótr. kr./mð. |
| 0 | 5.813 | 2.670 | 655 | 7.828 | 2.500 | 5.983 | 655 | 7.828 |
| 10.000 | 5.813 | 2.670 | 885 | 8.431 | 2.500 | 5.775 | 896 | 8.212 |
| 20.000 | 5.813 | 2.670 | 1.193 | 8.957 | 2.500 | 5.566 | 1.138 | 8.595 |
| 30.000 | 5.813 | 2.670 | 1.514 | 9.469 | 2.500 | 5.358 | 1.379 | 8.979 |
| 40.000 | 5.813 | 2.670 | 1.836 | 9.980 | 2.500 | 5.150 | 1.620 | 9.363 |
| 50.000 | 5.813 | 2.373 | 2.158 | 10.195 | 2.500 | 4.941 | 1.861 | 9.747 |
| 60.000 | 5.813 | 2.278 | 2.443 | 10.648 | 2.500 | 4.733 | 2.120 | 10.113 |
| 70.000 | 5.813 | 1.778 | 2.571 | 10.853 | 2.500 | 4.525 | 2.380 | 10.478 |
| 80.000 | 5.813 | 1.278 | 2.700 | 11.058 | 2.500 | 4.316 | 2.640 | 10.843 |
| 90.000 | 5.813 | 778 | 2.829 | 11.262 | 2.500 | 4.108 | 2.900 | 11.208 |
| 100.000 | 5.813 | 278 | 2.957 | 11.467 | 2.500 | 3.900 | 3.160 | 11.573 |
| 150.000 | 5.813 | - | 4.558 | 13.755 | 2.500 | 2.858 | 4.460 | 13.398 |
| 200.000 | 5.813 | - | 6.292 | 16.188 | 2.500 | 1.816 | 5.777 | 15.206 |
| 250.000 | 5.813 | - | 8.325 | 18.321 | 2.500 | 775 | 7.452 | 16.656 |
| 300.000 | 5.813 | - | 10.558 | 20.255 | 2.500 | - | 9.271 | 18.229 |
| 350.000 | 5.813 | - | 12.792 | 22.188 | 2.500 | - | 11.504 | 20.163 |
| 400.000 | 5.813 | - | 15.025 | 24.121 | 2.500 | - | 13.737 | 22.096 |

Eitt rokniark verður lagt á heimasíðuna hjá Fíggjarmálaráðnum, har tað ber til hjá pensjónistum at útrokna sínu persónligu inntøku eftir skatt og mótrokning. Um ein setur inn persónligu inntøkuna frá arbeiði og eftirlønaruppsparing, so verður inntøkan eftir skatt og mótrokning útroknað.




*Mynd 8: Samanseting av inntøku eftir skatt og mótrokning við vaksandi egininntøku. Skatturin er býttur lutfalsliga í mun til tey 3 inntøkusløgini.*

*Samtíðarmótrokningarskipan og skiftiskipan:*
Í uppskotinum verður mælt til 25 % mótrokning. Ein skipan við mótrokning á 25 % frá fyrst forvunnu krónu ger, at eitt sera stórt tal av borgarum skulu mótroknast. Sum er, verður bert ein lítil partur av pensjónistunum mótroknaðir. Um øll arbeiðsvirkin skulu hava sína egnu uppspardu eftirløn, so má roknast við, at nærum øll skulu mótroknast sum frá líður.

Sum er verður øll mótrokning framd manuelt við umrokning av pensjónum. Hetta ger, at nógv arbeiði stendst av mótrokning. Harumframt fer umrokningin fram árið eftir inntøkuárið, so mótroknað verður í pensjónsviðbótini árið eftir inntøkuárið.

Mælt verður til at gera eina automatiska mótrokningarskipan, sum virkar á sama hátt sum samtíðarskattaskipanin. Fyrimunurin verður, at mótrokningin verður gjørd automatiskt og uttan pappírsarbeiði og at hon fer fram í sama ári, sum inntøkan verður forvunnin.

Tað tekur drúgva tíð at gera eina automatiska samtíðarmótrokningarskipan.

Inntil ein samtíðarmótrokningarskipan kann fáast til vega verður mælt til, at mótroknað verður við 30 % í allari inntøku yvir 24.000 kr. um árið. Ein tílík mótrokning ger tað neyðugt at mótrokna hjá munandi færri pensjónistum, enn um mótroknað verður frá fyrstu krónu.

*Mótrokning millum hjúnafelagar.*
Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin um mótrokning í pensjón hjá einum hjúnafelaga fyri inntøku hjá hinum hjúnafelaganum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað í nógvum førum kann vera sera óheppið, um mótroknað verður millum hjúnafelagar. Serliga óheppið er tað, tá aldursmunur er millum hjúnafelagar og tann hjúnarfelagin, sum er pensjónistur, verður mótroknaður fyri inntøku hjá hjúnarfelaganum, sum enn ikki er pensjónistur. Havast skal í huga, at viðbótin fyri gift verður 6.000 kr. um mánaðin, t.e. 72.000 kr. um árið. Eitt gift par, har aldursmunurin er sjey ár, fær sostatt eina hálva millión minni í pensjón í tey sjey árini tilsamans, enn eitt par sum livir saman sum sambúgvar.

Havast skal eisini í huga, at gift pør longu frammanundan fáa 40.000 kr. minni í pensjón um árið enn tvey, sum liva saman sum sambúgvar.

Tvey atlit eru at taka í mótrokningarspurninginum millum hjúnafelagar. Annað atliti er javnstøða millum ymsar hættir at liva saman. Arbeiðsbólkurin hevur ikki til uppgávu at gera nakað tilmæli um hendan spurning.

Hitt atliti er, í hvønn mun henda mótrokningin ávirkar arbeiðsútboðið og uppsparingarhugin. Arbeiðsbólkurin metir, at mótrokningin ávirkar arbeiðsútboðið og uppsparingshugin negativt.

Mælt verður tí til, at avtaka mótrokningina millum hjúnafelagar.

### *Til 5: Javna almannapensjónir við lønarjavning minus 1%*

*Vansar við verandi skipan.*
Í dag verða viðbøturnar í fólkapensjónini javnaðar við 3 prosentum um árið, meðan grundupphæddin ikki verður javnað. Henda skipan stavar upprunaliga frá tíðini áðrenn vit høvdu eitt nýtiligt prístal.

Viðbøturnar eru umleið 46 prosent av fólkapensjónini, og grundupphæddin er um 54 prosent. Ein javning av viðbótunum við 3 prosentum um árið svarar til, at samlaða fólkapensjónin verður javnað við 1,4 prosentum um árið.

Verandi skipanir, har lítil prísjavning hevur verið í skipanini, hevur ført við sær, at pensjónirnar hava staðið í stað í nógv ár, og síðani eru hækkaðar í stórum lopum, tí tær vóru komnar ov langt afturum gongdina í vanligu lønunum.

Arbeiðsbólkurin heldur tí, at tað er betri bæði fyri framtíðar pensjónistar og fyri almennu myndugleikarnar at fáa eina skipan, har lættari er at síggja, hvussu gongdin í upphæddunum verður í framtíðini, so tað verður lættari at ráðleggja fyri framtíðina, bæði fyri tann einstaka og fyri myndugleikarnar.

*Javningarskipan hjá SAMEG.*
Útgjaldið frá SAMEG hevur higartil í minsta lagi verið prístalsjavnað. Arbeiðsbólkurin hevur bert viðgjørt, hvørja javningarskipan er best at nýta til fólkapensjónina, men hevur ikki viðgjørt, hvør javningarskipan er hóskandi fyri SAMEG.

*Prístalsjavning mótvegis lønarjavning.*
Arbeiðsbólkurin hevur umhugsað, um tað er best at nýta eina skipan, sum byggir á prístalsjavning ella eina, sum byggir á lønarjavning.

At pensjónirnar vera prístalsjavnaðar merkir, at pensjónirnar vera hækkaðar, so hvørt sum kostnaðarstøðið hækkar, so pensjónistar fáa fult endurgjald fyri økingar í livikostnaðinum.

Vansin við prístalsjavning er fyri myndugleikarnar, at prístalið stundum hækkar knappliga orsakað av oljupríshækkingum. Við slíkum príshækkingum fylgir ofta búskaparlig afturgongd, og myndugleikar hava tí torført við at geva endurgjald fyri slíkar príshækkingar. Vanliga føra oljupríshækkingar til lækking í livistøðinum í øllum samfelagnum, sum bert verður vunnið inn aftur við lønarhækkingum komandi sáttmálaskeiðini.

At pensjónirnar vera lønarjavnaðar merkir, at pensjónirnar fylgja gongdini í lønarlagnum. Harvið fáa pensjónistar lut í tí produktivitetsvøkstri sum er í samfelagnum annars. Tað er helst eisini ein fyrimunur fyri myndugleikarnar, at pensjónsupphæddirnar ikki broytast so knappliga og so nógv, sum tær gera um pensjónsupphæddirnar vera prístalsjavnaðar.

Lønarjavning er ein dýrari háttur at javna pensjónir enn prístalsjavning fyri landskassan, tí yvir eitt áramál hækka lønirnar vanliga meir enn prístalið, soleiðis at reallønin hjá løntakarum hækkar. Fyri pensjónistin merkir hetta, at við prístalsjavning fær hann endurgjald fyri økingar í kostnaðarstøðinum, men hinvegin má roknast við, at lønirnar veksa skjótari enn prístalið, og tí merkir prístalsjavning, at munurin millum lønarinntøkur og pensjónir økist.

Sum áður nevnt so er gongdin í lønum meira jøvn enn gongdin í prístalinum. Ein skipan, sum byggir á lønarjavning, førir tí til, at lættari verður at gera ætlanir fyri framtíðina, enn um prístalsjavning verður nýtt.
Ein fyrimunur fyri myndugleikarnar er, at lønarjavning førir við sær, at pensjónir bert verða javnaðar í tann mun ein hevur framgongd í búskapinum og realllønunum.

*Tilmæli:*
Mælt skal tí verða til eina skipan, ið byggir á lønarjavning, men sum tó ikki veitir fulla lønarjavning av pensjónum.

Mælt verður til, at pensjónir verða javnaðar við lønarhækkingini hjá ófaklærdum arbeiðara frádrigin gjøld til egna eftirløn vm. minus eitt prosent. Mælt verður sostatt til, at javnað verður við hækkingini av útgoldnari løn hjá arbeiðara minus eitt prosentstig.[11]




*Mynd 9: Mynd av ymsum javningarprinsippum.*

[11] Av tí at mælt verður til, at almannapensjónirnar skulu javnast við lønarjavningini minus 1%, kann tað verða neyðugt, at endurskoða skipanina um 10-20 ár, soleiðis at politikarnar kunnu taka støðu til, um dekningsgradurin hjá pensjónistunum framvegis er hóskandi.

Í útrokningunum er roknað við lønarhækking á 3,5 % árliga, og við inflatión á 1,5 % árliga. Hetta svarar til, at reallønin hækkar 2 % árliga. Verða hesar fyritreytir nýttar til at javna pensjónirnar við, so hækka pensjónirnar við 2,5 % árliga. Verður inflatiónin á 1,5 % frároknað, so merkir hetta, at pensjónin realt veksur 1%. Undir vanligum umstøðum merkir hendan skipan, at pensjónsjavningin er eitt stað millum eina lønarjavning (sum hevði givið 3,5 %) og eina prísjavning (sum hevði givið 1,5%).

### *Til 6: Livitíðarindeksera pensjónsaldurin*

Síðan fólkapensjónin varð sett í verk í 1959, hevur pensjónaldurin verið 67 ár. Tá var restlivitíðin hjá 60ára gomlum um 18 ár (donsk tøl), t.e. fólk livdu umleið, til tey vóru 78 ár og livdu sostatt sum pensjónistar í umleið 11 ár. Pensjónsaldurin er framvegis 67 ár, men restlivitíðin hjá 60 ára gomlum er nú 22 ár, t.e. fólk liva, til tey eru 82 í meðal og liva tí nú 15 ár sum pensjónistar. Tá líður móti 2050 fara fólk væntandi at liva til tey eru 86 ár í miðal og koma sostatt at liva í 19 ár sum pensjónistar. Sostatt er væntaða pensjónstíðarskeiðið munandi longt og fer alsamt at gerast longri. Hetta leggur stórt trýst á almennu útreiðslurnar. Fyri at fáa eina fíggjarliga haldføra skipan verður mælt til at hækka pensjónsaldurin í mun til hækkandi restlivitíðina hjá 60 ára gomlum.

Um pensjónsaldurin hækkar, so hvørt sum restlivitíðin hjá 60 ára gomlum økist, so førir hetta við sær, at fólk fáa eins nógv ár sum pensjónistar í framtíðini, sum tey fáa nú.

Í altjóða metingum verður roknað við, at restlivitíðin hjá 60 ára gomlum økist við 1 ári fyri hvørji 10 árum orsakað av sunnari lívshátti og betri heilsuviðgerðarhættum. Uppskotið førir sostatt við sær, at pensjónsaldurin verður um 68 ár í 2017, um 69 ár í 2027, og 70 ár í 2037.

Uppskotið byggir á trinnar langtíðartrendir í heilsuni og arbeiðslívinum hjá fólki í framkomna heiminum. Fyrsti trendurin er, at livitíðin hjá fólki støðugt hækkar. Annar er, at eisini tann livitíðin, har fólk hava góða heilsu og eru væl fyri fysiskt, støðugt leingist. Fólk um 70 ára aldur eru munandi betri fyri nú enn fyri einum ættarliði síðani. Triði trendurin er, at støðugt færri arbeiðspláss krevja fysiskt tungt arbeiði, og at ein tí kann rokna við, at fólk kunnu arbeiða nøkur ár longur enn fyrr.

Undantøk eru sjálvandi, har ein ikki kann rokna við, at fólk kunnu arbeiða so langt áramál. Nevnast kunnu nógv arbeiði umborð á skipi, arbeiði á fiskavirkjum og tyngri arbeiði innan røkt. Tey, ið ikki kunnu røkja arbeiði av heilsuávum, hava í dag rætt til fyritíðarpensjón, og henda skipan verður í stóran mun nýtt av fólki sum hava havt tungt fysiskt arbeiði. Roknast má við, at framvegis verður brúk fyri hesi skipan. Komið er fram í fundum við áhugapartarnar, at málsviðgerðin er sera drúgv í málum, har søkt verður um fyritíðarpensjón, eisini hjá persónum yvir 60 ár. Arbeiðsbólkurin skal tí mæla til, at Almannaráðið kannar, um málsviðgerðin hjá 60 ára gomlum og eldri kann gerast lættari, enn hon er í dag.

Sæð yvir eitt longri áramál má roknast við, at prosentparturin av teimum, sum hava lætt fysiskt arbeiði, støðugt økist, og at tað tí verða færri, ið hava fyritíðarpensjón fyri neyðini. Sæð yvir eitt longri áramál verður talið á teimum, sum kunnu arbeiða aftaná 67 ára aldur, munandi størri enn í dag.

Fleiri lond hava knýtt miðallivialdur og pensjónsaldur saman, soleiðis at pensjónsaldurin hækkar við hækkandi miðallivialdri. Hesi eru t.d. Svøríki, Finland og Danmark. Men nevnast skal eisini, at hesi lond í dag hava ein lægri pensjónsaldur enn Føroyar.

Mælt verður til, at hækka pensjónsaldurin við 1 ári fyri hvørji 10 ár. Fyri at gera hækkingina rímiliga lætta at umsita, verður mælt til at hækka pensjónsaldurin við einum ári í senn. Pensjónsaldurin hækkar sostatt 0,5 ár í 2012, 0,5 ár í 2017, 0,5 ár í 2022, 0,5 ár í 2027 o.s.fr.

Í uppskotinum er pensjónsaldurin settur at hækka javnt uttan mun til, um livialdurin hækkar skjótari ella seinni, enn roknað er við. Tøl frá øðrum londum vísa, at livialdurin ikki hækkar javnt, men at hann hækkar í smærri og størri lopum, t.d. er restlivitíðin hjá 60 ára gomlum í Danmark hækkað 2 ár seinastu 10 árini. Hildið verður tí, at tað er betri frammanundan at fastleggja eina javna gongd í pensjónsaldrinum, so fólk kunnu leggja sær pensjónstilveruna til rættis heldur enn, at myndugleikarnir knappliga noyðast at hækka pensjónsaldurin óvæntað.

Um livialdurin verður nógv øðrvísi enn tað, sum roknað er við, ber altíð til hjá myndugleikunum at gera tillagingar av gongdini í pensjónsaldrinum eftir eitt áramál, tí um livialdurin ikki hækkar, so er ikki neyðugt at hækka pensjónsaldurin.

*Talva 22: Hækking av pensjónsaldri.*

| | Hækking av pensjónsaldri | Pensjónsaldur |
|---|---|---|
| 2010 | 0 | 67 |
| 2011 | 0 | 67 |
| 2012 | 0,5 | 67,5 |
| 2013 | 0 | 67,5 |
| 2014 | 0 | 67,5 |
| 2015 | 0 | 67,5 |
| 2016 | 0 | 67,5 |
| 2017 | 0,5 | 68 |
| 2022 | 0,5 | 68,5 |
| 2027 | 0,5 | 69 |
| 2032 | 0,5 | 69,5 |
| 2037 | 0,5 | 70 |
| 2042 | 0,5 | 70,5 |
| 2047 | 0,5 | 71 |

## 9.4 Broytingar í Súlu 2 og 3: Persónlig uppsparing og frí uppsparing

### *9.4.1 Tríggir vansar við verandi uppsparingarmynstri*

Tríggir stórir vansar eru við verandi lóggávu og uppsparingarmynstri. Fyrsti vansin er, at vit í Føroyum eru byrjað ov seint at spara upp til pensjón. Annar vansin er, at ov fá spara upp, og at nógvir av uppspararunum spara ov lítið upp. Triðji vansin er, at tann uppsparingin, ið fer fram, er soleiðis samansett, at hon ikki tryggjar uppsparárunum fíggjarliga trygg ellisár.

***1. Føroyingar eru byrjaðir ov seint at gera eftirlønaruppsparingar.***

Onnur lond hava gjørt eftirlønarreformar fyri langari tíð síðan og hava nú stóra eftirlønaruppsparing. Ísland og Danmark hava eftirlønaruppsparingar sum svara til 400.000 kr. fyri hvønn íbúgva, meðan føroyska uppsparingin bert er 100.000 kr. fyri hvønn íbúgva. (Talva 15 í kapitli 8).

Tann lítla uppsparingin ger, at vit í Føroyum noyðast at tryggja okkum, at tey, sum enn ikki eru komin í gongd við at gjalda inn til eftirlønaruppsparing skjótt koma í gongd, og at inngjaldsprosentið verður støðugt vaksandi.

***2. Fleiri samfelagsbólkar mugu fáa eftirlønarskipanir, ið byggja á uppsparing.***

Fleiri og fleiri samfelagsbólkar eru farnir undir persónligar eftirlønaruppsparingar seinnu árini. Tó eru framvegis nógv, sum als ikki gjalda ella sum gjalda alt ov lítið til eftirlønarendamál.

Ein stórur partur av løntakarunum hava persónligar eftirlønaruppsparingar, sum ein part av teirra setanartreytum. Tey flestu, sum hava tílíka avtalu, hava gjørt hana sum ein part av kollektivum lønarsáttmála, sum fakfelag teirra hevur gjørt við arbeiðsgevarasíðuna. Um løntakarar hava eina hóskandi eftirlønarskipan, er tí í stóran mun ein spurningur, um tey eru skipaði í fakfelag, og ein spurningur um, hvørt av fakfeløgunum tey eru skipaði í. Higartil hevur spurningurin um løntakarar hava eina hóskandi eftirlønarskipan tí verið ein spurningur millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Ein stórur partur av fakfeløgunum hava ella eru um at fáa eitt hóskandi uppsparingarprosent.

Tó eru enn nøkur fakfeløg, sum ikki eru komin rættiliga í gongd við at gjalda nakran munagóðan part av inntøkuni inn til eftirlønaruppsparing.

Tann bólkurin, sum stendur uttanfyri fakfeløg, hevur aloftast alt ov lítla ella als onga pensjónsuppsparing. Mett eftir donskum kanningum eru tað serliga fólk, ið arbeiða á smáum arbeiðsplássum í tænastuvinnum, sum ikki spara upp til eftirløn. T.d. kunnu nevnast hýruvognsførarar, handilsfólk í kioskum og smærri handlum, starvsfólk á matstovum og á gistingarhúsum.

Fólk, sum ikki hava fast tilknýti til arbeiðsmarknaðin, sum ikki hava fastlønt arbeiði og sum ofta eru uttan arbeiði, koma eisini at fáa eina ov lítla eftirlønaruppsparing. Hetta kunnu vera ófaklærd, sum ofta eru uttan arbeiði. Talan kann eisini vera um fólk, sum fáa fyritíðarpensjón, og sum í skiftandi mun hava eina inntøku umframt fyritíðarpensjónina. Somuleiðis kann vera talan um fólk, sum í longri tíðarskeið liva av sosialum veitingum.

Sjálvstøðug vinnurekandi hava ofta onga serstaka eftirlønaruppsparing. Um fyritøkan er nakað verd, so kann hon seljast, tá hin vinnurekandi nærkast pensjónsaldri, og hin vinnurekandi kann útvega eina eftirlønarskipan fyri peningin. Hinvegin kann eisini vera, at fyritøkan er lítið ella einki verd, og at hin vinnurekandi tískil onga pensjónsskipan hevur.

Á henda hátt verður tað altíð ein partur av fólkinum, ið onga uppsparing fer at hava.

***3. Føroyska uppsparingin má leggjast um til ratueftirlønir og lívlangar veitingar***

Stórur partur av føroysku eftirlønaruppsparingini er uppsparing í kapitaleftirlønir. Fýra stórir trupulleikar eru við hesum eftirlønum:

1. Fyrsti trupulleikin er, at kapitaleftirlønir kunnu koma til útgjaldingar við 60 ára aldur. Sostatt skundar henda eftirløn fólki at gevast tíðliga at arbeiða. Ein av málsetningunum við hesum eftirlønarreformi er at tilskunda fólki at vera longri á arbeiðsmarknaðinum. Eftirlønir, ið koma til útgjaldingar áðrenn 67 ára aldur, stríða tí beinleiðis móti teimum neyðugu tillagingunum av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

2. Annar trupulleikin er, at eingin trygd er fyri, at uppspardi peningurin verður nýttur at tryggja uppspararanum ellisárini við einari javnari inntøku. Uppspararin veit ikki, hvussu langa tíð hann ella hon eiga eftir og hevur tí kanska ongan pening eftir, tá fá ár eru farin.

3. Triði trupulleikin er, at kapitaleftirløn fær fullan frádrátt (ofta 57 %) við inngjald, men bert verður skattað við 35% við útgjald. Hetta merkir, at hóast kapitaleftirløn ikki tænir endamálinum um at geva uppspararanum eina varandi inntøku, so er hon hitt mest fyrimunarliga slagið av uppsparing.

4. Fjórði trupulleikin er, at fólk við miðal og góðari inntøku og sum hava fíggjarorku at spara upp til eina stóra eftirløn, gera hetta, men er talan um kapitaleftirløn, kunnu tey framvegis krevja fulla pensjón frá landskassanum.

Eitt av endamálunum við at umskipa eftirlønarviðurskiftini er at skipa so fyri, at fólk í framtíðini í høvuðsheitum fara at liva av egnari uppspardari eftirløn í eftirlønarárunum.

Útrokningar vísa, at við einum inngjaldsprosenti á 15 %, har 10 % verða goldin til eftirlønaruppsparing, har helvtin er lívlang veiting og helvtin er 15 ára ratueftirløn so gevur hetta eitt dekningsprosent av endalønini á umleið 30 prosent. Við einum so lágum væntaðum dekningsprosenti er ikki rúm fyri at lata uppsparing fara til aðrar eftirlønarformar enn lívlangar veitingar og ratueftirlønir.

Av tí at landskassin stuðlar eftirlønaruppsparing sera nógv, er tað týðandi, at uppsparingin veruliga fer til at tryggja, at fólk hava nakað at liva fyri í nógv ár eftir, at tey eru vorðin pensjónistar.

Fólk kunnu sjálvandi spara upp til kapitaleftirlønir um tey hava hug til tess, men tað er frá landskassans sjónarmiði ikki rætt, at landskassin stuðlar kapitaluppsparing við stórum frádrátt í inntøkuni og lágum skatti.

Kapitaleftirløn tryggjar ikki á nakran hátt, at uppspararin hevur nakað at liva av í nógv ár sum pensjónistur, og landskassin má tí rokna við at taka sær av øllum uppspararum við kapitaleftirløn, tá peningurin er uppbrúktur.

Niðurstøðan er, at av tí kapitaleftirlønin ger, at fólk framvegis koma at skula hava meginpartin av pensjónini frá landskassanum, hevur landskassin í framtíðini ikki ráð til at stuðla kapitaleftirløn.

### 9.4.2 Tilmæli til broytingar í súlu 2 og 3: Lógarbundin uppsparing og frí uppsparing

Í hesum parti verður greitt frá teimum 7 broytingunum í súlu 2 og 3, sum mælt verður til. Talva 23 niðanfyri vísir eitt yvirlit yvir tær 7 broytingarnar.

*Talva 23: Mælt verður til at gera hesar broytingar í súlu 2 og 3: Lógarbundin uppsparing og frí uppsparing.*

| Broytingar í súlu 2 og 3: Lógarbundin uppsparing og frí uppsparing | | |
|---|---|---|
| **Nr.** | **Broyting** | **Útgreining** |
| 1 | 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn | 15% av skattskyldugu inntøkuni skal gjaldast til uppsparingar og tryggingar. Kravt verður tó ikki, at inngjaldið er meira enn 80.000 kr. um árið. Inngjald yvir 15% ella 80.000 kr./ár er sjálvboðið.<br>Goldið verður eisini til eftirløn av inntøku, ið kemur í staðin fyri arbeiðsinntøku, sum t.d. ALS, barsilsgjald og somuleiðis av nøkrum fyritíðarpensjónsveitingum og forsorgarveitingum. |
| 2 | Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til uppsparing | Av teimum 15% er tað loyvt at keypa sær tryggingar. Onki krav er um hvussu nógv kann brúkast til tryggingar (t.d. óarbeiðsføristrygging, lívstrygging, hjúnafelagatrygging og barnatrygging.). Men málið er, at í miðal skulu 2/3 av inngjaldinum (t.e. minst 10 %) fara til uppsparing. |
| 3 | Útgjald frá almenna pensjónsaldrinum | Tann persónliga eftirlønaruppsparingin kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum (í løtuni 67 ár). |
| 4 | Í mesta lagi 10 % kapitalútgjald | 10 % av samlaðu uppsparingini kann gjaldast sum kapitalútgjald. Fyri lívlanga veiting svarar 1,5 árs veiting til umleið 10 % av kapitalvirðinum. 1,5 árs veiting kann útgjaldast av lívlangari veiting sum kapitalútgjald. Kapitalútgjald verður skattað við 45%. |
| 5 | Helvt um helvt av restini til lívlanga veiting og ratueftirløn | Av restini, minst 90 % av samlaðu uppsparingini, skal minst 50% nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár. Tó er ikki neyðugt at tekna eina lívlanga veiting, sum er størri enn arbeiðaraløn, pt. 214.000 kr. árliga. |
| 6 | Undantak fyri smáar eftirlønaruppsparingar | Er uppsparingin við pensjónsaldur minni enn 100.000 kr., kann hon øll gjaldast sum kapitalútgjald. Er uppsparingin minni enn 400.000 kr., kann øll uppsparingin gjaldast sum ratueftirløn. |
| 7 | Sjálvboðin uppsparing yvir 15 % | Kann uppsparast í ratueftirløn ella lívlanga veiting. Við útgjald kann í mesta lagi 20 % takast út sum kapitalútgjald. |

Mynd 10 niðanfyri vísir eitt yvirlit yvir súlu 2, lógarbundnu persónligu uppsparingina, og súlu 3, fríu uppsparingina, eftir pensjónsnýskipanina. Reglurnar fyri útgjalding av fríu uppsparingini eru nakað øðrvísi enn fyri lógarbundnu uppsparingina. Øll eftirlønargjøld, sum verða inngoldin við skattafrádrátti frá og við 2010 eru umfataði av nýggju reglunum.




*Mynd 10: Yvirlit yvir lógarbundnu uppsparingina (súla 2) og fríu uppsparingina (súla 3).*

### *Nr. 1: 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn*

Álagt verður øllum við lóg at gjalda eitt gjald til uppsparingar- og tryggingarendamál, sum í minsta lagi er 15 % av skattskyldugu inntøkuni. Kravt verður tó ikki, at inngjaldið er meira enn 80.000 kr. um árið. Upphæddin verður javnað við lønargongdini. Allar inngjaldingar til lógarbundnu uppsparingina fáa frádrátt sambært rentutryggingarlógini. Inngjaldingar yvir 15% ella 80.000 kr./ár eru sjálvbodnar.

Inngjaldast skal til eftirløn av allari skattskyldugu inntøkuni. Umframt løntakarar skulu eisini móttakarar av ymsum veitingum gjalda eftirlønargjald.

Eitt av høvuðsendamálunum við at gera eina lógarbundna persónliga eftirlønuppsparing er, at fáa teir løntakarar, sum ikki hava eina eftirlønartrygging, at fara undir eina slíka uppsparing. Orsøkin til hetta er oftast, at teir ikki eru í fakfelag. Harumframt eru nógvir løntakarar, sum gjalda ov lítið til eftirlønarendamál, tí teir eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin í styttri ella longri tíðarskeið. Fyri at teir ikki skulu fáa munandi lægri eftirløn við pensjónsaldur, verður álagt borgarum, sum fáa veitingar, sum koma í staðin fyri mista inntøku, at gjalda eftirlønargjald av hesum veitingum. Sum dømi kunnu nevnast fyritíðarpensjón, arbeiðsloysisstuðul, barnsburðarveiting, sjúkradagpening og aðrar líknandi veitingar. Harumframt kann eisini nevnast forsorgarveitingar, sum líkjast hesum veitingum.

Av tí at hesar veitingar vanliga eru smáar, má roknast við, at veitingarnar mugu hækkast við inngjaldsprosentinum, og at landskassin og ALS mugu seta pening av til hægri útreiðslur komandi 10 árini.

Tær stóru veitingarútreiðslurnar hjá landskassanum eru:

- Barnsburðarpeningur (uml. 15 mió. kr.) (landskassans arbeiðsgevarapartur)
- Sjúkradagpeningur (uml. 30 mió. kr.)
- Fyritíðarpensjón (uml. 250 mió. kr.)
- Forsorgarpeningur

Inngjaldið til pensjón verður 3% í 2010 og hækkar upp í tilsamans 15% í 2018. Leysliga mett hækka útreiðslurnar til veitingar við 5-10 mió. kr. i 2010, og upp í umleið 35 mió. kr. í 2018.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, um gjaldast skal til eftirløn av øllum fyritíðarpensjónum. Tveir høvuðsbólkar av fyritíðarpensjónistum eru. Teir fyritíðarpensjónistar sum ongantíð hava havt arbeiði, og teir sum hava havt arbeiði, men sum hava fingið verri heilsu seinni í lívinum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at av tí at talan er um eina arbeiðsmarknaðareftirløn, so eigur pensjónsgjald at verða goldið av teimum fyritíðarpensjónum, sum koma í staðin fyri mista arbeiðsinntøku.

Hinvegin heldur arbeiðsbólkurin ikki, at tað er ráðiligt at gera pensjónsskipanir fyri tey, sum einki tilknýti hava til arbeiðsmarknaðin og sum alt lívið fáa almannaveitingar.

Niðurstøðan er tí, at gjaldast skal ikki pensjónsgjald av øllum fyritíðarpensjónum. Arbeiðsbólkurin mælir til, at Almannaráðið við støði í høvuðsreglunum omanfyri ger nærri reglur um, hvørjar fyritíðarpensjónir skulu gjalda eftirlønargjald. Neyðugt er eisini, at Almannaráðið ger reglur um, hvussu inngjald skal veitast av nettoveitingum.

*Eisini sjálvstøðug vinnurekandi skulu gjalda eftirlønargjald:*
Øll sjálvstøðug vinnurekandi skulu gjalda eftirlønargjald, roknað sum omanfyrinevndu prosentpartar av skattskyldugu inntøkuni.

Nógv sjálvstøðug vinnurekandi hava onga eftirlønaruppsparing. Stundum so kann tann vinnurekandi selja eina fyritøku og kann sostatt nýta peningin at keypa sær eina pensjónsveiting, men ofta hevur fyritøkan einki søluvirði, tá tann sjálvstøðugi gevst. Lógarbundna uppsparingin skal tryggja, at eisini sjálvstøðug vinnurekandi fáa eftirlønartrygging.

*Eftirlit:*
Pensjónsveitarar kunna eina ferð árliga TAKS um eftirlønarinngjaldingarnar hjá einstaka uppsparanum.

TAKS hevur eftirlit við, at inngjaldið er rætt. Hetta gerast við, at samanbera skattskyldigu inntøkuna í árinum við inngjaldið til eftirløn hjá pensjónsveitanum.

*Skiftisskipan:*
Av tí at nógv ikki hava nakra eftirlønarskipan í dag, so er neyðugt at gera eina skiftisskipan, har minstainngjaldið verður hækkað ár um ár. Minstainngjaldið verður 3 % í 2010 og hækkar síðani stigvíst við 1,5 prosentstigum árliga, sum víst í niðanfyristandandi talvu 24.

*Talva 24: Inngjaldsprosent í skiftiskipan.*

| | Eftirlønargjald |
|---|---|
| 2010 | 3,0 % |
| 2011 | 4,5 % |
| 2012 | 6,0 % |
| 2013 | 7,5 % |
| 2014 | 9,0 % |
| 2015 | 10,5 % |
| 2016 | 12,0 % |
| 2017 | 13,5 % |
| 2018 | 15,0 % |

*Eftirlønarskipan kann veljast, tá ein kemur til pensjónsaldur.*
Við verandi skipan verður avgjørt longu við inngjald, hvussu nógv skal gjaldast til ratueftirlønir, kapitaleftirlønir og lívlangar veitingar. Tó kann ein áðrenn pensjónsaldur flyta frá kapitaleftirløn til ratueftirløn og víðari til lívlangar veitingar um ein ynskir tað. Hinvegin ber ikki til at flyta frá lívlangum veitingum til ratueftirløn og til kapitaleftirløn.

Við nýggju skipanini verður møguligt at spara upp eina ávísa upphædd til eftirløn og ikki býta uppsparingina sundur til ymsu eftirlønarskipaninar fyrr enn ein kemur til pensjónsaldur.

Tað verður somuleiðis møguligt at gjalda til eina lívsvarandi veiting frá tí ein byrjar at gjalda til eftirløn.

Tann, sum velur at spara upp í eina ósundurgreinaða uppsparing, skal, tá hann kemur til pensjónsaldur, velja, hvussu samansetingin av ymsu eftirlønarskipanunum skal vera. Tað er tó ein treyt fyri frádrátti sambært rentutryggingarlógini at valda samansetingin heldur seg innan fyri ávísar karmar.

Høvuðsreglurnar fyri samansetingini eru, at:
1) í mesta lagi 10 % av uppsparingini kann gjaldast út í einum sum eitt kapitalútgjald
2) fyri í minsta lagi 50 % av restini verður keypt ein lívlang veiting
3) ratueftirløn kann keypast fyri tann eftirverandi partin

Høvuðsgrundgevingin fyri at krevja, at ein ávísur partur skal vera ein lívlang veiting er, at uppsparda eftirlønin í ávísan mun kemur í staðin fyri fólkapensjónina, sum er ein lívlang veiting. Kravið, um at ein partur skal fara til lívlangar veitingar, er tískil grundað við, at ein á henda hátt kann tryggja, at øll hava nakað at liva fyri, eisini um tey verða 90 ár ella eldri.

Greitt verður nærri frá samansetingini av eftirlønum í pørtunum 4 og 5 í hesum kapitli.

### *Nr. 2: Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til uppsparing*

Av teimum 15% er tað loyvt at keypa sær tryggingar. Onki krav er til hvussu nógv kann brúkast til tryggingar, men málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum (t.e. minst 10%) fer til uppsparing.

Í teimum búskaparligu metingunum av pensjónsnýskipanini er roknað við, at 10% av teimum 15 inngjaldsprosentunum fara til uppsparing. Búskaparligu metingarnar eru í kapitli 10.

### *Nr. 3: Útgjald frá almenna pensjónsaldrinum*

Frádráttur verður bert veittur fyri inngjald til skipanir sum geva útgjald frá almenna pensjónsaldrinum (í løtuni 67 ár) og seinni. Landskassin eigur ikki at stuðla eftirlønarskipanum, sum fáa fólk at fara frá áðrenn 67. ár.

Tann persónliga pensjónsuppsparingin kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum. Um ein ynskir at bíða við at fáa eftirlønina útgoldna, er hetta møguligt. Tað er tó ein treyt, at persónurin ikki fær almenna fólkapensjón, meðan hann bíðar við at taka út sína egnu uppspardu eftirløn.

Henda fyritreyt er galdandi bæði fyri uppsparing eftir súlu 2 og súlu 3.

### *Nr. 4: Í mesta lagi 10 % kapitalútgjald*

Nakrir uppspararar spara upp í eini uppsparing, har ikki verður avgjørt fyrr enn við pensjónsaldur, hvussu uppsparingin skal býtast sundur á ymsu eftirlønarskipaninar. 90 %av hesi uppsparing skal nýtast til lívlanga veiting og ratueftirløn. Tó verður møguligt at fáa eitt kapitalútgjald uppá 10 % av samlaðu uppsparingini.[12]

Aðrir uppspararar gjalda til eina lívlanga veiting heilt frá ungum árum. Fyri lívlangar veitingar svarar 1,5 árs veiting til umleið 10 % av kapitalvirðinum. Fyri at javnseta uppsparing til lívlangar veitingar við aðrar uppsparingar verður loyvt teimum, ið spara upp til lívlanga veiting at fáa eina upphædd, sum svarar til 1,5 árs veiting útgoldna í einum við pensjónsaldur.

Insitamentið til at spara upp í lívlangar veitingar frá byrjan er tí ikki ávirkað.

Kapitalútgjaldið minkar um árligu útgoldnu eftirlønina, men kapitalútgjaldið má ikki minka um samlaða útgjaldstíðarskeiðið.

Broytingin merkir, at kapitaleftirlønin, sum vit kenna hana í dag, verður burtur, men loyvt verður at ein partur av samlaðu uppsparingini verður goldin út í einum við pensjónsaldur.

[12] Hetta er í samsvari við uppskot um broytingar í rentutryggingarlógini.

Sum nevnt fleiri ferðir fyrr, tryggja kapitaleftirlønir ikki, at pensjónistar hava ávís livikor í nógv ár. Tað eru bert ratueftirlønir og lívlangar veitingar, ið tryggja, at fólk hava nakað at liva av í fleiri fylgjandi ár eftir, at tey eru vorðin pensjónistar. Landskassin eigur tí bert at stuðla fólki í at gera eftirlønarskipanir, sum gera at fólk fáa tryggjað eina inntøku í fleiri ár, tá tey gerast pensjónistar.

Møguleikin fyri kapitalútgjaldi var ikki partur av upprunaliga uppskotinum til eina pensjónsnýskipan. Orsøkin til at mælt verður til, at ein partur framvegis kann gjaldast út í einum sum eitt kapitalútgjald, eru:

1. Av tí, at eingin kapitaleftirløn verður í framtíðini, er eitt stórt ynski frá fleiri av áhugapørtunum um at varðveita møguleikan fyri at fáa út eina kapitalupphædd, tá farið verður á pensjón. Arbeiðsbólkurin heldur, at um parturin, sum verður goldin í einum, er ein lítil partur so kann góðtakast, at kapitalútgjaldið er ein partur av samansettu eftirlønini, og at hetta í øllum førum er eitt munandi framstig í mun til verandi skipan.
2. Hámarkið á 10 % til kapitalútgjald ger, at ratueftirlønin og lívsvarandi veitingarnar ikki verða ov nógv útholaðar.
3. Skattur á 45% av útgjaldinum tryggjar, at landskassin ikki missir ov nógv í minni skattainntøkum.

Mælt verður til, at tað verður møguligt at fáa eitt kapitalútgjald uppá í mesta lagi 10 % av kapitalvirðinum av uppspardu lógarbundnu eftirlønini, og at kapitalútgjaldið verður skattað við 45 %.

### *Nr. 5: Helvt um helvt av restini til lívlanga veiting og ratueftirløn*

Minst 90 % av samlaðu uppsparingini er eftir, tá ein persónur hevur fingið eitt kapitalútgjald. Av restini, minst 90% av samlaðu uppsparingini, skal minst 50% nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár.

*<u>1. Býti millum eftirlønarskipanir fyri uppspararar við ósundurgreinaðari uppsparing.</u>*
Er uppspart til ósundurgreinaða uppsparing, so kunnu 10 % útgjaldast í einum, tá komið er fram til pensjónsaldur. Av restini skal minst 50% av kapitalvirðinum nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% kann nýtast til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár.

*<u>2. Býti millum eftirlønarskipanir fyri uppspararar, ið hava spart upp til lívlanga veiting frá byrjan.</u>*
Er uppspart til eina lívlanga veiting frá byrjan, so kunnu umleið 10 % gjaldast út í einum. Hetta verður gjørt við, at útgjald svarandi til 1,5 árs útgjøld av lívlangu veitingini kann gjaldast út í einum. Av tí at uppspart er til lívlanga veiting, uppfyllir uppspararin treytina um at minst 50 % av uppsparingini skal fara til lívlanga veiting.

*<u>3. Býti millum eftirlønarskipanir fyri uppspararar, sum bæði hava ósundurgreinaða uppsparing og uppsparing til lívlanga veiting.</u>*
Tað fara eisini at vera uppspararar, sum ein part av lívinum hava goldið til eina lívlanga veiting og ein annan part av lívinum hava goldið til eina ósundurgreinaða uppsparing. Hesir uppsparar kunnu fáa útgoldið 10 % í einum, av ósundurgreinaðu uppsparingini og 1,5 árs gjald í einum, av lívlangu veitingini.

Av tí sum eftir er, nevniliga ein lívlang veiting og ein ósundurgreinað uppsparing, skal virðið av lívlangu veitingini vera í minsta lagi eins stórt sum virðið av tí, sum verður goldið til ratueftirløn. Hetta er torført at gera hetta á ein hátt, sum øll meta vera objektivt rættur.

Trupulleikin er, at ein uppsparing til eina lívrentu ikki hevur nakað neyvt ásett virðið, júst tí tað er ein rættur til eina veiting. Tað er tó møguligt at gera sundurbýtið so neyvt, at tað er nóg gott at tryggja ætlanina við hesi lóg.

Ásett verður tí, at árliga útgjaldið av lívlangu veitingini skal vera eins stórt sum árliga gjaldið frá ratueftirlønarpartinum, um roknað verður við eini ratueftirløn yvir 15 ár.

Eitt tílíkt sundurbýti tryggjar, at umleið helvtin av uppsparingini fer til lívlanga veiting og umleið helvtin fer til ratueftirløn.

*Størri fleksibilitetur við samanseting av eftirlønarskipan*
Í mun til tey fyrstu uppskotini verður ikki heilt so nógv av uppsparingini sett av til lívlangar veitingar við verandi uppskoti. Møguligt verður nú eisini at keypa lívlangu veitingina, tá komið er fram móti pensjónsaldri. Tað er tí ikki neyðugt at gjalda inn til lívlangu veitingina frá byrjan.

Hendan loysnin er vald at trimum høvuðsorsøkum:

Fyrra er, at fleiri fakfeløg vóru sera nógv ímóti lívlangum veitingum, tí inngjald til lívlangar veitingar ikki fellur aftur til familjuna, um uppspararin doyr. Fleiri fakfeløg vóru ímóti at gjalda til lívlanga veiting frá byrjan.

Arbeiðsbólkurin hevur tí valt at broyta uppskotið soleiðis, at hin einstaki ikki tørvar at keypa lívlangu veitingina fyrr enn við pensjónsaldur. Harvið varðveitir familjan ognarrættin til alla uppsparingina líka til pensjónsaldur. Tá uppspararin kemur til pensjónsaldur, kann ein partur gerast til ratueftirløn, og hesa uppsparing varðveitir familjan ognarrættin til. Minst helvtin skal tó gjaldast til eina lívlanga veiting. Í arbeiðinum hava tryggingarfólk greitt frá, at til ber eisini at keypa eina trygging til lívlangu veitingina, soleiðis at familjan fær eina upphædd um uppspararin doyr. Henda trygging kostar tó í útgjaldinum.

Samanumtikið hevur arbeiðsbólkurin lagað seg nógv eftir ynskinum hjá fakfeløgunum, um at familjan skal varðveita ognarrættin til uppsparingina.

Í øðrum lagi hevur arbeiðsbólkurin ynskt, at kapping skal vera um uppsparingina. Tey fyrstu uppskotini hjá arbeiðsbólkinum, har ætlanin var, at stórur partur av uppsparingini skuldi fara til lívlangar veitingar longu frá ungum árum, hevði ikki ført til stóra kapping um uppsparingina, tí bert tryggingarfeløg kunnu veita lívlangar veitingar. Møguleikin fyri at keypa lívlangu veitingina, tá ein er komin fram til pensjónsaldur, ger, at peningastovnar eisini kunnu kappast um eftirlønaruppsparingina.

Í triðja lagi so heldur arbeiðsbólkurin, at hesar tillagingar gera tað lættari hjá tí einstaka at fáa ta eftirlønarsamanseting, sum hann sjálvur ynskir. Tað er bæði møguligt at gjalda inn til eina lívrentu frá ungum árum, og somuleiðis ber til at varðveita fleksibilitetin og ikki velja eftirlønarskipan fyrr enn ein kemur fram móti pensjónsaldri.

*Hámark fyri lívlangar veitingar:*
Nakrir fáir persónar við sera stórum inntøkum kunnu, um teir ikki ansa eftir, fáa eina so stóra eftirlønaruppsparing, at kravið um, at helvtin av upphæddini skal nýtast til eina lívlanga veiting, fer at føra til, at uppspararin fær eina óneyðuga høga lívrentu. Tað er tí gjørd ein regla um, at tað er ikki neyðugt at tekna eina lívlanga veiting, sum er størri enn ein arbeiðaraløn, pt. 214.000 kr. árliga.

Viðmerkjast skal, at um ein persónur ikki sparir meira upp enn í mesta lagi 80.000 kr./ár , sum er hægst kravda inngjaldi, so fær uppspararin ikki eina uppsparing, sum fer at geva ein lívlanga veiting uppá meir enn eina arbeiðaraløn.

*Tann persónliga uppsparingin skal veita einstaka uppsparanum eitt rímiligt pensjónsútgjald:*
Tryggjast skal, at eftirlønaruppsparingin gevur ein hóskandi dekningsgrad av endalønini.

Fyri at fáa eina hóskandi eftirløn er neyðugt, at inngjaldið til eftirlønaruppsparing og tryggingar tilsamans er í minsta lagi 15 % av lønini. Útrokningar vísa, at um 10 prosent av lønini verða goldnar inn til eftirlønaruppsparing í einum arbeiðslívi, og uppsparingin verður býtt í helvt til lívlanga veiting og 10-ára ratueftirløn, so verður uppsparda eftirlønin umleið 35 prosent av seinastu lønini.

Verður ein skipan sett í verk, har allir løntakarar gjalda 10 prosent av lønini til eftirlønaruppsparing, so gevur hetta eftir 40 ára uppsparing umleið 35 prosent í dekningsgradi. Um SAMEG og fólkapensjónin (ella partur av henni) verða løgd aftrat, er møguligt at koma nakað upp um 50 %.

Fyri lægru lønirnar verður dekningsgradurin um 60-70 %, tí SAMEG og fólkapensjónin føra til eina góða hækking av dekningsgradinum. Fyri hægru lønirnar verður dekningsgradurin í minna lagi, tí SAMEG og fólkapensjónin geva lítlan dekning í mun til eina høga inntøku. Um uppspararin ynskir ein góðan dekningsgrad, so er meira neyðugt hjá teimum við høgari inntøku at tryggja sær eina góða eftirlønaruppsparing.

Fyri fólk, sum hava lága løn og eitt langt arbeiðslív, geva 15 prosent í eftirlønarinngjaldi eina hóskandi lønardekning um ein roknar við, at ein í framtíðini fær eitt sindur afturat í fólkapensjón og eitt sindur frá SAMEG.

Fleiri bólkar eru tó, sum hava fyri neyðini at gjalda meir enn 15 prosent í eftirlønargjaldi:

- Fyri fólk, sum hava langar útbúgvingar og tí eitt stutt arbeiðslív, er 15 prosent í eftirlønargjaldi ikki nóg mikið, serliga ikki um hugsað verður um, at fólk við longum útbúgvingum ofta hava hægri løn enn miðal.
- Fiskimenn hava ofta góða hýru í eitt tíðarskeið, men kunnu av heilsuávum ikki altíð liva eitt heilt arbeiðslív sum fiskimenn. Teir fara í nógvum førum at hava tørv á hægri inngjaldi enn 15 prosent.
- Kvinnur, sum eru ein munandi part av lívinum heima og ansa børnum, fáa aloftast eisini ein ov lítlan dekningsgrad, um tær bert gjalda 15 prosent av lønini til eftirløn.

15 prosent er tí bert eitt minstamark, og roknast má tí við, at nakrir bólkar fara at gjalda meir til eftirløn enn tey lógarásettu 15 prosentini.

Í appendix 4 verður nærri greitt frá um dekningsgradir.

***Nr. 6: Undantak fyri smáar eftirlønaruppsparingar***

Er tann samlaða uppsparingini minni enn 100.000 kr. við pensjónsaldur, kann hon øll gjaldast sum kapitalútgjald. Er tann samlaða uppsparingini minni enn 400.000 kr. við pensjónsaldur, kann øll uppsparingin gjaldast sum ratueftirløn.

Hetta verður gjørt fyri at minka um umsitingarkostnaðin av nýggju eftirlønarskipanini. Til dømis loysir tað seg ikki at gera lívlangar veitingar fyri helvtina av 400.000 kr., tí kostnaðurin av at gera skipanina er stórur, og upphæddirnar vera ov smábýttar.

***Nr. 7: Sjálvboðin uppsparing yvir 15 %***

Sjálvboðin uppsparing yvir 15% ella 80.000 kr./ár verður eisini nevnd frí uppsparing. Henda eyka uppsparing er súla 3, sí mynd 5.

Tveir høvuðsmunir eru millum lógarbundnu uppsparingina og sjálvbodnu uppsparingina:

1. Í fyrsta lagi kunnu upp til 20 prosent av uppsparingini gjaldast út í einum sum kapitalútgjald.

2. Í øðrum lagi er einki krav um, at ein partur av uppsparingini skal nýtast at tekna eina lívlanga veiting. Tað sum ikki er goldið út í einum, kann alt gjaldast út sum ein ratueftirløn. Tað er tó eisini møguligt at tekna eina lívlanga veiting, um uppspararin ynskir tað.

Kapitalútgjaldið fyri sjálvbodnu eftirlønina er sett til 20%, sum er hægri enn tey 10% fyri lógarbundnu eftirlønina. Orsøkin er, at um møguleikin fyri einum hægri kapitalútgjaldi kann tilskunda fólki til at spara eyka upp í ratueftirløn og lívlanga veiting, so gagnar tað landskassanum. Tað er tó ein fyritreyt, at kapitalútgjaldið ikki er ov stórt og at tað verður skattað á hóskandi hátt, so landskassin ikki fær undirskot av kapitalútgjaldinum.

Mælt verður til, at tað verður møguligt at fáa eitt kapitalútgjald uppá í mesta lagi 20% av kapitalvirðinum av uppspardu sjálvbodnu eftirlønini, og at kapitalútgjaldið verður skattað við 45 %.

### *9.4.3 Gamlar eftirlønaruppsparingar*

Broytingarnar í pensjónsskipanini fáa virkna frá tí nýggju lógirnar er settar í gildi, ætlandi 1. januar 2010. Pensjónsinngjøld, sum eru goldin inn til og við 2009, hava tí sama status sum frammanundan, til dømis vera skattasatsir og útgjaldstíðarskeið verandi soleiðis sum tey vóru, tá pensjónsgjaldið var inngoldið. Pensjónsnýskipanin fær bert virkna fyri tær pensjónsinngjaldingar, sum fara fram frá og við 1. januar 2010.

### *9.4.4 Serligt undantak fyri tænastumenn*

Tænastumenn hava eina pensjónsskipan, sum er sera góð. Tí er ikki neyðugt, at teir gjalda inn til lógarbundnu eftirlønaruppsparingina. Tí mugu arbeiðsgevarar, sum hava tænastumenn í starvi hvørt ár upplýsa TAKS p-talið hjá hesum persónum. Tænastumenn sleppa frá at gjalda til eftirløn so leingi, sum teir eru í tænastumanna-starvi.

### 9.4.5 Íløgureglur

Reglurnar sum í dag galda, tá ein einstaklingur ger íløgur sjálvur ella gjøgnum puljur eru ikki nóg góðar. Fyri at minka um vandan fyri at ein persónur kann missa ein stóran part av síni eftirlønaruppsparing orsakað av ov stórum váðafýsni, mælir pensjónsbólkurin til at gera hesar reglur fyri tær eftirlønaríløgur, sum ein persónur ger sjálvur ella gjøgnum puljur:

1. Hámark verður sett fyri partabrævapartin. Hámarkið minkar so hvørt sum uppspararin nærkast pensjónsaldrinum.
2. Partabrævaíløgan skal vera spjadd á fleiri partabrøv.
3. Partabrævaíløgan skal vera spjadd á vinnusektorar.

Útgreinaðu íløgureglurnar síggjast í appendix 3. Viðmerkjast skal, at íløgureglurnar bert fara at ávirka ein lítlan part av pensjónsuppspararunum. Meginparturin av pensjónsuppspararunum fer framhaldandi at hava sína eftirlønaruppsparing í eftirlønarfeløgum og eftirlønargrunnum, har munandi meir nágreiniligar lógir og reglur eru galdandi.

# 10 Búskaparliga ávirkanin av pensjónsnýskipanini

Avleiðingarnar av einki at gera er sum greitt frá í fyrstu kapitlunum:

- Um eingi tiltøk vera framd, so veksa eldraútreiðslurnar úr 10 % upp í 20 % av BTÚ. Um BTÚ er sett til 13 mia. kr. svarar hetta til eitt hall á fíggjarlógini á 350 mió. kr. árliga í 2020, vaksandi til 1.300 mió. kr. árliga í 2050.
- Um eingi tiltøk vera framd, so økist skattatrýstið upp frá umleið 50 % av BTÚ og upp móti 60 % av BTÚ.
- Um skattatrýstið verður sett so langt upp, at tað almenna kann røkja sínar skyldur, so fer hetta at føra til fráflyting.
- Tað almenna fer ikki at kunna røkja sínar skyldur, m.a. at gjalda pensjónir og at taka sær av teimum eldru, og heldur ikki at kunna røkja aðrar almennar uppgávur.

Fyri at broyta hesa gongd, verður mælt til at gjøgnumføra tey tiltøk, sum eru útgreinað í kapitli 9. Í talvu 25 niðanfyri er sett eitt yvirlit yvir broytingarnar.

*Talva 25: Yvirlit yvir uppskot til broytingar av pensjónsskipanini.*

| | Nr. | Broytingar |
|---|---|---|
| **Súla 1: Almannapensjón** | 1 | Leggja viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman |
| | 2 | Leggja grundupphædd og viðbót saman til eina fólkapensjón |
| | 3 | Gera allar almannapensjónir skattskyldugar, men geva ein frádrátt í skattinum |
| | 4 | Broyta mótrokning í almannapensjónini í mun til aðra inntøku |
| | 5 | Javna almannapensjónir við lønarjavning minus 1% |
| | 6 | Livitíðarindeksera pensjónsaldurin |
| **Súla 2 og 3: Lógarbundin og frí uppsparing** | 1 | 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn o.a. |
| | 2 | Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til uppsparing |
| | 3 | Útgjald frá almenna pensjónsaldrinum |
| | 4 | Í mesta lagi 10 % kapitalútgjald |
| | 5 | Helvt um helvt av restini til lívlanga veiting og ratueftirløn |
| | 6 | Undantak fyri smáar eftirlønaruppsparingar |
| | 7 | Sjálvboðin uppsparing yvir 15 % |

Tilsamans geva tiltøkini minni útreiðslur og øktar inntøkur á fíggjarlógini frá:

1. Økt persónlig uppsparing: Skattur og mótrokning.
2. Hækking av pensjónsaldri.
3. Javning av pensjónum við lønarhækkingin minus 1%.
4. Samvariatión millum 2 og 3. (Teknisk korrektión.)

Niðanfyri verður greitt nærri frá, hvussu tiltøkini ávirka inntøkur og útreiðslur landskassans.

### *Til 1. Økt persónlig uppsparing: Skattur og mótrokning:*

Tað er í dag bert møguligt at mótrokna í viðbótini, sum er góð 30 prosent av samlaðu almannapensjónunum. Við at leggja saman grundupphædd og viðbót til eina fólkapensjónsupphædd, sum mótroknast kann í, verður møguligt at mótrokna í størri parti av almannapensjónini. Mótroknast kann ikki í SAMEG. Størra uppsparingin ger, at sum frá líður fara tey flestu at hava eina góða persónliga eftirlønaruppsparing. Persónlig eftirlønar-uppsparing kann mótroknast í fólkapensjónini, og hetta ger, at útreiðslurnar til almanna pensjónir ikki fer at veksa so skjótt. Persónliga eftirlønin er skattskyldug inntøka og fer sum frá líður at geva landskassanum skattainntøkur. Persónligu eftirlønaruppsparinginar fara sum frá líður at vera so góðar, at tað verður møguligt at krevja brúkaragjøld fyri ávísar almennar tænastur. Nettoútreiðslurnar til hesar útreiðslur kann tí gerast nakað minni enn annars.

Tilsamans er roknað við, at almennu útreiðslurnar minka við eini upphædd, sum svarar til 50% av árliga útgjaldinum av persónligari eftirløn. Tey 50% stava frá øktari mótrokning og skatti av eftirlønarútgjøldunum. Eingin inntøka frá møguligum brúkaragjøldum er innroknað.

Sum heild vísir hetta, at uppsparda pensjónin í størri og størri mun kemur í staðin fyri ein part av fólkapensjónini.

### *Til 2. Hækking av pensjónsaldri:*

Hækkar pensjónsaldurin, so verður talið av fólkapensjónistum minni, og tískil veksa útreiðslurnar til almanna-pensjónir ikki so skjótt sum annars. Skattainntøkurnar hækka, tí fólk arbeiða eitt tíðarskeið aftrat. Roknað er við at fólk arbeiða hálva tíð í tíðini, sum kemur aftrat arbeiðslívinum.

### *Til 3. Javning av pensjónum við lønarhækkinging minus 1%:*

Stórur munur er á, um almannapensjónirnar verða framskrivaðar við prísjavning, lønarjavning ella við einum javningarsatsi, sum liggur har í millum. Lønarjavning minus 1 prosent ger, at pensjónsútreiðslurnar ikki vaksa eins nógv og við lønarjavning.

*Talva 26: Pensjónsútreiðslur við lønarjavning og við lønarjavning minus 1%.*

| | Lønarjavnað | | Lønarjavnað minus 1% | |
|---|---|---|---|---|
| | Pensjónir | % av BTÚ | Pensjónir | % av BTÚ |
| **2009** | 577 | 4,44 | 577 | 4,44 |
| **2010** | 611 | 4,52 | 605 | 4,48 |
| **2020** | 1.091 | 5,65 | 981 | 5,08 |
| **2030** | 1.909 | 7,12 | 1557 | 5,81 |
| **2040** | 3.167 | 8,79 | 2344 | 6,50 |
| **2050** | 4.553 | 9,01 | 3058 | 6,05 |




*Mynd 11: Munurin millum strikurnar vísir, hvønn týdning tað hevur fyri útreiðslurnar til almenna pensjón, um ein nýtir lønarjavning, prístalsjavning ella lønarjavning minus 1%.*

Verandi lóggáva hevur 3 prosent javning av pensjónum, uttan mun til hvussu gongdin er í prísum og lønum.

Lønarjavning minus 1 prosent gevur sjálvandi minni javning enn full lønarjavning, hinvegin gevur hon vanliga meir enn prísjavning upp á longri sikt.

### *Til 4. Samvariatión millum 2 og 3:*

Bæði hækkaði pensjónsaldurin og lønarjavningin minus 1 prosent føra til, at pensjónsútreiðslurnar ikki veksa so skjótt sum annars. Fyri ikki at rokna tað somu sparingina tvær ferðir, er neyðugt at seta ein rættingarfaktor inn Hetta er tað sum er gjørt í punkt 4.

## 10.1 Yvirlit yvir útreiðslugongd við og uttan tiltøk

Talva 27 og mynd 12 niðanfyri vísa, hvussu gongdin verður í eldraútreiðslunum við og uttan tiltøk.

*Talva 27: Yvirlit yvir gongdina í eldraútreiðslunum við og uttan tiltøkini í pensjónsnýskipanaruppskotinum.*

| | Eldraútreiðslur uttan tiltøk | | 1. Økt uppsparing: Skattur og mótrokning | | 2. Hækka pensjónsaldur | | 3. Lønarjavning minus 1% | | 4. Samvariatión millum 2 og 3 | | Eldraútreiðslur eftir tiltøk 1-4 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | % av BTÚ |
| 2009 | 1.244 | 9,57 | 0 | - | 0 | 0,00 | 0 | - | 0 | - | 1.244 | 9,57 |
| 2010 | 1.266 | 9,74 | 0 | - | 0 | 0,00 | 6 | 0,04 | 0 | - | 1.261 | 9,70 |
| 2020 | 1.584 | 12,18 | 20 | 0,16 | 71 | 0,55 | 74 | 0,57 | 5 | 0,04 | 1.423 | 10,95 |
| 2030 | 1.995 | 15,34 | 92 | 0,71 | 143 | 1,10 | 171 | 1,31 | 21 | 0,17 | 1.611 | 12,39 |
| 2040 | 2.461 | 18,93 | 217 | 1,67 | 205 | 1,58 | 297 | 2,28 | 46 | 0,36 | 1.789 | 13,76 |
| 2050 | 2.524 | 19,42 | 329 | 2,53 | 231 | 1,77 | 385 | 2,96 | 68 | 0,53 | 1.648 | 12,68 |




*Mynd 12: Yvirlit yvir gongdina í eldraútreiðslunum við og uttan tiltøk.*

Verða eingi tiltøk framd, so veksa eldraútreiðslurnar úr 9,6 prosentum upp í 19,4 prosent av BTÚ. Verður roknað við einum BTÚ, sum tað er nú, nevniliga 13 mia. kr., so svarar hetta til, at hallið á fíggjarlógini økist við 1.300 mió. kr.

Uttan tiltøk má skattatrýstið setast so langt upp, at tað førir til fráflyting, og harvið verða enn færri arbeiðsfør í Føroyum.

Tað almenna fer ikki at kunna røkja sínar skyldur, m.a. at gjalda pensjónir og at taka sær av teimum eldru, og heldur ikki at røkja aðrar almennar uppgávur.

Verður uppskotið samtykt sum tað er, so verður útreiðsluvøksturin tálmaður munandi. Í staðin fyri at veksa til 19,4 prosent av BTÚ, veksa eldraútreiðslurnar bert til 12,7 prosent av BTÚ. Verður roknað við einum BTÙ sum tað nú er, so svarar hetta til, at hallið á fíggjarlógini bert hækkar við 400 mió. kr.

Verður pensjónsnýskipanaruppskotið samtykt, sum tað er, loysir tað sostatt 70 prosent av fíggingartrupulleikunum, ið stava frá vaksandi talinum av eldri fólki.

Sum nevnt fleiri ferðir, er hetta eitt samlað uppskot. Tað er neyðugt at øll tiltøkini í uppskotinum verða framd. Partar av uppskotinum kunnu tí ikki verða tiknir burturúr, uttan at onnur tiltøk verða framd, ið tryggja eina eins stóra tálman av útreiðslunum og hetta uppskotið.

Verður hinvegin uppskotið samtykt sum tað er, so fer landskassin eisini í framtíðini at hava ráð bæði til veksandi tal av eldri, og at veita góðar vælferðartænastur og almannapensjón til tey, ið hava hana fyri neyðini.

# Appendix 1: Fyritreytir fyri fólkaframskriving

Fólkasamansetingin á ung og gomul fer at broytast í stórum:
Eins og í grannalondum okkara fer fólkasamansetingin í Føroyum uppá aldursbólkar at broytast stórliga næstu árini. Talið av eldri fólki fer at vaksa sera nógv, meðan talið av yngri og miðaldrandi fólki sum heild verður óbroytt.

Fleiri orsøkir eru til hesa gongd. Tríggir høvuðsfaktorar ávirka gongdina í og samansetingina av samlaða fólkatalinum í einum landi: burðartíttleikin, deyðstíttleikin (livitíðin) og flytingarmynstri.

Broytingar í burðartíttleikanum:
Fyrsti faktorurin er burðartalið. Burðartíttleikin minkaði við umleið 30 prosentum frá 50árunum til miðskeiðis í 80árunum. Síðan hevur burðartíttleikin verið rættiliga støðugur. Aðrastaðni í Vesturheiminum er burðartíttleikin væl lægri enn í Føroyum, men enn eru eingin greið tekin um lægri burðartíttleika. Roknað er tí við miðalburðartíttleikanum seinastu 25 árini.

Broytingar í deyðstíttleikanum og væntað longd livitíð:
Annar faktorurin er aldurstreytaðu deyðstíttleikarnir, sum siga um hvussu sannlíkindini eru fyri at ein persónur í ávísum aldursbólki fer at doyggja í næsta árinum. Verða hesi tøl umroknað geva tey ein ávísan miðallivialdur. Miðallivialdurin ávirkast nógv av lívsháttinum hjá fólki sum heild og av heilsufrøðiligum framstigum. Restlivitíðin hjá 60 ára gomlum er økt við 3 árum seinastu 30 árini, úr 19 árum uppí 22 ár. Hetta merkir, at 60 ára gamlir føroyingar í 1970árunum kundu rokna við at gerast 79 ár, meðan teir nú kunnu rokna við at gerast 82 ár.

Tað er sjálvandi verri at meta um hvussu restlivitíðin fer at økjast í framtíðini. Heilsufrøðiliga menningin hendir oftani ikki spakuliga, men í lopum, tá nýggir heilivágir og viðgerðir sum kunnu leingja um livitíðina, verða funnin. Felags fyri kanningar í Norðurlondum og ES er tó, at roknað verður við, at restlivitíðin hjá 60 ára gomlum økist við einum ári, fyri hvørji 10 ár sum ganga.

Í hesum álitið verður roknað við somu øking í livitíðini sum í Vestureuropa sum heild. Hetta merkir, at 60 gomul í dag kunnu rokna við at gerast 82 ára gomul, men umleið 2050 kunnu tey rokna við at gerast 86-87 ár.

Til- og fráflyting søguliga sæð og í framtíðini:
Triði faktorurin er til- og fráflyting. Føroyska flytingarmynstrið hevur í tíðini eftir kríggið verið rættiliga nógv merkt av, um talan hevur verið um búskaparliga framgongd ella afturgongd, við tilflyting í tíðum við framgongd og fráflyting í tíðum við afturgongd. Undantøk eru kortini, m.a. hava Føroyar havt hákonjunktur í seinastu árini, men kortini hevur fráflytingin verið størri enn tilflytingin.

Sæð yvir eitt longri tíðarskeið hevur nettofráflytingin verið stór. Síðan 1950árini eru útvið 8000 føroyingar fluttir av landinum uttan at koma heimaftur. Flytingingarmynstrið hjá Føroyum líkist tí hjá londum, sum hava stórt burðaravlop uttan samsvarandi høgan vøkstur í búskapinum. Tey ringu árini er stór fráflyting, meðan tey góðu árini er ein lítil tilflyting ella umleið eins stór tilflyting sum fráflyting. Í tíðini eftir 1950 hevur nettofráflytingin hevur verið 140 fólk um árið.

Vanligar altjóða fólkaflytingar – t.e. flóttaflytingar undantiknar – stava í sera stóran mun frá, at fólk vænta sær betri fíggjarlig livikor í landinum tey flyta til, enn í tí landinum tey flyta frá. Fólkaflytingar millum Føroyar og Danmark fylgja sama mynstri. Um danska livistøðið fer ov langt upp um tað føroyska, so førir tað til fólkaflyting úr Føroyum. Er hinvegin munurin millum føroyska og danska livistøðið lítil, so byrja fólk at flyta til Føroya.

At talan er um eina rættiliga støðuga fráflyting úr Føroyum, sæð yvir eitt longri áramál, kemst av hvussu gongdin hevur verið bæði í búskaparvøkstri og í burðartíttleika.

Síðan fyrst í 60árunum hevur búskaparvøksturin verið umleið eins stórur í Føroyum sum í Danmark, helst eitt sindur størri. Kortini hevur fráflytingin úr Føroyum verið sera stór. Ein høvuðsorsøk til hetta er, at burðartíttleikin hevur verið nógv størri í Føroyum enn í Danmark, og at føroyski búskapurin hevur ikki skapt nóg nógv nýggj arbeiðspláss til uppvaksandi ættarliðið.

Sum áður nevnt er tað eitt vanligt mynstur í altjóða flytingum, at fólk flyta úr londum við stórum burðaravlopið til lond við minni burðaravlopi. Írland og England og somuleiðis Mexico og USA er vælkend dømi um hetta. Orsøkirnar eru tvinnar og ofta samanhangandi. Um fólkavøksturin er stórur í einum landi, er tað ofta torførari at

fáa arbeiði. Hjá nógvum er lættari ella kanska neyðugt at flyta av landinum fyri at fáa arbeiði. Hin orsøkin er, at um tvey lond hava sama búskaparvøkstur so fær landið við lítlum fólkavøkstri ein skjótari vøkstur í BTÚ pr íbúgva. Tískil verður ein fólkaflyting til ríkara landið.

Fortreytir fyri meting um fólkaflyting:
Metingin um fólkaflytingina úr Føroyum komandi árini byggir á tvær fortreytir. Onnur er, at búskaparvøksturin er tann sami í Føroyum sum í grannalondunum, har serliga verður hugsað um Danmark. Hin fortreytin er, at burðartíttleikin framvegis verður nakað størri í Føroyum enn í Danmark.

Um burðaravlopið í Føroyum verður størri enn í Danmark, so verður BTÚ pr. íbúgva í Føroyum lægri enn í Danmark. Fólk byrja tá at flyta úr Føroyum inntil BTÚ pr. íbúgva er komið á umleið sama støði sum frammanundan.

Sum nevnt hevur fráflytingin verið 140 fólk um árið í tíðini eftir 1950. Í fólkaframskrivingini er roknað við at 75 fólk netto flyta úr Føroyum um árið. Við hesi flyting verður vøksturin í BTÚ pr. íbúgva tann sami í Danmark sum í Føroyum og samlaði fólkavøksturin íroknað fólkaflyting verður umleið tann sami í Føroyum sum í Danmark.

Orsøkin til at roknað verður við eini nógv minni fólkaflyting enn undanfarin ár er serliga, at burðaravlopið í Føroyum ikki longur er so nógv størri enn í Danmark.

# Appendix 2: Fyritreytir fyri útrokningunum

Sum grundarlag fyri øllum framrokningum av eldraútreiðslunum, bæði pensjónum og røktartænastum, eru brúktar nakrar felags fyritreytir um framtíðar búskaparvøksturin og framleidnið (produktivitetin). Niðanfyri verður stutt greitt frá hesum fyritreytum.

*Talva 28: Í framskrivingini er roknað við hesum fortreytum.*

| Variabul | Fyritreyt |
|---|---|
| Produktivitetsvøkstur | 2 % |
| Prísvøkstur | 1,5 % |
| Lønarvøkstur | 3,5 % |
| Prísvøkstur hjá almennum vørukeypi | 3,5 % |

Árligi produktivitetsvøksturin er settur til 2 %, tí ídnaðarlond seinastu 20 árini hava havt ein produktivitetsvøkstur á umleið 2 % árliga.

Árligi prísvøksturin er settur til 1,5 %, tí prísvøksturin ofta er um 2 % í framkomnum londum. Hendan fyritreyt er tó uttan týdning, tí úrslitini eru tey somu uttan mun til hvønn prísvøkstur, vit áseta.

Árligi lønarvøksturin er settur til 3,5 %, so at reallønarvøksturin gerst 2 % árliga. Ein rættiliga vanlig fortreyt í búskapi er, at lønarparturin av BTÚ er rættiliga støðugur. Um produktivitetsvøksturin er 2 % árliga, so førir ein reallønarvøkstur uppá 2 % til, at lønarparturin av BTÚ verður óbroyttur.

Prísvøksturin á almennum vørukeypi er settur til 3,5 %, tað sama sum útreiðslurnar annars. Henda fortreyt er torfør at meta um, men vanliga verður hildið, at prísvøksturin á almennum vørukeypi má metast at fara at vera nakað skjótari enn vanligi prísvøksturin, millum annað tí heilivágur er í hesum bólki.

Úrslitið av hesi framrokning er víst í talvu 8.

Í 2009 vóru eldraútreiðslurnar útvið 10 prosent av BTÚ. Við verandi útreiðslustrukturi koma eldraútreiðslurnar uppá 15 prosent umleið 2030, og fara síðan at liggja um tey 20 prosentini av BTÚ.

# Appendix 3: Íløgureglur

**Reglurnar galda fyri:**
Eftirlønaruppsparing sum hevur fingið skattafrádrátt eftir rentutryggingarlógini.

Reglurnar eru ikki galdandi fyri uppsparing har aðrar íløgureglur eru galdandi , t.d. hjá lívstryggingarfeløgum og eftirlønarkassum.

Reglurnar eru sostatt galdandi fyri eftirlønaruppsparing sum er sett í puljur, og eftirlønaruppsparing sum er støðlað av uppspararanum sjálvum.

## 1. Felagsreglur fyri íløgur í puljur og einstaklingaíløgur, sum fíggjarstovnar handhevja.

**1.1. Partabrævapartur:**
Partabrævaparturin minkar so hvørt uppspararin verður eldri. Hægst loyvdi partabrævaparturin er ásettur í niðanfyristandandi talvu:

| Aldur | Partabrævapartur i % |
|---|---|
| -34 | 80 |
| 35-44 | 70 |
| 45-49 | 60 |
| 50-54 | 55 |
| 55-59 | 50 |
| 60-64 | 35 |
| 65-69 | 25 |
| 70- | 15 |

**1.2. Rebalansering:**
Rebalanserað verður, hvørja ferð virðisbrøv verða keypt. Inntil 59 ára aldur verður ikki kravt, at uppspararin selur burturav partabrøvunum, um so er, at partabrævaparturin er omanfyri hámarkið. Rebalanserað verður við, at íløgur bert verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabrævaparturin er komin niður um hámarkið.

Áðrenn uppspararin fyllir ávikavist 60 og 65 og 70 ár, rebalanserar hann í samráð við fíggjarstovnin íløgurøðina. Um tað er neyðugt, verður hetta gjørt við at selja partabrøv fyri at koma niður á hægst loyvda partabrævapartin.

## 2. Reglur fyri einstaklingaíløgur, sum fíggjarstovnar handhevja.

**2.1. Íløgur í partabrøv:**
Íløgur kunnu bert gerast í børsskrásett partabrøv.

**2.2. Íløgur í lánsbrøv:**
Íløgur kunnu bert gerast í lánsbrøv, sum hava investment grade kredittmeting.

**2.3. Hámark fyri íløgu í einum partabrævi:**
Partabrævaíløgan skal vera spjadd á fleiri partabrøv. Setast kunnu í mesta lagi 20 % av samlaðu íløgunum í sama partabræv, tó altíð upp til 50 tús. kr.

**2.4. Handil við egnari íløgurøð:**
Allur handil við egnari íløgurøð skal fara fram gjøgnum ráðgeva uppspararans. Udelukkende ordreudførelse ”Execution only” sambært §19 í ”Bekendtgørelse for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel” sum kemur í gildi 1. januar 2010 verða ikki loydir.

**2.5. Ráðgeving um íløgureglur:**
Fíggjarstovnarnir ráðgeva uppspararanum um íløgureglurnar fyri eftirlønaruppsparing, serliga reglurnar um:
1) hámark fyri partabrævapart
2) hámark fyri íløgu í einstakt partabræv
3) hámark fyri íløgu í einstøkan sektor

**2.6. Generel ráðgeving:**
Fíggjarstovnarnir ráðgeva um fyrimunirnar við at spjaða íløgurnar á fleiri sektorar og vinnugreinar.

Fíggjarstovnarnir ráðgeva annars sambært galdandi reglur.

## 3. Reglur um einstaklingaíløgur, sum TAKS hevur eftirlit við.

**3.1. Spjaðing á sektorar:**
Partabrævaíløgan skal verða spjadd á sektorar. Setast kunnu í mesta lagi 20 % av samlaðu íløguni í sama sektor, tó altíð upp til 50 tús. kr.

# Appendix 4: Dekningsgradir

Dekningsgradir av skattafíggjaðari pensjón og uppsparingsfíggjaðari eftirløn 2008-2050.

*Talva 29: Samanseting av skattafíggjaðari pensjón og uppsparingsfíggjaðari eftirløn hjá arbeiðara í prosent av endaløn, eftir pensjónsnýskipani. (2008 tøl).*

| | 2008 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Pensjónistur uttan eftirlønaruppsparing:**<br>Skattafíggjað pensjón | 76 | 67 | 60 | 54 | 49 |
| **Pensjónin fyrstu 10 árini:**<br>Skattafíggjað pensjón<br>+ lívlang veiting<br>+ 10 ára ratueftirløn<br>- mótrokning | 76 | 72 | 72 | 73 | 74 |
| **Pensjónin eftir 10 ár:**<br>Skattafíggjað pensjón<br>+ lívlang veiting<br>- mótrokning | 76 | 69 | 65 | 62 | 60 |

*Talva 30: Samanseting av skattafíggjaðari pensjón og uppsparingsfíggjaðari eftirløn hjá miðalløntakara í prosent av endaløn, eftir pensjónsnýskipani. (2008 tøl).*

| | 2008 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Pensjónistur uttan eftirlønaruppsparing:**<br>Skattafíggjað pensjón | 59 | 52 | 47 | 42 | 38 |
| **Pensjónin fyrstu 10 árini:**<br>Skattafíggjað pensjón<br>+ lívlang veiting<br>+ 10 ára ratueftirløn<br>- mótrokning | 59 | 57 | 59 | 61 | 63 |
| **Pensjónin eftir 10 ár:**<br>Skattafíggjað pensjón<br>+ lívlang veiting<br>- mótrokning | 59 | 54 | 52 | 51 | 49 |

Í 2008 hevur ein pensjónistur uppsparda eftirløn, men so hvørt sum lógarbundna persónliga uppsparingin veksur, so broytist samansetingin, so persónliga eftirlønin verður ein lutfalsliga størri partur og almannapensjónin ein lutfalsliga minni partur av samlaðu pensjónini.

Fyritreytir fyri útrokninginar í tavlu 29 og 30:

| | |
|---|---|
| Arbeiðaraløn, 2008: | 200.091 kr. |
| Miðalløntakaraløn, 2008: | 256.800 kr. |

| | |
|---|---|
| Uppsparing: | 10 % |
| Lívlang veiting: | 5 % |
| Árlig reallønarhækking: | 2 % |
| Árlig real fólkapensjónshækking: | 1 % |
| Mótrokning í fólkapensjónsviðbót: | 25 % |